| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 4.844 | 4.420 | 5.150 | 5.450 | 5.450 | 5.450 |
| Útreiðslur | 4.844 | 4.420 | 5.150 | 5.450 | 5.450 | 5.450 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 4.844 | 4.420 | 5.150 | 5.450 | 5.450 | 5.450 |
| **Útreiðslur** | **4.844** | **4.420** | **5.150** | **5.450** | **5.450** | **5.450** |
| 11. Lønir v.m. | 4.203 | 3.677 | 4.150 | 4.450 | 4.450 | 4.450 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 479 | 565 | 800 | 800 | 800 | 800 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 21 | 18 | 40 | 40 | 40 | 40 |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 0 | - | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 140 | 159 | 160 | 160 | 160 | 160 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 4,5 | 4,0 | 4,0 | 4,0 | 4,0 | 4,0 |
| Fulltíðarstørv | 5,5 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 4,2 | 3,7 | 4,2 | 4,5 | 4,5 | 4,5 |

Viðmerkingar

# § 2 Løgmansfyrisitingin

## Felagsútreiðslur

### 2.11.1. Fyrisiting

#### 2.11.1.02. Løgmansskrivstovan (Rakstrarjáttan)

Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni og varðar av stjórnarmálum og nøkrum almennum feløgum. Høvuðsendamálið hjá Løgmansskrivstovuni er at veita løgmanni ráð, tryggja haldgott grundarlag og gera hugskot til veruleika á nevndu málsøkjum.

**Stjórnarmál** fevna um tær uppgávur, sum løgmanni eru tillutaðar samsvarandi stýrisskipanini. Tey kunnu greinast soleiðis:

- Stýrisskipanarviðurskifti, ríkislógir og slíkt, sum ikki hoyrir til annað stjórnarráð
- Samskipa virksemið hjá landsstýrinum og millum stjórnarráðini
- Uppfylging av samgonguskjalinum og málum, sum landsstýrið hevur sett sær fyri at fremja
- Eftirlit við landsstýrismonnum
- Menningartiltøk, sum t.d. nýskipan í almenna bygnaðinum, fjølmiðla- og kunningarpolitikkur og norðurlendsk tænastumannaumbýti
- Standa fyri og samskipa arbeiði og verkætlanir, ið fevna um ábyrgdarøki hjá fleiri landsstýrismonnum, og sum hava stóran politiskan, fyrisitingarligan og/ella samfelagsligan týdning
- Yvirtøkumál
- Ovasta umboð Føroya heima og í útlondum

**Feløg og grunnar**, har løgmaður hevur heimildir landsstýrisins, eru:

- BankNordik P/f
- Elektron P/f
- Eystur- og Sandoyartunlar P/f
- Tryggingarfelagið LÍV P/f
- Føroyagrunnurin frá 1971, vinnurekandi grunnur
- Norðoyatunnilin P/f
- Norðuratlantsbryggjan, vinnurekandi grunnur
- Smyril Line P/f
- Suðuroyartunnil P/f
- Vágatunnilin P/f
- Føroya Realkreditstovnur, almennur grunnur
- Íleggingargrunnurin fyri Føroyar, danskur almennur grunnur

Í august 2023 er avtala gjørd við P/F Fakfelag sambært sáttmála frá 2015 um at keypa síðstu 16,7% av partabrøvunum hjá landinum í Tryggingarfelagnum LÍV. Eftir ætlan verða partabrøvini hjá landinum í Smyril Line seld í 2023.

Løgmaður varðar av ognum landsins í Tinganesi og á Reyni.

## Undirkonta 35. Felagsfyrisitingin í Tinganesi

Løgmansskrivstovan veitir øðrum stjórnarráðum tænastur við felags móttøku og telefonmóttøku umframt við felags fundarhølum og felags matstovu fyri stjórnarráðini á Tinganesleiðini. Hini stjórnarráðini endurrinda ein part av útreiðslunum. Afturat hesum ber Løgmansskrivstovan útreiðslur til smærri viðlíkahald og útreiðslur til vasking fyri stjórnarráðini, ið halda til í Tinganesi. Haraftrat eru allar el- og oljuútreiðslurnar umframt tryggingargjøld av bygningunum á Tinganesleiðini og inntøkur av nøkrum leigumálum.

### Játtanin

Løgtingið hevur við uppskoti til samtyktar, løgtingsmál nr. 120/2021, heitt á landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið uppskot til løgtingslóg um føroyskt heiðurstekin at lata persónum fyri merkisvert arbeiði ella gerning, ið gagnar landi og fólki og tænir Føroyum. Løgmansskrivstovan hevur játtan fram til og við 2024 til tað arbeiðið.

Umframt lønarframskriving og krav um tillagaðan rakstur verður játtanin hækkað 100 tús. kr. til at samsýna nevndini, sum ásett í løgtingslóg nr. 77 frá 6. mai 2003 um at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m.

### Átekning

Landsstýrismanninum verður heimilað at gera grøna orkuloysn til upphiting av bygningunum í Tinganesi saman við øðrum pørtum í økinum, at gera avtalu, felag ella aðra fyriskipan við hesum pørtum um býtið av útreiðslum av íløgu og rakstri, umframt saman áseta, hvørjar treytir, herundir fíggjarligar, skulu galda fyri aðrar partar, sum seinni gerast partur av somu felags orkuloysn.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 15.552 | 15.239 | 12.547 | 12.843 | 12.293 | 12.939 |
| Útreiðslur | 17.764 | 17.294 | 14.242 | 14.508 | 13.958 | 14.604 |
| Inntøkur | 2.212 | 2.055 | 1.695 | 1.665 | 1.665 | 1.665 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 13.264 | 12.486 | 9.917 | 10.163 | 9.613 | 10.259 |
| **Útreiðslur** | **14.089** | **13.331** | **10.517** | **10.713** | **10.163** | **10.809** |
| 11. Lønir v.m. | 10.190 | 10.021 | 8.139 | 8.465 | 8.115 | 8.211 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 3.663 | 3.143 | 2.194 | 2.088 | 1.888 | 2.438 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 162 | 86 | 84 | 80 | 80 | 80 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 49 | 68 | 90 | 70 | 70 | 70 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 10 | - | 10 | 10 | 10 | 10 |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | 12 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 15 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **825** | **845** | **600** | **550** | **550** | **550** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *4* | *7* | - | - | - | - |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | - | *150* | *150* | *150* | *150* | *150* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *821* | *687* | *450* | *400* | *400* | *400* |

**35. Felagsfyrisitingin í Tinganesi**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 2.287 | 2.752 | 2.630 | 2.680 | 2.680 | 2.680 |
| **Útreiðslur** | **3.675** | **3.962** | **3.725** | **3.795** | **3.795** | **3.795** |
| 11. Lønir v.m. | 1.394 | 1.389 | 1.802 | 1.852 | 1.852 | 1.852 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2.085 | 2.371 | 1.708 | 1.708 | 1.708 | 1.708 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 33 | 11 | 60 | 60 | 60 | 60 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 49 | 51 | 40 | 40 | 40 | 40 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 14 | 14 | 15 | 15 | 15 | 15 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 100 | 125 | 100 | 120 | 120 | 120 |
| **Inntøkur** | **1.387** | **1.210** | **1.095** | **1.115** | **1.115** | **1.115** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *372* | *450* | *330* | *270* | *270* | *270* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *1.015* | *760* | *765* | *845* | *845* | *845* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 4,0 | 4,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |
| Onnur | 10,8 | 9,4 | 5,0 | 5,3 | 5,3 | 5,3 |
| Fulltíðarstørv | 14,8 | 13,4 | 8,0 | 8,3 | 8,3 | 8,3 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 10,2 | 10,0 | 8,1 | 8,5 | 8,1 | 8,2 |

**Starvsfólkayvirlit: 35 Felagsfyrisitingin í Tinganesi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,5 | 3,5 | 3,5 |
| Fulltíðarstørv | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,5 | 3,5 | 3,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 1,4 | 1,4 | 1,8 | 1,9 | 1,9 | 1,9 |

## 2.11.1.21. Umbygging í Tinganesi (Løgujáttan)

Játtanin er til at umbyggja, umvæla og skipa ognir landsstýrisins í Tinganesi sambært heildarætlanini fyri Tinganes. Endamálið við umbyggingini er m.a. at fáa Tinganes at koma til sín rætt í søgu, bygningum, uttanumøki, fornminni sum ferðavinnumál og sum hóskandi fyristingarkarm hjá landsins stjórn.

Flestu fyrireikingarnar á byggiplássinum eru gjørdar til at byrja at skifta stokkarnir í Stokkastovuni. Eftir er at gera eina skjalfestingarætlan, sum útlendsku serfrøðingarnir, sum eru knýttir at verkætlanini, skulu góðkenna, og síðani eina ítøkiliga arbeiðsætlan. Sjálvt arbeiði at skifta stokkarnir er mett at taka einar 4 mánaðir í 2023.

Ætlanin er at byrja umvæling av øðrum bygningi í Tinganesi, sum somu føroysku handverkarir skulu arbeiða við, tá steðgir eru í umvælingini av Stokkastovuni. Her verður hugsað um Kristnastovu ella Skansagarð. Endamálið við at hava aðra umvæling samstundis er at gagnnýta arbeiðsorkuna betur, tí umvælingin av Stokkastovuni má gerast við steðgum av og á.

Játtanin verður eisini nýtt til grøna orkuloysn til upphiting av bygningunum í Tinganesi. Ein partur av grønu orkuloysnini verður gjørdur saman við øðrum pørtum í økinum. Eitt skitsuprojekt er gjørt fyri eina sjógvhitaskipan, har sjógvinntak og brunnur eru felags fyri bygningarnir í Tinganesi og bygningin hjá Betri Kongabrúnni, og væntandi verða aðrir bygningar í økinum eisini knýttir uppí. Ætlanin er at bjóða verkætlanina út í 2023. Metti parturin hjá landinum av kostnaðinum er 4,5 mió. kr.

Í 2022 vórðu brúktar 1,9 mió. kr. Í 2023 vórðu játtaðar 5 mió. kr. Umframt framfluttar 2,6 mió. kr. vóru tí 7,6 mió. kr. tøkar í 2023. Nýtslan í 2023 verður mett til 3,3 mió.kr. Framfluttar verða sostatt 4,3 mió. kr. Játtanin fyri 2024 verður 5 mió. kr. Tøkar í 2024 verða sostatt 9,3 mió. kr.

## Átekning

Landsstýrismanninum verður heimilað at halda útreiðslur fyri 6,5 mió. kr. til umvæling av Stokkastovuni og at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 497 | 1.896 | 5.000 | 5.000 | 3.000 | 3.000 |
| **10. Umbygging** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **497** | **1.896** | **5.000** | **5.000** | **3.000** | **3.000** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -126 | -601 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 497 | 1.839 | 5.000 | 5.000 | 3.000 | 3.000 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 126 | 658 | - | - | - | - |

# Landsstýrið

## 2.12.3. Landsstýrið

### 2.12.3.01. Løgmaður og landsstýrið (Rakstrarjáttan)

Játtanin er til at gjalda løgmanni og landsstýrisfólkum løn o.a. sambært løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m., við seinni broytingum. Lógin ásetir, at fráfarin landsstýrisfólk hava rætt til til bíðipening. Lógin ásetir eisini, at landsstýrisfólk hava rætt til kostnaðarendurgjald, umframt at landið útvegar og rindar fyri allar neyðugar samskiftisútreiðslur.

Nýggj skipan varð sett í verk við løgtingslóg nr. 71 frá 19. mai 2014 um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. Ein broyting við nýggju skipanini var, at landsstýrisfólk, sum ikki frammanundan hava vunnið tænastumannaeftirløn eftir gomlu skipanini, nú í staðin fáa eftirlønargjald goldið á eftirlønarkontu. Tað hevur við sær, at útreiðslurnar vaksa so hvørt, sum nýggj landsstýrisfólk, sum ikki hava vunnið rætt til tænastumannaeftirløn eftir gomlu skipanini, verða tilnevnd.

Umframt lønarframskriving er játtanin lækkað 1,1 mió. kr., sum játtanin hækkaði við í 2023 í sambandi við, at løgtingsval var 8. desember 2022.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 7.447 | 9.305 | 11.300 | 10.620 | 10.620 | 10.770 |
| Útreiðslur | 7.447 | 9.305 | 11.300 | 10.620 | 10.620 | 10.770 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 7.447 | 9.305 | 11.300 | 10.620 | 10.620 | 10.770 |
| **Útreiðslur** | **7.447** | **9.305** | **11.300** | **10.620** | **10.620** | **10.770** |
| 11. Lønir v.m. | 7.447 | 9.258 | 11.300 | 10.530 | 10.530 | 10.680 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | 46 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | - | - | 90 | 90 | 90 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 7,0 | 7,0 | 9,0 | 9,0 | 9,0 | 9,0 |
| Onnur | 0,0 | 0,8 | 0,3 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Fulltíðarstørv | 7,0 | 7,8 | 9,3 | 9,0 | 9,0 | 9,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 7,4 | 9,3 | 11,3 | 10,5 | 10,5 | 10,7 |

# Uttanríkismál

## 2.13.1. Sendistovur

### 2.13.1.04. Norðurbryggjan í Keypmannahavn (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at stuðla virksemi at menna og breiða út kunnleikan til mentan og virkislív í útnorði.

Móttakari av játtanini er vinnurekandi grunnurin Norðurbryggjan í Keypmannahavn.

Stjórnirnar í Danmark, Íslandi, Grønlandi og Føroyum rinda hvør 500 tús. kr. árliga í beinleiðis stuðli. Av føroyska partinum rindar Løgmansskrivstovan 300 tús. kr. og Almanna- og mentamálaráðið 200 tús. kr.

Stuðulin verður útgoldin, tá ið Løgmansskrivstovan hevur fingið ársfrágreiðing og grannskoðaðan roknskap fyri undanfarna ár umframt fíggjar- og virksemisætlan fyri inniverandi ár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **300** | **300** | **300** | **300** | **300** | **300** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 |

# Lógarmál

## 2.14.1. Ymsar útreiðslur

### 2.14.1.02. Studningur til politiskt virksemi og upplýsing (Stuðulsjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 31 frá 6. mars 2003 um fíggjarligan stuðul til politiskt virksemi og politiska upplýsing er endamálið við játtanini at styrkja politiska arbeiðið og politiska upplýsing við at veita fíggjarligan stuðul, sum kann verða nýttur til at reka politiskar flokkar og til politiska virksemi teirra.

Upphæddin verður býtt millum flokkar og uttanflokkatingmenn eftir atkvøðutali seinasta løgtingsval. Peningurin kann m.a. verða nýttur til at reka politiskar flokkar, skeið- og fundarvirksemi og blaðútgávu í hesum sambandi.

Studningurin verður útgoldin mánaðarliga. Grundarlagið undir útgjaldinum er grannskoðaður roknskapur fyri undanfarna roknskaparár og váttan um, at stuðulsupphæddin er brúkt til ætlaða endamálið.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 4.800 | 4.800 | 4.800 | 4.800 | 4.800 | 4.800 |
| **01. Studningur til politiskt virksemi og upplýsing** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **4.800** | **4.800** | **4.800** | **4.800** | **4.800** | **4.800** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 4.800 | 4.800 | 4.800 | 4.800 | 4.800 | 4.800 |

# Handil og vinna annars

## 2.37.6. Útlán

### 2.37.6.11. Partabrøv, ymsi viðurskifti (Stuðulsjáttan)

Inntøkujáttanin er til at selja partabrøv hjá landinum, har mett er, at tað ikki er neyðugt, at landið eigur í feløgunum. Játtanin hevur ligið undir Fíggjarmálaráðnum, men er flutt til Løgmansskrivstovuna um ársskiftið 2022/2023 í sambandi við broytt málsøkjabýti. Játtanin hevur fevnt um sølu av partabrøvum hjá landinum í P/F Tjaldur og P/F Smyril-Line. Partabrøvini í Tjaldur vórðu seld i mars 2023.

Søluvirðið av partabrøvunum í Smyril-Line er mett til 79 mió. kr. út frá meting, sum Fíggjarmálaráðið hevur fingið í lag. Útreiðslurnar av ráðgeving o.ø. verða frádrignar søluupphæddini. Ætlanin er at fáa selt partabrøvini í 2023.

Eingin játtan er fyri 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | - | - | 79.000 | - | - | - |
| **01.Partabrøv - ymsi viðurskifti** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **79.000** | **-** | **-** | **-** |
| 85. Søla av virðisbrøvum | - | - | *79.000* | - | - | - |

# Samferðsla og samskifti

## 2.38.1. Vegir og havnir

### 2.38.1.12. Suðuroyartunnil, forkanningar og fyrireikingar (Løgujáttan)

Arbeitt verður við at fyrireika Suðuroyartunnilin. Ymiskir møguleikar fyri linjuføringum eru kannaðir. Ætlanin er at koma til eina niðurstøðu, har mælt verður til eina linjuføring, ið tekur hædd fyri kostnaði, trygd og framtíðar vegakervinum sum heild.

Jarðfeingi hevur gjørt eitt tilmæli til Landsverk um, hvørjar jarðfrøðiligar kanningar eiga at verða gjørdar fyri at hava eitt haldgott grundarlag undir, tá ið verkætlanin skal byrja. Jarðfrøðiligar kanningar eru gjørdar á landi. Harumframt eru mátingar gjørdar av havbotninum allan vegin millum Sandoy og Skúvoy, umframt sunnanfyri Skúvoy og norðanfyri Suðuroy.

Jarðfrøðiligu kanningarnar skulu gerast lidnar, trygdarspurningar viðvíkjandi farleiðini skulu avgreiðast, støða skal takast til linjuføring o.a. Í 2023 vórðu játtaðar 10 mió. kr. til endamálið, og mett verður, at øll játtanin verður brúkt í 2023. Játtanin í 2024 til endamálið er 10 mió. kr.

**Átekning**
Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 4.841 | 1.638 | 10.000 | 10.000 | - | - |
| **10. Suðuroyartunnil, forkanningar og fyrireikingar** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **4.841** | **1.638** | **10.000** | **10.000** | **-** | **-** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2 | - | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -853 | -198 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 4.841 | 1.638 | 10.000 | 10.000 | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 851 | 198 | - | - | - | - |

## 2.38.2. Samferðsla

### 2.38.2.25. P/F Eystur- og Sandoyartunlar (Stuðulsjáttan)

P/F Eystur- og Sandoyartunlar varð stovnað við heimild í løgtingslóg nr. 30 frá 14. apríl 2014 um at stovna partafelag og at byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy. Talan er um eina samlaða verkætlan. Endamálið er at binda føroyska samfelagið enn meira saman. Tað styttir um dagligu farleiðina hjá sera nógvum borgarum, betrar vinnumøguleikarnar og stimbrar búskaparvøkstur í Føroyum.

Eysturoyartunnilin er tilsamans 11,4 kilometrar langur, harumframt koma tilkoyringarvegir. Tunnilin knýtir eystara og vestara arm á Skálafjørðinum saman og er høvuðsfarleið millum Tórshavn, Skálafjørðin og norðurøkið. Høvuðstunnilin millum Hvítanes og rundkoyringina er 7,5 km., frá Rókini í Saltnesi oman til rundkoyringina er tunnilin 2,2 km., og frá Sjógv á Strondum til

rundkoyringina er tunnilin 1,7 km. Tunnilin styttir farleiðina millum Tórshavn og Runavík/Strendur frá 55 kilometrum til 17 kilometrar.

Farið varð undir at bora Eysturoyartunnilin í januar 2017, og varð tunnilin skotin ígjøgnum 7. juni 2019. Tunnilin lat upp fyri almennari ferðslu 19. desember 2020.

Sandoyartunnilin verður 10,8 kilometrar. Tunnilin gongur frá Traðadali millum Skopun og Sand og til Gomlurætt. Arbeiðið við at bora tunnilin gongur eftir ætlan. Sprongt varð ígjøgnum 3. februar 2022. Sandoyartunnilin letur sambært sáttmála við arbeiðstakaran upp fyri almennari ferðslu í desember 2023.

Eftir lógini um tunlarnar skal landið skjóta 400 mió. kr. inn sum partapening í felagið fram til og við 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | - | - |
| **01. P/F Eystur- og Sandoyartunlar** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **50.000** | **50.000** | **50.000** | **50.000** | **-** | **-** |
| 81. Keyp av virðisbrøvum | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | - | - |

## 2.38.2.28. Ferðsluveðhald til P/F Eystur- og Sandoyartunlar (Stuðulsjáttan)

Við heimild í § 5, stk. 4 í løgtingslóg nr. 30 frá 14. apríl 2014 um at stovna partafelag og at byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy, við seinni broytingum, veðheldur landið fyri minstuferðslu, sum ásett í fíggjarætlan hjá felagnum og í avtalu við veitararnar av láni til verkætlanina. Ferðsluveðhaldið verður goldið hálvárliga sambært uppgerð frá felagnum.

Enn er ferðslan í Eysturoyartunlinum minni enn mett í fíggjarætlanini hjá felagnum. Væntandi fer ferðslan gjøgnum Eysturoyartunnilin at vaksa so líðandi, soleiðis at veðhaldið bert verður effektivt í nøkur ár fram. Útreiðslurnar til ferðsluveðhaldið vóru 54,1 mió. kr. í 2022 og verða 47,2 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 40 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | - | 54.085 | 40.000 | 40.000 | 27.000 | 18.000 |
| **01. Ferðsluveðhald til P/F Eystur- og Sandoyartunlar** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **54.085** | **40.000** | **40.000** | **27.000** | **18.000** |
| 53. Stuðul til vinnu | - | 54.085 | 40.000 | 40.000 | 27.000 | 18.000 |

## 2.38.2.29. Ferðslustuðul til P/F Eystur- og Sandoyartunlar (Stuðulsjáttan)

Játtanin varð stovnað í 2022 og hevði sum endamál, at P/F Eystur- og Sandoyartunlar kundu lækka prísin fyri at koyra ígjøgnum Eysturoyartunnilin, og soleiðis at ferðslan møguliga kundi vaksa. Í mun til upprunaligu prísskipanina er bíligari at brúka tunnilin hjá teimum, sum koyra ofta.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | 7.000 | 7.000 | 7.000 | 7.000 | 7.000 |
| **01. Ferðslustuðul til P/F Eystur- og Sandoyartunlar** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **7.000** | **7.000** | **7.000** | **7.000** | **7.000** |
| 53. Stuðul til vinnu | - | 7.000 | 7.000 | 7.000 | 7.000 | 7.000 |

## 2.38.2.31. P/F Suðuroyartunnil (Stuðulsjáttan)

Í 2022 vórðu játtaðar 4 mió. kr. til at stovna P/F Suðuroyartunnilin. Løgmaður kann fyrireika uppskot til lóg um virksemið hjá felagnum. Ongin játtan er til endamálið í 2024, men ætlanin er at skjóta pening inn í felagið frá 2025 og frameftir.

Á høvuðskontu 2.38.1.12. eru 10 mió. kr. í 2023 og aftur í 2024 settar av til at gera forkanningar og fyrireikingar í sambandi við tunnilin.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | 4.000 | - | - | 100.000 | 100.000 |
| **01. P/F Suðuroyartunnil** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **4.000** | **-** | **-** | **100.000** | **100.000** |
| 81. Keyp av virðisbrøvum | - | 4.000 | - | - | 100.000 | 100.000 |

## 2.38.2.32. Rakstrarstuðul til P/F Eystur- og Sandoyartunlar (Stuðulsjáttan)

Játtanin er stovnað í 2024 og hevur sum endamál, at P/F Eystur- og Sandoyartunlar skulu hava møguleika at fáa stuðul úr landskassanum, eftir at sjóvegis flutningur millum Streymoynna og Sandoynna ikki longur eru útreiðsla í fíggjarlógini. Játtanin er partur av politisku semjuni frá 2014 og partur av løgtingslóg nr. 30 frá 14. apríl 2014 um at stovna partafelag at byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | - | - | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| **01. Rakstrarstuðul til P/F Eystur- og Sandoyartunlar** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **-** | **10.000** | **10.000** | **10.000** |
| 53. Stuðul til vinnu | - | - | - | 10.000 | 10.000 | 10.000 |

Viðmerkingar

# § 3 Fíggjarmál

## Felagsútreiðslur

## 3.11.1. Fyrisiting

### 3.11.1.03. Fíggjarmálaráðið (Rakstrarjáttan)

Ráðið er fyrisiting hjá landsstýriskvinnuni fyri málsøkini samsvarandi galdandi málsøkjabýti løgmans. Høvuðsmálsøkini eru búskaparmál, fíggjarmál, skatta- og avgjaldsmál, lønarmál, kommunal fíggjarmál, hagfrøðismál og talgilding.

Virkisøkini hjá landsstýriskvinnuni eru skipað í stovnunum:

- TAKS - skatta- og avgjaldsmál
- Gjaldstovan - fíggjarmál, kommunal fíggjarmál, lønarmál og talgilding
- Hagstovan - hagfrøðismál
- Landsbankin - búskaparmál og fíggjarmál (láns- og íløgufyrisiting)

Landsstýriskvinnan hevur heimildir landsstýrisins mótvegis P/F Tjaldur. Partabrøvini hjá landinum í felagnum eru seld í 2023.

Høvuðsuppgávurnar hjá Fíggjarmálaráðnum eru

- At ráðgeva landsstýriskvinnuni
- At málsviðgera
- At evna til lógir, kunngerðir og reglugerðir
- At samskipa tvørgangandi uppgávur
- At vegleiða og hava eftirlit við stovnum og øðrum undir ráðnum

Fíggjarmálaráðið hevur m.a. hesar tvørgangandi uppgávurnar:

- At gera uppskot til fíggjarlóg
- At gera uppskot til játtanarkarmar
- At skipa fyri lønarsamráðingum og at vera landsins arbeiðsgevari
- At skipa fyri talgilding og nettrygd

Fíggjarmálaráðið er ovasti fyristingarligi myndugleiki hjá teimum stovnum, ið hoyra undir málsøkini hjá landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum. Av játtanini eru avsett til ráðsins luttøku í altjóða átøkunum innan skattaøkið hjá altjóða felagsskapinum OECD.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 14.628 | 14.301 | 12.287 | 12.497 | 12.497 | 12.497 |
| Útreiðslur | 14.830 | 14.621 | 12.287 | 12.497 | 12.497 | 12.497 |
| Inntøkur | 202 | 320 | - | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 14.628 | 14.301 | 12.287 | 12.497 | 12.497 | 12.497 |
| **Útreiðslur** | **14.830** | **14.621** | **12.287** | **12.497** | **12.497** | **12.497** |
| 11. Lønir v.m. | 11.791 | 12.223 | 10.435 | 10.725 | 10.725 | 10.725 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.432 | 1.589 | 1.361 | 1.281 | 1.281 | 1.281 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 137 | 118 | 56 | 56 | 56 | 56 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 70 | 47 | 35 | 35 | 35 | 35 |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 296 | 292 | 170 | 170 | 170 | 170 |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | - | 1 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1.104 | 350 | 230 | 230 | 230 | 230 |
| **Inntøkur** | **202** | **320** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *202* | *320* | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 4,0 | 4,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |
| Onnur | 13,8 | 13,9 | 10,8 | 10,8 | 10,8 | 10,8 |
| Fulltíðarstørv | 17,8 | 17,9 | 13,8 | 13,8 | 13,8 | 13,8 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 11,8 | 12,2 | 10,4 | 10,7 | 10,7 | 10,7 |

## 3.11.1.36. Sáttmálaviðurskifti (Rakstrarjáttan)

Játtanin verður í høvuðsheitum nýtt til útreiðslur í sambandi við lønarsáttmálar, sum fakfeløg hava við tað almenna. Talan er um útreiðslur, ið ikki beinleiðis viðvíkja rakstrinum hjá Fíggjarmálaráðnum, men allari landsumsitingini. Tað snýr seg um útreiðslur til semingar, gerðarættarmál og rættarmál. Størsti parturin fer til gerðarættar- og rættarmál.

Útreiðslurnar av semingsstovninum eru sambært løgtingslóg nr. 39 frá 13. mai 2013 um semingsstovn og síggjast á høvuðskontu 18.39.1.01. Semingsmannaskipanin. Útreiðslurnar av fasta gerðarætti eru sambært løgtingslóg nr. 21 frá 11. apríl 2006 um mál ið hoyra undir fasta gerðarætt, við seinni broytingum, og síggjast á høvuðskontu 18.39.1.02. Fastur gerðarættur.

Útreiðslurnar í sambandi við lønarsáttmálar vóru 348 tús. kr. í 2022. Tað er sera torført at siga, hvussu stórar útreiðslurnar verða. Higartil eru útreiðslurnar um 100 tús. kr. og verða mettar til einar 500 tús. kr. fyri alt 2023. Roknað verður við 650 tús. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 864 | 348 | 650 | 650 | 650 | 650 |
| Útreiðslur | 864 | 348 | 650 | 650 | 650 | 650 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 864 | 348 | 650 | 650 | 650 | 650 |
| **Útreiðslur** | **864** | **348** | **650** | **650** | **650** | **650** |
| 11. Lønir v.m. | 2 | - | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 862 | 348 | 600 | 600 | 600 | 600 |

## 3.11.1.46. Søla av partabrøvum (Stuðulsjáttan)

Inntøkujáttanin er brúkt til sølu av partabrøvum hjá landinum í P/F Tjaldur.

Arbeiðið at taka sær av at selja partabrøvini fyri landið varð boðið út og sett í gongd í 2022. Arbeiðið steðgaði, tá ið val til Løgtingið varð útskrivað. Arbeiðið varð tikið upp aftur í 2023. Sølan varð endaliga avgreidd í mars 2023.

Játtanin í 2023 varð sett til 15,8 mió. kr., svarandi til innkomin boð og mettar útreiðslur av søluni. Nettoinntøkan varð 15,9 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkujáttan | - | - | 15.800 | - | - | - |
| **02.Søla av partabrøvum í P/F Tjaldur** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **15.800** | **-** | **-** | **-** |
| 85. Søla av virðisbrøvum | - | - | *15.800* | - | - | - |

## 3.11.1.61. Talgildu Føroyar (Rakstrarjáttan)

### Undirkonta 20. Vanligt virksemi

Játtanin til Talgildu Føroyar hevur til endamáls at nútímansgera vælferðina og tænasturnar hjá føroyingum, at skapa kappingarføri, vøkstur og framleidni, umframt at tryggja sparingar og effektiviseringar í almenna geiranum.

Játtanin hevur árini 2016-2023 verið grundað á heildarætlanina Talgilding av samfelagnum frá 2015 og verklagslóg um Talgildu Føroyar (løgtingslóg nr. 77 frá 29. mai 2017, við seinni broytingum). Játtanin er brúkt til at menna eitt talgilt undirstøðukervi fyri Føroyar. Loysnirnar, ið eru mentar eru:

- Samleikin
- Vangin
- Heldin
- Grundardáturnar: partar av fólkayvirlitinum, nýggj virkisskrá, føroyakort.fo og skanning av tinglýsingar- og matrikkul arkivi
- Skjáttan

Av hesum loysnum eru allar í dag í rakstri - uttan virkisskráin, sum verður sett í verk í 2024.

Loysnirnar eru væl móttiknar av bæði borgarum og av stovnum og virkjum, ið ynskja at brúka loysnirnar at veita talgildar tænastur. Umleið 90% av øllum borgarum hava í dag ein Samleika, og umleið 40 tænastuveitarar eru knýttir í Samleikan ella Vangan, har tey veita kundum sínum eina røð av ymiskum tænastum. Skjáttan, har talgilda koyri- og borgarakortini liggja, varð tikin í nýtslu á vári 2023 og verður brúkt av eini 20.000 brúkarum. Skjáttan er fyrst og fremst fíggjað av kommunum og øðrum áhugapørtum.

Í játtanini fyri 2023 eru settar 6 mió. kr. av til at gera Virkisskránna lidna. Sambært dagførdari ætlan fer tað at kosta 3,5 mió. kr. afturat í 2023. Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina við Virkisskránni verður sostatt 21 mió. kr.

**21. Talgildu Føroyar 2.0**
Í 2023 varð skjøtil settur á 2. umfar av Talgildu Føroyum. Nýggj heildarætlan er gjørd fyri árini 2024-2026. Heildarætlanin skal staðfestast í nýggjari verklagslóg, sum verður løgd fyri Løgtingið á vári 2024. Nýggja heildarætlanin umfatar ymisk átøk, m.a. nýggjan talgildan myndugleika, talgilda tinglýsing, virkisvanga, fulltrúa loysn, heilsutænastur á Vanganum og gagnnýtsla av nýggjari tøkni, so sum tilgjørdum viti innan m.a. eldrarøkt.

Í 2023 eru játtaðar netto 5 mió. kr. til verkætlanina. Fyri at arbeiðið kann halda fram ótarnað, er neyðugt við 2 mió. kr. afturat í 2023. Játtanin fyri 2024 verður 10 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 7.752 | 13.517 | 11.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| Útreiðslur | 15.717 | 22.430 | 14.000 | 12.000 | 13.000 | 13.000 |
| Inntøkur | 7.966 | 8.913 | 3.000 | 2.000 | 3.000 | 3.000 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 7.752 | 13.517 | 6.000 | - | - | - |
| **Útreiðslur** | **15.717** | **22.430** | **6.000** | **-** | **-** | **-** |
| 11. Lønir v.m. | 5.468 | 6.121 | 1.500 | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.270 | 997 | 4.500 | - | - | - |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 13.541 | 15.184 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 20 | 30 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 236 | 4 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 551 | 795 | - | - | - | - |
| 74. Tiltakspeningur og budgetjavningar | -5.368 | -700 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **7.966** | **8.913** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | *-* | *264* | - | - | - | - |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *3.662* | *3.313* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *300* | *1.642* | - | - | - | - |
| 77. Flyting frá kommunum | *4.004* | *3.694* | - | - | - | - |

**21. Talgildu Føroyar 2.0**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | - | - | 5.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **8.000** | **12.000** | **13.000** | **13.000** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 2.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | 6.000 | 9.000 | 10.000 | 10.000 |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **3.000** | **2.000** | **3.000** | **3.000** |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | - | - | *3.000* | *2.000* | *3.000* | *3.000* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | - | - | - | - |
| Onnur | 9,0 | 6,5 | 3,0 | - | - | - |
| Fulltíðarstørv | 10,0 | 7,5 | 3,0 | - | - | - |
| Lønarpartur (mio kr.) | 5,5 | 6,1 | 1,5 | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 21 Talgildu Føroyar 2.0**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | - | - | 3,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| Fulltíðarstørv | - | - | 4,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | - | - | 2,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |

# Uttanríkismál

## 3.13.2. Millumtjóða samstarv

### 3.13.2.03. Endurgjald av skatti og avgjøldum (Stuðulsjáttan)

Norrøna Atlantssamstarvið (NORA) er samstarv ímillum Ísland, Grønland, Føroyar og Vestur- og Norðurnoreg undir Ráðharraráðnum í Norðurlandaráðnum. Høvuðsskrivstovan er í Føroyum, men skrivstovur eru eisini í hinum samstarvslondunum. Norðurlandaráðharraráðið veitir játtanina, ið NORA hevur at arbeiða við.

Játtanin á 300 tús. kr. er til partvíst endurgjald fyri skatt og avgjøld, ið NORA og starvsfólk tess rinda í Føroyum. Endurgjaldið fyri fíggjarárið verður rindað einaferð árliga, tá ið uppgerð yvir skatt og avgjøld fyriliggur, sum í minsta lagi er á støðd við játtanarupphæddina.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| **01. Norrøna Atlantssamstarvið (NORA)** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **300** | **300** | **300** | **300** | **300** | **300** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 |

# Fíggjarmál o.a.

## 3.15.1. Fíggjarfyrisiting v.m.

### 3.15.1.04. TAKS (Rakstrarjáttan)

TAKS tryggjar tí almenna skatta- og avgjaldsinntøkur, umsitur gjøld og veitingar, og fyribyrgir ólógligum inn- og útflutningi sambært galdandi lógum.

Aðrar uppgávur hjá TAKS eru, at:

- Umsita frítíðarløn og trygdargrunn løntakaranna
- Krevja inn gjald til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og gjalda út úr grunninum
- Krevja inn gjald til Vinnusjúkugrunnin og gjalda út úr grunninum
- Krevja inn gjald til Arbeiðsloysisskipanina
- Krevja inn gjald til Heilsutrygd
- Krevja inn gjald til Kringvarpið
- Umsita Barsilsskipanina
- Umsita FAS-skipanina
- Krevja inn almenna skuld
- Umsita stuðulslóggávu
- Gera lóggávuarbeiði fyri Fíggjarmálaráðið, og ráðgeva um galdandi lóggávu og um onnur viðurskifti á skatta- og avgjaldsøkinum.

**TAKS umsitur heilt ella partvíst fylgjandi lógir:**

- Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, Ll. um
- Lov om arveafgift
- Avskrivingarlógin
- Ásetingarlógin
- Barsilsskipan, Ll. um
- Brenniolju, Ll. um serligt avgjald á
- Burturluting v.m., Ll. um gjald av vinningi við
- Dupult húsarhald, Ll. um stuðul til
- Eftirlønarlógin
- Eydnuspæl v.m., Ll. um
- Ferðagjald, Ll. um
- Ferðaútreiðslur, Ll. um stuðul til
- Framleiðslu og innflutningi, Ll um avgjald á
- Frítíð við løn, Ll. um
- Innkrevjing av faldnari skuld, Ll. um gjøld o.l. fyri
- Inddrivelse af personlig skat til amtskommunen, midlertidig bestemmelse
- Íløgugrunnar, Ll. um
- Kapitalvinningi, Ll. um skatting av
- Kolvetnisskattalógin
- Kolvetnisskattafyrisitingarlógin
- Kringvarpslógin
- Lønarhæddaravgjaldslógin
- Meirvirðisgjaldslógin
- Motorakførum v.m., Ll. um avgjøld við skráseting av

- Panting fyri skatt, Ll. um
- Panting, Ll. um avgjøld í samband við
- Stuðul til rentuútreiðslur av lánum, Ll. um
- Rentutryggingarlógin/ Ll. um uppsparing og skatting av eftirlønum
- Skattafría samanlegging, Ll. um
- Skattalógin
- Skuldarumskipan, Ll. um
- Smyrjiolju, Ll. um umhvørvisgjald á
- Tinglýsingaravgjald, Ll. um
- Tinglýsingargjøld v.m., Ll. um
- Toll- og Skattafyrisiting, Ll. um
- Toll-lógin
- Tonsaskatt, Ll. um
- Trygd og at bjóða á tvingsilssølu í sambandi við innkrevjingarmál, Ll. um at veita
- Trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m., Ll. um
- Umskipanarlógin
- Útflutningi av vørum, Ll. um skráseting av

**Harafturat eru hesar lógir lutvíst at røkja:**
Lóg um innflutning og sølu av rúsdrekka, lóg um sjúkur, sum fiskur, skeljadýr og krabbadýr hava, lóg um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, lóg um frítíð við løn, kunngerð um frítíðarløn, bókhaldsskyldulógin, lóg um arbeiðsloysisskipan, sjúkufyribyrging av dýrum, og bekæmpelse af smitsomme plantesygdomme og skadedyr (kunngerð).

**Millumlandasáttmálar**
Tvískattasáttmáli er við Norðurlond, Grønland, Schweiz, India, Stóra Bretland, Isle of Man, Jersey, Guernsey, Bermuda, Bretsku Jomfrúoyggjarnar, Cayman Islands, Niðurlondsku Antillurnar og Aruba. Norðurlendsk hjálpiavtala á skattaøkinum, hjálpiavtala hjá OECD og Europaráðnum í skattamálum, hjálpiavtala við Isle of Man, Guernsey, Jersey, Aruba, Niðurlendsku Antillurnar, Cayman Islands, Bermuda, Bretsku Jomfrúoyggjarnar, Gibraltar, St. Kitts & Nevis, St. Vincent & Grenadines, Anguilla, Antigua & Barbuda, Turks & Caicos Islands, St. Lucia, Bahamas, Dominica, Grenada, Cook Islands, Samoa, San Marino, Andorra, Monaco, Belize, Marshall Islands, Costa Rica, Liberia, Liechtenstein, Montserrat, Bahrain, Barbados, Brunei, Macao, Mauritius, Seychelles, Botswana, Uruguay, Guatemala, Panama, Jamaica, Vanuatu, Qatar og Niue.

**Fríhandilsavtalur**
Føroyar-ES, Føroyar-Turkaland, Føroyar-Noreg, Føroyar-Ísland og Føroyar-Sveis (íroknað Liktinstein). GATT-sáttmálin (WTO).

**OECD**
TAKS røkir alt tað praktiska samstarvið við OECD vegna Føroyar, soleiðis at Føroyar megna at lúka altjóða krøv í sambandi við tær avtalur, sum Føroyar hava gjørt við OECD.

TAKS arbeiðir alsamt við at økja sítt virkni og at betra sína tænastu, góðsku og trivnað. Tað verður m.a. gjørt við at menna KT-kervið og KT-skipanir, og fleiri KT-sjálvavgreiðslur verða gjørdar. Starvsfólkini verða førleikament, og trivnaðurin raðfestur. Arbeiðsgongdir verða betraðar, og samskifti innan- og uttanhýsis verður eisini ment.

TAKS leggur stóra áherðslu á at tryggja álitið á TAKS og at ávirka atburðin hjá borgarum og fyritøkum til at gera tað rætta. Álit er grundleggjandi fyritreyt fyri, at stovnurin megnar at loysa sína uppgávu at tryggja landskassans inntøkur. Arbeitt verður við at tryggja, at borgarin og samfelagið

hevur álit á lóggávu og fyrisiting soleiðis, at fólk skilja týdningin av at gera rætt, men eisini avleiðingarnar av at gera skeivt. Við góðari vegleiðing og skilagóðum samskifti, rættari málsviðgerð og eftirliti roynir TAKS at ávirka atburðin hjá fólki til at fylgja toll-, avgjalds- og skattalóggávuni.

Arbeitt verður við at styrkja eftirlitið, bæði vinnuligt og privat, umframt rúsevnaeftirlitið. Tí skulu KT-verkætlanir serliga snúgva seg um at minka um manuelt arbeiði og effektivisera arbeiðsgongdir, soleiðis at arbeiðsorka verður frígivin til meira eftirlit. Tað merkir, at starvfólk við tíðini kunnu brúka meira av arbeiðsorkuni til eftirlit og vegleiðing.

Umframt lønarframskriving og krav um tillagaðan rakstur verður játtanin lækkað 2,4 mió. kr. Upphæddin er umraðfest til Búskaparskipan landsins, tó bert galdandi fyri 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 69.296 | 70.636 | 76.517 | 75.529 | 77.929 | 77.929 |
| Útreiðslur | 87.978 | 91.130 | 91.964 | 90.976 | 93.376 | 93.376 |
| Inntøkur | 18.682 | 20.494 | 15.447 | 15.447 | 15.447 | 15.447 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 55.721 | 53.783 | 61.637 | 63.049 | 63.049 | 63.049 |
| **Útreiðslur** | **72.352** | **72.609** | **76.114** | **77.526** | **77.526** | **77.526** |
| 11. Lønir v.m. | 55.132 | 56.103 | 61.594 | 63.306 | 63.306 | 63.306 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 11.877 | 12.101 | 10.270 | 9.870 | 9.870 | 9.870 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 1.973 | 806 | 750 | 750 | 750 | 750 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 3.314 | 3.408 | 3.300 | 3.300 | 3.300 | 3.300 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 56 | 56 | 70 | 70 | 70 | 70 |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | - | - | 130 | 130 | 130 | 130 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 136 | - | 100 | 100 | 100 |
| **Inntøkur** | **16.631** | **18.826** | **14.477** | **14.477** | **14.477** | **14.477** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.748* | *3.138* | *680* | *680* | *680* | *680* |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *265* | *317* | - | - | - | - |
| 61. Skattir og avgjøld | - | *0* | - | - | - | - |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | *9.506* | *10.220* | *9.450* | *9.450* | *9.450* | *9.450* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *5.113* | *5.151* | *4.347* | *4.347* | *4.347* | *4.347* |
| **24. KT-skipanir hjá TAKS** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 13.575 | 16.853 | 14.880 | 12.480 | 14.880 | 14.880 |
| **Útreiðslur** | **15.626** | **18.521** | **15.850** | **13.450** | **15.850** | **15.850** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 9.124 | 8.769 | 8.700 | 10.100 | 10.100 | 10.100 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 6.396 | 9.409 | 7.150 | 3.050 | 5.450 | 5.450 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 106 | 343 | - | 300 | 300 | 300 |
| **Inntøkur** | **2.051** | **1.668** | **970** | **970** | **970** | **970** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.486* | *767* | *470* | *470* | *470* | *470* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *565* | *901* | *500* | *500* | *500* | *500* |

## Undirkonta 24. KT-skipanir hjá TAKS

Síðani 1980'ini eru KT-kjarnuskipanirnar hjá TAKS støðugt útbygdar, riknar og viðlíkahildnar av hesi játtan. Skipanirnar fevna í dag um fakskipanir til skatt, toll og avgjøld v.m., undir hesum eisini býtið

millum land og kommunur. Tað merkir, at skipanirnar hjá TAKS hava avgerandi týdning fyri landið, tí at tær tryggja innkrevjing og eftirlit við meginpartinum av inntøkunum hjá landskassanum.

Arbeitt hevur verið í fleiri ár við at uppstiga KT-skipanirnar til ein nútímans pall. Tað arbeiðið varð liðug á heysti 2018. Hóast uppstigingina eru KT-skipanirnar framvegis gamlar og krevja at verða nútímansgjørdar. Eftir ætlan verður størri orka løgd í tað arbeiðið í 2024.

Játtanin verður lækkað 2,4 mió. kr. Upphæddin er umraðfest til Búskaparskipan landsins, tó bert galdandi fyri 2024.

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 2,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |
| Onnur | 108,0 | 106,0 | 103,0 | 103,0 | 103,0 | 103,0 |
| Fulltíðarstørv | 110,0 | 109,0 | 106,0 | 106,0 | 106,0 | 106,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 55,1 | 56,1 | 61,6 | 63,3 | 63,3 | 63,3 |

### 3.15.1.06. Sakarmálskostnaður hjá TAKS (Rakstrarjáttan)

Játtanin verður brúkt til útreiðslur av sakarmálum hjá TAKS. Sveiggini eru stór, og upphæddirnar kunnu verða stórar. Tí er skilabetri at hava serstaka høvuðskontu til endamálið.

Útreiðslurnar av sakarmálum hjá TAKS vóru 894 tús. kr. í 2022. Tað er sera torført at siga, hvussu stórar útreiðslurnar verða. Higartil eru útreiðslurnar góðar 800 tús. kr. og verða mettar til einar 900 tús. kr. fyri alt 2023. Játtanin fyri 2024 er hækkað 600 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 520 | 894 | 300 | 900 | 900 | 900 |
| Útreiðslur | 520 | 894 | 300 | 900 | 900 | 900 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 520 | 894 | 300 | 900 | 900 | 900 |
| **Útreiðslur** | **520** | **894** | **300** | **900** | **900** | **900** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 520 | 894 | 300 | 900 | 900 | 900 |

### 3.15.1.07. Føroya gjaldstova (Rakstrarjáttan)

Játtanin verður nýtt at reka Gjaldstovuna. Gjaldstovan førir roknskap yvir játtanirnar í fíggjarlógini og førir m.a. eisini roknskap yvir ogn og skuld landskassans. Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og umsitur lønarskipanina, sum er karmur um avgreiðslu av almennum lønum. Gjaldstovan umsitur eisini almenna KT-undirstøðukervið, Landsnet og stendur fyri størstu føroysku KT-verkætlanini Talgildu Føroyar.

Játtanin til Landsnet liggur á høvuðskontu 3.38.3.19. KT Landsins. Játtanin til verkætlanina Talgildu Føroyar liggur á høvuðskontu 3.11.1.61. Talgildu Føroyar, meðan játtanin til raksturin av t.d.

Vanganum, Samleikanum, Heldini og ætlaðu Virkisskránni liggur á høvuðskontu 3.15.1.09. Talgildu Føroyar, rakstur.

Ábyrgdarøkið kann verða liðað sundur í hesar høvuðsuppgávur:

- Landsins roknskaparhald og gera landsroknskap
- Gera mánaðarroknskapir fyri land, kommunur og grunnar
- Menning, viðlíkahald og at reka Búskaparskipan landsins
- Gjaldstovan førir bókhald og avgreiðir lønir fyri fleiri stovnar, grunnar og samstørv
- Halda stýr á viðurskiftum millum land, kommunur, kommunal samstørv og grunnar
- Lønarfyrisiting og lønarbókhald, herundir Vaktætlan
- Undirvísing í t.d. skipanum og roknskaparverki
- Gjaldstovan hevur um hendi allar inn- og útgjaldingar landskassans vegna og skal ætla um gjaldførið í fíggjarárinum
- Taka ímóti og validera kommunuroknskapardátur og dátur fyri grunnar
- Menning, viðlíkahald og rakstur av Landsneti; tænastan verður nú víðkað til eisini at fevna um eitt Skúlanet fyrir allar skúlar
- KT-trygd fyri skipanir undir Gjaldstovuni
- Felagsfyrisiting í Kvíggjartúni
- Umsita og hýsa verkætlanina Talgildu Føroyar
- Umsiting, menning og marknaðarføring av Keypsportalinum
- Fyrisita keyp landsins, sum er at ráðgeva, gera rammusáttmálar, og umsita Keypsportalin

Stovnurin er ikki skipaður við lóg, men partar av virkseminum eru ásettir við lóg.

Í kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t., við seinni broytingum, eru ásett øll tey týdningarmestu viðurskiftini í sambandi við roknskaparverk landsins, t.d. hvønn roknskaparhaldið fatar um, hvørjar uppgávur roknskaparhald landsins skal loysa, hvussu tað verður fyriskipað, og hvørji krøv verða sett til roknskaparførslu.

Umframt lønarframskriving og krav um tillagaðan rakstur er játtanin fyri 2024 hækkað 2,4 mió. kr. til at dagføra Búskaparskipan landsins.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 30.664 | 31.865 | 35.161 | 38.007 | 37.007 | 34.007 |
| Útreiðslur | 38.410 | 37.461 | 39.746 | 42.592 | 41.592 | 38.592 |
| Inntøkur | 7.746 | 5.596 | 4.585 | 4.585 | 4.585 | 4.585 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 17.894 | 20.191 | 20.602 | 20.977 | 20.977 | 20.977 |
| **Útreiðslur** | **23.163** | **23.957** | **23.597** | **23.972** | **23.972** | **23.972** |
| 11. Lønir v.m. | 18.582 | 19.321 | 20.682 | 21.257 | 21.257 | 21.257 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 3.465 | 4.172 | 2.560 | 2.360 | 2.360 | 2.360 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 552 | 218 | 240 | 240 | 240 | 240 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 139 | 142 | 115 | 115 | 115 | 115 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 14 | 16 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 0 | 1 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 410 | 85 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **5.269** | **3.765** | **2.995** | **2.995** | **2.995** | **2.995** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *442* | *335* | *45* | *45* | *45* | *45* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *3.543* | *2.060* | *1.850* | *1.850* | *1.850* | *1.850* |
| 77. Flyting frá kommunum | *1.284* | *1.370* | *1.100* | *1.100* | *1.100* | *1.100* |
| **24. Búskaparskipan landsins** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 9.470 | 7.770 | 10.735 | 13.135 | 12.135 | 9.135 |
| **Útreiðslur** | **9.711** | **8.010** | **11.135** | **13.535** | **12.535** | **9.535** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 6.518 | 5.618 | 6.635 | 7.835 | 7.335 | 5.835 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 3.193 | 2.392 | 4.500 | 5.700 | 5.200 | 3.700 |
| **Inntøkur** | **241** | **240** | **400** | **400** | **400** | **400** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *241* | *240* | *400* | *400* | *400* | *400* |
| **25. Vaktætlanarskipanin** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 593 | 624 | 791 | 806 | 806 | 806 |
| **Útreiðslur** | **1.838** | **1.652** | **1.441** | **1.456** | **1.456** | **1.456** |
| 11. Lønir v.m. | 514 | 507 | 541 | 556 | 556 | 556 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.074 | 1.144 | 900 | 900 | 900 | 900 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 250 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **1.245** | **1.028** | **650** | **650** | **650** | **650** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *13* | *13* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *824* | *610* | *385* | *385* | *385* | *385* |
| 77. Flyting frá kommunum | *407* | *405* | *265* | *265* | *265* | *265* |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **28. Felagsfyrisitingin í Kvíggjartúni** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 2.740 | 3.222 | 3.033 | 3.089 | 3.089 | 3.089 |
| **Útreiðslur** | **3.431** | **3.572** | **3.373** | **3.429** | **3.429** | **3.429** |
| 11. Lønir v.m. | 1.657 | 1.270 | 2.004 | 2.060 | 2.060 | 2.060 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.542 | 2.064 | 1.090 | 1.090 | 1.090 | 1.090 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 11 | 46 | 30 | 30 | 30 | 30 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 219 | 193 | 249 | 249 | 249 | 249 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 2 | -0 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **691** | **351** | **340** | **340** | **340** | **340** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *346* | *348* | - | - | - | - |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | - | *2* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *345* | - | *340* | *340* | *340* | *340* |
| **40. Inntøkufíggjað virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -33 | 58 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **267** | **270** | **200** | **200** | **200** | **200** |
| 11. Lønir v.m. | 47 | 34 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 221 | 236 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| **Inntøkur** | **300** | **212** | **200** | **200** | **200** | **200** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *300* | *212* | *200* | *200* | *200* | *200* |

## Undirkonta 20. Vanligt virksemi

Lønarfyrisitingin hjá Almannaverkinum varð í 2015 flutt til Gjaldstovuna í sambandi við, at eldraøkið varð flutt til kommunurnar. Eldrasamstørvini rinda áleið 1,2 mió. kr. árliga fyri tær tænastur, sum Gjaldstovan veitir teimum. Henda tænasta er skipað í serligari avtalu og var liður í útleggingini av eldrarøktini til kommunurnar.

Í 2018 varð Keyp landsins skipað á Gjaldstovuni við einum starvsfólki. Í 2023 varð játtanin hækkað til eitt starvsfólk afturat. Arbeiðið hjá Keypi landsins er at umsita Keypsportalin, ráðgeva um útboð, umsita undantøk og gera rammusáttmálar fyri allar stovnar undir landinum. Úrslitini higartil vísa, at skal nakað munagott verða gjørt á økinum, so má økið raðfestast við bæði manning, og at stovnarnir fylgjal rundskrivinum.

Í einari uppgerð í 2023 hevur Gjaldstovan mett, at Keyp landsins samanlagt hevur skapt sparingar fyri 7,3 mió. kr.

## Undirkonta 24. Búskaparskipan landsins

Búskaparskipan landsins er m.a.:

- Høvuðsbók
- Debitorskipan
- Kreditorskipan og rokningarverkgongd (ljóslesing, arbeiðsgongdir o.t.)
- Útgjaldingarskipan
- Inngjaldingarskipan
- Støðisogn
- Lønarskipan o.a.
- Lønaravgreiðsluskipan
- Rokningaskipan fyri Landsnet
- Roknskapargóðkenningarskipan

- Leiðslukunningarskipan
- Búskettskipan
- Skipan fyri søguligar dátur
- Vegskattaskipan
- Lánsskipan
- Navna- og virkiskrá
- Ferðaavrokningarskipan
- Kommunuavrokningarskipan

Talið av brúkarum í Búskaparskipan landsins liggur um túsund. Krøvini til rakstrarumhvørvið - bæði við atliti til skipanir, talið av brúkarum og KT-trygd - hava merkt, at hetta er munandi útbygt síðstu árini. Stórur partur av KT-uppgávunum undir Búskaparskipan landsins eru útveittar gjøgnum árini.

Neyðugt verður at játta pening til at dagføra Búskaparskipan landsins næstu árini. Tí verður játtanin fyri 2024 hækkað 2,4 mió. kr. Roknað verður við, at umframt 1,6 mió. kr. í 2023 og 4 mió. kr. í 2024 skulu játtast 3 mió. kr. í 2025 til dagføringina. Orsøkin til dagføringina er serliga trygdarkrøv og tøkniligar broytingar á Oracle platforminum.

**Undirkonta 25. Vaktætlanarskipanin**
Í oktober 2016 yvirtók Gjaldstovan ábyrgdina av at reka Vaktætlanarskipanina. Vaktætlanarskipanin verður brúkt av sjúkrahúsunum, eldrarøktini og forsorgarstovnum til at ætla um arbeiðstíð og vaktir. Flytingar undir hesari kontu eru frá stovnum, sum nýta Vaktætlanarskipanina.

**Undirkonta 28. Felagsfyrisitingin í Kvíggjartúni**
Felagsfyrisitingin fatar um húsavørð, bygningstrygging, vasking og starvsfólkamatstovu.

Bygninginum tørvar stórar umvælingum í næstum.

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Onnur | 33,0 | 34,0 | 34,0 | 34,0 | 34,0 | 34,0 |
| Fulltíðarstørv | 35,0 | 36,0 | 36,0 | 36,0 | 36,0 | 36,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 18,6 | 19,3 | 20,7 | 21,3 | 21,3 | 21,3 |

**Starvsfólkayvirlit: 25 Vaktætlanarskipanin**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Fulltíðarstørv | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 0,5 | 0,5 | 0,5 | 0,6 | 0,6 | 0,6 |

**Starvsfólkayvirlit: 28 Felagsfyrisitingin í Kvíggjartúni**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 |
| Fulltíðarstørv | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 1,7 | 1,3 | 2,0 | 2,1 | 2,1 | 2,1 |

## 3.15.1.09. Talgildu Føroyar, rakstur (Rakstrarjáttan)

Í 2024 verða allar loysnirnar hjá Talgildu Føroyum í fullum rakstri. Talan er um Samleikan, Vangan, Heldina, Mínboks, Skjáttuna og Virkisskránna. Virkisskráin kemur í rakstur í 2024 og er tí einasta nýggja skipanin, sum ávirkar raksturin komandi árini.

Arbeitt verður framvegis við, hvussu fíggingarmyndilin millum land og kommunur skal skal vera frameftir.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 15.949 | 15.267 | 20.307 | 17.421 | 17.421 | 17.421 |
| Útreiðslur | 17.561 | 19.844 | 24.507 | 25.621 | 25.621 | 25.621 |
| Inntøkur | 1.612 | 4.577 | 4.200 | 8.200 | 8.200 | 8.200 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 15.949 | 15.267 | 20.307 | 17.421 | 17.421 | 17.421 |
| **Útreiðslur** | **17.561** | **19.844** | **24.507** | **25.621** | **25.621** | **25.621** |
| 11. Lønir v.m. | 2.488 | 2.418 | 4.107 | 4.221 | 4.221 | 4.221 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 13.249 | 13.787 | 13.900 | 17.900 | 17.900 | 17.900 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 1.824 | 3.638 | 6.500 | 3.500 | 3.500 | 3.500 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 2 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **1.612** | **4.577** | **4.200** | **8.200** | **8.200** | **8.200** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.506* | *4.216* | *2.200* | *2.400* | *2.400* | *2.400* |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | - | *118* | - | - | - | - |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | - | - | *2.000* | *5.800* | *5.800* | *5.800* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *106* | *243* | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 5,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 |
| Fulltíðarstørv | 5,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 2,5 | 2,4 | 4,1 | 4,2 | 4,2 | 4,2 |

### 3.15.1.12. Nýggj skattaskipan (Rakstrarjáttan)

Skipanirnar hjá TAKS eru í dag vorðnar ov gamlar og ótíðarhóskandi. Tær stuðla ikki undir dagførdar arbeiðsgongdir, krøv og ætlanir hjá TAKS. Skipanirnar eru bygdar á gamla tøkni frá 1980'unum. Tað er tí avbjóðandi at viðlíkahalda tær.

Eitt ættarliðskifti av KT-starvsfólkum er ávegis. Tað fer at gera tað torført at finna starvsfólk at viðlíkahalda tær gomlu skipanirnar. Føroyar fara at missa kritiska skipanarvitan, tá ið verandi lyklastarvsfólk fara á eftirløn. TAKS kann tí ikki veita vissu fyri, at skipanirnar kunnu koyra longri enn 5-6 ár afturat. Tað er ein stórur váði fyri alt tað føroyska samfelagið.

Skipanirnar tryggja flest allar inntøkur til lands- og kommunukassarnar og almennar grunnar.

Verkætlanin at nútímansgera skipanirnar hjá TAKS verður kallað "Kjarnan". Ein partur av arbeiðnum er longu farið ígongd. Talan er um eina rúgvusmikla ætlan, sum krevur bæði størri fígging og heimild. Neyðugt verður tí at gera eina verklagslóg fyri alla ætlanina.

At nútímansgera skipanirnar hjá TAKS hevur 3 endamál:

- At framtíðartryggja skipanirnar við at dagføra tøkni og rakstrarpallar
- At fáa eina fleksibla útveksling og endurnýtslu av dátum
- At nútímansgera brúkaraflatan í mun til arbeiðsgongdirnar í dag

Í tilgongdini verða arbeiðshættirnir hjá TAKS endurskoðaðir og hugsaðir av nýggjum. Málið er at gera eina munandi effektivisering á TAKS. Verkætlanin fer at skapa møguleikar og at hava við sær jaligar tillagingar á TAKS. Arbeiðsorka verður helst frígivin á summum økjum og flutt til onnur økir. Frígivin arbeiðsorka einastaðni kann merkja hægri raðfestingar aðrastaðni. Á TAKS stendur eitt ættarliðsskifti fyri framman. Verkætlanin fer at stimbra undir, at ættarliðsskiftið verður væl eydnað.

Væntast kann, at menningararbeiðið fer at fylla nógv hjá TAKS næstu 6 árini, og kann tað tí eisini ávirka vanliga virksemið nakað.

Ætlanin koyrir í 4 parallellum verkætlanarporum árini 2024-2030:

- Persónsskattur
- Tollur
- Virkisskattur
- Roknskapur og innheinting

Roknað verður við, at uttan óvissur og við núttíðarprísum kostar verkætlanin umleið 100 mió.kr. Við óvissum og prísbroytingum verður roknað við, at hon kostar 150 mió.kr.

Verklagslóg, sum skal vera grundarlag fyri samlaðu verkætlanini, verður løgd fyri Løgtingið í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | - | - | - | 11.000 | 20.000 | 20.000 |
| Útreiðslur | - | - | - | 11.000 | 20.000 | 20.000 |
| **30. Nýggj skattaskipan** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | - | 11.000 | 20.000 | 20.000 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **-** | **11.000** | **20.000** | **20.000** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | - | 2.000 | 2.200 | 2.200 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | - | 9.000 | 17.800 | 17.800 |

**Starvsfólkayvirlit: 30 Nýggj skattaskipan**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | - | - | - | 2,0 | 3,0 | 3,0 |
| Fulltíðarstørv | - | - | - | 2,0 | 3,0 | 3,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | - | - | - | 2,0 | 2,2 | 2,2 |

## 3.15.1.13. Búskaparráðið (Rakstrarjáttan)

Búskaparráðið varð skipað sambært løgtingslóg nr. 50 frá 11. mai 2009 um Búskaparráð, við seinni broytingum.

Við løgtingslóg nr. 72 frá 5. mai 2021 um Búskaparráð, er Landsbankaráðið eisini Búskaparráðið, og verður dagliga umsitingin og skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum røkt av Landsbankanum.

Høvuðskontan er tí niðurløgd, og játtan til umsiting og skrivarauppgávuna er flutt til høvuðskontu 3.15.1.20. Landsbankin, og játtan til gransking og undirvísing í búskaparfrøði er flutt til høvuðskontu 7.23.6.16. Fróðskaparsetur Føroya.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 2.274 | - | - | - | - | - |
| Útreiðslur | 2.274 | - | - | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 2.274 | - | - | - | - | - |
| **Útreiðslur** | **2.274** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 11. Lønir v.m. | 67 | - | - | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 7 | - | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 2.200 | - | - | - | - | - |

### 3.15.1.20. Landsbanki Føroya (Rakstrarjáttan)

Landsbankin virkar eftir løgtingslóg nr. 116 frá 24. november 2016 um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð. Bankin er skipaður sum sjálvstøðugur almennur stovnur, ið skal virka fyri fíggjarligum støðufesti, umsita gjaldføri, fíggjarogn og skuld landsins, gera búskaparfrágreiðingar og veita ráðgeving.

Landsbankin hevur eina nevnd og ein stjóra. Nevndin er skipað við 5 limum, sum landsstýriskvinnan velur eftir tilmæli frá stýrinum fyri Fróðskaparsetrinum. Í minsta lagi 3 limir skulu vera búskaparfrøðingar við útbúgving frá hægri lærustovni.

Landsbankin hevur verið fíggjaður við gjaldi upp til 4 promillu av minstagjaldføri landsins. Við løgtingslóg nr. 73 frá 5. mai 2021 er Landsbankin frameftir landsstovnur við vanligari rakstrarjáttan í fíggjarlógini.

**Føroya váðaráð**
Váðaráðið hevur yvirskipað eftirlit við systemiskum váðum í føroyska búskapinum.

Ráðið er skipað við 5 limum og 5 varalimum. Løgmaður velur limir og varalimir í ráðið eftir tilmælum frá myndugleikum, ið virka fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum.

Landsbankin er skrivstova fyri Váðaráðið.

**Búskaparráðið**
Við løgtingslóg nr. 72 frá 5. mai 2021 um Búskaparráð er Landsbankanevndin eisini Búskaparráðið.

Búskaparráðið ger tvær konjunkturfrágreiðingar um árið um tey búskaparligu útlitini. Harumframt kann ráðið gera temafrágreiðingar.

Landsbankin er skrivstova fyri Búskaparráðið, og verður dagliga umsitingin og skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum røkt av Landsbankanum.

**Undirkonta 40. Inntøkufíggjað virksemi**
Landsbankin hevur inntøkur og útreiðslur av at umsita og røkja stovnsfæ fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og harafturat innlán hjá ymiskum almennum grunnum.

Umframt lønarframskriving er nettojáttanin fyri 2024 hækkað 300 tús. kr. til skrivarauppgávuna fyri Búskaparráðið. Starvið varð sett miðskeiðis í 2023.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 0 | 6.562 | 8.543 | 9.030 | 9.030 | 9.030 |
| Útreiðslur | 10.053 | 9.249 | 10.143 | 10.630 | 10.630 | 10.630 |
| Inntøkur | 10.053 | 2.687 | 1.600 | 1.600 | 1.600 | 1.600 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 1.217 | 7.984 | 8.933 | 9.420 | 9.420 | 9.420 |
| **Útreiðslur** | **8.651** | **7.984** | **8.933** | **9.420** | **9.420** | **9.420** |
| 11. Lønir v.m. | 5.829 | 6.012 | 6.733 | 7.220 | 7.220 | 7.220 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2.156 | 1.769 | 2.100 | 2.100 | 2.100 | 2.100 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 190 | 184 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 15 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 475 | 4 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **7.434** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *7.434* | - | - | - | - | - |
| **40. Inntøkufíggjað virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -1.217 | -1.422 | -390 | -390 | -390 | -390 |
| **Útreiðslur** | **1.402** | **1.264** | **1.210** | **1.210** | **1.210** | **1.210** |
| 11. Lønir v.m. | 1.032 | 1.059 | 1.060 | 1.060 | 1.060 | 1.060 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 301 | 205 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 69 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **2.619** | **2.687** | **1.600** | **1.600** | **1.600** | **1.600** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.841* | *1.790* | *1.600* | *1.600* | *1.600* | *1.600* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *778* | *897* | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,3 | 1,3 | 1,3 | 1,3 | 1,3 | 1,3 |
| Onnur | 5,2 | 6,2 | 6,7 | 7,2 | 7,2 | 7,2 |
| Fulltíðarstørv | 6,5 | 7,5 | 8,0 | 8,5 | 8,5 | 8,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 5,8 | 6,0 | 6,7 | 7,2 | 7,2 | 7,2 |

*Í lønarpartinum er eisini samsýning til nevndina í Landsbankanum, sum eisini er Búskaparráðið, og til Føroya váðaráð.*

**Starvsfólkayvirlit: 40 Inntøkufíggjað virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 0,7 | 0,7 | 0,7 | 0,7 | 0,7 | 0,7 |
| Onnur | 0,8 | 0,8 | 0,8 | 0,8 | 0,8 | 0,8 |
| Fulltíðarstørv | 1,5 | 1,5 | 1,5 | 1,5 | 1,5 | 1,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 1,0 | 1,1 | 1,1 | 1,1 | 1,1 | 1,1 |

## 3.15.2. Hagfrøði

### 3.15.2.01. Hagstova Føroya (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið hjá Hagstovuni er løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya. Sambært lógini er Hagstovan sjálvstøðugur stovnur, sum er høvuðsmyndugleiki fyri hagfrøðiligum virksemi í Føroyum.

Í játtanini til P/F Visit Faroe Islands, høvuðskonta 6.38.5.02, eru 800 tús. kr. settar av til at menna ferðavinnuhagtøl. Hagstovan stendur fyri og ger tað arbeiðið og fær endurgoldið upphæddina frá Visit Faroe Islands.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 12.272 | 12.452 | 13.434 | 13.780 | 13.780 | 13.780 |
| Útreiðslur | 13.749 | 13.805 | 14.834 | 14.980 | 14.980 | 14.980 |
| Inntøkur | 1.477 | 1.352 | 1.400 | 1.200 | 1.200 | 1.200 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 12.272 | 12.452 | 13.434 | 13.780 | 13.780 | 13.780 |
| **Útreiðslur** | **13.749** | **13.805** | **14.834** | **14.980** | **14.980** | **14.980** |
| 11. Lønir v.m. | 11.200 | 11.315 | 12.444 | 12.790 | 12.790 | 12.790 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2.091 | 2.007 | 1.890 | 1.800 | 1.800 | 1.800 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 364 | 451 | 450 | 370 | 370 | 370 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 8 | 27 | 50 | 20 | 20 | 20 |
| 17. Avskrivingar o.a. | - | -5 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -0 | - | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | - | 2 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 86 | 8 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **1.477** | **1.352** | **1.400** | **1.200** | **1.200** | **1.200** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *872* | *852* | *600* | *400* | *400* | *400* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | - | - | *800* | *800* | *800* | *800* |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *500* | *500* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *105* | - | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 17,1 | 17,1 | 18,1 | 19,0 | 19,0 | 19,0 |
| Fulltíðarstørv | 18,1 | 18,1 | 19,1 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 11,2 | 11,3 | 12,4 | 12,8 | 12,8 | 12,8 |

# Almenn starvsfólk v.m.

## 3.18.1. Tænastumannaeftirlønir

### 3.18.1.02. Ymsar tænastumannaeftirlønir (Lógarbundin játtan)

**Undirkonta 01. Tænastumenn**
Lógargrundarlagið undir játtanini er løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirlønir, við seinni broytingum. Fólk, sum fáa eftirløn eftir lógini, eru

- Tænastumenn, sum eru farnir frá vegna aldur, sjúku ella av øðrum óvæntaðum ávum, sum teir ikki hava vald á, og sum ikki kunnu verða kannaðar teimum
- Eftirsitandi hjúnafelagi eftir tænastumann ella eftirløntan tænastumann
- Eftirsitandi børn hjá tænastumanni fáa barnaeftirløn til, at tey eru 21 ár
- Eftirløntir tænastumenn fáa barnaískoyti, eiga teir børn undir 21 ár

Eftirløn verður roknað eftir avtalu, sum er gjørd millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelagið eftir lógini.

Talið av eftirlønarmóttakarum er vaksið nógv seinastu árini. Tænastumannaeftirlønirnar vóru 41,9 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 45,5 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 48 mió. kr. í 2024.

**Undirkonta 02. Læraraeftirlønir**
Tey, sum fáa eftirløn av játtanini, eru tænastumenn, sum hava verið settir í føroyska fólkaskúlanum, og tey, sum hava verið sett við eftirlønarrætti sum tænastumenn í folkaskúlanum.

Játtanin er til:

- Tænastumenn í fólkaskúlanum, sum eru farnir frá vegna aldur, sjúku ella av øðrum óvæntaðum ávum, sum teir ikki hava vald á, og sum ikki kunnu verða kannaðar teimum
- Eftirsitandi hjúnafelaga eftir tænastumann ella eftirløntan tænastumann
- Eftirsitandi børn hjá tænastumonnum fáa barnaeftirløn til, at tey eru 21 ár
- Eftirløntir tænastumenn fáa barnaískoyti, eiga teir børn undir 21 ár

Tænastumenn, sum eru eftirløntir eftir 30. juni 1997, eru fevndir av løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirlønir, við seinni broytingum. Teir, sum eru eftirløntir áðrenn tað, eru eftirløntir eftir danskari lóg.

Útreiðslurnar til læraraeftirlønir eru vorðnar alsamt størri seinastu árini. Læraraeftirlønirnar vóru 111,4 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 115,7 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 118,5 mió. kr. í 2024.

**Undirkonta 03. Endurgjald fyri læraraeftirlønir**
Endurgjald verður rindað úr ríkiskassanum fyri eftirlønir til tænastumenn, sum hava verið settir í føroyska fólkaskúlanum.

Til 30. juni 1997 hevur ríkiskassin endurrindað 80% av øllum útreiðslunum til læraraeftirlønir, men eftir tað er endurrindað eftir ríkislóg nr. 474 frá 10. juni 1997 om ophævelse af lov om tjenestemænd m.fl. i folkeskolen på Færøerne. Eftir lógini verður skilnaður gjørdur millum eftirlønaraldur, sum er vunnin fyri og eftir 31. desember í 1987. Ríkiskassin endurrindar 80% av teimum

eftirlønarútreiðslum, sum eru fyri eftirlønarrætt, sum vunnin er fyri 31. desember í 1987. Útreiðslurnar til læraraeftirlønir verða alsamt størri, og tað, ríkiskassin endurrindar, verður ár fyri ár minni.

Endurgjaldið var 30,5 mió. kr. í 2022 og verður mett til 31,5 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 31,3 mió. kr. í 2024.

**Undirkonta 04. Eftirlønir innan heilsuverkið**
Játtanin verður nýtt til eftirlønir til tænastumenn, ið hava starvast í heilsuverkinum.

Útreiðslurnar til eftirlønir innan heilsuverkið vóru 14,8 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 15,1 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 15,6 mió. kr. í 2024.

**Undirkonta 05. Postverk Føroya, eftirlønir**
Tá Postverkið varð yvirtikið í 1976, yvirtók Postverkið 76 tænastumenn, sum gjørdust starvsmenn við sama eftirlønarrætti sum tænastumenn.

Eftirlønarskyldan er ein lógarbundin skylda ásett í § 1 í løgtingslóg nr. 45 frá 9. mai 1976 um viðurskiftini hjá starvsfólki á postverkinum í sambandi við yvirtøku. Eftirlønarbyrðan verður býtt millum statin og landsstýrið í mun til eftirlønaraldur hjá starvsfólki í postverkinum áðrenn yvirtøkuna og eftirlønaraldur hjá Postverki Føroya eftir yvirtøkuna. Postverkið (nú P/F Postverk Føroya) fær endurgoldið donsku eftirlønarútreiðslurnar frá danska statinum, men fíggjaði sjálvt útreiðslurnar fyri starvstíðina eftir yvirtøkuna av rakstrinum hjá fyritøkuni fram til ársenda 2004.

Tað varð mett at vera óheppið, at brúkarin av posttænastunum skuldi fíggja eftirlønarskylduna. Peningur verður tí settur av í fíggjarlógini til endamálið. Tó soleiðis at Postverkið sjálvt rindar yvir raksturin tað, sum annars svarar til eftirlønina fyri sáttmálasettar starvsmenn (starvsfólk, sum eru sett í starv eftir yvirtøkuna).

Útreiðslurnar til eftirlønir hjá Postverkinum vóru 9,3 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 9,6 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 9,8 mió. kr. í 2024.

**Undirkonta 06. Eftirløn landsstýrismanna**
Eftirløn verður goldin landsstýrisfólkum, ið hava rætt til eftirløn sambært løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m., við seinni broytingum.

Útreiðslurnar til eftirlønir hjá landsstýrisfólkum vóru 4 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 4,1 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 4,4 mió. kr. í 2024.

**Undirkonta 07. Danskar eftirlønir**
Landskassin rindar endurgjald til ríkiskassan sambært avtalu frá 6. februar 1981 við ískoyti frá 10. mai 1990 um eftirlønarbýti hjá ávikavist landsstýrinum og ríkiskassanum. Eftir avtaluni rindar ríkiskassin eftirløn til tænastumenn og onnur, ið hava tænastumannalíknandi eftirlønarskipan, sum heimastýrið hevur yvirtikið eftir hesi skipan. Landsstýrið skal síðani rinda ríkiskassanum aftur tað, sum er vunnið í eftirlønarrætti eftir yvirtøkuna.

Útreiðslurnar til donsku eftirlønirnar vóru 3,7 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 8,8 mió. kr. í 2023. Talan er um uppgerðir, sum hava við sær eftirreguleringar í 2023 og hægri útreiðslur við sær komandi árini. Roknað verður við 5,8 mió. kr. í 2024.

**Undirkonta 08. Eftirlønir**
Játtanin er til eftirlønir, sum sambært samtykt landsstýrisins og fíggjarnevnd Løgtingsins verða veittar

teimum, sum vóru í starvi hjá tí almenna 1. apríl 1949, og sum eftir 30 ára aldur hava starvast í minsta lagi 15 ár hjá tí almenna og fara úr starvi fyri aldur ella sjúku, ella eftirsitandi hjúnafelaga teirra.

Útreiðslurnar til eftirlønir vóru gott 0,1 mió. kr. í 2022 og verða somuleiðis mettar til gott 0,1 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 0,2 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 181.760 | 185.377 | 194.500 | 202.300 | 208.600 | 214.400 |
| Inntøkur | 30.825 | 30.466 | 30.500 | 31.300 | 31.100 | 30.900 |
| **01. Tænastumenn** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **39.082** | **41.897** | **44.200** | **48.000** | **51.000** | **54.000** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 39.082 | 41.897 | 44.200 | 48.000 | 51.000 | 54.000 |
| **02. Læraraeftirlønir** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **107.532** | **111.422** | **116.500** | **118.500** | **120.800** | **122.600** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 107.532 | 111.422 | 116.500 | 118.500 | 120.800 | 122.600 |
| **03. Endurgjald fyri læraraeftirlønir** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **30.825** | **30.466** | **30.500** | **31.300** | **31.100** | **30.900** |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *30.825* | *30.466* | *30.500* | *31.300* | *31.100* | *30.900* |
| **04. Eftirlønir innan heilsuverkið** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **15.177** | **14.834** | **15.600** | **15.600** | **16.200** | **16.800** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 15.177 | 14.834 | 15.600 | 15.600 | 16.200 | 16.800 |
| **05. Postverk Føroya, eftirlønir** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **9.335** | **9.340** | **9.700** | **9.800** | **9.900** | **10.000** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 92 | 94 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 9.243 | 9.246 | 9.550 | 9.650 | 9.750 | 9.850 |
| **06. Eftirløn landsstýrismanna** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **4.056** | **4.009** | **4.400** | **4.400** | **4.400** | **4.400** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 4.056 | 4.009 | 4.400 | 4.400 | 4.400 | 4.400 |
| **07. Danskar eftirlønir** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **6.430** | **3.739** | **3.900** | **5.800** | **6.100** | **6.400** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 6.430 | 3.739 | 3.900 | 5.800 | 6.100 | 6.400 |
| **08. Eftirlønir** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **149** | **136** | **200** | **200** | **200** | **200** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 149 | 136 | 200 | 200 | 200 | 200 |

# Almannamál

## 3.21.2. Útgjaldsskipanir

### 3.21.2.01. Stuðul til flutning og dupult húsarhald (Lógarbundin játtan)

Sambært løgtingslóg nr. 93 frá 6. juni 1997 um stuðul til ferðaútreiðslur, við seinni broytingum, og løgtingslóg nr. 95 um stuðul til dupult húsarhald, við seinni broytingum, verður stuðul veittur fólki, sum í sambandi við arbeiði hava útreiðslur til ferðing ella uppihald. Stuðulin er ásettur í kunngerð nr. 131 frá 30. september 2009 um stuðul til ferðaútreiðslur og dupult húsarhald, við seinni broytingum.

Talið av løntakarum hevur síðstu árini verið alsamt vaksandi og somuleiðis parturin, sum hevur langt at ferðast millum heim og arbeiðspláss.

Útreiðslurnar til stuðul til ferðing og dupult húsarhald vóru 24,9 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 26 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 26 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 25.430 | 24.918 | 25.500 | 26.000 | 26.000 | 26.000 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **25.430** | **24.918** | **25.500** | **26.000** | **26.000** | **26.000** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 25.430 | 24.918 | 25.500 | 26.000 | 26.000 | 26.000 |

## 3.21.7. Sosialar skipanir

### 3.21.7.10. Útgjald úr Trygdargrunninum (Lógarbundin játtan)

Trygdargrunnurin virkar sambært løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m., við seinni broytingum. Grunnurin hevur til endamáls at tryggja løntakarunum lønarkrøv í sambandi við, at arbeiðsgevari kemur í fíggjartrot, arbeiðsgevari doyr, ella fyritøka hansara heldur uppat vegna vantandi fíggjarligan førleika.

Í 2022 vóru útgjølini til lønarkrøv, sum landskassin fær endurrindað úr Trygdargrunninum, 483 tús. kr. Tað ber illa til at meta um upphæddirnar. Higartil eru útgjøldini um 300 tús. kr. og verða mett til 400 tús. kr. fyri alt 2023. Roknað verður við 500 tús. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | - | 483 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| Inntøkur | - | 483 | 500 | 500 | 500 | 500 |

**01. Útgjald úr Trygdargrunninum**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útreiðslur** | **-** | **483** | **500** | **500** | **500** | **500** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | 483 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| **Inntøkur** | **-** | **483** | **500** | **500** | **500** | **500** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *483* | *500* | *500* | *500* | *500* |

# Íbúðarmál

## 3.22.4. Útgjaldsskipanir

### 3.22.4.01. Stuðul til rentuútreiðslur (Lógarbundin játtan)

Sambært løgtingslóg nr. 148 frá 30. desember 1996 um stuðul til rentuútreiðslur av lánum, við seinni broytingum, verður stuðul latin til rentuútreiðslum av lánum til egnan bústað, til bústaðaeindir í lutaíbúðafeløgum, til útbúgving, og til at gjalda aftur virkin (effektiv) veðhald frá áðrenn 3. desember 1994.

Fíggjarmálaráðið og TAKS hava gjørt avtalu við Danmarks Rederiforening um, at Udligningsfonden endurrindar part av rentustuðlinum fyri teir føroyingar, sum sigla undir DIS-skipanini.

Síðani 2014 hevur rentustuðulin verið 35%, harav landið rindar 19,5% og kommunurnar 15,5%. Rentustuðul verður bert veittur til ein matrikul, og síðani 2018 eru stuðul latin til rentur, sum í mesta lagi eru 100 tús. kr.

Útreiðslurnar til rentustuðul vóru netto 47,7 mió. kr. í 2022 og verða mettar til netto 73 mió. kr. í 2023. Við hækkandi rentustøðinum verður roknað við útreiðslum á netto 80 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 79.286 | 86.209 | 109.000 | 141.000 | 141.000 | 141.000 |
| Inntøkur | 35.474 | 38.528 | 47.000 | 61.000 | 61.000 | 61.000 |
| **01. Rentustuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **79.286** | **86.209** | **109.000** | **141.000** | **141.000** | **141.000** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 79.286 | 86.209 | 109.000 | 141.000 | 141.000 | 141.000 |
| **Inntøkur** | **35.474** | **38.528** | **47.000** | **61.000** | **61.000** | **61.000** |
| 77. Flyting frá kommunum | *35.474* | *38.528* | *47.000* | *61.000* | *61.000* | *61.000* |

# Samferðsla og samskifti

## 3.38.3. Samskifti

### 3.38.3.19. KT Landsins (Rakstrarjáttan)

KT Landsins er skipað sum deild undir Gjaldstovuni og hevur til endamáls at virka fyri einari skynsamari og tryggari KT-nýtslu í almennu fyrisitingini. Tað verður gjørt við at miðsavna og samskipa KT-virksemið í almennu fyrisitingini.

Uppgávurnar hjá KT Landsins eru:

- At reka og menna Landsnet. Landsnet er KT-undirstøðukervið, sum verður bjóðað almennum stovnum at brúka. Endamálið við Landsnet er, við miðsavnan og stórrakstri, at fáa rationaliseringar, at savna vitan á einum stað og at økja um KT-trygdina í KT-virkseminum hjá almennum stovnum.
- At menna og bjóða út felags tænastur á Landsneti.
- At virka fyri at styrkja neyðugar førleikar í menning av KT.
- At samskipa almennar fakskipanir á yvirskipaðum stigi. Hetta fyri at tryggja endurnýtslu av KT-skipanum og at virka fyri vitanardeiling.
- At miðsavna innkeyp av KT-ritbúnaði. Tað krevur, at førleikar innan m.a. umsiting av lisensum og KT-sáttmálum verða miðsavnaðir í KT Landsins.
- At miðsavna innkeyp av hardware, so sum teldur, accesspoints og switches.
- At støðugt hækka KT-trygdarstigið hjá stovnunum, sum luttaka í Landsnetssamstarvinum.

Í 2016 varð alt undirstøðukervið hjá Landsneti boðið út, og vórðu sáttmálar gjørdir við tveir føroyskar KT-veitarar um Landsnet. Tað eru umleið 3.000 brúkarar av Landsneti í dag. Tað eru framhaldandi fleiri almennir stovnar, sum hava sítt egna net. Í nettrygdarætlanini 2023-2026 er gjørt av at konsolidera landsins net í hægst 3 net. Í 2023 verður tingast av nýggjum við veitararnar um Landsnet.

Í 2020 byrjaði ein stór verkætlan at savna allar skúlar í eitt Skúlanet. Netverkið til Skúlanet varð boðið út, og sáttmáli undirskrivaður í november 2021. Innlimanin av skúlunum er byrjað. Fólkaskúlar, sum ynskja tað, kunnu eisini verða partur av loysnini. Teir flestu teirra ynskja at vera við. Roknað verður við, at tað fer at taka 4 ár at verkseta Skúlanet. Sameinda loysnin, tá ið allir skúlarnir eru við, fer at kosta okkurt um 11 mió. kr. at reka; skúlarnir rinda fyri útreiðslurnar. Fyrstu skúlarnir vórðu innlimaðir í Skúlanet í 2022. Roknað verður við, at tað fer at taka 4 ár at verkseta Skúlanet. Um allir skúlar fara at brúka Skúlanet, verða tað 10 túsund næmingar og 2-3 túsund starvsett í Skúlaneti.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 4.718 | 4.548 | 4.670 | 4.928 | 4.928 | 4.928 |
| Útreiðslur | 33.779 | 35.125 | 38.770 | 44.028 | 47.028 | 47.028 |
| Inntøkur | 29.062 | 30.577 | 34.100 | 39.100 | 42.100 | 42.100 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 4.718 | 4.548 | 4.670 | 4.928 | 4.928 | 4.928 |
| **Útreiðslur** | **33.779** | **35.125** | **38.770** | **44.028** | **47.028** | **47.028** |
| 11. Lønir v.m. | 6.129 | 6.625 | 9.270 | 11.528 | 13.528 | 13.528 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 24.788 | 26.926 | 29.500 | 32.500 | 33.500 | 33.500 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 630 | 672 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 2 | 12 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 2.230 | 891 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **29.062** | **30.577** | **34.100** | **39.100** | **42.100** | **42.100** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *250* | *-55* | - | - | - | - |
| 27. Fakturering av tænastum frá KT Landsins | *27.112* | *29.982* | *34.100* | *39.100* | *42.100* | *42.100* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *1.700* | *650* | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 11,0 | 12,0 | 17,0 | 20,0 | 23,0 | 23,0 |
| Fulltíðarstørv | 11,0 | 12,0 | 17,0 | 20,0 | 23,0 | 23,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 6,1 | 6,6 | 9,3 | 11,5 | 13,5 | 13,5 |

# § 5 Fiskivinnu- og samferðslumál

## Felagsútreiðslur

### 5.11.1. Fyrisiting

#### 5.11.1.05. Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið (Rakstrarjáttan)

Ráðið er fyrisiting hjá landsstýrismanninum fyri málsøkini samsvarandi galdandi málsøkjabýti løgmans. Høvuðsmálsøkini eru fiskivinnumál, tilbúgving á sjóvnum, havnir og vegir, samferðslumál, almenn bygging og umvæling og ferðslutrygd.

Fyrisitingin innan fiskivinnu kann býtast uppí tvey høvuðsøki: altjóða samstarv og skipan av fiskivinnu.

**Altjóða samstarv** fevnir um fiskivinnusamráðingar og føroyska luttøku í øllum altjóða samstarvi, ið kann setast í samband við fiskivinnu og tilfeingi í havinum.

**Skipan av fiskivinnu** fevnir um menning og dagføring av fiskivinnulóggávu, kunngerðum og skipanum, ið vinnan virkar eftir. Økið fevnir eisini sum fiskvinnugransking og royndir í hesum sambandi.

Hvala- og grindamál eru partur av málsøkinum undir ráðnum.

Vegna ráðið umsitur MRCC sáttmála við Atlantic Airways um tyrlutænastu innan tilbúgving.

Virkisøkini undir Fiskivinnu- og Samferðslumálaráðnum eru í síni heild fyriskipað soleiðis:

- Vørn, ið umsitur fiskiveiðieftirlit, MRCC/Tórshavn Radio og Veðurstovu Føroya
- Havstovan
- Trygdargrunnur Fiskivinnunnar
- Landsverk, vegir, tunlar, brý og havnir, og almenn bygging og umvæling
- Akstovan- ferðslutrygdarmál og skatta- og avgjaldsmál (vegskattur og skrásetingargjøld)
- Strandfaraskip Landsins umsitur samferðslumál

Í sambandi við broytt málsøkjabýti er samskipandi tilbúgving ikki partur av málsøkinum hjá Fiskivinnu- og Samferðslumálaráðnum longur.

Í sambandi við, at samferðsla er vorðin partur málsøkinum hjá ráðnum er játtanin í 2024 hækkað tilsvarandi.

**Samferðsla**
Stovnar innan samferðsluøkið eru Strandfaraskip Landsins, sum umsitur samferðslumál, innanlands fólkaflutning og farmaflutning. Landsverk, sum umsitur landsvegakervið, herímillum tunlar og brýr, umframt havnir, landsins bygningar, byggimál og tyrlupallar. Akstovan hevur akfarseftirlit, koyrikort, ferðslutrygd, skattainnkrevjing og annað.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 14.188 | 14.255 | 17.992 | 19.320 | 19.320 | 19.320 |
| Útreiðslur | 14.279 | 14.255 | 18.012 | 19.340 | 19.340 | 19.340 |
| Inntøkur | 91 | 0 | 20 | 20 | 20 | 20 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 14.188 | 14.255 | 17.992 | 19.320 | 19.320 | 19.320 |
| **Útreiðslur** | **14.279** | **14.255** | **18.012** | **19.340** | **19.340** | **19.340** |
| 11. Lønir v.m. | 10.543 | 10.240 | 13.062 | 13.767 | 13.767 | 13.767 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2.742 | 2.951 | 3.829 | 4.452 | 4.452 | 4.452 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 48 | 129 | 229 | 229 | 229 | 229 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 910 | 899 | 820 | 820 | 820 | 820 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | 0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 36 | 36 | 72 | 72 | 72 | 72 |
| **Inntøkur** | **91** | **0** | **20** | **20** | **20** | **20** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *5* | *0* | *20* | *20* | *20* | *20* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *86* | - | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 4,0 | 4,0 | 4,0 |
| Onnur | 14,0 | 14,0 | 13,0 | 13,0 | 13,0 | 13,0 |
| Fulltíðarstørv | 17,0 | 17,0 | 16,0 | 17,0 | 17,0 | 17,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 10,5 | 10,2 | 13,1 | 13,8 | 13,8 | 13,8 |

## 5.11.1.23. Landsins ognir (Rakstrarjáttan)

Landsverk varðar av oljutangum landsins, og landskassin fær leiguinntøkur av hesum. Oljufelagið, sum leigar tangarnar, er givið at brúka tangarnar í Sørvági, og tær inntøkurnar falla tí burtur. Inntøkurnar verða mettar til 600 tús. kr. í 2024 fyri tangarnar í Søldarfirði.

Landið leigar út 3 bygningar í Hoydølum til mentanarlig endamál og tílíkt. Inntøkurnar fara til at reka ognirnar og til átrokandi viðlíkahald av ognunum í Hoydølum. Høvuðsbygningurin í fyrrverandi studentaskúlanum og lonirnar eru avhendaðar til Tórshavnar kommunu.

Meginparturin av bygningunum í Mjørkadali verða leigaðir út til Kriminalforsorgina. Leiguinntøkurnar verða brúktar til rakstur og viðlíkahald av bygningum í Mjørkadali. Á Sornfelli leigar Landsverk eina radomu (ein kupil) út til Naviair. Harumframt eru eini 20 antennu leigumál á Sornfelli, sum fíggjar restina av rakstrarkostnaðinum.

Harumframt eru smærri leigumál á høvuðskontuni.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | -1.070 | -925 | -721 | -521 | 79 | 79 |
| Útreiðslur | 5.277 | 5.661 | 3.679 | 3.679 | 3.679 | 3.679 |
| Inntøkur | 6.347 | 6.586 | 4.400 | 4.200 | 3.600 | 3.600 |
| **20. Oljugoymslur o.a.** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -1.200 | -1.200 | -800 | -600 | - | - |
| **Inntøkur** | **1.200** | **1.200** | **800** | **600** | **-** | **-** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.200* | *1.200* | *800* | *600* | - | - |
| **21. Húsaleiga og íbúðargjald** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -68 | -82 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **1.196** | **1.268** | **1.200** | **1.200** | **1.200** | **1.200** |
| 11. Lønir v.m. | 183 | 243 | - | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 696 | 827 | 800 | 800 | 800 | 800 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 8 | 40 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 310 | 157 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 2 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| **Inntøkur** | **1.264** | **1.350** | **1.200** | **1.200** | **1.200** | **1.200** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.270* | *1.350* | *1.200* | *1.200* | *1.200* | *1.200* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *-6* | - | - | - | - | - |
| **22. Leiga av økjum, uppisitaraavgjald o.a.** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -167 | -162 | -169 | -169 | -169 | -169 |
| **Útreiðslur** | **31** | **35** | **31** | **31** | **31** | **31** |
| 11. Lønir v.m. | - | 3 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 31 | 32 | 31 | 31 | 31 | 31 |
| **Inntøkur** | **198** | **198** | **200** | **200** | **200** | **200** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *198* | *198* | *200* | *200* | *200* | *200* |
| **23. Yvirtiknar ognir** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 365 | 519 | 248 | 248 | 248 | 248 |
| **Útreiðslur** | **4.049** | **4.358** | **2.448** | **2.448** | **2.448** | **2.448** |
| 11. Lønir v.m. | 822 | 832 | 403 | 403 | 403 | 403 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.739 | 1.583 | 1.975 | 1.975 | 1.975 | 1.975 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 36 | 188 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.452 | 1.750 | 70 | 70 | 70 | 70 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 6 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **3.685** | **3.839** | **2.200** | **2.200** | **2.200** | **2.200** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *3.685* | *3.839* | *2.200* | *2.200* | *2.200* | *2.200* |

## 5.11.1.56. Umvæling av almennum bygningum (Løgujáttan)

Umvæling av almennum bygningum, og grønar orkuloysnir í landsins bygningum verður raðfest, og játtanirnar hækka eftir ætlan stigvíst næstu árini.

**Undirkonta 10. Umvæling av almennum bygningum**
Landsverk varðar av landsins bygningum, 198 í tali, sum samanlagt fevna um 253 túsund fermetrar.

Játtanin verður brúkt til at umvæla, viðlíkahalda og bjálva landsins bygningar. Landsverk samstarvar við stjórnarráðini um, hvussu játtanin skal brúkast.

Týðandi avbjóðingar eru við at halda landsins bygningar í nøktandi standi, tí at alt ov lítið hevur verið játtað til viðlíkahald í nógv ár. Harafturat eru nógvir bygningar illa bjálvaðir, soleiðis at orkunýtslan er óneyðuga stór. Landsverk hevur áður mett, at eftirsleipið til at umvæla og viðlíkahalda landsins bygningar er umleið 470 mió. kr. Landsverk metir, at ein árlig játtan uppá 47 mió. kr. er neyðug fyri at halda verandi støði á bygningunum.

Í 2023 eru játtaðar 27 mió. kr. Játtanin fyri 2024 er 29 mió. kr.

**Undirkonta 11. Grønar orkuloysnir í almennum bygningum**
Meginparturin av landsins bygningum verða hitaðir við olju, og orkunýtslan er ov stór. Ætlanin er, at bygningar landsins í størri mun brúka varandi orku. Í 2023 eru 5 mió. kr. játtaðar til grønar orkuloysnir. Játtanin í 2024 er 7,5 mió. kr.

## Átekning
Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 22.657 | 22.629 | 32.000 | 36.500 | 40.000 | 47.500 |
| Inntøkur | - | 20 | - | - | - | - |
| **10. Umvæling av almennum bygningum** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **22.657** | **22.629** | **27.000** | **29.000** | **30.000** | **35.000** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 15 | - | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | - | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -3.433 | -3.593 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 22.657 | 22.578 | 26.000 | 28.000 | 29.000 | 34.000 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 3.418 | 3.645 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **20** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *20* | - | - | - | - |
| **11. Grønar orkuloysnir í almennum bygningum** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **5.000** | **7.500** | **10.000** | **12.500** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | - | - | 5.000 | 7.500 | 10.000 | 12.500 |

## 5.11.1.58. Almennir bygningar, søla (Løgujáttan)

Endamálið við játtanini er at heimila sølu av landsins bygningum, sum ikki er tørvur á, ella sum ikki longur eru nýtiligir.

Ongar inntøkur vóru í 2021 og 2022. Onkur søla er framd í 2023. Inntøkujáttanin er 3 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | - | 28 | - | - | - | - |
| Inntøkur | - | - | 5.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| **10. Almennir bygningar, søla** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **28** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 11. Lønir v.m. | - | 5 | - | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | 23 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **5.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** |
| 42. Søla av løgu o.ø. | - | - | *5.000* | *3.000* | *3.000* | *3.000* |

# Tilbúgving

## 5.31.1. Tilbúgving

### 5.31.1.06. VØRN, Tilbúgving á sjógvi (Rakstrarjáttan)

**Undirkonta 20. Tórshavn Radio**
Tórshavn Radio hevur lurtiskyldu á VHF og MF og vaktarhald á DSC sambært altjóða viðtøkum frá ITU og IMO. Tórshavn Radio sendir m.a. siglingar- og veðurávaringar og veðurforsagnir til skipaferðsluna í økinum. Eisini verður samskift um læknahjálp og í sambandi við leiting og bjarging. Tórshavn Radio hevur lurtivakt á øllum neyðrásum alt samdøgrið árið runt, m.a. VHF rás 16. Eisini tekur Tórshavn Radio ímóti EPIRB fráboðanum og sendir út ávaringar og NAVTEX fráboðanir.

HF/MF útgerðin á Nakki í Suðuroynni er farin í ódnarveðri. 450 tús. kr. verða játtaðar í 2024 til at keypa nýggja útgerð fyri.

**Undirkonta 21. MRCC Tórshavn**
MRCC (Maritime Rescue Coordination Center) hevur sambært løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving, við seinni broytingum, ábyrgdina av at samskipa samlaða átakið á sjónum. Øll leiting og bjarging í føroyskum sjóøki verður sostatt samskipað av MRCC. Tað verður gjørt sambært altjóða viðtøkum og við avtalum, sum eru gjørdar við okkara grannalond um samstarv. Avtalur eru eisini gjørdar við ymiskar partar av tilbúgvingini í Føroyum, sum vanliga luttaka í leiting og bjarging, eitt nú Atlantic Helicopters, Artisk Kommando. MRCC tekur ímóti fráboðanum um dálking á sjónum. Somuleiðis hevur MRCC skyldu at taka ímóti og bera víðari boð um yvirgang umborð á skipum sambært ISPS kotuni. MRCC samskipar sjúkraflutning við tyrlu bæði á sjógvi og landi. MRCC Tórshavn hevur vakt 24 tímar um døgnið fyri at taka ímóti neyðboðum, dálkingarfráboðanum og øðrum trygdarfráboðanum.

MRCC og Tórshavn Radio hava ábyrgdina av at halda mastrar, samskiftisútgerð og aðra útgerð viðlíka fyri at kunna útinna sítt virksemi.

MRCC og Tórshavn Radio hava skipaða góðskustýring við eksternari skoðan av mannagongdum og virkisgongdum.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 13.832 | 13.331 | 13.390 | 14.118 | 13.668 | 13.668 |
| Útreiðslur | 14.206 | 13.686 | 13.730 | 14.458 | 14.008 | 14.008 |
| Inntøkur | 374 | 355 | 340 | 340 | 340 | 340 |
| **20. Tórshavn Radio** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 6.315 | 6.340 | 6.570 | 7.148 | 6.698 | 6.698 |
| **Útreiðslur** | **6.442** | **6.453** | **6.680** | **7.258** | **6.808** | **6.808** |
| 11. Lønir v.m. | 4.334 | 4.418 | 4.600 | 4.728 | 4.728 | 4.728 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.218 | 1.396 | 1.450 | 1.450 | 1.450 | 1.450 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 667 | 430 | 430 | 880 | 430 | 430 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 223 | 209 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| **Inntøkur** | **127** | **113** | **110** | **110** | **110** | **110** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *127* | *113* | *110* | *110* | *110* | *110* |
| **21. MRCC Tórshavn** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 7.517 | 6.991 | 6.820 | 6.970 | 6.970 | 6.970 |
| **Útreiðslur** | **7.764** | **7.233** | **7.050** | **7.200** | **7.200** | **7.200** |
| 11. Lønir v.m. | 5.036 | 5.241 | 5.400 | 5.550 | 5.550 | 5.550 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.400 | 1.463 | 1.350 | 1.350 | 1.350 | 1.350 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 1.328 | 512 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 17 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **247** | **242** | **230** | **230** | **230** | **230** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *247* | *242* | *230* | *230* | *230* | *230* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Tórshavn Radio**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 8,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 |
| Fulltíðarstørv | 8,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 4,3 | 4,4 | 4,6 | 4,7 | 4,7 | 4,7 |

**Starvsfólkayvirlit: 21 MRCC Tórshavn**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
Eysturoyartunnilin lat upp fyri almennari ferðslu í desember 2020, og merkir tað økta ferðslu eystaru megin við Skálafjørðin. Fyri at betra um ferðsluviðurskiftini til og frá tunlinum ígjøgnum Runavík, Saltangará og Glyvrar verður nýggjur Fjøruvegur gjørdur at leiða serliga ta tungu ferðsluna til og frá Eysturoyartunlinum burtur frá høvuðsvegnum í Runavík.

Fjøruvegurin, sum er 2,5 kilometrar, verður eftir ætlan gjørdur frá rundkoyringini í Rókini, fram við fjøruni og havnalagnum í Runavík til bakkavegin á Glyvrum. Nýggjur betongtunnil verður eftir ætlan eisini gjørdur framvið Rókavegin og undir Løkin og Heiðaveg og kemur upp við Gulasteinsveg.

Runavíkar kommuna ber kostnaðin av verkætlanini við stuðli frá landinum. Alt vegastrekkið verður kommunalur vegur. Tó verða íbindingarnar í Rókaveg og Glyvraveg landsvegir.

Eftir løgtingslóg nr. 188 frá 18. desembur 2020 um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík kann landið í mesta lagi veita 55 mió. kr. í stuðuli til verkætlanina samanlagt, og stuðulin verður veittur yvir 5 ár. Stuðulin verður goldin út, so hvørt arbeiðið verður framt.

Arbeitt verður nú við at gera Fjøruvegin.

Onki varð játtað í 2022, men framfluttar vórðu 23,8 mió. kr. Onki varð brúkt av játtanini í 2022, og 23,8 mió. kr. eru tí fluttar fram til 2023. Tað verða játtaðar 23 mió. kr. til verkætlanina í 2024.

### Átekning

Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | - | - | - | 23.000 | 8.200 | - |
| **10. Innkomuvegur Runavík** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **-** | **23.000** | **8.200** | **-** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | - | - | - | 23.000 | 8.200 | - |

## 5.38.1.07. Nýggir landsvegir (Løgujáttan)

Játtanin verður brúkt til at útbyggja og bøta um vegakervið kring landið. Endamálið er at fáa eina so munadygga og trygga ferðslu sum gjørligt. Sum meginregla verða øll arbeiði boðin út.

Játtanin verður eftir ætlan brúkt til 7 endamál í 2024. Viðmerkjast skal, at játtanirnar til 4 aðrar verkætlanir eru fluttar frá høvuðskontuni til egnar høvuðskontur, sum vóru stovnaðar í fíggjarlógini fyri 2020. Tær eru 5.38.1.05. Innkomuvegur Tórshavn, 5.38.1.06. Innkomuvegur Runavík, 5.38.1.09. Tunlar Norður um Fjall, og 2.38.1.12. Suðuroyartunnil, forkanningar og fyrireikingar.

Játtanin til høvuðskontuna er 146,5 mió. kr. í 2023. Harumframt eru 27,4 mió. kr. fluttar fram frá undanfarnum árum. Sostatt er tøk játtan 173,9 mió. kr. í 2023. Í 2024 verða 137,5 mió. kr. játtaðar.

Eftir løguætlan landsins verða 122 mió. kr. játtaðar í 2024 og 95 mió. kr. í 2025.

**Dagføring av brúm og tunlum**
Landsverk hevur í nógv ár boðað frá, at játtanin til viðlíkahald er alt ov lág. Játtanin er minkað, sjálvt um kostnaðarstøðið er hækkað, nýggir landsvegir eru gjørdir, og ferðslan støðugt økist. Eisini eru størri dygdarkrøv og trygdarkrøv sett. Hetta hevur gingið út yvir viðlíkahaldið av føroyska vegakervinum, herímillum tunlar og brýr.

Samlaða eftirsleipið á undirstøðukervi landsins varð í 2018 mett til at vera umleið 375 mió. kr. Hetta er samlaði tørvurin á játtan til umvælingar, viðlíkahald og dagføring av vegum, tunlum, brúm o.a. Landsverk arbeiðir í løtuni við at dagføra metingina av eftirsleipinum.

Landsverk fekk í 2018 eina støðulýsing av brúm á landsvegum. 32 brúgvar vóru tá í so ringum standi, at ábøtur mugu gerast beinanvegin. Játtanin í 2024 verður 7 mió. kr.

**Trygdartiltøk, størri ábøtur og umvælingar**
Játtanin verður brúkt til at bøta um verandi samferðslukervi, soleiðis at trygdin verður betri á landsvegnum. Ferðslutrygdarætlan varð gjørd í 2019, sum mælir til, at munandi fleiri ferðslutrygdartiltøk verða gjørd á vegakervinum fyri at røkka nullhugsjónini. Talan kann vera um ábøtur á brýr, tunlar, vegir, íbindingar, busslummar o.tíl. Játtanin í 2024 verður 7,6 mió. kr.

**Søla av jørð til kommunur**
Endamálið við játtanini er at hava heimild til at selja lendi til kommunur.

**Tunnilslið, farleið til Dals**
Tunnilsliðið hjá Landsverki fór í november 2020 undir at gera eina nýggja farleið til Dals. Tunnilin verður 2,2 kilometrar langur, og tilhoyrandi vegagerð er 300 metrar. Harumframt verður ein partur av verandi vegi breiðkaður. Í árunum 2020-2022 eru 48,3 mió. kr. brúktar, og roknað verður við, at 38 mió. kr. verða brúktar til nýggju farleiðina til Dals í 2023.

Við verandi arbeiðsgongd verður roknað við at tunnilin verður boraður ígjøgnum tíðliga í novembur 2023. Tá er vegagerð, portalar, liðugt tryggjan av tunlinum og annað eftir at gera, umframt at leggja inn tekniskar installatiónir, trygdarútgerð og ljós, sum samanlagt verður mett til at kosta 70-75 mió. kr. Fyrireikingar verða gjørdar til at bjóða út restina av arbeiðinum at gera tunnilin í heyst. Tað verða játtaðar 25 mió. kr. til farleiðina til Dals í 2024.

**Fámjin, tunnil og vegagerð**
Fámjinsvegurin er einbreytaður, smalur, liggur høgt, og trupulleikar eru av kava og vindi. Fyri at fáa eina hóskandi farleið verður ein tunnil við tilhoyrandi vegagerð gjørdur millum Ørðavík og Fámjin. Nýggja farleiðin verður 2,6 km tilsamans. Tunnilin verður umleið 1,2 km langur og 8,5 m breiður. Harumframt skal umleið 1 km av vegi gerast Ørðavíkarvegin, og umleið 400 m av vegi skulu gerast Fámjinsmegin. Eftir løgtingslóg nr. 48 frá 19. apríl 2022 um broyting í løgtingslóg um

Fámjinstunnil við tilhoyarandi vegum kunnu byggiútreiðslurnar til verkætlanina í mesta lagi verða 207 mió. kr.

Farið var undir at bora tunnilin í novembur 2022. Gongur sum ætlað, verður nýggja farleiðin liðug á sumri 2024. Tilfarið í fjallinum, har borað verður, er sera vánaligt, og eitt omanlop hevur verið í tunnlinum, sum hevur tarnað arbeiðinum.

Tað eru brúktar 41,5 mió. kr. til verkætlanina í árini 2020-2022. Tað eru játtaðar 90 mió. kr. í 2023, og 20,5 mió. kr. eru fluttar fram frá undanfarnum árum, soleiðis at tøk játtan er 110,5 mió. kr. í 2023. Tað verða játtaðar 84 mió. kr. til at gera verkætlanina lidna í 2024,

### Tjørnuvíkarvegurin, tunnil
Ymisk tiltøk eru gjørd til tess at tryggja Tjørnuvíkarvegin. Eitt nú er trygdarhegn sett upp á einum strekki, og vegurin er asfalteraður og bøttur í støðum. At dagføra verandi veg og at seta upp trygdarhegn varð í 2018 mett til at kosta 14-17 mió. kr. Tað vórðu brúktar 900 tús. kr. til at tryggja Tjørnuvíkarvegin í 2020, og 1,2 mió. kr. vórðu brúktar í 2021. Í 2022 vóru 1,8 mió. kr. brúktar til at tryggja farleiðina.

Tað eru játtaðar 2,5 mió. kr. til Tjørnuvíkarfarleiðina í 2023. Av játtanini er 1 mió. kr. sett av til at fyrireika og prosjektera tunnil til Tjørnuvíkar. Í 2024 verður játtanin 1 mió. kr.

### Tunnil til Vestmanna
Vestmannatunnilin verður fyrireikaður og prosjekteraður. Ein loysn er, at tunnilin verður gjørdur frá Kvívík til Vestmanna, so tað slepst undan at koyra um Høgareyn. Tað verða játtaðar 1 mió. kr. til endamálið í 2024.

### Asfaltering av landsvegunum
Asfaltering av landsvegum verður raðfest fremri, og 12 mió. kr. verða játtaðar til asfaltering í 2024.

### Átekning
Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 68.425 | 96.122 | 146.600 | 137.600 | 122.100 | 95.100 |
| Inntøkur | 131 | 483 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| **10. Nýgerð av landsvegum** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **68.425** | **96.122** | **136.600** | **125.600** | **110.100** | **85.100** |
| 11. Lønir v.m. | 106 | 5 | - | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 821 | 3.336 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -15.185 | -14.713 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 65.769 | 94.873 | 136.600 | 125.600 | 110.100 | 85.100 |
| 32. Útvegan av løgu o.ø. | 2.525 | 1.180 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 14.389 | 11.441 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **131** | **483** | **100** | **100** | **100** | **100** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | - | *414* | - | - | - | - |
| 42. Søla av løgu o.ø. | - | - | *100* | *100* | *100* | *100* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *131* | *69* | - | - | - | - |

**11. Asfaltering av landsvegunum**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **10.000** | **12.000** | **12.000** | **10.000** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | - | - | 10.000 | 12.000 | 12.000 | 10.000 |

**Virksemisyvirlit: 10 Nýgerð av landsvegum**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (netto) (1.000 kr.)** | **68.294** | **95.640** | **146.500** | **137.500** | **122.000** | **95.000** |
| 1. Ørðavík- Hov | - | - | - | - | - | - |
| 2. Dagføring av brúm og tunlum | 2.563 | 9.260 | 5.000 | 7.000 | 8.000 | 8.000 |
| 3. Vegurin omanfyri Skálafjørð | - | - | - | - | - | - |
| 4. Innkoyringarvegur til Tórshavn | - | - | - | - | - | - |
| 5. Funningsfjarðavegurin | 3.737 | 6.797 | 2.000 | - | - | 5.000 |
| 6. Trygdartiltøk, størri ábøtur og umvælingar | 13.904 | 11.661 | 7.600 | 7.600 | 7.600 | 7.600 |
| 7. Hvannasund, asfaltering við atløgubryggju | - | 519 | - | - | - | - |
| 8. Vegagerð í Kalsoy, vegir og tunlar | - | 466 | - | - | - | - |
| 9. Søldarfjørður, súkklu- og gongubreyt | - | - | - | - | - | - |
| 10. Hvalbiartunnilin | 12.430 | 143 | - | - | - | - |
| 11. Søla av jørð til kommunur | - | - | -100 | -100 | -100 | -100 |
| 12. Farleið til Viðareiðis | - | 306 | - | - | - | - |
| 13. Tunlar norður um Fjall | - | - | - | - | - | - |
| 14. Vegurin til Akrar | - | - | - | - | - | - |
| 15. Sandslíð | 840 | 514 | - | - | 23.000 | 23.000 |
| 16. Í Oyrunum, Toftir | - | - | - | - | - | - |
| 17. Undir Valaknúkum-Undir Gøtueiði, breiðkan | - | - | - | - | - | - |
| 18. Søldarfjørður, umkoyringarvegur | - | - | - | - | 30.000 | 30.000 |
| 19. Ferðsluábøtur, Vágar | 4.418 | 3.791 | 2.000 | - | - | - |
| 20. Íbinding við Sjógv í Kollafirði | - | - | - | - | - | - |
| 21. Farleiðs til Dals, tryggja verandi veg | - | - | - | - | - | - |
| 22. Signabøur, Oyrareingir | - | - | - | - | - | - |
| 23. Fámjin, tunnil og vegagerð | 3.477 | 35.981 | 90.000 | 84.000 | - | - |
| 24. Vegurin til Múla | 395 | 3 | - | - | - | - |
| 25. Ábøtur á høvuðsveg í Hvalba | - | - | - | - | - | - |
| 26. Omankoyring, Kvívík | 395 | - | - | - | - | - |
| 27. Trongisvágur, gongubreyt | - | 72 | - | - | - | - |
| 28. Tjørnuvíkarvegurin, tunnil | 1.226 | 1.797 | 2.500 | 1.000 | 1.500 | 1.500 |
| 29. Tunnil Gøtudal/Kambsdal - Skálafjørður | - | - | - | - | - | - |
| 30. Tunnil til Vestmanna | - | 1.067 | 1.000 | 1.000 | - | 15.000 |
| 31. Tunnilslið, farleið til Dals | 22.692 | 19.128 | 25.000 | 25.000 | 35.000 | - |
| 32. Selatraðarvegurin | 1.914 | 3.287 | - | - | - | - |
| 33. Suðuroyartunnil, forkanningar | - | - | - | - | - | - |
| 34. Hvalbiarfarleiðin, vegagerð í Trongisvági | - | 337 | - | - | - | - |
| 35. Froðbiarvegurin | - | 309 | - | - | - | - |
| 36. Oyndarfjarðarvegurin | 303 | 202 | - | - | 5.000 | 5.000 |
| 37. Asfaltering av landsvegum | - | - | 10.000 | 12.000 | 12.000 | - |
| 38. Depilssvingið | - | - | 1.500 | - | - | - |

## 5.38.1.09. Tunlar Norður um Fjall (Løgujáttan)

Tunlarnir norður um Fjall eru gamlir, ótíðarhóskandi, og lúka als ikki dagsins krøv til samferðslu. Tí verða nýggir tunlar gjørdir, sum lúka øll nútíðar krøv til trygd og ferðslu.

Nýggjur tunnil verður gjørdur millum Ánirnar og Árnafjørð á leið har, sum verandi tunnil er, og nýggjur tunnil verður gjørdur millum Árnafjørð og Norðtoftir á leið har, sum verandi tunnil er.

Harumframt verða vegir gjørdir millum nýggju tunlarnar, og knýtt verður í verandi landsvegir. Árnafjarðartunnilin verður 1,9 km. og Hvannasundstunnilin verður 2,1 km. Tilhoyrandi vegagerð verður 1,9 km.

Eftir løgtingslóg nr. 12 frá 28. januar 2021 um broyting í løgtingslóg um tunlar norður um Fjall við tilhoyrandi vegum, verður verkætlanin mett til at kosta umleið 522 mió. kr.

Arbeiðið at gera nýggju tunlarnar norður um Fjall gongur væl. Roknað verður við, at byggitíðin verður 4 ár, og at farleiðin verður liðug í 2024. Tunlarnir vóru sprongdir ígjøgnum 15. novembur í 2022. Síðan hevur verið arbeitt við at tryggja tunlarnar lidnar, gera vegir og portalar, og tílíkt, umframt at gera arbeiðið við teknisku installatiónunum í tunlunum, herímillum eisini trygdarskipanir.

Í 2021 vórðu brúktar 110,7 mió. kr. Í 2022 vórðu játtaðar 97 mió. kr., men játtanin varð hækkað við eykajáttan á 30 mió. kr. Tøkar vóru tí 127 mió. kr. í 2022. Nýtslan í 2022 var 130,7 mió. kr. Játtanin í 2023 er 130 mió. kr., men verður hækkað við 40 mió. kr. við eykajáttan, soleiðis at hon verður 170 mió. kr. í 2023. Tað verða játtaðar 110 mió. kr. til tunlarnar norður um Fjall í 2024 til at gera arbeiðið liðugt.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 110.721 | 130.715 | 130.000 | 110.000 | - | - |
| **10. Tunlar Norður um Fjall** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **110.721** | **130.715** | **130.000** | **110.000** | **-** | **-** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 35 | 152 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -2.265 | -2.794 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 110.692 | 130.580 | 130.000 | 110.000 | - | - |
| 32. Útvegan av løgu o.ø. | 29 | 135 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 2.230 | 2.641 | - | - | - | - |

## 5.38.1.14. Havnir (Løgujáttan)

Fleiri lendingar og atløgubryggjur á útoyggjum, sum Strandferðslan brúkar, eru ikki í nóg góðum standi. Peningur verður játtaður til at umvælingar og ábøtur av atløgubryggjum og lendingum í Svínoy, Fugloy, Mykinesi og Skúvoy. Í 2022 varð lendingin í Mykinesi dagførd og útbygd. Í Svínoy er atløgubryggjan í Víkini longd og betrað.

Í 2023 eru 4 mió. kr., sum verða brúktar til smáábøtur, og til at betra umstøðurnar hjá ferðafólki á samferðsluhavnini í Syðradali. Eftir ætlan verða 3 mió. kr. játtaðar í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 10.521 | 11.456 | 4.000 | 3.000 | 5.000 | 5.000 |
| Inntøkur | 1.700 | - | - | - | - | - |
| **10. Nýgerð av havnum** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **10.521** | **11.456** | **4.000** | **3.000** | **5.000** | **5.000** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -251 | -56 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 10.521 | 11.482 | 4.000 | 3.000 | 5.000 | 5.000 |
| 32. Útvegan av løgu o.ø. | - | -26 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 251 | 56 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **1.700** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 77. Flyting frá kommunum | *1.700* | - | - | - | - | - |

**Virksemisyvirlit: 10 Nýgerð av havnum**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **8.821** | **10.322** | **4.000** | **3.000** | **5.000** | **5.000** |
| 1. Skopun, innsiglingin | 19 | 283 | - | - | - | - |
| 2. Samferðsluhavnin í Suðuroy | - | - | - | - | - | - |
| 3. Havnir í Svínoy | 5.508 | 6.460 | - | - | - | - |
| 4. Smáábøtur | 26 | 157 | 3.000 | 3.000 | 5.000 | 5.000 |
| 5. Kirkja og Hattarvík | - | - | - | - | - | - |
| 6. Samferðsluhavnin á Syðradali | - | - | 1.000 | - | - | - |
| 7. Mykines, lendingin | 10 | 3.422 | - | - | - | - |
| 8. Brimverjur | 3.258 | - | - | - | - | - |

## 5.38.1.18. Stuðul til infrakervið á útoyggjum (Stuðulsjáttan)

Málsøkið verður fyrisitið við heimild í lógtingslóg nr. 137 frá 13. desember 2005, og kunngerð nr. 10 frá 7. mars 2006, um at veita stuðul til íløgur í infrakervið á útoyggj. Endamálið við lógini er at skapa fyritreytir fyri at betra um trivnaðin og vinnuligu møguleikarnar á útoyggjum.

Landsstýrismaðurin kann eftir umsókn veita kommunum stuðul til íløgur í infrakervið til byggi- og løguarbeiði viðvíkjandi samferðslu, og byggi- og løguarbeiði til vinnulig, mentanarlig, ítróttarlig og onnur endamál. Útoyggjar, sum koma undir hesa skipan, eru Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

Stuðulin skal verða innanfyri karmarnar í § 50 í Kommunustýrislógini, har tað m.a. er ásett, at kommunur einans kunnu taka lut í vinnuligum virksemi, um so er, at tað tænir einum almannagagnligum endamáli.

Tilsagnir um stuðul kunnu verða veittar av árligu játtanini í tveimum fylgjandi fíggjarárum. Landsverk umsitur játtanina. Í teimum førum, tá kommunur standa fyri arbeiðinum, verður stuðulin goldin eftir skjalprógvaðum útreiðslum, tá arbeiðið er sýnað og góðkent.

Játtanin fyri 2024 verður 700 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 300 | 75 | 700 | 700 | 700 | 700 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **300** | **75** | **700** | **700** | **700** | **700** |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 300 | 75 | 700 | 700 | 700 | 700 |

## 5.38.1.21. Stuðul til havnir (Stuðulsjáttan)

Løgtingið játtaði 3 mió. kr. í mai 2021 til at stuðla smærri kommunum til at gera neyðugar umvælingar av havnaløgum, brimverjum og líknandi, ið fingu skaða í ódnarveðrinum, sum var tíðliga í 2020.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 3.000 | 0 | - | - | - | - |
| **01. Stuðul til havnir** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **3.000** | **0** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 3.000 | -3.000 | - | - | - | - |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | - | 3.000 | - | - | - | - |

## 5.38.1.22. Asfalt- og skervverk (Løgujáttan)

Asfaltverkini og skervverkini hjá Landsverki vóru niðurslitin, og tí fór Landsverk undir at endurnýggja asfaltverkið á Sundi og útvega flytført skervverk. Eftir løgtingslóg nr. 56 frá 2. mai 2022 um at endurnýggja asfaltsverk og skervverk hjá Landsverki kundi útreiðslurnar í mesta lagi verða 34,5 mió. kr. Flytføra skervverkið var liðugt útvegað í 2022 og asfaltsverkið liðugt endurnýggjað í 2023.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 9.917 | 23.159 | 8.000 | - | - | - |
| **10. Asfaltverkið á Sundi** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **6.415** | **16.218** | **8.000** | **-** | **-** | **-** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | 535 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -28 | -725 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 6.415 | 16.218 | - | - | - | - |
| 32. Útvegan av løgu o.ø. | - | - | 8.000 | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 28 | 190 | - | - | - | - |
| **11. Skervverk** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **3.502** | **6.942** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -6 | -4 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 3.502 | 6.942 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 6 | 4 | - | - | - | - |

## 5.38.2. Samferðsla

### 5.38.2.01. Strandfaraskip landsins (Rakstrarjáttan)

Høvuðsuppgávan hjá Strandfaraskipum Landsins er at lúka landsins tørv á innanlands fólkaflutningi og farmaflutningi. Sum landsfyritøka skal Strandferðslan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum grundarlagi.

Strandferðslan verður rikin sambært reglugerð frá 30. juli 2015. Flutningsskyldan hjá Strandferðsluni er ásett í løgtingslóg nr. 82 frá 15. mai 2001 um fólka- og farmaflutning, við seinni broytingum.

Útreiðslurnar hjá Strandfaraskipum landsins eru bundnar av galdandi ferðaætlanum og m.a. busssáttmálum hjá Bygdaleiðum, avtalum um havnargjøld, oljuprísinum og lønarsáttmálum. Busssáttmálarnir vóru endurnýggjaðir í 2020 at galda í 7 ár.

Dokkingar av ferjum, undantikið Smyril, og størri viðlíkahald og tólbúnaður eru partar av rakstrarjáttanini hjá Strandferðsluni. Sí eisini høvuðskontu 5.38.2.02. Strandfaraskip Landsins (Løgujáttan).

Í sambandi við fíggjarlógina fyri 2024 verða atlit tikin til ymisk viðurskifti. Siglingin á Sandoyarleiðini verður niðurløgd, og busssambandið við meginøkið verður eftir ætlan betrað. Farmasiglingin á Suðuroyarleiðini verður endurskoðað, soleiðis at tað ber til at fáa eina bíligari skipan. Eftir ætlan verður prísbygnaðurin hjá Strandferðsluni broyttur, soleiðis at tænastustøðið kann gerast enn betri í framtíðini.

Rakstrarjáttanin hjá Strandferðsluni er 262,3 mió. kr. í 2023, íroknað umbidna eykajáttan. Í 2024 verður játtanin 230,7 mió. kr.

Játtanin er millum annað treytað av, at undirtøka verður fyri at skipa farmaflutningin øðrvísi, og at tað ber til at fremja í verki. Broytti prísbygnaðurin er treytaður av, at játtan verður til at menna ferðaseðla- og bíleggingarskipanina. Nú Sandoyarleiðin verður niðurløgd, verður Hestleiðin dýrari, tí eitt skip skal røkja Hestleiðina burturav, og eitt betrað busssamband millum Sandoynna og meginøkið hevur eisini kostnað við sær.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 199.435 | 246.232 | 252.251 | 230.662 | 229.000 | 229.000 |
| Útreiðslur | 272.070 | 316.472 | 326.821 | 294.773 | 293.111 | 293.111 |
| Inntøkur | 72.635 | 70.240 | 74.570 | 64.111 | 64.111 | 64.111 |
| **20. Landsfyritøka** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 199.435 | 246.232 | 252.251 | 230.662 | 229.000 | 229.000 |
| **Útreiðslur** | **272.070** | **316.472** | **326.821** | **294.773** | **293.111** | **293.111** |
| 11. Lønir v.m. | 96.540 | 102.899 | 106.626 | 89.500 | 89.500 | 89.500 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 122.337 | 170.993 | 167.800 | 169.934 | 169.934 | 169.934 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 3.101 | 3.310 | 1.900 | 5.101 | 5.101 | 5.101 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 47.943 | 35.998 | 49.800 | 25.308 | 25.308 | 25.308 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 1.393 | 2.172 | 370 | 1.197 | 1.197 | 1.197 |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 311 | 333 | 305 | 333 | 333 | 333 |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 5 | - | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 440 | 767 | 20 | 3.400 | 1.738 | 1.738 |
| **Inntøkur** | **72.635** | **70.240** | **74.570** | **64.111** | **64.111** | **64.111** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *71.877* | *69.505* | *74.000* | *63.541* | *63.541* | *63.541* |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | *-87* | - | - | - | - | - |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *-0* | - | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *845* | *734* | *570* | *570* | *570* | *570* |

**Virksemisyvirlit: Oyggjaleiðir**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Inntøkur Oyggjaleiðir (1.000 kr.)** | **59.666** | **51.442** | **59.666** | **54.173** | **54.173** | **54.173** |
| Suðuroy | 41.236 | 34.977 | 39.603 | 44.925 | 44.925 | 44.925 |
| Sandoy | 10.334 | 8.337 | 10.600 | 0 | 0 | 0 |
| Hasfjord | 1.000 | 521 | 1.000 | 0 | 0 | 0 |
| Nólsoy | 2.527 | 2.656 | 2.530 | 3.460 | 3.460 | 3.460 |
| Kalsoy | 2.463 | 2.549 | 2.500 | 3.560 | 3.560 | 3.560 |
| Fugloy | 638 | 515 | 578 | 590 | 590 | 590 |
| Skúvoy | 313 | 158 | 200 | 203 | 203 | 203 |
| Mykines | 1.155 | 922 | 1.155 | 1.435 | 1.435 | 1.435 |
| Herjólfur | 0 | 807 | 1.500 | 0 | 0 | 0 |
| **B: Útreiðslur Oyggjaleiðir (1.000 kr.)** | **206.489** | **226.292** | **241.467** | **203.719** | **202.153** | **202.608** |
| Suðuroy | 101.101 | 128.710 | 118.925 | 122.451 | 122.451 | 122.451 |
| Sandoy | 25.767 | 27.133 | 27.367 | 5.060 | 3.494 | 3.949 |
| Hasfjord | 4.784 | 7.010 | 5.547 | 0 | 0 | 0 |
| Nólsoy | 13.643 | 15.419 | 14.814 | 15.220 | 15.220 | 15.220 |
| Kalsoy | 10.164 | 9.015 | 11.613 | 9.430 | 9.430 | 9.430 |
| Fugloy | 6.696 | 8.781 | 7.501 | 7.440 | 7.440 | 7.440 |
| Skúvoy | 5.211 | 4.627 | 5.934 | 4.400 | 4.400 | 4.400 |
| Mykines | 2.379 | 2.810 | 2.220 | 2.620 | 2.620 | 2.620 |
| Erla Kongsdóttir | 2.679 | 4.090 | 3.604 | 7.550 | 7.550 | 7.550 |
| Herjólfur/farmaleið | 23.000 | 13.680 | 32.531 | 20.000 | 20.000 | 20.000 |
| Sjódeild, fyrisiting | 11.065 | 5.017 | 11.411 | 9.548 | 9.548 | 9.548 |

**Virksemisyvirlit: Bygdaleiðir o.a.**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Aðrar inntøkur (1.000 kr.)** | **14.904** | **17.624** | **14.904** | **17.938** | **17.938** | **17.938** |
| Bygdaleiðir | 13.440 | 15.660 | 13.440 | 16.075 | 16.075 | 16.075 |
| Farstøðir og avgreiðslur | 1.464 | 1.964 | 1.464 | 1.863 | 1.863 | 1.863 |
| **B: Aðrar útreiðslur (1.000 kr.)** | **78.370** | **90.078** | **85.354** | **99.054** | **99.054** | **99.054** |
| Bygdaleiðir | 53.157 | 60.062 | 60.141 | 67.463 | 67.463 | 67.463 |
| Farstøðir og avgreiðslur | 12.361 | 15.557 | 12.361 | 16.121 | 16.121 | 16.121 |
| Fyrisiting | 12.852 | 14.459 | 12.852 | 15.470 | 15.470 | 15.470 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Landsfyritøka**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 182,0 | 190,0 | 190,0 | 177,0 | 177,0 | 177,0 |
| Fulltíðarstørv | 183,0 | 191,0 | 191,0 | 178,0 | 178,0 | 178,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 96,5 | 102,9 | 106,6 | 89,5 | 89,5 | 89,5 |

## 5.38.2.02. Strandfaraskip landsins (Løgujáttan)

### Undirkonta 03. Suðuroyarskip

Játtanin fyri 2024 verður 7 mió. kr. til umvælingar og viðlíkahald á Smyrli. Í 2025 skal Smyril til 20 ára klassing, og ymiskar dagføringar verða eisini gjørdar í hesum sambandi.

### Undirkonta 26. Søla av Teistanum

Sandoyartunnilin letur upp fyri almennari ferðslu síðst í 2023, og tá verður ikki tørvur á Teistanum á Sandoyarleiðini longur. Ætlanin er at selja skipið.

### Undirkonta 27. Endurnýggjan av Strandferðsluskipunum

Landsstýrið hevur sett sær fyri endurnýggja strandfaraskipini. Í 2023 eru 3 mió. kr. játtaðar til at gera kanningar og fyrireikingar, og somuleiðis verða 3 mió. kr. játtaðar í 2024. Eftir ætlan verður farið undir at byggja skip til Kalsoyarleiðina í 2025.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 7.072 | 41.167 | 25.000 | 10.000 | 105.000 | 67.000 |
| Inntøkur | - | 4.275 | 3.500 | 30.000 | - | - |
| **03. Suðuroyarskip** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **7.072** | **30.056** | **22.000** | **7.000** | **45.000** | **7.000** |
| 11. Lønir v.m. | - | 1.633 | - | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 36 | 107 | - | - | - | - |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | 1 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 7.036 | 28.316 | 22.000 | 7.000 | 45.000 | 7.000 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -7.072 | -30.056 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 7.072 | 30.056 | - | - | - | - |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **24. Fraktferja/avloysaraskip til Suðuroyarleiðina** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **11.111** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 11. Lønir v.m. | - | 265 | - | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | 211 | - | - | - | - |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | 17 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 10.619 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | -11.111 | - | - | - | - |
| 32. Útvegan av løgu o.ø. | - | 11.111 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **4.275** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | - | *4.275* | - | - | - | - |
| **25. Søla av Hasfjord** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **3.500** | **-** | **-** | **-** |
| 42. Søla av løgu o.ø. | - | - | *3.500* | - | - | - |
| **26. Søla av Teistanum** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **-** | **30.000** | **-** | **-** |
| 42. Søla av løgu o.ø. | - | - | - | *30.000* | - | - |
| **27. Endurnýggjan av strandfaraskipunum** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **3.000** | **3.000** | **60.000** | **60.000** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | - | - | 3.000 | 3.000 | 60.000 | 60.000 |

## 5.38.2.04. Tyrlutænastan (Rakstrarjáttan)

Sáttmáli millum landsstýrið og Atlantsflog er fyri tíðarskeiðið 1. januar 2016 til og við 31. desember 2025, um flúgving millum oyggjarnar við tyrlu. Endamálið er at hava gott ferðasamband, serliga til útoyggjar.

Samlaði kostnaðurin er 44,4 mió. kr. árliga. Parturin innan samferðslumál er 14,3 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 14.300 | 14.904 | 14.300 | 14.300 | 14.300 | 14.300 |
| Útreiðslur | 14.300 | 14.904 | 14.300 | 14.300 | 14.300 | 14.300 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 14.300 | 14.904 | 14.300 | 14.300 | 14.300 | 14.300 |
| **Útreiðslur** | **14.300** | **14.904** | **14.300** | **14.300** | **14.300** | **14.300** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 14.300 | 14.904 | 14.300 | 14.300 | 14.300 | 14.300 |

## 5.38.2.21. Stuðul til útoyggjar (Stuðulsjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 86 frá 14. desember 1998 um útjavningarstuðul til útjaðaraøki er heimilað at javna ein part av meirkostnaðinum av at flyta olju og annan farm til fastbúgvandi í útjaðaraøkjum í Føroyum.

Útjaðaraøki eru eftir lógini at skilja sum Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Nólsoy, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

Flestu vørur, sum stuðul annars verður veittur til, er til flutning av landbúnaðarvørum, umframt smápakkum.

Stuðulin verður fyrisitin eftir reglugerð frá 7. februar 2006, fyri útjavningarstuðul til útjavningarøki. Flutningsfeløgini Strandfaraskip Landsins, Posta og Atlantsflog umsita skipanina, og tey fáa eftir ætlan ávikavist 825 tús. kr., 150 tús. kr. og 525 tús. kr. í stuðli til endamálið.

Fiskivinnu- og Samferðslumálaráðið skal eftir lokið fíggjarár hava útgreinaðan roknskap við grannskoðaravváttan.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.432 | 1.305 | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.432** | **1.305** | **1.500** | **1.500** | **1.500** | **1.500** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 587 | 571 | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 845 | 734 | - | - | - | - |

## 5.38.4. Ferðslutrygd

### 5.38.4.01. Akstovan (Rakstrarjáttan)

Akstovan umsitur akfarseftirlit, skrásetir og umskrásetir akfør, útvegar koyrikort og krevur inn vegskatt og avgjøld á motorakførum. Virksemið hjá Akstovuni verður fíggjað við tænastugjøldum, sum eru ásett í løgtingslóg nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, við seinni broytingum.

Uppgávurnar hjá Akstovuni, sambært ferðslulógini og kunngerðum, eru hesar:

- akfarseftirlit, undir hesum regluligt sýn, umsýn og skrásetingarsýn
- umsita klippilista fyri akfør, sum ikki hava møtt til sýn og umsýn
- kanning av skaddum akførum við álvarsamar ferðsluvanlukkur
- veita øðrum myndugleikum atstøðu við viðgerð av ferðslumálum
- skráseting av nýggjum akførum og umskráseting av brúktum akførum
- umsita klippilista fyri akfør sum skylda trygging
- stíla fyri ástøðiligum og verkligum koyriroyndum
- útvega fólki koyrikort
- stíla fyri eftiransandi koyriroyndum
- viðgera heilsumál og fremja vegleiðandi heilsuligar koyriroyndir í sambandi við koyrikortmál
- fyrireikandi lógararbeiði í sambandi við broyting í ferðslulóg og kunngerðum

Uppgávurnar hjá Akstovuni sambært løgtingslóg um vektgjald, eru hesar:

- senda hálvárlig krøv og áminning til allar eigarar av gjaldsskyldugum akførum
- krevja inn vegskattaeftirstøður og senda bilar til plátumiss, sum ikki gjalda rættstundis

Uppgávurnar hjá Akstovuni sambært løgtingslóg um avgjøld á motorakførum, eru hesar:

- krevja inn skrásetingargjøld í sambandi við skráseting av motorakførum
- krevja inn burturbeiningargjøld í sambandi við skráseting av motorakførum og skráseta burturbeining av motorakførum
- útgjalda skrásetingargjøld í sambandi við útflutning av motorakførum

Akstovan hevur saman við Talgildu Føroyum ment eitt føroyskt talgilt koyrikort.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 3 | -309 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Útreiðslur | 18.189 | 18.152 | 18.947 | 18.947 | 18.947 | 18.947 |
| Inntøkur | 18.187 | 18.461 | 18.947 | 18.947 | 18.947 | 18.947 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 3 | -309 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **18.189** | **18.152** | **18.947** | **18.947** | **18.947** | **18.947** |
| 11. Lønir v.m. | 9.647 | 9.998 | 10.400 | 10.400 | 10.400 | 10.400 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 6.895 | 6.678 | 6.000 | 6.000 | 6.000 | 6.000 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 556 | 276 | 1.200 | 1.200 | 1.200 | 1.200 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.090 | 944 | 1.347 | 1.347 | 1.347 | 1.347 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 3 | 1 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 0 | 0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 254 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **18.187** | **18.461** | **18.947** | **18.947** | **18.947** | **18.947** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *174* | *132* | *200* | *200* | *200* | *200* |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *19* | *5* | *17* | *17* | *17* | *17* |
| 61. Skattir og avgjøld | *1* | - | - | - | - | - |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | *17.992* | *18.324* | *18.730* | *18.730* | *18.730* | *18.730* |

**Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **18.189** | **18.152** | **18.947** | **18.947** | **18.947** | **18.947** |
| 1. Leiðsla og hjálparvirksemi | 3.507 | 3.385 | 3.411 | 3.411 | 3.411 | 3.411 |
| 2. Sýn | 6.359 | 6.081 | 7.200 | 7.200 | 7.200 | 7.200 |
| 3. Koyrikort | 3.382 | 2.932 | 3.789 | 3.789 | 3.789 | 3.789 |
| 4. Akfarsskráseting | 4.941 | 5.754 | 4.547 | 4.547 | 4.547 | 4.547 |
| 5. Endurnýggjan av útgerð til sýn av akførum | - | - | - | - | - | - |
| **B: Virksemi (tal)** | **28.603** | **25.569** | **28.300** | **28.300** | **28.300** | **28.300** |
| 2. Framdar sýningar | 12.876 | 11.841 | 12.500 | 12.500 | 12.500 | 12.500 |
| 3. Útvegað koyrikort | 3.640 | 3.355 | 3.500 | 3.500 | 3.500 | 3.500 |
| 4.1. Skrásett akfør í árinum | 3.238 | 2.552 | 3.300 | 3.300 | 3.300 | 3.300 |
| 4.2. Umskrásett akfør í árinum | 8.849 | 7.821 | 9.000 | 9.000 | 9.000 | 9.000 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| 2. Útreiðslur fyri hvørt sýn | 610 | 633 | 576 | 576 | 576 | 576 |
| 3. Útreiðslur fyri hvørt koyrikort | 1.150 | 984 | 1.083 | 1.083 | 1.083 | 1.083 |
| 4. Útreiðslur fyri hvørja skráseting/umskrás. | 507 | 554 | 370 | 370 | 370 | 370 |
| **D: Tørvur (tal)** | | | | | | |
| 2. Tørvur á framdum sýnum | 16.000 | 16.000 | 16.500 | 16.500 | 16.500 | 16.500 |
| **E: Tørvsfulnaður (í %)** | | | | | | |
| 2. Sýn | 80 | 74 | 76 | 76 | 76 | 76 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 20,0 | 20,0 | 21,0 | 21,0 | 21,0 | 21,0 |
| Fulltíðarstørv | 21,0 | 21,0 | 22,0 | 22,0 | 22,0 | 22,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 9,6 | 10,0 | 10,4 | 10,4 | 10,4 | 10,4 |

## 5.38.4.04. Ráðið fyri ferðslutrygd (Stuðulsjáttan)

Ráðið fyri ferðslutrygd (RFF) skal:

- Betra ferðsluvanarnar við upplýsing og fjølbroyttum fyritaksemi
- Stuðla ferðsluundirvísingini við ráðgeving og stuðli
- Útvega tíðarhóskandi og viðkomandi undirvísingarmiðlar í ferðslulæru
- Skipa fyri skeiðsvirksemi og trygdarfremjandi verkætlanum
- Geva sakliga upplýsing um øll viðurskifti, sum eru til ampa fyri ferðslutrygdina
- Samstarva við myndugleikar, stovnar og einstaklingar um ferðslutrygdarspurningar
- Fáa støðugar og viðkomandi upplýsingar um ferðsluóhapp og vanlukkur, skaðaorsøkir o.a. at nýta í ferðslutrygdararbeiðinum
- Fáa regluligt fjølmiðlainnivist um ferðslutrygdarboðskap ráðsins

Játtanin varð í 2023 hækkað við 200 tús. kr. til at seta eina skaðanevnd á stovn. Endamálið er at kanna og varpa ljós á møguligar orsøkir til, hví ferðsluvanlukkur henda, og á hendan hátt at fyribyrgja aðrar ferðsluvanlukkur.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.200 | 1.200 | 1.400 | 1.400 | 1.400 | 1.400 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.200** | **1.200** | **1.400** | **1.400** | **1.400** | **1.400** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.200 | 1.200 | 1.400 | 1.400 | 1.400 | 1.400 |

**Virksemisyvirlit: 01 Stuðul**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Útreiðslur (1.000 kr.)** | **2.300** | **2.300** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** |
| Skrivstovuhald | 1.200 | 1.200 | 1.300 | 1.300 | 1.300 | 1.300 |
| Tiltøk: Skeið, undirvísing, lýsingar o.a. | 1.100 | 1.100 | 1.200 | 1.200 | 1.200 | 1.200 |
| **B: Inntøkur (1.000 kr.)** | **2.300** | **2.300** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** |
| Landskassastuðul | 1.200 | 1.200 | 1.400 | 1.400 | 1.400 | 1.400 |
| Tryggingarfeløg og aðrar inntøkur | 800 | 800 | 800 | 800 | 800 | 800 |
| Kommunur og limagjald | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 |

# § 6 Uttanríkis- og vinnumál

## Felagsútreiðslur

### 6.11.1. Fyrisiting

#### 6.11.1.06. Uttanríkis- og vinnumálaráðið (Rakstrarjáttan)

Uttanríkis- og vinnumálaráðið er stjórnarráð hjá landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum. Talan er um eitt breitt samansett málsøki, har ráðið og tilhoyrandi stovnar umsita tær áleið 110 lógirnar, sum landsstýrismaðurin, heilt ella lutvíst, situr fyri.

**Vinnudeildin** tryggjar føroyskum vinnulívi góðar og stimbrandi karmar og hevur ábyrgdina av vinnuliga lógarverkinum. Virkisøkini eru m.a. sjóvinna, alivinna, ferðavinna, matstovu- og gistingarhúsvinna, landbúnaður, fjarskifti, matvøruframleiðsla og -útflutningur, djór og djóravælferð, kappingarmál, kolvetni, vinnufeløg, íverksetan og skapandi vinnur.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið arbeiðir harumframt áhaldandi við at:

- Gera ætlanir fyri øki, sum hava týdning fyri menning, vøkstur og virðisskapan innan verandi og nýggjar vinnur kring alt landið
- Gera ætlanir fyri, hvussu kapitalur og arbeiðsmegi verða tilskundað at flyta frá minni produktivum vinnum til meira produktivar vinnur

**Uttanríkistænastan (undirkonta 28)** fyrisitur milljumtjóðasamstarv, handilsmál, altjóða rætt, trygdarmál og verjumál, alment diplomati og tjóðarbranding umframt menningarsamstarv sum er málsøki hjá landsstýrismanninum í lógarmálum. Í játtanini er 1/2 starv svarandi til 375 tús. kr. flutt til Løgmálaráðið. Samstundis er 1/2 starv raðfest í játtanini, soleiðis at tað framvegis er eitt fulltíðarstarv.

**Undirkonta 21. Marknaðarføring**
Játtanin er m.a. til at marknaðarføra føroyska nýskipan og nýggjar vinnur sum íløguland. Hetta verður m.a. gjørt við at luttaka í vinnurættaðu pørtunum av granskingarsamstarvinum Horizon Europe 2021-2027, m.a. innan økini SME og KST og í átøkum uttanlands, sum Uttanríkis- og vinnumálaráðið fyriskipar, saman við føroysku vinnuframaskipanini.

Landsstýrið gongur á odda at gera og seta í verk hóskandi strategi saman við vinnuni, soleiðis at tiltøkini gagna landi og vinnu á besta hátt.

**Undirkonta 26. Maritimur tænastudepil**
Játtanin umfatar m.a. samskipan og saman við vinnuni at skipa fyri miðvísari marknaðarføring av maritimum tænastum, sum føroyskar fyritøkur og stovnar hava at bjóða.

**Undirkonta 29. Yvirtøka av loftrúmi og loftferðslu**
Farið verður undir fyrireikinar at yvirtakað loftferðsluna yvir Føroyum. Tørvur er á at keypa serfrøðingarhjálp í hesum sambandi.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 14.481 | 14.903 | 22.372 | 22.783 | 22.783 | 22.783 |
| Útreiðslur | 14.481 | 14.918 | 22.372 | 22.783 | 22.783 | 22.783 |
| Inntøkur | - | 16 | - | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 14.429 | 14.784 | 9.624 | 9.827 | 9.827 | 9.827 |
| **Útreiðslur** | **14.429** | **14.800** | **9.624** | **9.827** | **9.827** | **9.827** |
| 11. Lønir v.m. | 11.988 | 12.650 | 8.397 | 8.630 | 8.630 | 8.630 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.855 | 1.748 | 936 | 906 | 906 | 906 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 158 | 158 | 58 | 58 | 58 | 58 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 42 | 31 | 31 | 31 | 31 |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 0 | 0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 428 | 201 | 202 | 202 | 202 | 202 |
| **Inntøkur** | **-** | **16** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *16* | - | - | - | - |
| **22. Marknaðarføring** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 52 | 52 | 310 | 310 | 310 | 310 |
| **Útreiðslur** | **52** | **52** | **310** | **310** | **310** | **310** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2 | 2 | 310 | 310 | 310 | 310 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 50 | 50 | - | - | - | - |
| **26. Maritimur tænastudepil** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | 67 | 400 | 350 | 350 | 350 |
| **Útreiðslur** | **-** | **67** | **400** | **350** | **350** | **350** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | 100 | 50 | 50 | 50 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 67 | - | - | - | - |
| **28. Uttanríkistænastan** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | 11.838 | 12.096 | 12.096 | 12.096 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **11.838** | **12.096** | **12.096** | **12.096** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 9.294 | 9.552 | 9.552 | 9.552 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | 2.170 | 2.170 | 2.170 | 2.170 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | 40 | 40 | 40 | 40 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | - | 44 | 44 | 44 | 44 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | - | 290 | 290 | 290 | 290 |
| **29. Yvirtøka av loftrúmi og loftferðslu** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | 200 | 200 | 200 | 200 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **200** | **200** | **200** | **200** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | 200 | 200 | 200 | 200 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 3,0 | 3,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Onnur | 16,0 | 16,0 | 9,1 | 9,1 | 9,1 | 9,1 |
| Fulltíðarstørv | 19,0 | 19,0 | 11,1 | 11,1 | 11,1 | 11,1 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 12,0 | 12,7 | 8,4 | 8,6 | 8,6 | 8,6 |

**Starvsfólkayvirlit: 28 Uttanríkistænastan**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Onnur | - | - | 10,0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 |
| Fulltíðarstørv | - | - | 12,0 | 12,0 | 12,0 | 12,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | - | - | 9,3 | 9,6 | 9,6 | 9,6 |

# Uttanríkismál

## 6.13.1. Sendistovur

### 6.13.1.01. Sendistovur (Rakstrarjáttan)

**Undirkonta 21. Sendistova Føroya til Evropasamveldið**
Serstøk mál hjá sendistovuni í Brússel fevna m.a. um:

- At umboða Føroyar mótvegis Evropasamveldinum
- Í samstarvi við Uttanríkistænastuna og avvarðandi stjórnarráð/stovn at varða av sáttmálum Føroya við ES, t.e. sáttmálar um handils-, heilsufrøðilig- og fiskivinnumál eins og granskingarmál
- At fylgja við ES málum, ið kunnu hava týdning og avleiðingar fyri Føroyar
- At arbeiða fyri at gera Føroyar sjónligari á evropeiska meginlandinum
- At veita tænastur til vinnufyritøkur
- At geiða fyrispurningar frá einstakum, vinnu og stovnum
- At veita tænastur til myndugleikar og vinnufyritøkur

Sendistovan í Brússel húsast í egnum hølum, sum eru á leið 350 fermetrar til støddar. Sendistovan hevur umstøður at hýsa fundum vegna stjórnarráð ella vinnufeløg, ið hava áhugamál at røkja í Brússel.

Umframt lønarframskriving er nettojáttanin hækkað 900 tús. kr. til eitt diplomatiskt starv. 250 tús. kr. eru settar av til umbygging, umvæling og innbúgv, og 200 tús. kr. í sambandi við, at leiguinntøkurnar lækka, tí at sendistovan partvíst skal nýta hølini sjálv, og partvíst tí at krøvini til, hvør kann leiga frá sendistovum av trygdaráum, eru herd.

Ein partur av játtanini, 600 tús. kr. verða nýttar til nationalan serfrøðing í ES-skipanini, sum skal virka fyri styrktum samstarvi millum Føroyar og ES.

**Undirkonta 22. Sendistova Føroya til Danmarkar**
Serstøk mál hjá sendistovuni í Keypmannahavn fevna m.a. um:

- At umbooða Føroyar mótvegis donskum stjónarráðum og myndugleikum
- Mál, har donsk stjórnarráð ráðføra seg við sendistovuna
- Regluligar fundir millum føroyskar og danskar myndugleikar
- Samskifti við aðrar sendistovur í Keypmannahavn serstakliga fyri at fremja búskaparligu áhugamál Føroya
- At veita hølisumstøður og aðrar tænastur til føroyskar myndugleikar og vinnulív
- At virka fyri, at Føroyar verða sjónligari í Danmark

Sendistovan í Keypmannahavn húsast á Norðurbryggjuni og ræður yvir fleiri skrivstovum, ið verða endurleigaðar einari altjóða skrivstovu og øðrum. Føroysk stjórnarráð, stovnar og fyritøkur nýta skrivstovu- og fundarhølini.

Ein týdningarmikil partur av virkseminum er at røkja sambond við aðrar sendistovur í Keypmannahavn, tí tær hava eisini Føroyar sum teirra arbeiðsøki.

Sendistovan veitir tænastur til føroyskar og útlendskar fyritøkur í handilsligum viðurskiftum, ið stuðla føroyskari útflutningsvinnu og samhandli.

Sendistovan røkir harumframt uppgávur í sambandi við føroyska umhvørvið í Keypmannahavn, herímillum Føroyahúsið og føroysku deildina á Vestara kirkjugarði.

**Undirkonta 23. Sendistova Føroya til Bretlands og Írlands**
Serstøk mál hjá sendistovuni í London fevna m.a. um:

- At virka fyri góðum sínámillum viðurskiftum millum Føroyar og ávikavist Bretland og Írland, bæði við støði í sínámillum avtalum og við atliti at menna nýggj samstarvsøki
- At veita tænastur til myndugleikar og vinnufyritøkur
- At greiða fyrispurningar frá einstaklingum, vinnu og stovnum
- At gera Føroyar sjónligari í Bretlandi og Írlandi, m.a. við at fremja mentanarsamstarv
- At røkja atlimaskap Føroya í IMO og sambond við millumtjóðafelagsskapir í Bretlandi, eitt nú NEAFC og NASCO

Sendistovan í London hevur, síðani hon var stovnað í 2002, hildið til í hølunum hjá donsku sendistovuni í London.

**Undirkonta 24. Sendistova Føroya til Íslands**
Serstøk mál hjá sendistovuni í Reykjavík fevna m.a. um:

- At umboða Føroyar mótvegis Íslandi og at røkja føroysk áhugamál í Íslandi
- Í samstarvi við Uttanríkistænastuna at varða av áhugamálum Føroya sambært Hoyvíkssáttmálanum, m.a. at beina burtur forðingar fyri vinnuligum virksemi landanna millum
- At menna mentanarsamstarv millum Føroyar og Ísland
- At greiða fyrispurningar frá einstaklingum, vinnu og stovnum
- At veita tænastur til myndugleikar og vinnufyritøkur
- At virka fyri at gera Føroyar sjónligari í Íslandi
- Harumframt fer sendistovan at røkja føroysk áhugamál í Grønlandi og at virka fyri styrktum samstarvi millum Føroyar og Grønland

Sendistovan í Reykjavík lat upp í egnum hølum í september 2007. Sendistovan flutti í 2013 í nýggj høli, sum liggja væl í sendistovuumhvørvi í Reykjavík. Harumframt hevur sendistovan eisini atgongd til ein sal, sum er 150 fermetrar, ið er væl hóskandi til størri tiltøk, so sum móttøkur, listaframsýningar, tónleik og vinnuátøk.

Sendistovan veitir harumframt føroyskum fyritøkum og myndugleikum møguleika fyri styttri innivist í skrivstovu, fundarhøli og møguleika fyri framsýningum.

**Undirkonta 25. Sendistova Føroya til Russlands**
Serstøk mál hjá sendistovuni í Moskva fevna m.a. um:

- At umboða Føroyar mótvegis Russlandi og hinum londunum í Eurasisku tollsamgonguni; Kasakstan, Hvítarusslandi, Armenia og Kirgisistan, ið sendistovan nú eisini er formliga akkrediterað til, umframt Ukraina
- At røkja føroysk áhugamál í nevndu tollsamgongulondunum og Ukraina og støðugt virka fyri, at tilgongdin fram ímóti betri og meira fjøltáttaðari marknaðaratgongd og fríhandilsavtalu kann verða hildin á rættari kós
- At virka fyri at bøta um marknaðaratgongdina annars hjá føroyskum útflytarum - bæði í Russlandi og í hinum londunum, ið eru nevnd omanfyri
- At veita tænastur til føroyskar vinnufyritøkur
- At virka fyri at gera Føroyar sjónligari í Russlandi

Sendistovan í Moskva lat upp í 2015. Sendistovan húsast í hølunum hjá donsku sendistovuni í Moskva. Arbeitt hevur verið við at útvega sendistovuni betri hølisviðurskifti, men orsakað av serligu støðuni er tað fyribils steðgað. Sendimaðurin røkir í løtuni starvið úr Føroyum.

**Undirkonta 26. Sendistova Føroya til Kina**
Serstøk mál hjá sendistovuni í Kina fevna m.a. um:

- At umboða Føroyar mótvegis Kina, Japan, Suðurkorea og øðrum viðkomandi londum í fjareystri
- At røkja føroysk áhugamál og støðugt virka fyri, at tilgongdin fram ímóti betri og meira fjøltáttaðari marknaðaratgongd og fríhandilsavtalu kann verða hildin á rættari kós
- At virka fyri at bøta um marknaðaratgongdina annars hjá føroyskum útflytarum
- At veita tænastur til føroyskar vinnufyritøkur
- At virka fyri at gera Føroyar sjónligari í Kina og øðrum londum har um leiðir

Sendistovan í Beijing lat upp í 2019. Sendistovan húsast í hølunum hjá donsku sendistovuni í Beijing.

**Undirkonta 27. Sendistova Føroya til Ísraels**
Serstøk mál hjá sendistovuni í Tel Aviv fevna m.a. um:

- At umboða Føroyar mótvegis Ísrael og at røkja føroysk áhugamál í Ísrael
- At virka fyri góðum sínámillum viðurskiftum millum Føroyar og Ísrael
- At veita føroyskum vinnulívi hjálp og góðar umstøður á ísraelska marknaðinum
- At virka fyri góðari marknaðaratgongd
- At veita tænastur til vinnufyritøkur
- At gera Føroyar sjónligari í Ísrael

Sendistovan í Tel Aviv lat upp í 2021. Sendistovan húsast í hølunum hjá donsku sendistovuni í Tel Aviv.

**Undirkonta 28. Sendistova Føroya til USA**

Serstøk mál hjá sendistovuni í Washington fevna m.a. um:

- At umboða Føroyar mótvegis USA og at røkja føroysk áhugamál í USA
- At virka fyri góðum sínámillum viðurskiftum millum Føroyar og USA
- At veita føroyskum vinnulívi hjálp og góðar umstøður á amerikanska marknaðinum
- At virka fyri góðari marknaðaratgongd
- At veita tænastur til vinnufyritøkur
- At gera Føroyar sjónligari í USA

Sendistovan í Washington leteur upp í 2024. Sendistovan kemur ætlandi at húsast í egnum hølum í House og Sweden, har íslendska og svenska sendistovan eisini halda til.

**Undirkonta 30. Marknaðarføra Føroyar**
Játtanin er ætlað bæði til at marknaðarføra Føroyar í vinnuligum høði, m.a. saman við vinnufyritøkum, men eisini til breiðari almenna kunning um Føroyar og føroyska mentan (public diplomacy).

Ætlanin er at skipa fyri einum mentanarátaki í New York í 2024 undir heitinum Føroyar í New York.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 24.668 | 27.040 | 31.815 | 32.925 | 35.920 | 35.920 |
| Útreiðslur | 25.608 | 28.138 | 32.594 | 33.679 | 36.674 | 36.674 |
| Inntøkur | 940 | 1.098 | 779 | 754 | 754 | 754 |
| **21. Sendistova Føroya til Evropasamveldið** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 3.057 | 3.310 | 4.720 | 6.367 | 6.367 | 6.367 |
| **Útreiðslur** | **3.322** | **3.580** | **4.745** | **6.392** | **6.392** | **6.392** |
| 11. Lønir v.m. | 1.266 | 1.175 | 2.055 | 3.012 | 3.012 | 3.012 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 346 | 568 | 850 | 925 | 925 | 925 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 133 | 42 | 50 | 150 | 150 | 150 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.225 | 1.448 | 1.400 | 1.600 | 1.600 | 1.600 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 352 | 346 | 390 | 705 | 705 | 705 |
| **Inntøkur** | **265** | **270** | **25** | **25** | **25** | **25** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *265* | *270* | *25* | *25* | *25* | *25* |
| **22. Sendistova Føroya til Danmarkar** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 4.889 | 5.383 | 5.906 | 6.526 | 6.526 | 6.526 |
| **Útreiðslur** | **5.535** | **6.186** | **6.535** | **7.155** | **7.155** | **7.155** |
| 11. Lønir v.m. | 2.481 | 2.207 | 2.971 | 3.283 | 3.283 | 3.283 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 470 | 675 | 607 | 650 | 650 | 650 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 51 | 375 | 72 | 72 | 72 | 72 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.500 | 2.895 | 2.852 | 3.100 | 3.100 | 3.100 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 35 | 34 | 33 | 50 | 50 | 50 |
| **Inntøkur** | **646** | **803** | **629** | **629** | **629** | **629** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *646* | *803* | *629* | *629* | *629* | *629* |
| **23. Sendistova Føroya til Bretlands og Írlands** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 2.986 | 3.496 | 4.452 | 3.969 | 3.969 | 3.969 |
| **Útreiðslur** | **2.986** | **3.496** | **4.477** | **3.994** | **3.994** | **3.994** |
| 11. Lønir v.m. | 939 | 1.286 | 1.377 | 1.429 | 1.429 | 1.429 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 176 | 280 | 650 | 400 | 400 | 400 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 29 | 28 | 250 | 50 | 50 | 50 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.707 | 1.666 | 1.950 | 1.800 | 1.800 | 1.800 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 135 | 236 | 250 | 315 | 315 | 315 |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 0 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **25** | **25** | **25** | **25** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | - | - | *25* | *25* | *25* | *25* |

**24. Sendistova Føroya til Íslands**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 2.912 | 3.504 | 3.704 | 3.772 | 3.772 | 3.772 |
| **Útreiðslur** | **2.927** | **3.529** | **3.729** | **3.797** | **3.797** | **3.797** |
| 11. Lønir v.m. | 1.378 | 1.412 | 1.505 | 1.612 | 1.612 | 1.612 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 371 | 662 | 615 | 585 | 585 | 585 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 6 | 13 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 859 | 975 | 950 | 1.050 | 1.050 | 1.050 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 310 | 466 | 609 | 500 | 500 | 500 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 2 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **15** | **25** | **25** | **25** | **25** | **25** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | - | - | *25* | *25* | *25* | *25* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | - | *25* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *15* | - | - | - | - | - |

**25. Sendistova Føroya til Russlands**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 3.316 | 3.479 | 3.622 | 1.200 | 1.200 | 1.200 |
| **Útreiðslur** | **3.316** | **3.479** | **3.647** | **1.200** | **1.200** | **1.200** |
| 11. Lønir v.m. | 999 | 1.235 | 1.457 | 950 | 950 | 950 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 192 | 79 | 300 | 25 | 25 | 25 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | 13 | 85 | 25 | 25 | 25 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.678 | 1.709 | 1.355 | 200 | 200 | 200 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 446 | 443 | 450 | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **25** | **-** | **-** | **-** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | - | - | *25* | - | - | - |

**26. Sendistova Føroya til Kina**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 2.863 | 2.825 | 3.517 | 3.370 | 3.370 | 3.370 |
| **Útreiðslur** | **2.863** | **2.825** | **3.542** | **3.395** | **3.395** | **3.395** |
| 11. Lønir v.m. | 920 | 1.148 | 1.402 | 1.455 | 1.455 | 1.455 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 163 | 173 | 500 | 400 | 400 | 400 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | 110 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.244 | 881 | 940 | 940 | 940 | 940 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 536 | 511 | 550 | 450 | 450 | 450 |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **25** | **25** | **25** | **25** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | - | - | *25* | *25* | *25* | *25* |

**27. Sendistova Føroya til Ísraels**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 4.248 | 4.260 | 4.694 | 4.716 | 4.716 | 4.716 |
| **Útreiðslur** | **4.263** | **4.260** | **4.719** | **4.741** | **4.741** | **4.741** |
| 11. Lønir v.m. | 934 | 1.361 | 1.427 | 1.481 | 1.481 | 1.481 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 294 | 533 | 525 | 450 | 450 | 450 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 204 | 58 | 147 | 147 | 147 | 147 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.326 | 1.845 | 2.020 | 2.063 | 2.063 | 2.063 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 504 | 463 | 600 | 600 | 600 | 600 |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 0 | -0 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **15** | **-** | **25** | **25** | **25** | **25** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | - | - | *25* | *25* | *25* | *25* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *15* | - | - | - | - | - |

**28. Sendistova Føroya til USA**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | - | - | 200 | 2.005 | 5.000 | 5.000 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **200** | **2.005** | **5.000** | **5.000** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | - | 400 | 1.500 | 1.500 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | 200 | 630 | 1.450 | 1.450 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | - | 300 | 150 | 150 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | - | - | 550 | 1.500 | 1.500 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | - | - | 125 | 400 | 400 |

**30. Marknaðarføra Føroyar**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 397 | 783 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| **Útreiðslur** | **397** | **783** | **1.000** | **1.000** | **1.000** | **1.000** |
| 11. Lønir v.m. | 7 | - | - | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 390 | 745 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | 5 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | 33 | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 21 Sendistova Føroya til Evropasamveldið**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 1,0 | 1,0 | 1,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 |
| Fulltíðarstørv | 2,0 | 2,0 | 2,5 | 3,5 | 3,5 | 3,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 1,3 | 1,2 | 2,1 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |

**Starvsfólkayvirlit: 22 Sendistova Føroya til Danmarkar**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Fulltíðarstørv | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 2,5 | 2,2 | 3,0 | 3,3 | 3,3 | 3,3 |

**Starvsfólkayvirlit: 23 Sendistova Føroya til Bretlands og Írlands**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Fulltíðarstørv | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 0,9 | 1,3 | 1,4 | 1,4 | 1,4 | 1,4 |

**Starvsfólkayvirlit: 24 Sendistova Føroya til Íslands**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Fulltíðarstørv | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 1,4 | 1,4 | 1,5 | 1,6 | 1,6 | 1,6 |

**Starvsfólkayvirlit: 25 Sendistova Føroya til Russlands**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Fulltíðarstørv | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 1,0 | 1,2 | 1,5 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |

**Starvsfólkayvirlit: 26 Sendistova Føroya til Kina**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Fulltíðarstørv | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 0,9 | 1,1 | 1,4 | 1,5 | 1,5 | 1,5 |

**Starvsfólkayvirlit: 27 Sendistova Føroya til Ísraels**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Fulltíðarstørv | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 0,9 | 1,4 | 1,4 | 1,5 | 1,5 | 1,5 |

**Starvsfólkayvirlit: 28 Sendistova Føroya til USA**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | 0,5 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | - | - | - | 0,3 | 1,0 | 1,0 |
| Fulltíðarstørv | - | - | - | 0,8 | 2,0 | 2,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | - | - | - | 0,4 | 1,5 | 1,5 |

## 6.13.2. Millumtjóða samstarv

### 6.13.2.04. Millumtjóða samstarv (Rakstrarjáttan)

**Undirkonta 01. NPA (The Northern Periphery and the Arctic)**
Endamálið við játtanini er at fíggja árliga gjald Føroya til Northern Periphery and the Arctic Programme (NPA) á 915 tús. kr. í tíðarskeiðnum 2021- 2027. Talan er um ES stuðlað millumtjóða samstarv um menning í útjaðaraøkjum í Norður Evropa og Arktis**.** Samstarvið fevnir um ES limalondini Finnland, Svøríki, Írland umframt Føroyar, Grønland, Norra, og Ísland. NPA er 7 ára samsstarvsskrá skipað undir eindini fyri økismenning Directorate General - Regional and Urban Policy og fíggjað við stuðulsjáttan úr stuðulsgrunninum European Regional Development Fund. Evnisliga samstarva londini í verkætlanum við denti á umhvørvi, vinnumenning og livikor sum heild. Treytin fyri luttøku er nevnda upphædd á 915 tús. kr. árliga í sjey ára skeið 2021-2027, íroknað helvtargjald til NPA Regional Contact Point. Móttakarin er umsitingin hjá NPA í Tromsø, og gjaldskravið verður sent í fyrsta kvartali fyri sama árið.

**Undirkonta 02. IMO**
Endamálið við játtanini er at geva Føroyum atlimaskap í altjóða sjóvinnufelagsskapinum IMO. Atlimaskapur í IMO gevur Føroyum sjávstøðuga umboðan og talurætt í IMO ráðnum og í viðkomandi fakligu undirnevndum. Gjaldið er roknað eftir einum føstum ST frymli. Móttakarin er skrivstovan hjá IMO í London.

**Undirkonta 03. NORA**
Tá ið viðtøkurnar fyri NORA vórðu gjørdar, varð ásett, at fígging hjá luttakandi londum í stóran mun skuldi verða partur av samlaðu fíggingini av virkseminum.

Í einari dagføring av fíggingini hevur síðani 2007 verið semja um, at lutfallið av fíggingini hjá luttakandi londunum verður sett soleiðis, at Føroyar og Grønland skulu gjalda 262 tús. kr. um árið, upphæddin verður prístalsregulerað, Ísland skal gjalda 500 tús. kr. um árið, og at Noreg skal gjalda 700 tús. kr. um árið.

Afturat hesum fíggjar Nordisk Ministerråd (NMR) 6,39 mió. kr. av virkseminum hjá NORA.

**Undirkonta 04. Altjóða veiðifelagsskapir**
*ICES*
Føroyar rinda eitt árligt gjald til ICES í Altjóða havgranskingarráðnum. Gjaldið, sum Føroyar rinda fyri formliga luttøku í ICES, byggir á eina avtalu frá 1988, ið viðurkennir sjálvræði hjá ávikavist Føroyum (v/Havstovuni) og Grønlandi, tá talan er um gransking og umsiting av havinum og havsins tilfeingi. Við hesum fáa Føroyar (og Grønland) eina serstaka eygleiðarastøðu í ráðgevandi nevndini

hjá ICES og gjalda tilsamans eina upphædd, ið svarar til ein part av gjaldslyklinum hjá ICES. Av hesum parti er avtalað millum Føroyar og Grønland, at Føroyar rinda 80% og Grønland rindar 20%.

Móttakarin er ICES skrivstovan í Keypmannahavn. Gjaldið verður goldið við grundarlagi í einum árligum kravi frá ICES.

*NEAFC*
Føroyar rinda eitt árligt gjald til NEAFC (Nevndin fyri samstarv um fiskiskap í altjóða sjógvi í landnyrðingspartinum av Atlantshavinum). Gjaldið hjá Føroyum er partur av felags NEAFC limagjaldinum hjá Føroyum og Grønlandi. Limagjøldini í NEAFC taka støði í fíggjarætlanini fyri NEAFC fyri komandi árið og verða roknað eftir einum gjaldsfrymli, ið er ásettur í NEAFC sáttmálanum grein 17.4, og sum partvís byggir á samlaða fiskiskapin hjá einstøku limalondunum fyri tveimum árum síðan. Árliga fíggjarætlanin fyri NEAFC verður formliga samtykt á ársfundinum í november á hvørjum ári.

Viðmerkjast skal, at NEAFC sáttmálin gevur limalondum møguleika á hvørjum ári at áseta, sambært grein 17.4 c), at limalond, ið hava eitt fólkatal undir 300.000 íbúgvar, ikki skulu gjalda meira enn 5% av samlaðu fíggjarætlanini. Semja er á hvørjum ári um at brúka hesa áseting. Tað hevur við sær, at gjaldið hjá Føroyum er munandi minni enn, hvat tað annars hevði verið, um tað varð ásett sambært frymlinum í grein 17.4 b) og c). Býtið millum Føroyar og Grønland fyri samlaða limagjaldið verður roknað eftir frymli í grein 17.4 a) og b).

Móttakarin av árliga gjaldinum er NEAFC skrivstovan í London, og gjaldið verður vanliga avgreitt fyri 1. apríl fyri sama árið.

*NAFO*
Føroyar rinda eitt árligt gjald til NAFO (Nevndin fyri samstarv um fiskiskap í altjóðasjógvi í útnyrðingspartinum av Atlantshavinum). Gjaldið hjá Føroyum er partur av felags NAFO limagjaldinum hjá Føroyum og Grønlandi. Limagjøldini í NAFO taka støði í fíggjarætlanini fyri NAFO fyri komandi árið og verða roknað eftir einum gjaldsfrymli, ið er ásettur í NAFO sáttmálanum grein 16.3, og sum partvís byggir á samlaða fiskiskapin hjá einstøku limalondunum fyri tveimum árum síðan. Árliga fíggjarætlanin fyri NAFO verður formliga samtykt á ársfundinum í september á hvørjum ári.

Býtið millum Føroyar og Grønland fyri samlaða limagjaldið verður roknað eftir frymli í grein 16.3 í NAFO sáttmálanum. Parturin hjá Grønlandi í sínámillum býtinum er munandi størri, av tí at Grønland rindar allan tann partin, sum er álagdur strandarlondunum í NAFO sambært grein 16.3.

Móttakarin av árliga gjaldinum er NAFO skrivstovan í Dartmouth, Kanada, og gjaldið verður vanliga avgreitt fyri 1. apríl sama árið.

*NAMMCO*
Føroyar rinda eitt árligt gjald til NAMMCO (Nevndin fyri samstarv um vernd, umsiting og gransking av havsúgdjórum í Norður Atlantshavinum). Føroyar hava sjálvstøðugan limaskap í NAMMCO. Limagjaldið byggir á eitt gjaldsbýti millum verandi fýra limalond: Føroyar, Grønland, Ísland og Noreg, sum varð avtalað í 1992, tá ið NAMMCO varð sett á stovn. Sambært tí rinda Føroyar og Grønland 12,5% í part, Ísland 25% og Noreg 50%. Árliga gjaldið verður ásett við støði í árligu fíggjarætlanini fyri NAMMCO, ið verður samtykt á NAMMCO ársfundinum á hvørjum ári.

Móttakarin av árliga gjaldinum er NAMMCO skrivstovan í Tromsø, og gjaldið verður vanliga avgreitt innan 1. apríl fyri sama árið.

*NASCO*
Føroyar rinda eitt árligt gjald til NASCO (Felagsskapurin fyri umsiting og vernd av villum laksi í Norðuratlantshavi). Gjaldið hjá Føroyum er partur av felags NASCO limagjaldinum hjá Føroyum og Grønlandi. Limagjøldini í NASCO taka støði í fíggjarætlanini fyri NASCO fyri komandi árið og verða roknað eftir ein gjaldsfrymli, ið er ásettur í grein 16 í NASCO sáttmálanum.

Árliga fíggjarætlanin fyri NASCO verður formliga samtykt á ársfundinum.

Móttakarin av árliga gjaldinum er NASCO skrivstovan í Edinburgh, og gjaldið verður vanliga avgreitt innan 1. apríl sama árið.

*SPRFMO*
Føroyar gjørdust í juli 2010 fyrsti formligi sáttmalaparturin av nýggja sáttmálanum fyri samstarv um fiskiveiði í altjóða sjógvi í Suðurkyrrahavinum. Við at taka lut í SPRFMO eru Føroyar við at tryggja sær rættindi at fiska í sáttmálaøkinum í Suðurkyrrahavinum. Formliga varð felagsskapurin settur á stovn í 2012, tá ið 8 lond høvdu staðfest sáttmálan. Í dag eru 15 limir í felagsskapinum.

Í 2012 varð ein leistur fyri luttøkugjald samtyktur, sum partvíst tekur støði í einum grundgjaldi, sum er eins fyri øll limalondini, og partvíst tekur støði í, hvussu væl landið er fyri (ein sokallaður vælferðarkomponentur) og luttøku í fiskiskapinum. Limagjaldið verður goldið fyri fíggjarár, sum er frá 1. juli til 30. juni.

Limagjaldið verður ásett í NZD. Limagjaldið kann eisini broytast, um fleiri lond staðfesta sáttmálan, tí hetta ávirkar serliga grundgjaldið, soleiðis at minni verður at gjalda í part. Í so fall verður føroyska íkasti lækkað.

Móttakarin av árliga gjaldinum er SPRFMO skrivstovan í Wellington í Nýsælandi, og gjaldið verður vanliga avgreitt innan 1. apríl sama árið.

**Undirkonta 05. FAO og UNESCO**
*FAO*
Endamálið við játtanini er at rinda gjaldið fyri atlimaskap Føroya í FAO - Matvøru- og landbúnaðarstovninum hjá ST. Atlimaskapur í FAO gevur Føroyum sjálvstøðuga umboðan og talurætt í FAO ráðnum og viðkomandi fakligu undirnevndum. Gjaldið er roknað eftir einum føstum ST frymli.

Móttakarin er umsitingin hjá FAO í Rom. Gjaldskravið verður sent fyrst í árinum fyri sama árið.

*UNESCO*
Føroyar rinda eitt árligt gjald fyri atlimaskap Føroya í UNESCO - ST felagsskapinum fyri samstarv um útbúgving, vísindi og mentan. Atlimaskapur í UNESCO gevur Føroyum sjálvstøðuga umboðan og talurætt í UNESCO ráðnum og viðkomandi fakligu undirnevndum. Gjaldið er roknað eftir einum føstum ST frymli.

Móttakarin er umsitingin hjá UNESCO í París. Gjaldskravið kemur fyrst í árinum fyri sama árið.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 3.186 | 3.341 | 3.478 | 3.565 | 3.565 | 3.565 |
| Útreiðslur | 3.186 | 3.341 | 3.478 | 3.565 | 3.565 | 3.565 |
| **01. The Northern Periphery** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 870 | 829 | 915 | 937 | 937 | 937 |
| **Útreiðslur** | **870** | **829** | **915** | **937** | **937** | **937** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | 1 | - | - | - | - |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 870 | 828 | 915 | 937 | 937 | 937 |
| **02. IMO** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 40 | 26 | 52 | 54 | 54 | 54 |
| **Útreiðslur** | **40** | **26** | **52** | **54** | **54** | **54** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 40 | 26 | 52 | 54 | 54 | 54 |
| **03. NORA** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 250 | 250 | 262 | 269 | 269 | 269 |
| **Útreiðslur** | **250** | **250** | **262** | **269** | **269** | **269** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 250 | 250 | 262 | 269 | 269 | 269 |
| **04. Altjóða veiðifelagsskapir** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 1.915 | 2.105 | 2.101 | 2.154 | 2.154 | 2.154 |
| **Útreiðslur** | **1.915** | **2.105** | **2.101** | **2.154** | **2.154** | **2.154** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 1.915 | 2.105 | 2.101 | 2.154 | 2.154 | 2.154 |
| **05. FAO og UNESCO** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 112 | 131 | 148 | 151 | 151 | 151 |
| **Útreiðslur** | **112** | **131** | **148** | **151** | **151** | **151** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 112 | 131 | 148 | 151 | 151 | 151 |

# Ráevnisvinna

## 6.32.1. Fyrisiting

### 6.32.1.03. Jarðfeingi (Rakstrarjáttan)

Endamálið við Jarðfeingi er at fyrisita, granska, ráðgeva og breiða út kunnleika um kolvetni og jarðfrøðilig náttúruvirði.

**Jarðfrøði**
Jarðfeingi kortleggur, savnar og varðveitir jarðfrøðiligt tilfar, umframt at granska, ráðgeva og kunna um jarðfrøðilig evni og viðurskifti, og virkar fyri, at lóggáva og umsiting innan jarðfrøðilig náttúruvirði verður grundað á framkomna og dagførda jarðfrøðiliga vitan. Stovnurin virkar sum jarðfrøðiligt dátusavn, har kanningarúrslit frá øllum jarðfrøðiligum kanningum og oljuleitingum á Føroyaøkinum, frágreiðingar og annað verður varðveitt.

Stovnurin ráðgevur m.a. Landsverki og øðrum í sambandi við tunnilsverkætlanir, samstarvar við Fróðskaparsetur Føroya og aðrar stovnar um undirvísing og við Tjóðsavnið um jarðfrøðiligar framsýningar. Jarðfeingi hevur nógv samstarv við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar.

Jarðfeingi kortleggur vatnið í undirgrundini, t.v.s. hitalagið, hvar tað er og hvussu tað flytur seg, og ráðgevur kommunum og fyritøkum um skynsama nýtslu av grundvatni til vatnveiting og í ymiskum háttum at gagnnýta vatnið í jarðhitaloysnum.

**Kolvetnismál**
Stovnurin fyrisitur lóggávuna innan leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum. Jarðfeingi granskar í jarðfrøði og náttúrufrøði á landi, á havbotninum og í undirgrundini. Stovnurin samskipar alt arbeiði, ið hevur beinleiðis við málsøkið at gera.

Stovnurin umsitur kolvetnismál sambært løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi, við seinni broytingum, og løgtingslógirnar um útbjóðingarumførini. Fýra útbjóðingarumfør hava verið, eitt í 2000, eitt í 2004/2005, triðja var í 2008 og tað nýggjasta í 2017/2018. Níggju leitibrunnar eru boraðir síðan 2001.

Á høvuðskontu 6.32.1.05. Marknaðarføring av landgrunninum til kolvetnisleiting er játtan til verkætlan, har dentur verður lagdur á at marknaðarføra føroyska landgrunnin til oljuleiting. Í sambandi við marknaðarføring av møguleikum undir open door skipanini verður áhaldandi arbeitt við at greina jarðfrøðina fyri á tann hátt betur at kunna marknaðarføra føroyska landgrunnin fyri oljufeløgum.

**Undirkonta 40. Granskingarverkætlanir**
Jarðfeingi luttekur í granskingarverkætlanum, ið partvíst verða fíggjaðar uttanhýsis. Granskingarsamstarv er við ymiskar útlendskar stovnar og vinnulív og hevur higartil verið viðvíkjandi geofakligum evnum.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 7.998 | 7.698 | 7.958 | 7.958 | 7.958 | 8.186 |
| Útreiðslur | 13.746 | 15.222 | 15.193 | 15.421 | 15.421 | 15.421 |
| Inntøkur | 5.748 | 7.523 | 7.235 | 7.463 | 7.463 | 7.235 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 7.998 | 7.698 | 7.958 | 7.958 | 7.958 | 8.186 |
| **Útreiðslur** | **11.397** | **12.388** | **10.493** | **10.721** | **10.721** | **10.721** |
| 11. Lønir v.m. | 8.300 | 8.295 | 8.207 | 8.435 | 8.435 | 8.435 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.303 | 1.899 | 906 | 906 | 906 | 906 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 231 | 133 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.246 | 1.291 | 1.330 | 1.330 | 1.330 | 1.330 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | 0 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 25 | 25 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 292 | 744 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **3.399** | **4.689** | **2.535** | **2.763** | **2.763** | **2.535** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *3.399* | *3.401* | *2.535* | *2.763* | *2.763* | *2.535* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *1.039* | - | - | - | - |
| 77. Flyting frá kommunum | - | *250* | - | - | - | - |
| **40. Granskingarverkætlanir** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **2.350** | **2.834** | **4.700** | **4.700** | **4.700** | **4.700** |
| 11. Lønir v.m. | 1.499 | 1.471 | 1.800 | 1.800 | 1.800 | 1.800 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 848 | 1.340 | 2.100 | 2.100 | 2.100 | 2.100 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 3 | 17 | 800 | 800 | 800 | 800 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 7 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **2.350** | **2.834** | **4.700** | **4.700** | **4.700** | **4.700** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | - | - | *300* | *300* | *300* | *300* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *30* | *475* | *400* | *400* | *400* | *400* |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *2.320* | *2.359* | *4.000* | *4.000* | *4.000* | *4.000* |

**Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **11.397** | **12.388** | **10.493** | **10.721** | **10.721** | **10.721** |
| 1. Leiðsla, umsiting og felagsútreislur | 3.464 | 3.064 | 3.192 | 3.200 | 3.200 | 3.200 |
| 2. Kolvetni | 4.293 | 4.184 | 4.311 | 4.320 | 4.320 | 4.320 |
| 3. Jarðfrøði | 3.640 | 5.140 | 2.990 | 3.201 | 3.201 | 3.201 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,5 | 1,5 | 1,5 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 13,5 | 13,5 | 13,5 | 14,5 | 14,5 | 14,5 |
| Fulltíðarstørv | 15,0 | 15,0 | 15,0 | 15,5 | 15,5 | 15,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 8,3 | 8,3 | 8,2 | 8,4 | 8,4 | 8,4 |

## 6.32.1.04. Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi (Stuðulsjáttan)

Gjøldini fyri forkanningarloyvi (seismikkloyvi) eru heimilað í løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi, við seinni broytingum. Eitt gjald er ásett feløgum uppá 75 tús. kr. fyri loyvi at gera seismiskar kanningar, umframt eitt ómaksgjald til Jarðfeingi á 10 tús. kr. á høvuðskontu 6.32.1.03. Jarðfeingi.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkujáttan | 10 | - | 75 | 75 | 75 | 75 |
| **01.Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **10** | **-** | **75** | **75** | **75** | **75** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *10* | - | *75* | *75* | *75* | *75* |

## 6.32.1.05. Marknaðarføring av landgrunninum til kolvetnisleiting (Rakstrarjáttan)

Játtanin er ætlað til miðvísa marknaðarføring av føroyska landgrunninum til tess at fáa økt leitivirksemið. Hóast leitað hevur verið eftir olju í nógv ár, er framvegis nógv eftir at kanna.

Avtalað er við oljuvinnufelagið, at grunnurin til førleikamenning, sum oljufeløgini hava goldið til í sambandi við leitiloyvi, fíggjar marknaðarføringina av føroyska landgrunninum.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | -0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Útreiðslur | 345 | 448 | 450 | 450 | 450 | 450 |
| Inntøkur | 345 | 448 | 450 | 450 | 450 | 450 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **345** | **448** | **450** | **450** | **450** | **450** |
| 11. Lønir v.m. | 117 | 126 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 228 | 308 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | 8 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 6 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **345** | **448** | **450** | **450** | **450** | **450** |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *345* | *448* | *450* | *450* | *450* | *450* |

# Landbúnaður

## 6.33.1. Djóralæknatænastur

### 6.33.1.04. Djóralæknatænastur (Rakstrarjáttan)

Endamálið við játtanini er at veita samsýning til privat starvandi djóralæknar, soleiðis at djóraeigarar kunnu fáa djóralæknahjálp.

Tænastan er síðani 2012 einans skipað við telefonvaktarhaldi. Djóraeigarar kunnu nú fáa fatur á privatstarvandi djóralækna alt samdøgrið allar dagar í árinum.

Fyri at tryggja at telefonvaktin framhaldandi verður allar dagar í árinum og alt samdøgrið, verður játtanin hækkað 50 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 615 | 652 | 650 | 700 | 700 | 700 |
| Útreiðslur | 615 | 652 | 650 | 700 | 700 | 700 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 615 | 652 | 650 | 700 | 700 | 700 |
| **Útreiðslur** | **615** | **652** | **650** | **700** | **700** | **700** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 615 | 652 | 650 | 700 | 700 | 700 |

## 6.33.2. Landbúnaðarstudningur

### 6.33.2.01. Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving (Rakstrarjáttan)

Deildin Landbúnaðarroyndir- og ráðgeving er staðsett hjá Búnaðarstovuni. Endamálið við virkseminum er at kanna, menna og royna nýggjar vinnumøguleikar í landbúnaðinum, at menna verandi vinnur, eins og at miðla dagførda vitan um hesi viðurskifti. Høvuðsøkini eru hesi:

- Varðveitsla av føroysku húsdjórasløgunum, herundir samskipan av kynbótararbeiði
- Gransking og royndir innan seyðahald og seyðakjøt
- Gransking og royndir innan gras og aðra avgrøði
- Gransking og royndir innan matframleiðslu í føroyska landbúnaðinum, t.d. epli, røtur, grønmeti og annar ávøkstur
- Ráðgeving og kunning at byrgja fyri neiligum umhvørvisárini frá landbúnaðinum
- Í samstarvi við Mentamálaráðið at skipa fyri førleikagevandi yrkisskeiði innan landbúnað og annars veita skeiðvirksemi og ráðgeving innan landbúnaðin
- Ullarmóttøka at troyta møguleikarnar fyri gagnnýtslu av føroysku ullini
- Røkja norðurlendsk og altjóða sambond innan landbúnaðargransking í breiðastu merking
- Veita landsstýrismanninum ráðgeving í landbúnaðarspurningum

Búnaðarstovan hevur sum liður í arbeiðinum at varðveita føroysk húsdjór keypt føroysk ross. Greðingarnir verða brúktir til kynbótararbeiðið sum liður í arbeiðinum at varðveita føroyska

rossið. 250 tús. kr. eru settar av til føroysku rossini hjá Búnaðarstovuni. Játtanin verður m.a. nýtt til eitt parttíðar fólk at taka sær serliga av føroysku rossunum.

Í 2022 til og við 2026 fer Búnaðarstovan at skipa fyri teljing av grágás. Metti kostnaðurin av grágásateljingunum er 60 tús. kr. um ári.

**Undirkonta 21. Verkætlanir**
Játtan til verkætlanir er niðurløgd. Nýggj játtan er stovnað undir høvuðskonto 6.33.2.17.

**Undirkonta 40. Inntøkufíggjað virksemi**
Játtanin er til inntøkufíggjað virksemi hjá Búnaðarstovuni. Fyri at virka fyri at føroyska ullin verður gagnnýtt, er ullarmóttøka skipað á Búnaðarstovuni í Kollafirði. Móttøkan keypir ullina frá bóndum og selur hana víðari. Royndirnar undanfarin ár eru, at útreiðslurnar av ullamóttøkuni eru hægri enn inntøkurnar frá søluni av ullini.

**Undirkonta 45. Stuðulsfíggjað virksemi**
Játtanin er ætlað til verkætlanir innan gransking, menning og nýskapan, ið Búnaðarstovan tekur lut í, og sum fáa uttanhýsis fígging.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 3.830 | 4.873 | 4.076 | 4.166 | 4.166 | 4.166 |
| Útreiðslur | 4.650 | 5.861 | 5.146 | 5.236 | 5.236 | 5.236 |
| Inntøkur | 820 | 988 | 1.070 | 1.070 | 1.070 | 1.070 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 3.638 | 3.759 | 3.884 | 3.974 | 3.974 | 3.974 |
| **Útreiðslur** | **3.780** | **4.156** | **4.354** | **4.444** | **4.444** | **4.444** |
| 11. Lønir v.m. | 1.887 | 2.340 | 3.234 | 3.324 | 3.324 | 3.324 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 672 | 928 | 570 | 570 | 570 | 570 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 628 | 41 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 332 | 510 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| 17. Avskrivingar o.a. | - | - | 20 | 20 | 20 | 20 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 27 | 27 | 30 | 30 | 30 | 30 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 234 | 309 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| **Inntøkur** | **142** | **397** | **470** | **470** | **470** | **470** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *142* | *275* | *270* | *270* | *270* | *270* |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | - | *122* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | - | *200* | *200* | *200* | *200* |
| **21. Verkætlanir** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | 925 | - | - | - | - |
| **Útreiðslur** | **-** | **925** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 53. Stuðul til vinnu | - | 925 | - | - | - | - |

**40. Inntøkufíggjað virksemi**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 192 | 189 | 192 | 192 | 192 | 192 |
| **Útreiðslur** | **564** | **635** | **492** | **492** | **492** | **492** |
| 11. Lønir v.m. | 341 | 299 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 59 | 179 | 192 | 192 | 192 | 192 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 53. Stuðul til vinnu | 164 | 157 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **372** | **446** | **300** | **300** | **300** | **300** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *146* | *207* | *300* | *300* | *300* | *300* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *227* | *240* | - | - | - | - |

**45. Stuðulsfíggjað virksemi**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **305** | **145** | **300** | **300** | **300** | **300** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 305 | 143 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 2 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **305** | **145** | **300** | **300** | **300** | **300** |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *305* | *145* | *300* | *300* | *300* | *300* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 4,0 | 4,2 | 4,5 | 4,5 | 4,5 | 4,5 |
| Fulltíðarstørv | 4,0 | 4,2 | 4,5 | 4,5 | 4,5 | 4,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 1,9 | 2,3 | 3,2 | 3,3 | 3,3 | 3,3 |

**Starvsfólkayvirlit: 40 Inntøkufíggjað virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Fulltíðarstørv | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 0,3 | 0,3 | 0,3 | 0,3 | 0,3 | 0,3 |

## 6.33.2.03. Búnaðarstovan (Rakstrarjáttan)

Búnaðarstovan er skipað sambært løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð, við seinni broytingum, og fyrisitur alla almennu jørð Føroya, ið ikki er fyrisitin av ella skrásett sum ogn hjá øðrum almennum stovni.

Fyrisitingin av landsjørðini fevnir í høvuðsheitum um umsiting av festum, traðum o.ø. lendi. Søla av landsjørð til ymisk endamál krevur nógva fyrisitingarliga orku. Búnaðarstovan samstarvar serliga nógv við føroysku kommunurnar um viðkomandi lendisviðurskifti, t.d. býarskipanir, sølu av jørð o.tíl.

Búnaðarstovan fyrisitur árligu studningsjáttanina til landbúnaðarvinnuna, sum verður veitt við heimild í ávikavist løgtingslóg nr. 18 frá 4. mai 1961 um studning til frama fyri húsdýraalingina og húsdýrahaldið v.m. og løgtingslóg nr. 32 frá 6. mars 2003 um landbúnaðarstuðul og sambært kunngerð nr. 76 frá 15. mai 2018 um stuðul til landbúnaðin.

Búnaðarstovan røkir norðurlendskar og altjóða uppgávur, ið hoyra til málsøkið, t.d. limaskapin í embætismannanevndini innan landbúnaðarviðurskifti hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum, EK-FJLS (Jordbrug og skovbrug), og avleitt virksemi, eitt nú í NordGen.

Játtanin hækkaði við 1 mió. kr. í 2021 til tess at styrkja jarðarumsitingina, m.a. til styrkt eftirlit og til at byggja upp GIS (Geographic Information System).

### Undirkonta 30. Útleigan av landsjørð

Búnaðarstovan yvirtók í 2021 umsitingina av at taka inn leigugjøld fyri traðir og festi. Játtanin er úteiðsluneutral av tí at festileigan verður flutt Búnaðargrunninum.

Búnaðargrunnurin fíggjar raksturin av jarðarumsitingini, sum verður mett at kosta 4,3 mió. kr., og er peningurin settur av til endamálið á høvuðskontu 20.52.1.30. Gjald til Búnaðarstovuna. Landið fíggjar umsitingina av landbúnaðarstuðlinum, og eru 246 tús. kr. settar av til endamálið.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 3.611 | 5.459 | 4.546 | 4.546 | 4.546 | 4.546 |
| Útreiðslur | 4.532 | 6.469 | 4.796 | 5.796 | 5.796 | 5.796 |
| Inntøkur | 921 | 1.010 | 250 | 1.250 | 1.250 | 1.250 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 4.532 | 4.545 | 4.546 | 4.546 | 4.546 | 4.546 |
| **Útreiðslur** | **4.532** | **4.575** | **4.796** | **4.796** | **4.796** | **4.796** |
| 11. Lønir v.m. | 3.221 | 3.421 | 3.891 | 3.999 | 3.999 | 3.999 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.144 | 985 | 780 | 672 | 672 | 672 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 77 | 62 | 75 | 75 | 75 | 75 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 88 | 107 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | -0 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 1 | 0 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **30** | **250** | **250** | **250** | **250** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *30* | *250* | *250* | *250* | *250* |
| **30. Útleigan av landsjørð** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -921 | 914 | - | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **-** | **1.895** | **-** | **1.000** | **1.000** | **1.000** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | 1.895 | - | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| **Inntøkur** | **921** | **980** | **-** | **1.000** | **1.000** | **1.000** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *921* | *980* | - | *1.000* | *1.000* | *1.000* |

**Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **4.532** | **4.575** | **4.796** | **4.796** | **4.796** | **4.796** |
| 1. Leiðsla og hjálparvirksemi | 850 | 850 | 900 | 900 | 900 | 900 |
| 2. Búnaðarmál | 3.436 | 3.479 | 3.650 | 3.650 | 3.650 | 3.650 |
| 3. Landbúnaðarstuðul | 246 | 246 | 246 | 246 | 246 | 246 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| Fulltíðarstørv | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 3,2 | 3,4 | 3,9 | 4,0 | 4,0 | 4,0 |

## 6.33.2.08. Búnaðarstovan (Løgujáttan)

Í 2022 vórðu brúktar 5,1 mió. kr. Ongin játtan er í 2023, men framfluttar vórðu 2,4 mió. kr. Arbeiðið at umvæla tekjuna á fjósinum og løguni er gjørt liðugt og er handað Búnaðarstovuni í 2023.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 202 | 5.132 | - | - | - | - |
| **10. Búnaðarstovan** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **202** | **5.132** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 202 | 2 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -202 | -66 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 202 | 5.130 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 66 | - | - | - | - |

## 6.33.2.10. Landbúnaðarstuðul (Stuðulsjáttan)

Landbúnaðarstuðul verður veittur við heimild í ávikavist løgtingslóg nr. 18 frá 4. mai 1961 um studning til frama fyri húsdýraalingina og húsdýrahaldið v.m. og løgtingslóg nr. 32 frá 6. mars 2003 um landbúnaðarstuðul og sambært kunngerð nr. 76 frá 15. mai 2018 um stuðul til landbúnaðin. Búnaðarstovan umsitur stuðulin. Harumframt eru reglugerðir gjørdar fyri umsiting av stuðulsjáttanunum, sí www.bst.fo.

Stuðul verður veittur til mjólk, neytakjøt, seyðakjøt, stráfóður, djórahald, avloysaraskipan og til føroysk húsdjór. Stuðulin er treytaður av, at umsøkjari er bókhaldsskyldugur og MVG skrásettur. Tó er tað ikki ein treyt fyri undirkontu 10. Føroysk húsdjór.

### Undirkonta 04. Stráfóður

Játtanin til stráfóðurstuðul var í 2023 raðfest við 920 tús. kr. og er nú 6 mió. kr. Henda raðfesting heldur fram í 2024.

## Undirkonta 11. Grønmetisframleiðsla
Játtanin til grønmetisframleiðisu er flutt til høvuðskontu 6.33.2.17.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 17.845 | 18.195 | 19.470 | 18.670 | 18.670 | 18.670 |
| **01. Mjólk** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **7.188** | **7.174** | **7.220** | **7.220** | **7.220** | **7.220** |
| 53. Stuðul til vinnu | 7.188 | 7.174 | 7.220 | 7.220 | 7.220 | 7.220 |
| **02. Neytakjøt** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.142** | **1.272** | **1.100** | **1.100** | **1.100** | **1.100** |
| 53. Stuðul til vinnu | 1.142 | 1.272 | 1.100 | 1.100 | 1.100 | 1.100 |
| **03. Seyðakjøt** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.999** | **2.930** | **2.900** | **2.900** | **2.900** | **2.900** |
| 53. Stuðul til vinnu | 2.999 | 2.930 | 2.900 | 2.900 | 2.900 | 2.900 |
| **04. Stráfóður** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **5.074** | **5.060** | **6.000** | **6.000** | **6.000** | **6.000** |
| 53. Stuðul til vinnu | 5.074 | 5.060 | 6.000 | 6.000 | 6.000 | 6.000 |
| **07. Húsdýralógin** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **15** | **14** | **70** | **70** | **70** | **70** |
| 53. Stuðul til vinnu | 15 | 14 | 70 | 70 | 70 | 70 |
| **08. Avloysaraskipan** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **480** | **480** | **480** | **480** | **480** | **480** |
| 53. Stuðul til vinnu | 480 | 480 | 480 | 480 | 480 | 480 |
| **10. Føroysk húsdjór** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **200** | **300** | **300** | **300** | **300** | **300** |
| 53. Stuðul til vinnu | 200 | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| **11. Grønmetisframleiðsla** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **419** | **483** | **800** | **-** | **-** | **-** |
| 53. Stuðul til vinnu | 419 | 483 | 800 | - | - | - |
| **12. Seyðakanningar** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **328** | **483** | **600** | **600** | **600** | **600** |
| 53. Stuðul til vinnu | 328 | 483 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | - | 600 | 600 | 600 | 600 |

## 6.33.2.11. Almenn jørð, søla (Løgujáttan)

Sambært § 9 í løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð, við seinni broytingum, er Búnaðarstovuni heimilað at selja burtur av landsjørð til almenn endamál, grundstykkir til húsabygging, handils- og ídnaðar-, havbúnaðar-, ítróttar- og frítíðarendamál. Harumframt er

Búnaðarstovuni heimilað at selja festara innistøðu, sethús, fjós og aðrar bygningar við hóskandi undirlendi, sum hoyra til festið.

Galdandi jarðarprísir síggast í fylgiskjali til kunngerð nr. 95 frá 23. oktober 2007 um umsiting av landsjørð, við seinni broytingum, og á heimasíðuni hjá Búnaðarstovuni, www.bst.fo, har meginreglurnar fyri prísásetingini eisini síggjast.

Tá ið festarar keypa bygningar á festum, kann tað sambært § 11, stk. 2 í lógini um landsjørð gerast við, at festarin rindar fyri eitt hóskandi grundstykki. Tá ið festi verða lýst leys, verða møguligir bygningar á festum seldir fyri marknaðarvirði.

Landsjørðin verður seld fyri fastan prís uttan alment útboð frammanundan og verður í høvuðsheitum seld kommunum til byggilendi. Tað er sera ymiskt, hvussu nógv almenn jørð verður seld einstaka árið. Trupult er tí at meta um søluupphæddina. Metta upphæddin er 10 mió. kr.

Eftir § 5 í løgtingslóg nr. 34 frá 7. mai 2013 um Búnaðargrunn, við seinni broytingum, skal ágóðin av søluni flytast Búnaðargrunninum og bókast á kontu hjá avvarðandi festi.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 24.351 | 41.351 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| Inntøkur | 23.306 | 39.851 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| **10. Almenn jørð, søla** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **24.351** | **41.351** | **10.000** | **10.000** | **10.000** | **10.000** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | -131 | - | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 24.482 | 41.351 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| **Inntøkur** | **23.306** | **39.851** | **10.000** | **10.000** | **10.000** | **10.000** |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | *1.577* | *1.680* | - | - | - | - |
| 42. Søla av løgu o.ø. | *21.729* | *38.171* | *10.000* | *10.000* | *10.000* | *10.000* |

## 6.33.2.15. Stuðul til seyðaskinn (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at tryggja, at føroysk seyðaskinn koma til høldar. Stuðul verður veittur sum endurgjald fyri djóralæknakanningar og -váttanir og fyri flutning av seyðaskinnum. Í reglugerð frá 5. oktober 2020 fyri veiting av stuðulsjáttan til føroysk seyðaskinn er ásett, hvussu endurrindanin fer fram.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 277 | 200 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| **01. Stuðul til seyðaskinn** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **277** | **200** | **200** | **200** | **200** | **200** |
| 53. Stuðul til vinnu | 277 | 200 | 200 | 200 | 200 | 200 |

### 6.33.2.16. Stuðul til feløg (Stuðulsjáttan)

Stuðulin verður latin til Felagið Føroysk Ross og er til aling og skráseting av føroyskum rossum.

Árliga stuðulsjáttanin verður goldin felagnum, tá roknskapur fyri árið fyri er latin Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 100 | 100 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| **01. Felagið Føroysk Ross** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **100** | **100** | **150** | **150** | **150** | **150** |
| 53. Stuðul til vinnu | 100 | - | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | 100 | 150 | 150 | 150 | 150 |

### 6.33.2.17. Átøk til at menna nýskapan og framleiðslu av føroyskum matvørum (Stuðulsjáttan)

**Undirkonta 01. Stuðul til menning og vøkstur á landbúnaðarøkinum**
Endamálið við játtanini er at stuðla verkætlanum, sum skapa størri vitan, menning og vøkstur á landbúnaðarøkinum.

**Undirkonta 02. Stuðul til at økja tilvitskuna um føroyska matframleiðslu**
Játtanini er ætlað at økja tilvitskuna um og virðingina fyri dygdargóðum og heilsugóðum matvørum úr føroyskum rávørum soleiðis, at føroyskar stuttfluttar vørur verða valdar fram um.

Ætlanin er, at t.d. skúlar, bústovnar, ellis- og røktarheim saman við staðbundnum framleiðarum, áhugabólkum og fakfólki kunnu framleiða, kunna um og gera heilsugóðan mat úr føroyskum rávørum í gerandisdegnum og í undirvísing.

**Undirkonta 03. Grønmetisframleiðsla**
Stuðul til samstarv millum Búnaðarstovuna, Veltuna og Grøna háskúlan um at menna grønmetisframleiðslu í Føroyum við vitan, royndum og kunnleika, so verulig gongd fæst á málið um at gerast sjálvbjargin við fleiri landbunaðarvørum.

Stuðulin verður umsitin eftir reglugerð.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | - | - | 1.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| **01. Stuðul til menning og vøkstur á landbúnaðarøkinum** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **750** | **850** | **850** | **850** |
| 53. Stuðul til vinnu | - | - | 750 | 850 | 850 | 850 |
| **02. Stuðul til at økja um tilvitskuna um føroyska matframleiðslu** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **750** | **850** | **850** | **850** |
| 53. Stuðul til vinnu | - | - | 750 | 850 | 850 | 850 |

**03. Grønmetisframleiðsla**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **-** | **800** | **800** | **800** |
| 53. Stuðul til vinnu | - | - | - | 800 | 800 | 800 |

# Sjóvinna

## 6.35.1. Ymsar útreiðslur

### 6.35.1.08. Sjóvinnustýrið (Rakstrarjáttan)

Undir Sjóvinnustýrinum eru skipaskráseting, FAS, skipaeftirlit og havnaeftirlit við fremmandum skipum.

**Undirkonta 20. Skipaskráseting**
Høvuðsuppgávan hjá Skipaskrásetingini er at umsita løgtingslóg nr. 9 frá 5. mars 1970 um skráseting av skipum, við seinni broytingum, sum er sermál og at veita landsstýri, Løgtingi og borgarum stuðul og ráðgeving í sjóvinnumálum.

Skipaskrásetingin umsitur lógina um skipaskráseting. Umsitingarligu uppgávurnar eru at skráseta nýggj skip og skip flutt úr øðrum skrásetingum, pantirættindi o.a., og at hava neyvt eftirlit við, um eigarar/feløg lúka øll skrásetingarkrøv. Skrásetingin skal eisini umsita reglurnar um leiguskráseting (bareboat-skráseting).

Allar skrásetingar verða gjørdar á www.teyggjan.fo, soleiðis at neyðugar upplýsingar verða skrásettar í einari skipan og á einum staði.

**FAS-skipanin**
FAS-skipanin virkar sambært løgtingslóg nr. 78 frá 10. mars 1992 um Føroyska Altjóða Skipaskrá, við seinni broytingum. Gjørdar eru broytingar í skipanini við tí endamáli at gera hana til eina kappingarføra hágóðskuskipaskrá.

Hetta er gjørt við at:

- Gera broytingar í ymiskum lógum, sum hava við virksemið á økinum at gera,
- Skipa fyrisitingina á økinum, soleiðis at viðskiftafólk í sínum samskifti við myndugleikarnar bert hava eitt stað at venda sær til, og at
- Skipanin verður miðvíst marknaðarførd

**Undirkonta 21. Skipaeftirlitið**
Sjóvinnustýrið arbeiðir støðugt við at betra um arbeiðsumhvørvið umborð á skipum, trygd á sjónum og at vera við til at verja havumhvørvið.

Sjóvinnustýrið umsitur og hevur ábyrgd av føroyska regluverkinum, sum ásetir krøv til skip og bátar, skrásett í føroysku skipa- og farskránni. Føroyska regluverkið fevnir um altjóða krøv til skip og bátar umframt serlig føroysk krøv. Stovnurin leggur áherðslu á at fylgja við í broytingunum í altjóða krøvum og at innføra tey og serligu føroysku krøvini í føroyska lóggávu. Løgtingslógir, kunngerðir umframt fráboðanir frá Sjóvinnustýrinum verða kunngjørdar á www.kunngerdaportalur.fo og á regluportalinum, sum Sjóvinnustýrið umsitur; sí, www.fma.fo.

Høvuðsuppgávurnar hjá Sjóvinnustýrinum eru at:

- Ráðgeva landsstýrimanninum
- Lógarfyrireiking og lógarsmíð: Lóg um trygd á sjónum og kunngerðir
- Áseta reglur við heimild í løgtingslóg um trygd á sjónum

- Umsita samskiftið við IMO og aðrar avvarðandi altjóða felagsskapir og stovnar, hvussu viðurskifti Føroya við IMO verða skipað
- Umsita og útinna lóggávuna, sum nevnd er omanfyri, undir hesum skriva út skipssertifikat, og samstarva við vinnuna í hesum sambandi
- Hava eftirlit við bygging og umbygging av skipum
- Sýna skip, undir hesum kanna vanlukkur á sjónum o.a.
- Hava eftirlit undir MARPOL og føroysku umhvørviskunngerðunum sambært § 10, stk. 3 í kunngerð nr. 124 frá 25. november 2005 um burturbeining av olju frá skipum o.ø., við seinni broytingum, og sambært § 11, stk. 3 í kunngerð nr. 122 frá 25. november 2005 um burturbeining av burturkasi frá skipum o.ø., við seinni broytingum
- Hava eftirlit við klassafeløgum, sum hava myndugleikagóðkenning at sýna og útgeva sertifikat myndugleikanna vegna
- Viðgera umsóknir um sjóvinnubrøv og manningarskjøl

Avtala er gjørd við donsku havaríkommisiónina um at hjálpa til við at kanna vanlukkur á sjónum.

Sjóvinnustýrið hevur sambært løgtingslóg nr. 4 frá 15. januar 1988 um starvsviðurskifti o.a. hjá sjófólki, við seinni broytingum, skyldu til at halda útreiðslur í sambandi við heimferð hjá sjófólki, m.a. tá ið sjófólk, sum er við barn og av heilsuligum ávum, krevur at sleppa av í útlondum, ella tá sjófólk, har hjúnafelagi ella barn er deytt ella illa sjúkt, krevur at sleppa heim v.m.

**Undirkonta 22. Havnaeftirlit við fremmandum skipum (Paris MoU)**
Paris MoU er ein felagsskapur, har 27 av sjóvinnufyrisitingunum í Europa, Russlandi og Kanada eru limir. Endamálið við felagsskapinum er at fremja eftirlit umborð á útlendskum skipum, sum koma í eina Paris MoU havn. Eftirlitið skal staðfesta, um skipini lúka altjóða krøv sambært m.a. SOLAS, MARPOL, STCW og MLC sáttmálunum. Við øðrum orðum verður kannað, um teknisku viðurskiftini á skipinum eru í lagi, at reglur um vernd av umhvørvinum verða hildnar, at manningin hevur kravdu førleikarnar, at hóskandi livi- og arbeiðsumstøður eru umborð, og at kravd sertifikat eru í gildi og eru umborð.

Meginreglan hjá felagsskapinum er, at høvuðsábyrgdin, fyri at krøvini sambært altjóða sáttmálanum verða yvirhildin, er hjá reiðarínum. Ábyrgdin at tryggja, at viðurskiftini eru í lagi, er hjá flaggmyndugleikanum.

Í 2018 varð farið undir tilgondina at gerast partur av Paris MoU. Tilgondin at gerast limur er drúgvari, enn fyrst mett. Arbeitt verður framvegis við málinum.

Umframt at røkja eftirlitsuppgávuna skal ein partur av játtanini nýtast til at menna ein føroyskan pall fyri "SafeSeaNet", sum er ein skipaferðslu- og upplýsingarskipan, sum inniheldur neyðugu upplýsingarnar um skipaferðslu, farm, tilburðir o.a., sum er avgerandi fyri at kunna virka í Paris MoU. Komið er væl áleiðis við fyrireikingunum. Árligt limagjald skal gjaldast til Paris MoU. Tað er áleið 350 tús. kr. Av tí at tað dregur út við at fáa sáttmála í lag, og væntað verður ikki, at tað kemur á mál við tí í 2024, lækkar játtanin 350 tús. kr.

**Undirkonta 23. Vitaverk og sjóuppmerking**
Landsstýrið hevur yvirtikið vitaverk- og sjóuppmerking við løgtingslóg nr. 60 frá 22. mai 2023 um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum. Yvirtøkan er 1. juni 2024.

Við yvirtøku av sjóuppmerking og vitaverki er lóggávugaldið, útinnandi valdið og fíggjarliga ábyrgdin á hesum økjum yvirtøkan sum føroysk sermál. Yvirtøkan fevnir um m.a. 24 vitar, sum verða rikni frá gomlu Loranstøðini á Eiði. Yvirtøkan fevnir haraafturat um onnur sjómerki, starvsfólk, alla

rakstrarúgerð, sum er knýtt at vitunum, og rakstrarútgerð í DGPS-støðini á Bøllureyni. Føroyskir myndugleikar yvirtaka eisini ábyrgdina av avtalum og samstarvinum, sum Sørfartsstyrelsen hevur við m.a. Arktisk Kommando, MRCC og Landsverk, undir hesum ábyrgdina av teimum uppgávum, sum avtalurnar fevna um.

Søfartsstyrelsen hevur í fylgiskjali til løgtingsmál 91/2022 gjørt eina meting av rakstrarkostnaðinum av vitaverkinum. Metingin vísir, at árligi rakstarkostnaðurin liggur á áleið 4 mió kr. Umframt hetta skal eitt starvsfólk setast í starv til m.a. at fyrireika yvirtøkuna og dagføra lóggávuna um sjóuppmerking og halda hesa viðlíka.

Játtanin í 2024 er 2,4 mió. kr. Í 2025 verður játtanin framskrivað til fult ár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 11.240 | 10.590 | 11.249 | 13.556 | 15.776 | 15.776 |
| Útreiðslur | 18.391 | 15.942 | 16.350 | 18.657 | 20.877 | 20.877 |
| Inntøkur | 7.151 | 5.352 | 5.101 | 5.101 | 5.101 | 5.101 |
| **20. Skipaskrásetingin** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 478 | 478 | 556 | 615 | 615 | 615 |
| **Útreiðslur** | **3.068** | **2.657** | **2.717** | **2.776** | **2.776** | **2.776** |
| 11. Lønir v.m. | 2.135 | 2.031 | 2.106 | 2.165 | 2.165 | 2.165 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 283 | 429 | 420 | 420 | 420 | 420 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 363 | 100 | 25 | 25 | 25 | 25 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 2 | 1 | 166 | 166 | 166 | 166 |
| 17. Avskrivingar o.a. | - | 43 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | -0 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | -2 | -2 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 286 | 54 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **2.590** | **2.179** | **2.161** | **2.161** | **2.161** | **2.161** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *113* | *110* | *190* | *190* | *190* | *190* |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *2.391* | *1.669* | *1.471* | *1.471* | *1.471* | *1.471* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *86* | *50* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *349* | *500* | *500* | *500* | *500* |

**21. Skipaeftirlitið**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 8.712 | 8.462 | 8.793 | 9.041 | 9.041 | 9.041 |
| **Útreiðslur** | **13.273** | **11.582** | **11.733** | **11.981** | **11.981** | **11.981** |
| 11. Lønir v.m. | 7.458 | 7.723 | 8.911 | 9.159 | 9.159 | 9.159 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2.939 | 2.298 | 1.382 | 1.382 | 1.382 | 1.382 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 2.271 | 511 | 134 | 134 | 134 | 134 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 603 | 651 | 806 | 806 | 806 | 806 |
| 17. Avskrivingar o.a. | - | 27 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 2 | 1 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 371 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| **Inntøkur** | **4.561** | **3.120** | **2.940** | **2.940** | **2.940** | **2.940** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *171* | *121* | *110* | *110* | *110* | *110* |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *3.297* | *2.607* | *2.830* | *2.830* | *2.830* | *2.830* |
| 61. Skattir og avgjøld | - | *-0* | - | - | - | - |
| 64. Aðrar flytingarinntøkur | *12* | - | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *1.080* | *392* | - | - | - | - |

**22. Havnaeftirlit við fremmandum skipum (Paris MoU)**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 2.050 | 1.650 | 1.900 | 1.550 | 1.550 | 1.550 |
| **Útreiðslur** | **2.050** | **1.704** | **1.900** | **1.550** | **1.550** | **1.550** |
| 11. Lønir v.m. | 1.212 | 1.289 | 1.450 | 1.350 | 1.350 | 1.350 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 14 | 22 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | - | - | 250 | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 824 | 392 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **54** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *54* | - | - | - | - |

**23. Vitaverk og sjóuppmerking**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | - | - | - | 2.350 | 4.570 | 4.570 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **-** | **2.350** | **4.570** | **4.570** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | - | 1.560 | 2.700 | 2.700 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | - | 740 | 1.770 | 1.770 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | - | 50 | 100 | 100 |

**Virksemisyvirlit: Sjóvinnustýrið**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **18.391** | **15.942** | **16.350** | **18.657** | **20.877** | **20.877** |
| Leiðsla | 1.233 | 1.204 | 1.252 | 1.252 | 1.252 | 1.252 |
| Umsiting | 3.100 | 3.138 | 3.166 | 3.123 | 3.123 | 3.123 |
| Manningarviðurskifti | 3.032 | 2.582 | 2.614 | 2.964 | 2.964 | 2.964 |
| Skráseting | 1.506 | 1.306 | 1.356 | 1.356 | 1.356 | 1.356 |
| Løgfrøði | 1.911 | 1.866 | 1.866 | 1.866 | 1.866 | 1.866 |
| Eftirlit | 4.679 | 3.316 | 3.316 | 3.316 | 3.316 | 3.316 |
| QA Dygdarmenning | 880 | 880 | 880 | 880 | 880 | 880 |
| Havnaeftirlit (Paris MoU) | 2.050 | 1.650 | 1.900 | 1.550 | 1.550 | 1.550 |
| Vitaverk og sjóuppmerking | - | - | - | 2.350 | 4.570 | 4.570 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Skipaskrásetingin**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 2,6 | 2,6 | 2,6 | 2,6 | 2,6 | 2,6 |
| Fulltíðarstørv | 3,6 | 3,6 | 3,6 | 3,6 | 3,6 | 3,6 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 2,1 | 2,0 | 2,1 | 2,2 | 2,2 | 2,2 |

**Starvsfólkayvirlit: 21 Skipaeftirlitið**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 15,0 | 15,0 | 15,0 | 15,0 | 15,0 | 15,0 |
| Fulltíðarstørv | 15,0 | 15,0 | 15,0 | 15,0 | 15,0 | 15,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 7,5 | 7,7 | 8,9 | 9,2 | 9,2 | 9,2 |

**Starvsfólkayvirlit: 22 Havnaeftirlit við fremmandum skipum (Paris MoU)**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Fulltíðarstørv | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 1,2 | 1,3 | 1,5 | 1,4 | 1,4 | 1,4 |

## 6.35.1.09. Sjóvinnustýrið, bygningur (Løgujáttan)

Farið er undir at fáa hølisviðurskiftini hjá Sjóvinnustýrinum í fastar karmar. Sjóvinnustýrið hevur síðani á sumri 2016 húsast í fyribilshølum, eftir at stovnurin mátti flyta bráðfeingis úr leiguhølunum í Miðvági.

Í 2022 vórðu brúktar 8,9 mió. kr. Í 2023 eru játtaðar 8 mió. kr. Umframt framfluttar 9,9 mió. kr., eru 17,9 mió. kr. tøkar í 2023. Verkætlanin er gjørd liðug í 2023.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 3.067 | 8.853 | 8.000 | - | - | - |
| **10. Sjóvinnustýrið, bygningur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **3.067** | **8.853** | **8.000** | **-** | **-** | **-** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -341 | -321 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 3.067 | 8.853 | 8.000 | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 341 | 321 | - | - | - | - |

# Aling

## 6.36.1. Ymsar útreiðslur

### 6.36.1.04. Havbúnaðarroyndir (Stuðulsjáttan)

Játtanin verður nýtt til at veita stuðul til gransking, menning og ráðgeving innan aling av vatnlivandi djórum og plantum. Arbeiðið fatar um at betra vitanarstøðið og framleiðsluna innan alivinnuna saman við Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

Løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2009 um at hækka partapeningin í P/F Fiskaaling heimilar landsstýrismanninum at veita stuðul til nevndu endamál av árligu játtanini í fíggjarlógini.

Visjónin hjá P/F Fiskaaling er **Vitan til varandi aling**, og arbeitt verður við langskygdari og dygdargóðari gransking, ið hevur til endamáls at uppbyggja vitan á altjóða støði. Tað arbeiðið skal koma alivinnuni og harvið eisini føroyska búskapinum sum heild til góðar.

Granskingararbeiðið hevur sostatt til endamáls at **menna vitan um aling** og viðurskifti, ið kunnu setast í samband við aling og teir karmar, alingin virkar í. Serligur dentur verður lagdur á **vitan, ið kann menna varandi føroyska aling**.

Sáttmálin millum P/F Fiskaaling og Uttanríkis- og vinnumálaráðið fevnir um gransking, menning og ráðgeving fyri tíðarskeiðið 2021-2023. Heimsmálini eru beinleiðis nevnd í sáttmálanum, m.a. tí at landsstýrið ynskir at varpa ljós á týdningin av, at vitanin verður brúkt sum grundarlag fyri burðardyggari menning av alivinnuni, og at nýtslan av firðunum ikki avmarkar møguleikan hjá komandi ættarliðum.

Raðfestu økini eru:

- Burðardygg nýtsla av firðum
- Aling á landi
- Lús og smitta
- Fiskavælferð
- Nýggir framleiðslumøguleikar (t.v.s. nýggir hættir, nýggj økir og nýggj sløg)

Tað starvast umleið 30 fólk á P/F Fiskaaling. Harafturat luttaka fleiri lesandi í arbeiðinum á P/F Fiskaaling. Hetta verður skipað soleiðis, at tann lesandi saman við P/F Fiskaaling ger uppgávur, ið eru partur av útbúgvingini. P/F Fiskaaling virkar tá sum vegleiðari. Talan er um bæði PhD-verkætlanir, masteruppgávur, bacheloruppgávur og praktikantar av ymiskum slagi, og virkar hetta eisini sum rekrutteringsarbeiði, soleiðis at lesandi í ymiskan mun búnast til at starvast í alivinnuni.

Stavnhaldið hjá P/F Fiskaaling er við gransking, menning og ráðgeving at økja vitanarstøðið, soleiðis at menningin av alivinnuni byggir á vitan um umhvørvi og fiskavælferð. Dentur verður lagdur á samstarv við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar og við vinnulívið um gransking, sum er viðkomandi fyri menningina av føroyskari alivinnu.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 8.900 | 8.900 | 8.900 | 8.900 | 8.900 | 8.900 |
| **01. Royndir** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **8.900** | **8.900** | **8.900** | **8.900** | **8.900** | **8.900** |
| 53. Stuðul til vinnu | 8.900 | 8.900 | 8.900 | 8.900 | 8.900 | 8.900 |

# Handil og vinna annars

## 6.37.1. Ymsar útreiðslur

### 6.37.1.05. Export Faroe Islands (Rakstrarjáttan)

Tørvur er á at seta fokus á útflutningsframa. Sett verður á stovn "Export Faroe Islands" sum skal samstarva við privatar vinnufyritøkur um branding av føroysku veitaravinnuni. Føroyskar fyritøkur eru lítlar í altjóða høpi, tað er tí neyðugt at føroyska vinnan bjóðar seg fram í felag.

Stórir og áhugaverdir marknaðir eru tætt við Føroyar. Í fyrstu atløgu veðrur dentur lagdur á grannalondini Bretland, Ísland, Norra, Danmark og Grønland.

Export Faroe Islands skal arbeiða fyri at:

- Fremja hugburð í mun til útflutning
- Fremja málrættað arbeiði við útflutningi
- Økja um møguleikan hjá fyritøkum at útflyta
- Skapa málrættað fokus á útflutning á føroysku sendistovunum

Í Vakstrarforum varð væntað, at Export Faroe Islands tørvar eina játtan á 5 mió. kr. Fyri at byrja arbeiðið vóru 500 tús.kr. settar av í 2023 til endamálið. Játtanin verður hækkað 200 tús. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | - | - | 500 | 700 | 700 | 700 |
| Útreiðslur | - | - | 500 | 700 | 700 | 700 |
| **20. Export Faroe Islands** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | 500 | 700 | 700 | 700 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **500** | **700** | **700** | **700** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 400 | 500 | 500 | 500 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | 100 | 200 | 200 | 200 |

### 6.37.1.07. Sáttmálaeftirlit (Rakstrarjáttan)

Í kunngerð nr. 61 frá 23. mai 2002 um at umsita lóg um studning til skipasmiðjur, við seinni broytingum, sum hevur heimild í løgtingslóg nr. 73 frá 20. mai 1996 um studning til skipasmiðjur, við seinni broytingum, er ásett, at føroyskar skipa- og bátasmiðjur og onnur kunnu søkja Vinnuframa um endurgjald til skipasmíð.

Játtanin er gjald til Vinnuframa fyri at umsita játtan til endurgjald til skipasmíð.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 50 | 50 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| Útreiðslur | 50 | 50 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 50 | 50 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| **Útreiðslur** | **50** | **50** | **50** | **50** | **50** | **50** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 50 | 50 | 50 | 50 | 50 | 50 |

## 6.37.1.15. Brúkaraumboð (Rakstrarjáttan)

Brúkaraumboðið virkar sambært løgtingslóg nr. 19 frá 8. mai 2008 um marknaðarføring, við seinni broytingum. Endamálið er at tryggja góðan marknaðarføringssið við atliti at brúkaranum, vinnurekandi og samfelagnum.

Virksemið hjá Brúkaraumboðnum er at hava eftirlit við privatum vinnuvirksemi og almennum virksemi umframt vinnuvirksemi hjá áhugafeløgum og felagsskapum, í tann mun vørur og tænastur verða bodnar út á marknaðinum, og at fremja góðan marknaðarføringssið til frama fyri brúkaran.

Eftirlitið er býtt í tveir partar. Tann fyrsti parturin eru innkomnar klagur ella mál, sum Brúkaraumboðið av sínum eintingum kann taka upp. Tað er ein sera týðandi partur, tí tað eru klagurnar, sum geva eina greiða mynd av, hvussu stendur til við góðum marknaðarføringssiði í Føroyum.

Tann næsti parturin er upplýsandi. Brúkaraumboðið skal royna at ávirka vinnurekandi og stovnar við at gera og almannakunngera leiðreglur um marknaðarføring á økjum, sum hava stóran týdning, serliga fyri brúkaran.

Brúkaraumboðið kann gera forhandarmeting, um ætlað marknaðarføringstiltøk kunnu metast at vera lóglig ella ikki. Tað vil siga, at Brúkaraumboðið kann fáa tilfar og lýsingar sendandi fyri at fyribyrgja, at nakað kemur skeivt fyri, tá ið marknaðarføringstiltøk verða sett í verk.

Í marknaðarføringslógini er ein áseting um eina samráðingarmeginreglu. Tí fer Brúkaraumboðið altíð samráðingarvegin fyri at loysa mál, áðrenn onnur tiltøk sum t.d. áleggingar, forboð og rættarmál verða sett í verk.

Frá1. juli 2021 hevur Brúkaraumboðið eisini eftirlit við "Kontantregluni" sambært Anordning nr. 1223 af 4. juni 2021 om ikrafttræden for Færøerne af lov om betalingar. Nýggju uppgávurnar hjá Brúkaraumboðnum fevna m.a. um at viðgera mál, fyrispurningar og klagur, sum hava við gjaldsstænastur og elektroniskan pening at gera.

Umframt lønarframskriving verður játtanin hækkað 100 tús. kr. til at tryggja, at Brúkaraumboðið kann halda fram við at hava ein virknan leiklut í føroyska samfelagnum til frama fyri brúkarar og vinnulív.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 1.075 | 1.218 | 1.400 | 1.535 | 1.535 | 1.535 |
| Útreiðslur | 1.075 | 1.218 | 1.400 | 1.535 | 1.535 | 1.535 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 1.075 | 1.218 | 1.400 | 1.535 | 1.535 | 1.535 |
| **Útreiðslur** | **1.075** | **1.218** | **1.400** | **1.535** | **1.535** | **1.535** |
| 11. Lønir v.m. | 885 | 900 | 1.275 | 1.410 | 1.410 | 1.410 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 74 | 166 | 70 | 70 | 70 | 70 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | 24 | 5 | 5 | 5 | 5 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 117 | 128 | 50 | 50 | 50 | 50 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 0,5 | 0,7 | 0,7 | 0,7 | 0,7 | 0,7 |
| Fulltíðarstørv | 1,5 | 1,7 | 1,7 | 1,7 | 1,7 | 1,7 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 0,9 | 0,9 | 1,3 | 1,4 | 1,4 | 1,4 |

## 6.37.1.20. Vinnustovnurin (Rakstrarjáttan)

### Undirkonta 20. Skráseting Føroya

Felagsskrásetingin umsitur parta- og smápartafelagslógina, lógina um vinnurekandi grunnar, ársroknskaparlógina, grannskoðaralógina, § 7, stk. 2-4 í lóg um aling av fiski, lóg um vatn í Sumbiarbergholinum og skrásetir m.a. nýggj feløg. Felagsskrásetingin hevur eftirlit við, at feløgini lúka øll krøv, sum verða sett til teirra felagshátt, herundir eisini viðvíkjandi lóg um hvítvask. Umsitingarkostnaðurin hjá Skrásetingini verður í høvuðsheitum fíggjaður við gjøldum og frá inntøkum fyri upplýsingar, sum viðskiftafólk biðja um.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal støðugt saman við Skrásetingini skapa karmar og dagføra lógargrundarlagið innan málsøkið.

Nýggj lóg um um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi, løgtingslóg nr. 190 frá 18. desember 2021, er sett í gildi í Føroyum 1. juli 2021. Sambært lógini hevur Skráseting Føroya eftirlit við fleiri ymiskum bólkum av fyritøkum og persónum, m.a. løggildum og skrásettum grannskoðarum, ognarmeklarum, skattaráðgevum, eksternum bókhaldarum og útbjóðarum av tænastuveitingum til fyritøkur. Umframt hetta eru umfatandi broytingar framdar í grannskoðaralógini í 2021, sum hava økt um eftirlitsskyldurnar hjá Skráseting Føroya og hevur økt um arbeiðsbyrðuna. Tað er av stórum týdnigi at Skráseting Føroya hevur neyðuga orku at raðfesta arbeiðið sambært hvítvasklógini og grannskoðaralógini.

Hvítvask fer oftast fram í altjóða høpi. Sum partur av altjóða samstarvinum innan karmarnar av FATF (Financial Action Task Force) hava Føroyar skyldu at tryggja, at FATF-tilmælini verða framd í føroyskari lóggávu. Tað hevur týdning at Føroyar standa seg væl í greiningunum viðvíkjandi hvítvasklóggávu og eftirlitsskyldum innan hvítvask, tí hetta styrkir umdømi og kappingarføri hjá Føroyum. Av slíkum greiningum kunnu nevnast greining sum Global Forum on Transparency and

Exchange of Information for Tax Purposes stendur fyri og Den Nationale Risikovurdering, sum Statsadvokaten for særlig økonomisk og international kriminalitet útgevur.

Játtanin hækkaði 850 tús. kr. í 2023 til fyrst og fremst eftirltisarbeiði sambært hvítvasklógini og grannskoðaralógini.

Í 2024 verður játtanin hækkað 800 tús. kr. til útflutningseftirlit í sambandi við sanktiónir mótvegis Russlandi.

Skrásetingin umsitur eisini:

- Lov om foreningsregisteret
- Lov om visse erhversdrivende virksomheder
- Lóg um keyp og sølu av fastogn o.a.
- Lóg um vinnu
- Lóg um bókhald

**Undirkonta 21. Kappingareftirlitið**
Kappingareftirlitið umsitur løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping, við seinni broytingum.

Lógin hevur til endamáls at fremja fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu til frama fyri fyritøkur og brúkarar. Hetta verður gjørt við at tryggja virkna kapping og soleiðis styrkja virkisførið í framleiðslu og handli við vørum og tænastum o.ø. við mest møguligum gjøgnumskygni viðvíkjandi kappingarviðurskiftum og við tiltøkum ímóti avmarking í vinnufrælsinum og øðrum skaðiligum árinum av kappingaravmarkingum.

Kappingarráðið hevur eftirlit við lógini og reglum, ásettar sambært lógini. Til ráðið er knýtt skrivstova, Kappingareftirlitið, sum vegna Kappingarráðið hevur um hendi dagligu umsitingina av kappingarlógini.

Kappingarráðið hevur sum høvuðsuppgávu at hava eftirlit við, at forboðini í kappingarlógini ikki verða brotin. Tað eru forboð ímóti kappingaravlagandi avtalum og forboð ímóti misnýtslu av marknaðarráðandi støðu. Afturat hesum hevur Kappingarráðið eftirlit við, at samanleggingar, sum kunnu hindra virknari kapping, ikki verða framdar. Kappingarráðið hevur eisini heimild til at venda sær beinleiðis til myndugleikar og vísa á reguleringar, sum eru skaðiligar fyri kappingina, og koma við uppskoti um øðrvísi regulering.

Til tess at kunna útinna áðurnevndu uppgávur er neyðugt hjá Kappingarráðnum at hava gott innlit í kappingarstøðuna á einstøku marknaðunum í Føroyum. Innlitið fæst lutvíst við, at størri kanningar verða framdar av marknaðum og vinnugreinum og umvegis málsviðgerð av einstøkum málum.

**Undirkonta 22. Fjarskiftiseftirlitið**
Fjarskiftiseftirlitið virkar eftir løgtingslóg nr. 72 frá 22. mai 2015 um fjarskifti, við seinni broytingum, og reglugerð frá 9. juli 1999 fyri Fjarskiftiseftirlitið. Fjarskiftiseftirlitið hevur eftirlit við fjarskifti og fjarskiftistænastum. Eftirlitið er ráðgevi hjá landsstýrinum og miðfyrisitingini annars um faklig viðurskiftið á fjarskiftisøkinum.

Virksemið hjá Fjarskiftiseftirlitinum verður fíggjað við rakstrargjaldi og eftirlitsgjøldum. Fjarskiftisveitarar rinda rakstrargjald í mun til marknaðarpart á føroyska fjarskiftismarknaðinum og frekvensgjøld sambært kunngerð. Harumframt eru flytingarinntøkur frá øðrum stovnum undir Vinnustovninum fyri felags skrivstovuhald o.t.

Fjarskiftiseftirlitið hevur frá 1. juli 2021 eftirlit við, at reglur ásettar í løgtingslóg nr. 56 frá 4. mai 2021 um økisnøvn á internetinum, umframt treytir, ásettar í loyvum, ið eru givin sambært løgtingslógini, verða yvirhildnar. Umsitarar, sum hava fingið loyvi sambært § 3, stk. 1 ella § 4, stk. 2 í lógini, bera útreiðslurnar hjá Fjarskiftiseftirlitinum. Kostnaðurin er mettur at verða áleið 50-100 tús. kr. FO-ráðið endurrindar Fjarskiftiseftirlitinum útreiðslunar.

**Undirkonta 23. Tryggingareftirlitið**
Tryggingareftirlitið virkar sambært løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi (tryggingarlógin), við seinni broytingum.

Høvuðsuppgávurnar eru:

- Eftirlitsvirksemi
- Menning og gerð av reglum
- Kunningarvirksemi

*Eftirlitsvirksemi*
Høvuðsuppgávan hjá Tryggingareftirlitinum er at hava eftirlit við tryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum. Serliga verður eftirkannað, at feløgini hava nóg mikið av kapitali í mun til tann váða, ið feløgini hava átikið sær (solvenseftirlit). Harumframt er eftirlit við, at tryggingarlóggávan sum heild verður hildin.

*Menning og gerð av reglum*
Tryggingareftirlitið er við til at gera reglurnar á tryggingarøkinum og ásetir eisini nærri reglur í kunngerð.

*Kunningarvirksemi*
Tryggingareftirlitið er við til at savna saman og miðla vitan um tryggingarøkið.

Útreiðslurnar, ið standast av eftirlitinum, rinda tryggingarfeløgini sambært § 207 í tryggingarlógini.

*Aðrar uppgávur*
Tryggingareftirlitið hevur eftirlit við, at m.a. realkredittstovnar, lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar halda ásetingarnar í lógini um hvítvask.

Tryggingareftirlitið hevur sambært løgtingslóg nr. 53 frá 12. mai 2015 um P/F Lív lívs- og pensjónstryggingarfelag, við seinni broytingum, eftirlit við P/F Lív lívs- og pensjónstryggingarfelag.

Tryggingareftirlitið hevur, sambært avtlalu við løgmann og landsstýrismannin í Uttanríkis- og vinnumálum, eftirlit við Føroya Realkreditstovni, sambært ásetingunum í kapittul 3 og 4 í løgtingslóg um Føroya Realkreditstovn (Realin).

**Undirkonta 24. Posteftirlitið**
Posteftirlitið virkar sambært § 20 í løgtingslóg nr. 135 frá 18. oktober 2001 um postvirksemi, við seinni broytingum. Posteftirlitið skal útinna skráseting og eftirlit við postvinnurekandi.

Útreiðslurnar av Posteftirlitinum verða sambært konsessiónstreytunum fíggjaðar við rakstrargjaldi frá teimum ið hava konsessión.

**Undirkonta 27. Nettrygd**
Sambært nýggju nettrygdarætlanini hjá landsstýrinum er ætlanin at Vinnustovnurin skal hava ein

týðandi og virknan leiklut í at verja kritiska undirstøðukjervi og tær samfelagstýðandi funkriónir, sum stuðla undir talgilda partin av føroyska samfelagnum. Vinnustovnurin skal standa fyri arbeiðinum at seta á stovn ein nettrygdarmyndugleika (mál 4 í nettrygdarætlanini).

Undirstøðukjervi sum er týðandi fyri samfelagið skal kortleggjast og skipa yvirvaking á økinum (mál 1 í nettrygdarætlanini) setast í verk. Vinnustovnurin skal luttaka í nettrygdartibúgving (mál 2) og luttaka í lóggávurarbeiðinum á økinum (mál 3).

Fyri fyrst er økið raðfest við áleið 1 mió kr. Mett er tó, at sum frálíður verður játtanartørvurin munandi hægri.

## Átekning
Landsstýrismanninum verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum høvuðskontuna og høvuðskontu 14.14.1.10. Útlendingastovan.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 1.993 | 2.036 | 2.920 | 4.829 | 7.529 | 8.279 |
| Útreiðslur | 21.101 | 22.065 | 20.900 | 23.034 | 25.734 | 26.484 |
| Inntøkur | 19.109 | 20.029 | 17.980 | 18.205 | 18.205 | 18.205 |
| **20. Skráseting Føroya** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -39 | -84 | 850 | 1.650 | 1.650 | 1.650 |
| **Útreiðslur** | **5.953** | **6.446** | **6.350** | **7.275** | **7.275** | **7.275** |
| 11. Lønir v.m. | 3.348 | 3.869 | 4.490 | 5.365 | 5.365 | 5.365 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.209 | 1.875 | 1.200 | 1.250 | 1.250 | 1.250 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 424 | 169 | 110 | 110 | 110 | 110 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 115 | 132 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| 17. Avskrivingar o.a. | 39 | 66 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -0 | 0 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 1 | 0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 818 | 334 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| **Inntøkur** | **5.992** | **6.531** | **5.500** | **5.625** | **5.625** | **5.625** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *321* | *297* | *280* | *280* | *280* | *280* |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *5.251* | *5.925* | *5.020* | *5.145* | *5.145* | *5.145* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *3* | *1* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *418* | *308* | *200* | *200* | *200* | *200* |
| **21. Kappingareftirlitið** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 2.032 | 2.121 | 2.070 | 2.129 | 2.129 | 2.129 |
| **Útreiðslur** | **2.670** | **2.485** | **2.420** | **2.479** | **2.479** | **2.479** |
| 11. Lønir v.m. | 2.094 | 2.163 | 2.132 | 2.191 | 2.191 | 2.191 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 398 | 197 | 178 | 178 | 178 | 178 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 84 | 3 | 10 | 10 | 10 | 10 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 38 | 40 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 57 | 82 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| **Inntøkur** | **638** | **364** | **350** | **350** | **350** | **350** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *638* | *364* | *350* | *350* | *350* | *350* |

**22. Fjarskiftiseftirlitið**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **8.270** | **8.211** | **8.480** | **8.480** | **8.480** | **8.480** |
| 11. Lønir v.m. | 4.553 | 4.562 | 5.510 | 5.510 | 5.510 | 5.510 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.701 | 2.510 | 1.600 | 1.600 | 1.600 | 1.600 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 257 | 201 | 400 | 400 | 400 | 400 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 732 | 408 | 720 | 720 | 720 | 720 |
| 17. Avskrivingar o.a. | 3 | 1 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -0 | 2 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1.025 | 527 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| **Inntøkur** | **8.270** | **8.211** | **8.480** | **8.480** | **8.480** | **8.480** |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *7.207* | *7.313* | *8.050* | *8.050* | *8.050* | *8.050* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | - | *0* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *1.063* | *898* | *430* | *430* | *430* | *430* |

**23. Tryggingareftirlitið**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 0 | -0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **4.159** | **4.858** | **3.520** | **3.620** | **3.620** | **3.620** |
| 11. Lønir v.m. | 2.172 | 2.364 | 2.490 | 2.590 | 2.590 | 2.590 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.276 | 1.904 | 700 | 700 | 700 | 700 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 73 | 52 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 283 | 126 | 130 | 130 | 130 | 130 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 0 | -0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 354 | 412 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| **Inntøkur** | **4.159** | **4.858** | **3.520** | **3.620** | **3.620** | **3.620** |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *4.117* | *4.758* | *3.520* | *3.620* | *3.620* | *3.620* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *42* | *100* | - | - | - | - |

**24. Posteftirlitið**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **50** | **66** | **130** | **130** | **130** | **130** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 5 | 8 | - | - | - | - |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 6 | - | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 38 | 58 | 130 | 130 | 130 | 130 |
| **Inntøkur** | **50** | **66** | **130** | **130** | **130** | **130** |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *50* | *66* | *130* | *130* | *130* | *130* |

**27. Nettrygd**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | - | - | - | 1.050 | 3.750 | 4.500 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **-** | **1.050** | **3.750** | **4.500** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | - | 700 | 2.250 | 3.000 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | - | 250 | 1.400 | 1.400 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | - | 50 | 50 | 50 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | - | - | 50 | 50 | 50 |

**Virksemisyvirlit: 20 Skráseting Føroya**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Vinnufeløg og grunnar 31. desember (tal)** | **3.666** | **3.860** | **4.060** | **4.260** | **4.460** | **4.660** |
| Vinnufeløg og grunnar pr. 1. januar | 3.483 | 3.666 | 3.860 | 4.060 | 4.260 | 4.460 |
| Stovnað feløg í árinum | 303 | 314 | 310 | 310 | 300 | 300 |
| Strikað feløg í árinum | -120 | -120 | -110 | -110 | -100 | -100 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Skráseting Føroya**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 5,5 | 6,5 | 7,5 | 8,5 | 8,5 | 8,5 |
| Fulltíðarstørv | 5,5 | 6,5 | 7,5 | 8,5 | 8,5 | 8,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 3,3 | 3,9 | 4,5 | 5,4 | 5,4 | 5,4 |

**Virksemisyvirlit: 21 Kappingareftirlitið**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **2.670** | **2.343** | **2.420** | **2.420** | **2.420** | **2.420** |
| 1. Kappingarráðið | 174 | 174 | 174 | 174 | 174 | 174 |
| 2.1. Leiðsla | 154 | 154 | 169 | 169 | 169 | 169 |
| 2.2. Felagsútreiðslur | 469 | 469 | 484 | 484 | 484 | 484 |
| 2.3. Kærumál | 419 | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 2.4. Kanningar | 821 | 613 | 663 | 663 | 663 | 663 |
| 2.5. Ráðgeving | 518 | 518 | 515 | 515 | 515 | 515 |
| 2.6. Kunning | 115 | 115 | 115 | 115 | 115 | 115 |
| **B: Virksemi (tal)** | **48** | **48** | **34** | **34** | **34** | **34** |
| 1. Kærur | 7 | 7 | 5 | 5 | 5 | 5 |
| 2. Kanningar | 6 | 6 | 9 | 9 | 9 | 9 |
| 3. Fyrispurningur/ráðgeving | 20 | 20 | 12 | 12 | 12 | 12 |
| 4. Onnur mál | 15 | 15 | 8 | 8 | 8 | 8 |

**Starvsfólkayvirlit: 21 Kappingareftirlitið**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 |
| Fulltíðarstørv | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 2,1 | 2,2 | 2,1 | 2,2 | 2,2 | 2,2 |

**Virksemisyvirlit: 22 Fjarskiftiseftirlitið**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **8.270** | **7.980** | **8.480** | **8.480** | **8.480** | **8.480** |
| 1. Frekvensumsiting | 2.253 | 2.350 | 2.850 | 2.850 | 2.850 | 2.850 |
| 2. Fjarskifti | 2.604 | 2.850 | 2.850 | 2.850 | 2.850 | 2.850 |
| 3. Felagsútreiðslur | 1.338 | 800 | 800 | 800 | 800 | 800 |
| 4. Leiðsla | 738 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| 5. Tænastur fyri onnur | 1.337 | 1.480 | 1.480 | 1.480 | 1.480 | 1.480 |

**Starvsfólkayvirlit: 22 Fjarskiftiseftirlitið**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 8,0 | 8,0 | 9,0 | 9,0 | 9,0 | 9,0 |
| Fulltíðarstørv | 9,0 | 9,0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 4,6 | 4,6 | 5,5 | 5,5 | 5,5 | 5,5 |

**Starvsfólkayvirlit: 23 Tryggingareftirlitið**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 3,9 | 3,9 | 3,9 | 3,9 | 3,9 | 3,9 |
| Fulltíðarstørv | 3,9 | 3,9 | 3,9 | 3,9 | 3,9 | 3,9 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 2,2 | 2,4 | 2,5 | 2,6 | 2,6 | 2,6 |

**Starvsfólkayvirlit: 27 Nettrygd**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | - | - | - | 1,0 | 3,0 | 5,0 |
| Fulltíðarstørv | - | - | - | 1,0 | 3,0 | 5,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | - | - | - | 0,7 | 2,3 | 3,0 |

## 6.37.2. Ymiskur studningur

### 6.37.2.02. Vinnuframi (Stuðulsjáttan)

Vinnuframi virkar sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um Vinnuframagrunn. Endamál grunsins er at styrkja og fjøltátta føroyskt vinnulív og menna burðardyggar føroyskar fyritøkur. Umframt at menna virksemi, sum er, verður dentur lagdur á tøkni, bæði nýskapan í kendari tøkni og í framkomnari tøkni sum t.d. teldutøkni, lívtøkni og skapandi vinnu.

Vinnuframi veitir m.a. stuðul til átøk, herundir samstarv t.d. millum kommunur, vinnu og almennar stovnar, sum vilja skapa karmar fyri at:

- Veita individuella ráðgeving til tann einstaka íverksetan
- Fremja bólkaráðgeving, t.d. skipa fyri ráðstevnum, skeiðum, verkstovum, netverkan og tílíkt, til tess at ala fram íverksetarahugburð og nýskapan í Føroyum
- Ráðgeva um at gera kunnandi tilfar, t.d. á interneti og í faldarum

Játtaða stuðulsupphæddin verður útgoldin einaferð árliga, tá Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur fingið avrit av grannskoðaðum roknskapi.

**Undirkonta 02. Stuðul til tónleikavinnu**
Sum nakað nýtt verður verður ein Stuðulsskipan til tónleikavinnuna raðfest. Stuðulsskipanin til tónleikavinnuna er til marknaðarføringstiltøk uttanlands í breiðum týdningi. skipanin verður løgd til Vinnuframa at umsita í samstarvi við Tónleikaútflutningsstovuna (FMX).

Tey, ið kunnu søkja stuðul eftir hesari skipan, eru tónleikarar, tónleikaframleiðarar, útgávufeløg, tónleikaumboðsfólk og onnur ið gera átøk uttanlands, fyri at fremja tónleikaútflutning.

Játtanin verður umsitin sambært reglugerð.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 3.200 | 3.000 | 3.500 | 3.500 | 3.500 | 3.500 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **3.200** | **3.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 3.200 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| **02. Stuðul til tónleikavinnu** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **500** | **500** | **500** | **500** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | - | 500 | 500 | 500 | 500 |

## 6.37.2.04. Endurgjald til skipasmíð (Stuðulsjáttan)

Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 73 frá 20. mai 1996, við seinni broytinum, er heimilað landstýrismanninum at veita føroyskum skipa- og bátasmiðjum 8% í studningi av sáttmálaprísinum til at nýbyggja og umbyggja flótandi eindir. Studningur til nýbygging kann verða játtaður, tá ið sáttmálaprísurin er 0,3 mió. kr. ella hægri, og studningur til at umbyggja flótandi eindir kann játtast, tá sáttmálaprísurin er 3 mió. kr. ella hægri.

Sambært kunngerð nr. 61 frá 23. mai 2002 um at umsita lóg um studning til skipasmiðjur, við seinni broytingum, kann stuðul veitast eftir umsókn. Saman við umsóknini skal liggja undirskrivaður byggisáttmáli. Umsókn skal verða send Vinnuframagrunninum, áðrenn farið verður at byggja.

Stuðulin verður útgoldin, tá ið løggildur grannskoðari hevur váttað uppgerð av studningsgrundarlagnum, umframt at skjalprógv eru fyri neyðugum góðkenningum frá tí almenna og/ella klassa og váttan um, at eigarin hevur yvirtikið farið.

Endurgjaldið til skipasmíð var 12,2 mió. kr. í 2022. Higartil er endurgjaldið 665 tús. kr. í 2023. Játtanin í 2024 verður hækkað 1,4 mió. kr. til 5,2 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 6.839 | 12.166 | 3.800 | 5.200 | 5.200 | 5.200 |
| **01. Endurgjald** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **6.839** | **12.166** | **3.800** | **5.200** | **5.200** | **5.200** |
| 53. Stuðul til vinnu | 6.839 | 12.166 | 3.800 | 5.200 | 5.200 | 5.200 |

## 6.37.2.08. Stuðul til fyritøkur vegna átøk í sambandi við COVID-19 (Stuðulsjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 97 frá 23. juni 2020 um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19 verður veitt endurgjald fyri fastar útreiðslur til fyritøkur við umsetingarmissi vegna átøk í sambandi við COVID-19.

Skeinkingarstøð verða viðgjørd á sama hátt sum ferðavinnufyritøkur, nevndar í § 1, stk. 2.

Við heimild í løgtingslóg nr. 183 frá 21. desember 2018 um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi, við seinni broytingum, er landsstýrismanninum heimilað við kunngerð at avmarka upplatingartíðina hjá matstovunum og skeinkingarstøðum.

Ongin játtan er til endamálið í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 39.875 | 2.216 | - | - | - | - |
| Inntøkur | 27 | 7 | - | - | - | - |
| **01. Stuðul til fyritøkur vegna átøk í sambandi við COVID-19** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-494** | **-81** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 53. Stuðul til vinnu | -494 | -81 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **25** | **4** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *25* | *4* | - | - | - | - |
| **02. Stuðul til fyritøkur innan ferðavinnuna vegna átøk í sambandi við COVID-19** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **39.970** | **2.297** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 53. Stuðul til vinnu | 39.970 | 2.297 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **1** | **3** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *1* | *3* | - | - | - | - |
| **03. Stuðul til fyritøkur uttanlands innan ferðavinnuna vegna átøk í sambandi við COVID-19** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **400** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 400 | - | - | - | - | - |

## 6.37.2.09. Umsiting av stuðulsskipan til fyritøkur vegna átøk í sambandi við COVID-19 (Rakstrarjáttan)

Sambært § 9 í kunngerð nr. 134 frá 28. august 2020 um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19 umsitur TAKS stuðulsskipanina og hevur eftirlit við, at

ásetingarnar í lógini og kunngerðini verða hildnar. Umsitingarkostnaðurin av skipanini verður goldin av hesi játtanini.

Ongin játtan er til endamálið í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | - | 100 | - | - | - | - |
| Útreiðslur | - | 100 | - | - | - | - |
| **20. Umsiting av stuðulsskipan til fyritøkur vegna átøk í sambandi við COVID-19** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | 100 | - | - | - | - |
| **Útreiðslur** | **-** | **100** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 100 | - | - | - | - |

## 6.37.2.11. Íverksetarahúsið í Klaksvík (Stuðulsjáttan)

Endamálið við Íverksetarahúsinum er at birta uppundir íverksetan av nýggjum vinnum og at menna verandi vinnur. Tað verður m.a. gjørt við at ráðgeva, skipa fyri skeiðum og øðrum útbúgvingarligum virksemi umframt at leiga høli út til íverksetarar, sum ætla at byrja egna fyritøku.

Avtala verður gjørd fyri virksemið fyri játtanarárið. Avtalan skal góðkennast av landsstýrismanninum.

Árliga stuðulsjáttanin verður goldin Íverksetarahúsinum í einum, tá ið Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur fingið avrit av grannskoðaðum roknskapi fyri árið fyri, og avtala er gjørd fyri virksemið í játtanarárinum.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 1.100 | 1.100 | 1.200 | 1.200 | 1.200 | 1.200 |
| **01. Íverksetarahúsið í Klaksvík** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.100** | **1.100** | **1.200** | **1.200** | **1.200** | **1.200** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.100 | 1.100 | 1.200 | 1.200 | 1.200 | 1.200 |

## 6.37.2.12. Filmshús (Rakstrarjáttan)

Til tess at stuðla undir føroyska filmsvinnu er filmshús sett á stovn. Filmshúsið virkar sambært løgtingslóg nr. 72 frá 29. mai 2017 um filmshús og kunngerð nr. 108 frá 10. juli 2017 um filmshús.

Filmshúsið skal leggja lunnar undir sprettandi føroysku filmsvinnuna. Filmshúsið skal savna og miðla vitan um film, filmsvinnuna og filmsførleikar í Føroyum, so at bæði føroyskar og útlendskar filmsframleiðslur kunnu verða settar í verk skjótt og væl. Filmshúsið skal eisini vera við til at meta um umsóknir um afturbering til filmsframleiðslur og soleiðis at tryggja góðskuna av verkætlanum, sum landið velur at stuðla við skipanini.

Filmshúsið skal vera savningarstaður fyri føroyska filmsumhvørvið, miðstøð fyri vitan um film, filmsfakligar førleikar og útgerð. Filmshúsið skal eisini menna altjóða netverk og virka fyri, at

føroyskir filmar verða sýndir uttanlands. Filmshúsið skal eisini verða við til at samskipa og stíla fyri skeiðum og undirvísing í filmsgerð.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 1.595 | 1.620 | 2.000 | 2.029 | 2.029 | 2.029 |
| Útreiðslur | 1.624 | 1.756 | 2.025 | 2.054 | 2.054 | 2.054 |
| Inntøkur | 30 | 136 | 25 | 25 | 25 | 25 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 1.595 | 1.620 | 2.000 | 2.029 | 2.029 | 2.029 |
| **Útreiðslur** | **1.624** | **1.756** | **2.025** | **2.054** | **2.054** | **2.054** |
| 11. Lønir v.m. | 713 | 694 | 1.030 | 1.059 | 1.059 | 1.059 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 682 | 819 | 795 | 795 | 795 | 795 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 32 | 43 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 96 | 99 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | - | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 100 | 100 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **30** | **136** | **25** | **25** | **25** | **25** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *30* | *67* | *25* | *25* | *25* | *25* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | - | *35* | - | - | - | - |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | - | *34* | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 1,0 | 1,0 | 1,5 | 1,5 | 1,5 | 1,5 |
| Fulltíðarstørv | 1,0 | 1,0 | 1,5 | 1,5 | 1,5 | 1,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 0,7 | 0,7 | 1,0 | 1,1 | 1,1 | 1,1 |

## 6.37.2.14. Endurgjald til filmsverkætlanir (Stuðulsjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 170 frá 20. desember 2017 um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum kunnu 25% av góðkendu útreiðslunum, sum framleiðslufelag hevur í Føroyum til góðkenda filmsverkætlan, verða endurgoldnar. Í minsta lagi 25% av fíggjarætlanini fyri framleiðsluna í Føroyum skal vera útlendsk fígging. Sostatt verður tryggjað, at skipanin gevur samfelagsbúskaparliga javnvág.

Fyri at fáa afturbering av parti av útreiðslunum skal framleiðslan lúka hesi krøv:

1. Framleiðslan skal fara heilt ella lutvíst fram í Føroyum
2. Fíggjarætlanin fyri framleiðsluna skal vísa nýtslu av góðkendum útreiðslum í Føroyum á í minsta lagi 500 tús. kr.
3. Í minsta lagi 25% av fíggjarætlanini fyri framleiðsluna í Føroyum skal vera útlendsk fígging
4. Skjalprógvast skal, at avtala er um altjóða útbreiðslu av framleiðsluni; ætlanarskriv um altjóða útbreiðslu kann eisini verða góðtikið

Filmsverkætlanin skal vera egnað til at útbreiða føroyska mentan, søgu ella náttúru. Eisini skal framleiðslan vera við til at menna listarliga og tøkniliga vitan og førleikar í føroysku filmsvinnuni.

Landsstýrismaðurin hevur ásett reglur í kunngerð nr. 61 frá 12. mai 2020 um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum. Uppskot til broyting í løgtingslógini er lagt fyri Løgtingið.

1. oktober 2023 er lógin um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í føroyum broytt soleiðis, at fyri filmar, sendirøðir og heimildarfilmar, sum verða framleidd í Føroyum, verða 25% av útreiðslunum, sum eru hildnar í Føroyum, afturbornar, um umsøkjarin lýkur treytirnar fyri at fáa afturbering. Afturberingin er í mesta lagi 5 mió. kr. Fer afturberingin upp um 5 mió. kr., kann upphæddin, ið er oman fyri 5 mió. kr., berast aftur, um játtanin til hetta fæst til vegar á løgtingsfíggjarlógini.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 200 | 200 | 1.800 | 1.800 | 1.800 | 1.800 |
| **01. Endurgjald til filmsverkætlanir** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **200** | **200** | **1.800** | **1.800** | **1.800** | **1.800** |
| 53. Stuðul til vinnu | 200 | 200 | 1.800 | 1.800 | 1.800 | 1.800 |

## 6.37.2.15. Tónleikaútflutningsstova (Rakstrarjáttan)

Tónleikaútflutningstovan virkar sambært løgtingslóg nr. 185 frá 21. desember 2018 um tónleikaútflutningsstovu og kunngerð nr. 33 frá 2. apríl 2019 um tónlekaútflutningsstovu.

Føroyar hava eitt ríkt tónleikalív, og seinastu tjúgu árini er talið á einstaklingum og fyritøkum, sum liva lutvíst ella burturav av tónleiki vaksið nógv. Mett verður, at tað eru áleið 75 fulltíðar yrkistónleikarar í Føroyum, og bæði áhugin og stóra tónlistarliga tilfeingið í Føroyum gevur grundarlag fyri vøkstri.

Tónleikaútflutningsstovan hevur stýri, sum setir dagligan leiðara. Skrivstovuhaldið er hjá Vinnuframa.

Játtanin hækkaði 500 tús. kr. í 2023 til, at Tónleikaútflutningsstovan kann fremja marknaðarátøk, útflutningsferðir, førleikamennandi tiltøk fyri vinnuna v.m. Henda raðfesting heldur fram í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 1.009 | 1.025 | 1.539 | 1.561 | 1.561 | 1.561 |
| Útreiðslur | 1.285 | 1.182 | 1.564 | 1.586 | 1.586 | 1.586 |
| Inntøkur | 277 | 158 | 25 | 25 | 25 | 25 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 1.009 | 1.025 | 1.539 | 1.561 | 1.561 | 1.561 |
| **Útreiðslur** | **1.285** | **1.182** | **1.564** | **1.586** | **1.586** | **1.586** |
| 11. Lønir v.m. | 738 | 711 | 809 | 831 | 831 | 831 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 423 | 347 | 530 | 530 | 530 | 530 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 7 | 9 | 25 | 25 | 25 | 25 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 18 | 11 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | 4 | - | - | - | - |
| 52. Tilskot til einstaklingar | -0 | - | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| **Inntøkur** | **277** | **158** | **25** | **25** | **25** | **25** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *227* | *88* | *25* | *25* | *25* | *25* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *50* | *70* | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Fulltíðarstørv | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 0,7 | 0,7 | 0,8 | 0,8 | 0,8 | 0,8 |

## 6.37.2.16. Kolagrevstur (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at varðveita kolahøgging sum vinnugrein í Føroyum. Jarðfeingi umsitur játtanina til kolagrevstur vegna Umhvørvis- og vinnumálaráðið og ger í hesum sambandi sáttmála við Roynds Kolasølu, sum tryggjar, at kol verður høgt í Føroyum.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 700 | 700 | 700 | 700 | 700 | 700 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **700** | **700** | **700** | **700** | **700** | **700** |
| 53. Stuðul til vinnu | 700 | 700 | 700 | 700 | 700 | 700 |

## 6.37.5. Almennir karmar

### 6.37.5.04. Heilsufrøðiliga starvsstovan (Rakstrarjáttan)

Heilsufrøðiliga starvsstovan (HFS) umsitur lógir og kunngerðir viðvíkjandi matvørum, djórasjúkum, djóravernd, djóralæknavirksemi og alivinnu.

Galdandi reglur innan hesi málsøki síggjast á heimasíðu stovnsins, sí www.hfs.fo

- Heilsufrøðilga starvsstovan fyribyrgjur at fólk gerast sjúk av mati
- Heilsufrøðilga starvsstovan tryggjar djóravælferðina
- Heilsufrøðilga starvsstovan veitur álítandi og altjóða góðkendar kanningar

Virksemið á HFS er býtt í meginøki, samsvarandi reglugerð frá 21. mars 2003 fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovu:

| Heiti á meginøki | Undirkonta | Heiti á undirkontu í fíggjarlógini |
|---|---|---|
| Fyrisitingarøkið | 20 | Vanligt virksemi |
| Kanningarstovuøkið | 21 | Vanligt virksemi, kanningarstovur |
| Aliloyvi | 22 | Umsiting av aliloyum |
| Granskingar- og menningarøkið | 45 | Inntøkufíggjað virksemi, verkætlanir |

Hesi fýra meginøki eru knýtt saman, tí tey byggja í stóran mun á sama fakliga førleika.

**Fyrisitingarøkið**
Fyrisitingarøkið umfatar landsdjóralæknan, veterinerdeildina og matvørudeildina. Harafturat er umsitingin av aliloyvum partur av fyrisitingarøkinum - eins og skrivstovan á stovninum.

Á matvøruøkinum verður arbeitt við at fyribyrgja, at fólk gerast sjúk av mati ella vatni. Stovnurin hevur eftirlit við matvøruframleiðslu og sølu av matvørum og vatni og ansar eftir, at brúkarar fáa álítandi upplýsingar um matvørur.

Fyri tilvirking av matvørum á heimamarknaðinum verður arbeitt eftir vegleiðingum. Harafturat er komin kunngerð um heimaframleiðslu har heimaframleiðarar skulu lata seg skráseta á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Á djóraheilsuøkinum verður arbeitt við at fyribyrgja og niðurberja fiska- og djórasjúkur. Arbeitt verður fram ímóti, at framleiðsuumstøðurnar allastaðni eru soleiðis, at djór hava góða heilsu og vælferð við minst møguligari nýtslu av heilvági.

Arbeitt verður við veterinerum viðurskiftum og matvørutrygd, soleiðis at føroyskur fiskur, fiskaúrdráttir og aðrar vørur kunnu útflytast og hava atgongd úti í heimi á jøvnum føti við onnur lond.

Byrja ar upp á BRÁ-skipan í 2023, at skapa regluverk. Skipanin ber við sær at Heilsufrøðiliga starvsstovan skipar og uppraðfestir eftirlitið við matstovum. Ætlanin er, at niðurstøðurnar frá eftirlitinum skulu verða sjónligar á matstaðnum umframt at úrslitini verða meira atkomulig enn tey eru í dag t.d. á eini heimasíðu. Fyri fyrst vóru 600 ús. kr. raðfestar til hetta økið, í játtanini fyri 2024 eru 400 tkr. aftuarat raðfestar til økið í alt 1 mió. kr.

Fleiri reglusett eyðkenna arbeiðið á stovninum. Hetta verið seg í mun til útflutning til ES, Russland, Kina og Vietnam. Dagførd umsókn er latin brasilianskum myndugleikum í 2023 soleiðis at teir kunnu taka støðu til landagóðkenningina.

HFS kemur at styrkja eftirlitið og fremja fleiri eftirlit framyvir til tess at liva upp til tær treytir sum ES setur.

Veterinerdeildin á stovninum er styrkt síðstu árini. Deildin røkir alt eftirlit og góðkenningar innan alivinnuna, herundir eisini loyvi til hvørt framleiðsluumfar í alivinnuni. Aðrar veterinerar uppgávur verða røktar eins og ávegis eftirlit er framt av djóravælferðini í.s.v. mjólkineyt. Gjørdar eru vergleiðingar fyri djórahald av ymiskum slag, tá umræður djóravælferð.

Innan økini, ið Heilsufrøðiliga starvsstovan varðar av, verður áhaldandi arbeitt við regluverkinum og íverksetan av tí, sum dømi kunnu nevnast at kunngerðin um yvirvøku og tálman av laksalús er dagførd og íverksett, m.a. eisini almannakunngering av lúsatølum og heilivágsnýtslu í alivinnuni (sí www.hfs.fo). Kunngerð um sjúkufyribyrging í alivinnuni er lýst og íverksett. Eisini verður arbeitt við kunngerðum innan matvøruøkið, t.d. í sambandi við BRÁ-skipan.

**Kanningarstovuøkið**
Kanningarstovuøkið umfatar kemiska deild, mikrobiologiska deild og patologiska deild. Allar eru akkrediteraðar eftir altjóða standardinum EN/ISO 17025:2017.

Kanningarstovurnar veita altjóða viðurkendar kanningar, sum brúk er fyri í vinnulívi, altjóða handli og í sambandi við eftirlit av øllum slag.

Kanningar fyri koronavirus eyðkendu í stóran mun virksemið í 2020, 2021 og 2022.

Samsvarandi ES ásetingunum er kanningarstovan útnevnd av landsstýrismanninum til at vera føroysk tilvísingar kanningarstova.

**Umsiting av aliloyvum**
HFS fyrisitur aliloyvi, sum ásett í løgtingslóg nr. 83. frá 25. mai 2009 um aling av fiski v.m., við seinni broytingum.

Við aliloyvum verður stuðlað undir eina burðardygga, nýhugsandi og kappingarføra vinnu.

Loyvir til taraaling eru útskrivað til tveir loyvishavarar. Arbeitt verður við grundarlagnum at bjóða út aliloyvi til kræklingaaling og aling á opnum havi.

Í kunngerð nr. 97 frá 3. juli 2009 um gjøld fyri aliloyvi, við seinni broytingum er árliga gjaldið fyri hvørt aliloyvi 12.000 kr.

**Granskingar- og menningarøkið**
Verkætlanirnar verða framdar í teimum yrkisgreinum, sum HFS røkir sambært lóg, og á økjum, har tað er eyðsýndur fyrimunur, at verkætlanirnar verða framdar á stovninum.

Verkætlanir:

- Verkætlan um infektiøs lasa anemi virus, sum er ein álvarsom sjúka í aldum laksi (verkætlanin er fíggjað av Granskingarráðnum)

- Verkætlan um Piscine myocartitis virus, sum er ein álvarsom sjúka í aldum laksi (verkætlanin er fíggjað av Granskingarráðnum)
- Ph.D. verkætlan um at optimera framleiðsluna av smolti á RAS smoltstøðum (verkætlanin er fíggjað av Horizon 2020)
- Verkætlan um SARS-CoV-2 (verkærlanin er fíggjað av Granskingarráðnum)
- Verkætlan um kryptosporidum í Føroyska umhvørvinum (verkætlanin er fíggjað av Granskingarráðnum)

**Serlig viðurskifti í 2023 og aftur í 2024**
Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur á ymiskan hátt eftirlit við føroyskum útflutningi, t.d. at vátta útflutningsgóðkenningar til ávís lond og við at gera kanningar á føroyskum framleiðsluvirkjum fyri at lúka krøv í sínamillum heilsufrøðiligum sáttmálum, t.d. við ES. Hetta virksemið er bæði fíggjað við játtan og við inntøkufíggjaðum virksemi. Nú útflutningurin til Russlands er minkaður niður í lítið og einki, lækka inntøkurnar hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni eisini. Samstundis krevur ES, at Heilsufrøðiliga starvsstovan ger fleiri kanningar og eftirlitsvitjanir á virkjum, sum útflyta til ES.

Fyri at røkja hesar skyldur er játtanin fyri 2023 hækkað 1.200 tús. kr. Henda raðfesting heldur fram í 2024.

BRÁ-skipan varð sett í verk í 2023, og er játtanin hækkað við 400 tús. kr. aftuarat til endamálið.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 16.207 | 18.458 | 21.238 | 22.536 | 22.536 | 22.536 |
| Útreiðslur | 63.373 | 51.069 | 44.990 | 46.288 | 46.288 | 46.288 |
| Inntøkur | 47.166 | 32.611 | 23.752 | 23.752 | 23.752 | 23.752 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 17.209 | 15.831 | 17.369 | 17.842 | 17.842 | 17.842 |
| **Útreiðslur** | **28.434** | **26.528** | **27.989** | **28.462** | **28.462** | **28.462** |
| 11. Lønir v.m. | 19.690 | 18.233 | 20.598 | 21.171 | 21.171 | 21.171 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 5.123 | 6.126 | 5.622 | 5.522 | 5.522 | 5.522 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 2.423 | 1.000 | 600 | 600 | 600 | 600 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.190 | 1.179 | 1.169 | 1.169 | 1.169 | 1.169 |
| 17. Avskrivingar o.a. | - | -69 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -0 | -7 | - | - | - | - |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | -0 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 0 | 0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 8 | 67 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **11.225** | **10.697** | **10.620** | **10.620** | **10.620** | **10.620** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *186* | *196* | - | - | - | - |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *11.038* | *10.502* | *10.620* | *10.620* | *10.620* | *10.620* |

**21. Vanligt virksemi, kanningarstovur**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | -1.203 | 2.484 | 3.869 | 4.694 | 4.694 | 4.694 |
| **Útreiðslur** | **34.134** | **23.392** | **16.069** | **16.894** | **16.894** | **16.894** |
| 11. Lønir v.m. | 16.193 | 13.624 | 11.697 | 12.022 | 12.022 | 12.022 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 14.221 | 8.206 | 3.707 | 4.207 | 4.207 | 4.207 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 3.639 | 719 | 665 | 665 | 665 | 665 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 76 | 263 | - | - | - | - |
| 17. Avskrivingar o.a. | 4 | -16 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 1 | -6 | - | - | - | - |
| 52. Tilskot til einstaklingar | -0 | - | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | - | 0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 602 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **35.337** | **20.909** | **12.200** | **12.200** | **12.200** | **12.200** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *35.337* | *20.909* | *12.200* | *12.200* | *12.200* | *12.200* |

**22. Umsiting av aliloyvum**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 201 | 128 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **633** | **560** | **432** | **432** | **432** | **432** |
| 11. Lønir v.m. | 587 | 531 | 400 | 400 | 400 | 400 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 45 | 29 | 32 | 32 | 32 | 32 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **432** | **432** | **432** | **432** | **432** | **432** |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *432* | *432* | *432* | *432* | *432* | *432* |

**45. Inntøkufíggjað virksemi, verkætlanir**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 0 | 16 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **172** | **589** | **500** | **500** | **500** | **500** |
| 11. Lønir v.m. | - | 455 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 172 | 134 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | 0 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **172** | **573** | **500** | **500** | **500** | **500** |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *172* | - | *500* | *500* | *500* | *500* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *573* | - | - | - | - |

**Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Samlðar útreiðslur (1.000 kr.)** | **28.434** | **26.528** | **27.989** | **28.462** | **28.462** | **28.462** |
| 1. Leiðsla og hjálparvirksemi | 6.001 | 6.263 | 6.265 | 6.615 | 6.615 | 6.615 |
| 2. Matvørudeildin | 12.383 | 10.874 | 11.075 | 10.875 | 10.875 | 10.875 |
| 3. Veterinerdeild | 6.500 | 6.269 | 6.650 | 6.500 | 6.500 | 6.500 |
| 4. Landsdjóralæknin | 3.250 | 3.122 | 3.399 | 3.472 | 3.472 | 3.472 |
| 5. Vistfrøði innan taraaling | 300 | - | - | - | - | - |
| 6. BRÁ skipan fyri matstovur | - | - | 600 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| **B: Rakstrarinntøkur (1.000 kr.)** | **11.225** | **10.697** | **11.220** | **10.620** | **10.620** | **10.620** |
| 1. Leiðsla og hjálparvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 2. Matvørudeildin | 10.027 | 9.236 | 9.270 | 9.120 | 9.120 | 9.120 |
| 3. Veterinerdeild | 1.012 | 1.455 | 1.350 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| 4. Landsdjóralæknin | 186 | 6 | - | - | - | - |
| 5. Vistfrøði innan taraaling | - | - | - | - | - | - |
| 6. Brá skipan | - | - | 600 | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Onnur | 26,5 | 27,5 | 27,5 | 27,5 | 27,5 | 27,5 |
| Fulltíðarstørv | 28,5 | 29,5 | 29,5 | 29,5 | 29,5 | 29,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 19,7 | 18,2 | 20,6 | 21,2 | 21,2 | 21,2 |

**Virksemisyvirlit: 21 Vanligt virksemi, kanningarstovur**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Samlaðar útreiðslur (1.000 kr.)** | **34.133** | **15.829** | **16.069** | **16.894** | **16.894** | **16.894** |
| 1. Kemiska deild | 5.493 | 3.875 | 3.882 | 3.775 | 3.775 | 3.775 |
| 2. Mikrobiologiska deild | 5.848 | 5.450 | 5.525 | 5.800 | 5.800 | 5.800 |
| 3. Fiskapatologiska deild | 18.810 | 5.544 | 5.547 | 5.929 | 5.929 | 5.929 |
| 4. Góðskudeild | 425 | 510 | 500 | 490 | 490 | 490 |
| 5. Hjálparvirksemi | 3.557 | 450 | 615 | 900 | 900 | 900 |
| **B: Rakstrarinntøkur (1.000 kr.)** | **35.337** | **12.200** | **12.200** | **12.200** | **12.200** | **12.200** |
| 1. Kemiska deild | 3.259 | 2.600 | 2.600 | 2.850 | 2.850 | 2.850 |
| 2. Mikrobiologiska deild | 3.861 | 4.250 | 4.250 | 4.050 | 4.050 | 4.050 |
| 3. Fiskapatologiska deild | 28.217 | 5.350 | 5.350 | 5.300 | 5.300 | 5.300 |

**Starvsfólkayvirlit: 21 Vanligt virksemi, kanningarstovur**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 24,8 | 24,8 | 24,8 | 24,8 | 24,8 | 24,8 |
| Fulltíðarstørv | 24,8 | 24,8 | 24,8 | 24,8 | 24,8 | 24,8 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 16,2 | 13,6 | 11,7 | 12,0 | 12,0 | 12,0 |

# 6.37.6. Útlán

## 6.37.6.01. Lánsafturgjald (Stuðulsjáttan)

Talan er yvirhøvur um afturgjald av lánum hjá Húsalánsgrunninum, Ídnaðargrunninum og Menningargrunninum, sum Íløgugrunnurin, Grunnur Ferðavinnunar og Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál lótu.

Grundað á eina gjøgnumgongd hjá TAKS av gamlari skuld og skuldarum, sum vóru í eftirstøðu av ymiskum vinnulánum o.ø., er skuld, sum er fyrnað til innheintingar, avskrivað í 2020.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 1 | - | - | - | - | - |
| Inntøkur | 1 | - | - | - | - | - |
| **63. Lán úr Grunni til ídnaðarfremjandi endamál** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 1 | - | - | - | - | - |
| 53. Stuðul til vinnu | -0 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **1** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 86. Afturgjaldan av útlánum v.m. | *1* | - | - | - | - | - |

# Samferðsla og samskifti

## 6.38.5. Ferðavinna

### 6.38.5.02. P/F Visit Faroe Islands (Stuðulsjáttan)

Ferðaráð Føroya varð endurstovnað við løgtingslóg nr. 56 frá 26. mai 2011 um Ferðaráð Føroya. Við løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands varð partafelag stovnað, og varð virksemið hjá Ferðaráðnum lagt í P/F Visit Faroe Islands.

Virksemið hjá P/F Visit Faroe Islands er í samstarvi við ferðavinnuna og Uttanríkis- og vinnumálaráðið at:

- Menna Føroyar sum ferðafólkaland
- Kunna um og marknaðarføra Føroyar sum ferðamál
- Menna vinnuferðavinnu

Økið er raðfest í fíggjarlógini í 2013 og í 2018 og aftur í 2023. Endamálið við raðfestingunum var í fyrstu syftu at marknaðarføra Føroyar uttanlands til tess at økja um ferðafólkatalið. Miðvísa arbeiðið hevur gingið væl, og menningaruppgávan innanlands er raðfest í 2018. Í 2023 verður av álvara farið undir at menna vinnuferðavinnu (ráðstevnur v.m.). Umframt at, at saman við Hagstovuni, bøta um hagtalsgrundarlagið.

**Marknaðarføring**
Marknaðarføringin av Føroyum sum ferðamál skal fremjast í samstarvi við vinnuna við støði í langtíðar marknaðarføringsstrategiini hjá P/F Visit Faroe Islands.

Arbeiðast skal við at marknaðarføra Føroyar alt árið fyri at leingja sesongina. Eitt miðvíst arbeiði skal gerast fyri at marknaðarføra Føroyar sum ráðstevnuland. Hetta er ein málbólkur, sum leggur nógvar pengar eftir seg og ferðast uttanfyri vanliga háárstíð. Strategiin skal eisini leggja størri fokus á at marknaðarføra Føroyar mótvegis ymiskum áhugabólkum. Upplagdir áhugabólkar eru m.a. fólk, sum vilja fiska, síggja fugl, ganga túrar, uppliva mentanartiltøk, eins og at fáa annarleiðis aktivar upplivingar í fjøllum, bjørgum og sjógvi.

**Ferðavinnumenning**
Við løgtingslóg nr. 168 frá 20. desember 2017 um broyting í løgtingslóg um P/F Visit Faroe Islands er uppgávan hjá P/F Visit Faroe Islands frameftir tvíbýtt. Afturat marknaðarføringsuppgávuni skal felagið eisini standa á odda fyri ferðavinnumenningini í Føroyum. Av samlaðu játtanini til P/F Visit Faroe Islands eru 6 mió. kr. ætlaðar til innlendis ferðavinnumenning.

Ferðavinnumenningin verður samskipað og stýrd av P/F Visit Faroe Islands, sum fær heimild at seta í verk, stýra og stuðla ymiskum menningarverkætlanum. Talan er um eina tvíbýtta stuðulsskipan, sum hevur til endamáls at stuðla eini breiðari viftu av menningarverkætlanum kring alt landið.

Onnur puljan skal brúkast til verkætlanir, sum P/F Visit Faroe Islands beinleiðis varðar av og stýrir í samstarvi við kommunur og vinnuna í ymsu økjunum. Peningurin eigur t.d. at fara til verkætlanarsett starvsfólk úti í økjunum, sum hava uppgávuna at stuðla og vegleiða pørtum í økjunum í mun til ferðavinnumenningina.

Hin puljan er ætlað sum ein stuðulsskipan til ferðavinnuverkætlanir kring landið. Endamálið við hesi stuðulspulju er at seta í verk og stuðla nýggjum ferðavinnutilboðum, t.e. til vinnuligar verkætlanir og vørumenning úti í økjunum. Stuðulin eigur at verða latin eftir kr/kr meginregluni soleiðis, at ein fortreyt fyri at fáa stuðulin er, at kommunan og møguliga eisini lokala vinnan í minsta lagi koma við helminginum av fíggingini til verkætlanirnar.

**Vinnuferðavinnumenning**
Í álitinum frá Vakstrarforum var eitt av tilmælunum at seta á stovn event skrivstovu sum part av vinnuferðavinnudeildini hjá P/F Visit Faroe Islands. Event skrivstovan kemur at hava hesar uppgávur,:

- Ráðstevnur
- Ítrótt
- Mentan

Høvuðsuppgávn er at bjóða Føroyar fram sum vert fyri stórum tiltøkum. Fyri fyrst verða úrvið 1 mió. kr. settar av til endamálið. Ætlanin er at henda játtan, við tíðini, skal vaksa uppí 3 mió. kr.

**Hagtalsætlan**
Tørvur er á at bøta um hagtalsgrundarlagið. P/F Visit Faroe Islands hevur saman við Hagstovuni gjørt eina ætlan um, hvussu tað kann gerast. Metti kostnaðurin er 900 tús. kr. um árið. Triðja hvørt ár skal spurnarkanning (TØBBE) gerast. Tað er mett at kosta 350 tús. kr.

**Játtan**
Játtanin verður hækkað 300 tús. kr., sum svarar til útreiðslurnar í eitt fult ár av átøkunum (vinnuferðavinna og hagtalsætlan), sum vórðu sett í verk í 2023, og sum halda fram.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 18.900 | 18.400 | 20.000 | 20.300 | 20.650 | 20.300 |
| **02. P/F Visit Faroe Islands, rakstur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **18.900** | **18.400** | **20.000** | **20.300** | **20.650** | **20.300** |
| 53. Stuðul til vinnu | 18.900 | 18.400 | 20.000 | 20.300 | 20.650 | 20.300 |

## 6.38.5.03. Limagjald til NATA (Stuðulsjáttan)

Játtanin er til limagjald til NATA (North Atlantic Tourism Association). NATA er eitt ferðavinnusamstarv millum Føroyar, Grønland og Ísland. Samstarvið byrjaði á politiskum stigi. Avtala er undirskrivað av ferðavinnuráðharrunum í teimum trimum londunum. Endamálið við samstarvinum er at menna og økja samstarv innan ferðavinnu í limalondunum, økja kunnleikan til londini og skapa sambond millum ungdómin í londunum.

Samstarvið er skipað við nevndum í teimum trimum londunum. Formansskapurin gongur upp á skift millum tey trý londini, sum hava formanssessin í 2 ár í senn.

Størsta einstaka tiltakið hjá NATA er Vestnorden Travel Mart. Harumframt veitir NATA stuðul til marknaðarførings- og menningarverkætlanir í limalondunum.

Føroyar hava bundið seg til at rinda 500 tús. kr. til NATA um árið. Grønland rindar eisini 500 tús. kr. Ísland rindar 1 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| **01. Limagjald til NATA** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **500** | **500** | **500** | **500** | **500** | **500** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |

# § 7 Barna- og útbúgvingarmál

## Felagsútreiðslur

### 7.11.1. Fyrisiting

#### 7.11.1.09. Barna- og útbúgvingarmálaráðið (Rakstrarjáttan)

Barna- og útbúgvingarmálaráðið fyrisitur málsøkini útbúgving, gransking og børn, sum m.a. umfatar dagstovnaøkið, barnavernd og heilsutænastur til børn. Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur sum mál og mið

- At fyrisita og menna galdandi lóggávu o.a. í barna-, útbúgvingar- og granskingarmálum.
- At seta í verk politikkin, sum er orðaður í samgonguskjalinum
- At hækka vitanarstøðið og mentanarmedvitið hjá borgarunum
- At tryggja mennandi karmar fyri virksemi innan barna-, útbúgvingar- og granskingarøkið.
- At seta barnið í fremstu røð, og tryggja eina sameining og samskipan av fjølbroyttu tænastunum, sum ymsir geirar og stovnar veita børnum og ungum, soleiðis at hesir samvirka fyri at veita eina so góða tænastu sum møguligt

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur hesar høvuðsuppgávur:

- Hevur undir landsstýrismanninum yvirskipað, fyrisitingarligarligt og fíggjarligt eftirlit við teimum stovnum, sum eru undir ráðnum og yvirskipaðu ráðleggingina viðvíkjandi øllum málsøkjum, nevnd eru omanfyri
- Fyrireikar lógaruppskot, m.a. fíggjarlógaruppskot, ger kunngerðir á fyrisitingarøkinum, ráðleggur og fyrireikar mál til landsstýrismannin at taka støðu til, umframt vanliga málsviðgerð
- Fyrisitur verk- og útbyggingarætlanir fyri útbúgvingarstovnar og aðrar stovnar á økinum á § 7 í løgtingsfíggjarlógini. Góðkennir skúlabygging í fólkaskúlanum. Ger uppskot til almenn stevnumið fyri dagstovnar, námsætlanir til fólka- og miðnámsskúlar og tíma og lærugreinabýti til fólkaskúlan. Tryggjar, at undirvísingartilfar verður fyrireikað og givið út
- Hevur eftirlit við, at galdandi reglur fyri skúlaskapin verða hildnar, og at áløgd tiltøk verða framd, umframt at ráðið skipar fyri, at próvtøkur og royndir, sum ásettar eru í lóggávuni, verða hildnar
- Samstarvar við onnur ráð, samskiftir og samstarvar við stovnsleiðarar, viðskiftafólk og við myndugleikar og stovnar í Norðurlondum, er umboðað í útbúgvingarmálanevndum undir norðurlendska ráðharraráðnum, er virkið í útnorðursamstarvi og fyrireikar og tekur lut í ES útbúgvingar- og granskingarsamstarvinum, eins og í UNESCO-samstarvinum

Barna- og útbúgvingarmálaráðið er skipað í eitt ráð og eitt Undirvísingarstýri, ið skal virka sum ein fyrisitingarlig eind undir ráðnum. Frá 1. januar 2020 er Undirvísingarstýrið ein sjálvstøðug høvuðskonta 7.23.1.02. Undirvísingarstýrið.

Arbeitt verður við at skipa grundarlagið fyri eina eksterna góðskutrygging av Fróðskaparsetrinum í samsvari við Bologna leistin.

**Undirkonta 23. Barnaverkætlan**
Barnaverkætlanin er eitt breitt skipað samstarv millum Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Løgmálaráðið og Kommunufelagið, har partarnir eru samdir í at virka í felag fyri at finna loysnir, sum kunnu sameina tænastur, sum verða veittar børnum og ungum til tess, at tey kunnu hava viðburð og trivnað. Málið er at laga niður forðingar, sum kunnu verða millum ymsu skipanirnar, tá tørvur er á at tryggja sameindar og samskipaðar tænastur til børn og ung. Fyribyrgjandi átøk og heilsufremandi tiltøk skulu eisini virka við til at røkka málinum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur leiðsluna av verkætlanini, og øll virkisøkini luttaka virkið í arbeiðinum og við øllum neyðugum upplýsingum. Skipaðar verða seminar og verkstovur við breiðari luttøku. Politiskur fylgibólkur úr Løgtinginum kemur eisini at luttaka í arbeiðinum. Eingin serstøk játtan hevur verið til Barnaverkætlanina í 2023, og er fyrireikandi virksemið fíggjað við innanhýsis raðfesting í ráðnum og nakað av ískoytisfígging frá hinum pørtunum. Neyðugt er at hava tryggari fíggjarkarmar um verkætlanina, um hon skal eydnast.

Endamálið við tilgongdini er ein meira fokuserað sameining og samskipan av menningarátøkum tvørtur um geira- og stovnsmørk fyri at røkka

- Einari miðvísari raðfesting av átøkum, tænastum og veitingum
- Einum sterkari førleikagrundarlagi í teimum fakligu umhvørvinum
- Betri møguleikum fyri samvirkan
- Betri samskipan og eisini betri gagnnýtslu av verandi tilfeingi

Tilgongin skilur seg frá øðrum almennum verkætlanum inn sama økið, sum t.d. eftirmetingar, greiningar og álit. Tilgongdin byggir á háttaløg og meginreglur fyri menning frá nýggjastu altjóða granskingini innan fyri strategi og leiðslu innan tað almenna. Hugt verður eisini eftir, hvussu íslendingar arbeiða við somu avbjóðingum.

Høvuðsuppgávan er at kortleggja og savna vitan um, hvat tað vil siga at hava eitt gott lív hjá børnum og ungdómum. Kortlagdar verða eisini tær týðandi avbjóðingar børn, ung, familjur og fakprofessionell uppliva í gerandisdegnum og í almennu stuðulsskipanunum. Eftirmetingar og álit innan viðkomandi økir seinastu árini, hava kastað ljós á avbjóðingar og loysnir, og verða tiknar við í kortleggingini.

Í 2024 er m.a. ætlanin at fyrireika uppskot til eina barnalóg, ið staðfestir rættindi hjá barninum og hvussu samskipað samstarv skal skipast. Í tilgongdini verða pilotverkætlanir royndar, fyri saman við pørtunum at finna nýggjar loysnir.

Umframt lønarframskriving og krav um tillagaðan rakstur verður játtanin hækkað 3,8 mió. kr. til barnaverkætlanina.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 24.352 | 25.441 | 12.096 | 16.072 | 16.072 | 16.072 |
| Útreiðslur | 24.926 | 25.530 | 12.096 | 16.072 | 16.072 | 16.072 |
| Inntøkur | 574 | 89 | - | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 24.352 | 25.441 | 12.096 | 12.272 | 12.272 | 12.272 |
| **Útreiðslur** | **24.926** | **25.530** | **12.096** | **12.272** | **12.272** | **12.272** |
| 11. Lønir v.m. | 18.094 | 18.799 | 9.200 | 9.300 | 9.300 | 9.300 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 4.740 | 4.925 | 1.810 | 1.836 | 1.836 | 1.836 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 353 | 146 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.096 | 1.165 | 950 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 0 | - | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 38 | 13 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 2 | 1 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 603 | 481 | 36 | 36 | 36 | 36 |
| **Inntøkur** | **574** | **89** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | *2* | *2* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *573* | *87* | - | - | - | - |
| **23. Barnaverkætlan** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | - | 3.800 | 3.800 | 3.800 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **-** | **3.800** | **3.800** | **3.800** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | - | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | - | 250 | 250 | 250 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | - | 50 | 50 | 50 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | - | - | 1.000 | 1.000 | 1.000 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 4,0 | 5,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Onnur | 23,1 | 22,3 | 10,8 | 10,8 | 10,8 | 10,8 |
| Fulltíðarstørv | 27,1 | 27,3 | 12,8 | 12,8 | 12,8 | 12,8 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 18,1 | 18,8 | 9,2 | 9,3 | 9,3 | 9,3 |

**Starvsfólkayvirlit: 23 Barnaverkætlan**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Onnur | - | - | - | 3,8 | 3,8 | 3,8 |
| Fulltíðarstørv | - | - | - | 3,8 | 3,8 | 3,8 |
| Lønarpartur (mio kr.) | - | - | - | 2,5 | 2,5 | 2,5 |

# Almannamál

## 7.21.3. Barnastuðul

### 7.21.3.01. Barnavernd (Lógarbundin játtan)

Barnaverndarútreiðslur verða goldnar við heimild í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, við seinni broytingum.

Kommunurnar hava ábyrgdina av barnaverndarøkinum og bera útreiðslurnar, ið standast av barnaverndarlógini. Tó ber landið útreiðslurnar av stovnsetan og rakstri av Høvuðsbarnaverndarnevndini, samdøgursstovnum og dagstovnum hjá landinum og av familjuviðgerð á samdøgursstovnum. Eisini ber landið útreiðslurnar, tá ið børn verða sett á stovn, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent sambært § 33, stk. 4 í lógini, ella tá ið børn verða sett á stovn uttanlands í sambandi við, at nøktandi tilboð ikki kann veitast í Føroyum.

Harumframt eru inngjøld fyri uppalingarískoyti tikin við. Er tað eftir lógini um rættarstøðu barnanna álagt einum persóni at rinda barnagjald v.m. til eitt barn, ið verður sett heiman, fær tað almenna rættin til barnagjaldið frá gjaldskylduga. Tað almenna er at skilja sum tann myndugleiki, ið uppiheldur barninum, meðan tað er sett heiman. Er barnið sett til fosturs, er tað tann kommunala barnaverndartænastan, ið heldur útreiðslurnar og hevur rætt til gjaldið. Verður barnið sett á stovn hjá landinum, er tað landið, ið heldur útreiðslurnar og hevur rætt til gjaldið.

Sambært kunngerð nr. 4 frá 30. januar 2007 um brúkaragjøld fyri børn á stovni hjá landinum, við seinni broytingum, skulu kommunurnar rinda ein part av útreiðslunum vegna stovnsuppihald. Brúkaragjaldið er ájavnt við samsýningina, sum kommunur rinda fosturforeldrum, sum hava óvanliga trupul børn til fosturs.

Játtanin til barnavernd fevnir um útreiðslur til onnur stovnsuppihald enn tey, sum liggja undir høvuðskontu 7.21.3.14. Barnaverndarstovnar.

Útreiðslurnar til barnavernd vóru netto 6,4 mió. kr. í 2022 og verða mettar til netto 6,1 mió. kr. í 2023. Játtanin verður lækkað, tí at eitt stovnspláss er blivið bíligari, og ein persónur er minni inni í skipanini. Roknað verður við netto 5,7 mió. kr. í 2024.

**Undirkonta 05. Advokatumboðan**
Um eitt barn verður sett heiman, og foreldramyndugleikin ella barnið, ið hevur fylt 15 ár, ikki hevur givið samtykki, hava foreldrini og barnið rætt til at verða umboðað ókeypis av advokati. Í málum har samtykki er fingið, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin gera av, um foreldur og børn kunnu fáa ókeypis umboðan. Útreiðslurnar til advokatin ber landið.

Útreiðslurnar til advokatumboðan vóru 527 tús. kr. í 2022 og verða mettar til 945 kr. í 2023. Roknað verður við 750 tús. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 5.317 | 8.581 | 9.673 | 7.617 | 7.617 | 7.617 |
| Inntøkur | 1.110 | 1.676 | 1.862 | 1.162 | 1.162 | 1.162 |
| **04. Barnavernd** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **4.559** | **8.055** | **8.998** | **6.867** | **6.867** | **6.867** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 4.559 | 8.055 | 8.998 | 6.867 | 6.867 | 6.867 |
| **Inntøkur** | **1.110** | **1.676** | **1.862** | **1.162** | **1.162** | **1.162** |
| 77. Flyting frá kommunum | *1.110* | *1.676* | *1.862* | *1.162* | *1.162* | *1.162* |
| **05. Advokatumboðan** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **758** | **527** | **675** | **750** | **750** | **750** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 758 | 527 | 675 | 750 | 750 | 750 |

**Virksemisyvirlit: 04 Barnavernd**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | | | | | | |
| Barnavernd | 4.559 | 8.055 | 8.998 | 6.867 | 6.867 | 6.867 |
| **B: Virksemi (tal)** | | | | | | |
| Tal av børnum | 5 | 4 | 4 | 3 | 3 | 3 |
| **C: Eindarkostnaður (1.000 kr.)** | | | | | | |
| Barnavernd | 912 | 2.014 | 2.250 | 2.289 | 2.289 | 2.289 |

## 7.21.3.02. Stuðul til Barnaverndarstovuna (Stuðulsjáttan)

Stuðul verður latin til virksemið hjá Barnahúsinum í sambandi við, at avtala er gjørd millum Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, Kommunufelagið og Føroya Landfúta um at skipa Barnahús í Føroyum. Sambært avtaluni er Barnahúsið ætlað børnum og ungdómum í aldrinum 0-18 ár og skal vera karmur um eitt skipað tvørfakligt samstarv millum barnaverndartænastur, løgreglu og heilsumyndugleikar í sambandi við mál um kynsligan ágang ella annan harðskap. Barnahúsið veitir eisini skipað viðgerðartilboð til børn, sum hava verið fyri harðskapi ella verið vitni til tað.

Barnaverndarstova Føroya, ið er stovnur undir Kommunufelagnum, umsitur og rekur Barnahúsið.

Játtanin til Barnahúsið verður hækkað 200 tús. kr. til at uppraðfesta tænastuna hjá Barnahúsinum.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 650 | 650 | 650 | 850 | 850 | 850 |
| **02. Barnahús** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **650** | **650** | **650** | **850** | **850** | **850** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 650 | 650 | 650 | 850 | 850 | 850 |

### 7.21.3.12. Gigni - heilsufrøði fyri børn & ung (Rakstrarjáttan)

Gigni virkar sambært løgtingslóg nr. 63 frá 17. mai 2005 um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, við seinni broytingum.

Endamálið við lógini er, at fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung skulu gera sítt til at tryggja teimum best møguligar fyritreytir fyri einum heilsugóðum uppvøkstri og vaksnamannalívi. Stovnurin hevur harumframt til uppgávu at ráðgeva kvinnum, ið umhugsa fosturtøku. Gigni ráðgevur eisini foreldrum, ið ættleiða. Í 2023 fóru enn fleiri at útbúgva seg til heilsufrøðingar.

Heilsutrygd er fyrisiting hjá Gigni.

Umframt lønarframskriving verður játtanin hækkað 500 tús. kr. til, at heilsufrøðingar kunnu byrja at virka í miðnámsskúlum.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 14.292 | 15.602 | 17.609 | 18.535 | 18.535 | 18.535 |
| Útreiðslur | 14.309 | 15.630 | 17.609 | 18.535 | 18.535 | 18.535 |
| Inntøkur | 17 | 28 | - | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 14.292 | 15.602 | 17.609 | 18.535 | 18.535 | 18.535 |
| **Útreiðslur** | **14.309** | **15.630** | **17.609** | **18.535** | **18.535** | **18.535** |
| 11. Lønir v.m. | 11.799 | 13.352 | 15.337 | 16.385 | 16.385 | 16.385 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.539 | 1.472 | 1.722 | 1.600 | 1.600 | 1.600 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 723 | 539 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 193 | 203 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 55 | 64 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| **Inntøkur** | **17** | **28** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *17* | *11* | - | - | - | - |
| 77. Flyting frá kommunum | - | *17* | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 22,3 | 24,0 | 25,0 | 26,0 | 26,0 | 26,0 |
| Fulltíðarstørv | 22,3 | 24,0 | 25,0 | 26,0 | 26,0 | 26,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 11,8 | 13,4 | 15,3 | 16,4 | 16,4 | 16,4 |

### 7.21.3.14. Barnaverndarstovnar (Rakstrarjáttan)

Barnaverndarstovnar fevna um játtan til stovnstilboð og Farmiljudepilin sambært § 33 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, við seinni broytingum.

Stovnstilboðið er skipað í deildum og er ætlað børnum og ungum í aldrinum 0-18 ár, í serligum førum til 23 ár, ið hava serligan tørv á umsorgan og viðgerð vegna sosialar- atferðar- ella tillagingartrupulleikar. Tað er Kærustovnurin, sum innskrivar børn og ung á stovnarnar.

Familjudepilin veitir tilboð til familjur. Pláss er fyri tveimum familjum ísenn, sum hava egna íbúð. Einki virksemið hevur verið á Familjudeplinum síðani januar 2022. Arbeitt verður við at eftirhyggja skipanina fyri at fáa hana at virka aftur.

Sambært kunngerð nr. 4 frá 30. januar 2007 um brúkaragjøld fyri børn á stovni hjá landinum, við seinni broytingum, skulu kommunurnar rinda ein part av útreiðslunum vegna stovnsuppihald. Brúkaragjaldið er ájavnt við samsýningina, sum kommunur rinda fosturforeldrum, sum hava óvanliga trupul børn til fosturs.

Umframt lønarframskriving og lønarlyft verður játtanin hækkað 55 tús. kr. vegna prístalshækking á húsaleigu.

## Átekning

Landsstýrismanninum verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum høvuðskontuna og høvuðskontu 12.21.1.02. Almannaverkið.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | - | 38.180 | 42.893 | 45.552 | 45.552 | 45.552 |
| Útreiðslur | - | 45.087 | 49.697 | 52.356 | 52.356 | 52.356 |
| Inntøkur | - | 6.907 | 6.804 | 6.804 | 6.804 | 6.804 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | 38.180 | 42.893 | 45.552 | 45.552 | 45.552 |
| **Útreiðslur** | **-** | **45.087** | **49.697** | **52.356** | **52.356** | **52.356** |
| 11. Lønir v.m. | - | 34.734 | 42.606 | 45.210 | 45.210 | 45.210 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | 4.816 | 2.312 | 2.312 | 2.312 | 2.312 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | 867 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 2.523 | 2.392 | 2.447 | 2.447 | 2.447 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | 187 | 226 | 226 | 226 | 226 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 1.961 | 1.961 | 1.961 | 1.961 | 1.961 |
| **Inntøkur** | **-** | **6.907** | **6.804** | **6.804** | **6.804** | **6.804** |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | - | *138* | - | - | - | - |
| 77. Flyting frá kommunum | - | *6.769* | *6.804* | *6.804* | *6.804* | *6.804* |

**Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **-** | **38.180** | **42.893** | **45.552** | **45.552** | **45.552** |
| Familjudepilin | - | 1.141 | 4.036 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| Stovnstilboð til børn og ung | - | 37.039 | 38.857 | 42.552 | 42.552 | 42.552 |
| **B: Virksemi (tal)** | | | | | | |
| Stovnstilboð til børn og ung | - | 24 | 28 | 29 | 29 | 29 |
| **C: Eindarkostnaður (1.000 kr.)** | | | | | | |
| Stovnstilboð til børn og ung | - | 1.543 | 1.388 | 1.467 | 1.467 | 1.467 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | - | 70,0 | 79,0 | 88,4 | 88,4 | 88,4 |
| Fulltíðarstørv | - | 70,0 | 79,0 | 88,4 | 88,4 | 88,4 |
| Lønarpartur (mio kr.) | - | 34,7 | 42,6 | 45,2 | 45,2 | 45,2 |

## 7.21.3.16. Stuðul til feløg (Stuðulsjáttan)

### Undirkonta 01. Felagið Barnabati

Stuðulin verður latin til Felagið Barnabati, sum rekur skrivstovu, hvørs endamál er at fremja tiltøk, ið tæna børnum og ungdómum. Barnabati virkar sambært viðtøkum felagsins sambært ST-sáttmálanum um barnarættindi og virkar fyri at bøta um trivnaðin hjá børnum og ungum. Stuðulin verður útgoldin hvønn ársfjórðing. Ársroknskapurin fyri árið frammanundan skal vera latin Barna- og útbúgvingarmálaráðnum innan 1. apríl.

### Undirkonta 02. Familjumenning

Stuðulin verður latin Sjálvsognarstovninum MEA - Húsið fyri familjumenning, sum hevur til endamáls at skapa góð sambond millum menniskju, bæði í parlagi og uttan fyri parlag. Stuðulin verður veittur til ymisk skeið innan familjumenning. Endamálið er at geva foreldrum og børnum teirra amboð og hjálp til at styrkja familjulívið og hvønn einstakan. Ársroknskapurin fyri árið frammanundan skal vera latin Barna- og útbúgvingarmálaráðnum innan 1. apríl.

Játtanin var í 2023 flutt frá høvuðskontu 12.21.1.22. Stuðul til feløg.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.250 | 1.250 | 1.450 | 1.450 | 1.450 | 1.450 |
| **01. Felagið Barnabati** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **850** | **850** | **850** | **850** | **850** | **850** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 850 | 850 | 850 | 850 | 850 | 850 |
| **02. Familjumenning** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **400** | **400** | **600** | **600** | **600** | **600** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 400 | 400 | 600 | 600 | 600 | 600 |

## 7.21.3.17. SSP-samstarv (Stuðulsjáttan)

Stuðul verður latin til virksemið hjá SSP-samstarvinum. SSP-samstarv er tvørfakligt samstarv millum myndugleikar, stovnar og felagsskapir, ið arbeiða ella hava samband við børn og ung í aldrinum 0-18 ár. Høvuðspartarnir í SSP eru Skúlin, Sosialu myndugleikarnir í almenna og kommunala geiranum og Politiið. Endamálið við SSP-samstarvinum er at byggja upp, brúka og røkja faklig netverk, sum hava eina mennandi ávirkan á gerandisdagin hjá børnum og ungum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið rindar tveir triðingar, harav ein triðingur verður goldin av játtanini til SSP-samstarv og ein triðingur av fólkaskúlajáttanini, og kommunurnar rinda ein triðing til samstarvið, samsvarandi samstarvssáttmálanum.

Arbeiðið verður skipað við eini ráðgeving, ið húsast saman við umsitingini hjá Kommunufelagnum.

Játtanin verður hækkað 100 tús. kr., soleiðis at hon aftur er 600 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 600 | 500 | 500 | 600 | 600 | 600 |
| **01. SSP-samstarv** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **600** | **500** | **500** | **600** | **600** | **600** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 600 | 500 | 500 | 600 | 600 | 600 |

# Útbúgving og gransking

## 7.23.1. Ymsar útreiðslur

### 7.23.1.02. Undirvísingarstýrið (Rakstrarjáttan)

**Undirkonta 20. Undirvísingarstýrið**
Stýrið er skipað sum fyrisitingarlig eind undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Stýrið skal taka sær av rakstrarligum og fyrisitingarligum uppgávum á undirvísingarøkinum. Serliga av rakstrarligu fyrisitingini av fólkaskúlanum og í ávísan mun miðnámsskúlunum og øðrum pørtum av undirvísingarverkinum. Vegleiðingarstovan er partur av Undirvísingarstýrinum.

Undirvísingarstýrið umsitur og varðar av hesum virksemisøkjum:

*7.23.1 Ymsar útreiðslur*
Føroyskt sum annaðmál

*7.23.2. Fólkaskúlin v.m.*
Fólkaskúlin
Sernám
Stuðul til fólkaskúlar
Skúlatilboð til ung við breki (Rásin)
Eftirskúlar

*7.23.3. Miðnámsútbúgvingar*
Miðnámsútbúgvingar
Fab Lab

*7.23.5. Fólkaupplýsing*
Fólkaháskúlar
Húsarhaldsskúlar
Frítíðarundirvísing
Musikkskúlaskipanin
Felagið fyri lesi- og skriviveik

*7.23.6. Hægri útbúgvingar og gransking*
Maritimir skúlar

Sáttmálin millum Føroyar og Evropasamveldið, sum er undirskrivaður í 2022, gevur Føroyum møguleika at samráðast um at fáa atlimaskap í fleiri ES skráum. Ætlanin er, at Føroyar gerast partur av ES útbúgvingarsamstarvinum Erasmus+, fyrireiking í hesum sambandi halda fram.

**Undirkonta 21. Studni**
Studni umsitur lestrarstuðulin til lesandi í Føroyum umframt ávísar stuðulsskipanir, ið veita stuðul til føroyingar uttanlands, t.d. ferðastudningin og ÚSUN-stuðulin. Galdandi reglur um lestrarstuðul eru í løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, við seinni broytingum, og kunngerð nr. 107 frá 25. august 2011 um lestrarstuðul, við seinni broytingum.

**Undirkonta 22. KT-skipan til skúlaverkið**
Til at standa fyri at fremja KT-heildarætlanina fyri undirvísingarverkið er skipað ein KT-eind í

Undirvísingarstýrinum, sum hevur ábyrgdina av at samskipa menning, verkseting, rakstur og hjálparveitingar í hesum sambandi. Tørvur verður á at gera fíggjarligar umleggingar millum skúlar, veitarar og almennar stovnar í hesum sambandi.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 16.729 | 17.364 | 18.072 | 18.494 | 18.494 | 18.494 |
| Útreiðslur | 16.986 | 17.605 | 19.072 | 19.494 | 19.494 | 19.494 |
| Inntøkur | 257 | 241 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 9.393 | 10.183 | 10.871 | 11.157 | 11.157 | 11.157 |
| **Útreiðslur** | **9.456** | **10.373** | **10.871** | **11.157** | **11.157** | **11.157** |
| 11. Lønir v.m. | 6.613 | 7.817 | 8.666 | 8.907 | 8.907 | 8.907 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2.300 | 2.181 | 1.925 | 1.925 | 1.925 | 1.925 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 197 | 164 | 280 | 325 | 325 | 325 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 170 | 33 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 17 | 18 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 159 | 159 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **63** | **190** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *3* | - | - | - | - | - |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *60* | *190* | - | - | - | - |
| **21. Studni** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 4.291 | 3.993 | 4.128 | 4.103 | 4.103 | 4.103 |
| **Útreiðslur** | **4.485** | **4.008** | **4.128** | **4.103** | **4.103** | **4.103** |
| 11. Lønir v.m. | 3.218 | 3.283 | 3.198 | 3.169 | 3.169 | 3.169 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 730 | 628 | 850 | 850 | 850 | 850 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 537 | 83 | 80 | 84 | 84 | 84 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 7 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | - | 0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 0 | 7 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **194** | **15** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *179* | - | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *15* | *15* | - | - | - | - |
| **22. KT-skipan til skúlaverkið, rakstur** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 3.045 | 3.189 | 3.073 | 3.234 | 3.234 | 3.234 |
| **Útreiðslur** | **3.045** | **3.225** | **4.073** | **4.234** | **4.234** | **4.234** |
| 11. Lønir v.m. | 2.299 | 2.682 | 3.323 | 3.018 | 3.018 | 3.018 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 736 | 358 | 600 | 966 | 966 | 966 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 10 | 96 | 150 | 250 | 250 | 250 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 90 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **36** | **1.000** | **1.000** | **1.000** | **1.000** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | - | *36* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | - | *1.000* | *1.000* | *1.000* | *1.000* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 11,0 | 12,0 | 11,8 | 11,8 | 11,8 | 11,8 |
| Fulltíðarstørv | 12,0 | 13,0 | 12,8 | 12,8 | 12,8 | 12,8 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 6,6 | 7,8 | 8,7 | 8,9 | 8,9 | 8,9 |

**Starvsfólkayvirlit: 21 Studni**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 6,6 | 6,0 | 5,8 | 5,8 | 5,8 | 5,8 |
| Fulltíðarstørv | 6,6 | 6,0 | 5,8 | 5,8 | 5,8 | 5,8 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 3,2 | 3,3 | 3,2 | 3,2 | 3,2 | 3,2 |

**Starvsfólkayvirlit: 22 KT-skipan til skúlaverkið, rakstur**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 1,9 | 4,5 | 4,2 | 4,2 | 4,2 | 4,2 |
| Fulltíðarstørv | 1,9 | 4,5 | 4,2 | 4,2 | 4,2 | 4,2 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 2,3 | 2,7 | 3,3 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |

## 7.23.1.03. Undirvísingarstýrið (Løgujáttan)

Ætlanin hevur verið, at Sernám skuldi flyta úr skúlanum á Trøðni og inn á Hoyvíksveg 72, og at bygningurin á Hoyvíksvegi 72 frameftir skuldi hýsa virkseminum í skúlaverkinum burturav. Í hesum sambandi hevur ætlanin verið at broyta nøkur høli, at umbyggja skrivstovu- og fundarhøli, skipa felags matstovu, flyta inngongdina og skipa felags móttøku fyri alt virksemið í húsinum og at fremja ávísar dagføringar í bygninginum í sambandi við brunakrøv. Í 2020 og 2021 er brúkt tilsamans 1 mió. kr. til nøkur av endamálunum. Verandi støða er, at Sernám ikki er flutt inn í bygningin á Hoyvíksvegnum.

Í 2024 er eingin játtan til endamálið.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 606 | - | - | - | - | - |
| **10. Undirvísingarstýrið** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **606** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 524 | - | - | - | - | - |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 36 | - | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 46 | - | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -606 | - | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 606 | - | - | - | - | - |

## 7.23.1.05. KT-skipan til skúlaverkið (Rakstrarjáttan)

Játtanin er ætlað til at seta í verk heildarætlanina "Saman um eina trygga KT-loysn", ið er menning og verkseting av nýggjari og tryggari KT-umsiting í øllum undirvísingarverkinum. Heildarætlanin fevnir um tvey høvuðsátøk:

- At stovna Skúlanet, sum er ein felags rakstrar- og tænastuorganisatión, ið mennir og rekur eitt vælvirkandi og trygt KT net fyri alt undirvísingarverkið, svarandi til tað, sum Landsnet er fyri landsstovnar. Skúlanet er ein KT felagsskapur millum Undirvísingarstýrið, Nám, kommunurnar, fólkaskúlan, miðnám, Vinnuháskúlan og Setrið og KT landsins.
- At menna eina framkomna og trygga lestrarfyrisitingarskipan (LFS), sum er felags fyri fólkaskúlar, miðnám, Vinnuháskúlan og Setrið. LFS setur sjøtul á talgilda skúlaumsiting, lærupallar og samskifti millum skúla, næming og heim. Úr LFS fáast álítandi hagtøl til skúlar, myndugleikar og politisku skipanina.

Við løgtingslóg nr. 52 frá 4. mai 2021 um KT-heildarætlan fyri undirvísingarverkið hevur Løgtingið játtað til samans 40 mió. kr. til at menna og verkseta heildarætlanina í tíðarskeiðinum 2021-2027. Í 2021 og 2022 eru til samans brúktar 12 mió. kr. av játtanini.

Higartil eru til samans 20 útbúgvingarstovnar innlimaðir í Skúlanet, og avtalur eru gjørdar við 13 aðrar útbúgvingarstovnar um at verða innlimaðir. Málið er, at nýggja lestrarfyrisitingarliga KT-skipanin og Skúlanet verða sett í verk í øllum undirvísingarverkinum í 2025. Arbeiðið verður gjørt í tøttum samstarvi við KT landsins og Talgildu Føroyar, har undirvísingarverkið kann gagnnýta førleikar og tær vælvirkandi og framkomnu loysnir, sum eru mentar. Hetta sparir tíð, orku, pening og minkar um teir vælkendu váðar, sum eru í so fjøltáttaðum verkætlanum.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 3.000 | 8.989 | 10.000 | 10.000 | 8.011 | - |
| Útreiðslur | 3.000 | 8.989 | 10.000 | 10.000 | 8.011 | - |
| **20. KT-skipan til skúlaverkið** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 3.000 | 8.989 | 10.000 | 10.000 | 8.011 | - |
| **Útreiðslur** | **3.000** | **8.989** | **10.000** | **10.000** | **8.011** | **-** |
| 11. Lønir v.m. | - | 502 | - | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.923 | 774 | - | - | - | - |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 77 | 7.714 | 10.000 | 10.000 | 8.011 | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1.000 | - | - | - | - | - |

## 7.23.1.06. Føroyskt sum annaðmál, vaksin (Rakstrarjáttan)

Talið av tilflytarum er økt munandi seinastu árini, og eru tilflytararnir úr fleiri ymiskum londum og tosa ymisk tungumál. Talan er í høvuðsheitum um tveir bólkar:

- Familjusamanførd, har fólk í størstan mun koma til Føroyar fyri at vera, og borgarar við tíðaravmarkaðum uppihaldsloyvi
- Arbeiðsøkið, har fólk koma til Føroya at arbeiða og steðga her í styttri ella longri tíð

Tað er serliga tann fyrri bólkurin, sum hevur tørv á at læra føroyskt, tí tey hava valt at búseta seg í Føroyum, og tí er umráðandi, at tey læra føroyskt so skjótt, sum til ber, fyri at kunna liva og virka í føroyska samfelagnum. Tó er eisini tørvur á at tryggja, at arbeiðsmegi, sum búleikast í Føroyum, kann læra føroyskt og um mentan og samfelag.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur higartil skipað arbeiðið sum eina verkætlan "Føroyskt sum annaðmál". Frá 2024 verður økið umskipað til vanligt rakstrarvirksemi, sum partvís Undirvísingarstýrið og partvís Nám hava ábyrgd av.

Eitt av átøkunum í verkætlanin hevur verið ein diplomútbúgving á MA- og bachelor stigi í føroyskum sum annaðmál, sum er fyri lærarar, sum skulu standa fyri undirvísingini í føroyskum sum annaðmál. Henda útbúgvingin verður liðug í januar 2024.

Tørvur er framhaldandi á at fáa til vega undirvísingartilfar, visitatiónstilfar, próvtøkutilfar og eftirútbúgvingartilboð, og eru 950 tús. kr. fluttar til høvuðskonto 7.23.1.18. Nám til tað arbeiðið. Játtanin er tillagað samsvarandi og verður nú rakstrarjáttan til umsiting av økinum við einari møguligar skipan við serstøkum málskúla fyri eyga. Barna- og útbúgvingarmálaráðið fyrireikar lógarverkið til økið.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 2.013 | 1.808 | 2.500 | 1.550 | 1.550 | 1.550 |
| Útreiðslur | 2.013 | 1.808 | 2.500 | 1.550 | 1.550 | 1.550 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 2.013 | 1.808 | 2.500 | 1.550 | 1.550 | 1.550 |
| **Útreiðslur** | **2.013** | **1.808** | **2.500** | **1.550** | **1.550** | **1.550** |
| 11. Lønir v.m. | 214 | 64 | 600 | 600 | 600 | 600 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 63 | 8 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1.736 | 1.570 | 1.800 | 850 | 850 | 850 |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | - | 166 | - | - | - | - |

## 7.23.1.08. Yrkisdepilin (Rakstrarjáttan)

Yrkisútbúgvingarnar eru undir felags ábyrgd hjá landsstýrismanninum og arbeiðsmarknaðarpørtunum, sum veita hvør sín part av innihaldinum í yrkisútbúgvingunum í læru og í skúlaskeiðum. Arbeiðsmarknaðarpartarnir eru skipaðir í eitt Yrkisútbúgvingarráð og eina Yrkisnevnd. Yrkisútbúgvingarráðið ráðgevur landsstýrismanninum í yvirskipaðum málum, eitt nú hvørjar útbúgvingar arbeiðsmarknaðurin hevur tørv á, skipan og umskipan av útbúgvingum og onnur yvirskipað mál, sum hava við yrkisútbúgvingarnar at gera. Yrkisnevndin ásetir fakliga innihaldið og skipanina av yrkisútbúgvingunum.

Yrkisdepilin er fyrisiting og skrivari hjá arbeiðsmarknaðarpørtunum, tá kemur til umsitingina av yrkisútbúgvingunum, sambært ásetingunum í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar. Uppgávurnar hjá Yrkisdeplinum eru at vera skrivari hjá Yrkisútbúgvingarráðnum og Yrkisnevndini, at fyrisita lærlingaskipanina og samskifta við lærlingar, lærumeistarar og føroyskar og danskar skúlar í sáttmálatíðini, rinda út ferða- og lønarendurgjøld, útskriva prógv, leiða verkætlanir so sum td. at lýsa nýggjar útbúgvingar, endurskoða útbúgvingar, lógarverk og námsskipanir, leiða ymiskar arbeiðsbólkar við arbeiðsmarknaðarumboðum, vegleiða lærlingum og lærumeistarum, savna vitan um tær umleið 70 yrkisútbúgvingarnar við føroyskari og danskari skúlagongd og miðla hesa vitanina, samskipa yrkis- og sveinarroyndir/skoðan, skeiðshald fyri próvdómarar og samskipa gerð av sveinarroyndaruppgávum.

Landskassin rindar fyrisitingarútreiðslurnar, sum standast av skipanini eftir kap. 5 í yrkisútbúgvingarlógini, ímeðan arbeiðsmarknaðarpartarnir, sambært kap. 5 í somu lóg, rinda eitt umsitingargjald fyri hvønn góðkendan sáttmála til at rinda fyri kostnaðin, ið stendist av yrkisnevndarfyrisitingini. Gjaldið er 3.000 kr. og verður goldið landskassanum, undirkonta 7.23.7.04.04. Gjald fyri lærusáttmálar.

Yrkisdepilin umsitur eisini yrkisskeið sambært løgtingslóg nr. 22 frá 17. mai 2004 um yrkisskeið og arbeiðið við vaksnamannalæru.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 5.071 | 3.980 | 4.425 | 4.542 | 4.542 | 4.542 |
| Útreiðslur | 5.071 | 3.980 | 4.425 | 4.542 | 4.542 | 4.542 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 5.071 | 3.980 | 4.425 | 4.542 | 4.542 | 4.542 |
| **Útreiðslur** | **5.071** | **3.980** | **4.425** | **4.542** | **4.542** | **4.542** |
| 11. Lønir v.m. | 3.727 | 3.229 | 4.225 | 4.042 | 4.042 | 4.042 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.157 | 697 | 200 | 450 | 450 | 450 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 159 | 12 | - | 50 | 50 | 50 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 12 | - | - | - | - |
| 17. Avskrivingar o.a. | -3 | - | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 31 | 31 | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 4,0 | 4,0 | 4,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| Fulltíðarstørv | 4,0 | 4,0 | 4,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 3,7 | 3,2 | 4,2 | 4,0 | 4,0 | 4,0 |

*Umframt føstu starvsfólkini í Yrkisdeplinum, rindar Yrkisdepilin løn og samsýning til allar teir partarnar, sum eru partur av arbeiðnum hjá Yrkisdeplinum, íroknað próvdøming og skoðan í sambandi við yrkis- og sveinarroyndir. Lønarsamsýningarnar til umboð fyri arbeiðsmarknaðarpartarnar og skúlar, ið eru partur av arbeiðnum hjá Yrkisdeplinum, eru ikki at rokna sum føst størv í Yrkisdeplinum. Tilsamans eru settar 1 mió. kr. av til lønarsamsýningar til ráðsskipanina, próvdøming, skoðan, sveinaroyndir, arbeiðsbólkar v.m. afturat 3 mió. kr. í føstum lønarsamsýningum til starvsfólk í Yrkisdeplinum, tilsamans 4 mió. kr.*

## 7.23.1.13. Skúlabókagerð (Rakstrarjáttan)

Sambært § 3, stk. 3 í løgtingslóg nr. 53 frá 15. mai 2014 um at útvega undirvísingarmiðlar o.a. kann landsstýrismaðurin veita forløgum og einstaklingum stuðul til at gera og geva út undirvísingarmiðlar. Stuðulin verður veittur sum tímaniðurskurður, farloyvi við løn í styttri tíðarskeið ella sum beinleiðis stuðul, ið verður goldin, tá ið handritið ella partar av handritinum er liðugt.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 425 | 234 | 539 | 539 | 539 | 539 |
| Útreiðslur | 425 | 234 | 539 | 539 | 539 | 539 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 425 | 234 | 539 | 539 | 539 | 539 |
| **Útreiðslur** | **425** | **234** | **539** | **539** | **539** | **539** |
| 11. Lønir v.m. | 128 | 83 | 389 | 389 | 389 | 389 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2 | 61 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 245 | 40 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 50 | 50 | - | - | - | - |

## 7.23.1.18. Nám (Rakstrarjáttan)

### Undirkonta 24. Nám
Nám útvegar fjølbroyttar undirvísingarmiðlar í sambandi við læring og menning. Virksemið fatar um m.a. útgávur, undirvísingarportal, KT-samskiftisskipan, miðlasavn, skeiðsvirksemi og ráðgeving.

Høvuðsvirkisøkini eru:

- At útvega fjølbroyttar undirvísingarmiðlar - prentað og talgilt tilfar
- Undirvísingarportalurin Snar
- Føroysk Teldutala
- Námsætlanararbeiðið
- Faklig og námsfrøðilig ráðgeving
- Ráðgeving og átøk innan trivnað í fólkaskúlanum
- Skeiðsvirksemi
- Miðlasavn og útlán
- Skúladátugrunnnur

Nám hevur heimild í § 3, stk. 1 í løgtingslóg nr. 53 frá 15. mai 2014 um at útvega undirvísingarmiðlar o.a., og er virksemið á stovninum ásett sambært lógini.

Av játtanini fær Føroysk Teldutalu 200 tús. kr. í stuðli, og nýttar verða 100 tús. kr. til at skipa fyri ymiskum tiltøkum í sambandi við Altjóða Holocaust dagin.

Umframt lønarframskriving verður játtanin hækkað 500 tús. kr. til at fáa til vega undirvísingartilfar og eftirútbúgvingartilboð til føroyskt sum annaðmál. Talan er um flyting av játtan frá høvuðskontu 7.23.1.06. Føroyskt sum annaðmál, vaksin, tí virksemið er flutt til Nám.

### Undirkonta 25. Próvtøkur
Játtanin verður brúkt til løn og amboð til at skipa fyri próvtøkum, uppgávugerð og próvdøming herímillum ferðaútreiðslur í sambandi við próvtøkur. Eisini verða allar útreiðslurnar til OECD-kanningar, Pisa og til landsroyndir í fólkaskúlanum rindaðar av hesi játtan.

Seinnu árini eru útreiðslurnar til próvtøkur hækkaðar, m.a. tí alsamt fleiri próvtøkuuppgávur til miðnámsútbúgvingarnar verða gjørdar í Føroyum og uppgávur til føroyskt sum annaðmál. Gjald til

prótøkunevndir er eisini hækkað sambært nýggjum sáttmála, umframt at tænastugjøld í sambandi við samstarv við danskar myndugleikar eisini eru hækkað.

Umframt lønarframskriving verður játtanin hækkað 450 tús. kr. til at fáa til vega visitatiónstilfar og próvtøkutilfar til føroyskt sum annaðmál. Talan er um flyting av játtan frá høvuðskontu 7.23.1.06. Føroyskt sum annaðmál, vaksin, tí virksemið er flutt til Próvstovuna.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 30.218 | 30.300 | 31.584 | 33.303 | 33.303 | 33.303 |
| Útreiðslur | 39.489 | 40.392 | 39.584 | 41.903 | 41.903 | 41.903 |
| Inntøkur | 9.270 | 10.091 | 8.000 | 8.600 | 8.600 | 8.600 |
| **24. Nám** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 18.884 | 18.723 | 19.350 | 20.331 | 20.331 | 20.331 |
| **Útreiðslur** | **27.951** | **28.626** | **27.350** | **28.931** | **28.931** | **28.931** |
| 11. Lønir v.m. | 15.642 | 16.520 | 17.457 | 18.188 | 18.188 | 18.188 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 10.383 | 10.278 | 9.143 | 9.493 | 9.493 | 9.493 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 218 | 304 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 413 | 312 | 350 | 350 | 350 | 350 |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 500 | - | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 200 | 200 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 595 | 1.013 | - | 500 | 500 | 500 |
| **Inntøkur** | **9.067** | **9.903** | **8.000** | **8.600** | **8.600** | **8.600** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *8.397* | *9.443* | *7.700* | *8.300* | *8.300* | *8.300* |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | - | *73* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *670* | *387* | *300* | *300* | *300* | *300* |
| **25. Próvtøkur** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 11.335 | 11.577 | 12.234 | 12.972 | 12.972 | 12.972 |
| **Útreiðslur** | **11.538** | **11.765** | **12.234** | **12.972** | **12.972** | **12.972** |
| 11. Lønir v.m. | 8.280 | 8.957 | 10.204 | 10.888 | 10.888 | 10.888 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2.548 | 2.354 | 1.955 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 249 | 322 | 75 | 84 | 84 | 84 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 33 | 130 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 428 | 2 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **203** | **188** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *55* | *4* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *148* | *184* | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 24 Nám**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 23,7 | 23,4 | 24,8 | 25,0 | 25,0 | 25,0 |
| Fulltíðarstørv | 24,7 | 24,4 | 25,8 | 26,0 | 26,0 | 26,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 15,6 | 16,5 | 17,5 | 18,2 | 18,2 | 18,2 |

*Umframt føstu starvsfólkini í Námi, ið fyrisita, ritstjórna og samskipa útgávur, skeið og lán, verða lønir goldnar til tænastur, sum verða keyptar frá rithøvundum, týðarum, myndprýðarum, skeiðshaldarum, forritarum o.ø. Lønarsamsýningar til at framleiða útgávur og til skeiðshald eru ikki at rokna sum føst størv í Námi. Tilsamans er sett 1 mió. kr. av til lønarsamsýningar til útgávur og skeið afturat 17,2 mió. kr. í føstum lønarsamsýningum, tilsamans 18,2 mió. kr.*

**Virksemisyvirlit: 25 Próvtøkur**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **11.538** | **11.765** | **12.234** | **12.972** | **12.972** | **12.972** |
| 1. Umsiting og felagsútreiðslur | 4.211 | 4.535 | 4.456 | 4.558 | 4.558 | 4.558 |
| 2. Fólkaskúlin | 1.550 | 1.550 | 1.600 | 1.636 | 1.636 | 1.636 |
| 3. Gymnasialt miðnám | 2.495 | 2.500 | 2.787 | 2.850 | 2.850 | 2.850 |
| 4. Yrkis miðnám | 280 | 280 | 290 | 297 | 297 | 297 |
| 5. Heilsuskúlin | 310 | 150 | 260 | 266 | 266 | 266 |
| 6. Maritimar útbúgvingar | 1.245 | 1.250 | 1.290 | 1.319 | 1.319 | 1.319 |
| 7. Aðrar hægri útbúgvingar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 8. Føroyskt sum annaðmál | 50 | 50 | 0 | 460 | 460 | 460 |
| 9. Próvtøkuskipan | 800 | 800 | 877 | 897 | 897 | 897 |
| 10. OECD-kanningar, PISA og TALIS | 580 | 600 | 622 | 636 | 636 | 636 |
| 11. Kvøldskúlin | 17 | 50 | 52 | 53 | 53 | 53 |

**Starvsfólkayvirlit: 25 Próvtøkur**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 6,8 | 7,0 | 7,2 | 7,5 | 7,5 | 7,5 |
| Fulltíðarstørv | 6,8 | 7,0 | 7,2 | 7,5 | 7,5 | 7,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 8,3 | 9,0 | 10,2 | 10,9 | 10,9 | 10,9 |

*Á Próvstovuni starvast 7 fólk, og harumframt eru millum 600 og 800 persónar knýttir at arbeiðinum at gera uppgávur og at vera próvdómarar.*

## 7.23.1.22. Barnabløð (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at veita árligan stuðul til at geva út barnabløð, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur staðið fyri síðani 1959. Útgávan fevnir um tvey barnabløð, sum eru løgd til rættis í mun til aldurin hjá næmingunum: PÍKA7 er ætlað næmingum í 0. - 3. flokki, og verða 7 bløð givin út árliga, og STROK, sum er ætlað næmingum í 4. - 7. flokki, og sum somuleiðis kemur út sjey ferðir um árið.

Játtanin hækkaði 300 tús. kr. í 2021 við tí endamáli at menna virksemið og skapa fíggjarligar møguleikar hjá øllum næmingum at ogna sær bløðini. Kommunurnar játtaðu eisini í 2021 at lata 100

kr. í stuðli fyri hvørt barn, og tað ger, at bløðini nú eru ókeypis fyri børn frá forskúla til og við 7. flokk í øllum landinum.

Árligi stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið og verður goldin hvønn ársfjórðing. Ársroknskapurin fyri árið frammanundan skal vera latin Barna- og útbúgvingarmálaráðnum innan 1. apríl.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 853 | 853 | 853 | 853 | 853 | 853 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **853** | **853** | **853** | **853** | **853** | **853** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 853 | 853 | 853 | 853 | 853 | 853 |

## 7.23.1.25. Barnabókaútgáva (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at veita árligan stuðul til Bókadeild Føroya Lærarafelags, ið gevur út bøkur á føroyskum til børn og ung. Í 2022 stóð Bókadeildin fyri 87 útgávum - umframt 7 eintøkum av barnabløðunum Strok og Píka7.

Útgávurnar kunnu flokkast soleiðis: 8 smábarnabøkur, 16 myndabøkur, 20 tekstbøkur til smærri og størri børn, 7 bøkur til ung og 3 ítrivsbøkur. Saman við Námi gav Bókadeildin út 32 lættlisnar bøkur, harav 8 eru í nýggju krossfiskarøðini. Í Barnabókaklubbanum eru knappir 2.400 limir, ið fáa bøkur 8 ferðir um árið.

Í 2023 hækkaði játtanin til at tryggja at støðið kann haldast, tá um barnabókaútgávu ræður og at styrkja arbeiðið við at gera eitt nú talgilt tilfar til børn. Økta játtanin ger, at Bókadeildin kann halda virkseminum á sama støði, sum árini frammanundan, á einum marknaði, har kostnaðir eru støðugt hækkandi. Tá ið ræður um at gera tilfar talgilt, verður fyrst og fremst hugsað um ljóðbøkur, har Bókadeild Føroya Lærarafelags saman vil Føroya landsbókasavni arbeiða við at tryggja, at stórt tal av talgildum ljóðbókum fara at verða tøkar fyrst í 2024.

Av játtanini brúkar Bókadeildin eina upphædd til keyp av taskum frá Dugna í sambandi við útbering av barnasangbókini, sum Bókadeildin gevur út, og sum verður latin øllum nýføðingum í Føroyum.

Árligi stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið og verður goldin hvønn ársfjórðing. Ársroknskapurin fyri árið frammanundan skal vera latin Barna- og útbúgvingarmálaráðnum innan 1. apríl.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 2.081 | 2.081 | 2.481 | 2.481 | 2.481 | 2.481 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.081** | **2.081** | **2.481** | **2.481** | **2.481** | **2.481** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2.081 | 2.081 | 2.481 | 2.481 | 2.481 | 2.481 |

### 7.23.1.37. Stuðul til feløg (Stuðulsjáttan)

**Undirkonta 01. Meginfelag Føroyskra Studenta**
Meginfelag Føroyskra Studenta (MFS) er felag teirra lesandi. MFS umboðar føroyingar undir hægri lestri uttanlands og í Føroyum. Føroyingar og onnur lesandi í Føroyum, sum eru undir hægri lestri, eru sjálvvirkandi limir í felagnum. Í altjóða høpi er MFS viðurkent sum sjálvstøðugt føroyskt studentafelag á jøvnum føti við eitt nú onnur norðurlendsk studentafeløg og altjóða studentafelagsskapin European Students' Union, har felagið hevur fullan og sjálvstøðugan limaskap. Luttøkan hjá MFS í ESU ger, at MFS hevur somu ávirkan á Bologna-tilgongdina sum aðrir viðurkendir evropeiskir lestrarfelagsskapir.

Játtanin í fíggjarlógini ger virksemi felagsins møguligt. Endamálið við felagnum er at arbeiða fyri at betra viðurskifti teirra lesandi. Talan er um rættiliga víttfevnandi arbeiði, har kjakfundir, evropeiskur og noðurlendskur útbúgvingarpolitikkur, blaðútgáva, samskifti við myndugleikar, hugnakvøld, lestrarstevna o.s.fr. hoyra til arbeiðsøkið.

Stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, útgoldin frammanundan mánaðarliga. Ársroknskapurin fyri árið frammanundan skal vera latin Barna- og útbúgvingarmálaráðnum innan 1. apríl.

**Undirkonta 02. Føroyamál**
Føroyamál er felag, sum arbeiðir fyri føroyska málinum í Føroyum og í Norðurlondum. Endamál felagsins er at gagna lærugreinini føroyskt á øllum stigum úr barnagarði til fróðskaparsetur. Felagið skipar fyri fakligum og námsfrøðiligum tiltøkum og kjaki um lærugreinina, elvir til samstarv millum lærarar í føroyskum og hevur samstarv við móðurmálslærarafeløg í hinum Norðurlondunum gjøgnum Nordspråk.

Stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið. Ársroknskapurin fyri árið frammanundan skal vera latin Barna- og útbúgvingarmálaráðnum innan 1. apríl.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 251 | 251 | 351 | 351 | 351 | 351 |
| **01. Meginfelag føroyskra studenta, MFS** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **251** | **251** | **251** | **251** | **251** | **251** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 251 | 251 | 251 | 251 | 251 | 251 |
| **02. Føroyamál** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **100** | **100** | **100** | **100** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | - | 100 | 100 | 100 | 100 |

## 7.23.2. Fólkaskúlin v.m.

### 7.23.2.01. Fólkaskúlin (Rakstrarjáttan)

Játtanin er til at reka virksemi í fólkaskúlanum sambært galdandi fólkaskúlalóg, løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, við seinni broytingum. Fólkaskúlin er tann almenni skúlin, ið býður

undirvísing eftir lógini. Játtanin fer eisini til fyrisitingarligar skipanir og verkætlanir, eftirútbúgving og at stuðla ymisk royndar-, menningar- og trivnaðarátøk í fólkaskúlanum.

Umframt lønarframskriving og lønarlyft verður játtanin framskrivað vegna starvsaldursbroytingar og hægri eftirlønarútreiðslur í sambandi við, at tænastumenn fara frá, og sáttmálasettir lærarar verða settir ístaðin. Harumframt er játtanin hækkað til eftirútbúgvingar, at styrkja flokslæraraskipanina og til at javna skipanina í sambandi við tilluting av leiðslutíð. Arbeiðast skal við arbeiðstíðaravtalu fyri námsfrøðingar í fólkaskúlanum.

**Eftirútbúgving**
Játtanin er ætlað til longru eftirútbúgvingarnar, sum Setrið bjóðar út. Talan er um eftirútbúgvingar til eitt nú orðblindni, lesivegleiðing, leiðsluútbúgving o.a. Setrið krevur inn gjald grundað á ECTS, og vanliga liggja hesar eftirútbúgvingar millum 30 og 60 ECTS. Harumframt krevja hesar eftirútbúgvingar niðurskurð í arbeiðstíðini hjá starvsfólkum, tí eftirútbúgvingin liggur í arbeiðstíð og er krevjandi lestrarliga.

**Føroysk sum annaðmál**
Játtanin til tímar til teir næmingar, sum hava føroyskt sum teirra annaðmál er grundað á kunngerð nr. 144 um undirvísing í føroyskum sum annaðmál og móðurmálsundirvísing. Grundað á umsóknir fær hvør einstakur skúli eina pulju av tímum, sum verður latin teimum saman við vanligu tímajáttanini, soleiðis at skúlin kann ráðleggja, hvussu tímarnir verða brúktir alt skúlaárið. Afturat hesum koma umsóknir gjøgnum alt skúlaárið alt eftir, nær familjur flyta til Føroyar.

**Serflokkar**
Grundað á alsamt fleiri visiteringar til serflokkar, eru fleiri tilboð skipað kring landið í verandi skúlum. Sertilboðini eru í 2024 11 í tali. Til samans 240 næmingar eru visiteraðir til sertilboð.

Játtanarleisturin til hesi sertilboð er 1:3 svarandi til 1 ársverk til hvørji 3 børn. Ávísar tillagingar kunnu vera í hesi játtan. Gongdin seinnu árini hevur verið, at næmingatalið í serflokkum økist. Talan er um samansettar avbjóðingar hjá hesum næmingum, og økingin skal síggjast bæði sum ein øking í avjóðingum, men eisini sum manglandi úrval av tilboðum á økinum. Økið er enn undir uppbygging.

**Kostnaðurin fyri hvønn næming**
Yvirlitið er grundað á fíggjarárið 2022, sum er seinasta endaliga uppgjørda fíggjarárið. Yvirlitið er sett upp eftir næmingatali á skúlunum. Í fólkaskúlanum eru smæstu skúlarnir skipaðir við einalærara. Í 2022 vóru til samans 5 fólkaskúlar skipaðir við einalærara. Tilsamans 17 næmingar gingu í hesum 5 skúlunum.

Yvirlitið vísir, at munurin á kostnaðinum fyri hvønn næming svingar ógvusliga. Størru skúlarnir í Føroyum, sum húsa nógv flestu næmingunum, eru teir, ið hava lægsta kostnað fyri hvønn næmingin.

| Fólkaskúlar 2022 | Ársnæmingar 2022 | Kostnaður í 1.000 kr. pr. ársnæming | Fólkaskúlar 2022 | Ársnæmingar 2022 | Kostnaður í 1.000 kr. pr. ársnæming |
|---|---|---|---|---|---|
| Kirkju-/Hattarvíkar skúli | 1 | 498 | Eiðis skúli | 79 | 53 |
| Fámjins skúli | 1 | 516 | Kollafjarðar skúli | 125 | 69 |
| Húsar - Syðradals skúli | 2 | 237 | Stranda skúli | 144 | 67 |
| Oyndarfjarðar skúli | 3 | 189 | Sørvágs skúli | 161 | 60 |
| Haraldssunds skúli | 4 | 141 | Vestmanna skúli | 165 | 73 |
| Skálavíkar skúli | 6 | 138 | Skúlin við Streymin | 200 | 63 |
| Hósvíkar skúli | 11 | 103 | Tvøroyrar skúli | 207 | 55 |
| Nólsoyar skúli | 13 | 90 | Tofta skúli | 210 | 54 |
| Kalbaks skúli | 23 | 73 | Vágs skúli | 215 | 52 |
| Skúlin á Fossánesi | 24 | 91 | Skúlin í Eysturkommunu | 244 | 52 |
| Velbastaðar skúli | 24 | 97 | Skúlin á Giljanesi | 284 | 59 |
| Hvalvíkar skúli | 25 | 85 | Fuglafjarðar skúli | 285 | 56 |
| Skopunar skúli | 27 | 66 | Sankta Frans skúli | 330 | 48 |
| Porkeris skúli | 30 | 69 | Hoyvíkar skúli | 337 | 51 |
| Sumbiar skúli | 35 | 61 | Skúlin á Argjahamri | 379 | 49 |
| Sands skúli | 37 | 67 | Skúlin við Løgmannabreyt | 393 | 51 |
| Viðareiðis skúli | 37 | 75 | Runavíkar Kommunuskúli | 420 | 54 |
| Kvívíkar skúli | 57 | 64 | Eysturskúlin | 485 | 53 |
| Skála skúli | 67 | 70 | Á Skúlatrøð | 677 | 48 |
| Sandoyar Meginskúli | 73 | 75 | Skúlin á Fløtum | 754 | 52 |
| Hvalbiar skúli | 77 | 77 | **Tilsamans** | **6.672** | **56** |
| **Serflokkar** | 205 | 188 | | | |

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 401.626 | 415.172 | 435.810 | 458.590 | 461.090 | 463.590 |
| Útreiðslur | 402.180 | 415.341 | 435.810 | 458.590 | 461.090 | 463.590 |
| Inntøkur | 554 | 169 | - | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 401.626 | 415.172 | 435.810 | 458.590 | 461.090 | 463.590 |
| **Útreiðslur** | **402.180** | **415.341** | **435.810** | **458.590** | **461.090** | **463.590** |
| 11. Lønir v.m. | 398.071 | 411.052 | 431.610 | 454.390 | 456.890 | 459.390 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.111 | 1.295 | 1.100 | 1.100 | 1.100 | 1.100 |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.091 | 1.175 | 1.400 | 1.400 | 1.400 | 1.400 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1.908 | 1.694 | 1.700 | 1.700 | 1.700 | 1.700 |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | - | 125 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **554** | **169** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *169* | - | - | - | - |
| 77. Flyting frá kommunum | *554* | - | - | - | - | - |

**Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **402.180** | **415.341** | **435.810** | **458.590** | **461.090** | **463.590** |
| 1. Leiðsla og hjálparvirksemi | 24.424 | 24.338 | 25.240 | 27.816 | 27.816 | 27.816 |
| 2. Eftirútbúgving | 2.619 | 1.912 | 2.131 | 2.693 | 2.693 | 2.693 |
| 3. Føroyskt sum annaðmál | 4.281 | 4.575 | 4.790 | 5.036 | 5.036 | 5.036 |
| 4. Undirvísing | 327.944 | 334.989 | 348.153 | 364.567 | 367.067 | 369.567 |
| 5. Námsfrøðiligur stuðul | 10.313 | 11.098 | 11.261 | 11.687 | 11.687 | 11.687 |
| 6. Undirvísing í serflokkum | 18.878 | 22.508 | 26.146 | 27.134 | 27.134 | 27.134 |
| 7. Námsfrøðiligur stuðul í serflokkum | 13.721 | 15.921 | 18.089 | 19.657 | 19.657 | 19.657 |
| **B: Virksemi (tal)** | | | | | | |
| Næmingatal í fólkaskúlanum | 6.853 | 6.877 | 6.940 | 6.940 | 6.940 | 6.940 |
| Herav í serflokkum | 175 | 205 | 228 | 240 | 240 | 240 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| 1. Kostn. fyri hvønn næming í skúlaflokkum | 55.338 | 56.466 | 58.340 | 61.463 | 61.836 | 62.209 |
| 2. Kostn. fyri hvønn næming í serflokki | 186.725 | 187.461 | 194.229 | 194.963 | 194.963 | 194.963 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 |
| Onnur | 783,0 | 793,0 | 799,0 | 799,0 | 799,0 | 799,0 |
| Fulltíðarstørv | 790,0 | 800,0 | 806,0 | 806,0 | 806,0 | 806,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 398,1 | 411,1 | 431,6 | 454,4 | 456,9 | 459,4 |

## 7.23.2.02. Sernám (Rakstrarjáttan)

Sernámsfrøðiliga virksemið í undirvísingarverkinum verður framt sambært § 4, stk. 5 og 6 og § 26, stk. 1 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, við seinni broytingum, og sambært kunngerð nr. 127 frá 12. september 2018 um serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligan stuðul, við seinni broytingum.

Sernámsfrøðiliga virksemið er skipað í eina fyrisitingarliga, námsfrøðiliga og fíggjarliga eind: Sernám.

Arbeiðið hjá Sernámi fevnir um at:

- Skipa fyri og ráðgeva í øllum sernámsfrøðiligum spurningum
- Ráðgeva í sambandi við serundirvísing og sernámsfrøðiligan stuðul
- Kanna, eygleiða og veita ráðgeving í sernámsføðiligum høpi, soleiðis at børn og ung við serligum tørvi fáa best møguligar umstøður at læra og mennast í dagstovni og skúlum

### Undirkonta 20. Sernám

Sernám skal tryggja, at lógarbundnu sernámsfrøðiligu uppgávurnar verða framdar, og skal taka sær av arbeiðsuppgávum, sum hava samband við og eru týdningarmiklar fyri at fremja tær lógarásettu arbeiðsuppgávurnar. Sernám hevur neyvt og regluligt samstarv við almannaverkið og heilsuverkið um felags áhugamál og viðskiftafólk. Játtanin verður nýtt til sernámsfrøðiliga og sálarfrøðiliga kanning og

ráðgeving, til tali-, hoyri- og lesikanning, ráðgeving og viðgerð, fysio- og ergoterapeutiska kanning og til ráðgeving til børn og ung.

## Undirkonta 23. Skúlin á Trøðni

Skúlin á Trøðni er sjálvstøðugur, almennur serskúli, sum virkar sambært løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005 um serskúla, við seinni broytingum. Serskúlin skal veita næmingum, sum ikki kunnu fáa nøktandi undirvísing í nærumhvørvinum, undirvísing. Serskúlin undirvísir næmingum í fólkaskúlaaldri, tó kunnu næmingar halda fram við skúlagongdini til endan á tí skúlaári, teir fylla 18 ár. Serskúlin kann eftir avgerð landsstýrismansins eisini skipa fyri undirvísing fyri teimum 18-21 ára gomlu við serligum tørvi. Eftir avgerð landsstýrismansins kann serskúlin skipa fyri serbarnagarði.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 37.793 | 39.432 | 41.873 | 43.637 | 43.637 | 43.637 |
| Útreiðslur | 39.148 | 40.733 | 42.773 | 44.537 | 44.537 | 44.537 |
| Inntøkur | 1.355 | 1.301 | 900 | 900 | 900 | 900 |
| **20. Sernám** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 21.524 | 21.899 | 23.013 | 23.797 | 23.797 | 23.797 |
| **Útreiðslur** | **21.825** | **22.062** | **23.013** | **23.797** | **23.797** | **23.797** |
| 11. Lønir v.m. | 18.821 | 19.035 | 20.743 | 21.527 | 21.527 | 21.527 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2.629 | 2.490 | 1.920 | 1.920 | 1.920 | 1.920 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 140 | 246 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 21 | 78 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 4 | 4 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 10 | 10 | - | - | - | - |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 200 | 200 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| **Inntøkur** | **301** | **162** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *260* | *90* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *41* | *72* | - | - | - | - |
| **23. Skúlin á Trøðni** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 16.269 | 17.533 | 18.860 | 19.840 | 19.840 | 19.840 |
| **Útreiðslur** | **17.323** | **18.672** | **19.760** | **20.740** | **20.740** | **20.740** |
| 11. Lønir v.m. | 16.207 | 17.254 | 18.467 | 19.447 | 19.447 | 19.447 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 927 | 1.214 | 1.173 | 1.173 | 1.173 | 1.173 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 133 | 120 | 70 | 70 | 70 | 70 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 57 | 83 | 40 | 40 | 40 | 40 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | - | 10 | 10 | 10 | 10 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 0 | 0 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **1.054** | **1.139** | **900** | **900** | **900** | **900** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1* | - | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *121* | *121* | - | - | - | - |
| 77. Flyting frá kommunum | *932* | *1.018* | *900* | *900* | *900* | *900* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Sernám**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 32,0 | 32,0 | 33,0 | 34,0 | 34,0 | 34,0 |
| Fulltíðarstørv | 33,0 | 33,0 | 34,0 | 35,0 | 35,0 | 35,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 18,8 | 19,0 | 20,7 | 21,5 | 21,5 | 21,5 |

**Virksemisyvirlit: 23 Skúlin á Trøðni**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **17.323** | **18.672** | **19.760** | **20.740** | **20.740** | **20.740** |
| 1. Leiðsla og hjálparvirksemi | 2.940 | 3.000 | 3.088 | 3.400 | 3.400 | 3.400 |
| 2. Skúli | 14.383 | 15.672 | 16.672 | 17.340 | 17.340 | 17.340 |
| **B: Virksemi (tal)** | | | | | | |
| 2. Skúli | 54 | 58 | 61 | 61 | 61 | 61 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| 2. Skúli (næmingar) | 326.849 | 315.345 | 323.934 | 340.000 | 340.000 | 340.000 |

**Starvsfólkayvirlit: 23 Skúlin á Trøðni**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 34,0 | 36,0 | 37,0 | 37,0 | 37,0 | 37,0 |
| Fulltíðarstørv | 35,0 | 37,0 | 38,0 | 38,0 | 38,0 | 38,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 16,2 | 17,3 | 18,5 | 19,4 | 19,4 | 19,4 |

## 7.23.2.03. Stuðul til fólkaskúlar (Stuðulsjáttan)

### Undirkonta 02. Skúlabarnaflutningur

Sambært § 33 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, við seinni broytingum, og kunngerð nr. 115 frá 22. november 2000 um næmingaflutning hevur verið latin landskassastuðul til lutvíst at rinda útreiðslurnar til góðkendar flutningsskipanir fyri næmingar, sum ikki ganga í skúla í síni egnu bústaðarkommunu. Kommunur, sum hava skúla/framhaldsskúla, men hava næmingaflutning um kommunumark, fáa ikki flutningsútreiðslur endurgoldnar.

Fyri at javnseta allar kommunur verður mett rímiligt at taka burtur endurgjaldið, sum nakrar kommunur fáa til næmingaflutning. Talan er um eina endurgjaldsskipan, sum mett verður, at tíðin er farin frá, nú fleiri kommunur hava mist rættin til endurgjald, tí tær hava valt at verða samanlagdar í størri eindir. Endurgjaldið verður einans veitt, um næmingaflutningurin er um kommunumark. Lógaruppskot um at taka burtur endurgjaldið til næmingaflutning verður tí lagt fyri Løgtingið saman við fíggjarlógaruppskotinum. Í 2024 verður tí ongin játtan til skúlabarnaflutning.

### Undirkonta 03. Privatir skúlar

Sambært løgtingslóg nr. 46 frá 26. mars 2002 um frískúlar, við seinni broytingum, kunnu frískúlar, sum eru góðkendir av landsstýrismanninum og undirvísa aldursbólkum samsvarandi 1.- 9. skúlaári í fólkaskúlanum, fáa stuðul sambært § 18 í lógini. Virksemið hjá frískúlum verður partvíst fíggjað við stuðli, sum landsstýrismaðurin og kommunurnar útvega. Landstýrisins partur av rakstrinum svarar til

85% av miðalkostnaðinum fyri hvønn næming í fólkaskúlanum. Stuðulin verður latin eftir umsókn og verður útgoldin ákontu. Roknskapur verður latin Undirvísingarstýrinum eftir lokið fíggjarár. Tað eru í løtuni tríggir frískúlar, sum fáa stuðul.

Játtanin fyri 2024 verður tillagað virksemið, sum er lækkað nakað undanfarin ár.

**Undirkonta 04. Føroyskir skúlar uttanlands**
Endamálið við játtanini er at veita føroyskum skúlum uttanlands stuðul til at undirvísa føroyskum børnum í føroyskum máli og føroyskari mentan. Føroyingafeløg í útlondum søkja Undirvísingarstýrið um stuðul til undirvísing. Stuðulin kann játtast sambært umsókn við hjálagdari virksemis- og kostnaðarætlan.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 15.196 | 14.298 | 16.523 | 12.723 | 12.723 | 12.723 |
| Inntøkur | 2.429 | 2.579 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| **02. Skúlabarnaflutningur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.161** | **2.272** | **2.230** | **-** | **-** | **-** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 229 | - | - | - | - | - |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 1.932 | 2.272 | 2.230 | - | - | - |
| **03. Privatir skúlar** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **13.026** | **12.026** | **14.218** | **12.648** | **12.648** | **12.648** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 13.026 | 12.026 | 14.218 | 12.648 | 12.648 | 12.648 |
| **Inntøkur** | **2.429** | **2.579** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** |
| 77. Flyting frá kommunum | *2.429* | *2.579* | *2.500* | *2.500* | *2.500* | *2.500* |
| **04. Føroyskir skúlar uttanlands** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **9** | **-** | **75** | **75** | **75** | **75** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 9 | - | 75 | 75 | 75 | 75 |

## 7.23.2.05. Skúlatilboð til ung við breki (Rásin) (Løgujáttan)

Játtanin er til verkætlanina at víðka og betra um karmarnar hjá Rásini í Saltangará.

Sambært § 3, 2. pkt. í løgtingslóg nr. 67 frá 2. mai 2003 um skúlatilboð til ung við breki, við seinni broytingum, skal upptøka til skúlan fara fram á hvørjum ári. Fyri at upptøka kann fara fram á hvørjum ári, má pláss vera fyri fleiri næmingum afturat í skúlanum. Karmarnir í skúlatilboðnum skulu tí víðkast, og tað krevur eina umbygging og útbygging. Ætlanin er, at skúlin skal hava búpláss til 7 næmingar afturat, í alt 14 næmingar.

Í verandi bygningi verða ikki gjørdar størri umvælingar við verkætlanini. Tó skulu trý rúm broytast, eitt kamar skal flytast har, sum ein loftstova er í dag, fyri at gera pláss fyri einum vaskirúmi, ið verður samanknýtt við nýggja køkin. Bygdur verður ein nýggjur bygningur omanfyri verandi bygning. Hann er í tveimum hæddum við kamarslon á ovaru hæddini og undirvísingarhølum og felagshølum á niðaru hæddini. Ein millumbygningur verður bygdur, ið knýtir gamla og nýggja bygningin saman. Í hesum millumbygningi verður m.a. nýggjur køkur gjørdur.

Eisini skal nakað av arbeiði gerast við økið uttan um bygningin, eitt nú at fáa til vega størri parkeringsøki. Fyri at kunna fremja verkætlanina er nakað av lendi sunnanfyri verandi bygning keypt.

Landsverk hevur havt byggingina í útboði, og útboðsvinnari er funnin, og ein verklagslóg fyri verkætlanina er samtykt av Løgtinginum. Sambært løgtingslóg nr. 49 frá 19. apríl 2023 um at umbyggja og útbyggja eftirskúlan Rásina er verkætlanin mett at kosta 25 mió. kr., íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv. Byggingin fór í gongd á sumri í 2023 og tekur umleið 1 1/2 ár.

Frá 2019 til 2022 eru brúktar 1,7 mió. kr. til fyrireiking og prosjektering.

Í 2023 eru játtaðar 3,8 mió. kr. Umframt framfluttar 4,2 mió. kr. eru tí 8 mió. kr. tøkar í 2023. Nýtslan í 2023 verður mett til 4 mió. kr. Framfluttar verða sostatt 4 mió. kr. Játtanin fyri 2024 verður 15,4 mió. kr. Tøkar í 2024 verða sostatt 19,4 mió. kr.

### Átekning
Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 733 | 330 | 3.800 | 15.350 | - | - |
| **10. Skúlatilboð til ung við breki (Rásin)** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **733** | **330** | **3.800** | **15.350** | **-** | **-** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -90 | -119 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 693 | 327 | 3.800 | 15.350 | - | - |
| 32. Útvegan av løgu o.ø. | 39 | 3 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 90 | 119 | - | - | - | - |

## 7.23.2.06. Skúlatilboð til ung við breki (Rásin) (Rakstrarjáttan)

Skúlatilboðið Rásin í Saltangará er skipað samsvarandi § 1 í løgtingslóg nr. 67 frá 2. mai 2003 um skúlatilboð til ung við breki, við seinni broytingum.

Rásin er eftirskúli til ung við menningartarni, ið eru liðug við fólkaskúlan. Endamál skúlans er, at næmingarnir fáa ment sínar førleikar, so tey eftir lokið skúlaskeið kunnu liva eitt so sjálvstøðugt lív sum møguligt.

Í verandi støðu er pláss fyri 7 næmingum á skúlaskeiðinum, sum varar 2 ár. Upptøka av næmingum er annaðhvørt ár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 4.330 | 4.491 | 4.657 | 4.925 | 4.925 | 4.926 |
| Útreiðslur | 4.593 | 4.748 | 4.867 | 5.135 | 5.135 | 5.136 |
| Inntøkur | 262 | 257 | 210 | 210 | 210 | 210 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 4.330 | 4.491 | 4.657 | 4.925 | 4.925 | 4.926 |
| **Útreiðslur** | **4.593** | **4.748** | **4.867** | **5.135** | **5.135** | **5.136** |
| 11. Lønir v.m. | 3.881 | 4.072 | 4.357 | 4.625 | 4.625 | 4.626 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 628 | 580 | 450 | 450 | 450 | 450 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 33 | 7 | 60 | 60 | 60 | 60 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 50 | 89 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 0 | 0 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **262** | **257** | **210** | **210** | **210** | **210** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *262* | *257* | *210* | *210* | *210* | *210* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 |
| Fulltíðarstørv | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 3,9 | 4,1 | 4,4 | 4,6 | 4,6 | 4,6 |

## 7.23.2.10. Eftirskúlar (Stuðulsjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar, við seinni broytingum, verður studningur latin eftirskúlum.

Skúlaárið 2023/2024 eru tveir eftirskúlar góðkendir at halda fram við virksemi sambært eftirskúlalógini; ein á Tvøroyri og ein í Skálavík. Býtið av játtanini á undirkontur er vegleiðandi, og til ber at flyta ímillum í mun til upptøku av næmingum.

### Undirkonta 01. Eftirskúlin á Tvøroyri

Føroya eftirskúli er sjálvsognarstovnur, sum er staðsettur á Tvøroyri. Sambært viðtøkum skúlans er endamálið at reka eftirskúla sambært eftirskúlalógini og at bjóða undirvísing, ið samsvarar fólkaskúlalógina og grundhugsjónina hjá eftirskúlanum. Ovasta leiðsla er eitt stýri við 6 limum. Skúlastýrið setir leiðara fyri skúlan.

Rakstur skúlans er fíggjaður við almennum stuðli sambært eftirskúlalógini, foreldragjaldi og við øðrum stuðli.

Landið letur skúlanum stuðul eftir umsókn. Stuðulin verður útgoldin ákontu. Grannskoðaður roknskapur verður latin Undirvísingarstýrinum eftir lokið fíggjarár.

Játtanin fyri 2024 verður tillagað í mun til verksemið á skúlanum, sum er nakað minni enn ætlað.

**Undirkonta 02. Eftirskúlin í Skálavík**
Brúgvin er sjálvsognarstovnur, sum er staðsettur í Skálavík. Sambært viðtøkum skúlans er endamálið at reka eftirskúla sambært eftirskúlalógini og bjóða undirvísing, ið samsvarar fólkaskúlalógina og grundhugssjónina hjá eftirskúlanum. Ovasta leiðsla er eitt stýri við 5 limum. Skúlastýrið setir leiðara fyri skúlan.

Rakstur skúlans er fíggjaður við almennum stuðli sambært eftirskúlalógini, foreldragjaldi og við øðrum stuðli.

Landið letur skúlanum stuðul eftir umsókn. Stuðulin verður útgoldin ákontu. Grannskoðaður roknskapur verður latin Undirvísingarstýrinum eftir lokið fíggjarár.

Játtanin fyri 2024 verður tillagað í mun til verksemið á skúlanum, sum er nakað minni enn ætlað.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 6.324 | 5.689 | 7.490 | 5.940 | 5.940 | 5.940 |
| Inntøkur | 334 | 256 | - | - | - | - |
| **01. Eftirskúlin á Tvøroyri** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.315** | **2.016** | **3.641** | **2.970** | **2.970** | **2.970** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2.315 | 1.848 | 3.641 | 2.970 | 2.970 | 2.970 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 169 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **96** | **86** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 77. Flyting frá kommunum | *96* | *86* | - | - | - | - |
| **02. Eftirskúlin í Skálavík** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **4.009** | **3.673** | **3.849** | **2.970** | **2.970** | **2.970** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 4.009 | 3.673 | 3.849 | 2.970 | 2.970 | 2.970 |
| **Inntøkur** | **237** | **170** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 77. Flyting frá kommunum | *237* | *170* | - | - | - | - |

## 7.23.3. Miðnámsútbúgvingar

### 7.23.3.02. Miðnám á Kambsdali (Løgujáttan)

Játtanin er ætlað til at umbyggja og útbyggja miðnámsskúlan á Kambsdali. Miðnámsskúlin á Kambsdali er síðstu árini um- og útbygdur við tí endamáli at nøkta hølistørvin og tryggja næmingum og lærarum nútímans námsfrøðiligar karmar. Arbeiðið er gjørt í byggistigum, og triðja byggistig, sum er í gongd, fevnir um at nýbyggja náttúruvísindadaliga økið, útbyggja felagsøkið, køkin og undirvísingarhølir umframt innbúgv. Triðja byggistig er seinasti partur fyri at fullføra heildarætlanina frá 2012 um út- og umbygging í sambandi við samanlegging av miðnámsskúlunum á Kambsdali.

Sambært høvuðsprojektinum fyri um- og útbyggingina verður útbyggingin av skúlanum gjørd í miðjuni í skúlanum - tað er har, sum garðurin er í skúlabygninginum. Málið er at skapa nýggjar og betri karmar fyri felags virksemi í skúlanum. Í garðinum verður eitt nýtt felagshøli gjørt, ið skal rúma alskyns virksemi og funktiónum og styrkja samanhaldið millum næmingar, samstundis sum ferðslumynstrið millum ymisku partarnar av skúlanum verður betrað munandi.

Til náttúruvísindaliga økið verða nýggjar skúlastovur gjørdar, og nýggjur køkur verður gjørdur. Sum partur av verkætlanini skal eisini ein nýggjur brunavegur gerast fyri at lúka brunakrøv, ið Fuglafjarðar kommuna hevur sett.

Landsverk hevur havt byggingina í útboði, og útboðsvinnari er funnin, og ein dagførd verklagslóg fyri verkætlanina er samtykt av Løgtinginum. Sambært løgtingslóg nr. 64 frá 4. mai 2022 um triðja byggistig í umbygging og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali, við seinni broytingum, er verkætlanin mett at kosta 94 mió. kr., íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv. Byggingin fór í gongd á sumri í 2023 og tekur áleið 2 1/2 ár.

Frá 2018 til 2022 eru brúktar 7,8 mió. kr. til fyrireiking og prosjektering.

Í 2023 eru játtaðar 10,1 mió. kr. Umframt framfluttar 8,3 mió. kr. eru tí 18,4 mió. kr. tøkar í 2023. Nýtslan í 2023 verður mett til 10,4 mió. kr. Framfluttar verða sostatt 8 mió. kr. Játtanin fyri 2024 verður 49,2 mió. kr. Tøkar í 2024 verða sostatt 57,2 mió. kr.

**Átekning**
Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 4.179 | 250 | 10.100 | 49.200 | 18.600 | - |
| **10. Miðnám á Kambsdali** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **4.179** | **250** | **10.100** | **49.200** | **18.600** | **-** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -258 | -390 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 4.179 | 250 | 10.100 | 49.200 | 18.600 | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 258 | 390 | - | - | - | - |

## 7.23.3.05. Miðnámsútbúgvingar (Rakstrarjáttan)

Miðnámsútbúgvingarnar (breytaskipanin og yrkisskúlarnir) venda sær allar til so at siga sama aldursbólk. Ymiskt er frá ári til ár, hvørja útbúgving næmingarnir søkja inn á, men við at hava eina høvuðskontu ber til at tillaga flokkatalið í teimum einstøku skúlunum við støði í tí staðfesta umsøkjaratalinum til tær einstøku útbúgvingarnar í sambandi við upptøku um várið.

Játtanin fyri 2024 er ætlað til sama virksemi sum í 2023. Umframt lønarframskriving og krav um tillagaðan rakstur eru gjørdar nakrar tillagingar, sum greitt er frá á undirkontunum.

Seinnu árini hava skúlarnir fingið miðfirraða játtan til sernámsfrøði frá Felags fyri miðnám. Hendan skipan er umløgd, soleiðis at skúlarnir nú fáa beinleiðis játtan til miðfirraða sernámsfrøði. Ístaðin er upphædd sett av á Felags fyri miðnám til einsæris sernámstænastur.

**Undirkonta 22. Klaksvíkar HF-skeið**
Klaksvíkar HF-skeið veitir undirvísing sambært løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, við seinni broytingum. Klaksvíkar HF-skeið bjóðar fyrireikingarbreyt, ið tekur 2 ár. Klaksvíkar HF-skeið verður umsitin av Miðnámsskúlanum á Kambsdali og er staðsett á Tekniska skúla í Klaksvík. Húsaraksturin liggur hjá Tekniska skúla í Klaksvík. Ein flokkur verður tikin upp árliga.

**Undirkonta 23. Miðnámsskúlin í Suðuroy**
Miðnámsskúlin í Suðuroy veitir undirvísing sambært løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, við seinni broytingum og løgtingslóg nr. 107 frá 29. desember 1998 um støðisútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið, við seinni broytingum. Gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar eru skipaðar við hugbreyt og náttúrubreyt, ið taka 3 ár, búskaparbreyt í tekur 2 ár og FHS yrkisnám. Flokkarnir lesa, í tann mun tað er møguligt, lærugreinar saman tvørtur um breytir og árgangir. Skúlin tekur vanliga upp ein flokk á hvørji breyt. Skúlin bjóðar eisini serligt skipað skúlatilboð, serbreyt, sambært nr. 36/2017 um serliga skipað skúlatilboð. Serbreytin er staðsett í fólkaskúlanum í Hovi.

Húsaraksturin hjá Heilsuskúlanum liggur hjá Miðnámsskúlanum í Suðuroy.

**Undirkonta 26. Tekniski skúlin í Klaksvík**
Tekniski skúli í Klaksvík er sjálvsognarstovnur skipaður sambært løgtingslóg nr. 106 frá 29. desember 1998 um yrkisskúlar, við seinni broytingum. Til skúlan hoyrir skúlaheim við 44 búplássum. Skúlin veitir undirvísing sambært løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 41 frá 23. apríl 1999 um støðisútbúgving innan tøkni, við seinni broytingum, og løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, við seinni broytingum. Skúlin hevur gymnasialu trýára breytina Tøknibreyt. Skúlin hevur yrkisnám í el, timbur, maskin og mat.

Eisini er Serbreyt, sum verður framd sambært kunngerð nr. 36 frá 4.apríl 2017. Serbreytin hevur 12 pláss og tekur 3 næmingar upp árliga. Serbreytir er ætlað teimum næmingum, sum eru tarnað at gjøgnumføra miðnám undir vanligum treytum, hóast teir stuðulsmøguleikar, sum eru í vanligu skúlaskipanini.

Skúlin tekur upp ein flokk á Tøknibreyt árliga, harumframt tveir flokkar á yrkisbreytunum, timbur, maskin, el og matvøru.

Í august 2023 vórðu tveir flokkar stovnaðir á Tøknibreyt. Játtan var til 3,5 flokkar. Játtanin fyri 2024 verður hækkað til at rúma 4 flokkum alt árið, umframt at neyðugt hevur verið at stovna eitt starv til einsæris sernámsfrøðiliga tænastu.

Húsaraksturin av Klaksvíkar HF-skeið liggur hjá Tekniska skúla í Klaksvík.

**Undirkonta 27. Miðnám í Vestmanna**
Útbúgvingarnar á Miðnámi í Vestmanna eru skipaðar sambært løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, við seinni broytingum og løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, við seinni broytingum.

Miðnám í Vestmanna bjóðar út trýára gymnasialu tilfeingisbreytina og yrkisútbúgving innan aling á sjógvi og landi.

Skúlin bjóðar út yrkisskeið í ferðavinnu sambært løgtingslóg nr. 22 frá 17. mai 2004 um yrkisskeið.

Yrkisútbúgvingin innan aling á sjógvi og landi byrjaði í august 2022. Fyrstu tvey árini hevur skúlaskeið 1 verið boðið út. Í 2024 verður skúlaskeið 2 boðið út. Í 2025 og 2026 verða skúlaskeið 3 og 4 boðin út, og eftir tað er fult virksemi. Játtanin fyri 2024 rúmar tvey skúlaskeið, men neyðugt verður at framskriva játtanina fyri 2025 og 2026 samsvarandi økta virkseminum.

Skúlin keypir serskeið til alarar frá Sjónám. Lærlingarnir fara ikki á verandi skeið, men verður flokkur stovnaður einsæris til tey. Tískil skal Miðnám í Vestmanna rinda fyri ein heilan flokk. Játtanin fyri 2024 verður vegna hetta hækkað 100 tús. kr. til at keypa serskeið til alarar. Tilsvarandi verður inntøkujáttanin hjá Sjónám hækkað 100 tús. kr.

**Undirkonta 28. Felags fyri miðnámsskúlar**
Felagsjáttanin til miðnámsútbúgvingar er ætlað til vikarlønir í sambandi við langtíðarsjúku, skeið v.m., óvæntaðar útreiðslur v.m. og felags rakstur av miðnámi; námsfrøðiliga útbúgving av miðnámsskúlalærarum; sernámsfrøðiligan stuðul til næmingar í miðnámsútbúgvingum sambært kunngerð nr. 94 frá 22. juni 2000 um sernámsfrøðiligan stuðul til næmingar við likamligum ella sálarligum breki, við seinni broytingum; serkøna uttanhýsis ráðgeving o.a. Harumframt verkætlanir, serliga í sambandi við at endurskoða og dagføra miðnámsútbúgvingarnar umframt annað royndar- og menningarvirksemi.

Á heysti 2019 varð farið undir at skipa námsfrøðilig útbúgving av miðnámsskúlalærarum í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya. Námsfrøðilig útbúgving er skipað eftir kunngerð nr. 109 frá 16. juli 2019 um námsfrøðiliga útbúgving av lærarum á miðnámsskúlum, yrkisskúlum og vinnuskúlum. Umleið helvtin av játtanini á Felags fyri miðnámsskúlar fer til námsfrøðiliga útbúgving. Tað er fíggjarligt rúm fyri, at 10-12 lærarar árliga fara á skeið. Hetta er hóskandi mongd, sum bæði ger, at til ber at fáa øll ígjøgnum, og at tað ikki nervar skúlarnar meira enn hægst neyðugt. Skúlarnir fáa endurrinda fyri vikartímar fyri tey, sum eru burtur úr arbeiði vegna eftirútbúgving.

Samskipan og felags rakstur av serbreytini er fíggjað av felags fyri miðnámsskúlar.

Í 2023 var skjøtul settir á eina royndarverkætlan við næmingum sum fáa úrvalsvirksemi undir ÍSF. Mett verður at umleið 100 næmingar á miðnámi koma undir skipanina. Næmingarnir fáa møguleika at fáa umlagda undirvísing. Skúlarnir fáa endurrindað fyri vegleiðing og eyka undirvísingartænastur. 350 tús. kr. verða settar av til tað í 2024.

Ávíst undirvísingarvirksemi er ikki endaliga ráðlagt fyri 2024. Orsøkin er m.a at flokkar eru ikki stovnaðir í 2023 og ávirkar hetta í fyrsta umfari 2024. Tá innskriving fyri 2024 er liðug í mars 2024, verða hesir flokkar ráðlagdir út á skúlarnar. Játtanin til hetta liggur á felags fyri miðnámsskúlar.

**Undirkonta 30. Heilsuskúli Føroya**
Heilsuútbúgvingarnar í Heilsuskúla Føroya eru skipaðar sambært løgtingslóg nr. 42 frá 26. apríl 2019 um heilsuhjálparaútbúgving, heilsurøktaraútbúgving og námsfrøðiliga hjálparaútbúgving. Heilsuskúli Føroya er staðsettur á Skúladeplinum í Suðuroy. Upptøka til heilsuhjálpara er tvær ferðir árliga, og tekur útbúgvingin 15 mánaðir, og upptøka til heilsurøktara er eina ferð árliga, og tekur útbúgvingin 22 mánaðir. Námsfrøðiliga hjálparaútbúgvingin byrjaði í august 2020 og tekur 24 mánaðir. Tað er upptøka í august hvørt ár.

Skúlin skipar eisini fyri skeiðum fyri vegleiðarar, ið skulu vegleiða heilsuhjálparanæmingum, heilsurøktaranæmingum og næmingunum í námsfrøðiligu hjálparútbúgvingini í starvsvenjingini. Eisini verður skipað fyri einstøkum førleikamennandi skeiðum til almanna- og heilsuøkið.

Í 2024 leggur Heilsuskúlin virksemi um, soleiðis at tað verða tiknir upp tveir flokkar til heilsurøktara í mun til ein flokk nú. Játtanin fyri 2024 verður tillagað økta virksemið, umframt at hetta eisini ávirkar játtanina fyri 2025 og frameftir, sum tí er framskrivað samsvarandi økta virkseminum.

Húsaraksturin hjá Heilsuskúlanum liggur hjá Miðnámsskúlanum í Suðuroy.

**Undirkonta 31. Glasir**
Glasir bjóðar gymnasialar miðnámsútbúgvingar, yrkisútbúgvingar og stuttar framhaldsútbúgvingar. Glasir bjóðar eisini skeiðsvirksemi, fyrisitir sjálvsognarstovnin Føroya Handilsskúli og Skeiðsdepilin og rekur skúlaheim við 49 búplássum.

Gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar eru skipaðar sum 2- og 3-ára langar útbúgvingarbreytir, ið geva næminginum fakligt grundarlag fyri hægri lestri og framhaldandi útbúgving. Hesar eru skipaðar sambært løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, við seinni broytingum. Skúlin bjóðar serligt skipað miðnám fyri næmingar við autismu, sum er miðnámsútbúgving lagd serliga til rættis.

Yrkisútbúgvingar fevna um Tekniskt Yrkisnám, FHS og støðiðsútbúgvingar innan fyri klædna- og tilvirkisøkið. Hesar eru skipaðar sambært løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 107 frá 29. desember 1998 um støðisútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkinum, við seinni broytingum, og løgtingslóg nr. 41 frá 23. apríl 1999 um støðisútbúgving innan tøkni, við seinni broytingum.

Glasir bjóðar út serbreyt, sum verður framd sambært kunngerð nr. 36 frá 4. apríl 2017 um serliga skipað skúlatilboð. Serbreytir er ætlað teimum næmingum, sum eru tarnað at gjøgnumføra miðnám undir vanligum treytum, hóast teir stuðulsmøguleikar, sum eru í vanligu skúlaskipanini.

Stuttar framhaldsútbúgvingar fevna m.a. um HD útbúgvingina og akademiútbúgvingar, sum verða lisnar parttíð. Bjóðað verður út, sum fulltíðarlestur, tríggjar styttri framhaldsútbúgvingar og tvær proffesionsbachelorútbúgvingar, byggifrøði og innovatión. Hesar eru skipaðar sambært løgtingslóg nr. 49 frá 9. mai 2005 um stuttar framhaldsútbúgvingar á yrkisskúlum og almennum útbúgvingarstovnum, við seinni broytingum.

Glasir umsitur sjálvsognarstovnin Føroya Handilsskúli sum fyriuttan egið inntøkufíggjað virksemi eisini eigur Skeiðsdepilin.

Játtanin fyri 2024 er tillagað virksemið á Glasir, sum samlað verður nakað minni enn undanfarið ár.

**Undirkonta 32. Miðnám á Kambsdali**
Útbúgvingarnar á Miðnám á Kambsdali eru skipaðar sambært løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, við seinni broytingum, og veitir eisini undirvísing eftir løgtingslóg nr. 107 frá 29. desember 1998 um støðisútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið, við seinni broytingum, og løgtingslóg nr. 49 frá 9. mai 2005 um stuttar framhaldsútbúgvingar á yrkisskúlum og almennum útbúgvingarstovnum, við seinni broytingum. Gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar eru skipaðar við útbúgvingarbreytum, ið taka 3 ár, og við fyrireikingarbreyt, ið tekur 2 ár. Tær geva næminginum fakligt grundarlag fyri hægri lestri og framhaldandi útbúgving.

Harumframt bjóðar Miðnám á Kambsdali serbreyt, sum verður framd sambært kunngerð nr. 36 frá 4. apríl 2017 um serliga skipað skúlatilboð. Serbreytir er ætlað teimum næmingum, sum eru tarnað at gjøgnumføra miðnám undir vanligum treytum, hóast teir stuðulsmøguleikar, sum eru í vanligu skúlaskipanini.

Játtanin fyri 2024 er tillagað virksemið á Miðnám á Kambsdali. Talan er um ein hálvan flokk minni enn ráðlagt, og at neyðugt hevur verið at stovna eitt starv til einsæris sernámsfrøðiliga tænastu.

Miðnám á Kambsdali umsitur Klaksvíkar HF-skeið.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 240.400 | 246.685 | 261.244 | 268.652 | 268.952 | 269.152 |
| Útreiðslur | 264.245 | 271.059 | 283.214 | 290.802 | 291.102 | 291.302 |
| Inntøkur | 23.845 | 24.374 | 21.970 | 22.150 | 22.150 | 22.150 |
| **22. Klaksvíkar HF-skeið** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 3.430 | 3.401 | 3.611 | 3.746 | 3.746 | 3.746 |
| **Útreiðslur** | **3.463** | **3.430** | **3.638** | **3.746** | **3.746** | **3.746** |
| 11. Lønir v.m. | 3.340 | 3.299 | 3.526 | 3.634 | 3.634 | 3.634 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 76 | 91 | 52 | 52 | 52 | 52 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 47 | 20 | 40 | 40 | 40 | 40 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 20 | 20 | 20 | 20 | 20 |
| **Inntøkur** | **33** | **30** | **27** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *33* | *30* | *27* | - | - | - |
| **23. Miðnámsskúlin í Suðuroy** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 14.770 | 17.050 | 17.955 | 18.557 | 18.557 | 18.557 |
| **Útreiðslur** | **15.484** | **17.628** | **18.555** | **19.257** | **19.257** | **19.257** |
| 11. Lønir v.m. | 12.695 | 14.712 | 16.233 | 16.935 | 16.935 | 16.935 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.484 | 1.796 | 1.522 | 1.522 | 1.522 | 1.522 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 900 | 350 | 550 | 550 | 550 | 550 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 405 | 770 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -0 | 0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 1 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **713** | **579** | **600** | **700** | **700** | **700** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *405* | *383* | *300* | *400* | *400* | *400* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *309* | *195* | *300* | *300* | *300* | *300* |
| **26. Tekniski skúli í Klaksvík** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 25.369 | 26.063 | 27.967 | 29.866 | 29.866 | 29.866 |
| **Útreiðslur** | **29.456** | **30.482** | **31.867** | **33.866** | **33.866** | **33.866** |
| 11. Lønir v.m. | 23.733 | 24.503 | 26.655 | 28.554 | 28.554 | 28.554 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 4.615 | 4.996 | 4.462 | 4.562 | 4.562 | 4.562 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 794 | 470 | 450 | 450 | 450 | 450 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 303 | 440 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 17. Avskrivingar o.a. | - | 67 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -0 | -0 | - | - | - | - |
| 52. Tilskot til einstaklingar | -0 | -0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 11 | 5 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **4.088** | **4.419** | **3.900** | **4.000** | **4.000** | **4.000** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.695* | *1.906* | *1.800* | *1.800* | *1.800* | *1.800* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | - | *0* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *980* | *1.011* | *600* | *600* | *600* | *600* |
| 77. Flyting frá kommunum | *1.413* | *1.502* | *1.500* | *1.600* | *1.600* | *1.600* |

**27. Miðnám í Vestmanna**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 7.331 | 8.109 | 8.733 | 9.138 | 9.438 | 9.638 |
| **Útreiðslur** | **7.868** | **8.827** | **8.825** | **9.588** | **9.888** | **10.088** |
| 11. Lønir v.m. | 6.642 | 7.658 | 7.915 | 8.578 | 8.878 | 9.078 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 867 | 998 | 750 | 850 | 850 | 850 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 307 | 78 | 80 | 80 | 80 | 80 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 37 | 79 | 80 | 80 | 80 | 80 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 14 | 14 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **537** | **718** | **92** | **450** | **450** | **450** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *88* | *159* | *50* | *50* | *50* | *50* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *449* | *559* | *42* | *400* | *400* | *400* |

**28. Felags fyri miðnámsskúlar**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 8.972 | 7.598 | 10.935 | 10.409 | 7.459 | 7.459 |
| **Útreiðslur** | **8.972** | **7.636** | **10.935** | **10.409** | **7.459** | **7.459** |
| 11. Lønir v.m. | 154 | 46 | 962 | 2.534 | 1.584 | 1.584 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 616 | 481 | 2.225 | 2.225 | 225 | 225 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | 500 | 500 | 500 | 500 |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | - | 150 | 150 | 150 | 150 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 8.203 | 7.108 | 7.098 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| **Inntøkur** | **-** | **37** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *37* | - | - | - | - |

**30. Heilsuskúli Føroya**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 7.835 | 8.736 | 9.300 | 10.284 | 10.634 | 10.634 |
| **Útreiðslur** | **7.930** | **8.742** | **9.351** | **10.684** | **11.034** | **11.034** |
| 11. Lønir v.m. | 7.080 | 7.740 | 8.633 | 9.966 | 10.316 | 10.316 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 679 | 577 | 518 | 518 | 518 | 518 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 135 | 375 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 18 | 35 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -0 | - | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 0 | - | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 17 | 14 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **95** | **6** | **51** | **400** | **400** | **400** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *7* | *6* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *88* | - | *51* | *400* | *400* | *400* |

**31. Glasir, Skúladepilin í Marknagili**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 125.768 | 125.691 | 129.225 | 131.483 | 133.483 | 133.483 |
| **Útreiðslur** | **139.623** | **139.711** | **143.425** | **145.383** | **147.383** | **147.383** |
| 11. Lønir v.m. | 117.514 | 119.061 | 122.265 | 124.023 | 126.023 | 126.023 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 14.490 | 14.532 | 14.660 | 14.660 | 14.660 | 14.660 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 4.310 | 2.550 | 3.500 | 3.700 | 3.700 | 3.700 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 3.297 | 3.405 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| 17. Avskrivingar o.a. | - | -15 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 13 | 178 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **13.855** | **14.019** | **14.200** | **13.900** | **13.900** | **13.900** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *7.269* | *7.507* | *7.800* | *8.800* | *8.800* | *8.800* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *3.843* | *3.619* | *3.500* | *2.000* | *2.000* | *2.000* |
| 77. Flyting frá kommunum | *2.743* | *2.893* | *2.900* | *3.100* | *3.100* | *3.100* |

**32. Miðnám á Kambsdali**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 46.925 | 50.037 | 53.518 | 55.169 | 55.769 | 55.769 |
| **Útreiðslur** | **51.449** | **54.603** | **56.618** | **57.869** | **58.469** | **58.469** |
| 11. Lønir v.m. | 44.505 | 47.306 | 49.673 | 50.924 | 51.524 | 51.524 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 5.105 | 6.004 | 4.620 | 4.620 | 4.620 | 4.620 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 1.241 | 405 | 1.400 | 1.400 | 1.400 | 1.400 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 582 | 862 | 925 | 925 | 925 | 925 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -1 | -5 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 0 | 0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 17 | 31 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **4.524** | **4.566** | **3.100** | **2.700** | **2.700** | **2.700** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.542* | *1.757* | *1.500* | *1.500* | *1.500* | *1.500* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *82* | *213* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *2.835* | *2.596* | *1.600* | *1.200* | *1.200* | *1.200* |
| 77. Flyting frá kommunum | *65* | - | - | - | - | - |

**Virksemisyvirlit: 22 Klaksvíkar HF-skeið**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **3.463** | **3.430** | **3.638** | **3.746** | **3.746** | **3.746** |
| 1. Stuðulsvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 1.1. Leiðsla, fyrisiting, búskapur, KT o.l. | 1.162 | 1.200 | 1.202 | 1.246 | 1.246 | 1.246 |
| 1.2. Húsaumsiting, reingerð o.l. | - | - | - | - | - | - |
| 2. Undirvísingarvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 2.1. Gymnasialt miðnám | 2.301 | 2.230 | 2.436 | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| **B: Virksemi (tal)** | **35** | **31** | **32** | **36** | **36** | **36** |
| 2.1. Gymnasialt miðnám (ársnæmingar) | 35 | 31 | 32 | 36 | 36 | 36 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | **98.943** | **110.645** | **113.688** | **104.055** | **104.055** | **104.055** |
| 1. Stuðulsvirksemi, kr. pr. ársnæming | 33.200 | 38.710 | 37.563 | 34.611 | 34.611 | 34.611 |
| 2. Undirvísingarvirksemi, kr. pr. ársnæming | 65.743 | 71.935 | 76.125 | 69.444 | 69.444 | 69.444 |

**Starvsfólkayvirlit: 22 Klaksvíkar HF-skeið**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 |
| Fulltíðarstørv | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 3,3 | 3,3 | 3,5 | 3,6 | 3,6 | 3,6 |

**Virksemisyvirlit: 23 Miðnámsskúlin í Suðuroy**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **15.484** | **17.628** | **18.555** | **19.257** | **19.257** | **19.257** |
| 1. Stuðulsvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 1.1. Leiðsla, fyrisiting, búskapur, KT o.l. | 1.718 | 2.200 | 2.405 | 2.477 | 2.477 | 2.477 |
| 1.2. Húsaumsiting, reingerð o.l. | 1.788 | 2.064 | 2.094 | 2.157 | 2.157 | 2.157 |
| 1.3. Kantina, skúlaheim o.t. | 569 | 552 | 485 | 500 | 500 | 500 |
| 2. Undirvísingarvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 2.1. Gymnasialt miðnám | 10.842 | 12.242 | 12.999 | 13.534 | 13.534 | 13.534 |
| 2.2. Yrkisnám | 567 | 570 | 572 | 589 | 589 | 589 |
| **B: Virksemi (tal)** | **101** | **103** | **105** | **105** | **105** | **105** |
| 2.1. Gymnasialt miðnám (ársnæmingar) | 94 | 96 | 97 | 97 | 97 | 97 |
| 2.2. Yrkisnám (ársnæmingar) | 7 | 7 | 8 | 8 | 8 | 8 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | **147.673** | **165.786** | **172.096** | **178.638** | **178.638** | **178.638** |
| 1. Stuðulsvirksemi, kr. pr. ársnæming, uttan 1.3. | 34.713 | 41.398 | 42.848 | 44.133 | 44.133 | 44.133 |
| 2. Undirvísing, kostnaður fyri hvønn næming | 112.960 | 124.388 | 129.248 | 134.505 | 134.505 | 134.505 |

**Starvsfólkayvirlit: 23 Miðnámsskúlin í Suðuroy**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 22,0 | 25,5 | 24,5 | 25,5 | 26,0 | 26,0 |
| Fulltíðarstørv | 23,0 | 26,5 | 25,5 | 26,5 | 27,0 | 27,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 12,7 | 14,7 | 16,2 | 16,9 | 16,9 | 16,9 |

**Virksemisyvirlit: 26 Tekniski skúli í Klaksvík**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **29.456** | **30.482** | **31.867** | **33.866** | **33.866** | **33.866** |
| 1. Stuðulsvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 1.1. Leiðsla, fyrisiting, búskapur, KT o.l. | 4.432 | 4.520 | 5.160 | 5.327 | 5.327 | 5.327 |
| 1.2. Húsaumsiting, reingerð o.l. | 3.892 | 3.968 | 4.350 | 4.493 | 4.493 | 4.493 |
| 1.3. Kantina, skúlaheim o.l. | 2.473 | 2.521 | 2.500 | 2.575 | 2.575 | 2.575 |
| 2. Undirvísingarvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 2.1. Gymnasialt miðnám | 7.202 | 7.525 | 7.150 | 8.265 | 8.265 | 8.265 |
| 2.2 Yrkisnám | 11.457 | 11.948 | 12.707 | 13.206 | 13.206 | 13.206 |
| **B: Virksemi (tal)** | **179** | **164** | **195** | **180** | **180** | **180** |
| 2.1. Gymnasialt miðnám (ársnæmingar) | 73 | 74 | 75 | 80 | 80 | 80 |
| 2.2. Yrkisnám (ársnæmingar) | 106 | 90 | 120 | 100 | 100 | 100 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | **150.743** | **170.494** | **167.812** | **173.839** | **173.839** | **173.839** |
| 1. Leiðsla o.a., kostnaður fyri hvønn næming, uttan 1.3 | 46.503 | 51.756 | 54.343 | 54.556 | 54.556 | 54.556 |
| 2. Undirvísing, kostnaður fyri hvønn næming | 104.240 | 118.738 | 113.469 | 119.283 | 119.283 | 119.283 |

**Starvsfólkayvirlit: 26 Tekniski skúli í Klaksvík**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 45,0 | 47,0 | 44,0 | 45,0 | 45,0 | 45,0 |
| Fulltíðarstørv | 46,0 | 48,0 | 45,0 | 46,0 | 46,0 | 46,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 23,7 | 24,5 | 26,7 | 28,6 | 28,6 | 28,6 |

**Virksemisyvirlit: 27 Miðnám í Vestmanna**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **7.868** | **8.827** | **8.825** | **9.588** | **9.888** | **10.088** |
| 1. Stuðulsvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 1.1. Leiðsla, fyrisiting, búskapur, KT o.l. | 1.529 | 2.052 | 1.850 | 2.028 | 2.028 | 2.028 |
| 1.2. Húsaumsiting, reingerð o.l. | 500 | 550 | 563 | 589 | 589 | 589 |
| 2. Undirvísingarvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 2.1. Gymnasialt miðnám | 5.098 | 5.375 | 5.462 | 6.071 | 6.071 | 6.071 |
| 2.2. Yrkisnám | 741 | 850 | 950 | 900 | 1.200 | 1.400 |
| **B: Virksemi (tal)** | **61** | **72** | **75** | **79** | **83** | **85** |
| 2.1. Gymnasialt miðnám (ársnæmingar) | 59 | 62 | 63 | 63 | 63 | 63 |
| 2.2. Yrkisnám (ársnæmingar) | 2 | 10 | 12 | 16 | 20 | 22 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | **128.983** | **122.597** | **117.666** | **121.368** | **119.132** | **118.682** |
| 1. Stuðulsvirksemi, kr. pr. ársnæming | 33.262 | 36.139 | 32.173 | 33.127 | 31.530 | 30.788 |
| 2. Undirvísingarvirksemi, kr. pr. ársnæming | 95.721 | 86.458 | 85.493 | 88.241 | 87.602 | 87.894 |

**Starvsfólkayvirlit: 27 Miðnám í Vestmanna**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 12,0 | 13,0 | 13,0 | 13,5 | 14,0 | 14,5 |
| Fulltíðarstørv | 12,0 | 13,0 | 13,0 | 13,5 | 14,0 | 14,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 6,6 | 7,7 | 7,9 | 8,6 | 8,9 | 9,1 |

**Virksemisyvirlit: 28 Felags fyri miðnámsskúlar**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.) -** | **8.972** | **7.636** | **10.935** | **10.409** | **7.459** | **7.459** |
| 0 Ógreinað | 59 | 114 | 1.795 | 2.950 | 0 | 0 |
| 510 Umsitingarskipan | 730 | 838 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 520 Serkøn ráðgeving og tænastur | 145 | 49 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 530 Kunning og tilfar | 315 | 98 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 540 Sernámsfrøði, miðfirrað | 1.800 | 1.733 | 1.800 | 0 | 0 | 0 |
| 541 Sernámsfrøði, umsókn | - | - | - | 409 | 409 | 409 |
| 542 Sernámsfrøði, teknmálstulking | 127 | 67 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| 550 Endurgjald Langtíðarsjúka o.l. | 0 | 0 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| 560 Námsfrøðilig útbúgving | 4.867 | 3.885 | 5.500 | 5.500 | 5.500 | 5.500 |
| 570 Serbreyt | 641 | 363 | 400 | 400 | 400 | 400 |
| 601 Føroyskt sum annaðmál | 288 | 489 | 440 | 0 | 0 | 0 |
| 602 ÍSF úrvalsnæmingar | - | - | 200 | 350 | 350 | 350 |

**Virksemisyvirlit: 30 Heilsuskúli Føroya**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **7.930** | **8.742** | **9.351** | **10.684** | **11.034** | **11.034** |
| 1. Stuðulsvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 1.1. Leiðsla, fyrisiting, búskapur, KT o.l. | 1.649 | 1.800 | 1.750 | 1.811 | 1.811 | 1.811 |
| 1.2. Húsaumsiting, reingerð o.l. | 100 | 125 | 100 | 110 | 110 | 110 |
| 2. Undirvísingarvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 2.2. Yrkisnám | 6.181 | 6.817 | 7.501 | 8.763 | 9.113 | 9.113 |
| **B: Virksemi (tal)** | **76** | **72** | **60** | **70** | **80** | **80** |
| 2.2. Yrkisnám (ársnæmingar) | 76 | 72 | 60 | 70 | 80 | 80 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | **104.342** | **121.417** | **155.850** | **152.629** | **137.926** | **137.926** |
| 1. Stuðulsvirksemi, kr. pr. ársnæming | 23.013 | 26.736 | 30.833 | 27.443 | 24.013 | 24.013 |
| 2. Undirvísingarvirksemi, kr. pr. ársnæming | 81.329 | 94.681 | 125.017 | 125.186 | 113.913 | 113.913 |

**Starvsfólkayvirlit: 30 Heilsuskúli Føroya**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 12,6 | 13,4 | 13,8 | 14,3 | 14,8 | 14,8 |
| Fulltíðarstørv | 12,6 | 13,4 | 13,8 | 14,3 | 14,8 | 14,8 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 7,1 | 7,7 | 8,6 | 10,0 | 10,3 | 10,3 |

**Virksemisyvirlit: 31 Glasir, Skúladepilin í Marknagili**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **139.623** | **139.711** | **143.425** | **145.383** | **147.383** | **147.383** |
| 1. Stuðulsvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 1.1. Leiðsla, fyrisiting, búskapur, KT o.l. | 20.958 | 17.246 | 28.000 | 29.025 | 29.025 | 29.025 |
| 1.2. Húsaumsiting, reingerð o.l. | 13.493 | 6.633 | 12.000 | 12.439 | 12.439 | 12.439 |
| 1.3. Kantina, skúlaheim o.l. | 6.880 | 4.339 | 2.500 | 2.592 | 2.592 | 2.592 |
| 2. Undirvísingarvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 2.1. Gymnasialt miðnám | 62.483 | 75.296 | 65.315 | 66.414 | 66.414 | 66.414 |
| 2.2. Yrkisnám | 31.510 | 30.985 | 30.900 | 32.031 | 32.031 | 32.031 |
| 2.3. Stuttar framhaldsútbúgvingar | 4.299 | 5.212 | 4.710 | 2.882 | 4.882 | 4.882 |
| **B: Virksemi (tal)** | **1.236** | **1.190** | **1.136** | **1.143** | **1.158** | **1.158** |
| 2.1. Gymnasialt miðnám (ársnæmingar) | 926 | 915 | 883 | 915 | 915 | 915 |
| 2.2. Yrkisnám (ársnæmingar) | 218 | 196 | 193 | 193 | 193 | 193 |
| 2.3. Stuttar framhaldsútbúgvingar (ársnæmingar) | 92 | 79 | 60 | 35 | 50 | 50 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | **107.397** | **113.758** | **124.053** | **124.926** | **125.036** | **125.036** |
| 1. Stuðulsvirksemi, kr. pr. ársnæming, uttan 1.3. | 27.873 | 20.066 | 35.211 | 36.276 | 35.807 | 35.807 |
| 2. Undirvísingarvirksemi, kr. pr. ársnæming | 79.524 | 93.692 | 88.842 | 88.650 | 89.229 | 89.229 |

**Starvsfólkayvirlit: 31 Glasir, Skúladepilin í Marknagili**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 4,0 | 5,0 | 4,0 | 4,0 | 4,0 | 4,0 |
| Onnur | 209,0 | 210,5 | 216,0 | 213,0 | 216,0 | 216,0 |
| Fulltíðarstørv | 213,0 | 215,5 | 220,0 | 217,0 | 220,0 | 220,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 117,5 | 119,1 | 122,3 | 124,0 | 126,0 | 126,0 |

**Virksemisyvirlit: 32 Miðnám á Kambsdali**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **51.449** | **54.603** | **56.618** | **57.869** | **58.469** | **58.469** |
| 1. Stuðulsvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 1.1. Leiðsla, fyrisiting, búskapur, KT o.l. | 9.008 | 10.478 | 10.125 | 10.368 | 10.368 | 10.368 |
| 1.2. Húsaumsiting, reingerð o.l. | 4.479 | 4.984 | 6.400 | 6.554 | 6.554 | 6.554 |
| 1.3. Kantina, skúlaheim o.l., uttan 1.3 | 1.426 | 1.241 | 1.200 | 1.229 | 1.229 | 1.229 |
| 2. Undirvísingarvirksemi | - | - | - | - | - | - |
| 2.1. Gymnasialt miðnám | 34.952 | 36.525 | 37.468 | 38.276 | 38.876 | 38.876 |
| 2.2. Yrkisnám | 1.317 | 1.300 | 1.350 | 1.365 | 1.365 | 1.365 |
| 2.3. Stuttar framhaldsútbúgvingar | 267 | 75 | 75 | 77 | 77 | 77 |
| **B: Virksemi (tal)** | **469** | **481** | **479** | **474** | **479** | **479** |
| 2.1. Gymnasialt miðnám (ársnæmingar) | 452 | 461 | 457 | 452 | 457 | 457 |
| 2.2. Yrkisnám (ársnæmingar) | 12 | 15 | 17 | 17 | 17 | 17 |
| 2.3. Stuttar framhaldsútbúgvingar (ársnæmingar) | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | **106.659** | **110.940** | **115.695** | **119.493** | **119.499** | **119.499** |
| 1. Leiðsla o.a., kostnaður fyri hvønn næming | 28.757 | 32.146 | 34.499 | 35.700 | 35.328 | 35.328 |
| 2. Undirvísing, kostnaður fyri hvønn næming | 77.902 | 78.794 | 81.196 | 83.793 | 84.171 | 84.171 |

**Starvsfólkayvirlit: 32 Miðnám á Kambsdali**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 82,0 | 85,5 | 86,0 | 85,5 | 87,0 | 87,0 |
| Fulltíðarstørv | 83,0 | 86,5 | 87,0 | 86,5 | 88,0 | 88,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 44,5 | 47,3 | 49,7 | 50,9 | 51,5 | 51,5 |

## 7.23.3.07. Tekniski skúli í Klaksvík (Løgujáttan)

Landsverk gjørdi í 2021 eina støðulýsing av Tekniska skúla í Klaksvík. Í henni var víst á, at tørvur er á bráðfeingis takumvælingum á skúlanum, ið er nógv plágaður av lekum. Talan er um umbygging av tekju á MAT-bygninginum, betran av frárensli á tekjuni á HT-bygninginum, umframt at takpapp er í sera ringum standi á stórum parti av skúlanum. Kostnaðurin fyri takumvælingina varð mettur at verða 8,9 mió. kr., íroknað prosjektering og eftirlit.

Rættarmál um tekjuna á MAT-bygninginum var í gongd, og seinkaði tað arbeiðinum við at seta umvælingina av tekjuni í gongd. Arbeiðið við umvæling av tekjum varð í høvuðsheitum liðugt í 2022.

Tekniska skúla í Klaksvík tørvar eitt savningarstað í skúlanum, har bæði næmingar, lærarar, starvsfólk og onnur atknýtt kunnu savnast saman til samkomur, fyrilestrar, prógvhandanir og onnur tiltøk, sum eru vanlig og umráðandi í einum nútímans skúla. Í 2021 vórðu 1,2 mió. kr. settar av til fyrireiking og prosjektering av einari aulu til skúlan og 2 mió. kr. í 2022. Landsverk skipaði í 2022 fyri eini arkitektakapping um aulu til skúlan, og vinnari av kappingini varð funnin. Næsta stig í verkætlanini er prosjekteringsarbeiðið, sum nú er í gongd. Ein ráðgevarasáttmáli varð í hesum sambandi undirskrivaður við vinnandi fyritøkuna, og ráðgevaratoymi er nú í holt við at prosjektera høvuðsprosjekt. Fyri at fullføra arbeiðið vórðu 200 tús. kr. játtaðar afturat til prosjekteringina av auluni við eykajáttan í 2022, soleiðis at samlaða játtanin til auluna er 3,4 mió. kr.

Tá prosjekteringin av auluni er liðug um ársskiftið 2023/24, er næsta stig at bjóða byggingina út, og síðani leggja eina verklagslóg fyri Løgtingið. Í 2024 er eingin játtan til at halda fram við verkætlanini, og tí verður verkætlanin fyribils ikki boðin út. Landsverk mælir til, sum eitt tað fyrsta stigið, at fara undir jørð-, lendis- og kloakkarbeiðið fyri seg og hareftir bygningsarbeiðið, sum so kann bjóðast út fyri seg.

Í 2023 eru játtaðar 2,2 mió. kr. til eina ventilatiónsskipan til timburdeildina. Umframt framfluttar 5,1 mió. kr. eru tí 7,3 mió. kr. tøkar í 2023. Nýtslan í 2023 verður mett til 6,8 mió. kr. til ventilatiónsskipanina og til at gera projekteringina av auluni lidna fram til útboð. Framfluttar verða sostatt 0,5 mió. kr. Ongin játtan er fyri 2024. Tøkar í 2024 verða sostatt 0,5 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 775 | 6.472 | 2.200 | - | - | - |
| **10. Tekniski skúli í Klaksvík** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **775** | **6.472** | **2.200** | **-** | **-** | **-** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -65 | -280 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 775 | 6.472 | 2.200 | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 65 | 280 | - | - | - | - |

## 7.23.3.09. Skúladepil við Marknagil (Løgujáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 43 frá 26. mai 2008 um at byggja skúladepil í Tórshavn, við seinni broytingum, skal nýggi skúladepilin, sum hevur fingið heitið Glasir, hýsa virkseminum hjá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, Tekniska skúla í Tórshavn og Føroya handilsskúla í Tórshavn. Byggikostnaðurin varð upprunaliga ásettur at verða í mesta lagi 391 mió. kr. Roknað varð harumframt við 60 mió. kr. til útgerð og innbúgv.

Í mars 2013 varð broytingaruppskot samtykt í Løgtinginum, har samlaði byggikostnaðurin varð dagførdur at verða 515 mió. kr., harav tað fóru at verða nýttar 60 mió. kr. til útgerð, innbúgv og list.

Farið varð undir at byggja Glasir í apríl 2013. Í 2017 varð játtanin hækkað við 8 mió. kr., ætlaðar til eina grøna orkuloysn. Harafturat varð játtanin hækkað við 50 mió. kr. í 2017, og játtaðar vórðu 63,5 mió. kr. í 2018 til liðugtgerð, undirvísingaramboð og flagtekju. Verklagslógin varð samsvarandi dagførd við hækking á 113,5 mió. kr., soleiðis at samlaði byggikostnaðurin varð 636,5 mió. kr. Í mun til verklagslógina varð stór meirnýtsla á 60,5 mió. kr. staðfest í 2018.

Í 2019 vóru 23,9 mió. kr. játtaðar til liðugtgerð av byggiverkætlanini og ymiskar tillagingar í bygninginum sambært nærri ásettari ætlan. Tað var tann mest átrokandi parturin. Nýggj verklagslóg fyri liðugtgerðina av skúladeplinum varð gjørd.

Í 2020 varð dómur sagdur í gerðarrættarmálinum millum Landsverk og TG-Verk. Landsverk skuldi gjalda ein netto mun á 7,4 mió. kr., rentur íroknaðar. Upphæddin varð goldin í 2020 av løgujáttanini til Glasir, ið eykajáttan varð givin til. Í 2020 fekk Glasir eisini eykajáttan á 6 mió. kr. til útstoypingar millum betong elementir, sum ikki vóru útstoypt eftir krøvunum í verkætlanartilfarinum. Tann verkætlanin skuldi fara í gongd í desember 2020, men av tí at útreiðslurnar í gerðarrættarmálinum gjørdust 1,2 mió. kr. størri enn upprunaliga mett, varð neyðugt at bíða við útstoypingunum. Eykajáttan á 1,2 mió. kr. til írestandi peningin til útstoypingarnar varð samtykt á vári 2021. Arbeiðið við útstoypingunum er framt.

Í 2024 er eingin játtan til endamálið.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 7.440 | 28 | - | - | - | - |
| Inntøkur | - | 28 | - | - | - | - |
| **10. Skúladepil við Marknagil** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **7.440** | **28** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -220 | -58 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 7.440 | - | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 220 | 86 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **28** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *28* | - | - | - | - |

## 7.23.3.13. Fab Lab (Rakstrarjáttan)

Játtanin er til at reka talgildar verkstaðir, sum eru knýttir at skúlum í Føroyum. Talgildu verkstøðini eru skipaði sum Fab Lab (Fabrication Laboratory). Eitt Fab Lab er eitt alment stað, sum er opið, tá ið skúlin er opin, og til ber eisini at leiga seg inn. Brúkarar eru næmingar, barnagarðar, vinnulív og einstaklingar. Eisini verður skipað fyri skeiðsvirksemi, t.d. í samstarvi við frítíðarundirvísing.

### Undirkonta 20. Fab Lab á Kambsdali

Fab Lab hevur verið knýtt at Miðnámsskúlanum á Kambsdali seinnu árini. Skúlin skipar raksturin, og eru hálvtannað starvsfólk knýtt at Fab Lab. Kommunur í økinum lata rakstrarstuðul, sum svarar til umleið helvtini av rakstrinum.

### Undirkonta 21. Fab Lab í Vági

Fólkaskúlin í Vági lat Fab Lab upp fyri nøkrum árum síðani. Eitt starvsfólk er í starvi á Fab Lab. Í 2024 eru játtaðar 419 tús. kr. til, at landið kann fíggja umleið helvtina av rakstrinum, eins og við Fab Lab á Kambsdali.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 418 | 883 | 1.155 | 1.180 | 1.180 | 1.180 |
| Útreiðslur | 787 | 1.202 | 1.475 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| Inntøkur | 368 | 319 | 320 | 320 | 320 | 320 |
| **20. Fab Lab á Kambsdali** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 418 | 483 | 739 | 761 | 761 | 761 |
| **Útreiðslur** | **787** | **802** | **1.059** | **1.081** | **1.081** | **1.081** |
| 11. Lønir v.m. | 675 | 688 | 909 | 931 | 931 | 931 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 55 | 114 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 56 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **368** | **319** | **320** | **320** | **320** | **320** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *12* | *19* | *20* | *20* | *20* | *20* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *56* | - | - | - | - | - |
| 77. Flyting frá kommunum | *300* | *300* | *300* | *300* | *300* | *300* |

**21. Fab Lab í Vági**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | - | 400 | 416 | 419 | 419 | 419 |
| **Útreiðslur** | **-** | **400** | **416** | **419** | **419** | **419** |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | - | 400 | 416 | 419 | 419 | 419 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Fab Lab á Kambsdali**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 1,0 | 1,0 | 1,5 | 1,5 | 1,5 | 1,5 |
| Fulltíðarstørv | 1,0 | 1,0 | 1,5 | 1,5 | 1,5 | 1,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 0,7 | 0,7 | 0,9 | 0,9 | 0,9 | 0,9 |

## 7.23.5. Fólkaupplýsing

### 7.23.5.01. Fólkaháskúlar (Stuðulsjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 101 frá 1. desember 1978 um studning til fólkaháskúlar, við seinni broytingum, verður studningur latin fólkaháskúlum, har høvuðsendamalið er at læra ungdómin føroyskt mál, siðmenning og føroyska mentan og at vekja ans hjá ungdóminum fyri andligum virðum, ítrótti og rørslu. Háskúlar kunnu eisini leggja dent á einstakar lærugreinir, men eru ikki próvtøkuskúli. Býtið av játtanini á undirkontur er vegleiðandi, og til ber at flyta ímillum í mun til upptøku av næmingum.

**Undirkonta 20. Føroya Fólkaháskúli**
Fólkaháskúlin er sjálvsognarstovnur. Ætlanin við skúlanum er at vekja ans fyri andligum og kropsligum mentum og at menna føroyska sjálvsfatan og føroyskt medvit.

Stuðulin til skúlan verður latin eftir umsókn og verður útgoldin ákontu. Roknskapur verður latin Undirvísingarstýrinum eftir lokið fíggjarár.

**Undirkonta 21. Ítróttaháskúlin í Suðuroy**
Ítróttaháskúlin er sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er at veita ungdóminum kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu og persónligu menningini.

Ítróttaháskúlin bjóðar undirvísing í føroyskum, fremmanda máli, ítrótti, list og mentan.

Stuðulin til skúlan verður latin eftir umsókn og verður útgoldin ákontu. Roknskapur verður latin Undirvísingarstýrinum eftir lokið fíggjarár.

**Undirkonta 22. Háskúlatilboð innan vistgrøði á Sandoynni**
Skúlin byrjaði virksemið í august 2019 undir navninum Mat- og moldmentanarháskúlin.

Skúlin hevur til endamáls at kanna og menna okkara evni at liva eitt frælst, vakurt, stuttligt, sterkt, livandi, andaligt, ríkt og sjálvstøðugt lív, í burðardyggum samspæli við alt livandi í okkara nær- og fjarumhvørvi. Játtanin er tillagað í mun til virksemi í skúlanum.

Skúlin valdi at fara í ein steðg summarið 2022, og hava ongir næmingar verið á skúlanum síðani. Ongin játtan er fyri 2024. Skúlin arbeiðir framvegis við at fáa skipað virksemi.

**Undirkonta 23. Háskúlin í Nesvík**
Ætlanir eru um at byrja háskúla í Nesvík. Tað er Heimamissiónin, sum ætlar at skipa háskúlavirksemi í Leguhúsinum.

Háskúlin hevur til endamáls at vekja ans hjá næmingum fyri andaligum, málsligum og siðmennandi virðum umframt likamligari rørslu, ítrivi og øðrum.

Skúlin fekk í 2022 játtan til at byrja virksemi, men eingi kravd longri skeið vóru. Fyrireikingar hildu á fram og ætlanin var at byrja í august 2023, men nóg nógvar tilmeldingar vóru ikki til longra skeiðið. Ongin játtan er fyri 2024. Skúlin arbeiðir framvegis við at fáa skipað virksemi.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 10.745 | 10.657 | 13.315 | 9.611 | 9.611 | 9.611 |
| **20. Føroya Fólkaháskúli** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **3.239** | **3.596** | **3.745** | **3.791** | **3.791** | **3.791** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 235 | 195 | 364 | 364 | 364 | 364 |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 3.004 | 3.402 | 3.381 | 3.427 | 3.427 | 3.427 |
| **21. Ítróttaháskúlin í Suðuroy** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **4.891** | **4.941** | **5.670** | **5.820** | **5.820** | **5.820** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 930 | 900 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 3.961 | 4.041 | 4.670 | 4.820 | 4.820 | 4.820 |
| **22. Háskúlatilboð innan vistgrøði á Sandoynni** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.615** | **1.720** | **1.350** | **-** | **-** | **-** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 84 | 74 | 100 | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2.531 | 1.646 | 1.250 | - | - | - |
| **23. Háskúlin í Nesvík** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **400** | **2.550** | **-** | **-** | **-** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | - | 150 | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | 400 | 2.400 | - | - | - |

## 7.23.5.04. Húsarhaldsskúlar (Stuðulsjáttan)

Húsarhaldsskúli Føroya er sjálvsognarstovnur, ið verður rikin sambært løgtingslóg nr. 66 frá 13. mai 1992 um húsarhaldsskúlar, við seinni broytingum.

Skúlin hevur árligt skeið, sum er 26 vikur frá august til februar og fleiri stutt skeið frá mars til juni mánað. Pláss er fyri 21 næmingum í skúlanum. Skúlin fær stuðul til virksemið sambært § 11 í lógini. Næmingastuðul verður játtaður á sama rakstrarstaði sum stuðulin til skúlan.

Eftir ætlan letur nýggjur Húsarhaldsskúli upp í 2025. Virksemið í 2025 og frameftir er tillaga hesum.

Stuðulin til skúlan verður latin eftir umsókn og verður útgoldin ákontu. Roknskapur verður latin Undirvísingarstýrinum eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 2.874 | 2.815 | 3.411 | 3.505 | 5.511 | 5.511 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.874** | **2.815** | **3.411** | **3.505** | **5.511** | **5.511** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 294 | 294 | 294 | 294 | 494 | 494 |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2.580 | 2.521 | 3.117 | 3.211 | 5.017 | 5.017 |

## 7.23.5.05. Húsarhaldsskúlin í Klaksvík, løgustuðul (Stuðulsjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 66 frá 13. mai 1992 um húsarhaldsskúlar, við seinni broytingum, kann Barna- og útbúgvingarmálaráðið eftir landsstýrisins góðkenning veita stuðul sum rentu- og avdráttarfrí lán til keyp av húsum ella til bygging ella umbygging av húsum til húsarhaldsskúla.

Sjálvsognarstovnurin Húsarhaldsskúli Føroya søkti í 2016 um stuðul til at byggja nýggjan húsarhaldsskúla í Klaksvík. Verkætlanin skuldi í mesta lagi kostað 67 mió. kr., íroknað mvg. Við heimild í løgtingslóg nr. 68 frá 9. mai 2019 um studningslán til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík, við seinni broytingum, gav Barna- og útbúgvingarmálaráðið sjálvsognarstovninum eina treytaða tilsøgn um stuðul áljóðandi 21 mió. kr. sum rentu- og avdráttarfrítt lán. Klaksvíkar kommuna gav somuleiðis skúlanum eina treytaða tilsøgn um stuðul, umframt at Bústaðir skuldi fíggja tilhoyrandi vistarpartin av skúlanum.

Aftaná at Húsarhaldsskúlin hevði havt byggingina av nýggja skúlanum í útboði, og skúlin saman við ráðgevanum hevði gjøgnumgingið tilboðini, umframt at tillagingar vóru gjørdar í verkætlanini, verður samlaði kostnaðurin væl hægri, enn upprunaliga mett. Sambært skúlanum verður kostnaðurin tilsamans 85,6 mió. kr., íroknað mvg.

Húsarhaldsskúlin heitti tí á Barna- og útbúgvingarmálaráðið um at hækka stuðulin til byggingina. Barna- og útbúgvingarmálaráðið umrøddi spurningin um fígging og býti av meirkostnaðinum við Bústaðir, Klaksvíkar kommunu og Húsarhaldsskúlan. Bústaðir fíggja partin av meirkostnaðinum fyri búeindina, men býráðstilsøgnin hjá Klaksvíkar kommunu á 21 mió. kr. í stuðli til skúlapartin er óbroytt. Landskassin átekur sær at fíggja restina upp til 85,6 mió. kr., ið svarar til 16 mió. kr.

Galdandi heimildarlóg er tí broytt við løgtingslóg nr. 114 frá 5. august 2022, har tað er ásett, at stuðulin úr landskassanum er í mesta lagi 37,3 mió. kr. Av hesi upphædd eru á leið 300 tús. kr. ætlað til tinglýsingaravgjald, ið landið skal rinda.

Harumframt er galdandi heimildarlóg broytt soleiðis, at landsstýrismaðurin fær heimild til at játta í mesta lagi 5 mió. kr., tó ikki meira enn 50% av veruligu útreiðslunum, sum stuðul úr landskassanum til keyp av innbúgvi og útbúnaði, sum Húsarhaldsskúlin hevur tørv á.

Árini 2019-2023 eru 28 mió. kr. játtaðar til endamálið. Í 2024 verða 14,3 mió. kr. játtaðar til bygging av nýggja húsarhaldsskúlanum, tað er íroknað tinglýsingaravgjald og innbúgv og útbúnaður.

Húsarhaldsskúlin og arbeiðstakarin hava skrivað undir arbeiðstakarasáttmála, og byggingin er í gongd.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 8.750 | 4.000 | 9.250 | 14.300 | - | - |
| **01. Húsarhaldsskúlin í Klaksvík, løgustuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **8.750** | **4.000** | **9.250** | **14.300** | **-** | **-** |
| 55. Íløgustuðul o.a. | 8.750 | 4.000 | 9.250 | 14.300 | - | - |

## 7.23.5.07. Frítíðarundirvísing (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir frítíðarundirvísingini er løgtingslóg nr. 70 frá 30. juni 1983 um frítíðarundirvísing v.m., við seinni broytingum. Játtanin er ætlað til at veita kommunum stuðul til at seta í verk frítíðarundirvísing, til skeið fyri lærarum í frítíðarundirvísingini, til útgerð, til at skipa fyri landsumfatandi frítíðarundirvísing og umboðan til at fyrisita játtanina til frítíðarundirvísing.

### Undirkonta 20. Vanligt virksemi

Barna- og útbúgvingarmálaráðið játtar kommunum stuðul við grundarlagi í innsendum umsóknum, íbúgvartali og játtanini. Kommunurnar rinda lønina hjá lærarum og leiðarum og góðkenna einstøku skeiðini innan almenna frítíðarundirvísing, frítiðarvirksemi og serundirvísing. Endurgjaldið hjá landinum er 50% fyri almenna frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi og 100% til serundirvísing. Landið rindar 100% fyri serstaka frítíðarundirvísing, sum í høvuðsheitum fatar um próvtøkur fólkaskúlans, dugnaskapsroyndir, HF-stakgreinalestur og yrkiskeið innan landbúnað. Kommunurnar lata Barna- og útbúgvingarmálaráðnum uppgerð hvørt hálvár, og verður stuðulin útgoldin við grundarlagi í hesum uppgerðum og í samsvari við játtaða stuðulin.

### Undirkonta 21. Undirvísing í føroyskum sum annaðmál

Undirvísingin í føroyskum sum annaðmál verður skipað sambært § 15, stk. 2 í lógini sum landsumfatandi frítíðarundirvísing v.m. og løgd til rættis sambært CEFR skipanini, sum fatar um tríggjar útbúgvingar, Føroyskt sum annaðmál 1, 2 og 3, sum aftur eru býtt í stigini, Undan A1, A1, A2, A2+, B1, B2 og C1.

Undirvísingin verður samskipað landafrøðiliga í 4-5 høvuðsøkjum. Tímajáttanin verður játtað einum øki í mun til, hvussu nógv stig undirvíst verður á hvørt skúlaár, men tað er tó tengt at framstigunum, ið næmingarnir gera og játtanini, tí at hvørt stig fatar um 300 tímar og endar við roynd, sum næmingarnir skulu lúka fyri at koma á næsta stig.

Umframt útbúgving í føroyskum sum annaðmál (FSA) í trimum til fimm støðum í Føroyum, verður tað á fleiri kvøldskúlum skipað fyri styttri skeiðum í føroyskum fyri tilflytarar. Miðað verður eftir, at styttru skeiðini enda við visitatión í mun til útbúgvingina í føroyskum sum annaðmál. Tey styttru málskeiðini verða eisini fyriskipað sum landsumfatandi frítíðarundirvísing.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 7.348 | 8.210 | 10.131 | 10.381 | 10.381 | 10.381 |
| Útreiðslur | 7.348 | 8.263 | 10.131 | 10.381 | 10.381 | 10.381 |
| Inntøkur | - | 53 | - | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 5.932 | 5.978 | 6.303 | 6.303 | 6.303 | 6.303 |
| **Útreiðslur** | **5.932** | **5.978** | **6.303** | **6.303** | **6.303** | **6.303** |
| 11. Lønir v.m. | 251 | 28 | 333 | 333 | 333 | 333 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1 | - | 10 | 10 | 10 | 10 |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 39 | - | - | - | - | - |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 5.641 | 5.950 | 5.960 | 5.960 | 5.960 | 5.960 |
| **21. Undirvísing í føroyskum fyri fremmandmælt** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 1.416 | 2.232 | 3.828 | 4.078 | 4.078 | 4.078 |
| **Útreiðslur** | **1.416** | **2.285** | **3.828** | **4.078** | **4.078** | **4.078** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 11 | - | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 53 | - | - | - | - |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 1.406 | 2.232 | 3.828 | 4.078 | 4.078 | 4.078 |
| **Inntøkur** | **-** | **53** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *53* | - | - | - | - |

## 7.23.5.10. Musikkskúlar (Rakstrarjáttan)

Skipaða musikkskúlaundirvísingin í Føroyum virkar eftir løgtingslóg nr. 83 frá 29. mai 2017 um musikkskúlaskipan. Lærararnir eru settir hjá landinum, og musikkskúlarnir eru kommunalir/interkommunalir. Musikkskúlastjórin hevur námsfrøðiligu ábyrgdina og samskipar undirvísingina.

Landið rindar løn til musikkskúlastjóran og meginfyrisiting, ferðing hjá musikkskúlalærarum og 50% av musikkskúlalæraralønum. Játtanin fer eisini til at stuðla ymisk royndar-, menningar- og trivnaðartiltøk í Musikkskúlaskipanini.

Landið umsitur og avgreiðir lønir til musikkskúlalærarar, og kommunan endurrindar landinum 50% av musikkskúlalæraralønum.

Umframt lønarframskriving verður nettojáttanin fyri 2024 framskrivað við 700 tús. kr. til økt virksemi.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 15.952 | 17.386 | 18.354 | 19.735 | 19.735 | 19.735 |
| Útreiðslur | 29.947 | 32.373 | 34.627 | 37.129 | 37.129 | 37.129 |
| Inntøkur | 13.995 | 14.987 | 16.273 | 17.394 | 17.394 | 17.394 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 15.952 | 17.386 | 18.354 | 19.735 | 19.735 | 19.735 |
| **Útreiðslur** | **29.947** | **32.373** | **34.627** | **37.129** | **37.129** | **37.129** |
| 11. Lønir v.m. | 28.796 | 31.064 | 33.487 | 35.729 | 35.729 | 35.729 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.145 | 1.291 | 1.090 | 1.350 | 1.350 | 1.350 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 5 | - | 10 | 10 | 10 | 10 |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | 2 | 30 | 30 | 30 | 30 |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2 | 16 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | - | 10 | 10 | 10 | 10 |
| **Inntøkur** | **13.995** | **14.987** | **16.273** | **17.394** | **17.394** | **17.394** |
| 77. Flyting frá kommunum | *13.995* | *14.987* | *16.273* | *17.394* | *17.394* | *17.394* |

**Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **29.947** | **32.373** | **34.627** | **37.129** | **37.129** | **37.129** |
| 1. Leiðsla, skrivstova, ferðing lærarar o.a. | 1.960 | 2.080 | 2.150 | 2.090 | 2.090 | 2.090 |
| 2. Musikkundirvísing | 27.987 | 30.293 | 32.477 | 35.039 | 35.039 | 35.039 |
| **B: Virksemi (tal)** | | | | | | |
| 2. Musikkundirvísing (næmingar) | 2.300 | 2.300 | 2.350 | 2.380 | 2.380 | 2.380 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| 2. Musikkundirvís. (kostn. fyri hvønn næming) | 12.168 | 13.170 | 13.820 | 14.722 | 14.722 | 14.722 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 56,2 | 58,0 | 60,0 | 60,0 | 60,0 | 60,0 |
| Fulltíðarstørv | 56,2 | 58,0 | 60,0 | 60,0 | 60,0 | 60,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 28,8 | 31,1 | 33,5 | 35,7 | 35,7 | 35,7 |

## 7.23.5.13. Felagið fyri lesi- og skriviveik (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at veita ein árligan stuðul til Felagið fyri lesi- og skriviveik, ið hevur sum endamál at hjálpa og stuðla teimum, ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.

Árligi stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, og verður goldin felagnum hvønn ársfjórðing. Roknskapur verður latin Undirvísingarstýrinum eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 2.600 | 2.600 | 2.600 | 2.400 | 2.400 | 2.400 |
| **01. Felagið fyri lesi- og skriviveik** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.600** | **2.600** | **2.600** | **2.400** | **2.400** | **2.400** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2.600 | 2.600 | 2.600 | 2.400 | 2.400 | 2.400 |

## 7.23.6. Hægri útbúgvingar og gransking

### 7.23.6.05. Maritimir skúlar (Rakstrarjáttan)

**Undirkonta 20. Vinnuháskúlin**
Skúlin er skipaður sambært løgtingslóg nr. 55 frá 24. apríl 2001 um útbúgving av manning á skipum o.ø. Undirvísingarvirksemið er skiparaútbúgving, skipsføraraútbúgving, maskinistútbúgving og maskinmeistaraútbúgving. Harumframt verða skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingarnar bjóðaðar út í aspirantskipan.

Eisini skipar skúlin fyri skeiðsvirksemi í sjóvinnu, eftirútbúgvingarskeiðum fyri maskinistar og maskinmeistarar og dugnaskaparskeiðum í sigling og motor. Flestu skeiðini eru kravd av IMO.

Umframt lønarframskriving verður játtanin lækkað 200 tús. kr.

**Undirkonta 22. Sjónám (Klaksvíkar sjómansskúli)**
Skúlin er skipaður sambært løgtingslóg nr. 55 frá 24. apríl 2001 um útbúgving av manning á skipum o.ø. Undirvísingarvirksemi skúlans er skiparaútbúgving (1½ ár) og útbúgving til skipsatstøðara, byrjanar- og endaskeið (6 mánaða skeið).

**Undirkonta 23. Sjónám (Trygdarmiðstøðin og skeiðsvirksemi)**
Trygdarmiðstøðin varð stovnað í 1999 sum sjálvstøðugur stovnur til at geva sjómonnum skeið og undirvísing í trygd á sjónum sambært løgtingslóg nr. 63 frá 3. juli 1998 um manning av skipum, við seinni broytingum. Flestu skeiðini eru kravd av IMO.

Umframt lønarframskriving verður inntøkan hækkað 100 tús. kr. vegna skeiðsvirksemi til alaralærlingar á Miðnám í Vestmanna.

**Undirkonta 30. Føroya Brandskúli**
Skúlin skipar fyri skeiðum í trygd á sjónum, sløkkiliðsútbúgvingum og skeiðum innan eldsløkking og roykkaving. Flestu skeiðini eru kravd av IMO.

Umframt lønarframskriving verður inntøkan hækkað 200 tús. kr.

**Undirkonta 40. Inntøkufíggjað virksemi**
Virksemið fevnir um sølu av skeiðum. Talan er um skeið at viðlíkahalda og endurnýggja førleikar hjá sjófólki. Flestu skeiðini eru kravd av IMO.

Umframt lønarframskriving verður inntøkan hækkað 100 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 29.078 | 29.515 | 30.310 | 30.851 | 30.851 | 30.851 |
| Útreiðslur | 40.707 | 39.989 | 40.839 | 41.780 | 41.780 | 41.780 |
| Inntøkur | 11.629 | 10.474 | 10.529 | 10.929 | 10.929 | 10.929 |
| **20. Vinnuháskúlin** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 23.818 | 23.122 | 23.691 | 24.207 | 24.207 | 24.207 |
| **Útreiðslur** | **25.054** | **24.148** | **25.101** | **25.617** | **25.617** | **25.617** |
| 11. Lønir v.m. | 18.019 | 18.412 | 19.862 | 20.378 | 20.378 | 20.378 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 4.419 | 3.922 | 3.204 | 3.204 | 3.204 | 3.204 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 1.469 | 1.101 | 1.580 | 1.580 | 1.580 | 1.580 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.148 | 682 | 455 | 455 | 455 | 455 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -0 | -0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 32 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **1.236** | **1.026** | **1.410** | **1.410** | **1.410** | **1.410** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.213* | *1.026* | *1.410* | *1.410* | *1.410* | *1.410* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *24* | - | - | - | - | - |
| **22. Sjónám (Klaksvíkar sjómansskúli)** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 3.601 | 3.408 | 3.676 | 3.784 | 3.784 | 3.784 |
| **Útreiðslur** | **3.659** | **3.642** | **3.786** | **3.894** | **3.894** | **3.894** |
| 11. Lønir v.m. | 2.445 | 2.689 | 2.992 | 3.100 | 3.100 | 3.100 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 872 | 685 | 724 | 724 | 724 | 724 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 45 | 36 | 20 | 20 | 20 | 20 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 54 | 52 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 243 | 179 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **58** | **234** | **110** | **110** | **110** | **110** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *52* | *77* | *110* | *110* | *110* | *110* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *6* | *3* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *154* | - | - | - | - |
| **23. Sjónám (Trygdarmiðstøðin og skeiðsvirksemi)** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 1.481 | 2.238 | 2.043 | 2.058 | 2.058 | 2.058 |
| **Útreiðslur** | **4.082** | **4.663** | **4.357** | **4.472** | **4.472** | **4.472** |
| 11. Lønir v.m. | 2.603 | 3.066 | 3.171 | 3.286 | 3.286 | 3.286 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.214 | 1.115 | 982 | 982 | 982 | 982 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 67 | 140 | 90 | 90 | 90 | 90 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 199 | 330 | 114 | 114 | 114 | 114 |
| 17. Avskrivingar o.a. | - | 12 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **2.601** | **2.425** | **2.314** | **2.414** | **2.414** | **2.414** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *2.251* | *2.070* | *2.314* | *2.414* | *2.414* | *2.414* |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | - | *4* | - | - | - | - |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *350* | *350* | - | - | - | - |

**30. Føroya Brandskúli**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 505 | 1.190 | 1.329 | 1.282 | 1.282 | 1.282 |
| **Útreiðslur** | **5.993** | **6.002** | **5.724** | **5.877** | **5.877** | **5.877** |
| 11. Lønir v.m. | 3.721 | 3.841 | 4.222 | 4.375 | 4.375 | 4.375 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.074 | 1.269 | 902 | 902 | 902 | 902 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 535 | 142 | 330 | 330 | 330 | 330 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 664 | 750 | 270 | 270 | 270 | 270 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -0 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **5.488** | **4.812** | **4.395** | **4.595** | **4.595** | **4.595** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *5.488* | *4.812* | *4.395* | *4.595* | *4.595* | *4.595* |

**40. Inntøkufíggjað virksemi**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | -328 | -443 | -429 | -480 | -480 | -480 |
| **Útreiðslur** | **1.919** | **1.535** | **1.871** | **1.920** | **1.920** | **1.920** |
| 11. Lønir v.m. | 1.234 | 1.031 | 1.351 | 1.400 | 1.400 | 1.400 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 543 | 464 | 320 | 320 | 320 | 320 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 140 | 40 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 2 | 0 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **2.246** | **1.978** | **2.300** | **2.400** | **2.400** | **2.400** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *2.246* | *1.978* | *2.300* | *2.400* | *2.400* | *2.400* |

**Virksemisyvirlit: 20 Vinnuháskúlin**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **25.054** | **24.148** | **25.101** | **25.617** | **25.617** | **25.617** |
| 1. Leiðsla, hjálparvirks., ikki flokksbýtt virks. | 9.276 | 9.070 | 9.415 | 9.604 | 9.604 | 9.604 |
| 2. Maskinistútbúgving | 752 | 362 | 764 | 779 | 779 | 779 |
| 3. Maskinmeistaraútbúgving | 8.427 | 7.741 | 7.850 | 8.007 | 8.007 | 8.007 |
| 4. Skiparar | 3.382 | 3.419 | 3.467 | 3.550 | 3.550 | 3.550 |
| 5. Skipsførarar | 3.217 | 3.556 | 3.605 | 3.677 | 3.677 | 3.677 |
| **B: Virksemi (tal)** | **197** | **183** | **205** | **199** | **199** | **199** |
| 2. Maskinistútbúgving (ársnæmingar) | 8 | 6 | 18 | 15 | 15 | 15 |
| 3. Maskinmeistaraútbúgving (ársnæmingar) | 109 | 107 | 107 | 106 | 106 | 106 |
| 4. Skiparar (ársnæmingar) | 40 | 37 | 40 | 42 | 42 | 42 |
| 5. Skipsførarar (ársnæmingar) | 40 | 33 | 40 | 36 | 36 | 36 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| 1. Fyri hvønn ársnæmingar tilsamans | 127.178 | 131.956 | 122.444 | 128.729 | 128.729 | 128.729 |
| 2. Maskinistútbúgving (fyri hv. ársnæming) | 94.000 | 60.333 | 42.444 | 51.933 | 51.933 | 51.933 |
| 3. Maskinmeistaraútbúgving (fyri hv. ársn.) | 77.312 | 72.346 | 73.364 | 75.538 | 75.538 | 75.538 |
| 4. Skiparar (fyri hv. ársnæming) | 84.550 | 92.405 | 86.675 | 84.524 | 84.524 | 84.524 |
| 5. Skipsførarar (fyri hv. ársnæming) | 80.425 | 107.758 | 90.125 | 102.139 | 102.139 | 102.139 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vinnuháskúlin**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 31,0 | 32,0 | 30,0 | 32,0 | 32,0 | 32,0 |
| Fulltíðarstørv | 32,0 | 33,0 | 31,0 | 33,0 | 33,0 | 33,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 18,0 | 18,4 | 19,9 | 20,4 | 20,4 | 20,4 |

**Virksemisyvirlit: 22 Sjónám (Klaksvíkar sjómansskúli)**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **3.659** | **3.642** | **3.786** | **3.894** | **3.894** | **3.894** |
| 1. Leiðsla, hjálparvirks., ikki flokksbýtt virks. | 1.108 | 1.120 | 1.180 | 1.165 | 1.165 | 1.165 |
| 2. Skiparar | 1.384 | 1.362 | 1.453 | 1.521 | 1.521 | 1.521 |
| 3. Fulltikin skipsatstøðarari | 1.167 | 1.160 | 1.153 | 1.208 | 1.208 | 1.208 |
| **B: Virksemi (tal)** | **13** | **13** | **22** | **22** | **22** | **22** |
| 2. Skiparar (ársnæmingar) | 9 | 9 | 12 | 12 | 12 | 12 |
| 3. Fulltikin skipsatstøðarari (ársn.) | 4 | 4 | 10 | 10 | 10 | 10 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| 1. Kostnaður fyri hvønn ársnæming | 281.462 | 280.154 | 169.045 | 177.000 | 177.000 | 177.000 |
| 2. Skiparar (kostnaður fyri hv. ársnæm.) | 153.778 | 151.333 | 121.083 | 126.750 | 126.750 | 126.750 |
| 3. Fulltikin skipsatstøðarar (kostn. fyri hv. ársn.) | 291.750 | 290.000 | 115.300 | 120.800 | 120.800 | 120.800 |

**Starvsfólkayvirlit: 22 Sjónám (Klaksvíkar sjómansskúli)**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 3,6 | 4,8 | 4,5 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| Fulltíðarstørv | 3,6 | 4,8 | 4,5 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 2,4 | 2,7 | 3,0 | 3,1 | 3,1 | 3,1 |

**Starvsfólkayvirlit: 23 Sjónám (Trygdarmiðstøðin og skeiðsvirksemi)**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 5,2 | 5,2 | 5,2 | 5,2 | 5,2 | 5,2 |
| Fulltíðarstørv | 5,2 | 5,2 | 5,2 | 5,2 | 5,2 | 5,2 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 2,6 | 3,1 | 3,2 | 3,3 | 3,3 | 3,3 |

**Starvsfólkayvirlit: 30 Føroya Brandskúli**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 7,1 | 7,1 | 7,1 | 7,1 | 7,1 | 7,1 |
| Fulltíðarstørv | 7,1 | 7,1 | 7,1 | 7,1 | 7,1 | 7,1 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 3,7 | 3,8 | 4,2 | 4,4 | 4,4 | 4,4 |

### 7.23.6.15. Fróðskaparsetur Føroya (Løgujáttan)

Játtanin er ætlað til universitetskampus til Fróðskaparsetur Føroya.

Í 2018 var ein arbeiðsbólkur settur at arbeiða við hølisviðurskiftum hjá Fróðskaparsetrinum, og í desember 2018 kom út ein strategisk menningarætlan fyri eitt savnað Fróðskaparsetur, staðsett millum J. C. Svabosgøta og Frælsið í Tórshavn.

Í 2022 var arbeitt við at gera byggiskrá og fyrireika arkitektakapping um felagsbygning og framtíðar útbygging. Arbeiðið dróg út, m.a. orsakað av nýggju støðuni, har virksemið hjá Fróðskaparsetrinum í Sjóvinnuhúsinum eftir ætlan skuldi flyta inn í hølini hjá gamla Venjingarskúlanum og Læraraskúlanum, ið landið skuldi yvirtaka fult og heilt, og sum skuldi verða partur av samlaðu kampusætlanini fyri Fróðskaparsetrið. Arkitektakapping um felagsbygning í Nóatúni varð útskrivað í februar 2023, har 6 undangóðkend arkitektavirkir luttóku. Vinnandi uppskotið varð kunngjørt í juni 2023.

Næsta stig er at projektera felagsbygningin. Hetta er mett at kosta 38-40 mió. kr., og er sambært vinnandi ráðgevanum eitt arbeiði, sum tekur 1 1/2 ár. Lógaruppskot um prosjektering av nýggja felagsbygninginum verður ætlandi lagt fyri Løgtingið í næstum, og miða verður eftir at byrja prosjekteringina í endanum av 2023. Prosjekteringin verður annars framd sambært játtanum veittum á fíggjarlógini.

Tá felagsbygningurin stendur liðugur, og er tikin í nýtslu, vil tað lætta um stóra tørvin á undirvísingarhølum og skrivstovuplássum, ið Setrið hevur, nú tey skulu flyta út úr Sjóvinnuhúsinum.

Landið hevur yvirtikið ognarlutin hjá kommununi í Venjingarskúlanum móti, at kommunan yvirtekur partar av matr. nr. 18 og 19 í Hoyvík, tað er Studentaskúlin í Hoydølum, umframt partar av lendinum á økinum, samsvarandi nærri ásettum treytum. Fróðskaparsetrið skal síðani stigvíst flyta úr leigumálinum í Sjóvinnuhúsinum. Avtalað er, at ein hædd av trimum, ið Fróðskaparsetrið leigar í Sjóvinnuhúsinum, skal vera tøk hjá Tórshavnar kommunu í august 2024 og hinar báðar seinni eftir nærri avtalu.

Fyri at Fróðskaparsetrið skal kunna nýta ognirnar til sítt virksemi krevst, at ognirnar verða høvuðsumvældar og partvís umbygdar til tørvin hjá Fróðskaparsetrinum. Landsverk hevur gjørt eina yvirskipaða kostnaðarætlan og tíðarætlan fyri verkætlanina, ið verður framd í stigum heilt fram til 2029 til ein mettan kostnað á 144 mió. kr. Afturat hesum kemur, at ognirnar skulu dagførast til nútímans støði og tørvin hjá Setrinum. Arbeitt verður við at gera eina nærri útgreinaða heildarætlan fyri hetta.

Fyrsta stig í verkætlanini, at høvuðsumvæla skúlabygningarnar á Frælsinum, er at byrja høvuðsumvælingina av lon 5, og at fyrireika høvuðsumvælingina av tí næstu lonini. Byrjað varð uppá arbeiðið í 2023. Galdandi verklagslóg er løgtingslóg nr. 83 frá 22. juni 2023 um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum.

Landsverk metir, at tað er skilabest fyrst at projektera fyrstu stigini, t.e. lon 5 og tí næstu, soleiðis at til ber at byggja víðari á royndirnar í tilgongdini og við úrslit frá kappingini um felagsbygningin.

Í 2022 vórðu brúktar 2,7 mió. kr. Í 2023 eru játtaðar 27 mió. kr. Umframt framfluttar 4,5 mió. kr. eru tí 31,5 mió. kr. tøkar í 2023. Nýtslan í 2023 verður mett til 16,5 mió. kr. Framfluttar verða sostatt 15 mió. kr. Játtanin fyri 2024 verður 30 mió. kr. Tøkar í 2024 verða sostatt 45 mió. kr.

### Átekning

Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | - | 2.772 | 27.000 | 30.000 | 30.000 | 49.000 |
| **10. Fróðskaparsetur Føroya** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **2.772** | **27.000** | **30.000** | **30.000** | **49.000** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | -389 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | - | 2.690 | 27.000 | 30.000 | 30.000 | 49.000 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 472 | - | - | - | - |

## 7.23.6.16. Fróðskaparsetur Føroya (Rakstrarjáttan)

Fróðskaparsetur Føroya er vísindaligur granskingar- og útbúgvingardepil og fremsti vitanarstovnur landsins. Fróðskaparsetrið skal veita undirvísing og fremja gransking á altjóða stigi og virka fyri burðardyggari samfelagsmenning og nýskapan. Fróðskaparsetrið skal viðvirka til at tryggja, at vísindalig grund er undir mentanarligum, samfelagsligum og vinnuligum virksemi í landinum.

Fróðskaparsetrið hevur undirritað og tekur undir við Magna Charta Universitatum, verjir granskingarfrælsið hjá tí einstaka vísindafólkinum og eggjar til samstarv, kritiskt orðaskifti og til forvitna og óhefta leitan eftir nýggjari vitan og kunnleika.

Á Fróðskaparsetrinum eru 25 útbúgvingar, umleið 1.100 lesandi og 160 starvsfólk. Fróðskaparsetrið er í høvuðsheitum alment fíggjað við játtan á løgtingsfíggjarlógini. Harumframt eru fleiri granskingarverkætlanir fíggjaðar við uttansetursstuðli frá m.a. Granskingarráðnum og vinnulívinum.

Útbúgvingarnar og granskingin fara fram á teimum fimm deildunum, Námsvísindadeildini, Føroyamálsdeildini, Søgu- og samfelagsdeildini, Náttúruvísindadeildini og Deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi.

Á Námsvísindadeildini verða lærarar og námsfrøðingar útbúnir á bachelorstigi. Stórur eftirspurningur er eftir námsfrøðingum, og ætlanin er at tvífalda upptøkuna av teimum.

Føroyamálsdeildin veitir bachelor- og masterútbúgving í føroyskum máli og bókmentum, umframt bachelorútbúgving í listaligum arbeiði.

Søgu- og samfelagsdeildin hevur bachelorútbúgvingar í búskapar- og virkisfrøði, løgfrøði, samfelagsvísindum og politikki & umsiting, umframt í søgu; masterútbúgvingarnar á Søgu- og samfelagsdeildini eru leiðsla & skipan, løgfrøði, politikkur & umsiting, samfelagsvísindi, søga og embætisprógv í lóg.

Á Náttúruvísindadeildini útbúgva tey bachelorar í KT-verkfrøði, lívfrøði, maskinfrøði, mýlalívsvísindum og verkfrøði, har lesandi á triðja ári velja millum byggiverkfrøði, orkuverkfrøði og el-verkfrøði. Eftirspurningurin eftir KT-verkfrøðingum er so stórur, at upptøka av bachelorum nú er hvørt ár og ikki annaðhvørt sum higartil, umframt at masterútbúgving í dátuvísindum eisini er farin í gongd.

Á Deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi verða bachelorar í sjúkrarøktarfrøði útbúnir og master í heilsuvísindum. Í 2022 hevur á fyrsta sinni verið tvær upptøkur av sjúkrarøktarfrøðingum vegna stóra eftirspurningin.

Aftrat hesum útbúgvingum veita deildir á Setrinum eisini hjánám, stakgreinalestur og ískoytisútbúgvingar.

Á sumri 2023 útskrivaði Setrið 209 prógv, í mun til 240 árið fyri sum tá var met. Kanning á sumri 2022 vísti, at 95 prosent av teimum, sum fingu prógv á Setrinum á vári og sumri í 2021 annaðhvørt vóru í lestrarviðkomandi starvi ella vóru farin undir hægri lestur.

**Undirkonta 20. Fróðskaparsetur Føroya**
Fróðskaparsetrið virkar sambært ásetingum í løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, við seinni broytingum. Fróðskaparsetrið er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini, har hetta er ásett í lógini.

Fróðskaparsetrið verður stjórnað av einum stýri, sum er ovasti myndugleiki hjá stovninum og hevur evstu ábyrgdina av virkseminum á stovninum. Rektari leiðir Fróðskaparsetrið innan karmar, sum stýrið ásetir. Í stýrinum fyri Fróðskaparsetrið eru sjey limir. Eftirmeting skal fara fram regluliga, m.a. fyri at Fróðskaparsetrið skal viðurkennast sum altjóða góðkendur lærustovnur eftir Bologna-tilgongdini.

Mentamálaráðið og Stýrið fyri Fróðskaðarsetrið fingu í 2018 eina óhefta kanning gjørda av Fróðskaparsetrinum, sum m.a. kom fram til, at fyrisitingin á Setrinum ikki var vaksin samsvarandi vøkstrinum í talinum av lesandi og vísindastarvsfólki. Í 2020 fekk Fróðskaparsetrið játtaðar 1,5 mió. kr. til at styrkja um fyrisitingina.

Fróðskaparsetrið setti í 2020 á stovn eina Granskingar- og framtakseind, sum skal stuðla undir gransking og uttanhýsis granskingarfígging, og eisini eina Góðskueind, sum skal tryggja, at Fróðskaparsetrið lýkur ásetingarnar í Bologna-tilgongdini, at góðskutrygging og góðskumenning áhaldandi verður styrkt, soleiðis at útbúgvingarnar standa altjóða mát.

Umframt lønarframskriving og eina lækking á 1,2 mió. kr. verður játtanin framskrivað við 6.572 tús. kr., ið fevnir um framhald av upptøku av sjúkrarøktarfrøði tvær ferðir um árið, nýggja masterútbúgving í Dátuvísindum og árliga upptøku av bachelorlesandi í KT-verkfrøði og upptøku av námsfrøðilesandi tvær ferðir um árið.

**Undirkonta 27. Máltøknidepilin**
Ein máltøknidepil, sum verður knýttur at Fróðskaparsetrinum, verður settur á stovn. Tørvur er á at styrkja og savna máltøkniliga virksemið í Føroyum á einum støðugum og sterkum staði, har áhaldandi

menning og rakstur eru kjarnuuppgávurnar. Máltøkniliga menningin í Føroyum hevur higartil verið grundað á einstakar verkætlanar, t.d. teldutala, rættstavari, talukennari og teldutýðing. Máltøknidepilin verður við til at tryggja, at máltøkniliga menningin heldur fram, og at verkætlanir sum er komnar at enda, verða mentar og dagførdar. Máltøkniligt arbeiði snýr seg um at arbeiða við málsligum tilfari og dátum og at skapa rætta tøkniliga bygnaðin í tilfarinum og eitt málsligt undirstøðukervi.

Máltøknidepilin fer at hava til uppgávu og tryggja:

- At arbeiðið við máltøkni verður samskipað og styrkt
- At tilfarið (grundeindir, dátur, tekstbankar), sum er grundarlagið undir máltøkniliga arbeiðinum, verður savnað, røkt og atkomuligt
- At gransking og undirvísing í máltøkni verður raðfest

Játtanin til Máltøknidepilin er umraðfest frá høvuðskontu 12.24.1.11. Føroyskur raddarkennari, sum hevur verið til verkætlanina at menna ein føroyskan talukennara, og sum er komin á mál í 2022.

**Undirkonta 40. Stuðulsfíggjað virksemi**
Granskingarverkætlanir verða í høvuðsheitum skipaðar undir stuðulsfíggjaðum virksemi, sum heilt ella lutvíst eru fíggjaðar uttanífrá. Verkætlanirnar verða allar umsitnar eftir innanhýsis leisti, sum Fróðskaparsetrið hevur ásett.

Dømi um samstarv hjá Fróðskaparsetrinum um gransking eru við Bakkafrost, SEV, Fiskaaling, Havstovuna, Umhvørvisstovuna, Carlsbergfondet v.m.

Tað hevur alstóran týdning at seta nýggjar granskarar við í Føroyum, og í summar 2023 vóru 20 ph.d.-lesandi (9 kvinnur/11 menn) á Fróðskaparsetrinum. Ph.d.-lestur er trý ára granskaraútbúgving, sum er kravd fyri at kunna fáa starv sum granskari á universitetum og granskingarstovnum, og tá undirvísingin av lesandi eisini skal vera granskingargrundað, er hesin parturin av virkseminum sera týdningarmikil.

PURE Faroe Islands er vindeygað til umheimin og føroyska samfelagið um granskingarvirksemið, ið fer fram í Føroyum og í samstarvi við stovnar uttanlands. Granskarar á Setrinum hava vanga á PURE.fo, har til ber at fylgja við førleikum, útgávum og granskingarvirksemi teirra, eins og tað eisini ber til at fylgja við granskingarvirkseminum á deildunum á Fróðskaparsetrinum hvør sær.

**Undirkonta 45. Inntøkufíggjað virksemi**
Skeiðsvirksemið hjá Fróðskaparsetrinum og partvís søla av tómum plássum verða skipað undir inntøkufíggjaðum virksemi, sum skal hvíla í sær sjálvum.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 121.935 | 130.678 | 147.278 | 157.302 | 163.209 | 166.530 |
| Útreiðslur | 138.409 | 148.415 | 158.992 | 169.116 | 174.223 | 176.580 |
| Inntøkur | 16.474 | 17.738 | 11.714 | 11.814 | 11.014 | 10.050 |
| **20. Fróðskaparsetur Føroya** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 121.905 | 130.678 | 146.278 | 156.302 | 162.209 | 165.530 |
| **Útreiðslur** | **127.722** | **135.997** | **149.142** | **159.266** | **164.373** | **166.730** |
| 11. Lønir v.m. | 97.699 | 103.589 | 123.103 | 131.637 | 135.255 | 136.845 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 17.015 | 19.424 | 15.603 | 17.093 | 18.482 | 19.149 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 4.089 | 3.615 | 1.370 | 1.470 | 1.570 | 1.670 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 6.915 | 7.647 | 8.966 | 8.966 | 8.966 | 8.966 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 184 | 2 | - | - | - | - |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | 99 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.748 | 55 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 0 | 1 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 48 | 1.508 | - | - | - | - |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 24 | 56 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **5.818** | **5.319** | **2.864** | **2.964** | **2.164** | **1.200** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *2.368* | *454* | *1.200* | *1.200* | *1.200* | *1.200* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *16* | - | - | - | - | - |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | - | *120* | - | - | - | - |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | - | *-4* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *3.386* | *4.697* | *1.664* | *1.764* | *964* | - |
| 77. Flyting frá kommunum | *48* | *52* | - | - | - | - |
| **27. Máltøknidepilin** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **1.000** | **1.000** | **1.000** | **1.000** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 800 | 800 | 800 | 800 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | 150 | 150 | 150 | 150 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | 50 | 50 | 50 | 50 |
| **40. Stuðulsfíggjað virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **8.390** | **9.847** | **7.850** | **7.850** | **7.850** | **7.850** |
| 11. Lønir v.m. | 5.286 | 6.168 | 6.000 | 6.000 | 6.000 | 6.000 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2.457 | 3.398 | 1.800 | 1.800 | 1.800 | 1.800 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 225 | - | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 27 | 16 | - | - | - | - |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 366 | 41 | - | - | - | - |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 19 | 22 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 11 | 202 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **8.390** | **9.847** | **7.850** | **7.850** | **7.850** | **7.850** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *129* | *443* | *600* | *600* | *600* | *600* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *6.172* | *5.529* | *6.250* | *6.250* | *6.250* | *6.250* |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *1.130* | *994* | *1.000* | *1.000* | *1.000* | *1.000* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *960* | *2.880* | - | - | - | - |

**45. Inntøkufíggjað virksemi**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 30 | -0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **2.296** | **2.572** | **1.000** | **1.000** | **1.000** | **1.000** |
| 11. Lønir v.m. | 39 | 357 | 700 | 700 | 700 | 700 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2.237 | 294 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | 10 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 20 | 27 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 1.884 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **2.266** | **2.572** | **1.000** | **1.000** | **1.000** | **1.000** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.089* | *1.681* | *1.000* | *1.000* | *1.000* | *1.000* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *1.178* | *891* | - | - | - | - |

**Virksemisyvirlit: 20 Fróðskaparsetur Føroya**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **127.722** | **135.997** | **149.142** | **159.266** | **164.373** | **166.730** |
| 1. Leiðsla og fyrisiting | 10.652 | 12.841 | 14.221 | 15.131 | 15.615 | 15.855 |
| 2. Felags- og hjálparvirks., ikki flokksbýtt virks. | 23.953 | 23.668 | 25.302 | 24.686 | 25.478 | 25.818 |
| 3. Undirvísing | 68.093 | 73.452 | 82.028 | 87.596 | 90.405 | 91.741 |
| 4. Gransking (íroknað savnsuppg.) og frálæra | 25.024 | 26.036 | 27.591 | 31.853 | 32.875 | 33.316 |
| **B: Virksemi (tal)** | **1.090** | **1.030** | **1.115** | **1.155** | **1.195** | **1.210** |
| 1.1. Søgu- og samfelagsdeildin (lesandi á fulltíðarútbúgvingum) | 303 | 244 | 244 | 244 | 244 | 244 |
| 1.2. Føroyamálsdeildin (lesandi á fulltíðarútbúgvingum) | 104 | 84 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 1.3. Náttúruvísindadeildin (lesandi á fulltíðarútbúgvingum) | 121 | 151 | 181 | 181 | 181 | 181 |
| 1.4. Sjúkrarøktarfrøðideildin (lesandi á fulltíðarútbúgvingum) | 185 | 206 | 231 | 256 | 281 | 281 |
| 1.5. Námsvísindadeildin (lesandi á fulltíðarútbúgvingum) | 361 | 328 | 342 | 357 | 372 | 387 |
| 2.1. Søgu- og samfelagsdeildin (lesandi á parttíðarútbúgvingum) | 4 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 |
| 2.2. Føroyamálsdeildin (lesandi á parttíðarútbúgvingum) | 0 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 |
| 2.3. Náttúruvísindadeildin (lesandi á parttíðarútbúgvingum) | 6 | 6 | 6 | 6 | 6 | 6 |
| 2.4. Sjúkrarøktarfrøðideildin (lesandi á parttíðarútbúgvingum) | 4 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 |
| 2.5. Námsvísindadeildin (lesandi á parttíðarútbúgvingum) | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | **117.176** | **132.036** | **133.760** | **137.892** | **137.550** | **137.793** |
| 1. Leiðsla og fyrisiting (kostnaður fyri hvørt lestrarársverk) | 9.772 | 12.467 | 12.754 | 13.100 | 13.067 | 13.103 |
| 2. Felags- og hjálparvirks., ikki flokksbýtt virks. (kostnaður fyri hvørt lestrarársverk) | 21.975 | 22.978 | 22.692 | 21.373 | 21.320 | 21.337 |
| 3. Undirvísing (kostnaður fyri hvørt lestrarársverk) | 62.471 | 71.313 | 73.568 | 75.841 | 75.653 | 75.819 |
| 4. Gransking (kostnaður fyri hvørt lestrarársverk) | 22.958 | 25.278 | 24.746 | 27.578 | 27.510 | 27.534 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Fróðskaparsetur Føroya**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Onnur | 140,0 | 143,2 | 154,9 | 160,8 | 166,3 | 169,3 |
| Fulltíðarstørv | 142,0 | 145,2 | 156,9 | 162,8 | 168,3 | 171,3 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 97,7 | 103,6 | 123,1 | 131,6 | 135,3 | 136,8 |

**Starvsfólkayvirlit: 27 Máltøknidepilin**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | - | - | 1,1 | 1,1 | 1,1 | 1,1 |
| Fulltíðarstørv | - | - | 1,1 | 1,1 | 1,1 | 1,1 |
| Lønarpartur (mio kr.) | - | - | 0,8 | 0,8 | 0,8 | 0,8 |

## 7.23.6.18. Avhendan og útvegan av ognum millum land og Tórshavnar kommunu (Løgujáttan)

Treytað avtala er gjørd við Tórshavnar kommunu um avhendan og útvegan av ognum. Útreiðslurnar fyri landskassan verða mettar til netto 3,7 mió. kr.

Talan er um avhendan og útvegan av ognum millum land og Tórshavnar kommunu, har kommunan avhendar landinum sín part av Venjingarskúlanum á Frælsinum í Tórshavn, ið mettur er at hava eitt virði á 44,9 mió. kr., og landið avhendar Tórshavnar kommunu part av matr. nr. 18 og 19 í Hoyvík, undir hesum auluna, skúlabygningin, ítróttarhøllina og barakkina á Sanatoriivegi 11, 13, 15 og 17, í mesta lagi 12.500 m2, og verða partar av hesum ognum eftir ætlan býttir sundur og lagdir saman í ein nýggjan matrikul, ið kommunan kemur at eiga. Tilsamans eru landsins ognir í Hoydølum mettar til 32,5 mió. kr., og lonirnar uttan undirlendi eru mettar til 4,5 mió. kr.

Mett er um virðið á ognunum, og hevur Tórshavnar kommuna í hesum sambandi sett fram ynski um, at landið sleppur einum og hvørjum kravi, ið standast kann av, at galdandi leigusáttmáli í Sjóvinnuhúsinum verður sagdur upp fyri 2027, sbrt. § 4 í galdandi leigusáttmála. Við at sleppa hesum kravi leggur landið í sín part áleið 4,2 mió. kr. afturat í samband við hesa avtalu.

Sølupeningurin fyri ognirnar í Hoydølum og áogn landsins í Sjóvinnuhúsinum, mettur til 41,2 mió. kr., verður mótroknaður í keypspeninginum fyri ognarlutin hjá Tórshavnar kommunu í Venjingarskúlanum, mettur til 44,9 mió. kr., og verður metti munurin á 3,7 mió. kr. goldin Tórshavnar kommunu.

Keypið av ognarlutunum í Venjingarskúlanum er framt í 2023. Landskassin hevur rindað og farið er undir høvuðsumvæling av bygningunum. Sølan av Hoydølum verður framd, tá ið øll myndugleikakrøv viðvíkjandi byggisamtykt, matrikulering v.m. eru liðugt viðgjørd.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | - | - | 40.700 | - | - | - |
| Inntøkur | - | - | 37.000 | - | - | - |
| **10. Avhendan av Studentaskúlanum í Hoydølum til Tórshavnar kommunu** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **37.000** | **-** | **-** | **-** |
| 42. Søla av løgu o.ø. | - | - | *37.000* | - | - | - |
| **11. Útvegan av Venjingarskúlanum frá Tórshavnar kommunu** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **40.700** | **-** | **-** | **-** |
| 32. Útvegan av løgu o.ø. | - | - | 40.700 | - | - | - |

## 7.23.6.20. Granskingarráð Føroya (Rakstrarjáttan)

Løgtingslóg nr. 89 frá 7. juni 2020 um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan varð sett í gildi 1. januar 2021.

Játtanin er til fyrisitingina Granskingarráðið, sum sambært løgtingslógini er skipað sum almennur stovnur, ið umsitur eksternan grunn.

Granskingarráðið kunnar um stuðulsmøguleikar til gransking, menning, nýskapan og annað úr skipanum, sum Granskingarráðið fyrisitur, vegleiðir umsøkjarum og umsitur játtaðar verkætlanir.

Granskingarráðið fyrisitur ES granskingar- og menningarsamstarvið Horizon Europe við tilhoyrandi politikk- og samskiftisuppgávum, herundir NCP-, PC- og EURAXESS tænastu.

Granskingarráðið kunnar breitt um úrslit og avrik frá gransking, menning, nýskapan o.a., og skipar fyri ymiskum tiltøkum og verkstovum.

Granskingarráðið arbeiðir í neyvum samstarvi við Hagstovu Føroya við at menna, savna inn og greina hagtøl fyri gransking, menning og nýskapan.

Granskingarráðið hevur skrivarauppgávuna fyri Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan (GMN), sum er sett á stovn at ráðgeva Føroya Landsstýri og vinnu um yvirskipaða politikk Føroya við felags hugsjón, sum fevnir um gransking, menning og nýskapan.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 3.004 | 3.059 | 3.676 | 3.765 | 3.765 | 3.765 |
| Útreiðslur | 3.331 | 3.951 | 4.174 | 4.255 | 4.255 | 4.255 |
| Inntøkur | 326 | 892 | 498 | 490 | 490 | 490 |
| **20. Granskingarráð Føroya** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 3.004 | 3.059 | 3.676 | 3.765 | 3.765 | 3.765 |
| **Útreiðslur** | **3.331** | **3.951** | **4.174** | **4.255** | **4.255** | **4.255** |
| 11. Lønir v.m. | 2.110 | 2.708 | 3.222 | 3.130 | 3.130 | 3.130 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.025 | 958 | 751 | 800 | 800 | 800 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 95 | - | 10 | 13 | 13 | 13 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 10 | 1 | 2 | 2 | 2 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 6 | 5 | - | - | - | - |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | 163 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | - | 3 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 94 | 104 | 190 | 310 | 310 | 310 |
| **Inntøkur** | **326** | **892** | **498** | **490** | **490** | **490** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *15* | *15* | *15* | *15* | *15* | *15* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *229* | *800* | *60* | *408* | *408* | *408* |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | - | - | *340* | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *82* | *77* | *83* | *67* | *67* | *67* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Granskingarráð Føroya**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 2,2 | 2,9 | 2,9 | 2,9 | 2,9 | 2,9 |
| Fulltíðarstørv | 3,2 | 3,9 | 3,9 | 3,9 | 3,9 | 3,9 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 2,1 | 2,7 | 3,2 | 3,1 | 3,1 | 3,1 |

## 7.23.6.21. Stuðul til gransking (Stuðulsjáttan)

Játtanin er til stuðulsskipan, ið hevur til endamáls at stuðla granskingarverkætlanum.

Við heimild í løgtingslóg nr. 89 frá 7. juni 2020 um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan er stuðulsskipan til gransking ásett í kunngerð nr. 83 frá 25. mai 2021 um stuðul til gransking.

Stuðulsskipanin verður stjórnað av faknevnd við fimm limum, ið landsstýrismaðurin velur. Faknevndin tekur endaliga avgerð í málum um stuðul.

Fyrisitingin av stuðulsskipanini liggur hjá Granskingarráðnum.

Stuðul til gransking kann verða játtaður til bæði grundgransking og nýtslugransking, tá ið granskingin verður framd av føroyskum granskara, framd í samstarvi við føroyskan granskingarstovn og/ella mett at hava samfelagsligan týdning fyri Føroyar.

Seinnu árini hava 8-12 verkætlanir verið stuðlaðar árliga. Talan kann vera um ph.d.-verkætlanir, post.doc. og smærri verkætlanir. Evnini kunnu vera á øllum fakøkjum.

Í ársfrágreiðingini hjá Ráðnum fyri gransking, menning og nýskapan verður víst á økta tørvin á gransking í Føroyum, og verður játtanin fyri 2024 tí hækkað 1,5 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 7.500 | 7.500 | 7.500 | 9.000 | 9.000 | 9.000 |
| **01. Stuðul til gransking** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **7.500** | **7.500** | **7.500** | **9.000** | **9.000** | **9.000** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 7.500 | 7.500 | 7.500 | 9.000 | 9.000 | 9.000 |

## 7.23.6.24. Altjóða granskingar- og menningarsamstarv (Stuðulsjáttan)

Játtanin til altjóða granskingar- og menningarsamstarv er á tveimum undirkontum. Verður ikki øll játtanin nýtt á eini undirkontuni, kann avlopið verða nýtt sum stuðul á hinari undirkontuni.

### Undirkonta 01. Evropiskt granskingar- og menningarsamstarv

Játtanin er til at rinda fyri luttøku í Evropasamveldisins (ES) granskingar- og menningarskrá Horizon Europe (HE), luttøku í tilhoyrandi Partaløgum og til stuðul til arbeiðið við HE umsóknum. Harumframt kann talan verða um at rinda fyri luttøku í øðrum skráum, sum Føroyar kunnu luttaka í við atlimaskapi ella sum triðjaland, og fyri limaskap í Evropiskum felagsskapum, sum eru viðkomandi fyri ES samstarvi.

Føroyar hava síðan 2010 verið partur av granskingar- og menningarsamstarvinum í ES, sum er skipað í 7 ára skeið. Í mai 2022 varð nýggjur yvirskipaður sáttmáli millum Føroyar og ES um luttøku Føroya í samstarvsætlanum Samveldisins undirskrivaður við afturvirkandi gildi frá 1. januar 2021. Við hesum sáttmála fingu Føroyar atlimaskap í Horizon Europe fyri tíðarskeiðið 2021-2027. Gjaldsleisturin varð broyttur í mun til undanfarnu avtalurnar. Árliga gjaldið verður nú samansett av einum luttøkugjaldi og einum nýtslugjaldi, sum verður tillagað í mun til føroysku úrtøkuna undanfarnu tvey árini. Føroyar koma nú at rinda á leið tað, sum svarar til egna luttøku í Horizon Europe. Goldið verður eftir rokning frá ES hálvárliga.

Partaløg og líknandi skipanir eru alt meira vanligar fíggingarskipanir í altjóða granskingar- og menningarsamstørvum. Í Horizon Europe eru skipaði ein røð av evnisligum partaløgum, sum lond kunnu velja at samstarva um og luttaka í við samfígging. Føroyar meta sjálvi um, hvørji av hesum partaløgum eru viðkomandi fyri Føroyar, og gera í hvørjum einstøkum føri av, hvørji partaløg Føroyar skulu luttaka í, og hvussu nógv samfígging skal setast av. Hendan fígging verður bundin til luttakarar í Føroyum, og verður bert útgoldin, um føroyskir stovnar ella virki eru við í verkætlan stuðlað av partalagi í Horizon Europe. Arbeitt verður við neyvari mannagongd fyri støðutakan til luttøku í partaløgum.

Umsóknir til HE eru umfatandi og tíðarkrevjandi. Fyri at kunna gagnnýta avtaluna í størri mun verður ein partvísur stuðul latin til umsóknararbeiði hjá stovnum og fyritøkum. Reglugerð verður gjørd fyri stuðulsmøguleikar og -treytir.

Tøk játtan eftir at luttøkugjaldið fyri HE er goldið, verður brúkt til luttøku í partaløgum og stuðul til arbeiðið við HE umsóknum, og verður hon at flyta yvir í GMN grunnin, harfrá tilsagnir verða givnar sambært ásettum reglum.

Í 2023 eru sambært rokning goldnar 17,7 mió. kr. til granskingarsamstarvið. Høvuðsorsøkin til høga gjaldið í 2023 í mun til tøku játtanina er, at føroyskar granskingar- og menningarætlanir hava fingið játtaðan óvanliga høgan stuðul frá Horizon Europe í 2021, ið er árið, ið eftirreguleringin fyri 2023 er gjørd útfrá. Sambært nýggju gjaldsavtaluni við ES verður eftirregulering gjørd tvey ár eftir virksemisárið.

Í 2024 verður gjaldið reguleråð í mun til veittan stuðul í 2022, sum var nógv minni enn ávegis inngjaldið hetta ári. Hetta viðførir, at gjaldið til Horizon Europe verður umleið 4 mió. kr í 2024. Afturat hesum skal leggjast luttøkugjald í partalagsavtalum, sum er roknað til 1,4 mió. kr. í 2024.

**Undirkonta 02. Norðurlendskt og altjóða granskingar- og menningarsamstarv**
Játtanin er til føroyska luttøku í NordForsk átøkum, arktiskum átøkum og annað líknandi í sambandi við altjóða granskingar- og menningarsamstarv.

Játtanin til føroyska luttøku í NordForsk átøkum, arktiskum átøkum og líknandi verður at flyta yvir í GMN grunnin, harfrá tilsagnir verða givnar sambært ásettum reglum. Fyri at kunna luttaka í NordForsk arbeiðinum v.m., verður játtanin fyri 2024 hækkað 1,5 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 9.000 | 6.688 | 8.700 | 7.200 | 7.200 | 5.850 |
| **01. Evropiskt granskingar- og menningarsamstarv** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **9.000** | **6.688** | **8.400** | **5.400** | **5.400** | **5.400** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 9.000 | 6.688 | 8.400 | 5.400 | 5.400 | 5.400 |
| **02. Nordurlendskt og altjóða granskingar- og menningarsamstarv** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **300** | **1.800** | **1.800** | **450** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 3.368 | 3.816 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |

**21. Hjálparráð**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | - | 27.292 | 29.219 | 32.720 | 34.356 | 36.074 |
| **Útreiðslur** | **-** | **27.292** | **29.219** | **32.720** | **34.356** | **36.074** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | 27.292 | 29.219 | 32.720 | 34.356 | 36.074 |

**Virksemisyvirlit: Heilsutrygdarveitingar**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **220.945** | **232.547** | **255.126** | **275.200** | **288.960** | **303.408** |
| Heilivágur | 82.131 | 88.987 | 97.940 | 98.727 | 103.662 | 108.844 |
| Kommunulæknahjálp | 66.208 | 68.712 | 75.625 | 84.173 | 88.382 | 92.801 |
| Serlæknahjálp | 862 | 683 | 752 | 807 | 847 | 890 |
| Tannlæknahjálp | 22.226 | 22.896 | 25.200 | 27.048 | 28.401 | 29.821 |
| Brillur og bandasjur o.a. | 1.560 | 1.676 | 1.845 | 1.980 | 2.079 | 2.183 |
| Fysiurgisk viðgerð | 12.384 | 12.441 | 13.693 | 14.697 | 15.432 | 16.204 |
| Kiropraktor | 61 | 74 | 81 | 87 | 92 | 96 |
| Sálarfrøðingar | 1.993 | 924 | 1.017 | 4.492 | 4.716 | 4.952 |
| Jarðarferðarhjálp | 1.917 | 2.136 | 2.351 | 2.523 | 2.650 | 2.782 |
| Fótarøkt | 4.004 | 3.998 | 4.400 | 4.723 | 4.959 | 5.207 |
| Hjálparráð | 24.976 | 27.292 | 29.219 | 32.720 | 34.356 | 36.074 |
| Ergoterapi | 1.258 | 1.319 | 1.452 | 1.558 | 1.636 | 1.718 |
| Eftirútbúgving og gransking, kommunulæknar | 1.355 | 1.394 | 1.534 | 1.647 | 1.729 | 1.816 |
| Ferðing, flutningur og annað ógreinað | 10 | 15 | 17 | 18 | 19 | 20 |

## 11.20.2.04. Kommunulæknaskipanin (Rakstrarjáttan)

Kommunulæknaskipanin virkar sambært løgtingslóg nr. 28 frá 23. apríl 1999 um kommunulæknaskipan, við seinni broytingum. Lógin er givin út sambært § 1, stk. 2, nr. 2 í lóg nr. 316 frá 17. mai 1995 om sundhedsvæsenet på Færøerne.

Játtanin til kommunulæknaskipanina verður mestsum øll nýtt til lønir til kommunulæknarnar og viðtalustarvsfólk hjá avloysarum í teimum 9 læknadømunum í Føroyum. Talan er um eina fasta grundupphædd, sum verður goldin kommunulæknunum. Viðtalustarvsfólkini fáa løn sambært viðkomandi sáttmála. Heilsutrygdarveitingar flyta basisgjald til Kommunulæknaskipanina, tá ið avloysarar eru í starvi. Kommunulæknaskipanin nýtir hesa upphædd til at rinda viðtalustarvsfólki hjá avloysarunum løn.

Tann 1. januar 2023 vóru 22 sett og 12 avloysarasett kommunulæknastørv í skipanini. Tað hevur verið trupult at fáa sett læknar í leysu størvini, samstundis sum fleiri læknar fara frá vegna aldur. Arbeitt hevur verið fyri at fáa fleiri at serútbúgva seg til kommunulækna (almen medisin).

Umframt lønarframskriving er játtanin fyri 2024 hækkað við 1.080 tús. kr. til grundgjøld til íverksettu ætlanina at stovnseta tríggjar kommunulæknaviðtalur.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 12.968 | 13.246 | 16.017 | 17.587 | 17.587 | 17.587 |
| Útreiðslur | 16.333 | 17.061 | 19.017 | 20.587 | 20.587 | 20.587 |
| Inntøkur | 3.365 | 3.814 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 12.968 | 13.246 | 16.017 | 17.587 | 17.587 | 17.587 |
| **Útreiðslur** | **16.333** | **17.061** | **19.017** | **20.587** | **20.587** | **20.587** |
| 11. Lønir v.m. | 14.021 | 15.693 | 17.617 | 19.187 | 19.187 | 19.187 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.269 | 1.163 | 1.400 | 1.400 | 1.400 | 1.400 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 15 | - | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 4 | 1 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 15 | 12 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 50 | 2 | - | - | - | - |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 959 | 189 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **3.365** | **3.814** | **3.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *3.365* | *3.814* | *3.000* | *3.000* | *3.000* | *3.000* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Kommunulæknar í føstum starvi | 27,0 | 24,0 | 24,0 | 24,0 | 24,0 | 24,0 |
| Viðtalur uttan starvssettan lækna | 7,0 | 10,0 | 11,0 | 13,0 | 13,0 | 13,0 |
| Fulltíðarstørv | 34,0 | 34,0 | 35,0 | 37,0 | 37,0 | 37,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 14,0 | 15,7 | 17,6 | 19,2 | 19,2 | 19,2 |

## 11.20.2.05. Útbúgving av yngri læknum (Rakstrarjáttan)

Játtanin er til at styrkja útbúgvingina av kommunulæknum og sjúkrahúslæknum í Føroyum. Ein partur av játtanini skal nýtast til álagt skeiðvirksemi.

Tann 1. januar 2023 vóru 46 læknar í ymiskum útbúgvingarstørvum í skipanini. Av hesum eru 11 læknar í útbúgvingarstarvi í almennum medisini, sum er útbúgving til kommunulækna, og verða 3 eftir ætlan lidnir í 2023.

Síðani 2002 hevur verið møguligt at tikið serútbúgving til kommunulækna í Føroyum. Higartil hava 33 tikið serútbúgvingina ella partar av henni her, og starvast meginparturin av teimum í Føroyum.

Játtanin ber ikki útreiðslurnar av at skipa starvsvenjingina.

Umframt lønarframskriving er játtanin hækkað við 1,25 mió. kr. til útbúgvingarstørv.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 12.002 | 12.514 | 14.223 | 15.850 | 15.850 | 15.850 |
| Útreiðslur | 12.002 | 12.514 | 14.223 | 15.850 | 15.850 | 15.850 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 12.002 | 12.514 | 14.223 | 15.850 | 15.850 | 15.850 |
| **Útreiðslur** | **12.002** | **12.514** | **14.223** | **15.850** | **15.850** | **15.850** |
| 11. Lønir v.m. | 10.873 | 11.431 | 13.563 | 15.190 | 15.190 | 15.190 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.098 | 1.077 | 600 | 600 | 600 | 600 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 32 | 6 | 60 | 60 | 60 | 60 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 14,7 | 18,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| Fulltíðarstørv | 14,7 | 18,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 10,9 | 11,4 | 13,6 | 15,2 | 15,2 | 15,2 |

## 11.20.2.06. Økisheilsuskipanin (Rakstrarjáttan)

Við støði í Diabetesheildarætlanini fyri Føroyar ráðgeva kliniskir dietistar borgarum við varandi sjúkum um kost. Tilboðið um kostráðgeving verður veitt borgarunum í nærumhvørvi teirra.

Umframt lønarframskriving er játtanin hækkað við 75 tús. kr. til øktar hølisútreiðslur.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 1.781 | 1.740 | 2.426 | 2.553 | 2.553 | 2.553 |
| Útreiðslur | 1.781 | 1.740 | 2.426 | 2.553 | 2.553 | 2.553 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 1.781 | 1.740 | 2.426 | 2.553 | 2.553 | 2.553 |
| **Útreiðslur** | **1.781** | **1.740** | **2.426** | **2.553** | **2.553** | **2.553** |
| 11. Lønir v.m. | 1.557 | 1.536 | 1.876 | 1.928 | 1.928 | 1.928 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 156 | 188 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 62 | 7 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 4 | 6 | 350 | 425 | 425 | 425 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 2 | 2 | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 3,1 | 3,0 | 3,5 | 3,5 | 3,5 | 3,5 |
| Fulltíðarstørv | 3,1 | 3,0 | 3,5 | 3,5 | 3,5 | 3,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 1,6 | 1,5 | 1,9 | 1,9 | 1,9 | 1,9 |

## 11.20.2.08. Apoteksverkið (Rakstrarjáttan)

### Undirkonta 20. Landsfyritøka

Apoteksverkið virkar sambært løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág, við seinni broytingum, umframt kunngerðum við heimild í apotekslógini. Harumframt kann Landsapotekarin fremja eftirlit við, at tey, sum innflyta og selja medisinska útgerð, halda ásetingar og krøv sambært løgtingslóg nr. 76 frá 6. mai 2022 við gildiskomu 1. apríl 2023.

Apoteksverkið er stovnur undir Heilsumálaráðnum, og undir apoteksverkinum eru: Tjaldurs Apotek, Norðoya Apotek, Suðuroyar Apotek, Eysturoyar Apotek, Framleiðsluapotek og Landsapotekaraembætið.

Apoteksverkið hevur einkarætt at gera, flyta inn, flýggja út, hava á goymslu, handla við og pakka heilivág, uttan so at annað er ásett í apotekslógini ella reglum við heimild í apotekslógini.

Høvuðsuppgávan hjá landsapotekaranum er at hava eftirlit við tí heilivági o.ø., sum verður innflutt til, selt ella gjørt í Føroyum.

Apoteksverkinum er sett avlopskrav komandi árini til at fíggja umbyggingina á Staravegi 15 í Havn. Í 2024 er avlopskravið 6,5 mió. kr.

### Undirkonta 30. KT-verkætlan

KT-skipanin hjá Apoteksverkinum er dagførd sambært løgtingslóg nr. 81 frá 7. juni 2020 um at dagføra KT-skipanina hjá Apoteksverkinum.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | -91 | -8.862 | -6.500 | -6.500 | -6.500 | -6.500 |
| Útreiðslur | 365.932 | 376.561 | 313.500 | 346.500 | 346.500 | 346.500 |
| Inntøkur | 366.023 | 385.423 | 320.000 | 353.000 | 353.000 | 353.000 |
| **20. Landsfyritøka** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -6.087 | -8.862 | -6.500 | -6.500 | -6.500 | -6.500 |
| **Útreiðslur** | **359.936** | **376.561** | **313.500** | **346.500** | **346.500** | **346.500** |
| 11. Lønir v.m. | 65.673 | 70.323 | 70.400 | 76.000 | 76.000 | 76.000 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 276.558 | 280.745 | 230.100 | 252.500 | 252.500 | 252.500 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 6.720 | 5.662 | 6.000 | 6.000 | 6.000 | 6.000 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 9.301 | 16.572 | 7.000 | 12.000 | 12.000 | 12.000 |
| 17. Avskrivingar o.a. | 1.124 | 2.765 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 43 | 58 | - | - | - | - |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 64 | - | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 445 | 227 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 8 | 209 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **366.023** | **385.423** | **320.000** | **353.000** | **353.000** | **353.000** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *366.023* | *385.423* | *320.000* | *353.000* | *353.000* | *353.000* |
| **30. KT-verkætlan** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 5.996 | - | - | - | - | - |
| **Útreiðslur** | **5.996** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 5.996 | - | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Landsfyritøka**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 |
| Onnur | 124,0 | 125,5 | 126,0 | 126,0 | 126,0 | 126,0 |
| Fulltíðarstørv | 130,0 | 131,5 | 132,0 | 132,0 | 132,0 | 132,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 65,7 | 70,3 | 70,4 | 76,0 | 76,0 | 76,0 |

## 11.20.2.09. Apoteksverkið (Løgujáttan)

Lógargrundarlagið undir játtanini er løgtingslóg nr. 65 frá 22. mai 2023 um at umbyggja hølini hjá Apoteksverkinum á Staravegi 15 í Tórshavn.

Tá ið hølini hjá Apoteksverkinum eru umbygd verður rúm fyri øktum virksemi og fleiri starvsfólkum. Harumframt fara hølini at hava nýggja avgreiðslu og goymslurúm, fleiri fundar- og undirvísingarhølir og umstøður at húsa starvsfólkunum við skrivstovum og felags matstovu.

Útreiðslurnar til verkætlanina kunnu samsvarandi lógini í mesta lagi vera 19 mió. kr. og er ætlanin, at verkætlanin verður liðug í 2024.

Nýtslan í 2023 verður mett til 3 mió. kr. Framfluttar verða sostatt 3,5 mió. kr. til 2024.

Játtaðar eru 12,5 mió. kr. í 2024 til verkætlanina.

**Átekning**
Landsstýriskvinnuni verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | - | 6.500 | 12.500 | - | - |
| **10. Apoteksverkið** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **6.500** | **12.500** | **-** | **-** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | - | - | 6.500 | 12.500 | - | - |

### 11.20.2.15. Royndarætlan, ókeypis sálarfrøði (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir skipanini er løgtingslóg nr. 153 frá 30. oktober 2020 um royndarskipan um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til persónar millum 15 og 35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi. Lógin fer úr gildi 31. oktober 2023.

Játtanin er til eina 3 ára royndarætlan við ókeypis sálarfrøði til 15-35 ára gomul. Royndarætlanin er sett í verk á heysti í 2020. Ein verkætlanarleiðari er settur hálva tíð at samskipa royndarætlanina.

Royndarætlanin endar í oktober 2023 og í staðin verður virksemið skipað av nýggjum undir Heilsutrygdarveitingum.

Eingin játtan er á hesi høvuðskontuni í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 2.917 | 6.212 | 7.900 | - | - | - |
| Útreiðslur | 2.917 | 6.212 | 7.900 | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 2.917 | 6.212 | 7.900 | - | - | - |
| **Útreiðslur** | **2.917** | **6.212** | **7.900** | **-** | **-** | **-** |
| 11. Lønir v.m. | 367 | 214 | 350 | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 63 | 38 | 7.550 | - | - | - |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 366 | 117 | - | - | - | - |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 2.121 | 5.844 | - | - | - | - |

## 11.20.3. Sjúkrahúsverkið v.m.

Sjúkrahúsverkið virkar sambært løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, við seinni broytingum. Sjúkrahúsverkið átekur sær serkanningar, viðgerðir, røkt og linna av bæði likamliga og sálarliga sjúkum fólki.

Sjúkrahúsverkið fevnir um Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús, Suðuroyar sjúkrahús, Sjúklingahotellið Tórshavn, KT-økið heilsuverksins og Heilsugranskingareindina.

Rakstrarútreiðslurnar fevna eisini um útreiðslur til Serviðgerð uttanlands.

Sjúkrahúsini eru skipað undir einari leiðslu, og arbeitt verður við at gagnnýta sjúkrahúsverkið enn betur.

**11.20.3.04. Landssjúkrahúsið (Rakstrarjáttan)**

Lógargrundarlagið undir sjúkrahúsverkinum er løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, við seinni broytingum.

Landssjúkrahúsið er meginsjúkrahús í Føroyum við 127 seingjarplássum og um 29 serlæknaøkjum, íroknað 9 konsulentøkir. Innan fleiri onnur serlæknaøki er ráðgeving skipað, soleiðis at læknar uttanlands eru við í viðgerðini av sjúklingum á Landssjúkrahúsinum.

Uppgávan hjá sjúkrahúsinum er at kanna, viðgera, røkta og venja sjúklingar uppaftur. Sjúkrahúsið hevur eina bráðfeingis tilbúgvingarskipan alt samdøgrið innan tey stóru serlæknaøkini.

Aðalmálið hjá Landsjúkrahúsinum, saman við Sjúkrahúsverkinum, er at veita eina dygdargóða heilsutænastu alt lívið. Sjúkrahúsverkið veitir heilsutænastur, ið fevna frá gitnaði til seinastu fráferð, og er málið at veita dygdargóðar heilsutænastur, bornar av vitan og tænastusinni. Vitan fevnir um fakliga vitan, førleikar og menning, tøkni í breiðastu merking og mentan, sum er opin og fevnandi. Tænastusinni er ein uppliving av at vera í miðdeplinum, uppliving av góðari tænastu og uppliving av nærlagni.

**H-bygningurin**
Í 2018 varð byrjað at byggja nýggjan meginbygning, róptur H-bygningurin til psykiatri, medisinskar og skurðseingjarstovur, háisolatiónsstovur, føðideild, barnadeild, høvuðskøk og endurvenjing. Tá nýggi bygningurin verður tikin í nýtslu, verður Landssjúkrahúsið á leið 17.000 fermetrar størri enn í dag.

Nýggi sjúkrahúsbygningurin flytur føroyska sjúkrahúsverkið inn í eina nýggja tíð og veitir tíðarhóskandi karmar fyri sjúklingar og starvsfólk, sum flyta inn í nýggja bygningin, umframt at onnur viðgerðarøki fáa munandi betri hølisumstøður enn í dag. Eitt stórt frambrot er, at sjúklingarnir fáa einastovur í nýggja Sjúkrahúsbygninginum. Virksemið er so smátt byrjað at flyta inn í H-bygningin, t.d. køkur og endurvenjing er flutt, og annað virksemið flytur í 2024.

**Skurðdepilin**
Á skurðdeplinum verður viðgerð veitt millum annað innan ortopædi, urologi, plastikkkirurgi og almenna kirurgi. Harumframt eru oyrna-, nasa- og hálsdeild, eygnadeild, tannlæknadeild, føðideild og ein deild fyri skurðstovur og skopiir. Á deplinum eru tvær seingjadeildir við tilsamans 34 seingjum, dagskurðstovur við 7 seingjum og harafturat kirurgiskt ambulatorium. Í 2022 var føðiøkið umframt serlæknaøkið innan kvinnusjúkur flutt frá Skurðdeplinum til Familjudepilin, hetta sæst aftur í hagtølunum.

Ambulanta virksemið á skurðdeplinum er nógv økt seinastu árini. Miðað verður ímóti, at ein enn størri partur av virkseminum á skurðdeplinum verður ambulant og dagskurð, umframt at innleggingartíðin verður stytt. Tað ger, at fleiri sjúklingar verða viðgjørdir, og at bíðitíðirnar verða styttar.

| Virksemi á skurðdeplinum | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Innleggingar | 3.573 | 3.773 | 3.743 | 3.663 | 3.845 | 2.206 |
| Ambulantar viðgerðir | 30.210 | 33.021 | 34.542 | 34.830 | 37.066 | 27.616 |
| Skurðviðgerðir | 2.294 | 2.633 | 2.697 | 2.199 | 2.437 | 2.353 |
| Dag skurðviðgerðir | 618 | 734 | 767 | 508 | 635 | 541 |
| Amb. viðtalur og viðg. íalt | 34.195 | 37.754 | 39.201 | 38.766 | 41.480 | 30.949 |

## Medisinski depilin

Á medisinska deplinum verður viðgerð veitt m.a. innan hjartasjúkur, lungnasjúkur, krabbamein, evnaskiftissjúkur, nýrasjúkur íroknað dialysu, maga-tarm sjúkur, neurologiskar sjúkur, húðsjúkur umframt fysio- og ergoterapi. Barnøkið er í 2022 flutt frá Medisinska deplinum til Familjudepilin, og sæst hetta aftur í hagtølunum fyri virksemið í 2022. Á deplinum eru 3 sjúklingadeildir við íalt 39 seingjarplássum, harumframt medisinskt ambulatorium. Harumframt hevur depilin medisinskt ambulatorium, har virksemið er vaksið nógv seinastu árini.

Seinastu árini eru fleiri nýggir serlæknar settir, m.a. innan gikt, hjarta, diabetis, krabbamein, lungamedisin og dermatologi.

Stórar broytingar hava verið á medisinska deplinum seinnu árini, har ein lutfalsliga størri partur av kanningum og viðgerðum er broyttur til ambulant virksemi. Innleggingartíðin er stytt, og hevur møguleiki tí verið fyri at gera fleiri ambulantar viðgerðir. Málið er í framtíðini at økja ambulanta virksemið enn meira, soleiðis at færri planlagdar innleggingar verða, og innleggingartíðin verður styttri.

Stórur vøkstur hevur verið í útreiðslunum til heilivág og aðrar viðgerðarvørur seinastu árini, eins og tað hevur verið at sæð í heilsuverkunum í londunum rundan um okkum. Heilivágurin á marknaðinum gerst støðugt betri við færri hjáárinum, umframt at sjúklingar liva longri. Nýggi heilivágurin er oftast væl dýrari, og tað sæst aftur á útreiðslunum. Serstakur sjúkrahúsheilivágur hevur játtan á høvuðskontu 11.20.3.19. Serstakur sjúkrahúsheilivágur.

| Virksemi á med. deplinum | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Innleggingar | 5.382 | 5.408 | 5.317 | 5.074 | 5.828 | 3.098 |
| Ambulantar viðtalur * | 39.036 | 42.903 | 47.139 | 47.739 | 59.767 | 55.264 |
| Amb. viðtalur og viðg. íalt | 44.438 | 48.781 | 55.917 | 67.224 | 76.831 | 72.568 |

## Psykiatriski depilin

Psykiatriski depilin veitir viðgerð fyri sálarligar sjúkur og fevnir um alt landið. Arbeitt verður við at skipa eitt breitt ambulant viðgerðartilboð, soleiðis at viðgerðin í høvuðsheitum verður ambulant, men við innleggingarmøguleika, har tað er neyðugt. Depilin hevur eina seingjadeild við 19 seingjarplássum til intensiva, akutta og almenna psykiatri, sum er skipað í eindum. Í 2022 varð Barna-og ungdómspsykiatriin flutt frá Psykiatrisa deplinum til Familjudepilin. Hetta sæst aftur í hagtølunum fyri 2022.

Til at menna ambulantu viðgerðartilboðini er økispsykiatriska tænastan ment munandi og hevur síðani 2017 virkað í øllum landinum. Harumframt verður arbeitt við at styrkja demensøkið við skjótari útgreinan og at viðgera og samantvinna tað við eina viðgerðarskipan fyri eldri við sálarligum trupulleikum.

| Virksemi á psyk. deplinum | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Innleggingar | 227 | 269 | 221 | 240 | 226 | 238 |
| Ambulantar viðtalur | 11.200 | 13.050 | 12.563 | 13.583 | 14.049 | 12.580 |
| Amb. viðtalur og viðg. íalt | 21.711 | 26.296 | 26.504 | 30.625 | 33.893 | 28.639 |

**Bráðdepilin**
Bráðdepilin umfatar bráðmóttøku/skaðastovu, intensiv við 5 seingjum, anæstesi og sjúkraflutningstænastuna og tænasturnar í forhøllini. Eisini verður kommunulæknavaktskipanin hýst í forhøllini.

| Virksemi á bráðdeplinum | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Innleggingar | 210 | 226 | 257 | 189 | 260 | 185 |
| Skaðastovuviðgerðir | 8.009 | 8.273 | 8.276 | 8.014 | 8.996 | 9.531 |
| Kommunulæknavaktin | 24.189 | 26.090 | 27.243 | 31.149 | 27.757 | 31.189 |
| Sjúkraflutningstúrar | 6.762 | 7.285 | 7.019 | 7.182 | 6.233 | 8.422 |

**Diagnostiski depilin**
Diagnostiski depilin umfatar røntgen, patologi og rannsóknarstovu.

Stórur vøkstur hevur verið í talinum av diagnostiskum kanningum seinnu árini. Tí eru útreiðslurnar øktar munandi til økið. Diagnostiska økið verður raðfest frammarlaga fyri, at Landssjúkrahúsið kann vera ført fyri at hava betri og skjótari sjúklingagongdir og meira ambulant virksemi.

| Virksemi á diagn. deplinum | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Røntgenkanningar | 36.511 | 37.417 | 36.600 | 35.838 | 38.937 | 39.657 |
| MR-skanningar | 1.549 | 2.188 | 2.640 | 2.822 | 3.367 | 3.160 |
| CT-skanningar | 6.702 | 7.161 | 7.481 | 8.133 | 9.113 | 9.182 |
| Rannsóknarstovukanningar | 706.868 | 775.139 | 920.887 | 1.012.139 | 1.261.549 | 1.175.101 |
| Harav innløgd | 269.637 | 273.237 | 349.269 | 358.787 | 420.160 | 447.005 |
| Harav ambulant | 437.231 | 501.902 | 571.618 | 653.352 | 841.389 | 728.096 |

**Familjudepilin**
Familjudepilin er stovnaður í 2021 við tí endamáli at stuðla undir allari tilgongdini hjá barnafamiljum, børnum og ungum, frá gitnaði, til barnið er 18 ár. Hesin depil brýtur frá hinum klinisku deplunum soleiðis, at hann byggir á sjúklingagongdir og funktiónir, heldur enn viðgerðarhættir og fakbólkar.

Við Familjudeplinum verður dentur lagdur á tvørfakliga fyribyrging, stuðul, kanning, viðgerð, uppfylging og trivnað fyri øll børn, uttan mun til um tey hava somatiska ella psykiatriska sjúku, avvarðandi teirra, umframt komandi foreldur og allar nýføðingar í Føroyum.

Nýggi bygnaðurin á Familjudeplinum skal stuðla undir sjúklingagongdini hjá barnakonum og børnum og eisini skapa ein organisatoriskan pall fyri einum meira útgangandi og fyribyrgjandi innsatsi á øllum økinum. Allar barnakonur og børn fáa á hendan hátt viðgerð á sama depli.

Nýggi Familjudepilin hevur 2 seingjardeildir við 24 seingjarplássum, sum fevna um Føðideildina, sum er flutt av Skurðdeplinum og Barnadeildina/B5, sum er flutt av Medisinska deplinum. Harumframt fevir depilin um ambulant virksemi umframt dagtilboð innan Barna- og ungdómspsykiatriina, sum er flutt av Psykiatriska deplinum. Læknafakliga fevnir Familjudepilin um gynækologi/obstetrik, barnasjúkur og barna & ungdómspsykatri.

Hagtølini fyri Familjudepilin eru í 2021 enn við í uppgerðunum hjá ávikavist skurð-, medisinska og psykiatriska deplinum, tí Familjudepilin varð stovnaður mitt í árinum 2021. Frá 2022 eru virksemishagtølini framleidd, so hesi avspegla depilin.

| Virksemi á familjudeplinum | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Innleggingar | | | | | | 4.399 |
| Ambulantar viðtalur | | | | | | 13.828 |
| Amb. viðtalur og viðg. í alt | | | | | | 21.389 |

**Tænastudepilin**
Tænastudepilin fevnir um rakstur av bygningum (umleið 50.000 fermetrar), uttanduraøki (umleið 150.000 fermetrar), tekniskar veitingar, medisinskan útbúnað, vaskarí, køk, goymslu, reingerð og húsavørð.

Goymslan økir støðugt sítt virksemi og veitir eisini tænastur til aðrar kundar innan heilsuverkið.

Tá ið flutt verður í H-bygningin, verður fermetratalið økt munandi, og fer tað at hava nógvar broytingar við sær fyri Tænastudepilin.

**Kliniskur stápur**
Kliniski stápurin er stovnaður í 2021 og hevur ábyrgd av ymiskum tvørgangandi uppgávum saman við, og fyri klinisku deplarnar. Hesar uppgávur verða tí miðsavnaðar í kliniska stápinum, so tær stuðla undir virkseminum í samlaða Sjúkrahúsverkinum.

Málið er, at Kliniski stápurin við sínum ymisku uppgávum bæði kann vera ein longdur armur og ein serstøk tænasta til klinisku deplarnar. Somuleiðis virkar stápurin sum bindilið millum stjórn, klinisku deplarnar og deildirnar í serstøku uppgávunum hjá stápinum.

Kliniski stápurin samstarvar við allar deplar og deildir og gongur undan í at samskipa, góðskutryggja og menna Sjúkrahúsverkið. Kliniski stápurin hevur uppgávur bæði í mun til sjúklingin og starvsfólkini í Sjúkrahúsverkinum. Kliniski stápurin fevnir um hagtalsfrøðingar, sjúklingaleiðbeinarar, dygdarmennarar, smittuverju, apotekseind, uttanlandstænastuna umframt virksemi við Serviðgerð uttanlands, herundir Sjúklingahotellið Tórshavn.

**Fyrisiting**
Fyrisitingin hevur nógvar rakstraruppgávur, m.a. lønarútgjalding, starvsfólkamál, bókhald, fíggjarstýring, KT, dygdareind, skrivarauppgávur og ráðlegging. Harumframt er KT-øki heilsuverksins.

KT er vorðin ein týðandi táttur í virkseminum á sjúkrahúsinum. Við talgildum skipanum er virksemið á sjúkrahúsinum í alt størri mun tengt at KT. Tað setir krøv til KT-økið á sjúkrahúsinum, bæði hvat viðvíkur rakstri og trygd.

Eisini er KT-trygdarøkið og dátuverndarfólk (DPO) skipað undir Fyrisitingini.

**Koronupass**
Landssjúkrahúsið hevur framhaldandi rakstur av innfrastrukturinum hjá talgilda føroyska koronupassinum. Europeiska koronapassi er flutt undir WHO.

**Játtanin**
Umframt lønarframskriving er játtanin fyri 2024 til vanliga virksemið á Landssjúkrahúsinum

framskrivað við 6,9 mió. kr. vegna broytta fólkasamanseting og við 9,2 mió. kr. til príshækkingar. Somuleiðis eru framskrivingar gjørdar fyri um 3,4 mió. kr. til fult virksemi at styrkja læknavaktina 1870 til fólk, ið bráðliga gerast illa fyri sálarliga og til dialysuøkið. Játtanin er hækkað við 5,3 mió. kr. til H-bygningin til innanhýsis viðlíkahald og service avtalur. Vanliga virksemið í 2024 er hækkað við 2,8 mió. kr. frá Avseting til serlæknar, 1,4 mió. kr. frá undirkontu 32. Krabbameinsátøk og lækkað við 400 tús. kr. vegna avtalu um Teistan.

Játtanirnar til Serviðgerð uttanlands, Flutning og uppihald og Sjúklingahotellið Tórshavn eru framskrivaðar við 5% út frá nýtsluni í 2022, t.e. við ávikavist 2,97 mió. kr., -3,7 mió. kr. og 1,26 mió. kr.

Játtanin til Avseting til serlæknar er sett til 3 mió. kr. í 2024.

Játtanin til KT-øki heilsuverksins er hækkað við 252 tús. kr., svarandi til 2,5 prosent.

Játtanin til Krabbameinsátøk er sett til 1,5 mió. kr. í 2024.

## Átekning

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum høvuðskontuna og høvuðskonturnar 11.20.3.10. Klaksvíkar sjúkrahús, 11.20.3.15. Suðuroyar sjúkrahús, og 11.20.3.19. Serstakur sjúkrahúsheilivágur.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 852.801 | 878.889 | 913.993 | 958.359 | 970.576 | 984.125 |
| Útreiðslur | 925.885 | 961.294 | 988.368 | 1.033.434 | 1.045.651 | 1.059.200 |
| Inntøkur | 73.084 | 82.404 | 74.375 | 75.075 | 75.075 | 75.075 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 661.766 | 677.685 | 696.673 | 740.077 | 747.528 | 754.841 |
| **Útreiðslur** | **706.914** | **730.440** | **737.573** | **780.977** | **788.428** | **795.741** |
| 11. Lønir v.m. | 455.153 | 482.372 | 532.239 | 557.012 | 557.012 | 557.012 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 235.731 | 227.038 | 194.379 | 213.010 | 220.461 | 227.774 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 9.982 | 14.349 | 6.705 | 6.705 | 6.705 | 6.705 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 4.702 | 4.994 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| 17. Avskrivingar o.a. | 191 | -184 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 368 | 517 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| 52. Tilskot til einstaklingar | -0 | -0 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 0 | 53 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 788 | 1.301 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **45.147** | **52.755** | **40.900** | **40.900** | **40.900** | **40.900** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *41.874* | *47.471* | *39.900* | *39.900* | *39.900* | *39.900* |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | *1.391* | *1.197* | *1.000* | *1.000* | *1.000* | *1.000* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *-385* | *-182* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *2.268* | *4.268* | - | - | - | - |

**22. Serviðgerð uttanlands**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 126.363 | 138.282 | 148.955 | 147.023 | 152.169 | 157.495 |
| **Útreiðslur** | **135.263** | **147.282** | **158.355** | **156.823** | **161.969** | **167.295** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 135.263 | 147.282 | 158.355 | 156.823 | 161.969 | 167.295 |
| **Inntøkur** | **8.900** | **9.000** | **9.400** | **9.800** | **9.800** | **9.800** |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *8.900* | *9.000* | *9.400* | *9.800* | *9.800* | *9.800* |

**25. Flutningur og uppihald**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 25.250 | 21.682 | 28.729 | 25.112 | 25.991 | 26.901 |
| **Útreiðslur** | **25.250** | **21.682** | **28.729** | **25.112** | **25.991** | **26.901** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 25.193 | 21.740 | 28.729 | 25.112 | 25.991 | 26.901 |
| 17. Avskrivingar o.a. | 57 | -57 | - | - | - | - |

**26. Sjúklingahotellið Tórshavn**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 22.808 | 24.131 | 25.345 | 26.604 | 25.345 | 25.345 |
| **Útreiðslur** | **24.252** | **25.733** | **27.580** | **28.839** | **27.580** | **27.580** |
| 11. Lønir v.m. | 10.710 | 11.408 | 13.724 | 14.983 | 13.724 | 13.724 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 6.295 | 7.053 | 6.137 | 6.137 | 6.137 | 6.137 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 306 | 164 | 67 | 67 | 67 | 67 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 6.942 | 7.107 | 7.652 | 7.652 | 7.652 | 7.652 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 0 | 1 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **1.444** | **1.602** | **2.235** | **2.235** | **2.235** | **2.235** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.444* | *1.602* | *2.235* | *2.235* | *2.235* | *2.235* |

**27. KT-øki heilsuverksins**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 9.129 | 9.758 | 10.091 | 10.343 | 10.343 | 10.343 |
| **Útreiðslur** | **10.572** | **10.314** | **11.091** | **11.343** | **11.343** | **11.343** |
| 11. Lønir v.m. | 3.387 | 3.784 | 5.299 | 5.551 | 5.551 | 5.551 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 5.139 | 6.522 | 5.482 | 5.482 | 5.482 | 5.482 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 3.007 | 8 | 70 | 70 | 70 | 70 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | - | 240 | 240 | 240 | 240 |
| 17. Avskrivingar o.a. | -960 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **1.443** | **556** | **1.000** | **1.000** | **1.000** | **1.000** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.443* | *556* | *1.000* | *1.000* | *1.000* | *1.000* |

**28. Avseting til serlæknar**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 894 | 3.376 | 2.800 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| **Útreiðslur** | **894** | **3.376** | **2.800** | **3.000** | **3.000** | **3.000** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 894 | 3.376 | 2.800 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |

**29. Fyribils Koronudeild**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 6.761 | 3.985 | - | - | - | - |
| **Útreiðslur** | **6.761** | **3.985** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 11. Lønir v.m. | 4.465 | 3.123 | - | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 480 | 659 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.816 | 203 | - | - | - | - |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **31. Steno miðstøðin** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **5.000** | **5.000** | **5.000** | **5.000** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | 500 | 500 | 500 | 500 |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **5.000** | **5.000** | **5.000** | **5.000** |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | - | - | *5.000* | *5.000* | *5.000* | *5.000* |
| **32. Krabbameinsátøk** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | 1.400 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **1.400** | **1.500** | **1.500** | **1.500** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 1.400 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| **33. H-bygningurin, kliniskt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | - | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **-** | **5.000** | **5.000** | **5.000** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | - | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | - | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| **40. Inntøkufíggjað virksemi (Vaskarí)** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -171 | -9 | 0 | -300 | -300 | -300 |
| **Útreiðslur** | **14.700** | **17.732** | **15.000** | **15.000** | **15.000** | **15.000** |
| 11. Lønir v.m. | 7.797 | 9.875 | 8.100 | 8.100 | 8.100 | 8.100 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 4.142 | 5.607 | 3.700 | 3.700 | 3.700 | 3.700 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 2 | - | 500 | 500 | 500 | 500 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.766 | 2.259 | 2.700 | 2.700 | 2.700 | 2.700 |
| 17. Avskrivingar o.a. | -7 | -9 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **14.871** | **17.741** | **15.000** | **15.300** | **15.300** | **15.300** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *14.871* | *17.741* | *15.000* | *15.300* | *15.300* | *15.300* |
| **45. Stuðulsfíggjað virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **1.278** | **749** | **840** | **840** | **840** | **840** |
| 11. Lønir v.m. | 802 | 207 | 672 | 672 | 672 | 672 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 196 | 496 | 168 | 168 | 168 | 168 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 280 | 46 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **1.278** | **749** | **840** | **840** | **840** | **840** |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | *118* | - | - | - | - | - |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *1.160* | *749* | *840* | *840* | *840* | *840* |

## Undirkonta 22. Serviðgerð uttanlands

Sambært § 5 í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, við seinni broytingum, hava persónar, ið búgva her í landinum, rætt til ókeypis viðgerð frá sjúkrahúsverkinum. Rætturin til ókeypis viðgerð fevnir eisini um viðgerð í Danmark ella í øðrum landi, tá ið ávísingin er gjørd í samsvari við galdandi leiðreglur.

Talva 1 vísir, hvussu ofta føroyskir sjúklingar verða sendir til serviðgerð uttanlands, og tal av sjúklingum.

| Talva 1 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Viðgerðaruppihald hjá føroyskum sjúklingum | 2.821 | 2.769 | 2.813 | 2.132 | 2.480 | 2.689 |
| Tal av sjúklingum | 1.590 | 1.582 | 1.606 | 1.397 | 1.605 | 1.662 |

Talva 2 vísir, hvussu nógvir fylgjarar eru visiteraðir at fylgja sjúklingunum til serviðgerð uttanlands.

| Talva 2 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av visiteraðum fylgjarum | 1.692 | 1.687 | 1.601 | 1.293 | 1.532 | 1.765 |

**Undirkonta 26. Sjúklingahotellið Tórshavn**
Endamálið við Sjúklingahotellinum Tórshavn er at hýsa sjúklingum og møguliga teimum, ið varða av sjúklingunum, sum føroyska sjúkrahúsverkið sendir niður til viðgerðar. Húsaleigan fyri Sjúklingahotellið Tórshavn verður prístalsjavnað á hvørjum ári. Danskt meirvirðisgjald er tikið við í játtanina hjá Sjúklingahotellinum Tórshavn.

Talva 3 vísir tal av yvirnáttingum seinastu árini.

| Talva 3 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Yvirnáttingar | 35.100 | 32.496 | 35.412 | 29.094 | 32.891 | 33.458 |

**Undirkonta 27. KT-øki heilsuverksins**
Játtanin fevnir um rakstur, viðlíkahald og menning av Talgildu heilsuskipanini (THS).

Játtanin verður brúkt til rakstur, ráðgeving, verkætlanarleiðslu, trygd, support, neyðugar dagføringar og viðlíkahald. Skipanin skal eisini víðarimennast, m.a. fyri at aðrir stovnar eisini skulu fáa møguleika fyri at verða partur av skipanini.

THS er verksett á teimum trimum sjúkrahúsunum, hjá øllum kommunulæknunum og Hvíldarheiminum Naina. THS er felags journal og samskiftisskipan í føroyska heilsuverkinum, og fleiri enn 1.000 heilsustarvsfólk brúka THS sum dagligt arbeiðsamboð. Ætlanin er, at THS skal nýtast í øllum heilsuverkinum, og farið er í gongd við at verkseta THS á eitt nú ellisheimum og Gigni.

Farið er í holt við at menna leiðslukunningina í THS, soleiðis at virksemið á heilsuøkinum kann verða lýst við góðskutryggjaðum hagtølum.

Í 2020 varð farið undir at dagføra medisinmodulið í THS fyri at tryggja samskiftið við Apoteksverkið um heilivágsskamtan. Arbeiðið er liðugt, og tað fer at tryggja, at heilivágslistarnir, eitt nú á ellisheimunum, eru rættir.

**Undirkonta 28. Avseting til serlæknar**
Sjúkrahúsverkið hevur seinastu árini sett fleiri serlæknar í starv, men enn vantar eina røð av fastsettum serlæknum og øðrum serútbúnum heilsustarvsfólkum, um málið skal røkkast, at flest allar kanningar og viðgerðir skulu veitast í Føroyum. Fyri framhaldandi at kunna bjóða føroyingum viðgerðir í Føroyum á sama stigi, sum okkara grannalond bjóða, er neyðugt at fáa fleiri serútbúgvin heilsustarvsfólk.

Síðani avsetingin til serlæknar byrjaði í 2017, er játtanin brúkt til at seta serlæknar og serútbúgvin heilsustarvsfólk. Tað er 2 hjartalæknar, 2 barna- og ungdóms psykiatarar, barnalækni, serlækni í kvinnusjúkum, eygnalækni, serlækni í diabetis, stofskifti o.ø. (endokrinologi), nýralækni (nefrologi) og maga- og tarmsjúkulækni (gastroenterologi).

**Undirkonta 29. Fyribils koronudeild**
Fyri at hava vanliga virksemið í gongd á sjúkrahúsinum hóast koronustøðuna varð ein koronudeild skipað í tíðarskeiðinum 2020 til 2022. Eingin játtan er til endamálið frameftir.

**Undirkonta 31. Steno miðstøðin**
Við grundarlagi í løgtingslóg nr. 126 frá 13. september 2022 um heimild at taka ímóti peningaupphædd frá Novo Nordisk Fonden verður farið undir stuðulsfíggjað virksemi. Virksemið verður skipað samsvarandi avtalu millum partarnar. Fyri landskassan verður talan um útreiðsluneutralt virksemi, tí útreiðslurnar javnviga við flytingarinntøkurnar frá Novo Nordisk grunninum.

**Undirkonta 32. Krabbameinsátøk**
Endamálið við játtanini er at íverkseta krabbameinsátøk. Samsvarandi Krabbameinsætlanini er eitt krabbameinsráð sett, ið skal gera tilmæli um, hvussu átøkini skulu íverksetast.

**Undirkonta 33. H-bygningurin, kliniskt virksemi**
Tað verður ein stór broyting í virkseminum, tá ið H-bygningurin verður tikin í nýtslu. Avsettar eru 5 mió. kr. til endamálið.

Nýggi sjúkrahúsbygningurin flytur føroyska sjúkrahúsverkið inn í eina nýggja tíð og veitir tíðarhóskandi karmar fyri sjúklingar og starvsfólk, sum flyta inn í nýggja bygningin, umframt at onnur viðgerðarøki fáa munandi betri hølisumstøður enn í dag. Eitt stórt frambrot er, at sjúklingarnir fáa einastovur í nýggja Sjúkrahúsbygninginum. Virksemið er so smátt byrjað at flyta inn í H-bygningin, t.d. køkur og endurvenjing er flutt, og annað virksemið flytur í 2024.

**Undirkonta 40. Inntøkufíggjað virksemi (Vaskarí)**
Vaskaríið verður rikið sum inntøkufíggjað virksemi, og umleið helvtin av umsetninginum kemur frá at vaska fyri almenn og privat virki. Kappingarráðið hevur í 2013 kannað viðurskiftini á vaskarínum og kom til, at mannagongdirnar eru í samsvari við galdandi reglur.

**Undirkonta 45. Stuðulsfíggjað virksemi**
Landssjúkrahúsið hevur sum mál, at starvsfólk skulu vera vælútbúgvin og mennast. Tað verður gjørt við at stuðla starvsfólkum at fara undir gransking innan heilsuøkið. Fígging fæst úr almennum grunnum og privatum grunnum, ið granskarin sjálvur stendur fyri at útvega. Meginreglan er, at øll gransking skal vera sjálvfíggjað. Granskingarverkætlanir fevna vanliga yvir fleiri fíggjarár.

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 45,1 | 48,2 | 60,8 | 60,8 | 60,8 | 60,8 |
| Onnur | 749,0 | 764,6 | 757,0 | 770,0 | 770,0 | 770,0 |
| Fulltíðarstørv | 794,1 | 812,8 | 817,8 | 830,8 | 830,8 | 830,8 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 455,2 | 482,4 | 532,2 | 557,0 | 557,0 | 557,0 |

**Starvsfólkayvirlit: 26 Sjúklingahotellið Tórshavn**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 16,9 | 16,9 | 16,9 | 16,9 | 16,9 | 16,9 |
| Fulltíðarstørv | 17,9 | 17,9 | 17,9 | 17,9 | 17,9 | 17,9 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 10,7 | 11,4 | 13,7 | 15,0 | 13,7 | 13,7 |

**Starvsfólkayvirlit: 27 KT-øki heilsuverksins**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 6,1 | 6,4 | 6,7 | 6,7 | 6,7 | 6,7 |
| Fulltíðarstørv | 6,1 | 6,4 | 6,7 | 6,7 | 6,7 | 6,7 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 3,4 | 3,8 | 5,3 | 5,6 | 5,6 | 5,6 |

**Starvsfólkayvirlit: 40 Inntøkufíggjað virksemi (Vaskarí)**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 22,3 | 25,0 | 25,0 | 25,0 | 25,0 | 25,0 |
| Fulltíðarstørv | 22,3 | 25,0 | 25,0 | 25,0 | 25,0 | 25,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 7,8 | 9,9 | 8,1 | 8,1 | 8,1 | 8,1 |

## 11.20.3.06. Medicoteknisk tól (Løgujáttan)

Neyðugt er støðugt at endurnýggja tólútbúnaðin hjá sjúkrahúsunum. Arbeitt verður við at samskipa íløgurnar hjá øllum trimum sjúkrahúsunum. Játtanin er ætlað bæði til medicoteknisk tól og sjúkrabilar.

Játtaðar vórðu 10 mió. kr. til nýggjan CT-skannara til Landssjúkrahúsið í 2022. Tøka játtanin fyri 2023 er 24,6 mió. kr. Roknað verður við at brúktar verða umleið 14,6 mió. kr. í 2023, og tí verða um 10 mió. kr. at flyta til 2024.

### Átekning

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 10.325 | 6.020 | 10.300 | 10.300 | 10.300 | 10.300 |
| Inntøkur | 25 | - | - | - | - | - |
| **10. Medicoteknisk tól** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **10.325** | **6.020** | **10.300** | **10.300** | **10.300** | **10.300** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 15 | 15 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -15 | -15 | - | - | - | - |
| 32. Útvegan av løgu o.ø. | 10.325 | 6.020 | 10.300 | 10.300 | 10.300 | 10.300 |
| **Inntøkur** | **25** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *25* | - | - | - | - | - |

## 11.20.3.08. Landssjúkrahúsið, útbygging (Løgujáttan)

### Undirkonta 10. Landssjúkrahúsið

Lógargrundarlagið undir játtanini er løgtingslóg nr. 129 frá 22. desember 2008 um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið, við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 64 frá 5. mai 2021 um at binda H- og B-bygningarnar á Landssjúkrahúsinum saman og um at keypa neyðgenerator, tól og útgerð og løgtingslóg nr. 82 frá 16. mai 2022 um at innrætta viðkaða partin av kjallarnum í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum til parkering, goymslu og reingerð, umframt til goymslutorn og vegleiðing í H-bygninginum. Uppskot til løgtingslóg um at byggja H-bygningin á Landssjúkrahúsinum lidnan er lagt fyri Løgtingið 7. september 2023.

Heitini á bygningunum hjá Landssjúkrahúsinum eystan fyri J.C. Svabosgøtu eru hesi:

- A-bygningurin er gamla Dronning Alexandrines Hospital
- B-bygningurin er høgi bygningurin, ið varð bygdur í 60-árunum
- C-bygningurin er tann, ið gongur frá B-bygninginum móti J.C. Svabosgøtu
- E-bygningurin er barakkin fram til J.C. Svabosgøtu
- G-bygningurin er nýggi bygningurin norðan frá B-bygninginum
- H-bygningurin er tann nýggi bygningurin, sum er í gerð

Eftir at verklagslógin um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið kom í gildi, er B-bygningurin umvældur og klæddur, svimjihylurin er umvældur, røntgendeildin er umbygd, og sektiónsstovan er flutt og dagførd. Vaskaríið er eisini dagført. Harumframt er og verður annað viðlíkahald gjørt.

Í 2012 varð gjørd byggiskrá sum grundarlag undir H-bygninginum, í 2016 varð arbeiðið at byggja boðið út, og í 2018 varð byrjað at byggja nýggjan meginbygning (H-bygningin) til psykiatri, medisinska seingjadeild, føðideild, barnadeild, høvuðskøk og endurvenjing.

H-bygningurin verður framhaldandi bygdur. Við hesum meginbygningi fara sjúkrahúsumstøðurnar innan nevndu økir at koma á nýmótans støði, umframt at onnur viðgerðarøki fáa munandi betri hølisumstøður enn í dag. Arbeiðið at binda H- og B-bygningarnar saman er eisini farið í gongd.

Sambært galdandi verklagslóg um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið kunnu útreiðslurnar í mesta lagi vera 799,5 mió. kr. fram til og við 2024.

Samsvarandi galdandi verklagslóg um at binda H- og B-bygningarnar saman og um at keypa neyðgenerator, tól og útgerð kunnu útreiðslurnar í mesta lagi vera 70,8 mió. kr. fram til og við 2024.

Samsvarandi uppskoti til løgtingslóg um at gera H-bygningin á Landssjúkrahúsinum lidnan verður biðið um 43,7 mió. kr.

Í 2022 vórðu brúktar 65 mió. kr. Í 2023 eru játtaðar 4 mió. kr. Umframt framfluttar 120,5 mió. kr. eru tí 124,5 mió. kr. tøkar í 2023. Nýtslan í 2023 verður mett til 94,5 mió. kr. Framfluttar verða sostatt 30 mió. kr. Játtanin fyri 2024 verður 47,7 mió. kr., harav 4 mió. kr. eru til viðlíkahald. Tøkar í 2024 verða sostatt 77,7 mió. kr.

**Undirkonta 11. Landssjúkrahúsið, framhaldandi byggistig**
Fyri framman eru aðrar verkætlanir. Játtanin var upprunaliga 10 mió. kr. og verður hon í mestan mun brúkt til ráðgeving til komandi verkætlanir og til at framtíðartryggja eitt virkisført sjúkrahúsverk. Framfluttar verða umleið 2 mió. kr. í óbrúktari játtan frá 2023 til at nýta í 2024.

**Undirkonta 12. Landssjúkrahúsið, Steno Miðstøðin**
Við grundarlagi í løgtingslóg nr. 126 frá 13. september 2022 um heimild at taka ímóti peningaupphædd frá Novo Nordisk Fonden er farið undir at fyrireika at byggja Steno Miðstøðina.

Fyrireikingararbeiðið sum prosjektering o.a. verður framt samsvarandi avtalu millum partarnar.

Peningaupphæddin, sum í mesta lagi er 62 mió. kr., verður sum heild brúkt til at prosjektera, bjóða út og byggja fyri.

Fyri landskassan verður talan um útreiðsluneutrala verkætlan, tí útreiðslurnar javnviga við flytingarinntøkurnar frá Novo Nordisk grunninum.

**Undirkonta 13. Landssjúkrahúsið, keyp av grundstykki**
Játtanin er í 2023 brúkt til at keypa eitt grundøkið við ástandandi sethúsum. Ognin liggur upp at økinum hjá Landssjúkrahúsinum. Grundøkið betrar um byggi- og nýtslustigi hjá sjúkrahúsinum.

**Átekning**
Landsstýriskvinnuni verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 153.660 | 67.950 | 18.250 | 67.700 | 36.000 | 4.000 |
| Inntøkur | - | - | 10.000 | 20.000 | 32.000 | - |
| **10. Landssjúkrahúsið** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **149.613** | **64.999** | **4.000** | **47.700** | **4.000** | **4.000** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | 2 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -2.930 | -3.621 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 149.613 | 64.999 | 4.000 | 47.700 | 4.000 | 4.000 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 2.930 | 3.619 | - | - | - | - |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **11. Landssjúkrahúsið, framhaldandi byggistig** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **4.047** | **2.951** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -515 | -569 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 4.047 | 2.951 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 515 | 569 | - | - | - | - |
| **12. Landssjúkrahúsið, Steno miðstøðin** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **10.000** | **20.000** | **32.000** | **-** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | - | - | 10.000 | 20.000 | 32.000 | - |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **10.000** | **20.000** | **32.000** | **-** |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | - | - | *10.000* | *20.000* | *32.000* | - |
| **13. Landssjúkrahúsið, keyp av grundstykki** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **4.250** | **-** | **-** | **-** |
| 32. Útvegan av løgu o.ø. | - | - | 4.250 | - | - | - |

## 11.20.3.10. Klaksvíkar sjúkrahús (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir sjúkrahúsverkinum er løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, við seinni broytingum.

Klaksvíkar sjúkrahús hevur 22 føst seingjarpláss, 3 fastar yvirlæknar og 9 fastar konsulentar, umframt aðrar avloysarar. Uppgávan hjá sjúkrahúsinum er at viðgera, røkta og rehabilitera sjúklingar.

Á skuðrgongini verða viðgerðir veittar m.a. innan ortopedi, uroloig og almenkirurgi og endoskopi. Flestu skurðviðgerðir eru dagskurðviðgerðir, og er ambulanta virksemið nógv økt tey síðstu árini.

Seingjadeildini er bæði medisinsk og kirurgisk seingjardeild við 22 seingjarplássum, umframt 4 plássum til dagskurð og 1 observatiónsplássi.

Hjálparlæknar røkja forvaktina á skaðastovuni, meðan kirurgur røkir dagliga virksemið á skurðgongini. Avloysarar røkja sergreinina anæstesi. Klaksvíkar sjúkrahús samstarvar við Landssjúkrahúsið innan læknaligu serøkini. Eisini er samstarv við Læknavaktina, har læknin í læknavaktini kann ávísa sjúklingar í nærumhvørvinum á skaðastovuna eftir avtalu.

Harumframt er landsfevnandi svøvnkøvuambulatorium, ryggambulatorium og serligt viðgerðartilboð til børn. Sjúkrahúsið hevur harumframt endurvenjingartilboð, eitt nú til fólk við gikt og sclerosu.

Klaksvíkar sjúkrahús hevur rannsóknarvirksemi í Læknamiðstøðini í Gøtudali og Runavík.

Samsvarandi menningarætlanini er endurvenjing fyri seinheilaskaða skipað á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

### Játtanin

Umframt lønarframskriving er játtanin fyri 2024 hækkað við 998 tús. kr. vegna broytta fólkasamanseting.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 93.291 | 96.404 | 99.805 | 103.171 | 104.202 | 105.244 |
| Útreiðslur | 97.057 | 99.598 | 103.676 | 107.042 | 108.073 | 109.115 |
| Inntøkur | 3.766 | 3.194 | 3.871 | 3.871 | 3.871 | 3.871 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 93.291 | 96.404 | 99.805 | 103.171 | 104.202 | 105.244 |
| **Útreiðslur** | **97.057** | **99.598** | **103.676** | **107.042** | **108.073** | **109.115** |
| 11. Lønir v.m. | 72.767 | 75.193 | 82.307 | 85.193 | 85.193 | 85.193 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 19.889 | 19.862 | 18.119 | 18.599 | 19.630 | 20.672 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 2.396 | 2.447 | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.478 | 1.608 | 1.300 | 1.300 | 1.300 | 1.300 |
| 17. Avskrivingar o.a. | - | 15 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 426 | 347 | 450 | 450 | 450 | 450 |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 5 | 10 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 96 | 116 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **3.766** | **3.194** | **3.871** | **3.871** | **3.871** | **3.871** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.950* | *2.102* | *3.771* | *3.771* | *3.771* | *3.771* |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | - | - | *100* | *100* | *100* | *100* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *1.816* | *1.092* | - | - | - | - |

**Virksemisyvirlit**

| **Virksemisyvirlit** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Innleggingar | 1.351 | 1.507 | 1.498 | 1.287 | 1.245 | 1.198 |
| **Virksemi á skurð. og med.** | | | | | | |
| Skurðviðgerðir | 531 | 616 | 717 | 631 | 724 | 793 |
| Skaðastovuviðgerðir | 3.621 | 4.018 | 3.952 | 3.404 | 2.827 | 3.304 |
| Ambulantar viðgerðir | 15.838 | 17.232 | 19.389 | 20.665 | 20.573 | 18.356 |
| Amb. viðtalur og viðgerðir íalt | 17.394 | 19.652 | 23.125 | 26.759 | 25.631 | 24.296 |
| **Virksemi á diagn. deplinum** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** |
| **A. Røntgen** | | | | | | |
| Kanningar | 5.942 | 6.500 | 6.543 | 6.213 | 6.673 | 6.837 |
| **B. Rannsóknarstovan** | **188.253** | **208.323** | **231.821** | **250.918** | **283.083** | **299.748** |
| Innløgd | 24.846 | 24.333 | 32.962 | 47.164 | 40.931 | 49.092 |
| Ambulant | 163.407 | 183.990 | 198.859 | 203.754 | 242.152 | 250.656 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 4,2 | 4,9 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| Onnur | 134,5 | 132,4 | 134,5 | 134,5 | 134,5 | 134,5 |
| Fulltíðarstørv | 138,7 | 137,3 | 139,5 | 139,5 | 139,5 | 139,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 72,8 | 75,2 | 82,3 | 85,2 | 85,2 | 85,2 |

### 11.20.3.11. Klaksvíkar sjúkrahús (Løgujáttan)

Lógargrundarlagið undir játtanini er løgtingslóg nr. 75 frá 6. mai 2022 um at umvæla og umbyggja gomlu læknahúsini, tað gula húsið, til fyrisitingarbygning o.a. hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Harumframt verður arbeitt við uppskoti til starvsfólkabygningin og móttøku til sjúkraflutningstænastuna.

Gomlu læknahúsini vórðu bygd í 1923 og eru ogn hjá landinum. Tey verða sett í stand til fyrisiting. Talan er um at útvega 10 skrivstovupláss, fundarhøli, viðtaluhøli, arbeiðsklivar og skjalasavn. Bygningurin verður innrættaður við fáum broytingum, soleiðis at dámurin á húsunum verður varðveittur.

Projektering av starvsfólkabygninginum er í gongd og væntast liðug um ársskiftið.

Í 2022 varð brúkt 1 mió. kr. Í 2023 eru játtaðar 10 mió. kr. Umframt framfluttar 8,5 mió. kr. eru tí 18,5 mió. kr. tøkar í 2023. Nýtslan í 2023 verður mett til 9 mió.kr. Framfluttar verða sostatt 9,5 mió. kr. Játtanin fyri 2024 verður 10 mió. kr. Tøkar í 2024 verða sostatt 19,5 mió. kr.

### Átekning
Landsstýriskvinnuni verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 1.568 | 962 | 10.000 | 10.000 | - | - |
| **10. Klaksvíkar sjúkrahús** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.568** | **962** | **10.000** | **10.000** | **-** | **-** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -140 | -143 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 1.568 | 962 | 10.000 | 10.000 | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 140 | 143 | - | - | - | - |

### 11.20.3.15. Suðuroyar sjúkrahús (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir sjúkrahúsverkinum er løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, við seinni broytingum.

Suðuroyar sjúkrahús er eitt akuttsjúkrahús, sum hevur eina felags seingjardeild fyri heiliráð- og skurðøkið við 46 seingjarplássum. Uppgávan hjá sjúkrahúsinum er at kanna, viðgera, røkta og venja sjúklingar uppaftur. Á Suðuroyar sjúkrahúsi eru settir ein yvirlækni innan kirurgi, ein medisinskur yvirlækni og ein yvirlækni í anæstesi, sum eisini virkar sum serlækni í pínuviðgerð. Á skurðøkinum verður viðgerð veitt m.a. innan urologi, ortopædi, plastikkkirugi og almenna kiurgi. Suðuroyar sjúkrahús hevur eina bráðfeingis tilbúgvingarskipan alt døgnið. Sjúkrahúsið hevur umframt egna rannsóknarstovu, eisini rannsóknarstovuvirksemi á Læknamiðstøðini í Vági tvær ferðir um vikuna og koyritænastu í oynni til eldri og avlamnar borgarar eina ferð um vikuna. Sjúkrahúsið hevur røntgendeild við CT-skannara og røntgen, ið er mannað alt døgnið. Á Suðuroyar sjúkrahúsið eru høli og útgerð gjørd klár til hemodialysuviðgerð.

Hjálparlæknar røkja læknaforvaktina, ið er skipað soleiðis, at hon millum kl. 16 og kl. 8 eisini virkar sum vakthavandi í samstarvi við kommunulæknaskipanina (1870).

Samsvarandi menningarætlanini hevur sjúkrahúsið landsfevnandi pínuviðgerð. Afturat serlæknanum í pínuviðgerð verða stuðulstænastur veittar innan sálarfrøði, sjúkrarøkt, sosialráðgeving, fysioterapi og ergoterapi. Sjúkrahúsið hevur harumframt onnur endurvenjingartilboð, eitt nú til fólk við parkinson.

## Játtanin

Umframt lønarframskriving er játtanin fyri 2024 hækkað við 871 tús. kr. vegna broytta fólkasamanseting. Játtað var 1 mió. kr. í 2023 til dialysuútgerð. Útreiðslan er 300 tús. kr. um árið frameftir.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 80.085 | 85.475 | 87.125 | 89.413 | 90.307 | 91.188 |
| Útreiðslur | 82.864 | 87.755 | 90.495 | 92.783 | 93.677 | 94.558 |
| Inntøkur | 2.779 | 2.280 | 3.370 | 3.370 | 3.370 | 3.370 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 80.085 | 85.475 | 87.125 | 89.413 | 90.307 | 91.188 |
| **Útreiðslur** | **82.864** | **87.755** | **90.495** | **92.783** | **93.677** | **94.558** |
| 11. Lønir v.m. | 64.812 | 68.588 | 73.667 | 76.248 | 76.248 | 76.248 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 13.829 | 15.555 | 14.545 | 14.252 | 15.146 | 16.027 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 2.930 | 2.335 | 1.251 | 1.251 | 1.251 | 1.251 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 931 | 858 | 785 | 785 | 785 | 785 |
| 17. Avskrivingar o.a. | - | 44 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 312 | 290 | 247 | 247 | 247 | 247 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 49 | 86 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **2.779** | **2.280** | **3.370** | **3.370** | **3.370** | **3.370** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.703* | *1.650* | *1.070* | *1.070* | *1.070* | *1.070* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *878* | *428* | - | - | - | - |
| 77. Flyting frá kommunum | *198* | *202* | *2.300* | *2.300* | *2.300* | *2.300* |

**Virksemisyvirlit**

| **Virksemisyvirlit** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Innleggingar | 967 | 1.084 | 1.169 | 1.040 | 1.232 | 1.170 |
| **Virksemi á skurð. og med.** | | | | | | |
| Skurðviðgerðir | 258 | 360 | 346 | 321 | 404 | 393 |
| Skaðastovuviðgerðir | 989 | 1.219 | 1.177 | 1.488 | 1.296 | 1.144 |
| Ambulantar viðgerðir | 11.942 | 12.559 | 11.440 | 10.018 | 11.199 | 11.139 |
| Amb. viðtalur og viðgerðir íalt | 12.547 | 14.942 | 15.019 | 14.091 | 14.246 | 13.719 |

| **Virksemi á diagn. deplinum** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A. Røntgen** | | | | | | |
| Kanningar | 1.758 | 2.129 | 2.009 | 1.795 | 2.610 | 1.858 |
| CT-skanningar | - | - | - | 525 | 925 | 729 |
| **B. Rannsóknarstovan** | **103.264** | **111.505** | **113.745** | **112.823** | **132.312** | **137.949** |
| Innløgd | 38.334 | 38.851 | 40.928 | 40.092 | 43.816 | 45.070 |
| Ambulant | 64.930 | 72.654 | 72.817 | 72.731 | 88.496 | 92.879 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 5,3 | 5,3 | 4,0 | 4,0 | 4,0 | 4,0 |
| Onnur | 112,7 | 113,2 | 115,4 | 115,4 | 115,4 | 115,4 |
| Fulltíðarstørv | 118,0 | 118,5 | 119,4 | 119,4 | 119,4 | 119,4 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 64,8 | 68,6 | 73,7 | 76,2 | 76,2 | 76,2 |

## 11.20.3.16. Suðuroyar sjúkrahús (Løgujáttan)

Í 2021 varð játtan útvegað til at dagføra røntgenútgerð og røntgenrúmið. Tað arbeiðið er liðugt.

Sambært støðulýsing er átrokandi at fáa skift klædning og vindeygu á Suðuroyar sjúkrahúsi.

Í 2023 eru 3 mió. kr. í játtan til tað átrokandi viðlíkahaldið, og er fyrireikandi arbeiðið byrjað. Møguliga verður øll upphæddin ikki brúkt í 2023.

Í 2024 eru 6 mió. kr. afturat í játtan til verkætlanina og annað viðlíkahald.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 611 | - | 3.000 | 6.000 | - | - |
| **10. Suðuroyar sjúkrahús** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **611** | **-** | **3.000** | **6.000** | **-** | **-** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 24 | - | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 588 | - | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -611 | - | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 611 | - | 3.000 | 6.000 | - | - |

## 11.20.3.19. Serstakur sjúkrahúsheilivágur (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir sjúkrahúsverkinum er løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, við seinni broytingum.

Heilivágsráðið, sum er ráðgevandi hjá landsstýriskvinnuni, ásetir leiðreglur fyri nýtsluna av serstøkum sjúkrahúsheilivági í sjúkrahúsverkinum og hevur eftirlit við nýtsluni av heiliváginum.

Út frá gongdini seinastu árini, bæði í Føroyum og í londunum rundan um okkum, kann væntast, at vøksturin í heilivágsútreiðslunum fer at halda fram. Framhaldandi gransking og menning innan heilivágsframleiðslu ger, at nýggjur og betri heilivágur alsamt kemur á marknaðin.

### Játtanin
Játtanin fyri 2024 er framskrivað við 3,3 mió. kr., svarandi til 5 prosent.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 62.505 | 63.787 | 66.630 | 69.962 | 72.411 | 74.946 |
| Útreiðslur | 62.505 | 63.787 | 66.630 | 69.962 | 72.411 | 74.946 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 62.505 | 63.787 | 66.630 | 69.962 | 72.411 | 74.946 |
| **Útreiðslur** | **62.505** | **63.787** | **66.630** | **69.962** | **72.411** | **74.946** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 62.505 | 63.787 | 66.630 | 69.962 | 72.411 | 74.946 |

## 11.20.3.21. Endurvenjing (Rakstrarjáttan)

Játtanin hevur verið brúkt til at menna endurvenjingartilboð í sjúkrahúsunum.

Eingin játtan er til endamálið í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 3.597 | 2.192 | - | - | - | - |
| Útreiðslur | 3.597 | 2.192 | - | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 3.597 | 2.192 | - | - | - | - |
| **Útreiðslur** | **3.597** | **2.192** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 3.597 | 2.192 | - | - | - | - |

## 11.20.3.22. Greiningar- og viðgerðarmiðstøðin (Rakstrarjáttan)

Játtanin var ætlað til greiningar- og viðgerðarmiðstøð í sambandi við endurvenjing.

Í sambandi við hesa játtanina er ein arbeiðsbólkur við umboðum úr Heilsumálaráðnum, Almannamálaráðnum og Kommunufelagnum settur at lýsa, hvørjar avbjóðingar eru á rehabiliteringsøkinum í dag. Arbeiðsbólkurin skal lata landsstýriskvinnuni tilmæli um, hvørt avbjóðingarnar á rehabiliteringsøkinum kunnu loysast við lóggávu ella á annan hátt.

Arbeiðsbólkurin er ikki liðugur við arbeiðið. Eingin játtan er til endamálið í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | - | - | 1.000 | - | - | - |
| Útreiðslur | - | - | 1.000 | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | 1.000 | - | - | - |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **1.000** | **-** | **-** | **-** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 700 | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | 300 | - | - | - |

## 11.20.3.23. Umsiting av sjúklingatrygging (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir umsitingini av sjúklingatryggingini er anordning nr. 1248 frá 19. desember 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet, við seinni broytingum.

Fyri at vera við í partinum um sjúklingatrygging samsvarandi lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet verða umsitingarútreiðslurnar at gjalda donsku tryggingarskipanini.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 819 | 582 | 900 | 900 | 900 | 900 |
| Útreiðslur | 819 | 582 | 900 | 900 | 900 | 900 |
| **20. Umsiting av sjúklingatrygging** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 819 | 582 | 900 | 900 | 900 | 900 |
| **Útreiðslur** | **819** | **582** | **900** | **900** | **900** | **900** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 819 | 582 | 900 | 900 | 900 | 900 |

## 11.20.3.24. Sjúklingatrygging (Lógarbundin játtan)

Lógargrundarlagið undir sjúklingatryggingini er anordning nr. 1248 frá 19. desember 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet, við seinni broytingum.

Tað er sera torført at meta um, hvussu nógv fer at verða goldið í endurgjøldum. Endurgjald til sjúklingar verða útreiðsluførd í tí fíggjarári, avgerð um endurgjald verður tikin.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 7.282 | 3.285 | 5.000 | 6.000 | 6.000 | 6.000 |
| **01. Sjúklingatrygging** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **7.282** | **3.285** | **5.000** | **6.000** | **6.000** | **6.000** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 7.282 | 3.285 | 5.000 | 6.000 | 6.000 | 6.000 |

## 11.20.3.25. Hvíldarheimið Naina (Rakstrarjáttan)

Hvíldarheimið Naina virkar sambært løgtingslóg nr. 18 frá 9. apríl 1964 um raksturin av hvíldarheiminum Naina. Sambært lógini letur landskassin árligan studning. Írestandi útreiðslur gjalda kommunurnar í mun til dagarnar, íbúgvarnir í viðkomandi kommunu hava verið á heiminum.

Á heiminum er pláss fyri 25 fólkum. Heimið er ætlað sum hvíldar- og eftirbataheim. Innleggingartíðin er í mesta lagi fýra vikur í senn.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 3.398 | 3.453 | 3.569 | 3.856 | 3.856 | 3.856 |
| Útreiðslur | 8.393 | 8.414 | 8.680 | 9.182 | 9.182 | 9.182 |
| Inntøkur | 4.995 | 4.961 | 5.111 | 5.326 | 5.326 | 5.326 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 3.398 | 3.453 | 3.569 | 3.856 | 3.856 | 3.856 |
| **Útreiðslur** | **8.393** | **8.414** | **8.680** | **9.182** | **9.182** | **9.182** |
| 11. Lønir v.m. | 6.858 | 7.027 | 7.260 | 7.762 | 7.762 | 7.762 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.181 | 1.193 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 281 | 82 | 120 | 120 | 120 | 120 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 73 | 112 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -0 | -0 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **4.995** | **4.961** | **5.111** | **5.326** | **5.326** | **5.326** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *12* | *6* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *86* | - | - | - | - | - |
| 77. Flyting frá kommunum | *4.897* | *4.955* | *5.111* | *5.326* | *5.326* | *5.326* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 14,5 | 14,5 | 14,5 | 14,5 | 14,5 | 14,5 |
| Fulltíðarstørv | 14,5 | 14,5 | 14,5 | 14,5 | 14,5 | 14,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 6,9 | 7,0 | 7,3 | 7,8 | 7,8 | 7,8 |

## 11.20.3.26. Hvíldarheimið Naina (Løgujáttan)

Hvíldarheimið Naina hevur víst á, at atkomuumstøðurnar ikki eru nóg góðar. Hvíldarheimið hevur arbeitt við at finna eina loysn. Húsini eru í trimum hæddum, og er ein partur av loysnini at fáa eina lyft inni í húsunum, og at ein skrái verður gjørdur uttanfyri, fram við húsunum.

Mett verður, at samlaði kostnaðurin er um 3,9 mió. kr. Arbeiðið er ikki sett í gongd, og eingin játtan er til endamálið í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | - | - | 3.900 | - | - | - |
| Inntøkur | - | - | 2.900 | - | - | - |
| **10. Hvíldarheimið Naina** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **3.900** | **-** | **-** | **-** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | - | - | 3.900 | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **2.900** | **-** | **-** | **-** |
| 77. Flyting frá kommunum | - | - | *2.900* | - | - | - |

## 11.20.3.28. Felags fyri Sjúkrahúsverkið (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir sjúkrahúsverkinum er løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, við seinni broytingum.

**Undirkonta 20. Vanligt virksemi Heilsugranskingareindin**
Heilsugranskingareindin savnar heilsugransking á einum stað, soleiðis at tað granskingarvirksemið, sum var á Deildini fyri arbeiðs- og almannaheilsu, í Ílegusavninum, í Fólkaheilsuráðnum, í Sjúkrahúsverkinum og møguligt annað granskingarvirksemið, verður flutt til hesa játtanina.

**Undirkonta 21. Felags rakstur fyri Sjúkrahúsverkið**
Játtanin verður brúkt til felags rakstur í Sjúkrahúsverkinum. Avsettar eru 1,5 mió. kr. til virksemið.

**Undirkonta 22. Universitets sjúkrahús**
Ætlanin við hesi játtan er at fyrireika Sjúkrahúsverkið til Universitets sjúkrahús, samsvarandi tilmælunum í áliti um Universitets sjúkrahús, september 2023. Avsettar eru 1,5 mió. kr. til endamálið.

**Undirkonta 45. Stuðulsfíggjað virksemi**
Heilsugranskingareindin skal standa fyri heilsugransking innan Sjúkrahúsverkið. Virksemið, sum hevur verið í neyvum samstarvi við starvsfelagar í Evropa, USA og Asia, er fíggjað við peningi úr almennum og privatum grunnum í USA, ES og Danmark.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 412 | -334 | 1.294 | 4.322 | 4.322 | 4.322 |
| Útreiðslur | 5.545 | 6.576 | 5.294 | 8.322 | 8.322 | 8.322 |
| Inntøkur | 5.133 | 6.910 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| **20. Heilsugranskingareindin** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | 1.294 | 1.322 | 1.322 | 1.322 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **1.294** | **1.322** | **1.322** | **1.322** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 994 | 1.022 | 1.022 | 1.022 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | 200 | 200 | 200 | 200 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | 100 | 100 | 100 | 100 |

**21. Felags rakstur**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | - | - | - | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **-** | **1.500** | **1.500** | **1.500** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | - | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | - | 400 | 400 | 400 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | - | 100 | 100 | 100 |

**22. Universitets sjúkrahús**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | - | - | - | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **-** | **1.500** | **1.500** | **1.500** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | - | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | - | 400 | 400 | 400 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | - | 100 | 100 | 100 |

**45. Stuðulsfíggjað virksemi**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 412 | -334 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **5.545** | **6.576** | **4.000** | **4.000** | **4.000** | **4.000** |
| 11. Lønir v.m. | 3.643 | 4.286 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.902 | 2.290 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| **Inntøkur** | **5.133** | **6.910** | **4.000** | **4.000** | **4.000** | **4.000** |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *1.853* | *1.942* | *1.500* | *1.500* | *1.500* | *1.500* |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *3.280* | *4.968* | *2.500* | *2.500* | *2.500* | *2.500* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Heilsugranskingareindin**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | 0,5 | 0,5 | 0,5 | 0,5 |
| Onnur | - | - | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Fulltíðarstørv | - | - | 1,5 | 1,5 | 1,5 | 1,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | - | - | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |

**Starvsfólkayvirlit: 45 Stuðulsfíggjað virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | - | - | 7,5 | 7,5 | 7,5 | 7,5 |
| Fulltíðarstørv | - | - | 7,5 | 7,5 | 7,5 | 7,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 3,6 | 4,3 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |

## 11.20.3.30. Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu (Rakstrarjáttan)

Í 2023 vórðu játtanin og uppgávurnar viðvíkjandi m.a. heilsufakligari ráðgeving hjá Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu fluttar til Fólkaheilsustýrið. Tær klinisku uppgávunar innan arbeiðs- og umhvørvislæknafrøði vórðu fluttar til Sjúkrahúsverkið.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 2.257 | 2.267 | - | - | - | - |
| Útreiðslur | 2.388 | 2.484 | - | - | - | - |
| Inntøkur | 131 | 218 | - | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 2.257 | 2.267 | - | - | - | - |
| **Útreiðslur** | **2.388** | **2.484** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 11. Lønir v.m. | 2.067 | 2.075 | - | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 322 | 401 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 8 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **131** | **218** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *131* | *218* | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | - | - | - | - |
| Onnur | 2,5 | 2,5 | - | - | - | - |
| Fulltíðarstørv | 3,5 | 3,5 | - | - | - | - |
| Lønarpartur (mio kr.) | 2,1 | 2,1 | - | - | - | - |

# 11.20.4. Viðgerðarstovnar

## 11.20.4.02. Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (Rakstrarjáttan)

Løgtingslóg nr. 53 frá 7. mai 2019 um virksemi á stovnum, ið veita rúsviðgerð, kom í gildi 1. januar 2020. Viðgerðarstovnar átaka sær at viðgera fyri bundni av rúsdrekka ella rúsevnum.

Viðgerðarheimið á Velbastað hevur til endamáls at virka sum viðgerðarstaður fyri rúsdrekkamisnýtarar o.o. Eisini hevur stovnurin familjuviðgerð.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 8.370 | 8.169 | 8.737 | 8.931 | 8.931 | 8.931 |
| Útreiðslur | 8.370 | 8.169 | 8.737 | 8.931 | 8.931 | 8.931 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 8.370 | 8.169 | 8.737 | 8.931 | 8.931 | 8.931 |
| **Útreiðslur** | **8.370** | **8.169** | **8.737** | **8.931** | **8.931** | **8.931** |
| 11. Lønir v.m. | 6.307 | 6.569 | 6.965 | 7.159 | 7.159 | 7.159 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.907 | 1.497 | 1.520 | 1.520 | 1.520 | 1.520 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 68 | 50 | 60 | 60 | 60 | 60 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 64 | 40 | 30 | 30 | 30 | 30 |
| 55. Íløgustuðul o.a. | - | - | 162 | 162 | 162 | 162 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 23 | 13 | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 13,1 | 13,0 | 13,0 | 13,0 | 13,0 | 13,0 |
| Fulltíðarstørv | 13,1 | 13,0 | 13,0 | 13,0 | 13,0 | 13,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 6,3 | 6,6 | 7,0 | 7,2 | 7,2 | 7,2 |

## 11.20.4.03. Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið (Rakstrarjáttan)

Løgtingslóg nr. 53 frá 7. mai 2019 um virksemi á stovnum, ið veita rúsviðgerð, kom í gildi 1. januar 2020. Viðgerðarstovnar átaka sær at viðgera fyri bundni av rúsdrekka ella rúsevnum.

Blákrossheimið hevur til endamáls at virka sum viðgerðar- og avrúsingarstaður og familju- og ambulantur viðgerðarstaður.

Harumframt hevur stovnurin ambulant viðgerðartilboð til ung, yngri enn 18 ár við rúsevnatrupulleikum.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 9.275 | 9.390 | 9.663 | 9.872 | 9.872 | 9.872 |
| Útreiðslur | 9.647 | 9.546 | 9.693 | 9.902 | 9.902 | 9.902 |
| Inntøkur | 372 | 155 | 30 | 30 | 30 | 30 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 9.275 | 9.390 | 9.663 | 9.872 | 9.872 | 9.872 |
| **Útreiðslur** | **9.647** | **9.546** | **9.693** | **9.902** | **9.902** | **9.902** |
| 11. Lønir v.m. | 7.068 | 7.110 | 7.527 | 7.736 | 7.736 | 7.736 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.810 | 1.663 | 1.483 | 1.483 | 1.483 | 1.483 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 121 | 177 | 60 | 60 | 60 | 60 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 647 | 596 | 623 | 623 | 623 | 623 |
| **Inntøkur** | **372** | **155** | **30** | **30** | **30** | **30** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *357* | *155* | *30* | *30* | *30* | *30* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *15* | - | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 13,9 | 13,5 | 13,5 | 13,5 | 13,5 | 13,5 |
| Fulltíðarstørv | 13,9 | 13,5 | 13,5 | 13,5 | 13,5 | 13,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 7,1 | 7,1 | 7,5 | 7,7 | 7,7 | 7,7 |

## 11.20.4.04. Viðgerðarstovnurin Frælsi (Rakstrarjáttan)

Løgtingslóg nr. 53 frá 7. mai 2019 um virksemi á stovnum, ið veita rúsviðgerð, kom í gildi 1. januar 2020. Viðgerðarstovnar átaka sær at viðgera fyri bundni av rúsdrekka ella rúsevnum.

Viðgerðarstovnurin Frælsi á Eiði hevur til endamáls at virka sum viðgerðarstaður til ung við rúsdrekka- og rúsevnatrupulleikum. Eisini hevur stovnurin skeið fyri avvarðandi.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 4.924 | 5.728 | 5.675 | 5.879 | 5.879 | 5.879 |
| Útreiðslur | 4.924 | 5.728 | 5.675 | 5.879 | 5.879 | 5.879 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 4.924 | 5.728 | 5.675 | 5.879 | 5.879 | 5.879 |
| **Útreiðslur** | **4.924** | **5.728** | **5.675** | **5.879** | **5.879** | **5.879** |
| 11. Lønir v.m. | 3.765 | 4.404 | 4.835 | 5.039 | 5.039 | 5.039 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.017 | 1.170 | 720 | 720 | 720 | 720 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 133 | 131 | 120 | 120 | 120 | 120 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 9 | 5 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 17 | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 8,0 | 8,8 | 9,0 | 9,0 | 9,0 | 9,0 |
| Fulltíðarstørv | 8,0 | 8,8 | 9,0 | 9,0 | 9,0 | 9,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 3,8 | 4,4 | 4,8 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |

Viðmerkingar

# § 12 Almanna- og mentamál

## Felagsútreiðslur

### 12.11.1. Fyrisiting

#### 12.11.1.26. Almanna- og mentamálaráðið (Rakstrarjáttan)

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum umsitur málsøkini almanna-, javnstøðu- og mentamál og er ovasti fyrisitingarligi leiðari í Almanna- og mentamálaráðnum.

Uppgávan hjá Almanna- og mentamálaráðnum er:

- at ráðgeva landsstýriskvinnuni
- at tilevna lógaruppskot, kunngerðir og aðrar reglur
- at veita stovnum og øðrum undir ráðnum ráð og vegleiðing

Umframt lønarframskriving er játtanin fyri 2024 framskrivað til fult virksemi í samband við, at starvsfólkahópurin frá miðskeiðis í 2023 varð tillagaður broyttum málsøkjabýti, tá ið nýtt landsstýri varð skipað.

**Undirkonta 27. Heildarætlan um harðskap**
Játtanin skal nýtast til nýggju heildarætlanina um harðskap í parløgum og nærsambondum 2023-2028. Arbeiðið byggir víðari á fyrru heildarætlanir um harðskap í parløgum og nærsambondum og heildarætlanina um kynsligan ágang: at upplýsa og fyribyrgja harðskapi, átøk sum stuðul til harðskaparrakt og átøk, ið venda sær til yrkisbólkar. Eisini er ætlanin at byggja upp tvey nýggj øki; átøk, ið lætta um atgongdina til hjálp í sambandi við harðskapin (dulnevnd harðskapsráðgeving - hotline), og átøk at stuðla undir vísindaligum kanningararbeiði innan harðskapsøkið. Játtanin er hækkað við 147 tús. kr. til endamálið.

Fluttar eru 729 tús. kr. frá undirkontu 27. Heildarætlanir til undirkontu 20. Vanligt virksemi, sum eru útreiðslur til rakstur og løn hjá samskiparanum av heildarætlanini. Á tann hátt sæst betur, hvussu nógv er sett av til harðsskapsátøk sambært heildarætlanini.

**Átekning**
Landsstýriskvinnuni verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum høvuðskontuna og høvuðskontu 11.11.1.24. Heilsumálaráðið.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 13.092 | 13.808 | 16.547 | 17.317 | 17.317 | 17.317 |
| Útreiðslur | 13.151 | 13.808 | 16.547 | 17.317 | 17.317 | 17.317 |
| Inntøkur | 59 | - | - | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 11.782 | 12.595 | 14.731 | 16.063 | 16.063 | 16.063 |
| **Útreiðslur** | **11.841** | **12.595** | **14.731** | **16.063** | **16.063** | **16.063** |
| 11. Lønir v.m. | 8.782 | 9.397 | 11.618 | 12.874 | 12.874 | 12.874 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.113 | 1.425 | 1.710 | 1.761 | 1.761 | 1.761 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 269 | 106 | 124 | 130 | 130 | 130 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 96 | 94 | 10 | 10 | 10 | 10 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1.581 | 1.573 | 1.269 | 1.288 | 1.288 | 1.288 |
| **Inntøkur** | **59** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *59* | - | - | - | - | - |
| **27. Heildarætlan um harðskap** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 1.310 | 1.213 | 1.816 | 1.254 | 1.254 | 1.254 |
| **Útreiðslur** | **1.310** | **1.213** | **1.816** | **1.254** | **1.254** | **1.254** |
| 11. Lønir v.m. | 680 | 639 | 709 | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 616 | 397 | 1.107 | 1.254 | 1.254 | 1.254 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 9 | - | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 6 | - | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 177 | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 3,0 | 2,0 | 4,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |
| Onnur | 11,0 | 13,0 | 12,0 | 15,5 | 15,5 | 15,5 |
| Fulltíðarstørv | 14,0 | 15,0 | 16,0 | 18,5 | 18,5 | 18,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 8,8 | 9,4 | 11,6 | 12,9 | 12,9 | 12,9 |

## 12.11.1.63. Javnstøðumál (Rakstrarjáttan)

### 20. Javnstøðunevndin

Javnstøðunevndin virkar sambært løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn. Javnstøðunevndin skal m.a. hava eftirlit við, at javnstøðulógin verður hildin, vera ráðgevi hjá myndugleikum, stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum og gera tilmæli í javnstøðumálum.

### 21. Kvinnuluttøka í politikki

Demokratia skal virka fyri, at leikluturin hjá kvinnum í føroyskum politikki økist.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 1.025 | 1.234 | 1.322 | 1.356 | 1.356 | 1.356 |
| Útreiðslur | 1.150 | 1.462 | 1.322 | 1.356 | 1.356 | 1.356 |
| Inntøkur | 125 | 228 | - | - | - | - |
| **20. Javnstøðunevndin** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 722 | 847 | 912 | 936 | 936 | 936 |
| **Útreiðslur** | **847** | **1.034** | **912** | **936** | **936** | **936** |
| 11. Lønir v.m. | 606 | 681 | 847 | 871 | 871 | 871 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 240 | 260 | 65 | 65 | 65 | 65 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | 12 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 2 | 11 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 70 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **125** | **188** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *125* | *188* | - | - | - | - |
| **21. Kvinnuluttøka í politikki** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 302 | 388 | 410 | 420 | 420 | 420 |
| **Útreiðslur** | **302** | **428** | **410** | **420** | **420** | **420** |
| 11. Lønir v.m. | 73 | 68 | 359 | 369 | 369 | 369 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 104 | 137 | 51 | 51 | 51 | 51 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 5 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 125 | 218 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **40** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *40* | - | - | - | - |

# Almannamál

## 12.21.1. Fyrisiting

### 12.21.1.02. Almannaverkið (Rakstrarjáttan)

Almannaverkið veitir sosiala ráðgeving og leiðbeining til einstaklingar. Harumframt veitir Almannaverkið tænastur til borgarar við serligum tørvi.

Almannaverkið umsitur:

- Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur
- Løgtingslóg um almannapensjónir o.a.
- Løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk
- Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar
- Løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.
- Løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening
- Løgtingslóg um dagpening av sjúku v.m.
- Løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum
- Løgtingslóg um familjuískoyti

Somuleiðis umsitur Almannaverkið ávísar ásetingar í løgtingslóg um barnavernd.

Harumframt umsitur Almannaverkið Millumlandasáttmálan frá 12. juni 2012 við Finnland, Ísland, Noreg og Svøríki um almannatrygd, sum fekk virknað í Føroyum tann 1. mai 2015. Sáttmálin fevnir um pensjónir, dagpening v.m. Høvuðssetningurin í sáttmálanum er, at norðurlendskir ríkisborgarar verða javnsettir við ríkisborgarar í viðkomandi landi í mun til lóggávuna í landinum. Eisini norðurlendski millumlandasáttmálin um almannastuðul og almannatænastur frá 14. juni 1994 er settur í gildi í Føroyum og hevur sum høvuðssetning at javnseta allar norðurlendskar borgarar, sum hava tørv á almannatrygd og tænastum.

**Bygnaður hjá Almannaverkinum**
Almannaverkið er skipað við eini fyrisiting, viðskiftadepli og trivnaðardepli. Játtanin til virksemið hjá Trivnaðardeplinum er at finna undir høvuðskontu 7.21.3.14. Barnaverndarstovnar og 12.21.6.09. Trivnaðartænastur. Innanhýsis flytingar eru frá høvuðskontu 7.21.3.14. Barnaverndarstovnar og 12.21.6.09. Trivnaðartænastur, undirkonta 20. Vanligt virksemi.

Fyrisitingin fevnir um fíggjardeild, HR-deild, fakdeild og KT-deild.

Viðskiftadepilin er býttur upp soleiðis:

*Avgerðarskrivstovan*
Avgerðarskrivstovan skal góðskutryggja nógvar av avgerðunum, sum Viðskiftadepilin tekur. Allar avgerðir, sum verða tiknar viðvíkjandi fyritíðarpensjón, arbeiðsbúgving, stórum hjálpartólum og visitering til Trivnaðardepilin verða sendar til Avgerðarskrivstovuna, sum skal tryggja, at málsviðgerðin er í samsvari við galdandi lóggávu og livir upp til sosialfakligar og fyrisitingarligar meginreglur.

*Borgaratænastan*
Við støði í tvørfakligari hugsan ráðgevur Borgaratænastan borgarum um allar peningaligar veitingar

og tænastur hjá Almannaverkinum, soleiðis at borgarar kunnu fáa kunning um teirra møguleikar, rættindi og skyldur á einum staði. Borgaratænastan avgreiðir umsóknir um stuðul vegna arbeiðsloysi og sjúku, stakútreiðslur, barnaískoyti umframt aðrar veitingar. Borgaratænastan veitir ráðgeving til pensjónistar og einkjur/einkjumenn, umframt at Borgaratænastan vísir borgarum víðari til aðrar viðkomandi deildir. Borgaratænastan er sambindingarlið fyri føroyingar, sum fara til onnur norðurlond at arbeiða.

*Børn og ung*
Á deildini fyri børn og ung verður dentur lagdur á at stuðla foreldrum, sum hava børn, ið bera brek, so familjan fær møguleika fyri einari so vanliga tilveru sum møguligt hóast brekið/sjúkuna hjá barninum. Á deildini verða eisini avgreiddar umsóknir um endurgjald fyri neyðugar meirútreiðslur vegna brekið hjá barninum, endurgjald fyri mista inntøku til tann, sum uppiheldur barni við breki heima, og umsóknir um persónligan stuðul og pláss á vardum bústaði. Ráðgevarnir á deildini hava samskipandi leiklutin fyri átakinum *Tann góða tilgongdin*.

*Heimaráðgeving*
Heimaráðgeving er eitt námsfrøðiligt tilboð til familjur, ið hava barn við ASÓ (Autismu Sprektrum Órógv) og/ella ADHD (Attention Deficit Hyperactivity Disorder) í aldrinum 0-18 ár. Endamálið við ráðgevingini er at viðvirka til, at gerandisdagurin hjá familjuni verður lættari, so at familjan kann liva eitt so vanligt familjulív, sum til ber.

*Arbeiðsbúgving*
Á deildini verður dentur lagdur á at menna og stuðla borgaranum til størri sjálvbjargni og sjálvsavgerðarrætt. Har verða eisini avgreiddar umsóknir um arbeiðsbúgving, tillagað starv, fyritíðarpensjón og upptøku á vardum bústaði og umsóknir um persónligan stuðul.

*Útgjald*
Á deildini fyri útgjald verða flest allar veitingar útgoldnar. Harumframt avgreiðir deildin umsóknir um fólkapensjón og sjúkradagpening.

*Talgild menning*
Deildin slóðar fyri í arbeiðinum at gera Almannaverkið talgilt. Deildin hevur ábyrgd av menning av KT-skipanum, undir hesum málsviðgera- og útgjaldsskipanina, og menna sjálvavgreiðslur, soleiðis at viðskiftafólk kunnu avgreiða síni viðurskifti talgilt.

***Framskrivingar***
Umframt lønarframskriving og lønarlyft er framskrivað fyri fólkavøkstri og broyttari fólkasamanseting við 674 tús. kr. og vegna prístalshækking á húsaleigu 31 tús. kr.

**21. Hjálpartól**
Á deildini fyri hjálpartól verður dentur lagdur á at menna og stuðla borgaranum til størri sjálvbjargni og sjálvsavgerðarrætt. Har verða eisini avgreiddar umsóknir um hjálpartól, avlamisbilar og bústaðarbroytingar.

**22. Teknmálstulkatænastan**
Teknmálstulkatænastan veitir tulk til alt slag av samskifti, har deyv/hoyritarnað og hoyrandi møtast, og har almenn upplýsing og tiltøk fara fram.

**24. Fakliga nevndin fyri børn við serligum tørvi**
Fakliga nevndin fyri børn við serligum tørvi hevur sínar fundir á Almannaverkinum, sum hevur ábyrgd av umsitingarliga partinum av arbeiðinum. Nevndin er mannað við 3 serfrøðingum og er sett

sambært § 39, stk. 4 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Nevndin skal taka støðu í málum, har ivamál eru, um barn er fevnt av § 5 í dagstovnalógini, ella um Almannaverkið skal veita barni tilboð.

## 40. Inntøkufíggjað virksemi

Fyri at fáa ein skynsamari rakstur av hjálpartólum, ið verða veitt sum útlán, fyri at tryggja endurnýtslu av hjálpartólum, og fyri at forða fyri, at tað verða fleiri hjálpartólagoymslur, varð ein leiguskipan sett á stovn í 2010. Myndugleikar, sum annars hava ábyrgd av at veita hjálpartól, kunnu leiga hesi fyri eitt leigugjald. Skipanin fevnir eisini um sølu av hjálpartólum til stovnar hjá landinum og kommununum.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 65.426 | 66.429 | 70.007 | 72.690 | 72.690 | 72.690 |
| Útreiðslur | 87.877 | 89.906 | 85.814 | 88.500 | 88.500 | 88.500 |
| Inntøkur | 22.451 | 23.477 | 15.807 | 15.810 | 15.810 | 15.810 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 57.117 | 57.275 | 59.290 | 61.733 | 61.733 | 61.733 |
| **Útreiðslur** | **75.898** | **77.603** | **73.418** | **75.861** | **75.861** | **75.861** |
| 11. Lønir v.m. | 54.011 | 57.540 | 59.935 | 62.347 | 62.347 | 62.347 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 9.606 | 10.581 | 8.361 | 8.361 | 8.361 | 8.361 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 7.198 | 4.888 | 2.247 | 2.247 | 2.247 | 2.247 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 3.980 | 3.710 | 2.875 | 2.906 | 2.906 | 2.906 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 0 | 2 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1.103 | 882 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **18.781** | **20.328** | **14.128** | **14.128** | **14.128** | **14.128** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *317* | *348* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *18.464* | *19.980* | *14.128* | *14.128* | *14.128* | *14.128* |
| **21. Hjálpartól** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 8.327 | 8.727 | 8.659 | 8.817 | 8.817 | 8.817 |
| **Útreiðslur** | **8.777** | **9.627** | **8.659** | **8.817** | **8.817** | **8.817** |
| 11. Lønir v.m. | 5.331 | 6.185 | 5.697 | 5.855 | 5.855 | 5.855 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.590 | 1.181 | 1.550 | 1.550 | 1.550 | 1.550 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 130 | 393 | 143 | 143 | 143 | 143 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.017 | 911 | 669 | 669 | 669 | 669 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 8 | 10 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 702 | 947 | 600 | 600 | 600 | 600 |
| **Inntøkur** | **450** | **900** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *450* | *900* | - | - | - | - |

**22. Teknmálstulkatænastan**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 1.397 | 1.414 | 2.043 | 2.125 | 2.125 | 2.125 |
| **Útreiðslur** | **1.863** | **1.724** | **3.104** | **3.186** | **3.186** | **3.186** |
| 11. Lønir v.m. | 1.624 | 1.447 | 2.954 | 3.036 | 3.036 | 3.036 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 112 | 150 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 23 | 19 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1 | 87 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 103 | 21 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **466** | **310** | **1.061** | **1.061** | **1.061** | **1.061** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *466* | *310* | *1.061* | *1.061* | *1.061* | *1.061* |

**24. Fakliga nevndin fyri børn við serligum tørvi**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | - | - | 15 | 15 | 15 | 15 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **15** | **15** | **15** | **15** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 15 | 15 | 15 | 15 |

**40. Inntøkufíggjað virksemi, Hjálpartólamiðstøðin**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | -1.414 | -988 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **1.339** | **951** | **618** | **621** | **621** | **621** |
| 11. Lønir v.m. | 113 | 113 | 118 | 121 | 121 | 121 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 723 | 122 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 53 | 265 | 400 | 400 | 400 | 400 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 2 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 450 | 450 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **2.753** | **1.939** | **618** | **621** | **621** | **621** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *2.753* | *1.939* | *618* | *621* | *621* | *621* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |
| Onnur | 103,0 | 110,0 | 108,0 | 114,0 | 114,0 | 114,0 |
| Fulltíðarstørv | 106,0 | 113,0 | 111,0 | 117,0 | 117,0 | 117,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 54,0 | 57,5 | 59,9 | 62,3 | 62,3 | 62,3 |

**Starvsfólkayvirlit: 21 Hjálpartól**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 11,7 | 13,0 | 12,0 | 11,5 | 11,5 | 11,5 |
| Fulltíðarstørv | 11,7 | 13,0 | 12,0 | 11,5 | 11,5 | 11,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 5,3 | 6,2 | 5,7 | 5,9 | 5,9 | 5,9 |

**Starvsfólkayvirlit: 22 Teknmálstulkatænastan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 3,0 | 2,6 | 4,5 | 4,5 | 4,5 | 4,5 |
| Fulltíðarstørv | 3,0 | 2,6 | 4,5 | 4,5 | 4,5 | 4,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 1,6 | 1,4 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |

## 12.21.1.08. Dugni - skúlin (Rakstrarjáttan)

Dugni-skúlin við Áir er fyri vaksin, sum av likamligum, sálarligum ella sosialum orsøkum hava skerdan arbeiðsførleika. Skúlin hevur kostdeild og veitir undirvísing.

Virksemið hjá Dugna er skipað við heimild í § 40, stk. 3 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 4.091 | 4.184 | 4.297 | 4.429 | 4.429 | 4.429 |
| Útreiðslur | 4.301 | 4.464 | 4.450 | 4.582 | 4.582 | 4.582 |
| Inntøkur | 210 | 280 | 153 | 153 | 153 | 153 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 4.091 | 4.184 | 4.297 | 4.429 | 4.429 | 4.429 |
| **Útreiðslur** | **4.301** | **4.464** | **4.450** | **4.582** | **4.582** | **4.582** |
| 11. Lønir v.m. | 3.761 | 3.856 | 4.009 | 4.141 | 4.141 | 4.141 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 513 | 526 | 366 | 366 | 366 | 366 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 26 | 35 | 20 | 20 | 20 | 20 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 47 | 55 | 55 | 55 | 55 |
| **Inntøkur** | **210** | **280** | **153** | **153** | **153** | **153** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *210* | *280* | *153* | *153* | *153* | *153* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 6,3 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 |
| Fulltíðarstørv | 7,3 | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 3,8 | 3,9 | 4,0 | 4,1 | 4,1 | 4,1 |

## 12.21.1.12. Endur- og viðlíkahaldsvenjing (Rakstrarjáttan)

*Endurvenjing*
Endurvenjingin er skipað sambært § 37 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Almannaverkið kann veita borgarum í aldrinum 18-66 ár endurvenjing fyri at venja aftur ein ella fleiri mistar førleikar. Í 2018 gjørdist venjing av førleikum til at samskifta eisini partur av endurvenjingini. Endamálið við

endurvenjingini er, at borgarin kann fáa ella fasthalda tilknýtið til arbeiðsmarknaðin ella, at borgarin kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

Almannaverkið arbeiðir mið- og stigvíst við at skipa eina landsfevnandi endurvenjingartænastu. Í løtuni eru toymi, eitt í Tórshavn og eitt í Runavík/Klaksvík, har borgarar fáa eitt ávíst tal av endurvenjingartímum í eitt frammanundan avtalað tíðarskeið.

Tað eru eisini borgarar, sum ikki hava møguleikan til at fara á hesi støð at fáa viðgerð, og tá verður endurvenjingin veitt í nærumhvørvinum og í heiminum. Almannaverkið veitir eisini í ávísum førum endurvenjing heima hjá borgaranum, og verða avtalur eisini í ein ávísan mun gjørdar við kommunur og privatar veitarar um nýtslu av hølum og tólum og/ella keyp av endurvenjingartænastum.

*Viðlíkahaldsvenjing*
Viðlíkahaldsvenjing er skipað sambært § 38 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Almannaverkið hevur  frá 1. september 2021 kunnað veitt viðlíkahaldsvenjing til borgarar í aldursbólkinum 18 ár til fólkapensjónsaldur. Talan er um borgarar, sum orsakað av breki ella sjúku hava ella eru í vanda fyri at fáa týðandi og varandi skert virkisføri, ið víkir munandi frá aldurssvarandi virkisføri og hevur týðandi ávirkan á sjálvhjálpni.

Viðlíkahaldsvenjing er málrættað venjing fyri at fyribyrgja førleikamissi, fasthalda ella betra um verandi førleika, ella fyri at seinka sjúkugongdina. Viðlíkahaldsvenjing fevnir um viðlíkahald av likamligum førleikum, herundir taluvenjing.

Viðlíkahaldsvenjingin er staðsett í Almannaverkinum og  verður skipað saman við endurvenjingini. Heimild er fyri, at Almannaverkið kann keypa viðlíkahaldsvenjing frá kommunum og privatum veitarum kring landið, soleiðis at viðlíkahaldsvenjing kann gerast ein landsfevnandi tænasta.

Ætlanin er, at tænastan stig- og miðvíst verður útbygt. Higartil eru 3,75 mió. kr. settar av til endamálið.

*Samskiftismenning*
Í 2018 gjørdist venjing av førleikum til at samskifta partur av endurvenjingini, og frá 1. september 2021 hevur Almannaverkið veitt taluvenjing sum ein part av viðlíkahaldsvenjingini.

Ásannandi at tørvurin á samskiftismenning, harundir taluvenjing, er ovurstórur, og hevur stóran týdning fyri eina væleydnaða endur-og viðlíkahaldsvenjing, hevur Almannaverkið sett deild fyri Samskiftismenning á stovn í 2023, ið savnar alla endur- og viðlíkahaldsvenjing innan samskifti á einum stað.

Ætlanin er, at tænastan stig- og miðvíst verður útbygd. Higartil eru 1,25 mió. kr. settar av til endamálið.

*Framskrivingar*
Umframt lønarframskriving og lønarlyft er framskrivað fyri fólkavøkstri og broyttari fólkasamanseting við 119 tús. kr. og vegna prístalshækking á húsaleigu 20 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 9.003 | 11.108 | 13.286 | 13.759 | 13.759 | 13.759 |
| Útreiðslur | 9.019 | 11.108 | 13.286 | 13.759 | 13.759 | 13.759 |
| Inntøkur | 16 | - | - | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 9.003 | 11.108 | 13.286 | 13.759 | 13.759 | 13.759 |
| **Útreiðslur** | **9.019** | **11.108** | **13.286** | **13.759** | **13.759** | **13.759** |
| 11. Lønir v.m. | 6.217 | 6.950 | 11.998 | 12.451 | 12.451 | 12.451 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 786 | 1.016 | 682 | 682 | 682 | 682 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 582 | 933 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 712 | 1.254 | 456 | 476 | 476 | 476 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 25 | 28 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 698 | 926 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **16** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | *16* | - | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 14,0 | 16,0 | 25,0 | 26,0 | 26,0 | 26,0 |
| Fulltíðarstørv | 14,0 | 16,0 | 25,0 | 26,0 | 26,0 | 26,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 6,2 | 7,0 | 12,0 | 12,5 | 12,5 | 12,5 |

## 12.21.1.19. Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark (Stuðulsjáttan)

Stuðulin verður latin til sjálvsognarstovnin Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark. Sjálvsognarstovnurin hevur heimstað í Danmark. Endamálið við Ráðgevingini fyri føroyingar í Danmark er m.a.

- at veita føroyingum í Danmark hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum
- at upplýsa um nevndu øki mótvegis einstaklingum, myndugleikum og stovnum í Danmark og Føroyum
- at virka sum millumlið millum føroyingar í Danmark og myndugleikar og stovnar í Danmark og í Føroyum á nevndu økjum

Árligi stuðulin verður latin til lønir og vanligar skrivstovuútreiðslur. Stuðulin verður útgoldin mánaðarliga. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.248 | 1.198 | 1.398 | 1.398 | 1.398 | 1.398 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.248** | **1.198** | **1.398** | **1.398** | **1.398** | **1.398** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 1.248 | 1.198 | 1.398 | 1.398 | 1.398 | 1.398 |

## 12.21.1.22. Stuðul til feløg (Stuðulsjáttan)

Stuðul verður latin til ymisk feløg.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 7.865 | 8.415 | 9.715 | 9.715 | 9.715 | 9.715 |
| **01. Kvinnuhúsið - ráðgeving og kreppumiðstøð** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.765** | **2.065** | **2.665** | **2.665** | **2.665** | **2.665** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.765 | 2.065 | 2.665 | 2.665 | 2.665 | 2.665 |
| **02. Reyði Krossur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **350** | **350** | **650** | **650** | **650** | **650** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 350 | 350 | 650 | 650 | 650 | 650 |
| **06. KRIS** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.150** | **2.150** | **2.150** | **2.150** | **2.150** | **2.150** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2.150 | 2.150 | 2.150 | 2.150 | 2.150 | 2.150 |
| **08. Sorgbólkurin Berin** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.400** | **1.400** | **1.800** | **1.800** | **1.800** | **1.800** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.400 | 1.400 | 1.800 | 1.800 | 1.800 | 1.800 |
| **10. Fountainhúsið** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.000** | **2.250** | **2.250** | **2.250** | **2.250** | **2.250** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2.000 | 2.250 | 2.250 | 2.250 | 2.250 | 2.250 |
| **11. Føroysk teldutala** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **200** | **200** | **200** | **200** | **200** | **200** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 200 | 200 | 200 | 200 | 200 | 200 |

### Undirkonta 01. Kvinnuhúsið - Ráðgeving og kreppumiðstøð

Stuðulin verður latin Kvinnuhúsinum, sum hevur til endamáls at veita teimum, ið hava verið fyri harðskapi ráðgeving og sálarfrøðiliga hjálp. Kvinnur og børn kunnu fáa innivist á Kreppumiðstøðini. Stuðulin verður útgoldin mánaðarliga. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl.

Í 2023 byrjaði eisini skipað virksemi við ambulantari harðskapsmóttøku kallað "Liv uttan harðskap". Talan er um harðskapsmóttøku við ráðgeving fyri bæði kvinnur og menn.

**Undirkonta 02. Reyði Krossur Føroya**
Stuðulin verður latin Reyða Krossi, sum er heimsfevnandi hjálparfelagsskapur, sum m.a. hevur til endamáls at veita hjálp uttan mun til tjóðskap, ættarslag, átrúnað, sannføring, stætt ella politiskan hugburð. Stuðulin verður játtaður til virksemið hjá felagsskapinum. Stuðulin verður útgoldin einaferð um árið. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl.

**Undirkonta 06. KRIS**
Stuðulin verður játtaður til virksemi hjá KRIS, ið virkar fyri at hjálpa vaksnum insestoffrum, og til heildarverkætlanina hjá KRIS. Stuðulin verður útgoldin mánaðarliga. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl.

**Undirkonta 08. Sorgarbólkurin Berin**
Stuðulin verður latin til Sorgarbólkin Beran, sum hevur til endamáls at geva børnum og ungum, ið hava mist ella hava álvarsama sjúk foreldur og/ella systkin, eitt stað, har tey kunnu hittast og práta við javnlík. Sorgarbólkar eru eisini skipaðir fyri foreldur, sum hava mist børn. Stuðulin verður útgoldin mánaðarliga. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl.

**Undirkonta 10. Fountainhúsið**
Stuðulin verður latin Fountainhúsinum, ið veitir arbeiðsrættað tilboð til persónar við sálarsjúku ella við sálarligum trupulleikum sambært meginreglunum galdandi fyri Fountain hús. Stuðulin verður útgoldin mánaðarliga. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl.

**Undirkonta 11. Føroysk teldutala**
Stuðulin verður latin Grunninum fyri Talutøkni. Stuðulin fer til at rinda árliga gjaldið til teldutaluskipanina. Teldutalan er eitt týðandi amboð fyri sjónveik, blind og lesiveik, sum í gerandisdegnum stimbrar undir virkisfýsni og sjálvbjargni. Stuðulin verður útgoldin einaferð um árið. Ársroknskapurin fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum fyri 1. apríl.

**12.21.1.23. Stuðul til fyriskipanir fyri heimleys (Stuðulsjáttan)**

Serlig bútilboð eru skipað sambært § 47 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Serlig bútilboð verða veitt persónum við víttfevndum sosialum trupulleikum, sum ikki eru førir fyri at útvega sær ella fasthalda ein varandi bústað.

Endamálið við serligu bútilboðunum er at veita umsorgan og hjálp til gerandis virksemi og talan kann bæði vera um dag- og náttartilboð. Tað eru 3 felagsskapir sum fáa stuðul frá landinum til serlig bútilboð. Frelsunarherurin og Blái Krossur hava virksemi í Tórshavn og felagsskapurin Soli deo Gloria í Klaksvík.

Sambært § 9 í kunngerð nr. 227 frá 28. desember 2020 kann stuðul verða veittur sjálvbodnum felagsskapum, sum Almanna- og mentamálaráðið hevur góðkent til at skipa serlig bútilboð.

Stuðulin til Herbergið verður hækkaður við 700 tús. kr. Stuðulin á fíggjarlógini verður hækkaður árliga samsvarandi lækkandi stuðli frá Frelsunarherinum í Noregi.

Játtanin til stuðul til fyriskipanir fyri heimleys verður hækkað við 1,5 mió. kr. Hækkingin er markað til at útvega fleiri herbergspláss, sambært §3, nr. 3 í kunngerð nr. 227 frá 28. desember 2020 um serlig bútilboð.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 8.432 | 9.600 | 10.500 | 12.700 | 13.400 | 13.400 |
| **01. Stuðul til fyriskipanir fyri heimleys** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **-** | **1.500** | **1.500** | **1.500** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | - | - | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| **02. Herbergið** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **3.984** | **4.684** | **5.384** | **6.084** | **6.784** | **6.784** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 3.984 | 4.684 | 5.384 | 6.084 | 6.784 | 6.784 |
| **03. Umsorganarheimið hjá Bláa Krossi** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.283** | **2.283** | **2.283** | **2.283** | **2.283** | **2.283** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2.283 | 2.283 | 2.283 | 2.283 | 2.283 | 2.283 |
| **04. Umsorganarheimið Gloria** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.165** | **2.633** | **2.833** | **2.833** | **2.833** | **2.833** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2.165 | 2.633 | 2.833 | 2.833 | 2.833 | 2.833 |

# 12.21.3. Barnastuðul

## 12.21.3.03. Einkjubarnastyrkur (Lógarbundin játtan)

Barnagjald verður veitt við heimild í løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl., við seinni broytingum.

Rætt til gjald hava børn, sum hava mist annað av foreldrunum, faðir- og móðurleys børn, og børn fødd uttanfyri hjúnalag, tá faðirskapurin ikki er staðfestur. Harumframt kann Almannaverkið veita stuðul til útreiðslur í sambandi við barnsins dóp, ferming, sjúku og jarðarferð ella av øðrum serstøkum orsøkum.

Veitingar sambært lógini verða á hvørjum ári javnaðar sambært løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.702 | 2.249 | 1.977 | 2.052 | 2.052 | 2.052 |
| **01. Einkjubarnastyrkur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.702** | **2.249** | **1.977** | **2.052** | **2.052** | **2.052** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 1.702 | 2.249 | 1.977 | 2.052 | 2.052 | 2.052 |

**Virksemisyvirlit: 01 Einkjubarnastyrkur**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | | | | | | |
| Barnagjald | 1.702 | 2.249 | 1.977 | 2.052 | 2.052 | 2.052 |
| **B: Virksemi (tal) av børnum** | | | | | | |
| Tal av móttakarum | 101 | 107 | 115 | 110 | 110 | 110 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| Barnagjald | 16.851 | 21.019 | 17.191 | 18.655 | 18.655 | 18.655 |

## 12.21.3.04. Barnapeningur veittur í forskoti (Lógarbundin játtan)

Barnapeningur verður veittur í forskoti við heimild í løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl., við seinni broytingum.

Rindar gjaldskyldugi ikki barnagjald, ið er ásett eftir lóggávuni um rættarstøðu barnanna, rættstundis (gjalddagin), kann tað almenna í forskoti rinda vanliga barnagjaldið til tann, sum hevur rætt til gjaldið. Barnagjald kann verða útgoldið til barnið fyllir 18 ár.

Umframt barnagjaldið kunnu eisini serlig gjøld eftir nevndu lógum omanfyri verða útgoldin í forskoti, t.d. uppihaldspeningur til mammuna í sambandi við barnsburð og dóps- og fermingargjøld. Almannaverkið krevur umvegis TAKS peningin inn aftur frá gjaldskylduga.

Veitingar sambært lógini verða á hvørjum ári javnaðar sambært løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | -372 | -90 | 101 | 105 | 105 | 105 |
| **01. Forskotsrindan** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **9.321** | **9.153** | **9.403** | **9.760** | **9.760** | **9.760** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 9.321 | 9.153 | 9.403 | 9.760 | 9.760 | 9.760 |
| **02. Innkrevjing av forskotsrindan av barnapeningi** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-9.693** | **-9.244** | **-9.302** | **-9.655** | **-9.655** | **-9.655** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | -9.693 | -9.244 | -9.302 | -9.655 | -9.655 | -9.655 |

**Virksemisyvirlit: 01 Forskotsrindan**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | | | | | | |
| Barnapeningur veittur í forskoti | 9.321 | 9.153 | 9.403 | 9.760 | 9.760 | 9.760 |
| **B: Virksemi (tal)** | | | | | | |
| Tal av móttakarum | 557 | 539 | 590 | 555 | 555 | 555 |
| Tal av børnum | 788 | 787 | 860 | 800 | 800 | 800 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| Barnapeningur veittur í forskoti pr. móttakara | 16.734 | 16.981 | 15.937 | 17.586 | 17.586 | 17.586 |
| Barnapeningur veittur í forskoti pr. barn | 11.829 | 11.630 | 10.934 | 12.200 | 12.200 | 12.200 |

## 12.21.3.05. Stuðul til uppihaldspening (Lógarbundin játtan)

Stuðulin verður veittur sambært løgtingslóg nr. 90 frá 6. juni 1997 um stuðul til uppihaldspening, við seinni broytingum. Rætt til stuðul eftir lógini hava persónar, ið eru undir fullari skattskyldu í Føroyum, sum av tí almenna eru álagdir at gjalda uppihaldspening til hjúnafelaga, sum teir eru skildir ella sundurlisnir frá, og til børn yngri enn 18 ár, sum ikki búgva hjá uppihaldsskylduga. Stuðulin verður bert veittur eftir umsókn.

Stuðul til uppihaldspening verður bert veittur fyri 40% av goldnu upphæddina, sum fer upp um vanliga árliga gjaldið fyri eitt barn.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 2.439 | 2.266 | 2.510 | 2.605 | 2.605 | 2.605 |
| **01. Stuðul til uppihaldspening** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.439** | **2.266** | **2.510** | **2.605** | **2.605** | **2.605** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 2.439 | 2.266 | 2.510 | 2.605 | 2.605 | 2.605 |

**Virksemisyvirlit: 01 Stuðul til uppihaldspening**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | | | | | | |
| Stuðul til uppihaldspening | 2.439 | 2.266 | 2.510 | 2.605 | 2.605 | 2.605 |
| **B: Virksemi (tal)** | | | | | | |
| Stuðul til uppihaldspening | 213 | 213 | 208 | 220 | 220 | 220 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| Stuðul til uppihaldspening | 11.451 | 10.638 | 12.067 | 11.841 | 11.841 | 11.841 |

## 12.21.3.06. Barnaískoyti (Lógarbundin játtan)

Barnaískoyti verður veitt við heimild í løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl., við seinni broytingum. Barnaískoyti til einsamallar uppihaldarar verður veitt eftir umsókn. Í 2023 var ískoytið 2.582 kr. um ársfjórðing pr. barn.

Veitingar sambært lógini verða á hvørjum ári javnaðar sambært løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 12.432 | 12.793 | 13.016 | 13.874 | 13.874 | 13.874 |
| **01. Barnaískoyti** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **12.432** | **12.793** | **13.016** | **13.874** | **13.874** | **13.874** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 12.432 | 12.793 | 13.016 | 13.874 | 13.874 | 13.874 |

**Virksemisyvirlit: 01 Barnaískoyti**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | | | | | | |
| Barnaískoyti | 12.432 | 12.793 | 13.016 | 13.874 | 13.874 | 13.874 |
| **B: Virksemi (tal)** | | | | | | |
| Tal av móttakarum | 875 | 899 | 870 | 905 | 905 | 905 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| Barnaískoyti | 14.208 | 14.230 | 14.961 | 15.330 | 15.330 | 15.330 |

## 12.21.3.09. Familjuískoyti (Lógarbundin játtan)

Familjuískoyti verður veitt við heimild í løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti, við seinni broytingum, og verður veitt til barnafamiljur, ið hava lágar inntøkur og trong fíggjarlig kor. Familjuískoytið er í mesta lagi 48.000 kr. um árið til tey, sum hava eitt barn. Fyri hvørt barnið aftrat tí fyrsta, hækkar veitingin við 6.000 kr. Eitt par við ársinntøku lægri enn 220.000 kr. fær fulla upphædd, meðan markið hjá einum støkum fyri at fáa fulla upphædd er 120.000 kr. Ískoytið lækkar stigvíst, so hvørt sum inntøkan hækkar.

Fyri 2022 og 2023 vóru tíðaravmarkaðar hækkingar í familjuískoyti umframt at olju- og hjálparískoyti vórðu latin.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 9.833 | 13.934 | 21.760 | 10.760 | 10.760 | 10.760 |
| **01. Familjuískoyti** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **9.833** | **9.774** | **12.160** | **10.760** | **10.760** | **10.760** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 9.833 | 9.774 | 12.160 | 10.760 | 10.760 | 10.760 |
| **02. Olju- og hjálparískoyti** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **4.160** | **9.600** | **-** | **-** | **-** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | 4.160 | 9.600 | - | - | - |

**Virksemisyvirlit: 01 Familjuískoyti**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **9.833** | **13.934** | **21.760** | **10.760** | **10.760** | **10.760** |
| Familjuískoyti | 9.833 | 9.774 | 12.160 | 10.760 | 10.760 | 10.760 |
| Olju- og hjálparískoyti | - | 4.160 | 9.600 | - | - | - |
| **B: Virksemi (tal)** | | | | | | |
| Tal av móttakarum, barnafamiljur | 385 | 403 | 382 | 425 | 425 | 425 |
| Tal av móttakarum, húski | - | 415 | 800 | - | - | - |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| Familjuískoyti | 25.540 | 24.253 | 31.832 | 25.318 | 25.318 | 25.318 |
| Olju- og hjálparískoyti | - | 10.024 | 12.000 | - | - | - |

### 12.21.3.13. Ættleiðingarstuðul (Lógarbundin játtan)

Lógargrundarlagið undir ættleiðingarstuðlinum er løgtingslóg nr. 51 frá 3. mai 1994 um ættleiðingarstuðul, við seinni broytingum. Stuðulin er 100 tús. kr. í sambandi við ættleiðingina.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 300 | 300 | 400 | 400 | 400 | 400 |
| **01. Ættleiðingarstuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **300** | **300** | **400** | **400** | **400** | **400** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 300 | 300 | 400 | 400 | 400 | 400 |

**Virksemisyvirlit: 01 Ættleiðingarstuðul**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | | | | | | |
| 01 Ættleiðingarstuðul | 300 | 300 | 400 | 400 | 400 | 400 |
| **B: Virksemi (tal) av børnum** | | | | | | |
| 01 Ættleiðingarstuðul | 3 | 3 | 4 | 4 | 4 | 4 |
| **C: Eindarkostnaður (1.000 kr.)** | | | | | | |
| 01 Ættleiðingarstuðul | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

## 12.21.4. Sjúkradagpeningur

### 12.21.4.01. Dagpeningaskipanin (Lógarbundin játtan)

Dagpeningur vegna sjúku verður veittur við heimild í løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m., við seinni broytingum.

Dagpeningur verður veittur:

- løntakarum, sum ikki hava rætt til fulla ella partvísa løn í sambandi við sjúku o.a. sambært lóg, trygging ella sáttmála
- útróðrarmonnum, sum rógva út við egnum ella annan mans fari
- sjálvstøðugt vinnurekandi, sum ikki hava ella bara hava lítla leysa arbeiðsmegi aftur at sær

- sjálvstøðugt vinnurekandi og stjórum í egnum feløgum, sum hava teknað sjálvbodna trygging
- vegna fráveru fyri føðing av heilsuvanda fyri móður ella barn
- fólki, hvørs børn ella hjúnafelagi gerast álvarliga sjúk
- foreldrum, sum eru heima hjá sjúkum barni á barnsins fyrsta og øðrum sjúkradegi

Rætturin til dagpening er sum høvuðsregla treytaður av føstum bústaði og fullari skattskyldu í Føroyum. Tann, ið seinastu 13 vikurnar undan sjúkrafráveruni hevur verið í løntum arbeiði í minst 120 tímar tilsamans, hevur rætt til dagpening vegna sjúku.

Dagpeningur verður veittur frá 1. fráverudegi og verður sum høvuðsregla roknaður eftir miðalinntøkuni síðstu 5 vikurnar, áðrenn viðkomandi gjørdist óarbeiðsførur. Tó kunnu bæði styttri og longri meira umboðandi tíðarskeið verða nýtt sum inntøkugrundarlag. Útreiðslurnar fyri 1. og 2. fráverudag verða endurrindaðar av arbeiðsgevaranum.

Dagpeningaveitingin er væntaða mista inntøkan, tó í mesta lagi 80% av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Tey, sum hava teknað sjálvbodna trygging, hava rætt til dagpening 4 vikur eftir, at umsóknin um upptøku í sjálvbodnu tryggingini er latin inn, og tryggingargjaldið er goldið. Sjálvboðin tryggjað fáa dagpening frá 1. fráverudegi og við fullari dagpeningaupphædd.

Dagpeningur til løntakarar og sjálvboðin tryggjað kann í mesta lagi verða veittur í 52 vikur í einum 18 mánaða skeiði. Undir ávísum umstøðum kann dagpeningur veitast í eitt longri tíðarskeið.

Í sambandi við fráveru fyri føðing, orsakað av heilsuvanda fyri móður ella barn, verður dagpeningur veittur í mesta lagi 32 vikur í viðgongutíðini. Barsilsskipanin rindar tær seinastu 8 vikurnar.

Sambært løgtingslóg nr. 153 frá 12. desember 2018 um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m., verður bundið eftirlønargjald lagt aftrat dagpeningaveitingini. Bundna eftirlønargjaldið verður 10% í 2024 og hækkar síðani við einum prosentstigi um árið fram til 2026, tá eftirlønargjaldið er komið uppá 12 prosent.

1. januar 2024 hækkar talið av døgum, ið arbeiðsgevarar skulu endurrinda, úr 2 upp til 7 fráverudagar. Mett verður, at nettojáttanin kann lækka við 13 mió. kr. Uppskot til løgtingslóg verður lagt fyri Løgtingið.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 97.654 | 113.120 | 99.018 | 104.662 | 106.638 | 108.654 |
| Inntøkur | 13.109 | 12.876 | 10.960 | 25.347 | 25.482 | 25.621 |
| **01. Løntakarar** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **93.775** | **108.322** | **94.522** | **100.010** | **101.932** | **103.892** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 93.775 | 108.322 | 94.522 | 100.010 | 101.932 | 103.892 |
| **Inntøkur** | **6.743** | **6.287** | **4.410** | **4.410** | **4.410** | **4.410** |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *6.743* | *6.287* | *4.410* | *4.410* | *4.410* | *4.410* |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **02. Sjálvboðin trygging** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.760** | **3.585** | **3.252** | **3.408** | **3.462** | **3.518** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 2.760 | 3.585 | 3.252 | 3.408 | 3.462 | 3.518 |
| **Inntøkur** | **818** | **783** | **693** | **693** | **693** | **693** |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *818* | *783* | *693* | *693* | *693* | *693* |
| **04. Gjald fyri læknaváttanir** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.120** | **1.212** | **1.244** | **1.244** | **1.244** | **1.244** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 1.120 | 1.212 | 1.244 | 1.244 | 1.244 | 1.244 |
| **09. Arbeiðsgevarans partur, dagpengar** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **5.549** | **5.806** | **5.857** | **20.244** | **20.379** | **20.518** |
| 61. Skattir og avgjøld | *-13* | *-2* | - | - | - | - |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *5.553* | *5.799* | *5.857* | *20.244* | *20.379* | *20.518* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *9* | *9* | - | - | - | - |

**Virksemisyvirlit**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **97.654** | **113.120** | **99.018** | **104.662** | **106.638** | **108.654** |
| 1. Løntakarar, sjúkradagpeningur | 93.775 | 108.322 | 94.522 | 100.010 | 101.932 | 103.892 |
| 2. Sjálvboðin trygging | 2.760 | 3.585 | 3.252 | 3.408 | 3.462 | 3.518 |
| 3. Gjald til læknaváttanir | 1.120 | 1.212 | 1.244 | 1.244 | 1.244 | 1.244 |
| **B: Virksemi (tal)** | **3.204** | **4.139** | **3.165** | **3.650** | **3.650** | **3.650** |
| 1. Løntakarar, sjúkradagpeningur | 3.064 | 3.982 | 3.000 | 3.500 | 3.500 | 3.500 |
| 2. Sjálvboðin trygging | 140 | 157 | 165 | 150 | 150 | 150 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| 1. Løntakarar, sjúkradagpeningur | 30.605 | 27.203 | 31.507 | 28.574 | 29.123 | 29.683 |
| 2. Sjálvboðin trygging | 19.714 | 22.834 | 19.709 | 22.720 | 23.080 | 23.453 |

# 12.21.5. Stuðul til eldri og teirra, ið bera brek

## 12.21.5.01. Stuðul til feløg teirra, ið bera brek (Stuðulsjáttan)

Stuðul verður latin til feløg teirra, ið bera brek.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 4.332 | 4.832 | 5.132 | 5.132 | 5.132 | 5.132 |
| **01. Deyvafelagið** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **982** | **982** | **982** | **982** | **982** | **982** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 982 | 982 | 982 | 982 | 982 | 982 |
| **03. MEGD** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.650** | **1.650** | **1.950** | **1.950** | **1.950** | **1.950** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.650 | 1.650 | 1.950 | 1.950 | 1.950 | 1.950 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **05. Hjálpargrunnur fyri óarbeiðsførar fiskimenn** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **250** | **250** | **250** | **250** | **250** | **250** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 250 | 250 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| **07. Javni** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **550** | **550** | **550** | **550** | **550** | **550** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 550 | 550 | 550 | 550 | 550 | 550 |
| **08. Sinnisbati** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **450** | **450** | **450** | **450** | **450** | **450** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 450 | 450 | 450 | 450 | 450 | 450 |
| **09. Føroya blindafelag** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **250** | **250** | **250** | **250** | **250** | **250** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 250 | 250 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| **10. Hoyr** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **200** | **200** | **200** | **200** | **200** | **200** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 200 | 200 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| **11. ADHD-felagið** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **250** | **250** | **250** | **250** | **250** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | 250 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| **12. Autismufelagið** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **250** | **250** | **250** | **250** | **250** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | 250 | 250 | 250 | 250 | 250 |

### 01. Deyvafelagið
Deyvafelag Føroya er áhugafelag fyri deyv og er eitt av feløgunum í MEGD. Stuðulin verður latin Deyvafelagnum, sum hevur til endamáls at savna deyv í Føroyum og at varpa ljós á og virka fyri, at deyv í Føroyum hava somu rættindi, sum hoyrandi hava. Deyvafelagið skipar fyri tiltøkum og skeiðum fyri deyv og hevur deyvaráðgeva í starvi, ið veitir persónliga ráðgeving og vegleiðing til deyv, hoyriveik og CI-brúkarar. Deyvafelagið fór undir sítt virksemi í Deyvahúsinum í 1983. Stuðulin verður veittur til rentur og avdráttir til Deyvahúsið og til skrivstovurakstur. Stuðulin verður útgoldin mánaðarliga. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl.

### 03. MEGD
MEGD er meginfelag fyri 24 feløg, ið umboða fólk, ið bera brek og/ella hava varandi sjúku. Meginfelagið virkar fyri at stuðla og menna limafeløgini, og fyri at fólk, ið bera brek, verða hoyrd í viðkomandi málum. Stuðulin fer til virksemið hjá MEGD, og verður útgoldin mánaðarliga. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl.

### 05. Hjálpargrunnur fyri óarbeiðsførar fiskimenn
Hjálpargrunnurin fyri óarbeiðsførar fiskimenn er grunnur hjá Føroya Fiskimannafelag. Stuðulin verður latin hjálpargrunninum, sum hevur til endamáls at veita stuðul til sjómenn, ið eru vorðnir óarbeiðsførir av sjúku ella skaða á sjónum. Stuðulin verður útgoldin einaferð um árið. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl.

**07. Javni**
Felagið Javni er landsfelag menningartarnaðum at bata og er eitt av feløgunum í MEGD. Stuðulin verður latin til Javna, sum hevur til endamáls at virka fyri javnrættindum til øll við menningartarni í føroyska samfelagnum. Stuðulin verður útgoldin hvønn ársfjórðing. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl.

**08. Sinnisbati**
Sinnisbati er ein sjálvboðin áhugafelagsskapur hjá teimum, ið hava sálarsjúku, og avvarðandi teirra og er eitt av feløgunum í MEGD. Stuðulin verður latin til Sinnisbata, ið hevur til endamáls at bøta um korini hjá teimum sálarsjúku og virkar fyri tolsemi og betri fatan av menniskjum, sum eru sálarsjúk. Sinnisbati veitir upplýsingar um sálarsjúku og viðgerðarmøguleikar, stuðlar samstarvi millum avvarðandi at sálarsjúkum, stovnar, læknar og onnur, umframt at felagsskapurin skipar fyri fyribyrgjandi tiltøkum, gransking og øðrum, ið virka sálarheilsufremjandi. Stuðulin verður útgoldin hvønn ársfjórðung. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl.

**09. Føroya blindafelag**
Føroya Blindafelag er limafelag hjá fólki, sum hava sjón undir 10%, og er eitt av feløgunum í MEGD. Stuðulin verður latin Blindafelagnum, ið hevur til endamáls at røkja áhugamálini hjá blindum og sjónveikum, at styrkja javnrættindini og atkomu hjá blindum og sjónveikum í samfelagnum. Stuðulin verður útgoldin einaferð um árið. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl.

**10. Hoyr**
Hoyr er áhugafelag fyri fólk við hoyribreki í Føroyum og er eitt av feløgunum í MEGD. Felagið arbeiðir m.a. fyri, at umstøðurnar hjá fólki við hoyribreki verða so góðar sum gjørligt. Stuðulin verður latin til felagið, m.a. til at brúka skrivitulk til virksemi og tiltøk hjá felagnum. Stuðulin verður útgoldin einaferð um árið. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl.

**11. ADHD-felagið**
ADHD-felagið er eitt av feløgunum í MEGD. Felagið hevur sum høvuðsmál at varpa ljós á ADHD og ADD og vil virka til frama fyri fólk við ADHD og ADD og fyri teirra avvarðandi. Stuðulin skal m.a. brúkast til eina samstarvsavtalu um vegleiðing til limirnar í ADHD-felagnum og Autismufelagnum. Ársroknskapur fyri 2022 skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl 2023.

**12. Autismufelagið**
Autismufelagið er áhugafelagið hjá teimum, sum hava autismu, ella á einhvønn hátt varða av fólki, ið bera brekið autismu og er eitt av feløgunum í MEGD. Stuðulin skal m.a. brúkast til eina samstarvsavtalu um vegleiðing til limirnar í ADHD-felagnum og Autismufelagnum. Ársroknskapur fyri 2022 skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl 2023.

**12.21.5.04. Stuðul til feløg hjá eldri (Stuðulsjáttan)**

**Landsfelag Pensjónista**
Stuðulin verður latin til skrivstovuhald og annað virksemi hjá Landsfelag Pensjónista, t.d. blaðið Eldri og norðurlendskt samstarv. Landsfelagið hevur eisini til uppgávu at ráðgeva landsstýriskvinnuni í øllum málum, ið viðvíkja eldri. Árligi stuðulin verður útgoldin hvønn ársfjórðing. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almanna- og mentamálaráðnum innan 1. apríl.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 450 | 450 | 450 | 450 | 450 | 450 |
| **02. Landsfelag pensjónista** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **450** | **450** | **450** | **450** | **450** | **450** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 450 | 450 | 450 | 450 | 450 | 450 |

## 12.21.6. Eldri og serforsorg

### 12.21.6.02. Bústovnar o.a. (Løgujáttan)

**10. Bústovnar o.a.**
Farið er undir fyrireikingar at byggja tveir nýggjar bústovnar. Talan er um eitt sambýli til fólk við autismu, og eitt sambýli til fólk við sálarligum avbjóðingum við ávikavist 24 og 18 búplássum.

Sambýlið til fólk við autismu verður eftir ætlan bygt á Argjum. Sambýlið verður bygt í fýra eindum, hvør eindin fer at hava seks sjálvstøðugar íbúðir, umframt felagsøkir, starvsfólkarúm og felags hentleikar. Byggiskrá er skrivað, og klárt er at bjóða út ráðgevarauppgávuna. Grundøkið verður keypt frá Tórshavnar kommunu, og verður grovplanerað í 2024. Verklagslógin verður løgd fyri Løgtingið, tá høvuðsverkætlanin er boðin út, og tilboðini um arbeiðstøkurnar eru komin inn.

Sambýlið til fólk við sálarligum avbjóðingum verður eftir ætlan bygt í Miðvági, og kemur í staðin fyri verandi tilboð í oynni. Sambýlið verður í trimum eindum, við seks sjálvstøðugum íbúðum í hvørjari eind. Grundøkið verður keypt frá Vága kommunu, og verður grovplanerað í 2024. Verklagslógin verður løgd fyri Løgtingið, tá høvuðsverkætlanin er boðin út og tilboðini um arbeiðstøkurnar eru komin inn.

Ætlanin er eisini at fara undir fyrireiking av øðrum verkætlanum til vardar bústaðir, fleiri umlættingarpláss og virknistænastur, samtíðis sum neyðug dagføring av verandi bygningum heldur fram.

**11. Vardur bústaður til fólk við menningartarni (Sambýlið á Mýrini)**
Við heimild í løgtingslóg nr. 59 frá 30. apríl 2018, sum broytt við løgtingslóg nr. 11 frá 28. januar 2021, er vardur bústaður til fólk við menningartarni bygdur á Mýrini í Hoyvík.

Pláss er til 18 búfólk, og eru búplássini skipað sum sjálvstøðugar íbúðir, umframt felags hentleikar.

**12. Búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu**
Við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 30. apríl 2018, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 40 frá 29. mars 2023, er búheim og umlættingarheim til børn og ung við autismu bygt í Kvíggjartúni á Argjum.

Í heiminum eru seks búpláss, seks umlættingarpláss og eitt virknistilboð til áleið 16 børn og ung, umframt felagshøli til starvsfólk.

**13. Vardur bústaður til fólk við menningartarni og fjølbreki**
Við heimild í løgtingslóg nr. 65 frá 4. mai 2022 um at byggja sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki verður ein vardur bústaður bygdur í Reynstúni á Argjum.

Talan er um eitt sambýli við 18 búplássum, har tólv av plássunum eru sergjørd til búfólk, sum hava tørv á nógvum stuðli og røkt. Umframt bústaðirnar eru felagshølir og felags hentleikar. Bruttovíddin er 1314 $m^2$ .

Eftir ætlan verður bygningurin avhendaður tíðliga í 2024.

## Átekning

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 27.687 | 54.298 | 56.250 | 45.500 | 50.000 | 50.000 |
| Inntøkur | 124 | - | - | - | - | - |
| **10. Bústovnar o.a.** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **27.687** | **24.473** | **13.996** | **45.500** | **50.000** | **50.000** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -1.404 | -975 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 26.488 | 22.812 | 13.996 | 45.500 | 50.000 | 50.000 |
| 32. Útvegan av løgu o.ø. | 1.198 | 1.661 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1.404 | 975 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **124** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 64. Aðrar flytingarinntøkur | *124* | - | - | - | - | - |
| **11. Vardur bústaður til fólk við menningartarni (Sambýlið á Mýrini)** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **17.256** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | -411 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | - | 17.256 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 411 | - | - | - | - |
| **12. Bú- og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **12.569** | **4.000** | **-** | **-** | **-** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | -403 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | - | 12.569 | 4.000 | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 403 | - | - | - | - |
| **13. Sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **38.254** | **-** | **-** | **-** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | - | - | 38.254 | - | - | - |

**Virksemisyvirlit: 10 Bústovnar o.a.**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (netto) (1.000 kr.)** | **27.563** | **54.298** | **56.250** | **45.500** | **50.000** | **50.000** |
| Eirargarður 14 og 16 | - | - | - | - | - | - |
| Umbygging og ábøtur | - | - | - | - | - | - |
| Eiðisgarður í Vági | 511 | - | - | - | - | - |
| Fyrireiking av verkætlanum | - | - | 2.000 | 5.000 | 4.000 | 5.000 |
| Sambýlið Grønlandsvegur 59 | 8 | - | - | - | - | - |
| Vardir bústaðir í Tórshavn, Mýran | 7.765 | 17.256 | 17.962 | - | - | - |
| Sambýlið við Rygsá | - | - | - | 18.000 | 22.000 | 20.000 |
| Bú- og umlættingarheim til børn og ung við autismu | 9.678 | 12.569 | 17.288 | - | - | - |
| Vardur bústaður á Argjum, Reynstún | 2.092 | 14.518 | 38.254 | - | - | - |
| Dagføring av vardum bústaðum | 6.725 | 10.066 | 15.643 | 4.500 | 2.000 | 2.000 |
| Sambýlið í Vágunum | - | - | - | 18.000 | 22.000 | 20.000 |
| Sambýlið á Traðavegi í Sandavági | 908 | - | - | - | - | - |
| Aðrar verkætlanir | -124 | -111 | 4.877 | - | - | 3.000 |
| Flutt til rakstur | - | - | 750 | - | - | - |
| Flutt játtan, netto | - | - | -40.524 | - | - | - |

## 12.21.6.09. Trivnaðartænastur (Rakstrarjáttan)

### 20. Vanligt virksemi
Virksemið hjá Trivnaðartænastuni er partvíst skipað við heimild í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Virksemið fevnir um virknistænastu, bútilboð, umlætting og stuðulstænastu.

### Virknistænasta
Virknistænasta er skipað við heimild í § 39 og § 40 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Virknistænasta er ætlað persónum sum bera likamligt ella sálarligt brek ella hava víðfevndar sosialar trupulleikar og sum ikki megna at luttaka á vanliga arbeiðsmarknaðinum.

Børn, sum bera týðandi brek, og sum ikki kunnu vera á kommunalum dagstovni ella frítíðarheimi kunnu fáa dagstovnapláss ella pláss á frítíðarheimi hjá Trivnaðartænastuni. Børn, sum hava likamligt ella sálarligt brek ella sosialar trupulleikar kunnu eisini fáa frítíðartilboð.

Virknistænasta verður skipað sum eitt nú vardur verkstaður, verkhús, tilhald ella frítíðartilboð.

### Bústaðartilboð
Bústaðartilboð eru skipað sambært § 45 og § 46 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

Fyribils bústaður sambært § 45 hevur eitt mennandi endamál, og er ætlaður persóni við likamligum ella sálarligum breki ella sosialum trupulleikum. Vardur bústaður sambært § 46 er meira varandi og hevur til endamáls at veita persóni, sum hevur likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar og hevur tørv á hjálp og stuðli til vanligt dagligt virksemi umframt møguliga røkt, eitt heim har viðkomandi kann liva eitt sjálvstøðugt, støðugt, innihaldsríkt og virkið lív.

### Umlætting
Umlætting er skipað sambært § 41 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

Endamálið við umlætting er at lætta um hjá avvarðandi, sum er umsorganarpersónur hjá fólki, sum hevur likamligt ella sálarligt brek ella sosialar trupulleikar. Umlætting kann eisini hava til endamál at

menna persónligar og sosialar førleikar hjá persónum, sum búgva einsamøll og hava avmarkað samband við onnur fólk.

**Stuðulstænasta**
Stuðulstænasta er skipað sambært § 35 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

Persónar, sum hava likamligt ella sálarligt brek, og vaksin, sum hava víðfevndar sosialar trupulleikar, kunnu fáa stuðulstænastu. Talan er um persónligan stuðul til einstaklingar.

Í tann mun, at talan er um stuðulstænastu, sum verður veitt sum umsorgan og praktisk hjálp til gerandis uppgávur og fíggjarviðurskifti, fylgjara til sosial tiltøk, og vøka og hjávera sum er uttanfyri ábyrgdarøki hjá viðkomandi kommunu og heilsuverkinum, kann persónur sum fær stuðulstænastu, sjálvur gera av, hvør skal virka sum stuðulsfólk og hvat stuðulstænastan kann nýtast til og nær, sambært § 36 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

**Bygnaður**
Bygnaðarliga er Trivnaðardepilin skipaður í 5 eindir, sum eru býttar upp eftir breki, og í nøkrum førum eftir landafrøði. Niðanfyri verður greitt frá virkseminum í einstøku eindunum.

**Virknistænastur**
Eindin veitir virknistænastur sbrt. §§ 39 og 40 í almannalógini, og umlætting sbrt. § 41 í somu lóg. Eindin veitir eisini vardan bústað til vaksin í Sandoy sbrt. § 46 í somu lóg.

Virknistænastan verður veitt børnum, ungum og vaksnum við sálarsjúku, fjølbreki, menningartarni og autismu, sum hava tørv á stuðli fyri at megna gerandisdagin.

Virknistænasturnar verða veittar sum verkhús- og verkstaðstilboð og frítíðartilboð, sum dagtilboð og klubbtilboð. Umlættingin hevur til endamáls at lætta um hjá umsorganarpersónum í gerandisdegnum.

Eindin veitir tænasturnar um alt landið, tó undantikið í Suðuroy, har eindin Likamligt brek veitir allar tænastur.

Eindin miðar eftir, at hvør einstakur í størst møguligan mun hevur ávirkan á egið lív, fær ein virknan og innihaldsríkan gerandisdag og kann menna og viðlíkahalda sínar førleikar. Endamálið er, at hvør einstakur kann liva eitt gott og virkið lív.

**Menningartarn**
Eindin veitir bútilboð. Bútilboðini verða veitt sum fyribils bústaður sbrt. § 45 og vardur bústaður sbrt. § 46 í almannalógini.

Tænastan verður veitt ungum og vaksnum við menningartarni og fjølbreki, sum hava tørv á stuðli fyri at megna gerandisdagin.

Tænastan verður veitt borgarum um alt landið, tó undantikið í Suðuroy, har eindin Likamligt brek veitir allar tænastur.

Eindin miðar eftir, at hvør einstakur í størst møguligan mun hevur ávirkan á egið lív, fær ein virknan og innihaldsríkan gerandisdag og kann menna og viðlíkahalda sínar førleikar. Endamálið er, at hvør einstakur kann liva eitt gott og virkið lív.

**Autisma**
Eindin veitir bútilboð sbrt. §§ 45 og 46 í almannalógini, frítíðartilboð sbrt. §§ 39 og 40 og umlætting sbrt. § 41 í somu lóg. Bútilboðini verða veitt sum fyribils bústaður og vardur bústaður.

Tænastan verður veitt børnum, ungum og vaksnum við autismu og menningartarni, sum hava tørv á stuðli fyri at megna gerandisdagin.

Tænastan verður veitt borgarum um alt landið, tó undantikið í Suðuroy, har eindin Likamligt brek veitir allar tænastur.

Eindin miðar eftir, at hvør einstakur í størst møguligan mun hevur ávirkan á egið lív, fær ein virknan og innihaldsríkan gerandisdag og kann menna og viðlíkahalda sínar førleikar. Endamálið er, at hvør einstakur kann liva eitt gott og virkið lív.

**Likamligt brek**
Eindin veitir bútilboð sbrt. §§ 45 og 46 í almannalógini, dagtilboð sbrt. § 40 og umlætting sbrt. § 41 í somu lóg, til likamliga skerd vaksin.

Eindin veitir allar tænastur til borgarar við seinheilaskaða og dagtilboð til borgarar við demens fyri alt landið. Eindin hevur einstaklingafyriskipanir fyri fólk við øðrum likamligum breki kring landið.

Harumframt veitir eindin allar trivnaðartænastur í Suðuroy, bæði til børn og vaksin.

Eindin miðar eftir, at hvør einstakur í størst møguligan mun hevur ávirkan á egið lív, fær ein virknan og innihaldsríkan gerandisdag og kann menna og viðlíkahalda sínar førleikar. Endamálið er, at hvør einstakur kann liva eitt gott og virkið lív.

**Sosialpsykiatri**
Bútilboðini verða veitt sum fyribils bústaður sbrt. § 45 og vardur bústaður sbrt. § 46 í almannalógini. Stuðulstænastan verður veitt sbrt. § 35 og dag- og kvøldtilboð sbrt. § 40 í somu lóg.

Eindin veitir bútilboð, stuðulstænastu og dag- og kvøldtilboð.

Tænastan verður veitt ungum og vaksnum, sum hava sálarligar avbjóðingar og tørv á stuðli fyri at megna gerandisdagin.

Tænastan verður veitt borgarum um alt landið, tó undantikið í Suðuroy, har eindin Likamligt brek veitir allar tænastur.

Eindin miðar eftir, at hvør einstakur í størst møguligan mun hevur ávirkan á egið lív, fær ein virknan og innihaldsríkan gerandisdag og kann menna og viðlíkahalda sínar førleikar. Endamálið er, at hvør einstakur kann liva eitt gott og virkið lív.

**Sjálvsognarstovnar**
Sjálvsognarstovnar, sum veita bútilboð til fólk við sálarligum avbjóðingum eru Sólteigur/Eysturstrætið og Tórshavnar Privata Vistarheim. Harumframt veitir sjálvsognarstovnurin Umlættingarheimið Dáin í Klaksvík frítíðartilboð og umlætting.

**Framskrivingar**
Umframt lønarframskriving og lønarlyft verður játtanin í 2024 hækkað sum greitt frá niðanfyri.

Á fíggjarlógini í 2023 vórðu játtaðar 4.998 tús. kr. til Varda bústaðin til fólk við menningartarni á Mýrini. Játtanin er framskrivað við 1.730 tús. kr. til fult virksemi í 2024.

Á fíggjarlógini í 2023 vórðu játtaðar 12.543 tús. kr. til Búheim og umlættingarheim til børn og ung við autismu á Argjum. Játtanin er framskrivað við 5.429 tús. kr. til fult virksemi í 2024.

Vardur bústaður til fólk við menningartarni og fjølbreki í Reynstúni á Argjum letur upp eftir ætlan um várið 2024, samtíðis sum ein partur av verandi stovni letur aftur. Játtanin í 2024 er hækkað við 1.849 tús. kr. Játtanin í 2025 verður hækkað við 616 tús. kr. til fult virksemi.

Framskrivað er fyri fólkavøkstri og broyttari fólkasamanseting 5.869 tús. kr. til at verandi virksemisstig kann varðveitast. Harumframt er játtanin hækkað við 134 tús. kr. vegna prístalshækking á húsaleigum.

**21. Virksemi uttanlands**
Sambært skjali A L. nr. 717 frá 18. november 1987 um heildarveiting til føroyska almannaøkið rindar landskassin útreiðslur fyri føroyingar á stovni í Danmark, og ferðaútreiðslur fyri føroyingar á stovni í Danmark og fyri tey, sum varða av teimum.

Sambært § 67, stk. 2 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur kann Almannaverkið gera avtalur við veitara uttanlands um nøktandi tilboð ikki kann veitast í Føroyum.

**Átekning**
Landsstýriskvinnuni verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum høvuðskontuna og høvuðskontu 12.21.1.02. Almannaverkið.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 407.032 | 385.105 | 430.148 | 466.403 | 477.584 | 484.021 |
| Útreiðslur | 431.182 | 401.527 | 443.963 | 480.218 | 491.399 | 497.836 |
| Inntøkur | 24.150 | 16.423 | 13.815 | 13.815 | 13.815 | 13.815 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 383.976 | 365.788 | 405.967 | 441.679 | 452.305 | 458.174 |
| **Útreiðslur** | **408.127** | **382.210** | **419.782** | **455.494** | **466.120** | **471.989** |
| 11. Lønir v.m. | 341.849 | 319.754 | 373.045 | 408.623 | 419.249 | 425.118 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 27.506 | 24.929 | 21.573 | 21.573 | 21.573 | 21.573 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 5.347 | 5.724 | 2.713 | 2.713 | 2.713 | 2.713 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 13.619 | 12.596 | 9.752 | 9.886 | 9.886 | 9.886 |
| 17. Avskrivingar o.a. | - | 6 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 1.612 | 1.459 | 1.132 | 1.132 | 1.132 | 1.132 |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | - | 60 | - | - | - | - |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | 46 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | -524 | - | - | - | - | - |
| 55. Íløgustuðul o.a. | 200 | 200 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 1 | 0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 17.137 | 16.301 | 11.567 | 11.567 | 11.567 | 11.567 |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 1.380 | 1.134 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **24.150** | **16.423** | **13.815** | **13.815** | **13.815** | **13.815** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *14.058* | *15.500* | *13.382* | *13.382* | *13.382* | *13.382* |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | *864* | *922* | *433* | *433* | *433* | *433* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *1.002* | - | - | - | - | - |
| 77. Flyting frá kommunum | *8.226* | - | - | - | - | - |
| **21. Virksemi uttanlands** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 23.056 | 19.317 | 24.181 | 24.724 | 25.279 | 25.847 |
| **Útreiðslur** | **23.056** | **19.317** | **24.181** | **24.724** | **25.279** | **25.847** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 11.621 | 7.824 | 8.492 | 9.035 | 9.590 | 10.158 |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 11.411 | 11.478 | 15.639 | 15.639 | 15.639 | 15.639 |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 24 | 15 | 50 | 50 | 50 | 50 |

**Virksemisyvirlit:**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1: Lønarútreiðslur (1.000 kr.)** | **-** | **-** | **-** | **408.623** | **419.249** | **425.118** |
| Virknistænastur | - | - | - | 74.771 | 76.781 | 77.908 |
| Menningartarn | - | - | - | 110.359 | 113.325 | 114.988 |
| Autisma | - | - | - | 65.143 | 66.895 | 67.877 |
| Likamligt brek | - | - | - | 72.718 | 74.674 | 75.770 |
| Sosialpsykiatri | - | - | - | 66.359 | 68.143 | 69.144 |
| Sjálvsognarstovnar | - | - | - | 13.408 | 13.408 | 13.408 |
| Felags | - | - | - | 5.865 | 6.023 | 6.023 |

*Frá 1. januar 2023 er bygnaðurin broyttur, og virksemið er nú skipað í 5 eindum.*

**Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1.: Lønarútreiðslur (1.000 kr.)** | **341.849** | **319.754** | **373.045** | **-** | **-** | **-** |
| 1. Fólk við autismu í Norðoyggjum | 20.011 | 24.299 | 24.959 | - | - | - |
| 2. Fólk við menningartarni og fjølbr. í Eyst. og Norð. | 22.721 | 24.433 | 28.695 | - | - | - |
| 3. Fólk við autismu í Suðurstreymoy | 19.391 | 19.604 | 34.784 | - | - | - |
| 4. Fólk við sálarsjúku í Suðurstr. og virksemi í Vágum | 40.587 | 39.051 | 42.832 | - | - | - |
| 5. Fólk við menningartarni o.tíl. í Suðurstreymoy | 14.938 | 19.593 | 21.799 | - | - | - |
| 6. Fólk við menningartarni í Suðurstreymoy | 31.373 | 30.203 | 36.010 | - | - | - |
| 7. Fólk við fjølbreki o.tíl. í Suðurstreymoy og Sandoy | 35.907 | 35.032 | 36.829 | - | - | - |
| 8. Vaksin við sálarsjúku og seinheilaskaða | 37.069 | 32.962 | 40.171 | - | - | - |
| 9. Verkstøð og verkhús | 23.124 | 25.183 | 24.251 | - | - | - |
| 10. Barnaverndarstovnar | 38.568 | - | - | - | - | - |
| 11. Suðuroy | 19.384 | 18.119 | 25.952 | - | - | - |
| 12. Fólk við menningartarni og líkamligum breki | 16.194 | 16.789 | 18.014 | - | - | - |
| 13. Stuðulseindin | 5.560 | 15.003 | 19.488 | - | - | - |
| Sjálvsognarstovnar | 10.964 | 11.726 | 12.888 | - | - | - |
| Felags | 4.774 | 7.757 | 6.373 | - | - | - |
| Megna títt lív | 1.284 | 0 | - | - | - | - |
| Tíðaravmarking | - | - | - | - | - | - |

*Megna títt lív er flutt til Eind 4 í 2022. Barnaverndarstovnar eru í 2022 fluttir til høvuðskontu 7.21.3.14. Barnaverndarstovnar.*

**Virksemisyvirlit:**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **20: Høvuðsvirksemi í Trivnaðardeplinum (tal)** | | | | | | |
| Tal av fastbúgvandi | 250 | 247 | 267 | 274 | 274 | 274 |
| Tal av stovnsplássum fyri børn og ung | 27 | 19 | - | - | - | - |
| Tal av vaksnum, sum fáa stuðul | 235 | 314 | 270 | 310 | 310 | 310 |
| Tal av børnum, sum fáa stuðul og/ella onnur tilboð | 97 | 122 | 105 | 120 | 120 | 120 |
| Tal av umlættingum | 75 | 80 | 95 | 95 | 95 | 95 |
| Verkstaðspláss | 193 | 190 | 210 | 200 | 200 | 200 |
| Annað (Serligt skipað miðnám, toymi v.m. ) | 45 | 16 | 45 | 20 | 20 | 20 |

*Veristøð, frítíðarklubbar og kaffihús eru ikki tald við her. Stovnspláss fyri børn og ung eru í 2022 flutt til høvuðskontu 7.21.3.14. Barnaverndarstovnar.*

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 3,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 726,0 | 665,0 | 798,5 | 808,5 | 830,7 | 842,5 |
| Fulltíðarstørv | 729,0 | 666,0 | 799,5 | 809,5 | 831,7 | 843,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 341,8 | 319,8 | 373,0 | 408,6 | 419,2 | 425,1 |

*Stovnspláss fyri børn og ung eru í 2022 flutt til høvuðskontu 7.21.3.14. Barnaverndarstovnar.*

**Virksemisyvirlit: 21 Virksemi uttanlands**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **23.056** | **19.317** | **24.181** | **24.724** | **25.279** | **25.847** |
| Føroyingar á stovni í Danmark | 11.411 | 11.478 | 15.639 | 15.639 | 15.639 | 15.639 |
| Ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi | 24 | 15 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| Fyriskipanir uttanlands | 11.621 | 7.824 | 8.492 | 9.035 | 9.590 | 10.158 |
| **B: Virksemi (tal)** | | | | | | |
| Føroyingar á stovni í Danmark | 8 | 8 | 7 | 6 | 6 | 6 |
| Ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Fyriskipanir uttanlands | 7 | 6 | 5 | 6 | 6 | 6 |
| **C: Eindarkostnaður (1.000 kr.)** | | | | | | |
| Føroyingar á stovni í Danmark | 1.426 | 1.435 | 2.234 | 2.607 | 2.607 | 2.607 |
| Ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi | 24 | 15 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| Fyriskipanir uttanlands | 1.660 | 1.304 | 1.698 | 1.506 | 1.598 | 1.693 |

## 12.21.6.14. Lán til ellis- og røktarheim (Stuðulsjáttan)

### 01. Lán til ellis- og røktarheim í Vági

Við løgtingslóg nr. 118 frá 20. desember 2006 um lán til bygging av ellis- og røktarheimi í Vági, við seinni broytingum, varð landsstýrinum heimilað at veita kommununum í Suðuroynni rentufrítt lán úr landskassanum til kommunupartin av útreiðslunum til bygging av ellis- og røktarheiminum í Vági.

Heimið var liðugt bygt á vári 2011.

Lánið verður afturgoldið landskassanum yvir eitt 13 ára skeið í tíðarskeiðnum 2012-2025.

### 02. Lán til ellis- og røktarheim í Vágum

Við løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2014 um studningslán og rentufrítt lán til umvæling av ellis- og røktarheiminum á Sýnini varð landsstýrinum heimilað at veita lán til Sørvágs kommunu og Vága kommunu til umvæling av ellis- og røktarheiminum á Sýnini í Miðvági.

Helvtin av lánsupphæddini til hvørja kommunu varð veitt sum studningslán og helvtin sum rentufrítt lán.

Lánið verður afturgoldið landskassanum yvir eitt 13 ára skeið í tíðarskeiðnum 2015-2028.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkujáttan | 3.878 | 3.878 | 3.878 | 3.878 | 3.878 | 1.212 |
| **01.Lán til ellis- og røktarheim í Vági** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **2.666** | **2.666** | **2.666** | **2.666** | **2.666** | **-** |
| 86. Afturgjaldan av útlánum v.m. | *2.666* | *2.666* | *2.666* | *2.666* | *2.666* | - |
| **02.Lán til ellis- og røktarheim í Vágum** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **1.212** | **1.212** | **1.212** | **1.212** | **1.212** | **1.212** |
| 86. Afturgjaldan av útlánum v.m. | *1.212* | *1.212* | *1.212* | *1.212* | *1.212* | *1.212* |

## 12.21.6.17. Serflutningsskipan landsins (Stuðulsjáttan)

Endamálið við Serflutningsskipan landsins er at veita flutningsmøguleika til fólk, ið bera brek og eru so tarnað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól, ella í avmarkaða tíð vegna sjúku ella skaða hava henda tørv. Skipanin fevnir ikki um sjúkraflutning.

Ein stýrisbólkur, sum landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum setur eftir tilmæli frá pørtunum, hevur mótvegis landsstýriskvinnunni ábyrgdina av, at skipanin virkar eftir ætlan. Í stýrisbólkinum sita umboð fyri brúkaran (MEGD), fyri Kommunufelagið og fyri Almanna- og mentamálaráðið.

Skipanin verður fíggjað ávikavist av landskassanum, avvarðandi kommunu og av brúkarunum. Brúkarin rindar eitt brúkaragjald fyri hvønn túrin, meðan restkostnaðurin verður býttur javnt millum land og luttakandi kommunur. Landskassaparturin verður útgoldin sambært góðkendari fíggjarætlan tvær ferðir um árið. Kommunurnar senda fyri hvørja serflutningsskipan sær ein grannskoðaðan ársroknskap fyri árið frammanundan til Almanna- og mentamálaráðið innan 15. mars.

Skipanin virkar í Tórshavnar kommunu og Klaksvíkar kommunu.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 707 | 707 | 707 | 707 | 707 | 707 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **707** | **707** | **707** | **707** | **707** | **707** |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 707 | 707 | 707 | 707 | 707 | 707 |

## 12.21.6.19. Dugni - endurbúgving (Rakstrarjáttan)

Sjálvsognarstovnurin Dugni hevur til endamáls, at vera arbeiðstarnaðum til hjálpar við m.a. at royna arbeiðsevnini, menna arbeiðsmøguleikarnar og at skipa fyri endurbúgving. Sjálvsognarstovnurin hevur verkstøð í Tórshavn, Suðuroy og á Kambsdali, sum standa fyri framleiðslu, eins og stovnurin hevur nakrar sølubúðir kring landið.

Virksemið er skipað við heimild í § 40, stk. 3 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

Játtanin verður latin til vanliga virksemið hjá Dugna, meðan egið virksemi verður fíggjað við søluinntøkum og møguligum øðrum inntøkum.

Umframt lønarframskriving og lønarlyft er játtanin hækkað við 200 tús. kr. til húsaleiguútreiðslur í Suðuroy.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 8.478 | 8.997 | 9.551 | 10.184 | 10.184 | 10.184 |
| Útreiðslur | 8.478 | 8.997 | 9.551 | 10.184 | 10.184 | 10.184 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 8.478 | 8.997 | 9.551 | 10.184 | 10.184 | 10.184 |
| **Útreiðslur** | **8.478** | **8.997** | **9.551** | **10.184** | **10.184** | **10.184** |
| 11. Lønir v.m. | 6.771 | 7.427 | 7.840 | 8.273 | 8.273 | 8.273 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 787 | 679 | 736 | 736 | 736 | 736 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 66 | 9 | 90 | 90 | 90 | 90 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 604 | 632 | 638 | 838 | 838 | 838 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | - | 247 | 247 | 247 | 247 |
| 55. Íløgustuðul o.a. | 250 | 250 | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 12,3 | 13,0 | 13,0 | 13,0 | 13,0 | 13,0 |
| Fulltíðarstørv | 13,3 | 14,0 | 14,0 | 14,0 | 14,0 | 14,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 6,8 | 7,4 | 7,8 | 8,3 | 8,3 | 8,3 |

## 12.21.6.20. Sjóndepilin (Rakstrarjáttan)

Sjóndepilin er skipaður sum sjálvsognarstovnur. So at siga alt virksemið hjá stovninum er fíggjað úr landskassanum. Á Sjóndeplinum verður skipað fyri virksemi fyri blind og sjónveik við frálæru í ymiskum lærugreinum og vegleiðing í hjálpartólum. Tænastan er fyri alt landið. Vart verkstað fyri sjónveik og lættari seinment er skipað sum sjálvstøðug eind í virkishúsi undir Sjóndeplinum.

Virksemið er skipað við heimild í § 40, stk. 3 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 6.844 | 7.090 | 7.139 | 7.350 | 7.350 | 7.350 |
| Útreiðslur | 7.390 | 7.747 | 7.352 | 7.563 | 7.563 | 7.563 |
| Inntøkur | 546 | 658 | 213 | 213 | 213 | 213 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 6.844 | 7.090 | 7.139 | 7.350 | 7.350 | 7.350 |
| **Útreiðslur** | **7.390** | **7.747** | **7.352** | **7.563** | **7.563** | **7.563** |
| 11. Lønir v.m. | 4.211 | 4.570 | 4.753 | 4.964 | 4.964 | 4.964 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.574 | 1.583 | 1.018 | 1.018 | 1.018 | 1.018 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 18 | 104 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 505 | 434 | 397 | 397 | 397 | 397 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 68 | 43 | 71 | 71 | 71 | 71 |
| 55. Íløgustuðul o.a. | 1.013 | 1.013 | 1.013 | 1.013 | 1.013 | 1.013 |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 1 | 1 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **546** | **658** | **213** | **213** | **213** | **213** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *546* | *645* | *213* | *213* | *213* | *213* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | - | *12* | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 10,0 | 11,0 | 11,0 | 11,0 | 11,0 | 11,0 |
| Fulltíðarstørv | 10,0 | 11,0 | 11,0 | 11,0 | 11,0 | 11,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 4,2 | 4,6 | 4,8 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |

## 12.21.6.21. Sjóndepilin (Løgujáttan)

Sjóndepilin, ið er sjálvsognarstovnur, hevur havt avbjóðingar í mun til lekar o.a. Tekjan er skift, men tørvur er eisini á at dagføra útsíður, hurðar vindeygu o.a. umframt at fáa útluftingarskipan. Ætlanin er eisini at skifta orkuskipan til fjarhita. Mettur kostnaður er umleið 4,5 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 124 | 1.279 | - | 4.500 | - | - |
| **10. Sjóndepilin** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **124** | **1.279** | **-** | **4.500** | **-** | **-** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 124 | 1.279 | - | 4.500 | - | - |

### 12.21.6.22. Keyp og avhendan av lendi til leigubústaðir (Løgujáttan)

Almannaverkið fær heimild til at keypa grundstykki frá kommunum, við tí endamáli at selja sama grundstykki víðari til ein privatan íleggjara, sum vinnur útboð frá Almannaverkinum at byggja leigubústaðir til fólk við serligum tørvi, sum Almannaverkið hevur ávísingarrætt til.

Sambært kunngerð um løgujáttan kunnu løgur ikki avhendast, fyrr enn tær hava verið lýstar til sølu alment. Tann treytin verður lokin við tað, at grundstykkið inngongur sum partur av útbjóðingini.

Grundstykkið verður selt privata íleggjaranum fyri sama prís sum Almannaverkið keypti grundstykkið fyri frá kommununi, og við teirri treyt, at grundstykkið bert verður brúkt til ta íbúðarverkætlan, sum íleggjarin hevur bjóðað sær at fremja, og sum Almannaverkið hevur góðkent.

Almannaverkið skal treyta sær, tá grundstykkið verður keypt við hesi heimild, at um grundstykkið ikki verður selt víðari innanfyri eitt nærri ásett tíðarskeið (í mesta lagi 6 mánaðir), skal kommunan taka grundstykkið aftur fyri sama prís, sum kommunan seldi Almannaverkinum tað fyri.

Almannaverkið skal treyta sær, tá grundstykkið verður selt við hesi heimild, at handilin við grundstykkinum skal ganga aftur, um privati íleggjarin ikki fremur íbúðarverkætlanina, soleiðis sum avtalað við Almannaverkið.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | - | - | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| Inntøkur | - | - | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| **10. Keyp og avhendan av lendi til leigubústaðir** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **2.000** | **2.000** | **2.000** | **2.000** |
| 32. Útvegan av løgu o.ø. | - | - | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **2.000** | **2.000** | **2.000** | **2.000** |
| 42. Søla av løgu o.ø. | - | - | *2.000* | *2.000* | *2.000* | *2.000* |

## 12.21.7. Sosialar skipanir

### 12.21.7.01. Almannatrygd (Lógarbundin játtan)

Almannatrygd verður veitt við heimild í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur. Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur er grundarlagið undir sosialari hjálp í Føroyum. Tá allir aðrir møguleikar eru troyttir, virkar lógin sum eitt trygdarnet fyri persónar, ið hava tørv á hjálp.

*Fyribils uppihaldsveiting*
Endamálið við veiting av fyribils fíggjarligari hjálp eftir § 11, samanber § 12, er at forða fyri, at lívskorini hjá persóni og familju hansara versna munandi orsakað av eini almannahending, t.d. sjúku, hjúnaskilnaði ella viðgongu. Støddin á veitingini er tengd at uppihaldsskyldu, aldri og bústaðarviðurskiftum.

Bundna eftirlønargjaldið, sum verður lagt aftrat uppihaldsveitingum, verður 10% í 2024 og hækkar síðani við einum prosentstigi um árið fram til 2026, tá eftirlønargjaldið er komið uppá 12 prosent.

*Varandi uppihaldsveiting*
Um tað ikki tykist vera møguligt at gerast fíggjarliga sjálvbjargin á nakran hátt, og viðkomandi ikki hevur rætt til fyritíðarpensjón, kann í serligum førum vera veitt varandi hjálp eftir § 13.

*Fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslur*
Fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslur verður veitt eftir §§ 16, 19 og § 28, stk. 2 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

*Stuðul til hjálparráð o.a.*
Stuðul verður veittur til hjálparráð, bil og innrættan av bústaði til persónar við varandi virkistarni eftir ávikavist § 26, § 27 og § 29.

Almannaverkið umsitur stuðulin sbrt. §§ 26, 27 og 29.

Stuðul til hjálparráð verður veittur til persónar við virkistarni orsakað av likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku. Hjálparráð fevna um bein- og armprotesur, serligar skógvar, hárkollar, korsett, serkost, koyristólar, lyftir v.m. Hjálparráðið skal vera neyðugt fyri at vera í arbeiði, munandi bøta um varandi avleiðingar av sjúkuni/brekinum ella munandi lætta um gerandisdagin í heiminum.

Frá 1. januar 2024 verður ikki longur veittur stuðul til keyp av vanligum bili. Stuðul verður veittur til serligan útbúnað og til kassabil. Mett verður, at játtanin kann lækka við 1 mió. kr. Uppskot til løgtingslóg verður lagt fyri Løgtingið.

*Uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi*
Uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi kann veitast arbeiðsleysum, sum í eitt skifti ikki eru før fyri at vinna sær og sínum til uppihalds. Støddin á veitingini er tengd at uppihaldsskyldu, aldri og bústaðarviðurskiftunum.

Bundna eftirlønargjaldið, sum verður lagt aftrat uppihaldsveitingum, verður 10% í 2024 og hækkar síðani við einum prosentstigi um árið fram til 2026, tá eftirlønargjaldið er komið uppá 12 prosent.

*Móttøkuskylda og tryggjaðar búfyriskipanir*
Almannaverkið hevur skyldu til at veita bútilboð til persónar, ið sambært rættarúrskurði skulu sinniskannast, sambært rættarúrskurði ella dómi skulu setast í vardan bústað ella vera undir eftirliti, ella sum treyt fyri ákæruafturtøku ella royndarleyslating verða settir í vardan bústað.

*Hoyritól*
Stuðul til hoyritól verður veittur sambært § 30 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Landssjúkrahúsið umsitur hoyritólsskipanina.

*Serligur stuðul*
Persónar, sum heilt ella partvíst eru í fyriskipan hjá tí almenna eftir §§ 45 og 46 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur ella eftir aðrari lóggávu, kunnu fáa stuðul eftir § 11, stk. 2, samanber § 12, stk. 2, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

*Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku*
Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku verður veitt í hesum førum:

- tá tað vegna likamligt ella sálarligt brek ella varandi sjúku er neyðugt at ansa barni í heiminum
- tá persónur undir fólkapensjónsaldur, sum ynskir at doyggja heima, verður ansaður í heiminum

- tá persónur undir fólkapensjónsaldur við seinheilaskaða, sum vegna vantandi pláss á bústaði sambært § 45 ella § 46, verður ansaður í heiminum
- tá foreldur missa eitt barn yngri enn 18 ár, ella sum fáa eitt barn, ið er deyðføtt, kunnu tey fáa endurgjald í 26 vikur í part.

Bundna eftirlønargjaldið, sum verður lagt aftrat endurgjaldi fyri inntøkumiss, verður 10% í 2024 og hækkar síðani við einum prosentstigi um árið fram til 2026, tá eftirlønargjaldið er komið uppá 12 prosent.

*Endurgjald fyri meirútreiðslur*
Familjur, ið heima uppihalda barni undir 18 ár við víðfevndum og longri varandi skerdum førleika, kunnu frá tí almenna fáa endurgoldnar neyðugar meirútreiðslur, harundir útreiðslur til serligar viðgerðir. Endurgjaldið er treytað av, at staðfest verður, at meirútreiðslurnar eru avleiðing av skerda førleikanum.

Uppihaldsveitingar sambært lógini og hægst møguliga endurgjald fyri inntøkumiss verða á hvørjum ári javnaðar sambært løgtingslóg nr. 64 frá 30 apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 111.701 | 108.919 | 120.691 | 138.083 | 139.773 | 142.068 |
| Inntøkur | 818 | 673 | 395 | 410 | 410 | 410 |
| **01. Fyribils uppihaldsveiting** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **38.497** | **39.292** | **42.115** | **51.892** | **52.889** | **53.906** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 38.497 | 39.292 | 42.115 | 51.892 | 52.889 | 53.906 |
| **Inntøkur** | **818** | **673** | **395** | **410** | **410** | **410** |
| 77. Flyting frá kommunum | *818* | *673* | *395* | *410* | *410* | *410* |
| **02. Varandi uppihaldsveiting** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **46** | **185** | **215** | **217** | **219** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | 46 | 185 | 215 | 217 | 219 |
| **03. Fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **586** | **1.049** | **1.320** | **1.902** | **1.921** | **1.940** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 586 | 1.049 | 1.320 | 1.902 | 1.921 | 1.940 |
| **06. Stuðul til hjálparráð o.a.** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **33.491** | **27.302** | **32.905** | **32.863** | **33.202** | **33.544** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 33.491 | 27.302 | 32.905 | 32.863 | 33.202 | 33.544 |
| **07. Uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **8.469** | **6.815** | **7.096** | **7.725** | **7.875** | **8.028** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 8.469 | 6.815 | 7.096 | 7.725 | 7.875 | 8.028 |
| **08. Móttøkuskylda og tryggjaðar búfyriskipanir** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **4.688** | **6.101** | **4.900** | **7.290** | **6.722** | **6.722** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 4.688 | 6.101 | 4.900 | 7.290 | 6.722 | 6.722 |

**09. Hoyritól**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útreiðslur** | **4.659** | **3.949** | **5.800** | **5.000** | **5.200** | **5.400** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 4.659 | 3.949 | 5.800 | 5.000 | 5.200 | 5.400 |

**10. Serligur stuðul**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útreiðslur** | **4.632** | **5.257** | **5.786** | **5.598** | **5.706** | **5.817** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 4.632 | 5.257 | 5.786 | 5.598 | 5.706 | 5.817 |

**11. Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útreiðslur** | **12.286** | **14.330** | **14.184** | **19.432** | **19.814** | **20.203** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 12.286 | 14.330 | 14.184 | 19.432 | 19.814 | 20.203 |

**12. Endurgjald fyri meirútreiðslur**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útreiðslur** | **4.392** | **4.778** | **6.400** | **6.166** | **6.227** | **6.289** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 4.392 | 4.778 | 6.400 | 6.166 | 6.227 | 6.289 |

**Virksemisyvirlit**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **111.701** | **108.919** | **120.691** | **138.083** | **139.773** | **142.068** |
| 1. Fyribils uppihaldsveiting | 38.497 | 39.292 | 42.115 | 51.892 | 52.889 | 53.906 |
| 2. Varandi uppihaldsveiting | 0 | 46 | 185 | 215 | 217 | 219 |
| 3. Fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslur | 586 | 1.049 | 1.320 | 1.902 | 1.921 | 1.940 |
| 6. Stuðul til hjálparráð o.a. | 33.491 | 27.302 | 32.905 | 32.863 | 33.202 | 33.544 |
| 7. Uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi | 8.469 | 6.815 | 7.096 | 7.725 | 7.875 | 8.028 |
| 8. Móttøkuskylda og tryggjaðar búfyriskipanir | 4.688 | 6.101 | 4.900 | 7.290 | 6.722 | 6.722 |
| 9. Hoyritól | 4.659 | 3.949 | 5.800 | 5.000 | 5.200 | 5.400 |
| 10. Serligur stuðul | 4.633 | 5.257 | 5.786 | 5.598 | 5.706 | 5.817 |
| 11. Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku | 12.286 | 14.330 | 14.184 | 19.432 | 19.814 | 20.203 |
| 12. Endurgjald fyri meirútreiðslur | 4.392 | 4.778 | 6.400 | 6.166 | 6.227 | 6.289 |
| **B: Virksemi (tal)** | **2.533** | **2.519** | **2.790** | **2.866** | **2.921** | **2.977** |
| 1. Fyribils uppihaldsveiting | 553 | 564 | 600 | 590 | 590 | 590 |
| 2. Varandi uppihaldsveiting | 0 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 |
| 3. Fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslur | 63 | 78 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 7. Uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi | 166 | 138 | 91 | 135 | 135 | 135 |
| 8. Móttøkuskylda og tryggjaðar búfyriskipanir | 6 | 5 | 6 | 5 | 5 | 5 |
| 9. Tal av hoyritólum | 1.567 | 1.543 | 1.767 | 1.820 | 1.875 | 1.931 |
| 10. Serligur stuðul | 50 | 54 | 75 | 55 | 55 | 55 |
| 11. Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku | 128 | 136 | 150 | 160 | 160 | 160 |
| **C: Eindarkostnaður (1.000 kr.)** | | | | | | |
| 1. Fyribils uppihaldsveiting | 70 | 70 | 70 | 88 | 90 | 91 |
| 2. Varandi uppihaldsveiting | - | 46 | 185 | 215 | 217 | 219 |
| 3. Fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslur | 9 | 13 | 13 | 19 | 19 | 19 |
| 7. Uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi | 51 | 49 | 78 | 57 | 58 | 59 |
| 8. Móttøkuskylda og tryggjaðar búfyriskipanir | 781 | 1.220 | 817 | 1.458 | 1.344 | 1.344 |
| 9. Hoyritól | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 |
| 10. Serligur stuðul | 93 | 97 | 77 | 102 | 104 | 106 |
| 11. Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku | 96 | 105 | 95 | 121 | 124 | 126 |

## 12.21.7.02. Arbeiðsfremjandi tiltøk (Lógarbundin játtan)

Stuðul til arbeiðsfremjandi tiltøk verður veittur við heimild í løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, við seinni broytingum. Lógin fevnir um tiltøk, ið stuðla undir eitt virkið arbeiðslív hjá persónum, sum hava ella kunnu fáa trupulleikar við at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin. Við lógini kann stuðul verða veittur til virknisvenjing, arbeiðsbúgving, stuðul til íverksetan av egnari fyritøku, tillagað starv, avtalaða løn og leiðbeinaraskipan.

Frá 1. januar 2024 verða ikki játtað fleiri frávik til næmingar í arbeiðsbúgving, sum eru í vanligum útbúgvingaraldri. Mett verður, at játtanin í 2024 kann lækka við 1,3 mió. kr. Uppskot til løgtingslóg verður lagt fyri Løgtingið.

Játtanin fevnir eisini um vard størv. Heimildin at seta á stovn vard størv varð strikað við løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2012 um broyting í løgtingslóg um almenna forsorg. Sambært løgtingslóg nr. 187 frá 18. desember 2020 um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk kunnu vard størv, sum eru sett á stovn áðrenn 1. januar 2013, halda fram.

Uppihaldsveitingar sambært lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk eru tengdar at uppihaldsskyldu, aldri og bústaðarviðurskiftum.

Sambært løgtingslóg nr. 152 frá 12. desember 2018 um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk verður bundið eftirlønargjald lagt aftrat uppihaldsveitingum, lønarískoyti og stuðli til leiðbeinara. Bundna eftirlønargjaldið verður 10% í 2024 og hækkar síðani við einum prosentstigi um árið fram til 2026, tá eftirlønargjaldið er komið uppá 12 prosent.

Uppihaldsveitingar verða javnaðar sambært løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 117.728 | 131.454 | 139.542 | 151.303 | 154.494 | 159.890 |
| **02. Arbeiðsbúgving** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **33.770** | **41.214** | **41.367** | **42.553** | **42.070** | **41.604** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 33.770 | 41.214 | 41.367 | 42.553 | 42.070 | 41.604 |
| **03. Tillagað starv** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **74.061** | **83.237** | **90.772** | **101.662** | **105.537** | **112.023** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 74.061 | 83.237 | 90.772 | 101.662 | 105.537 | 112.023 |
| **04. Vart starv** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **9.897** | **7.003** | **7.403** | **7.088** | **6.887** | **6.263** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 9.897 | 7.003 | 7.403 | 7.088 | 6.887 | 6.263 |

**Virksemisyvirlit: 01 Arbeiðsfremjandi tiltøk**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **117.728** | **131.454** | **139.542** | **151.303** | **154.494** | **159.890** |
| 2. Arbeiðsbúgving | 33.770 | 41.214 | 41.367 | 42.553 | 42.070 | 41.604 |
| 3. Tillagað starv | 74.061 | 83.237 | 90.772 | 101.662 | 105.537 | 112.023 |
| 4. Vart starv | 9.897 | 7.003 | 7.403 | 7.088 | 6.887 | 6.263 |
| **B: Virksemi (tal)** | **906** | **910** | **960** | **948** | **928** | **908** |
| 2. Arbeiðsbúgving | 448 | 403 | 461 | 386 | 366 | 346 |
| 3. Tillagað starv | 401 | 463 | 460 | 520 | 520 | 520 |
| 4. Vart starv | 57 | 44 | 39 | 42 | 42 | 42 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| 2. Arbeiðsbúgving | 75.379 | 102.268 | 89.733 | 110.241 | 114.945 | 120.243 |
| 3. Tillagað starv | 184.691 | 179.778 | 197.330 | 195.504 | 202.956 | 215.429 |
| 4. Vart starv | 173.632 | 159.159 | 189.821 | 168.762 | 163.976 | 149.119 |

# 12.21.8. Sosialar pensjónir

## 12.21.8.01. Fólkapensjón (Lógarbundin játtan)

Fólkapensjón verður veitt við heimild í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., við seinni broytingum. Persónur, ið er føddur áðrenn 1. juli 1957, hevur rætt til fólkapensjón, tá hann er fyltur 67 ár. Persónur, ið er føddur í tíðarskeiðinum 1. juli 1957 til 31. desember 1962, hevur rætt til fólkapensjón, tá hann er fyltur 67 ½ ár. Persónur, ið er føddur eftir 31. desember 1961, hevur rætt til fólkapensjón, tá hann er fyltur 68 ár. Hevur pensjónisturin uppihaldsskyldu ella gjaldskyldu mótvegis børnum undir 18 ár, verður ein barnaviðbót veitt.

Tað eru tvær ymiskar pensjónsskipanir, ávikavist til persónar, sum eru føddir áðrenn 1953, og til persónar, sum eru føddir í 1953 ella seinni. Veitingarnar í pensjónsskipanunum eru ymiskliga samansettar, og møguleikarnir at útseta pensjón og at mótrokna millum hjúnafelagar eru eisini ymiskir.

1. januar 2024 hækkar frádráttarfría inntøkuupphæddin úr 45.000 kr. upp til 61.900 kr. Mett verður, at játtanin skal hækka við 6,5 mió. kr. Uppskot til løgtingslóg verður lagt fyri Løgtingið.

Veitingar sambært lógini verða á hvørjum ári javnaðar sambært løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 621.224 | 647.930 | 666.703 | 708.596 | 719.664 | 751.087 |
| **10. Fólkapensjón** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **579.151** | **571.063** | **555.403** | **552.077** | **535.107** | **519.617** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 579.151 | 571.063 | 555.403 | 552.077 | 535.107 | 519.617 |
| **15. Pensjónsnýskipanin** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **42.073** | **76.866** | **111.300** | **156.519** | **184.557** | **231.470** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 42.073 | 76.866 | 111.300 | 156.519 | 184.557 | 231.470 |

**Virksemisyvirlit: 10 Fólkapensjón**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **621.224** | **647.929** | **666.703** | **708.596** | **719.664** | **751.087** |
| 10. Fólkapensjón | 579.151 | 571.063 | 555.403 | 552.077 | 535.107 | 519.617 |
| 15. Pensjónsnýskipanin | 42.073 | 76.866 | 111.300 | 156.519 | 184.557 | 231.470 |
| **B: Virksemi (tal)** | **8.874** | **8.943** | **8.864** | **9.050** | **9.150** | **9.500** |
| 10. Fólkapensjón | 8.000 | 7.637 | 7.364 | 7.100 | 6.850 | 6.600 |
| 15. Pensjónsnýskipanin | 874 | 1.306 | 1.500 | 1.950 | 2.300 | 2.900 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| 10. Fólkapensjón | 72.394 | 74.776 | 75.421 | 77.757 | 78.118 | 78.730 |
| 15. Pensjónsnýskipanin | 48.138 | 58.856 | 74.200 | 80.266 | 80.242 | 79.817 |

## 12.21.8.05. Fyritíðarpensjón (Lógarbundin játtan)

Fyritíðarpensjón verður veitt við heimild í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., við seinni broytingum.

Tað eru trý ymisk fyritíðarpensjónsstig: Hægsta, miðal og lægsta fyritíðarpensjón. Fyritíðarpensjónin verður veitt vegna niðursett arbeiðsføri ella einkjustøðu. Hægsta og miðal fyritíðarpensjón eru samansettar av grundupphædd, viðbót og avlamisviðbót, meðan lægsta fyritíðarpensjón er samansett av grundupphædd, viðbót og eyka viðbót. Støddin av viðbótini er treytað av pensjónsstiginum. Avlamisviðbót er óheft av aðrari inntøku.

Persónar í aldrinum 18 ár og upp til fólkapensjónsaldur kunnu fáa fyritíðarpensjón, um arbeiðsførið varandi er niðursett orsakað av sjúku, avlamni ella øðrum serligum orsøkum. Hvørt hægsta, miðal ella lægsta fyritíðarpensjón verður veitt, er treytað av aldri, hvussu nógv arbeiðsførið er niðursett og orsøkini til niðursetta arbeiðsførið.

Sambært løgtingslóg nr. 66 frá 30. apríl 2018 um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. kunnu persónar, sum eru likamliga ella sálarliga niðurslitnir, frá 1. januar 2020 fáa framskundaða pensjón. Framskundað pensjón kann verða veitt upp til trý ár áðrenn fólkapensjónsaldur. Veitingin er í minsta lagi ein upphædd, sum svarar til miðal fyritíðarpensjón.

Veitingar sambært lógini verða á hvørjum ári javnaðar sambært løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 283.071 | 288.178 | 305.907 | 321.730 | 331.831 | 342.835 |
| **01. Hægsta fyritíðarpensjón** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **209.095** | **221.467** | **241.260** | **261.690** | **273.252** | **285.644** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 209.095 | 221.467 | 241.260 | 261.690 | 273.252 | 285.644 |
| **02. Miðal fyritíðarpensjón** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **40.677** | **36.008** | **33.282** | **30.340** | **28.879** | **27.491** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 40.677 | 36.008 | 33.282 | 30.340 | 28.879 | 27.491 |

**03. Lægsta fyritíðarpensjón**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útreiðslur** | **24.678** | **21.859** | **20.984** | **21.314** | **21.314** | **21.314** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 24.678 | 21.859 | 20.984 | 21.314 | 21.314 | 21.314 |

**04. Avlamisveiting**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útreiðslur** | **3.278** | **3.407** | **3.743** | **3.885** | **3.885** | **3.885** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 3.278 | 3.407 | 3.743 | 3.885 | 3.885 | 3.885 |

**05. Læknaváttanir**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útreiðslur** | **892** | **954** | **1.145** | **1.145** | **1.145** | **1.145** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 892 | 954 | 1.145 | 1.145 | 1.145 | 1.145 |

**06. Framskundað pensjón**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útreiðslur** | **4.451** | **4.482** | **5.493** | **3.356** | **3.356** | **3.356** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 4.451 | 4.482 | 5.493 | 3.356 | 3.356 | 3.356 |

**Virksemisyvirlit**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **283.071** | **288.178** | **305.907** | **321.730** | **331.831** | **342.835** |
| 1. Hægsta fyritíðarpensjón | 209.095 | 221.467 | 241.260 | 261.690 | 273.252 | 285.644 |
| 2. Miðal fyritíðarpensjón | 40.677 | 36.008 | 33.282 | 30.340 | 28.879 | 27.491 |
| 3. Lægsta fyritíðarpensjón | 24.678 | 21.859 | 20.984 | 21.314 | 21.314 | 21.314 |
| 4. Avlamisveiting | 3.278 | 3.407 | 3.743 | 3.885 | 3.885 | 3.885 |
| 5. Læknaváttanir | 892 | 954 | 1.145 | 1.145 | 1.145 | 1.145 |
| 6. Framskundað pensjón | 4.451 | 4.482 | 5.493 | 3.356 | 3.356 | 3.356 |
| **B: Virksemi (tal)** | **2.131** | **2.183** | **2.174** | **2.272** | **2.362** | **2.452** |
| 1. Hægsta fyritíðarpensjón | 1.381 | 1.463 | 1.554 | 1.650 | 1.750 | 1.850 |
| 2. Miðal fyritíðarpensjón | 377 | 351 | 297 | 280 | 270 | 260 |
| 3. Lægsta fyritíðarpensjón | 240 | 231 | 185 | 200 | 200 | 200 |
| 4. Avlamisveiting | 95 | 95 | 105 | 102 | 102 | 102 |
| 6. Framskundað pensjón | 38 | 43 | 33 | 40 | 40 | 40 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| 1. Hægsta fyritíðarpensjón | 151.408 | 151.379 | 155.251 | 158.600 | 156.144 | 154.402 |
| 2. Miðal fyritíðarpensjón | 107.897 | 102.587 | 112.061 | 108.357 | 106.959 | 105.735 |
| 3. Lægsta fyritíðarpensjón | 102.825 | 94.628 | 113.427 | 106.570 | 106.570 | 106.570 |
| 4. Avlamisveiting | 34.505 | 35.863 | 35.648 | 38.088 | 38.088 | 38.088 |
| 6. Framskundað pensjón | 117.132 | 104.233 | 166.455 | 83.900 | 83.900 | 83.900 |

## 12.21.8.13. Viðbót til ávísar pensjónistar (Lógarbundin játtan)

Viðbót til ávísar pensjónistar verður veitt sambært løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997 um viðbót til ávísar pensjónistar, við seinni broytingum. Fyritíðarpensjónistar og fólkapensjónistar, ið eru føddir áðrenn 1953, hava rætt til viðbót til ávísar pensjónistar. Hjún ella samlivandi, har bæði eru pensjónistar, fáa eina viðbót í felag. Viðbótin verður útgoldin við einari helvt til hvønn.

Treytin fyri at fáa viðbótina er, at stakur pensjónistur ikki hevur hægri ársinntøku umframt pensjónina enn 60 tús. kr., og at pensjónistur saman við hjúnafelaga ella samlivandi ikki hevur hægri ársinntøku umframt pensjónina enn 80 tús. kr. Pensjónistur, sum saman við møguligum hjúnafelaga ella samlivandi hevur árliga nettoinntøku hægri enn 2 tús. kr., ið verður skattað sambært kapitalvinningskattalógini, hevur ikki rætt til hesa viðbót.

Veitingar sambært lógini verða á hvørjum ári javnaðar sambært løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 31.909 | 31.875 | 32.942 | 32.948 | 32.748 | 32.548 |
| **01. Viðbót** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **31.909** | **31.875** | **32.942** | **32.948** | **32.748** | **32.548** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 31.909 | 31.875 | 32.942 | 32.948 | 32.748 | 32.548 |

**Virksemisyvirlit: 01 Viðbót**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | | | | | | |
| Viðbót | 31.909 | 31.875 | 32.942 | 32.948 | 32.748 | 32.548 |
| **B: Virksemi (tal)** | | | | | | |
| Viðbót | 5.619 | 5.606 | 5.400 | 5.586 | 5.566 | 5.546 |
| **C: Eindarkostnaður (kr.)** | | | | | | |
| Viðbót | 5.679 | 5.686 | 6.100 | 5.898 | 5.884 | 5.869 |

# Mentan

## 12.24.1. Ymsar útreiðslur

### 12.24.1.04. Føroyahús í Danmark (Stuðulsjáttan)

**Undirkonta 01. Føroyahúsið í Keypmannahavn**
Játtanin er til stuðul til rakstur av Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Føroyahúsið í Keypmannahavn er eitt savningarstað fyri allar føroyingar í Danmark, eins og húsið er opið fyri øll onnur. Húsið er við til at varðveita sambandið millum føroyingar í Danmark, sum antin eru í lestrarørindum ella eru fluttir hagar at búgva. Hetta verður mett at vera týdningarmikið fyri føroyska málið og mentanina og fyri valið at flyta aftur til Føroyar.

Stuðulin er til lønir, leigu og annan rakstur í sambandi við virksemið í húsinum og verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, útgoldin hálvárliga. Roknskapur fyri virksemið hjá sjálvsognarstovninum verður latin Almanna- og mentamálaráðnum eftir lokið fíggjarár.

**Undirkonta 02. Føroyingafelagið í Aarhus**
Játtanin er til stuðul til virksemið hjá Føroyingafelagnum í Aarhus.

Stuðulin er til lønir, leigu og annan rakstur í sambandi við virksemið hjá felagnum. Stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, útgoldin við ársbyrjan. Roknskapur fyri virksemið hjá felagnum verður latin Almanna- og mentamálaráðnum eftir lokið fíggjarár.

**Undirkonta 03. Norðuratlantshúsið í Odense**
Játtanin er til Norðuratlantshúsið í Odense fyri at stuðla upp undir føroyska virksemið í húsinum og hjá føroyingafelagnum á Fyn.

Stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, útgoldin frammanundan árliga. Roknskapur fyri virksemið hjá felagnum verður latin Almanna- og mentamálaráðnum eftir lokið fíggjarár.

**Undirkonta 04. Føroyingafelagið í Aalborg**
Játtanin er til stuðul til virksemið hjá Føroyingafelagnum í Aalborg.

Stuðulin er til lønir, leigu og annan rakstur í sambandi við virksemið hjá felagnum. Stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, útgoldin frammanundan árliga. Roknskapur fyri virksemið hjá felagnum verður latin Almanna- og mentamálaráðnum eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 2.641 | 2.541 | 2.541 | 2.541 | 2.541 | 2.541 |
| **01. Føroyahúsið í Keypmannahavn** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.041** | **1.991** | **1.991** | **1.991** | **1.991** | **1.991** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 2.041 | 1.991 | 1.991 | 1.991 | 1.991 | 1.991 |
| **02. Føroyingafelagið í Aarhus** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **100** | **100** | **100** | **100** | **100** | **100** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **03. Norðuratlantshúsið í Odense** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **400** | **350** | **350** | **350** | **350** | **350** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 400 | 350 | 350 | 350 | 350 | 350 |
| **04. Føroyingafelagið í Aalborg** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **100** | **100** | **100** | **100** | **100** | **100** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

## 12.24.1.05. Tiltøk fyri børn og ung (Stuðulsjáttan)

Almanna- og mentamálaráðið fær umvegis Sp/f Ítróttavedding 15% av tillutaða føroyska partinum av veddingarpeninginum. Játtanin verður nýtt til verkætlanir og tiltøk til gagns fyri børn og ung til og við 25 ár. Talan kann vera um stuðul til virksemi, ið stimbrar og mennir listarlig, skapandi, mennandi og útinnandi evni hjá børnum og ungum, til upplýsandi og fyribyrgjandi tiltøk, søgulig og siðsøgulig tiltøk, íverksetarastuðul o.a. Leiðreglar um stuðulin eru at finna aftast í umsóknarblaðnum til barna- og ungdómsarbeiði, sum finst á www.ammr.fo.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum. Stuðul verður játtaður eftir umsókn og útgoldin frammanundan. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum, tá verkætlan ella tiltak er endað ella í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 2.758 | 1.907 | 1.900 | 1.900 | 1.900 | 1.900 |
| Inntøkur | 2.758 | 1.907 | 1.900 | 1.900 | 1.900 | 1.900 |
| **01. Flyting frá P/F Ítróttarvedding** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **2.758** | **1.907** | **1.900** | **1.900** | **1.900** | **1.900** |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *2.758* | *2.348* | *1.900* | *1.900* | *1.900* | *1.900* |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | - | *-441* | - | - | - | - |
| **02. Tiltøk fyri børn og ung** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.758** | **1.907** | **1.900** | **1.900** | **1.900** | **1.900** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 0 | - | - | - | - | - |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 90 | 37 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2.480 | 1.806 | 1.900 | 1.900 | 1.900 | 1.900 |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 188 | 64 | - | - | - | - |

## 12.24.1.07. Málráðið (Rakstrarjáttan)

### Undirkonta 20. Málráðið

Játtanin er ætlað til rakstur av Málráðnum, ið er skipað við løgtingslóg nr. 59 frá 15. mai 2012 um málráð, við seinni broytingum. Málráðið er málrøktar- og málmenningarstovnur, skipaður undir landsstýrinum og í virksemi sínum óheftur av politisku skipanini. Málráðið hevur til endamáls at røkja, menna og verja føroyska málið, at vegleiða, ráðgeva og gera niðurstøður í málspurningum og at áseta føroyska stavseting. Játtanin fyri 2021 hækkaði 100 tús. kr. til menning av teknmáli.

**Undirkonta 21. Staðarnavnanevndin**
Játtanin er ætlað til rakstur av Staðarnavnanevndini, ið er sett sambært reglugerð fyri Staðarnavnanevndina frá 6. juli 2010. Staðarnavnanevndin ásetir form og stavseting av staðarnøvnum í almennari nýtslu, eitt nú á kortum, skeltum og í skúlabókum. Nevndin gevur harumframt myndugleikum ráð viðvíkjandi nøvnum á almennum støðum í Føroyum, so sum búsetingum, fyrisitingarligum eindum, samferðsluleiðum o.ø.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 1.201 | 1.602 | 1.781 | 1.823 | 1.823 | 1.823 |
| Útreiðslur | 1.201 | 1.602 | 1.781 | 1.823 | 1.823 | 1.823 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 1.197 | 1.594 | 1.751 | 1.793 | 1.793 | 1.793 |
| **Útreiðslur** | **1.197** | **1.594** | **1.751** | **1.793** | **1.793** | **1.793** |
| 11. Lønir v.m. | 1.054 | 1.334 | 1.521 | 1.563 | 1.563 | 1.563 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 34 | 144 | 127 | 127 | 127 | 127 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 26 | 33 | 20 | 20 | 20 | 20 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 1 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 83 | 83 | 83 | 83 | 83 | 83 |
| **21. Staðarnavnanevndin** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 4 | 8 | 30 | 30 | 30 | 30 |
| **Útreiðslur** | **4** | **8** | **30** | **30** | **30** | **30** |
| 11. Lønir v.m. | 4 | 8 | 30 | 30 | 30 | 30 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 1,5 | 1,8 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Fulltíðarstørv | 1,5 | 1,8 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 1,1 | 1,3 | 1,5 | 1,6 | 1,6 | 1,6 |

## 12.24.1.10. Orðabókagerð (Stuðulsjáttan)

Játtanin fer til at stuðla orðabókagerð úr og í fremmant mál og at gera orðabøkur tøkar á alnetinum. Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum.

Stuðul, ið verður latin eftir umsókn, verður útgoldin frammanundan. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum, tá verkætlan er endað ella í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Játtanin fyri 2023 er hækkaði við 400 tús. kr. til at arbeiða við Føroysku orðabókini. Tað er Føroyamálsdeildin á Fróðskaparsetri Føroya, sum eftir nærri avtalu fer at dagføra Føroysku orðabókina.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.610 | 1.499 | 1.900 | 1.900 | 1.900 | 1.900 |
| **01. Orðabókaútgáva** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.610** | **1.499** | **1.900** | **1.900** | **1.900** | **1.900** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.610 | 1.499 | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | - | 400 | 400 | 400 | 400 |

## 12.24.1.11. Føroyskur raddarkennari (Stuðulsjáttan)

Játtanin var í 2023 flutt til høvuðskontu 7.23.6.16. Fróðskaparsetur Føroya, undirkontu 27. Máltøknidepilin.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.000 | 1.000 | - | - | - | - |
| **01. Føroyskur raddarkennari** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.000** | **1.000** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.000 | 1.000 | - | - | - | - |

## 12.24.1.13. Ymiskir studningar (Stuðulsjáttan)

Endamálið er at veita stuðul til norrønt samstarv, ungmannafeløg og mentan.

**Undirkonta 01. Útnorðursamstarv**
Játtanin er til mentanarsamstarv millum Hetland, Ísland, Grønland og Føroyar umframt føroysk tiltøk á Norðurbryggjuni. Stuðul verður veittur til ávís átaksøki, sum eru tilskilað í samstarvsavtalum. Um játtan annars er tøk, er eisini møguligt at stuðla uttan um avtalur innan fyri endamálið við játtanini.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum.

**Undirkonta 02. Norrøna felagið**
Játtanin verður veitt Norrøna Felagnum í Føroyum, sum er landsfelag og hevur til endamáls at styðja og økja um norðurlendskt samstarv í felag við norrønu feløgini í hinum Norðurlondunum. Árligi stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið og verður útgoldin mánaðarliga. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum.

**Undirkonta 03. Ungmannafeløg**
Játtanin er til at stuðla ungdómsarbeiði fyri at menna ungdómin í øllum lutum. Stuðul verður m.a. veittur til upplýsing um útbúgvingarmøguleikar, sum FUR stendur fyri. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum.

**Undirkonta 04. Stuðul til onnur endamál**
Játtanin er ætlað til menning av mentan og list, til virknan stuðul til mentanarlív á bygd og í bý, so sum mentanarverkætlanir ella tiltøk. Talan kann vera um konsertir, framsýningar og framflyting av list innan- og uttanlands v.m. Stuðulin verður latin eftir umsókn, og lýst verður alment eftir umsóknum. Stuðulin verður sum høvuðsregla útgoldin, tá ið tiltakið verður sett í verk. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum.

**Undirkonta 05. Listafólkasamband Føroya**
Játtanin verður veitt til Listafólkasamband Føroya, ið er meginfelag fyri 11 limafeløg. Játtanin verður nýtt til skrivstovuhald, ráðgeving og aðrar tænastur til føroysk listafólk. Árligi stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið og verður útgoldin mánaðarliga. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum.

**Undirkonta 06. Stuðul til myndlistafólk**
Játtanin er ætlað myndlistafólkum at nema sær útbúgvingar, til ferðastuðul v.m. Stuðulin verður latin eftir umsókn, og lýst verður alment eftir umsóknum. Stuðulin verður sum høvuðsregla útgoldin, tá ið tiltakið verður sett í verk. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum.

**Undirkonta 07. Skótarørsla**
Játtanin fer til Føroya Skótaráð, ið er samstarvsráð fyri skótasamskipanirnar í Føroyum. Árligi stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið og verður útgoldin hvønn ársfjórðing. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum.

**Undirkonta 08. FarLit**
Játtanin fer til at menna og marknaðarføra føroyskar bókmentir við m.a. at skipa fyri átøkum fyri rithøvundar, týðarar og forløg og við luttøku á altjóða bókamessum o.ø. útflutningsfremjandi tiltøkum. Játtanin fevnir eisini um týðingar úr føroyskum í fremmand mál, tó ikki norðurlendsk, ið eru fevnd av norðurlendska týðarastuðlinum. Árligi stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið og verður útgoldin hálvárliga til Bókamiðsøluna, har FarLit er staðsett. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum.

## Undirkonta 09. Bátasavn í Svínoy

Játtanin er ætlað til verkætlanina at byggja eitt bátasavn í Svínoy. Tað er felagið Bjarnafossur í Svínoy, sum stendur fyri hesi ætlan, ið sambært stigtakarunum er eitt týðandi stig á leiðini at varðveita gomlu føroysku bátarnar, sum eru bygdir úti í Svínoy. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

## Undirkonta 11. Ovasavn í Nólsoy

Í 2023 vóru 400 tús. kr. játtaðar til verkætlanina Ovasavn í Nólsoy. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 4.264 | 4.482 | 5.550 | 5.150 | 5.150 | 5.150 |
| **01. Útnorðursamstarv** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **225** | **200** | **300** | **300** | **300** | **300** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 200 | 200 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 25 | - | - | - | - | - |
| **02. Norrøna felagið** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **150** | **150** | **150** | **150** | **150** | **150** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 150 | 150 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| **03. Ungmannafeløg** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **350** | **350** | **350** | **350** | **350** | **350** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 350 | 350 | 350 | 350 | 350 | 350 |
| **04. Stuðul til onnur endamál** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **950** | **967** | **1.120** | **1.120** | **1.120** | **1.120** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 178 | 96 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 772 | 871 | 1.120 | 1.120 | 1.120 | 1.120 |
| **05. Listafólkasamband Føroya (LISA)** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **430** | **430** | **530** | **530** | **530** | **530** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 430 | 430 | 530 | 530 | 530 | 530 |
| **06. Stuðul til myndlistafólk** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **59** | **135** | **150** | **150** | **150** | **150** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 59 | 135 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| **07. Skótarørsla** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.250** | **1.250** | **1.250** | **1.250** | **1.250** | **1.250** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.250 | 1.250 | 1.250 | 1.250 | 1.250 | 1.250 |
| **08. Farlit** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **700** | **1.000** | **1.000** | **1.000** | **1.000** | **1.000** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 700 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| **09. Bátasavn í Svínoy** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **150** | **-** | **300** | **300** | **300** | **300** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 150 | - | 300 | 300 | 300 | 300 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **11. Ovasavn í Nólsoy** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **400** | **-** | **-** | **-** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | - | 400 | - | - | - |

## 12.24.1.16. Stuðul til mentanarøkið vegna átøk í sambandi við COVID-19 (Stuðulsjáttan)

Í 2020 og 2021 varð fíggjarligur stuðul latin til mentanarøkið fyri inntøkumiss vegna átøk í sambandi við COVID-19 og til tónleikafestivalar, ið valdu at avlýsa sum úrslit av COVID-19 og teimum tilmælum, ið myndugleikarnir komu við. Eisini vórðu í 2021 latnar 300 tús. kr. í stuðli til føroysk træseglskip, sum eru partur av mentanararvi føroyinga, og hvørs virksemi var munandi minni vegna støðuna í ferðavinnuni í sambandi við COVID-19.

Í 2022 vóru 2 mió. kr. latnar í stuðli til listafólk, sum hava verið fyri fíggjarligum missi í tíðarskeiðinum frá 1. mai 2021 til 31. januar 2022. Stuðulin er latin við heimild í løgtingslóg nr. 63 frá 4. mai 2022 um stuðul til listafólk, sum hava verið fyri fíggjarligum missi í tíðarskeiðinum 1. mai 2021 til 31. januar 2022 í sambandi við COVID-19.

Í 2024 er eingin játtan til endamálið.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 7.874 | 1.999 | - | - | - | - |
| **01. Stuðul til mentanarøkið vegna átøk í sambandi við COVID-19** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **7.574** | **1.999** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 53. Stuðul til vinnu | 7.574 | 1.999 | - | - | - | - |
| **02. Stuðul til annan mentanararv vegna átøk í sambandi við COVID-19** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **300** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 300 | - | - | - | - | - |

## 12.24.1.26. LOA-grunnurin (Stuðulsjáttan)

Í apríl 2010 varð samstarvsavtala gjørd við Lokale- og Anlægsfonden, LOA-grunnin, soleiðis at føroyingar kunnu søkja um stuðul til íløgur innan ítrótt og mentan. Við avtaluni við LOA ber til at søkja um stuðul ella lán til størri íløgur í ítróttaverkløg, mentanarhús, sjónleikarhús, konserthús, verkløg til skótar, biografar, tónleika- og dansiverkløg o.t. at nýta til almannagagnlig endamál. Tey, sum kunnu søkja, eru feløg, stovnar, grunnar og kommunur, sum ynskja at byggja og reka verkløg uttan fíggjarlig egináhugamál.

LOA-grunnurin er danskur grunnur, ið verður fíggjaður við 8% av donsku veddingarpengunum. Harumframt hevur grunnurin eitt stovnsfæ, sum donsk ítróttafeløg settu í grunnin, tá ið hann var stovnaður í 1993. Árliga limagjaldið til LOA-grunnin er 520 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024** **F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 520 | 520 | 520 | 520 | 520 | 520 |
| **01. Limagjald** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **520** | **520** | **520** | **520** | **520** | **520** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 520 | 520 | 520 | 520 | 520 | 520 |

## 12.24.2. Skapandi og útinnandi virksemi

### 12.24.2.01. Tónleikur, sangur og føroyskur dansur (Stuðulsjáttan)

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum.

**Undirkonta 01. Tónleikur og sangur**
Játtanin er ætlað til at stuðla og menna tónleik og sang í Føroyum. Stuðul verður latin meginfeløgum, ið virka á tónleikaøkinum. Kórsamband Føroya, Konsertfelagið, Meginfelagið fyri Føroysk Hornorkestur, Aldubáran og Felagið Føroysk Tónaskøld hava fingið stuðul av hesi undirkontu. Av játtanini fær Tórshavnar Big Band 100 tús. kr. í stuðli. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

**Undirkonta 02. Føroya Symfoniorkestur**
Játtanin er ætlað til at stuðla Føroya Symfoniorkestur, ið er skipað sum ein sjálvsognarstovnur við stjóra og stýri. Stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið og verður útgoldin hálvárliga. Partur av játtanini er ætlaður til at styrkja barna- og ungdómsarbeiði, m.a. barnakonsertir, og annars eisini konsertir kring landið. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

**Undirkonta 03. Føroyskur dansur**
Játtanin er ætlað til at varðveita og menna føroyska dansin kring landið og verður flutt landsfelagnum fyri føroyskan dans, Sláið Ring. Stuðulin er eisini í stóran mun ætlaður barnadansitiltøkum. Stuðulin verður útgoldin mánaðarliga. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024** **F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 3.115 | 3.005 | 3.415 | 3.415 | 3.415 | 3.415 |
| Inntøkur | 13 | - | - | - | - | - |
| **01. Tónleikur og sangur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **415** | **305** | **415** | **415** | **415** | **415** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 415 | 305 | 415 | 415 | 415 | 415 |
| **Inntøkur** | **13** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 64. Aðrar flytingarinntøkur | *13* | - | - | - | - | - |
| **02. Føroya Symfoniorkestur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.200** | **2.200** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2.200 | 2.200 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 |

**03. Føroyskur dansur**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útreiðslur** | **500** | **500** | **500** | **500** | **500** | **500** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |

## 12.24.2.03. Filmur (Stuðulsjáttan)

Játtanin er ætlað til at stuðla einari ungari filmsvinnu í framgongd.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum. Stuðul verður játtaður eftir umsókn og sum høvuðsregla útgoldin, tá ið verkætlanin verður sett í verk. Lýst verður alment eftir umsóknum. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum, tá verkætlanin er endað ella í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 2.900 | 3.499 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| Inntøkur | - | 3 | - | - | - | - |
| **01. Filmur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.900** | **3.499** | **4.000** | **4.000** | **4.000** | **4.000** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 602 | 2.131 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2.298 | 1.369 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| **Inntøkur** | **-** | **3** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 64. Aðrar flytingarinntøkur | - | *3* | - | - | - | - |

## 12.24.2.04. Mentanargrunnurin (Stuðulsjáttan)

Mentanargrunnurin virkar við heimild í løgtingslóg nr. 84 frá 17. mai 2000 um Mentanargrunn Landsins. Endamálið við virksemi grunsins er at styðja starv fyri føroyskum mentanarlívi; føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum.

Grunnurin skal serliga stuðla tiltøkum og verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónleik og tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, sum kann javnmetast við hesar listagreinir.

Kunngerð nr. 109 frá 21. september 2000 um Mentanargrunn Landsins er dagførd til at fevna um skipanina við listafólkalønum. Lýst verður eftir listafólkum.

Stuðul úr Mentanargrunninum verður latin eftir umsókn og verður útgoldin, tá vissa er fingin fyri, at verkætlanin/tiltakið verður framt. Starvslønir og listafólkalønir verða útgoldnar mánaðarliga.

Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin roknskap og frágreiðing, eftir at tiltakið er av, tó í seinasta lagi 1. apríl árið eftir játtanarárið. Henda áseting er eisini treyt fyri nýggjari tilsøgn. Gongur verkætlan yvir fleiri ár, verður frágreiðing at meta sum ávegisfrágreiðing, sum verður latin Mentanargrunninum hvørt ár. Tey, sum fáa starvsløn ella listafólkaløn, skulu bert lata inn frágreiðing ella ávegisfrágfreiðing.

Verður øll játtanin ikki nýtt á undirkontu 02. Listafólkalønir og undirkontu 03. Týðaragrunnur Landsins, kann avlopið verða nýtt sum stuðul sambært undirkontu 01. Mentanargrunnurin.

**Undirkonta 01. Mentanargrunnurin**
Játtanin er ætlað til starvslønir, íverksetarastuðul og annars til stuðul til mentanarlig tiltøk og verkætlanir innan fyri endamál grunsins.

**Undirkonta 02. Listafólkalønir**
Játtanin er ætlað til listafólkalønir. Endamálið við listafólkalønunum er at bøta um korini hjá yrkislistafólkum, sum í játtanarskeiðnum burturav arbeiða við list. Lønin er ásett sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Undirkonta 03. Týðaragrunnur Landsins**
Játtanin er ætlað til týðing úr fremmandum málum til føroyskt.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 10.368 | 10.477 | 10.530 | 10.530 | 10.530 | 10.530 |
| Inntøkur | 23 | 97 | - | - | - | - |
| **01. Mentanargrunnurin** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **6.200** | **6.297** | **6.200** | **6.200** | **6.200** | **6.200** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 6.200 | 6.297 | 6.200 | 6.200 | 6.200 | 6.200 |
| **Inntøkur** | **-** | **97** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *97* | - | - | - | - |
| **02. Listafólkalønir** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **3.600** | **3.680** | **3.830** | **3.830** | **3.830** | **3.830** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 1.200 | 2.454 | - | - | - | - |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 2.400 | 1.226 | 3.830 | 3.830 | 3.830 | 3.830 |
| **03. Týðaragrunnur Landsins** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **568** | **500** | **500** | **500** | **500** | **500** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 255 | 36 | - | - | - | - |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 215 | 307 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| 53. Stuðul til vinnu | 68 | 40 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 30 | 20 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 97 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **23** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 64. Aðrar flytingarinntøkur | *23* | - | - | - | - | - |

## 12.24.2.05. Umsiting av Mentanargrunninum (Rakstrarjáttan)

Mentanargrunnurin hevur egna umsiting og umsitur sjálvstøðugt játtanina til grunnin.

Mentanargrunnurin umsitur umleið 10 mió. kr. um árið og fær 500-600 stuðulsumsóknir árliga. Stuðul verður latin til listafólkalønir, starvslønir, verkætlanir, týðingar og til íverksetan.

Stuðul verður latin til 250-300 fólk um árið.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 599 | 618 | 948 | 964 | 964 | 964 |
| Útreiðslur | 599 | 618 | 948 | 964 | 964 | 964 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 599 | 618 | 948 | 964 | 964 | 964 |
| **Útreiðslur** | **599** | **618** | **948** | **964** | **964** | **964** |
| 11. Lønir v.m. | 453 | 444 | 563 | 579 | 579 | 579 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 118 | 109 | 65 | 65 | 65 | 65 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 8 | 46 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 21 | 20 | 20 | 20 | 20 | 20 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 0,8 | 0,8 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Fulltíðarstørv | 0,8 | 0,8 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 0,5 | 0,4 | 0,6 | 0,6 | 0,6 | 0,6 |

## 12.24.2.06. Leiklist (Rakstrarjáttan)

### Undirkonta 20. Vanligt virksemi

Játtanin er til at reka Tjóðpall Føroya. Tjóðpallurin er sjálvstøðugur almennur stovnur, ið virkar sambært løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m.

Tjóðpallurin skal í virksemi sínum leggja dent á føroysk verk á dygdargóðum listaligum støði, og stovnurin skal framføra klassisk so væl sum nútímans altjóða verk. Harafturat skal stovnurin geva borgarunum í øllum landinum eitt breitt og dygdargott tilboð av leiklist og sjónleiki so væl sum aðrari palllist, tryggja sjónleikarum, dansarum og øðrum leikhússtarvsfólki hóskandi arbeiðsmøguleikar til tess at menna yrkisførleikar teirra, skipa fyri leiklistaligum útbúgvingum og eftirútbúgvingum, og fremja og menna yrkis- og áhugaleiklistina í Føroyum.

### Undirkonta 21. Meginfelag áhugaleikara Føroya

Játtanin er stuðul til áhugaleiklist. Stuðulin verður latin Meginfelag Áhugaleikara Føroya, sum umsitur játtanina. Stuðulin verður útgoldin hvønn ársfjórðing. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

### Undirkonta 22. Stuðul til yrkisleiklist

Játtanin er stuðul til aðra yrkisleiklist. Játtanin kann eisini nýtast til førleikamenning. Stuðulin verður latin eftir umsókn. Lýst verður alment eftir umsóknum. Leiklistaráðið viðger umsóknirnar og ger tilmæli til landsstýriskvinnuna um býtið av játtanini. Stuðulin verður sum høvuðsregla útgoldin, tá ið tiltakið verður sett í verk. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 6.650 | 6.797 | 6.989 | 7.127 | 7.127 | 7.127 |
| Útreiðslur | 7.378 | 7.551 | 7.839 | 7.977 | 7.977 | 7.977 |
| Inntøkur | 728 | 754 | 850 | 850 | 850 | 850 |
| **20. Tjóðpallur Føroya** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 5.350 | 5.348 | 5.539 | 5.677 | 5.677 | 5.677 |
| **Útreiðslur** | **5.928** | **6.102** | **6.389** | **6.527** | **6.527** | **6.527** |
| 11. Lønir v.m. | 3.421 | 3.899 | 4.955 | 5.093 | 5.093 | 5.093 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.841 | 1.677 | 1.027 | 1.027 | 1.027 | 1.027 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 228 | 58 | 107 | 107 | 107 | 107 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 437 | 468 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | 0 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | -0 | - | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1 | 1 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **578** | **754** | **850** | **850** | **850** | **850** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *578* | *754* | *850* | *850* | *850* | *850* |
| **21. Meginfelag áhugaleikara Føroya** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 800 | 800 | 800 | 800 | 800 | 800 |
| **Útreiðslur** | **800** | **800** | **800** | **800** | **800** | **800** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 800 | 800 | 800 | 800 | 800 | 800 |
| **22. Stuðul til yrkisleiklist** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 500 | 649 | 650 | 650 | 650 | 650 |
| **Útreiðslur** | **650** | **649** | **650** | **650** | **650** | **650** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 100 | - | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 550 | 649 | 650 | 650 | 650 | 650 |
| **Inntøkur** | **150** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 64. Aðrar flytingarinntøkur | *150* | - | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Tjóðpallur Føroya**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 4,0 | 5,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 |
| Fulltíðarstørv | 5,0 | 6,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 3,4 | 3,9 | 5,0 | 5,1 | 5,1 | 5,1 |

## 12.24.2.09. Tjóðleikhús (Løgujáttan)

Sum ein liður í at lyfta føroyska leiklist frameftir, verður eitt nýtt tjóðleikhús bygt, sum skal tryggja yrkisleiklistini tíðarhóskandi hølisumstøður. Í 2020 varð avgerð tikin um at skriva út eina hugskotskapping um staðseting av tjóðleikhúsinum og eina arkitektakapping. Hugskotskappingin um staðseting varð liðug á vári 2021, og er Bursatangi mett at vera besta staðsetingin fyri tjóðleikhúsið.

Valda staðsetingin hevði við sær, at Tórshavnar kommuna ynskti at fáa gjørt eina heildarætlan fyri økið á Vestaru vág, áðrenn arkitektakappingin varð útskrivað.

Arkitektakappingin varð framd í 2022, og í september sama ár varð avdúkað, at MAP arkitektar høvdu vunnið kappingina og harvið áttu besta boðið upp á eitt nútímans leikhús, ið fer at hýsa pallist og kreativum tiltøkum. Tjóðleikhúsið verður somuleiðis ein nýggjur mentanardepil, eitt vakstrarhús fyri ungar spírar, ið fer at menna og savna pallistina í landinum.

Játtanin fyri 2023 var 4 mió. kr. til framhaldandi fyrireiking. Næsta stig er at fáa semju við Tórshavnar kommunu um lendið og uttanumøkið, umframt at fara undir at gera eitt skipanaruppskot og prosjektering.

Landsverk hevur við ávísum fyritreytum mett verkætlanina at kosta áleið 600 mió. kr., harav landið átekur sær í mesta lagi at fíggja 200 mió. kr. Restin verður útvegað sum uttanhýsis fígging. Heimildarlóg verður løgd fyri Løgtingið á heysti 2023, ið fer at heimila landsstýrinum at taka ímóti uttanhýsis fígging og at geva tilsøgn um landsins part av fíggingini árini fram til 2032. Útreiðslur til fyrireiking, skipanaruppskot og prosjektering og longu goldnar útreiðslur eru partar av teimum 200 mió. kr. Mett verður, at størstu útreiðslurnar falla, tá ið byggingin fer ígongd, sum væntandi verður árini 2026-2031.

Í 2022 vórðu brúktar 3,5 mió. kr. Í 2023 eru játtaðar 4 mió. kr. Nýtslan í 2023 verður mett til 1 mió. kr. Játtanin fyri 2024 verður 6 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.254 | 3.499 | 4.000 | 6.000 | 10.000 | 10.000 |
| **10. Tjóðleikhús** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.254** | **3.499** | **4.000** | **6.000** | **10.000** | **10.000** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -339 | -560 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 1.254 | 3.499 | 4.000 | 6.000 | 10.000 | 10.000 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 339 | 560 | - | - | - | - |

## 12.24.2.10. Norðurlandahúsið (Stuðulsjáttan)

Norðurlandahúsið í Føroyum er mentanarstovnur, sum virkar fyri norðurlendskari mentan í Føroyum, fremur føroysk mentanartiltøk í Norðurlondum og stuðlar og fremur føroysk tiltøk í Føroyum.

Árligi stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið og verður útgoldin hvønn ársfjórðing. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.700 | 1.700 | 1.700 | 1.700 | 1.700 | 1.700 |
| **01. Norðurlandahúsið** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.700** | **1.700** | **1.700** | **1.700** | **1.700** | **1.700** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.700 | 1.700 | 1.700 | 1.700 | 1.700 | 1.700 |

### 12.24.2.13. Heiðursgávur til mentafólk (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at heiðra listafólk. Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum.

Landsstýriskvinnan setir virðislønarnevnd at gera tilmæli um, hvør skal fáa virðisløn og sømdargávu. Latin verður Mentanarvirðisløn Landsins, sum er 150 tús. kr., og Heiðursgáva Landsins, sum er 75 tús. kr. Fyri at kunna fáa Mentanarvirðisløn Landsins skal virðislønarevnið hava skapað listaverk á høgum støði. Fyri at fáa Heiðursgávu Landsins skal virðislønarevnið hava virkað til frama fyri mentanarlig virði, sum hava týdning fyri føroysku mentanina, list og mentanararv. Landsstýriskvinnan ger av, nær á árinum og á hvønn hátt virðislønirnar verða handaðar.

Eisini verða latnar árligar sømdargávur til listafólk, so leingi tey eru á lívi. Til tess at fáa sømdargávu skal listafólkið hava útint listarligt avrik, ið verður mett at hava týdning fyri samtíð og framtíð. Upphæddin er vanliga 20 tús. kr. um árið. Eftir avgerð hjá landsstýriskvinnuni kunnu harafturat aðrar heiðursgávur latast listafólki, mentafólki ella felagsskapum.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 495 | 495 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| **01. Sømdarpeningur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **495** | **495** | **500** | **500** | **500** | **500** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 495 | 495 | 500 | 500 | 500 | 500 |

## 12.24.3. Mentanararvur

### 12.24.3.03. Søvnini (Rakstrarjáttan)

Játtanin fevnir um rakstrarjáttanir til Koltursætlanina, Tjóðsavnið, Tjóðskjalasavnið og Landsbókasavnið.

**Undirkonta 21. Koltursætlanin**
Tjóðsavnið umsitur játtanina. Í 2024 eru 833 tús. kr. av játtanini ætlaðar til rakstur innan karmarnar av eini antikvariskari serskipan, ið verður gjørd fyri Koltur. Hin parturin av játtanini er serstudningur, játtaður úr Búnaðargrunninum. Í 2024 verður mett, at 500 tús. kr. skulu játtast úr Búnaðargrunninum.

Við heimild í løgtingslóg nr. 34 frá 7. mai 2013 um Búnaðargrunn, við seinni broytingum, eru sum serstudningur úr Búnaðargrunninum til at fyriskipa og menna eina antikvariska serskipan í Koltri avsettar 5 mió. kr. at nýta lutvíst tey næstu árini. Upphæddin skal brúkast til at fyriskipa og menna antikvarisku serskipanina og til íløgur í endurreising og viðlíkahald av bygningum í Koltri, umframt íløgur í neyðug rakstrargøgn í sambandi við stovnsetan av antikvarisku skipanini. Eftir ætlan skal arbeiðið við at fyriskipa og menna ta antikvarisku serskipanina halda fram til 2025. Upphæddin úr Búnaðargrunninum verður flutt landskassanum á høvuðskontu 56.33.2.12. Niðurlaðing av Búnaðargrunninum sambært uppgerð hjá Tjóðsavninum fyri staðfesta árliga nýtslu. Higartil eru slakar 4 mió. kr. av upphæddini úr Búnaðargrunninum nýttar.

**Undirkonta 22. Tjóðsavnið**
Tjóðsavnið virkar sambært løgtingslóg nr. 32 frá 2. mai 1952 um fornminnissavn, við seinni

broytingum, og sambært løgtingslóg nr. 26 frá 17. august 1955 um Føroya Náttúrugripasavn, við seinni broytingum. Høvuðsuppgávurnar hjá Tjóðsavninum eru at reka savnsvirksemi gjøgnum innsavning, varðveiting, gransking, miðlan og framsýning av náttúruarvi og mentanararvi Føroya. Tjóðsavnið er umboðað í yvirfriðingarnevndini og í fornminnisnevndini. Harumframt fevna uppgávurnar um umsiting av fornminna- og bygningafriðingarlógini, løgtingslóg um vernd av fornlutum í havinum, løgtingslóg um Havnar skansa, antikvariska ráðgeving í sambandi við bygningar fólkakirkjunnar og loyvisumsiting í sambandi við fuglaveiðu. Tjóðsavnið umsitur stuðulin til bygdasøvnini og hevur fakligt eftirlit við teimum. Tjóðsavnið umsitur eisini átekningar og stuðul til mentanarsøgulig skip.

Ein partur av játtanini er til at reka friðaðar landsognir, sum álagdar eru stovninum at umsita, at viðlíkahalda urtagarðin í prestagarðinum í Sandagerði, umframt at samsýna fornminnisnevnd og lata stuðul til friðað hús og fornminni, sum ikki eru landsogn.

Játtanin varð í 2023 hækkað við 200 tús. kr. til at Tjóðsavnið kann átaka sær at innflyta og selja seym, spíkar og røur til føroyskar bátar. Tað er ov kostnaðarmikið hjá hvørjum bátasmiði sær at innflyta seym, og talan er ikki um eina lønandi vinnu. Tað hevur stóran týdning at bátasmiðir kunnu keypa seym í Føroyum. Føroyski báturin kom á UNESCO listan fyri umboðandi siðaarv hjá mannaættini í desember 2021. Føroyskir myndugleikar hava tí skyldu til at tryggja, at føroyskt bátasmíð hevur livilíkindi.

**Undirkonta 23. Tjóðskjalasavnið**
Tjóðskjalasavnið virkar sambært løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992 um skjalasøvn, við seinni broytingum. Tjóðskjalasavnið hevur tvær høvuðsuppgávur. Onnur er at innsavna, skipa, varðveita, lýsa og taka sær av tí tilfari, sum almennir stovnar sambært lóggávu skulu avhenda til savnið. Hin er at hava eftirlit við journalum og arkivum hjá almennum stovnum og ráðgeva teimum. Tjóðskjalasavnið savnar harumframt privat skjøl, sum hava granskingarligan ella mentanarligan týdning. Samstundis er tað uppgáva Tjóðskjalasavnsins at hava savnindi tøk til almenna fyrisiting og gransking og at hava egna gransking. Tjóðskjalasavnið er A1 limur í altjóða skjalasavnsráðnum (International Council on Archives), og samstarvar nógv við útlendsk skjalasøvn.

Arbeiðið við varðveiting av talgildum savninum, sum gongd varð sett á í 2019, heldur fram.

**Undirkonta 24. Landsbókasavnið**
Landsbókasavnið er tjóðbókasavn og virkar frá 1. januar 2024 sambært løgtingslóg nr. 78 frá 1. juni 2023 um bókasøvn.

Landsbókasavnið hevur sum høvuðsbókasavn til uppgávu at fremja útbreiðslu av upplýsing, lærdómi og mentanarligum virksemi í landinum. Landsbókasavnið skal savna allar føroyskar bókmentir og í tann mun tað er gjørligt allar bókmentir, sum viðvíkja Føroyum. Tað hevur eina handritadeild við handritum, ið lýsa føroyska bókmentasøgu, mentan og siðsøgu. Landsbókasavnið umsitur skylduavhendingina, sum er áløgd teimum, ið framleiða eintøk til útgávu, ger føroysku tjóðbókaskránna og er føroysk ISBN-skrivstova. Landsbókasavnið hevur eftirlit við fólkabókasøvnunum og tekur sær m.a. av bókakeypi, klárgering og skráseting til bókasøvn, sum ikki sjálv hava útbúgvið fólk til hetta. Landsbókasavnið veitir vísindabókasavnstænastu í samstarvi við vísindaligar stovnar og útbúgvingarstovnar. Ljóðbókatænastan liggur hjá Landsbókasavninum, ið hevur ábyrgd av at reka og menna eina føroyska ljóðbókatænastu. Hildið verður fram við virkseminum, har higartil umleið 25 nýggir ljóðbókatitlar hava verið framleiddir árliga. Talan er bæði um fagurbókmentir og yrkisbøkur, skúlabøkur og barna- og ungdómsbøkur. Miðað verður eftir, at ljóðbøkurnar verða atkomuligar á netinum.

Umframt lønarframskriving er játtanin fyri 2024 framskrivað 169 tús. kr. til hægri lønarútreiðslur, orsakað av, at bókavørðir við kandidatútbúgving, sum higartil hava verið løntir eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið, kunnu verða løntir eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelagið.

Játtanin til bókasavnsgjaldið, sum er gjald til føroyskar høvundar sum skriva, týða ella prýða føroyskar bøkur, ið eru til taks á føroysku bókasøvnunum, og sum verður ásett sambært § 22 í bókasavnslógini, verður hækkað við 250 tús kr. ætlað til bókasavnsgjald fyri ljóðbøkur, e-bøkur og annað tilfar.

Játtanin til rakstur av Landsbókasavninum verður í 2024 hækkað við 750 tús. kr. til vaksandi virksemi, eitt nú til at skipa eitt bókasavnsráð og til at menna Landsbókasavnið sum universitetsbókasavn sambært nýggju bókasavnslógini.

**Undirkonta 40. Tjóðsavnið, inntøkufíggjað virksemi**
Tjóðsavnið hevur ymiskt inntøkufíggjað virksemi.

**Undirkontu 45. Tjóðsavnið, stuðulsfíggjað virksemi**
Tjóðsavnið fær til tíðir stuðul til ymiskar verkætlanir hjá Tjóðsavninum.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 35.664 | 37.251 | 38.961 | 41.017 | 41.133 | 41.249 |
| Útreiðslur | 39.268 | 42.743 | 43.361 | 45.460 | 45.576 | 45.692 |
| Inntøkur | 3.604 | 5.491 | 4.400 | 4.443 | 4.443 | 4.443 |
| **21. Koltursætlanin** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 839 | 1.067 | 1.344 | 1.364 | 1.364 | 1.364 |
| **Útreiðslur** | **990** | **1.192** | **1.461** | **1.481** | **1.481** | **1.481** |
| 11. Lønir v.m. | 591 | 601 | 726 | 746 | 746 | 746 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 215 | 440 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | 21 | 165 | 165 | 165 | 165 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 114 | 58 | 320 | 320 | 320 | 320 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -0 | -0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 70 | 71 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **151** | **125** | **117** | **117** | **117** | **117** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *151* | *125* | *117* | *117* | *117* | *117* |

**22. Tjóðsavnið**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 18.686 | 19.305 | 20.641 | 21.111 | 21.111 | 21.111 |
| **Útreiðslur** | **20.361** | **22.008** | **22.371** | **22.841** | **22.841** | **22.841** |
| 11. Lønir v.m. | 14.635 | 15.594 | 16.901 | 17.371 | 17.371 | 17.371 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 4.100 | 4.693 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 716 | 799 | 790 | 790 | 790 | 790 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 756 | 798 | 630 | 630 | 630 | 630 |
| 17. Avskrivingar o.a. | 61 | -12 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 19 | 16 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 25 | 32 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 0 | - | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 48 | 89 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **1.675** | **2.704** | **1.730** | **1.730** | **1.730** | **1.730** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *760* | *1.352* | *800* | *800* | *800* | *800* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *915* | *1.352* | *930* | *930* | *930* | *930* |

**23. Tjóðskjalasavnið**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 5.758 | 6.381 | 6.033 | 6.176 | 6.176 | 6.176 |
| **Útreiðslur** | **6.270** | **7.376** | **6.136** | **6.279** | **6.279** | **6.279** |
| 11. Lønir v.m. | 4.439 | 5.004 | 5.139 | 5.282 | 5.282 | 5.282 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.437 | 1.327 | 737 | 737 | 737 | 737 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 204 | 719 | 104 | 104 | 104 | 104 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 189 | 173 | 156 | 156 | 156 | 156 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | 40 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 0 | 114 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **512** | **995** | **103** | **103** | **103** | **103** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *44* | *12* | *13* | *13* | *13* | *13* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | - | *170* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *467* | *813* | *90* | *90* | *90* | *90* |

**24. Landsbókasavnið**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 10.380 | 10.499 | 10.943 | 12.366 | 12.482 | 12.598 |
| **Útreiðslur** | **10.781** | **10.710** | **11.263** | **12.686** | **12.802** | **12.918** |
| 11. Lønir v.m. | 8.342 | 8.252 | 9.143 | 10.566 | 10.682 | 10.798 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.482 | 1.564 | 1.430 | 1.430 | 1.430 | 1.430 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 578 | 598 | 450 | 450 | 450 | 450 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 286 | 263 | 240 | 240 | 240 | 240 |
| 17. Avskrivingar o.a. | - | -18 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -0 | -0 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 25 | 25 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 68 | 26 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **400** | **211** | **320** | **320** | **320** | **320** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *330* | *157* | *228* | *228* | *228* | *228* |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | *71* | *54* | *92* | *92* | *92* | *92* |

**40. Inntøkufíggjað virksemi**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | -0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **421** | **235** | **380** | **385** | **385** | **385** |
| 11. Lønir v.m. | 88 | 19 | 166 | 171 | 171 | 171 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 22 | 20 | 214 | 214 | 214 | 214 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | 84 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 19 | - | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 28 | -12 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 36 | 40 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 228 | 85 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **421** | **235** | **380** | **385** | **385** | **385** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *201* | *68* | - | - | - | - |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *56* | *98* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *165* | *69* | *380* | *385* | *385* | *385* |

**45. Stuðulsfíggjað virksemi**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | -0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **445** | **1.222** | **1.750** | **1.788** | **1.788** | **1.788** |
| 11. Lønir v.m. | 360 | 746 | 1.360 | 1.398 | 1.398 | 1.398 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 39 | 366 | 390 | 390 | 390 | 390 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 28 | 75 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 26 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 18 | 9 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **445** | **1.222** | **1.750** | **1.788** | **1.788** | **1.788** |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *18* | *452* | - | - | - | - |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *407* | *716* | *1.750* | *1.788* | *1.788* | *1.788* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *19* | *54* | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 21 Koltursætlanin**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 1,1 | 1,1 | 1,1 | 1,1 | 1,1 | 1,1 |
| Fulltíðarstørv | 1,1 | 1,1 | 1,1 | 1,1 | 1,1 | 1,1 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 0,6 | 0,6 | 0,7 | 0,7 | 0,7 | 0,7 |

**Starvsfólkayvirlit: 22 Tjóðsavnið**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 27,1 | 28,5 | 29,5 | 29,5 | 29,5 | 29,5 |
| Fulltíðarstørv | 28,1 | 29,5 | 30,5 | 30,5 | 30,5 | 30,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 14,6 | 15,6 | 16,9 | 17,4 | 17,4 | 17,4 |

**Starvsfólkayvirlit: 23 Tjóðskjalasavnið**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 8,2 | 8,2 | 8,2 | 8,2 | 8,2 | 8,2 |
| Fulltíðarstørv | 9,2 | 9,2 | 9,2 | 9,2 | 9,2 | 9,2 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 4,4 | 5,0 | 5,1 | 5,3 | 5,3 | 5,3 |

**Starvsfólkayvirlit: 24 Landsbókasavnið**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 15,6 | 15,6 | 15,7 | 16,7 | 16,7 | 16,7 |
| Fulltíðarstørv | 16,6 | 16,6 | 16,7 | 17,7 | 17,7 | 17,7 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 8,3 | 8,3 | 9,1 | 10,6 | 10,7 | 10,8 |

## 12.24.3.06. Onnur søvn (Stuðulsjáttan)

Tjóðsavnið umsitur stuðulin til bygdasøvn, onnur listasøvn, sjósavn og mentanarsøgulig skip. Landsbókasavnið umsitur stuðulin til fólka- og skúlabókasøvn. Tjóðskjalasavnið umsitur játtanina til skjalasøvn.

**Undirkonta 01. Bygdasøvn**
Lógargrundarlagið er løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972, við seinni broytingum, um bygdasøvn við mentanarsøguligum virksemi. Í bygdasøvnunum verður varðveitt ymiskt søguligt tilfar, sum hevur týdning fyri bygdirnar. Játtanin er eisini til serlig tiltøk hjá landsantikvarinum í sambandi við bygdasavnsvirksemið og ásetingarnar í bygdasavnslógini.

Góðkendu bygdarsøvnini eru:

- Vágs Sóknar Bygdasavn
- Porkeris Bygdarsavn
- Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn
- Hvalbiar Sóknar Bygdar- og Kolasavn
- Fornminnisavnið á Mýri, Hovi
- Sunnbiar Sóknar Bygdasavn
- Sands Bygdasavn
- Skopunar Bygdasavn
- Skúvoyar Bygdasavn
- Sandavágs Bygdasavn
- Miðvágs Bygdasavn
- Sørvágs Bygdasavn
- Nólsoyar Bygdarsavn
- Vestmanna Bygdarsavn
- Kollafjarðar Bygdarsavn
- Tórshavnar Býarsavn
- Sjóvar Fornminnissavn

- Eiðis Bygdasavn
- Bygdarsavnið "Gamli Skúli", Leirvík
- Gøtu Fornminnissavn
- Bygdasavnið "Forni", Glyvrar
- Bygdasavnið í Nes kommunu
- Norðoya Fornminnissavn

Landið letur góðkendum bygdasøvnum stuðul, sum er 60% av góðkendum rakstrarútreiðslum. Stuðulin verður latin eftir umsókn og útgoldin árliga sambært roknskapinum árið fyri.

**Undirkonta 02. Menning av fólkabókasavnstænastum**
Sambært §10 í bókasavnslógini verður heimilað at lata stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum.

Stuðulin er ætlaður at menna bókasavnstænastur í kommunum, sum ikki hava fólkabókasøvn og til nýggjar tænastur hjá verandi fólkabókasøvnum.

Stuðulin verður latin eftir neyvari treytum, ið landsstýrisfólkið ásetur.

**Undirkonta 04. Listasøvn**
Játtanin er ætlað at stuðla listasøvnum kring landið. Stuðulin verður latin sum stuðul til rakstur og stuðul til ymsar verkætlanir, so sum keyp og umvæling av listaverkum, skráseting, keyp av útbúnaði til framsýningarhøli v.m. Norðoya Listafelag, Skálin við Skálá og Listasavnið á Sandi hava fingið stuðul av hesi játtan.

Stuðulin verður latin eftir umsókn og verður goldin út síðst í árinum, treytað av at roknskapur er latin inn fyri árið fyri.

**Undirkonta 05. Sjósavn**
Játtanin er ætlað at stuðla sjálvsognarstovninum Grunnurin Føroya Sjósavn.

**Undirkonta 06. Mentanarsøgulig skip**
Endamálið við játtanini er at skipa eina antikvariska verndar- og stuðulsskipan til mentanarsøgulig skip og hava tey siglandi í Føroyum. Stuðulin er ætlaður skipum millum 5 BT og 300 BT, ið hava fingið átekning sum varðveitingarverd skip. Ánarar av varðveitingarverdum skipum kunnu søkja um, at skipið fær átekning sum varðveitingarvert skip.

Stuðulin verður latin sum verkætlanarstuðul og rakstrarstuðul eftir umsókn. Tjóðsavnið umsitur verndar- og stuðulsskipanina og veitur ráðgeving í sambandi við átekning og stuðulsveiting. Heimildin fyri verndar- og stuðulsskipanini er løgtingslóg nr. 14 frá 28. februar 2013 um mentanarsøgulig skip.

**Undirkonta 07. Skjalasøvn**
Játtanin er ætlað sum stuðul til skjalasavn á Tvøroyri. Talan er um eina royndarverkætlan, sum hevur verið skipað við sáttmála millum Tjóðskjalasavnið og Tvøroyrar kommunu síðani desember 2017.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 9.933 | 10.769 | 10.888 | 10.888 | 10.888 | 10.888 |
| Inntøkur | - | 20 | - | - | - | - |
| **01. Bygdasøvn** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.462** | **2.462** | **2.462** | **2.462** | **2.462** | **2.462** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2.071 | 2.050 | 2.070 | 2.070 | 2.070 | 2.070 |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 391 | 412 | 392 | 392 | 392 | 392 |
| **02. Menning av fólkabókasavnstænastum** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **4.383** | **4.395** | **4.387** | **4.387** | **4.387** | **4.387** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 1.539 | 1.551 | 1.543 | 1.543 | 1.543 | 1.543 |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 20 | - | - | - | - | - |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 2.824 | 2.844 | 2.844 | 2.844 | 2.844 | 2.844 |
| **04. Listasøvn** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **120** | **120** | **120** | **120** | **120** | **120** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 120 | 120 | 120 | 120 | 120 | 120 |
| **05. Sjósavn** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **884** | **884** | **884** | **884** | **884** | **884** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 884 | 884 | 884 | 884 | 884 | 884 |
| **06. Mentanarsøgulig skip** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.045** | **1.023** | **1.050** | **1.050** | **1.050** | **1.050** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.045 | 1.023 | 1.050 | 1.050 | 1.050 | 1.050 |
| **Inntøkur** | **-** | **20** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 64. Aðrar flytingarinntøkur | - | *20* | - | - | - | - |
| **07. Skjalasøvn** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.039** | **1.885** | **1.985** | **1.985** | **1.985** | **1.985** |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 1.039 | 1.885 | 1.985 | 1.985 | 1.985 | 1.985 |

## 12.24.3.18. Krígssavn (Stuðulsjáttan)

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum.

Stuðulin til virksemið hjá Krígssavninum verður útgoldin árliga. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| **01. Krígssavn** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **300** | **300** | **300** | **300** | **300** | **300** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 |

## 12.24.3.21. Varðveiting av mentanararvinum (Løgujáttan)

### Undirkonta 10. Varðveiting av mentanararvinum

Játtanin er til at gera bakkaverju í Kirkjubø, á Sandi og aðrastaðni fyri at tryggja fornminnini. Arbeiðið við bakkaverju í Kirkjubø varð sett í gongd í 2021 og heldur fram í 2024. Í 2024 er eisini ætlanin at gera kanningar og tilmæli viðvíkjandi fornminnum, ið eru hótt av máan og brimi aðrastaðni í landinum.

### Undirkonta 11. Kirkjubømúrurin

Játtanin er til varðveitingararbeiði í sambandi við Kirkjubømúrin og onnur jarðføst fornminni á miðaldar biskupssetrinum í Kirkjubø. Landsstýrið fekk í november 2008 handað eitt álit frá Múrnevndini og Føroya Fornminnissavni um varðveiting av Kirkjubømúrinum. Í álitinum varð mælt til, at verndararbeiðið fer fram eftir altjóða etiskum leiðreglum. Verkætlanin fevnir um skráseting, umvæling og varðveiting av Kirkjubømúrinum og øðrum leivdum av biskupssetrinum, umframt økisskipanarlig tiltøk, ið eisini taka atlit at ferðavinnuni í økinum.

Støðan á verkætlanini er, at varðveitingararbeiðið á múrverkið í Múrinum og Líkhús nú eru framd. Múrurin og Líkhús eru væl skrásett og bygningssteinar og viðalutir, ið hoyra til fornminnini, eru 3D skrásett og løgd á goymslu. Tørvur er á framhaldandi viðlíkahaldi og røkt.

Fyri at gera Múrin betri atkomuligan hjá øllum og fyri at skipa atkomuna eru flísar úr føroyskum gróti lagdir uttanfyri og inni í Múrinum í 2023. Eisini er umfatandi avstoypingararbeiði gjørt.

Í framtíðini er neyðugt við eini viðlíkahaldsskipan fyri Kirkjubømúrin og hini jarðføstu fornminnini á miðaldar biskupssetrinum í Kirkjubø.

Tjóðsavnið umsitur játtanina til Kirkjubømúrin.

### Undirkonta 12. Hvalastøðin við Áir

Arbeiðið at varðveita Hvalastøðina við Áir verður gjørt við støði í ávegis áliti um varðveiting av hvalastøðini sum sjóvinnusavn frá 2007 og áliti um økisskipan við Áir frá 2013. Í álitunum verður staðfest, at hvalastøðin er varðveitingarverd sum dømi um ídnaðarsamfelagið, ið tók seg upp í Føroyum í 19. øld. Arbeiðið at varðveita hvalastøðina verður gjørt so hvørt játtan er til endamálið.

Fyrsta byggistig, at tryggja hvalastøðini móti veðri og vindi, varð liðugt í 2023. Harumframt eru el og ein ABA-eldávaringarskipan løgd inn. Framyvir verður neyðugt at halda mongu bygningarnar við líka.

### Undirkonta 13. Koltursætlanin

Løgtingslóg nr. 83 frá 16. mai 2022 um heimild at fíggja Koltursætlanina heimilar landsstýriskvinnuni at fíggja 9 mió. kr. av Koltursætlanini hjá Tjóðsavninum. Árini 2023-2025 verða játtaðar 3 mió. kr.

árliga. Samlaða verkætlanin er mett at kosta 65 mió. kr., og fíggingin úr landskassanum er treytað av, at Tjóðsavnið fær uttanhýsis fígging til restina av Koltursætlanini.

Við Koltursætlanini verða fysiskir karmar skaptir fyri antikvarisku serskipanina í Koltri, sum í 2013 varð løgd til Tjóðsavnið at umsita. Endamálið við Koltursætlanini er at bjóða føroyingum og útlendingum eina einastandandi uppliving, ið lýsir samspælið millum náttúru og menniskju í Koltri í meir enn 1000 ár. Visjónin er, at Koltur verður eitt av heimsins fremstu útisøvnum við tænastum á altjóða støði.

## Átekning

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 3.952 | 3.526 | 5.900 | 5.400 | 3.000 | - |
| **10. Varðveiting av mentanararvinum** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.001** | **815** | **750** | **750** | **-** | **-** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | 62 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -128 | -118 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 1.001 | 815 | 750 | 750 | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 128 | 56 | - | - | - | - |
| **11. Kirkjubømúrurin** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **998** | **939** | **650** | **650** | **-** | **-** |
| 11. Lønir v.m. | 305 | 164 | - | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 65 | 0 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 16 | 3 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -386 | -167 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 870 | 868 | 650 | 650 | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 127 | 71 | - | - | - | - |
| **12. Hvalastøðin við Áir** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.953** | **1.772** | **1.500** | **1.000** | **-** | **-** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 1.805 | 1.622 | 1.500 | 1.000 | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 148 | 149 | - | - | - | - |
| **13. Koltursætlanin** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **3.000** | **3.000** | **3.000** | **-** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | - | - | 3.000 | 3.000 | 3.000 | - |

## 12.24.3.22. Listasøvn (Rakstrarjáttan)

Listasavn Føroya er tjóðlistasavn Føroya og virkar sambært galdandi viðtøkum frá 2016. Høvuðsuppgávan hjá Listasavninum er at røkja myndlistaliga mentanararv Føroya við innsavning, varðveitslu, skráseting, gransking og miðlan, og við grundarstøði í hesum gera savnið atkomuligt fyri almenningin og granskingina.

Listasavnið sýnir fram og skipar fyri skiftandi serframsýningum við støði í listasavninum, sum fevnir um umleið 2.500 verk. Savnsvirksemið hjá Listasavninum fevnir eisini um at siðmenna og kunna

næmingar í skúlum og dagtilboðum um føroyska søgu, siðir og samfelagsumstøður, sum verða lýst í tí visuellu mentanini, fyrst og fremst myndlistini. Listasavnið mennir eisini miðlatilfar og veitir skúlatænastu. Listasavnið hýsir einum skjalasavni við tilfari frá føroyskum listafólkum, sum er tøkt at granska í.

Listasavnið ráðgevur í sambandi við almennar listprýðingar og luttekur í ymiskum listanevndum. Listasavn Føroya veitir útbúgvingarverkinum og almennum myndugleikum ráðgeving.

Umframt lønarframskriving er játtanin hækkað við 160 tús. kr. í sambandi við, at Listasavnið frá 2023 rindar samsýning til listafólk í sambandi við framsýningar av verkum teirra.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 3.413 | 3.445 | 3.549 | 3.789 | 3.789 | 3.789 |
| Útreiðslur | 5.333 | 6.836 | 5.275 | 5.515 | 5.515 | 5.515 |
| Inntøkur | 1.920 | 3.391 | 1.726 | 1.726 | 1.726 | 1.726 |
| **20. Listasavn Føroya** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 3.413 | 3.445 | 3.549 | 3.789 | 3.789 | 3.789 |
| **Útreiðslur** | **5.333** | **6.836** | **5.275** | **5.515** | **5.515** | **5.515** |
| 11. Lønir v.m. | 2.560 | 2.812 | 2.864 | 2.944 | 2.944 | 2.944 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.979 | 1.965 | 1.871 | 2.031 | 2.031 | 2.031 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 320 | 1.243 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 472 | 815 | 290 | 290 | 290 | 290 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 1 | 2 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | - | 0 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **1.920** | **3.391** | **1.726** | **1.726** | **1.726** | **1.726** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.409* | *1.906* | *1.410* | *1.410* | *1.410* | *1.410* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *211* | *1.211* | *166* | *166* | *166* | *166* |
| 64. Aðrar flytingarinntøkur | - | *104* | - | - | - | - |
| 77. Flyting frá kommunum | *300* | *170* | *150* | *150* | *150* | *150* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Listasavn Føroya**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 4,6 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| Fulltíðarstørv | 4,6 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 2,6 | 2,8 | 2,9 | 2,9 | 2,9 | 2,9 |

## 12.24.3.27. Saltsilo, rakstrarstuðul (Stuðulsjáttan)

Landið hevur saman við Tvøroyrar kommunu átikið sær at lata stuðul til raksturin av mentanarbygninginum Saltsiloini. Stuðulin verður útgoldin ákontu hvønn ársfjórðing.

Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| **01. Saltsilo, rakstrarstuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 |

## 12.24.3.31. Víkingagarðurin í Hovi (Stuðulsjáttan)

Játtanin er ætlað til verkætlanina at byggja neyst og víkingaskip í Hovi, ið felagið Víkingaskipið er stigtakari til. Játtanin er ætlað til at halda fram við fyrireikingini, m.a. til at skipa verkætlanina, til forkanningar, ráðgeving, tekningar og umsóknir, og annað í hesum sambandi.

Stuðulin til verkætlanina verður útgoldin árliga, og roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 150 | - | 100 | 100 | 100 | 100 |
| **01. Víkingagarðurin í Hovi** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **150** | **-** | **100** | **100** | **100** | **100** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 150 | - | 100 | 100 | 100 | 100 |

## 12.24.3.32. Listasavn Føroya (Løgujáttan)

Listasavn Føroya hevur tørv á umfatandi umvæling, útbygging og nútímansgerðing. Samlaði fíggjartørvurin hjá Listasavninum til ætlanina er mettur til 60,5 mió. kr., og tá er lagt upp fyri møguligum prísvøkstri á 20%.

Listasavnið er skipað sum sjálvsognarstovnur og hevur fingið tilsøgn frá grunnum um stuðul á tilsamans 40,5 mió. kr. Augustinus Fonden hevur givið tilsøgn um 17 mió. kr., Louis-Hansen Fonden hevur givið tilsøgn um 17 mió. kr., og Villum Fonden hevur givið tilsøgn um 6,5 mió. kr.

Treytin fyri útgjaldi er tó, at landið eisini átekur sær ein part av fíggingini. Prosjektering er mett at kosta 4,5 mió. kr. Í eykajáttanini fyri heystið 2003 er biðið um at settar verða 2 mió. kr. av til endamálið. Fyri at fáa prosjekteringina gjørda, so klárt er til at fara undir útboð í 2024, er neyðugt at játtaðar verða 2,5 mió. kr. afturat í 2024. Móti sumri í 2024 er ætlanin at leggja fyri Løgtingið uppskot um heimildarlóg, har landið átekur sær at fíggja 12,5 mió. kr. yvir trý ár, so landsins partur er ájavnt við størstu útlendsku grunnarnar. Listasavnið er í sambandi við aðrar partar um tær írestandi 3 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.336 | 766 | - | 2.500 | - | - |
| **10. Listasavn Føroya** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.336** | **766** | **-** | **2.500** | **-** | **-** |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -71 | -29 | - | - | - | - |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 1.336 | 766 | - | 2.500 | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 71 | 29 | - | - | - | - |

## 12.24.3.33. Mentanarhús í Klaksvík, løgustuðul (Stuðulsjáttan)

Í 2022 vórðu játtaðar 5 mió. kr. og í 2023 7 mió. kr. sum stuðul til byggingina av nýggjum mentanarhúsi í Klaksvík. Talan er um verkætlanina at um- og afturatbyggja Posthúsið í Klaksvík til eitt nýmótans mentanarhús. Tað er sjálvsognarstovnurin - Grunnur, Mentanarhús í Klaksvík, sum eigur og byggir mentanarhúsið Varpið.

Grunnurin hevur fingið eina tilsøgn um stuðul á 12 mió. kr., harav 10,8 mió. kr. eru útgoldnar, og 1,2 mió. kr. verður útgoldin, tá treytirnar í tilsøgnini eru loknar.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | 5.000 | 7.000 | - | - | - |
| **01. Mentanarhús í Klaksvík, løgustuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **5.000** | **7.000** | **-** | **-** | **-** |
| 55. Íløgustuðul o.a. | - | 5.000 | 7.000 | - | - | - |

## 12.24.3.34. Mentanarhúsið í Fuglafirði (Stuðulsjáttan)

Játtanin er ætlað til at stuðla rakstrinum av Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| **01. Mentanarhúsið í Fuglafirði** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **300** | **300** | **300** | **300** | **300** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | - | 300 | - | - | - |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | - | 300 | - | 300 | 300 | 300 |

## 12.24.4. Fjølmiðlar

### 12.24.4.06. Kringvarp Føroya (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir Kringvarpi Føroya er løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp, við seinni broytingum. Í lógini er ásett, at Kringvarpið er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Stovnurin verður stjórnaður av stýri við sjey limum, sum landsstýriskvinnan tilnevnir fyri fýra ár í senn. Virksemið hjá Kringvarpinum verður fíggjað við kringvarpsgjaldi, kunngerðarinntøkum, inntøkugevandi eydnuspølum og stuðli sambært nærri ásettum treytum.

Frá 1. januar 2016 varð farið frá at krevja kringvarpsgjald frá húskjum til at krevja eitt mánaðargjald frá einstaklingum, ið hava fulla skattskyldu í Føroyum. Virki, stovnar o.o. rinda kringvarpsgjald eftir samlaðu árligu lønarútgjaldingunum. TAKS krevur kringvarpsgaldið inn fyri Kringvarp Føroya.

Sendingar hjá Kringvarpinum fevna um tíðindaflutning, upplýsing, undirhald og mentan. Í programmvirkseminum skal dentur leggjast á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð. Í public service-sáttmálanum millum Kringvarpið og Almanna- og mentamálaráðið verða almennu skyldur Kringvarpsins nærri greinaðar.

Sambært § 8, stk. 5 í kringvarpslógini kann virksemið hjá Kringvarpinum eisini verða fíggjað við játtan í fíggjarlógini. Hetta er tó ikki vanligt og verður bert gjørt undir serstøkum umstøðum.

Samlaðu inntøkurnar hjá Kringvarpinum vaksa við 0,5 mió. kr. Inntøkurnar eru framroknaðar út frá ítøkiliga fyriliggjandi upplýsingum. Lítli inntøkuvøksturin røkkur ikki til sáttmálabundnar lønarhækkingar og príshækkingar annars, og tí verður neyðugt at tillaga raksturin.

**Undirkonta 30. Talgilding av bandasavninum**
Í 2023 varð komið á mál at talgilda bandasavnið. Við hesum er ein týðandi partur av okkara miðlasøguliga arvi komin til høldar.

Nú talgildingin er liðug, er næsta stigið at taka støðu til, um ein játtan skal latast til at fara undir arbeiðið at lata savnið upp fyri almenninginum.

**Undirkonta 31. Lýsingarinntøkur**
Lagt er upp fyri 2 mió. kr. í lýsingarinntøkum í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | -1.989 | -1.799 | -1.500 | -1.500 | -1.500 | -1.500 |
| Útreiðslur | 77.273 | 77.335 | 79.362 | 79.443 | 79.443 | 79.443 |
| Inntøkur | 79.262 | 79.134 | 80.862 | 80.943 | 80.943 | 80.943 |
| **20. Landsfyritøka** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -900 | -900 | -400 | -400 | -400 | -400 |
| **Útreiðslur** | **75.858** | **76.096** | **78.020** | **78.543** | **78.543** | **78.543** |
| 11. Lønir v.m. | 55.181 | 53.587 | 54.872 | 53.358 | 53.358 | 53.358 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 15.944 | 16.451 | 15.756 | 16.740 | 16.740 | 16.740 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 1.561 | 2.045 | 3.500 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.791 | 1.957 | 1.890 | 1.845 | 1.845 | 1.845 |
| 17. Avskrivingar o.a. | 129 | 496 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | - | 0 | - | - | - | - |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 9 | 14 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1.243 | 1.546 | 1.702 | 1.300 | 1.300 | 1.300 |
| **Inntøkur** | **76.758** | **76.996** | **78.420** | **78.943** | **78.943** | **78.943** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *3.930* | *3.112* | *2.535* | *2.635* | *2.635* | *2.635* |
| 61. Skattir og avgjøld | *65.751* | *66.985* | *66.227* | *67.908* | *67.908* | *67.908* |
| 64. Aðrar flytingarinntøkur | *6.292* | *6.113* | *9.658* | *8.400* | *8.400* | *8.400* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *0* | - | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *785* | *785* | - | - | - | - |
| **30. Talgilding av bandasavninum** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 900 | 900 | 900 | 900 | 900 | 900 |
| **Útreiðslur** | **1.416** | **1.239** | **1.342** | **900** | **900** | **900** |
| 11. Lønir v.m. | 1.173 | 1.185 | 1.292 | 850 | 850 | 850 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 217 | 45 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 17 | 5 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 8 | 4 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **516** | **339** | **442** | **-** | **-** | **-** |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *402* | *27* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *114* | *312* | *442* | - | - | - |
| **31. Lýsingarinntøkur** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -1.989 | -1.799 | -2.000 | -2.000 | -2.000 | -2.000 |
| **Inntøkur** | **1.989** | **1.799** | **2.000** | **2.000** | **2.000** | **2.000** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *1.989* | *1.799* | *2.000* | *2.000* | *2.000* | *2.000* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Landsfyritøka**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 104,0 | 98,6 | 99,4 | 92,5 | 90,6 | 88,8 |
| Fulltíðarstørv | 105,0 | 99,6 | 100,4 | 93,5 | 91,6 | 89,8 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 55,2 | 53,6 | 54,9 | 53,4 | 53,4 | 53,4 |

*Í lønarpartinum er íroknað gjald fyri rættindi og keyp av sendingum frá eksternum studio og fólki, sum ikki eru í starvi á stovninum.*

## 12.24.4.10. Stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari (Stuðulsjáttan)

Játtanin er ætlað sum ein public service-tænasta til teknmálstulking av tíðindasendingum og øðrum føroyskum sendingum á sjónvarpsmiðlinum hjá Kringvarpinum.

Í 2020 varð játtanin hækkað við 200 tús. kr. til at styrkja teknmálstulking og teksting av sendingum á sjónvarpsmiðlinum hjá Kringvarpi Føroya.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum. Stuðul verður útgoldin veitarum eftir uppgerð nakrar ferðir árliga.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 785 | 785 | 785 | 785 | 785 | 785 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **785** | **785** | **785** | **785** | **785** | **785** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 785 | 785 | 785 | 785 | 785 | 785 |

## 12.24.4.13. Miðlastuðul (Stuðulsjáttan)

Játtan er sett av til tess at hækka dygdina í journalistiska arbeiðinum og at tryggja eitt fjøltáttað útboð av tíðindamiðlum.

Sambært samgonguskjalinum skal skipanin við miðlastuðli stuðla undir at styrkja miðlalandslagið. Tí hevur samgongan valt at raðfesta miðlastuðulin við at hækka játtanina við 1. mió. kr.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 35 frá 31. mars 2017 um miðlastuðul, við seinni broytingum.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| **01. Miðlastuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **2.000** | **2.000** | **2.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** |
| 53. Stuðul til vinnu | 1.774 | 2.000 | 2.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 226 | - | - | - | - | - |

# 12.24.5. Kirkjan

## 12.24.5.01. Studningur til Kirkjugrunnin (Stuðulsjáttan)

Á ólavsøku 2007 vórðu málsøkini fólkakirkjan og onnur trúarsamfeløg yvirtikin. Við yvirtøkuni tók landið á seg skylduna at stuðla fólkakirkjuni, eisini peningaliga, á ein hátt, ið er sambæriligur við tann stuðul, ið danska ríkisvaldið veitti fólkakirkjuni. Hesin peningaligi stuðulin kom afturat stuðlinum, ið landið undan yvirtøkuni veitti nú avtikna Kirkjugrunninum.

Stuðulin verður veittur sambært § 28 og § 29, stk. 1 í løgtingslóg nr. 61 frá 7. juni 2007 um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar. Talan er um stuðul til rakstur, og stuðul, ið samsvarar við minst 40% av lønini til sóknarprestar í starvi sum tænastumenn í fólkakirkjuni, og 100% av lønini til biskup. Stuðulin fer í nýggja Kirkjugrunnin, ið Stiftsstjórnin situr fyri.

Stuðulin, ið landið veitti undan yvirtøkuni, fór í gamla kirkjugrunnin, og soleiðis til viðlíkahald og rakstur av kirkjum, umbygging og niðurtøku av kirkjum, og til helmingin av ferðaútreiðslunum hjá prestum. Stuðulin, sum verður veittur eftir omanfyri nevndu lógargreinum, er harafturímóti ikki markaður til ávís endamál.

Tá gjørt varð av, at loyva fólkakirkjuni at skipa tvey serprestaembæti, varð játtanin í 2023 hækkað við 300 tús. kr., og verður játtanin í 2024 hækkað við 300 tús. kr. afturat samsvarandi landsins parti av báðum serprestaembætunum.

Harumframt verður stuðulin hækkaður samsvarandi lønarframskriving av 40% av lønini til sóknarprestar í starvi sum tænastumenn í fólkakirkjuni, og 100% av lønini til biskup, íalt 340 tús. kr.

Árligi stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, útgoldin frammanundan árliga. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum eftir lokið fíggjarár.

Eftir § 29, stk. 2, í lógini um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar rindar landskassin tænastumonnum fólkakirkjunnar eftirløn, men fer hon ikki at verða uppgjørd fyri seg.

Eftir § 30 í lógini kann landskassin veita upp til 1/3 av góðkenda byggikostnaðinum í stuðli, tá ið kirkja verður bygd ella umbygd. Stuðulin verður veittur einstøku kirkjuni beinleiðis og verður settur í fíggjarlógina fyri seg tey ár, ið kirkja er, sum lýkur treytirnar fyri stuðli.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 9.600 | 9.600 | 10.100 | 10.740 | 10.740 | 10.740 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **9.600** | **9.600** | **10.100** | **10.740** | **10.740** | **10.740** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 9.600 | 9.600 | 10.100 | 10.740 | 10.740 | 10.740 |

## 12.24.5.04. Føroyskt kirkjumál (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at veita Føroyskum Kirkjumáli ein árligan stuðul til rakstur. Endamálið hjá Føroyskum Kirkjumáli er at geva út bøkur o.a., ið er neyðugt at brúka til gudstænastu, og annað, sum er gagnligt til kirkjuligt arbeiði á føroyskum.

Stuðulin til virksemið hjá Føroyskum Kirkjumáli verður útgoldin frammanundan árliga. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 250 | 250 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| **01. Føroyskt kirkjumál** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **250** | **250** | **250** | **250** | **250** | **250** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 250 | 250 | 250 | 250 | 250 | 250 |

## 12.24.5.12. Stuðul til kirkjubygging (Stuðulsjáttan)

Eftir § 30 í løgtingslóg nr. 61 frá 7. juni 2007 um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar kann Landskassin veita upp til 1/3 av góðkenda byggikostnaðinum í stuðli, tá ið kirkja verður bygd; men ikki fyrr enn landsstýriskvinnan hevur givið endaligt loyvi til byggingina.

Nú er komið somikið væl á leið við verkligu fyrireikingunum, og við at útvega eginfígging, til at byggja nýggjar kirkjur á Glyvrum og á Argjum, at líkindi eru fyri, at landsstýriskvinnan í 2024 kann fáa tilmæli frá umsitingini um at geva endaligt loyvi til fara undir verkætlanirnar.

Kirkjan á Glyvrum er størri og meira krevjandi byggiverkætlan og fer væntandi at kosta millum ein triðing og ein fjórðing meira enn kirkjan á Argjum.

Stuðulin í 2024 er til fyrireikingar og projektering. Tá projekteringin er liðug, má støða takast til, nær byggingin verður boðin út, og heimildarlóg um at fíggja bygging av kirkjunum síðani verður løgd fyri Løgtingið.

### Undirkonta 01. Kirkja á Argjum
Játtanin fyri 2024 er 1.980 tús. kr. sum stuðul til fyrireiking og projektering av kirkju á Argjum.

### Undirkonta 02. Kirkja á Glyvrum
Játtanin fyri 2024 er 2.640 tús. kr. sum stuðul til fyrireiking og projektering av kirkju á Glyvrum.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | - | 4.620 | 4.620 | 6.185 | 15.625 |
| **01. Kirkja á Argjum** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **1.980** | **1.980** | **3.545** | **12.985** |
| 55. Íløgustuðul o.a. | - | - | 1.980 | 1.980 | 3.545 | 12.985 |
| **02. Kirkja á Glyvrum** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **2.640** | **2.640** | **2.640** | **2.640** |
| 55. Íløgustuðul o.a. | - | - | 2.640 | 2.640 | 2.640 | 2.640 |

# 12.24.6. Ítróttur

## 12.24.6.06. Ítróttasamband Føroya (Stuðulsjáttan)

Ítróttasamband Føroya er savnandi felagsskapur fyri alla ítrótt í Føroyum og umboðar tilsamans um 20.000 virkin ítróttafólk í 150 feløgum og 25 ítróttagreinir kring oyggjarnar. Tey eru savnað í 24 sambond, 16 sersambond og 8 menningarsambond.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

**Undirkonta 01. ÍSF**
Játtanin í 2024 er hækkað við 1,5 mió. kr. Ferðastuðulin er íroknaður játtanini. Stuðulin verður útgoldin hálvárliga.

**Undirkonta 04. Parasport Føroyar**
Játtanin til Parasport Føroyar er 300 tús. kr. Stuðulin verður útgoldin árliga.

**Undirkonta 05. Altjóða ítróttaluttøka**
Játtanin til altjóða ítróttaluttøku er 500 tús. kr. ÍSF umsitur og ger av, hvør skal hava henda stuðulin. Stuðulin verður útgoldin árliga.

**Undirkonta 06. Úrvalsítróttur**
Játtanin til úrvalsítrótt er 800 tús. kr. ÍSF umsitur og ger av, hvør skal hava henda stuðulin. Stuðulin verður útgoldin árliga.

**Undirkonta 07. Dopingeftirlit**
Játtanin á 500 tús. kr. er stuðul til dopingarbeiðið hjá Ítróttasambandi Føroya. Við løgtingslóg nr. 88 frá 7. juni 2020 um doping og óreiðiliga ávirkan í ítrótti varð heimilað landsstýriskvinnuni at góðkenna ein privatan felagsskap at vera dopingeftirlitsfelagsskapur í Føroyum. Felagsskapurin skal taka dopingroyndir, kunna um doping, ráðgeva myndugleikunum og luttaka í altjóða samstarvi um at fyribyrgja doping. ÍSF hevur fingið hesa góðkenning.

Lógin ásetir m.a., at dopingeftirlitsvirksemið bygnaðarliga skal vera skilt frá restini av virkseminum hjá felagsskapinum. Tí verður latin serstøk stuðulsjáttan, ið er oyramerkt til dopingarbeiði og ikki kann nýtast til annað virksemi hjá ÍSF.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 14.750 | 13.700 | 15.700 | 17.200 | 17.700 | 18.200 |
| **01. ÍSF** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **13.150** | **11.600** | **13.600** | **15.100** | **15.600** | **16.100** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 13.150 | 11.600 | 13.600 | 15.100 | 15.600 | 16.100 |
| **04. Parasport Føroyar** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **300** | **300** | **300** | **300** | **300** | **300** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| **05. Altjóða ítróttaluttøka** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **500** | **500** | **500** | **500** | **500** | **500** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| **06. Úrvalsítróttur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **800** | **800** | **800** | **800** | **800** | **800** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 800 | 800 | 800 | 800 | 800 | 800 |
| **08. Dopingeftirlit** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **500** | **500** | **500** | **500** | **500** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |

## 12.24.6.08. Hugasamband Føroya (Stuðulsjáttan)

Hugasamband Føroya er sersamband, sum Talvsamband Føroya og Bridgesamband Føroya hava stovnsett. Játtanin er til at stuðla virksemið hjá hesum báðum sambondum, til verksetan av kappingum í Føroyum og til luttøku í kappingum í altjóða høpi.

Síðani 2019 hevur Talvsamband Føroya havt sáttmála við Nám um, at Talvsamband Føroya átekur sær at ráðgeva fólkaskúlum og miðnámsskúlum í undirvísing í talvi við støði í tvørgreinaligari undirvísing. Vegna Talvsamband Føroya er tað stórmeistarin, ið verður løntur av Námi at átaka sær hesa uppgávu.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum. Stuðulin verður útgoldin mánaðarliga. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.300 | 1.300 | 1.300 | 1.300 | 1.300 | 1.300 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.300** | **1.300** | **1.300** | **1.300** | **1.300** | **1.300** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.300 | 1.300 | 1.300 | 1.300 | 1.300 | 1.300 |

### 12.24.6.13. Ítróttahøll í Sandoynni (Løgujáttan)

Í 2020 vórðu játtaðar 1,3 mió. kr. til liðugtgerð av ítróttahøllini á Sandoynni og til tinglýsing av veðbrævi, sum gevur landinum veð í høllini, sum kommunurnar í Sandoynni skulu eiga. Klárt var ikki í 2020 og 2021 at fáa tinglýst veðbrævið, og varð játtanin til tinglýsingina tí endurjáttað í 2022.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | - | 301 | - | - | - | - |
| **01. Ítróttahøll í Sandoynni** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **301** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | - | 301 | - | - | - | - |

### 12.24.6.15. Stórhøll í Hoyvík, løgustuðul (Stuðulsjáttan)

Verkætlanin stórhøll í Hoyvík er skipað í sjálvsognarstovnin Føroya Arena, sum hevur til endamáls at byggja stórhøllina og harumframt at umsita og fyrisita høllina, tá hon er liðug og tikin í nýtslu.

Fyrireikingarnar av verkætlanini eru í gongd. Almanna- og mentamálaráðið fer at seta neyðugar treytir, ið skulu verða uppfyltar, áðrenn stuðul verður veittur, herundir at høllin skal lúka øll altjóða krøv sum hondbólts- og flogbóltshøll.

Í ávikavist 2022 og 2023 vórðu 5 mió. kr. settar av til endamálið.

Í 2024 eru 10 mió. kr. játtaðar til endamálið og í 2025 verða settar 10 mió. kr. settar av, so tað samsvarar við politisku ætlanina um at veita stuðul til verkætlanina, sum, sambært sjálvsognarstovninum Føroya Arena, væntast at verða liðug í 2025.

Í sambandi við stuðulin er uppskot til heimildarlóg lagt fyri Løgtingið, ið fevnir um allan stuðulin frá landinum áljóðandi tilsamans 30 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | - | 5.000 | 5.000 | 10.000 | 10.000 | - |
| **01. Stórhøll í Hoyvík, løgustuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **5.000** | **5.000** | **10.000** | **10.000** | **-** |
| 55. Íløgustuðul o.a. | - | 5.000 | 5.000 | 10.000 | 10.000 | - |

### 12.24.6.17. Fótbóltshøll, løgustuðul (Stuðulsjáttan)

Í 2022 vóru játtaðar 5 mió. kr. sum stuðul til fótbóltshøll, ið er ein verkætlan, sum Fótbóltssamband Føroya fer at standa fyri.

Projekteringin av fótbóltshøllini er ikki gjørd, og støða er ikki tikin til nakra staðseting. Tí fyriliggur heldur eingin kostnaðarætlan fyri høllina. Tað verður Fótbóltssambandið, sum kemur at standa fyri

fyrireiking, projektering og bygging av høllini. Almanna- og mentamálaráðið veitir stuðulin og fer í tí sambandi at seta neyðugar treytir, ið skulu verða uppfyltar, áðrenn stuðul verður veittur.

Í 2024 er eingin játtan til endamálið.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | - | 5.000 | - | - | - | - |
| **01. Fótbóltshøll, løgustuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **5.000** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 55. Íløgustuðul o.a. | - | 5.000 | - | - | - | - |

## 12.24.6.18. Stuðul til at smíða kappróðrarbátar (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at stuðla smíð av føroyskum kappróðrarbátum og harvið menna okkara tjóðarítrótt. Hetta er liður í at uppraðfesta føroyska sermentan, har føroyski kappróðrarbáturin er nakað heilt serligt.

Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., við seinni broytingum. Stuðulin verður útgoldin árliga. Roknskapur verður latin Almanna- og mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| **01. Stuðul til at smíða kappróðrarbátar** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **100** | **100** | **100** | **100** | **100** | **100** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

# Samferðsla og samskifti

## 12.38.3. Samskifti

### 12.38.3.07. Kringvarpssendistøðir (Rakstrarjáttan)

Játtanin er ætlað til at rinda P/F Føroya Tele fyri at halda og reka kringvarpssendistøðir, ið varpa út sendingarnar hjá Kringvarpi Føroya.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 4.169 | 4.069 | 4.070 | 4.070 | 4.070 | 4.070 |
| Útreiðslur | 4.169 | 4.069 | 4.070 | 4.070 | 4.070 | 4.070 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 4.169 | 4.069 | 4.070 | 4.070 | 4.070 | 4.070 |
| **Útreiðslur** | **4.169** | **4.069** | **4.070** | **4.070** | **4.070** | **4.070** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 4.169 | 4.069 | 4.070 | 4.070 | 4.070 | 4.070 |

# § 14 Lógarmál

## Felagsútreiðslur

## 14.11.1. Fyrisiting

### 14.11.1.28. Løgmálaráðið (Rakstrarjáttan)

Løgmálaráðið er fyrisiting hjá landsstýrismanninum í lógarmálum, sum umsitur lógarmál, útlendingamál, integratiónsmál, matstovulóggávuna, rúsdrekkalóggávuna, persóns-, húsfólka- og arvarætt, kommunumál, val, fólkayvirlit, navnamál, útoyggjastuðul, persónsupplýsingarmál, tvingsil á sosiala økinum, tilbúgving, útjaðaramál, altjóðamenningarsamstarv og neyðhjálp, norðurlandamál, og ráðgevur øðrum landsstýrismonnum í lógartekniskum spurningum.

Høvuðsendamálið hjá Løgmálaráðnum er at veita landsstýrismanninum ráð, tryggja haldgott grundarlag og gera hugskot til veruleika á nevndu málsøkjum.

Virkisøkini hjá landsstýrismanninum eru skipað í stovnunum:

- Føroya Kærustovnur
- Vinnustovnurin (Útlendingastovan)
- Familjufyrisitingin
- Dátueftirlitið
- Rúsdrekkasøla landsins
- Arbeiðs- og brunaeftirlitið (samskipan í tilbúgvingarmálum)
- Umhvørvisstovan (landsfólkayvirlit, navnamál og vápnaskráseting)
- Einstøk øki eru skipað undir Umhvørvismálaráðnum og Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, t.d. norðurlandamál, altjóðamenningarsamstarv og neyðhjálp

Landsstýrismaðurin hevur heimildir mótvegis hesum partafeløgum: Ítróttarvedding Sp/f, Atlantic Airways P/f, Føroya Tele P/f, Postverk Føroya P/f og Vága Floghavn P/f.

**Lógarmál** fevna um lóggávu, sum er undir føroyskum málsræði og ríkislóggávu.

*Føroysk lóggáva*
Fevnir um revsilóggávuna, fíggjarrætt (m.a. keyp, avtalur, fyrning, skuldarbrøv, kekkar, brúkaraavtalur og produktábyrgd), lóg um alment innlit, fyrisitingarlóg, persónsupplýsingarlóg, innsavnan og burturlutan, lóggáva um eydnuspæl, lóg um Ítróttarvedding, finningargóðs, vápnalóg, eitur, lóg um endurgjald, ekspropriatión til serlig endamál, serstakar ásetanir um serliga tíðarrokning, brúkaravernd í sambandi við at keypa og selja fastogn, løgtingslóg um at keypa fastogn í Føroyum, endurgjald til brotsverkoffur, fjølmiðlaábyrgd, løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli, lóggávu kring uppboðssøluhaldarar, vaktarvirksemi, ikki vinnurekandi grunnar og feløg

*Ríkislóggáva*
Fevnir um rættargang og konkurslóggávu, brotsmálaumsorgan, heimarætt danska ríkisins, politi og ákærumyndugleika, pass, sakførarastarvssemi, og Hægstarætt danska ríkisins.

*Lógardygd*
Fevnir um at ráðgeva øðrum stjórnarráðum í lógartøkniligum spurningum, herundir at eftirkanna

lógaruppskot og kunngerðir. Til hetta arbeiðið eru rundskriv og leiðbeiningar, sum verða brúkt sum grundarlag fyri eftirkanningini. Eisini verða hildin skeið í lógarsmíð. Ársfrágreiðing um eftirkanning verður gjørd fyri hvørt løgtingsár.

*Logir.fo*
Portalurin www.logir.fo er ein tænasta til borgaran, vinnulív, stovnar og aðrar myndugleikar, har tað ber til umvegis alnótina skjótt at kunna seg um galdandi lóggávu í Føroyum.

*Kunngerðablaðið*
Í Kunngerðablaðnum skulu allar rættarreglur, sum skulu galda í Føroyum, lýsast, jb. løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 um alment kunngerðablað, við seinni broytingum. Føroysk lóggáva verður lýst í Kunngerðablaði A, meðan ríkislóggáva verður lýst í B-blaðnum. Síðani 1. januar 2013 er Kunngerðablaðið talgilt og sæst á Kunngerðaportalinum, www.kunngerdaportalur.fo.

**Útlendingamál og integratiónsmál**
*Útlendingamál* er ríkismál, og tað er danska Udlændingestyrelsen og Styrelsen for International Rekruttering og Integration, ið taka avgerðir um at veita útlendingum arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum. Í 2008 varð Útlendingastovan sett á stovn, og hon stendur fyri avgreiðsluni av málunum, sum verða send føroyskum myndugleikum til ummælis.

*Integrasjónsmál.* Tørvurin á væl skipaðari integratión er vaksin alsamt í tráð við, at talið av útlendingum í Føroyum økist, bæði í sambandi við familjusameingar, arbeiðsloyvi og ítróttarfólk, sum flyta til Føroya í ítróttarørindum. Integratión snýr seg um eina røð av átøkum, so sum málundirvísing, atgongd til arbeiðsmarknaðin, sosialar tænastur, ið krevja luttøku frá fleiri pørtum. Í november 2015 var ein integratiónssamskipari settur í starv á Útlendingastovuni, sum skal samskipa tey ymsu integratiónsátøkini.

**Tilbúgving**
*Tilbúgvingin* í Føroyum er skipað við løgtingslóg um tilbúgving. Tilbúgvingarlógin ásetur, at hvør landsstýrismaður skal, fyri sítt ábyrgdarøki, hava eina tilbúgving. Landsstýrismaðurin í lógarmálum hevur yvirskipaða eftirlitið við tilbúgvingarsamskipanini, sum er løgd til Arbeiðs- og brunaeftiritið, ið hevur ábyrgd av at samskipa tilrættisleggingina av tilbúgvingini og skal á tann hátt tryggja eina samvirkandi tilbúgving fyri alt landið.

**Játtanin**
Umframt lønarframskriving er framskrivað fyri størv, sum vórðu sett í august 2023, umframt at játtan til eitt hálvt starv er flutt úr Uttanríkis- og vinnumálaráðnum í Løgmálaráðið.

**Undirkonta 23. Ráð og nevndir**
Játtanin er til útreiðslur til Sterilisatiónsnevndina og gjald fyri umsiting av ogn hjá verjuleysum.

**Undirkonta 24. Navnanevndin**
Navnanevndin skal sambært løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanógv, við seinni broytingum, gera leiðbeinandi lista við fornøvnum og endurskoða hann javnan, geva ráð um fólkanøvn, stavseting, bending o.a. og taka avgerðir í málum, ið løgd verða fyri hana sambært § 2 í lógini.

**Átekning**
Landsstýrismanninum verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum høvuðskontuna og høvuðskontu 14.14.1.01. Ymsar útreiðslur.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 167 | 235 | 7.274 | 9.472 | 9.472 | 9.472 |
| Útreiðslur | 167 | 235 | 7.274 | 9.472 | 9.472 | 9.472 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | 7.127 | 9.325 | 9.325 | 9.325 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **7.127** | **9.325** | **9.325** | **9.325** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 6.031 | 8.031 | 8.031 | 8.031 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | 783 | 786 | 786 | 786 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | 113 | 133 | 133 | 133 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | - | 200 | 375 | 375 | 375 |
| **23. Ráð og nevndir** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 63 | 136 | 47 | 47 | 47 | 47 |
| **Útreiðslur** | **63** | **136** | **47** | **47** | **47** | **47** |
| 11. Lønir v.m. | 25 | 36 | 47 | 47 | 47 | 47 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 0 | 0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 38 | 100 | - | - | - | - |
| **24. Navnanevndin** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 103 | 99 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| **Útreiðslur** | **103** | **99** | **100** | **100** | **100** | **100** |
| 11. Lønir v.m. | 101 | 96 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2 | 2 | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | - | - | 7,7 | 10,5 | 10,5 | 10,5 |
| Fulltíðarstørv | - | - | 8,7 | 11,5 | 11,5 | 11,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | - | - | 6,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 |

# Uttanríkismál

## 14.13.3. Menningarsamstarv og neyðhjálp

### 14.13.3.03. Neyðhjálp og menningarsamstarv (Stuðulsjáttan)

Játtanirnar til Neyðhjálp og Menningarsamstarv eru lagdar í hvør sína undirkontu. Verður ikki øll játtanin nýtt á einari undirkontuni, kann avlopið verða nýtt sum stuðul á hinari undirkontuni.

**Undirkonta 01. Neyðhjálp**
Endamálið við játtanini er at veita neyðhjálp, m.a. til krígsherjað øki, og tá ið vanlukkur brádliga raka úti í heimi. Neyðhjálp kann verða latin sum peningaligur stuðul og sum virkin luttøka í neyðhjálpararbeiði. Partur av latna stuðlinum kann verða nýttur til útbúgving av delegatum. Hjálpin verður vanliga latin gjøgnum hjálparfelagsskapir og altjóða stjórnarfelagsskapir. Játtanin verður eisini nýtt at svara áheitanum frá felagsskapum og altjóða myndugleikum um t.d. at lata pening til at basa hungursneyð.

Felagsskapurin Mercy Ships kann søkja upp til 200 tús. kr. í stuðli av játtanini til Neyðhjálp.

Løgmálaráðið fær atgongd til upplýsingar um, hvussu peningurin er nýttur gjøgnum ársfrágreiðingar og roknskapir hjá felagsskapunum.

Játtanin fyri 2024 er hækkað 1 mió. kr.

**Undirkonta 02. Menningarsamstarv**
Endamálið við játtanini er at útinna løgtingslóg nr. 44 frá 14. mai 2007 um altjóða menningarsamstarv og kunngerð nr. 72 frá 25. juni 2008 um altjóða menningarsamstarv, hvørs endamál er at minka um búskaparliga ójavnan í heiminum við m.a. at vera við í sjálvberandi menningarsamstarvi.

Samstarvað verður við lokalar, millumtjóða og altjóða hjálparfelagsskapir. Landsstýrið hevur sum mál at skapa føroyingum og føroyska samfelagnum royndir, kunnleika og áhuga fyri altjóða menningarviðurskiftum. Tá ið til ber, eigur føroysk vitan og føroyskur serkunnleiki tí at verða gagnnýttur og mentur í sambandi við menningarverkætlanir, ið landsstýrið stuðlar.

Løgmálaráðið ger skrivliga avtalu við hvønn einstakan stuðulsmóttakara um frágreiðingar og roknskap. Harumframt ger Løgmálaráðið stakroyndir av verkætlanum, ið ráðið hevur stuðlað.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 9.027 | 11.951 | 15.500 | 16.500 | 17.000 | 17.500 |
| **01. Neyðhjálp** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **4.329** | **6.836** | **8.250** | **9.250** | **9.750** | **10.250** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 4.329 | 6.836 | 8.250 | 9.250 | 9.750 | 10.250 |
| **02. Menningarsamstarv** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **4.698** | **5.115** | **7.250** | **7.250** | **7.250** | **7.250** |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 3.958 | 4.181 | 7.250 | 7.250 | 7.250 | 7.250 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 740 | 934 | - | - | - | - |

# Lógarmál

## 14.14.1. Ymsar útreiðslur

### 14.14.1.01. Ymsar útreiðslur (Rakstrarjáttan)

**Undirkonta 20. Kunngerðarsavn og -blað**
Játtanin er til at reka, røkja og menna Kunngerðaportalin, har talgilda kunngerðablaðið verður givið út.

**Undirkonta 21. Lógarsavn**
Játtanin er til at reka, røkja og menna talgilda lógdátugrunnin, ið fevnir um alla lóggávu, sum er galdandi í Føroyum.

**Undirkonta 22. Dóms- og løgreglumál**
Í dóms- og løgreglumálum hevur landsstýrið higartil rindað fyri, at rættarskjøl verða týdd til danskt, tá ið mál verða skotin inn fyri hægri rætt, men sambært dagførdu rættargangslógini við gildiskomu 1. januar 2021 eru tað danskir myndugleikar, sum rinda fyri týðingina. Eingin játtan er til endamálið.

**Undirkonta 26. Rættarhjálp Føroya**
Játtanin er til at stuðla rakstrinum hjá Rættarhjálp Føroya.

**Undirkonta 27. Fjølmiðlanevndin**
Játtanin til Fjølmiðlanevndina varð í 2023 flutt frá Føroya Kærustovni til Løgmálaráðið. Fjølmiðlanevndin viðger kærur um brot á góðan fjølmiðlasið og rættin at svara aftur. Játtanin er til nevndarsamsýning og fundarpening umframt rakstur av Fjølmiðlanevndini.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 597 | 217 | 340 | 340 | 340 | 340 |
| Útreiðslur | 597 | 217 | 440 | 440 | 440 | 440 |
| Inntøkur | - | - | 100 | 100 | 100 | 100 |
| **20. Kunngerðarsavn og -blað** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 455 | 70 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| **Útreiðslur** | **455** | **70** | **150** | **150** | **150** | **150** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 55 | 70 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 400 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **50** | **50** | **50** | **50** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | - | *50* | *50* | *50* | *50* |
| **21. Lógarsavn** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 92 | 97 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| **Útreiðslur** | **92** | **97** | **150** | **150** | **150** | **150** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 20 | 97 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 72 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **50** | **50** | **50** | **50** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | - | *50* | *50* | *50* | *50* |

| 26. Rættarhjálp Føroya | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 50 | 50 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| **Útreiðslur** | **50** | **50** | **50** | **50** | **50** | **50** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 50 | 50 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| **27. Fjølmiðlanevndin** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | 90 | 90 | 90 | 90 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **90** | **90** | **90** | **90** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 90 | 90 | 90 | 90 |

## 14.14.1.03. Útreiðslur av vali (Rakstrarjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Løgtingið, við seinni broytingum, verður valnevndarlimum, valstýrislimum og hjálparfólki veitt samsýning úr landskassanum.

Bæði fólkatings- og løgtingsval vóru í 2022 og skulu vera aftur í seinasta lagi í ávíkavist november og desember 2026.

Útreiðslurnar til val vóru 1,9 mió. kr. í 2022 og verða um 30 tús. kr. í 2023. Settar eru 50 tús. kr. av til endamálið í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 47 | 1.940 | 50 | 50 | 50 | 2.000 |
| Útreiðslur | 47 | 1.940 | 50 | 50 | 50 | 2.000 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 47 | 1.940 | 50 | 50 | 50 | 2.000 |
| **Útreiðslur** | **47** | **1.940** | **50** | **50** | **50** | **2.000** |
| 11. Lønir v.m. | 0 | 1.267 | 50 | 50 | 50 | 2.000 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 47 | 673 | - | - | - | - |

## 14.14.1.04. Føroya kærustovnur (Rakstrarjáttan)

Tann 27. november 2021 varð løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn sett í gildi.

Lógin hevur við sær, at Kærustovnurin í tíðarskeiðinum frá 1. januar 2022 til 1. januar 2024 fer at vera í eini skiftistíð. Kærunevndir verða í hesum tíðarskeiðinum tiknar av, og virkisøkið teirra flutt til Kærustovnin.

Kærustovnurin fer frá at vera skrivstova hjá kærunevndum, ið viðgera avgerðir hjá almennum myndugleikum, til at vera ein sjálvstøðugur kærumyndugleiki fyri fyrisitingarligar avgerðir, tá ið tað er ásett í løgtingslóg ella við heimild í løgtingslóg. Harumframt fer Kærustovnurin at taka avgerðir í málum, tá ið tað er ásett í løgtingslóg.

Tann 1. januar 2022 vórðu tær fyrstu kærunevndirnar tiknar av. Talan er um Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndina og Kærunevndina hjá Studna.

Tann 1. juli 2022 vórðu næstu nevndirnar tiknar av. Talan er um Kærunevndina í lendismálum, Vinnukærunevndina og Skuldarumskipanarnevndina.

Tann 1. januar 2023 varð Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini tikin av og tann 1. juli 2023 vórðu Psykiatrisku sjúklingakærunevndin og Høvuðsbarnaverndarnevndin niðurlagdar.

Einasta nevndin, sum nú er eftir á Kærustovninum, er Tvingsilsnevndin. Hon verður niðurløgd 1. januar 2024.

Tá eru virkisøkini hjá øllum nevndum flutt til Kærustovnin.

Kærustovnurin viðger á **skatta- og avgjaldsøkinum** kærur um:

- Avgerðir hjá TAKS um skatt, toll og meirvirðisgjald
- Avgerðir hjá Akstovuni um skrásetingargjald á motorakførum

Á **almanna-, familju- og heilsumálaøkinum** viðger Kærustovnurin kærur um:

- Avgerðir hjá Almannaverkinum
- Avgerðir hjá Sjúkrahúsverkinum, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi
- Avgerðir hjá kommunustýrum um barna- og ungdómstannrøkt
- Avgerðir hjá Heilsutrygd og tilskotsnevndini eftir lóg um almenna heilsutrygd
- Avgerðir eftir barnaverndarlógini, sum ikki kunnu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina
- Avgerðir hjá kommunum eftir lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
- Ávísar avgerðir hjá Familjufyrisitingini

Á **lestrarstuðulsøkinum** viðger Kærustovnurin kærur um:

- Avgerðir hjá Studna eftir lóg um lestrarstuðul

Innan **lendismál** viðger Kærustovnurin kærur um:

- Avgerðir hjá kommununum eftir býarskipanarlógini ella byggisamtykt
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir tinglýsingarlógini og lóg um matrikulering og sundurbýti
- Avgerðir hjá kommunum eftir 1881-lógini um ognartøku
- Avgerðir eftir løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir, við seinni broytingum
- Avgerðir eftir lóg um bygging

Innan **vinnumál** viðger Kærustovnurin kærur um:

- Avgerðir hjá Akstovuni eftir lóg um ferðslu
- Avgerðir hjá Arbeiðseftirlitinum eftir lóg um arbeiðsumhvørvi
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni og eftir kunngerð um vápnaprógv
- Avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum eftir lóg um fjarskifti

- Avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eftir lóg um matvørur v.m., lóg um aling av fiski, lóg um djórasjúkur, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø.
- Avgerðir hjá Kappingarráðnum eftir lóg um kapping
- Avgerðir hjá Landsverki eftir lóg um landsvegir og lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál
- Avgerðir hjá Posteftirlitinum eftir lóg um postvirksemi
- Avgerðir hjá Skráseting Føroya eftir partafelagslógini, smápartafelagslógini, ársroknskaparlógini, lóg um ávís vinnurekandi virkir, lóg um vinnurekandi grunnar, lóg um vinnu og lóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir
- Avgerðir hjá Sjóvinnustýrinum eftir kunngerð um loðsprógv og loðsfrítøkuskjal
- Avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum eftir lóg um tryggingarvirksemi
- Harumframt viðger Kærustovnurin kærur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum

Innan **skuldarumskipanarmál** viðger Kærustovnurin umsóknir um umskipan av skuld, sum fólk hava til landskassan. Tað er bert niðanfyri nevnda skuld, sum er umfatað av lógini:

- Landsskattur og AM-gjald
- Meirvirðisgjald
- Tollur
- Lønarhæddaravgjald
- Framleiðsluavgjald
- Vinnulán og veðhald givin av landsstýrinum
- Lestrarlán frá Studna
- Rentuskuld og skuld frá øðrum útreiðslum, ið eru knýttar at høvuðsskuldini

Innan **psykiatrisk sjúklingamál** viðger Kærustovnurin kærur eftir anordning nr. 185 frá 13. mars 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang i psykiatrien, við seinni broytingum. Umframt at viðgera kærur, setir Kærustovnurin sjúklingaráðgevarar í starv og upplærir teir um galdandi rættarreglur og arbeiðsuppgávur innan økið. Tvingsilsinntrivini, kærast kann um, eru:

- Tvingsilsinnlegging
- Tvingsilsafturhald
- Afturføring
- Tvingsilsviðgerð
- Fastspenning
- Nýtslu av likamligum valdi
- Nýtslu av persónligum ávaringar- og peiliskipanum og serligum hurðalásum
- Verjufastspenning
- Persónliga vernd, ið uttan steðg varir meira enn 24 tímar
- Hurðalæsing á deildini
- Tvungna uppfylging eftir útskriving

Innan **barnaverndarmál** tekur Kærustovnurin avgerð í:

- Málum um umsorganaryvirtøku
- Málum um samverurætt
- Málum um familjuviðgerð á stovnum hjá landinum
- Málum um dag- og samdøgurstilboð á stovnum hjá landinum
- Málum, har samtykki ikki er fingið frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan

Kærustovnurin tekur somuleiðis avgerð um rætt til ókeypis umboðan í nevndu málum.

Innan **arbeiðsloysisskipanar- og barsilsskipanarmál** viðger Kærustovnurin kærur um avgerðir, sum TAKS tekur við heimild í lóg um barsilsskipan, og kærur um avgerðir, sum Arbeiðsloysisskipanin tekur við heimild í ALS-lógini.

Í hesum sambandi verða árliga fluttar 50 tús. kr. frá TAKS og 182 tús. kr. frá ALS til Kærustovnin.

**Tvingsilsnevndin** tekur bæði støðu til, um tilmæli um tvingsilsinntriv frá kommunum og Almannaverkinum kunnu góðkennast, samstundis sum nevndin eisini viðger kærur um framd tvingsilsinntriv og ávísar avgerðir hjá myndugleikunum.

Tvingsilsnevndin viðger tilmæli um

- Flyting uttan samtykki
- Ávaringar- og peilingarskipan
- Serliga upplatingarskipan til úthurð
- At halda persóni aftur og føra hann aftur
- At halda persóni føstum í sambandi við reinføri o.a.
- Nýtslu av hjálparráði
- At forða fyri atgongd til og eftirlit við nýtslu av interneti og telefon
- Kanning av býli og ognarlutum
- At leggja hald á ognarlutir
- At læsa býli um náttina

Harumframt hevur Kærustovnurin til uppgávu at føra yvirlit yvir avgerðir um goðkenning, móttiknar fráboðanir og frágreiðingar.

**Heimild**
Heimildargrundarlagið fyri nevndirnar og Føroya Kærustovn er:

- Løgtingslóg nr. 61 frá 2. mai 2022 um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi
- Løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, við seinni broytingum
- Løgtingslóg nr. 29 frá 8. apríl 2005 um umskipan av landsskatta-, mvg- og tollskuld v.m. hjá fólki
- Løgtingslóg nr. 110 frá 13. desember 2006 um kærunevnd í lendismálum, við seinni broytingum, og kunngerð nr. 3 frá 25. januar 2007 um kærunevnd í lendismálum
- Løgtingslóg nr. 17 frá 8. mai 2008 um Vinnukærunevnd
- Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008 um at broyta ymsar lógir undir Vinnumálaráðnum
- Anordning nr. 185 af 13. mars 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang i psykiatrien, við seinni broytingum
- Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, við seinni broytingum
- Fráboðanir dagfestar 11. apríl 2016
- Løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan, við seinni broytingum
- Kunngerð nr. 39 frá 14. juni 2004 um kærunevnd hjá barsilsskipanini
- Løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, við seinni broytingum
- Løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin
- Løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn.

**Ókeypis umboðan (Lógarbundin játtan)**
Um eitt barn verður sett heiman, og foreldramyndugleikin ella barnið, ið er fylt 15 ár, ikki hevur givið samtykki, hava foreldrini og barnið rætt til at verða umboðað ókeypis av advokati. Í málum, har samtykki er fingið, kann Kærustovnurin gera av, at foreldur og børn fáa ókeypis umboðan. Útreiðslurnar til advokatin ber landið.

Í sambandi við, at Kærustovnurin tekur støðu til, um foreldur og børn hava rætt til ókeypis umboðan, umsitur stovnurin játtanina á undirkontu 7.21.3.01.05. Advokatumboðan, sum er til ókeypis advokatumboðan. Talan er um lógarbundna játtan.

**Nýtt virksemi**
Við nýggju lógini um Kærustovnin er Kærustovnurin í einari broytingartíð, har nevndir, sum Kærustovnurin hevur verið skrivstova hjá, verða tiknar av, og virkisøki teirra verður flutt til Kærustovnin. Tað hevur við sær, at Kærustovnurin frameftir skal viðgera og taka avgerð í kærumálum, har heimildin fyrr hevur ligið hjá kærunevndunum, og at Kærustovnurin eisini skal taka avgerð í teimum málum, sum avgerðarnevndirnar hava havt heimild at viðgera.

So hvørt sum nevndirnar verða lagdar niður, minka útreiðslurnar til nevndarsamsýningar. Hinvegin koma útreiðslur til serkøn ístaðin, umframt øktar lønarútreiðslur til løgfrøðingar á stovninum.

Tann 1. januar 2024 kemur nýggja náttúruverndarlógin, løgtingslóg nr. 70 frá 22. mai 2023 í gildi. Samstundis verður virkisøkið hjá Kærustovninum víðkað, tí avgerðir sambært lógini kunnu kærast til Kærustovnin, jbr. § 35 í náttúruverndarlógini. Talan er um ógvuliga umfatandi og fjøltáttað øki og eisini púra nýtt og grundleggjandi øðrvísi øki í mun til virksemi annars hjá Kærustovninum.

Kærustovnurin gevur út ársfrágreiðing um virksemið í árinum og liggur á heimasíðuni www.fks.fo.

Umframt lønarframskriving verður játtanin hækkað 500 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 9.234 | 9.561 | 10.196 | 10.947 | 10.947 | 10.947 |
| Útreiðslur | 9.446 | 9.765 | 10.428 | 11.179 | 11.179 | 11.179 |
| Inntøkur | 212 | 204 | 232 | 232 | 232 | 232 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 9.234 | 9.561 | 10.196 | 10.947 | 10.947 | 10.947 |
| **Útreiðslur** | **9.446** | **9.765** | **10.428** | **11.179** | **11.179** | **11.179** |
| 11. Lønir v.m. | 7.879 | 7.957 | 9.015 | 9.766 | 9.766 | 9.766 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.084 | 1.186 | 937 | 937 | 937 | 937 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 114 | 218 | 104 | 104 | 104 | 104 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 369 | 404 | 372 | 372 | 372 | 372 |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | - | 0 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **212** | **204** | **232** | **232** | **232** | **232** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *150* | *150* | *182* | *182* | *182* | *182* |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *12* | *4* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *50* | *50* | *50* | *50* | *50* | *50* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 10,5 | 11,5 | 11,5 | 11,5 | 11,5 | 11,5 |
| Fulltíðarstørv | 11,5 | 12,5 | 12,5 | 12,5 | 12,5 | 12,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 7,9 | 8,0 | 9,0 | 9,8 | 9,8 | 9,8 |

## 14.14.1.07. Endurgjald til brotsverksoffur (Lógarbundin játtan)

Landið veitir endurgjald og rindar útreiðslur sambært anordning nr. 581 frá 23. juni 2008 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erstatning fra staten til ofre for forbrydelser, við seinni broytingum.

Sambært § 7 í lógini veitir landið ikki endurgjald, í tann mun skaðavaldari longu hevur veitt brotsverksoffri skaðaendurgjald, ella trygging ella onnur veiting tekur við. Landið gongur inn í kravið hjá brotsverksoffrinum mótvegis skaðavaldara, og landið kann tí seta aftursóknarkrav móti skaðavaldara.

Útreiðslurnar til endurgjald til brotsverksoffur hava seinastu árini verið millum 150 og 500 tús. kr. Brotsmenn verða kravdir eftir endurgjaldi, sum hevur við sær eina ávísa inntøku.

Útreiðslurnar vóru netto 240 tús. kr. í 2022. Higartil eru útreiðslurnar netto 6 tús. kr. í 2023. Játtanin fyri 2024 til ávikavist útreiðslur og inntøkur er 300 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 114 | 240 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **01. Endurgjald til brotsverksoffur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **324** | **215** | **300** | **300** | **300** | **300** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 324 | 215 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| **02. Innkrevjing av endurgjaldi frá brotsmonnum** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-210** | **26** | **-300** | **-300** | **-300** | **-300** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | -210 | 26 | -300 | -300 | -300 | -300 |

## 14.14.1.10. Útlendingastovan (Rakstrarjáttan)

### Undirkonta 20. Vanligt virksemi

Útlendingamál verða fyrisitin sambært anordning nr. 182 frá 22. mars 2001 om ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven, við seinni broytingum.

Uppgávurnar hjá Útlendingastovuni eru serliga at:

- Ummæla umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi og familjusameining
- Vegleiða og hjálpa útlendingum, viðvíkjandi føroyskum viðurskiftum

- Røkja ymisk arbeiði í samband við móttøku av ukrainum
- Samskipa og útvega ukrainum hóskandi bústaðir til langtíðarleigu

Útlendingastovan røkir uppgávuna at samskipa integratiónina av útlendingum, sum flyta til Føroyar. Útlendingastovan bjóðar eisini tilflytarum almenna vegleiðing og persónliga ráðgeving um integratiónsfremjandi tiltøk og arbeiðsmarknaðin.

Í 2019 varð samtykt ríkislógartilmæli um at flyta umsitingarheimildirnar fyri arbeiðs- og uppihaldsloyvi og familjusameining til Føroyar.

Í 2020 varð farið undir fyrireikingar at yvirtaka umsitingina av umsóknum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi og familjusameining. Arbeiðið er framvegis í gongd og miðað verður ímóti at arbeiðið er liðugt í 2024.

**Móttøka av ukrainum**
Í apríl 2022 varð Anordning frá 8. apríl 2022 um "Ikrafttræden for Færøerne af lov om imidlertidig opholdstilladelse til personer der er fordrevet fra Ukraine" sett í gildi í Føroyum.

Udlændingestyrelsen viðger umsóknir um fyribils uppihaldsloyvir og heldur tær útreiðslur ið eru í hesum sambandi.

Í sambandi við móttøku av fólki, ið søkja um uppihaldsloyvi eftir serlógini, skal Útlendingastovan halda ávísar útreiðslur, ið verða endurrindaðar av danska Udlændingestyrelsen. Hetta eru teir fyrstu dagarnir í Føroyum og fram til 4 gerandisdagar eftir at ukrainin hevur fingið sítt fyribils uppihaldsloyvi.

*Umsóknartíðarskeiðið*
Tá ein persónur søkir um fyribils uppihaldsloyvi, og til viðkomandi hevur fingið játtað ella noktað uppihaldsloyvi, er viðkomandi fevndur av skipan ájavnt við flóttafólk í útlendingalógini. Í umsóknarskeiðinum hevur umsøkjari rætt til hóskandi bústað, grundleggjandi heilsutænastur, heilsukanning og neyðuga viðgerð, sum ikki kann bíða, mat, klæði og aðrar neyðugar uppihaldsveitingar. Landsstýrið hevur avtalað við avvarðandi donsku myndugleikar, at Útlendingastovan vegna donsku stjórnina røkir hesa uppgávuna og heldur útreiðslur í fyrsta liði, og at Udlændingestyrelsen endurrindar Útlendingastovuni útreiðslurnar. Útlendingastovan hevur tískil tørv á eini fíggjarligari heimild at halda útreiðslur í umsóknartíðarskeiðinum, ið síðan verða endurrindaðar av Udlændingestyrelsen.

*Skipan við móttøkuhúsi*
Móttøkuhús er skipað og Útlendingastovan samstarvar við Reyða Kross um raksturin av móttøkuhúsinum. Tað almenna rindar ikki fyri býli hjá teimum, ið verða hýst privat. Útreiðslurnar til móttøkuhúsið fevna millum annað um leigu av hóskandi hølum, starvsfólk til húsið og aktivering v.m. av umsøkjarum, kostnað av heilsutænastum v.m., mat, klæði og aðrar uppihaldsveitingar. Umsøkjarar hava harumframt rætt til lummapengar í umsóknarstíðarskeiðinum, soleiðis at tey kunnu keypa mat og aðrar tørvslutir og í avmarkaðan mun virka í samfelagnum. Útlendingastovan hevur ábyrgd av at rinda fólkunum lummapengar. Mett er um útreiðslurnar í umsóknartíðarskeiðinum. Metingin er heft við fleiri óvissum t.d. vita vit ikki, hvussu nógv fara at søkja um fyribils uppihaldsloyvi, vit vita ikki, hvønn aldur umsøkjararnir hava, hvussu umsøkjararnir eru fyri, um umsøkjarar hava tørv á heilsuviðgerð v.m. Henda játtan verður á serstakari undirkontu hjá Útlendingastovuni.

*Økt arbeiðsbyrða hjá Útlendingastovuni*
Útlendingastovan hevur fingið ein stóran leiklut í mun til at ráðgeva ymiskum pørtum, og tí hevur

verið neyðugt at tillaga starvsfólkaorkuna til umsiting av nýggjum uppgávum samstundis sum tær vanligu arbeiðsuppgávurnar skulu røkjast.

*Tulkar, kunningartilfar o.a.*
Tørvur verður á at brúka tulkatænastu til tey, sum ikki duga at samskifta á enskum ella øðrum máli, ið Útlendingastovan vanliga brúkar. Tulkur skal m.a. brúkast til integratiónssamrøður o.tíl., felags kunnandi fundir ella skeið og annars eftir tørvi. Útlendingastovan kann bíleggja telefontulking frá útlendskum veitara. Til kunnandi fundir o.a. verður helst tørvur á tulki á staðnum, og tá kann Útlendingastovan keypa tænastu frá ukrainum í Føroyum.

*Samstarv við felagsskapir og privatpersónar*
Í sambandi við at tryggja smidliga yvirgongd frá móttøkuskipanini og út í samfelagið, og til tess at stuðla undir væleydnaða integratión, verður samstarv við áhugafelagsskapir og serfrøðingar innan økið sera týðandi. Reyði Krossur er ein týðandi viðspælari í tilgongdini. Landið endurrindar Reyða Krossi útreiðslunar í tann mun, hetta virksemið liggur uttanfyri vanligu uppgávurnar hjá felagsskapinum. Eisini fær Útlendingastovan ein stóran leiklut í sambandi við arbeiði við ymiskum integratiónsfremjandi tiltøkum og átøkum.

Útlendingastovan hevur eisini fingið fleiri uppgávur í sambandi við arbeiðið at samskipa og útvega ukrainum hóskandi bústaðir til langtíðarleigu.

Í nógvum førum hevur verið torført hjá Útlendingastovuni at finna ukrainum hóskandi bústað til langtíðarleigu, tí bústaðirnir t.d. eru ov fáir ella ov dýrir. Tí hevur verið neyðugt hjá Útlendingastovuni at finna aðrar loysnir. T.d. hevur Útlendingastovan leigað eini ávegishús, sum ukrainar kunnu búgva í til Útlendingastovan ella tey sjálvi finna ein bústað til langtíðarleigu. Tað kann eisini gerast neyðugt at leiga aðrar ella fleiri fyribils bústaðir.

Eisini kann verða neyðugt at keypa tænastur og veitingar frá serfrøðingum, t.d. skeiðsfyriskipan, førleikamenning v.m.

**Undirkonta 21. Útlegg fyri tænastur til flóttafólk**
Í sambandi við móttøku av fólki, ið søkja um uppihaldsloyvi eftir serlógini, skal Útlendingastovan halda ávísar útreiðslur, ið verða endurrindaðar av danska Udlændingestyrelsen. Í 2022 vóru útleggini umleið 2,2 mió. kr. Higartil eru útleggini út við 1,1 mió. kr. í 2023. Játtanin fyri 2024 til ávikavist útreiðslur og inntøkur er 1,1 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 7.153 | 6.465 | 8.431 | 8.618 | 8.618 | 8.618 |
| Útreiðslur | 7.608 | 8.749 | 9.950 | 10.137 | 10.137 | 10.137 |
| Inntøkur | 455 | 2.284 | 1.519 | 1.519 | 1.519 | 1.519 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 7.153 | 6.465 | 8.431 | 8.618 | 8.618 | 8.618 |
| **Útreiðslur** | **7.608** | **6.565** | **8.831** | **9.018** | **9.018** | **9.018** |
| 11. Lønir v.m. | 4.761 | 4.858 | 6.730 | 6.917 | 6.917 | 6.917 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 845 | 1.196 | 1.676 | 1.676 | 1.676 | 1.676 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 231 | 129 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.397 | 341 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 373 | 41 | 25 | 25 | 25 | 25 |
| **Inntøkur** | **455** | **100** | **400** | **400** | **400** | **400** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *91* | *94* | - | - | - | - |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | - | *6* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *364* | - | *400* | *400* | *400* | *400* |
| **21. Útlegg fyri tænastur til flóttafólk** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **-** | **2.184** | **1.119** | **1.119** | **1.119** | **1.119** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 396 | 396 | 396 | 396 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | 1.674 | 353 | 353 | 353 | 353 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | 294 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | - | 171 | 139 | 139 | 139 | 139 |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | - | 231 | 231 | 231 | 231 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 45 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **2.184** | **1.119** | **1.119** | **1.119** | **1.119** |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | - | *2.184* | *1.119* | *1.119* | *1.119* | *1.119* |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 10,0 | 10,0 | 11,0 | 11,0 | 11,0 | 11,0 |
| Fulltíðarstørv | 10,0 | 10,0 | 11,0 | 11,0 | 11,0 | 11,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 4,8 | 4,9 | 6,7 | 6,9 | 6,9 | 6,9 |

## 14.14.1.13. Familjufyrisitingin (Rakstrarjáttan)

Familjufyrisitingin umsitur ymiskar uppgávur í sambandi við húsfólka- og persónsrættin og varð sett á stovn, tá ið málsøkini persóns-, húsfólka- og arvarættur komu á føroyskar hendur á ólavsøku 2018.

Húsfólka- og persónsrætturin snýr seg í høvuðsheitinum um verjumál, framtíðarfulltrú, hjúnalag, hjúnaskilnað, ættleiðing, og um rættarstøðuna hjá børnum, m.a. í sambandi við faðir- ella

sammóðurskap, uppihaldskyldu, foreldramyndugleika, samveru- og bústað og ókeypis umboðan í tí sambandi.

Umframt veitir Familjufyrisitingin einstaklingaráðgeving til børn og foreldur, barnabólkar, mekling og foreldrasamstarvsskeið.

Starvsfólkini á Familjufyrisitingini eru løgfrøðingar, skrivstovufulltrúar, sosialráðgevi, sálarfrøðingur og sociologur. Harafturat er sakførari og løgfrøðingur tilnevndir fastir verjar hjá Familjufyrisitingini.

Umframt lønarframskriving og aðrar framskrivingar er játtanin í 2023 hækkað 1.550 tús. kr. og í 2024 við øðrum 300 tús. kr. í sambandi við, at Løgtingið hevur samtykt løgtingslóg nr. 87  frá 16. mai 2022 um foreldramyndugleika og samveru. Umsitingin av lógini krevur økta starvsfólkaorku, umframt útreiðslur til tillaging í KT-skipanum og til at framleiða og tillaga oyðubløð og vegleiðingar.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 7.470 | 8.062 | 10.342 | 10.891 | 10.891 | 10.891 |
| Útreiðslur | 7.497 | 8.062 | 10.342 | 10.891 | 10.891 | 10.891 |
| Inntøkur | 27 | 0 | - | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 7.470 | 8.062 | 10.342 | 10.891 | 10.891 | 10.891 |
| **Útreiðslur** | **7.497** | **8.062** | **10.342** | **10.891** | **10.891** | **10.891** |
| 11. Lønir v.m. | 5.563 | 6.042 | 8.952 | 9.501 | 9.501 | 9.501 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.219 | 1.122 | 870 | 870 | 870 | 870 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 321 | 256 | 70 | 70 | 70 | 70 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 394 | 501 | 450 | 450 | 450 | 450 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1 | 141 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **27** | **0** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *27* | *0* | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 6,0 | 8,0 | 9,9 | 10,5 | 10,5 | 10,5 |
| Fulltíðarstørv | 7,0 | 9,0 | 10,9 | 11,5 | 11,5 | 11,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 5,6 | 6,0 | 9,0 | 9,5 | 9,5 | 9,5 |

## 14.14.1.14. Advokatumboðan (Lógarbundin játtan)

Sambært løgtingslóg nr. 87 frá 16. mai 2022 um foreldramyndugleika og samveru fáa foreldur, ið eru partur í málum um bústaðin hjá barninum, rætt til ókeypis umboðan. Familjufyrisitingin skal viðgera umsóknir um ókeypis umboðan, ið skulu lúka treytirnar í kapittul 41 í rættargangslógini fyri Føroyar.

Útreiðslurnar av advokatumboðan eru higartil 12 tús. kr. í 2023. Roknað verður við 320 tús. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | - | 320 | 320 | 320 | 320 |
| **02. Advokatumboðan, foreldramyndugleiki** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **320** | **320** | **320** | **320** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | - | 320 | 320 | 320 | 320 |

### 14.14.1.15. Stuðul til feløg (Stuðulsjáttan)

### Undirkonta 01. Pro Vita

Stuðulin verður latin til Føroya Pro Vita, sum er felagsskapur, sum virkar fyri at verja barnið í móðurlívi. Pro Vita vegleiðir og stuðlar teimum kvinnum, sum eru komnar í trongstøðu, tí tær eru vorðnar við barn. Stuðulin verður útgoldin einaferð um árið. Fyri at fáa stuðulin skal Føroya Pro Vita lata Løgmáláráðnum ársroknskap fyri undanfarna roknskaparár og fíggjarætlan fyri inniverandi ár fyri 1. apríl.

Játtanin er í 2024 flutt frá høvuðskontu 11.20.1.08. Stuðul til feløg.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | - | - | 300 | 300 | 300 |
| **01. Pro Vita** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **-** | **300** | **300** | **300** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | - | - | 300 | 300 | 300 |

## 14.14.2. Skráseting og eftirlit

### 14.14.2.02. Dátueftirlitið (Rakstrarjáttan)

Nýggj dátuverndarlóg, løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum, kom í gildi 1. januar 2021.

Dátueftirlitið umsitur dátuverndarlógina, og sambært § 68 í lógini eru uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum m.a. hesar:

- Av sínum eintingum ella eftir klagu frá skrásetta ansa eftir, at viðgerð av persónupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum eru ásettar sambært lógini
- Styrkja almenna kunnleikan til dátuvernd
- Ráðgeva landsstýrinum og øðrum stovnum o.a. um lóggávu og umsitingarlig tiltøk dátuvernd til frama
- Styrkja kunnleikan hjá dátuábyrgdarum og dátuviðgerum um teirra skyldur sambært lógini
- Gera kanningar, har persónupplýsingar verða viðgjørdar
- Fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónupplýsingum her á landi og uttanlands
- Gera eina ársfrágreiðing, sum skal almannakunngerast

Dátueftirlitið er sett saman av Dáturáði og avgreiðsluskrivstovu. Dáturáðið tekur avgerð í prinsipiellum málum og málum av almennum týdningi. Avgreiðsluskrivstovan fyrireikar mál at leggja fyri Dáturáðið.

Dátuverndarlógin er grundað á ES-fyriskipanina GDPR og hevur við sær eina nýggja skipan innan dátuverndarrætt í Føroyum. Av tí sama verður arbeiðsbyrðan hjá Dátueftirlitinum alsamt størri.

Dátueftirlitið skal framhaldandi fremja regluligar eftirlitsvitjanir á privatum virkjum og almennum stovnum. Stovnurin skal harumframt leggja stóran dent á tann partin av arbeiðinum, sum er fyribyrgjandi, vegleiðandi og kunnandi. Í hesum sambandi ger Dátueftirlitið tilfar og skipar fyri ymiskum átøkum.

Til og við 2018 hevði játtanin hjá Dátueftirlitinum verið óbroytt í eini 10 ár. Nógv er broytt hesi árini, har alt fleiri øki verða elektronisk og talgild. Nýggja dátuverndarlógin og økti áhugin fyri og tørvurin á dátuvernd økir alsamt um arbeiðstrýstið hjá Dátueftirlitinum.

Starvsfólkaorkan hjá Dátueftirlitinum varð tí styrkt við trimum ársverkum yvir 4 ár frá 2019 til 2022.

Dátueftirlitið flytir 1. november 2023 úr Tórshavn inn á Skálafjørðin. Í tí sambandi er játtanin fyri 2023 hækkað 140 tús. kr. og í 2024 við øðrum 470 tús. kr. umframt lønarframskriving. Av teimum eru 300 tús. kr. til varandi hægri útreiðslur til húsaleigu.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 3.604 | 4.054 | 4.441 | 5.011 | 4.721 | 4.721 |
| Útreiðslur | 3.604 | 4.059 | 4.441 | 5.011 | 4.721 | 4.721 |
| Inntøkur | - | 4 | - | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 3.604 | 4.054 | 4.441 | 5.011 | 4.721 | 4.721 |
| **Útreiðslur** | **3.604** | **4.059** | **4.441** | **5.011** | **4.721** | **4.721** |
| 11. Lønir v.m. | 3.019 | 3.277 | 3.841 | 4.021 | 3.941 | 3.941 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 336 | 531 | 360 | 360 | 310 | 310 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 216 | 145 | 160 | 220 | 60 | 60 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 15 | 98 | 80 | 410 | 410 | 410 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 18 | 8 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **4** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | *4* | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 4,2 | 4,8 | 4,8 | 4,8 | 4,8 | 4,8 |
| Fulltíðarstørv | 5,2 | 5,8 | 5,8 | 5,8 | 5,8 | 5,8 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 3,0 | 3,3 | 3,8 | 4,0 | 3,9 | 3,9 |

# Tilbúgving

## 14.31.1. Tilbúgving

### 14.31.1.05. Stuðul til bjargingarfeløg (Stuðulsjáttan)

Stuðulin til bjargingarfeløgini í Føroyum hevur verið býttur millum og útgoldin frammanundan til feløgini við teirri treyt, at tey føra roknskap/uppgerð yvir virksemið. Sambært reglugerð fyri fíggjarjáttan til bjargingarfeløg verður partur av stuðlinum latin sum rakstrarstuðul, men størsti parturin av stuðulinum verður latin sum verkætlanarstuðul til dagføring av hølum og til keyp og dagføring av bjargingarútgerð, ið verður brúkt til virksemið hjá bjargingarfeløgunum bæði á sjógvi og á landi.

Áðrenn 2018 var játtanin til bjargingarfeløgini tvíbýtt, har ein serskilt játtan var til keyp og viðlíkahald av bjargingarbátum. Hendan skipan varð mett at vera ov stirvin, og tí varð farið yvir til eina heildarjáttan til alt virksemið hjá bjargingarfeløgunum, bæði á sjógvi og á landi.

Bjargingarfeløgini kring landið, ið liva upp til treytirnar at fáa stuðul, eru 9 í tali. Harafturat verður veittur stuðul til Landsfelagið fyri bjargingarfeløgini.

Játtanin er í 2024 frá frá fiskivinnu- og samferðslumálum, 5.31.1.05. Stuðul til bjargingarfeløg.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 4.200 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| **01. Stuðul til bjargingarfeløg** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **4.200** | **4.000** | **4.000** | **4.000** | **4.000** | **4.000** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 4.200 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |

# Handil og vinna annars

## 14.37.1. Ymsar útreiðslur

### 14.37.1.08. Loyvisnevndin (Rakstrarjáttan)

Loyvisnevndin umsitur skeinkiloyvi til rúsdrekka o.a. Játtanin er til at fíggja umsitingina av málsøkinum. Loyvisnevndin virkar sambært løgtingslóg nr. 183 frá 21. desember 2018 um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi, við seinni broytingum. Virksemið hjá Loyvisnevndini er skipað í kunngerð nr. 3 frá 13. januar 2020 um skeinkiloyvi, hissiniloyvi og virksemi Loyvisnevnarinnar.

Inntøkurnar frá loyvisgjøldum eru undir § 20 Inntøkur, høvuðskonta 20.52.3.10. Aðrar inntøkur.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 186 | 186 | 186 | 186 | 186 | 186 |
| Útreiðslur | 186 | 186 | 186 | 186 | 186 | 186 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 186 | 186 | 186 | 186 | 186 | 186 |
| **Útreiðslur** | **186** | **186** | **186** | **186** | **186** | **186** |
| 11. Lønir v.m. | 91 | 91 | 175 | 175 | 175 | 175 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 95 | 94 | 11 | 11 | 11 | 11 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | 2 | - | - | - | - |

## 14.37.2. Ymiskur studningur

### 14.37.2.19. Stuðul til útoyggjamenning (Stuðulsjáttan)

Játtanin er ætlað til at stuðla tiltøkum í útoyggjum, sum eru mennandi fyri útoyggjarnar. Stuðul verður veittur sambært reglugerð fyri veiting av stuðulsjáttan til útoyggjamenning. Reglugerðin er á heimasíðuni hjá Løgmálaráðnum.

Umsóknir skulu innihalda upplýsingar um endamál og lýsing av verkætlanini, kostnaðarmeting og fíggjarætlan.

Stuðulin verður útgoldin so hvørt sambært rokning, fyribils verkætlanarroknskapi ella endaligum roknskapi. Roknskapur verður latin aðalráðnum, saman við frágreiðing um úrslitið av verkætlanini, tá ið verkætlanin er liðug ella í seinasta lagi 20. februar eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.003 | 900 | 1.100 | 1.100 | 1.100 | 1.100 |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.003** | **900** | **1.100** | **1.100** | **1.100** | **1.100** |
| 53. Stuðul til vinnu | 1.045 | 870 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | -42 | 30 | 1.100 | 1.100 | 1.100 | 1.100 |

# 14.37.3. Alment riknar fyritøkur

## 14.37.3.01. Rúsdrekkasøla landsins (Rakstrarjáttan)

Rúsdrekkasøla landsins virkar sambært løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka, við seinni broytingum, og kunngerð nr. 144 frá 20. oktober 1992 um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu landsins, við seinni broytingum.

Rúsdrekkasøla landsins hevur 8 sølubúðir kring landið.

Rúsdrekkasøla landsins virkar eisini sum skrivstova hjá Loyvisnevndini.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | -19.980 | -19.917 | -18.600 | -18.600 | -18.600 | -18.600 |
| Útreiðslur | 139.846 | 136.710 | 135.050 | 135.050 | 135.050 | 135.050 |
| Inntøkur | 159.826 | 156.627 | 153.650 | 153.650 | 153.650 | 153.650 |
| **20. Landsfyritøka** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -19.980 | -19.917 | -18.600 | -18.600 | -18.600 | -18.600 |
| **Útreiðslur** | **139.846** | **136.710** | **135.050** | **135.050** | **135.050** | **135.050** |
| 11. Lønir v.m. | 16.604 | 16.210 | 17.450 | 17.450 | 17.450 | 17.450 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 118.807 | 116.633 | 112.000 | 112.000 | 112.000 | 112.000 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 1.244 | 833 | 2.180 | 2.180 | 2.180 | 2.180 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 3.178 | 3.125 | 3.320 | 3.320 | 3.320 | 3.320 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 13 | -100 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | - | 8 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **159.826** | **156.627** | **153.650** | **153.650** | **153.650** | **153.650** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *159.792* | *156.556* | *153.500* | *153.500* | *153.500* | *153.500* |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | *58* | *71* | *150* | *150* | *150* | *150* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *-24* | - | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Landsfyritøka**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 36,0 | 36,0 | 36,0 | 36,0 | 36,0 | 36,0 |
| Fulltíðarstørv | 37,0 | 37,0 | 37,0 | 37,0 | 37,0 | 37,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 16,6 | 16,2 | 17,5 | 17,5 | 17,5 | 17,5 |

# § 18 Umhvørvismál

## Felagsútreiðslur

## 18.11.1. Fyrisiting

### 18.11.1.65. Umhvørvismálaráðið (Rakstrarjáttan)

Umhvørvismálaráðið er fyrisiting hjá landsstýriskvinnuni í umhvørvismálum. Umhvørvismálaráðið umsitur umhvørvismál, náttúrumál, veðurlagsmál, orkumál, elveitingarmál, matrikulering, útskifting, sundurbýti, kort- og landmáting, bústaðarmál og arbeiðsmarknaðarmál.

Uppgávur ráðsins mótvegis landsstýriskvinnuni eru m.a. at:

- Ráðgeva
- Málsviðgera
- Fyrireika lógaruppskot, kunngerðir og reglugerðir
- Samskipa
- Fremja stovnseftirlit

Umhvørvismálaráðið arbeiðir harumframt áhaldandi við at halda altjóða skyldur um at tálma og avmarka veðurlagsbroytingar og at gera ætlanir fyri at tryggja náttúrumargfeldi. Hetta eitt nú við náttúru- og umhvørvisvernd, orkusparing og at flutt verður frá oljunýtslu til varandi orkukeldur.

Umframt lønarframskriving er framskrivað fyri tvey størv, sum vórðu sett á sumri 2023, fyri fult ár. Eisini eru 800 tús. kr. settar av til eitt fulltrúastarv at umsita nýggju náttúrverndarlógina, umframt at eyka orkan skal nýtast á arbeiðsmarknaðarøkinum, har stórur tørvur er á at dagføra løggávuna.

**Undirkonta 21. Leigunevndin**
Leigunevndin tekur avgerð í ávísum trætumálum millum leigara og útleigara. Í leigunevndini eru tríggir limir og tríggir varalimir. Nevndarlimirnir skulu hava kunnleika um leiguvirksemi, byggifrøði, búskaparfrøði og viðurskifti hjá brúkarum. Formaðurin í leigunevndini skal vera løgfrøðingur. Leigunevndin hevur umsiting at fyrireika mál til støðutakan hjá leigunevndini og at avgreiða fyrispurningar um rættindi og skyldur sambært leigulógini.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 433 | 436 | 8.484 | 10.184 | 10.184 | 10.184 |
| Útreiðslur | 433 | 436 | 8.484 | 10.184 | 10.184 | 10.184 |
| Inntøkur | - | - | - | - | - | - |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | 7.956 | 9.641 | 9.641 | 9.641 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **7.956** | **9.641** | **9.641** | **9.641** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 6.665 | 8.350 | 8.350 | 8.350 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | 1.042 | 1.042 | 1.042 | 1.042 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | 149 | 149 | 149 | 149 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | - | 100 | 100 | 100 | 100 |

**21. Leigunevndin**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 433 | 436 | 528 | 543 | 543 | 543 |
| **Útreiðslur** | **433** | **436** | **528** | **543** | **543** | **543** |
| 11. Lønir v.m. | 424 | 420 | 528 | 543 | 543 | 543 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 9 | 16 | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Onnur | - | - | 8,2 | 9,2 | 9,2 | 9,2 |
| Fulltíðarstørv | - | - | 10,2 | 11,2 | 11,2 | 11,2 |
| Lønarpartur (mio kr.) | - | - | 6,7 | 8,4 | 8,4 | 8,4 |

**Starvsfólkayvirlit: 21 Leigunevndin**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | - | - | 0,6 | 0,6 | 0,6 | 0,6 |
| Fulltíðarstørv | - | - | 0,6 | 0,6 | 0,6 | 0,6 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 0,4 | 0,4 | 0,5 | 0,5 | 0,5 | 0,5 |

# Almannamál

## 18.21.1. Fyrisiting

### 18.21.1.13. Vanlukkutryggingarráðið (Rakstrarjáttan)

Vanlukkutryggingarráðið tekur avgerðir í málum um arbeiðsskaðar og vinnusjúkur sambært løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, við seinni broytingum. Umsitingin verður fíggjað við gjaldi sambært kunngerð nr. 80 frá 17. juni 2010 um gjald fyri raksturin av Vanlukkutryggingarráðnum. Tryggingarfeløgini, sum tekna arbeiðsskaðatryggingar, bera kostnaðin fyri raksturin av ráðnum.

Í Vanlukkutryggingarráðnum eru 5 nevndarlimir. Dómari frá Føroya rætti er formaður. Hinar 4 limirnar velur landsstýriskvinnan; ein teirra skal vera útbúgvin lækni. Limirnir verða valdir fyri 4 ár í senn.

Útreiðslurnar av vanlukkutryggingarráðnum vóru brutto 1,3 mió. kr. í 2022. Higartil eru útreiðslurnar brutto 406 tús. kr. Játtanin fyri 2024 til ávikavist útreiðslur og inntøkur er 2,6 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | -0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Útreiðslur | 1.522 | 1.296 | 1.543 | 2.643 | 2.643 | 2.643 |
| Inntøkur | 1.522 | 1.296 | 1.543 | 2.643 | 2.643 | 2.643 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **1.522** | **1.296** | **1.543** | **2.643** | **2.643** | **2.643** |
| 11. Lønir v.m. | 1.347 | 1.320 | 1.400 | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 174 | -24 | 143 | 143 | 143 | 143 |
| **Inntøkur** | **1.522** | **1.296** | **1.543** | **2.643** | **2.643** | **2.643** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *6* | *4* | *43* | *43* | *43* | *43* |
| 64. Aðrar flytingarinntøkur | *1.257* | *1.095* | *1.300* | *2.400* | *2.400* | *2.400* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *188* | *154* | *200* | *200* | *200* | *200* |
| 77. Flyting frá kommunum | *71* | *43* | - | - | - | - |

### 18.21.1.15. Umsiting av Vinnusjúkugrunninum (Rakstrarjáttan)

Vinnusjúkugrunnurin hevur til endamáls at fíggja og rinda endurgjald fyri vinnusjúkur. Grunnurin er settur á stovn sambært arbeiðsskaðatryggingarlóg, sí §§ 78-82 í løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða, við seinni broytingum.

Grunnurin verður fíggjaður við inngjøldum frá arbeiðsgevarum; gjaldið er 0,1% av útgoldnum A-inntøkum.

Umsitingin hjá Vinnusjúkugrunninum er sambært avtalu løgd til TAKS.

Vinnusjúkugrunnurin endurrindar landinum kostnaðin av umsitingini av Vinnusjúkugrunninum.

Útreiðslurnar av umsitingini av Vinnusjúkugrunninum vóru brutto 615 tús. kr. í 2022. Higartil eru útreiðslurnar brutto 350 tús. kr. Játtanin fyri 2024 til ávikavist útreiðslur og inntøkur er 950 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Útreiðslur | 700 | 615 | 950 | 950 | 950 | 950 |
| Inntøkur | 700 | 615 | 950 | 950 | 950 | 950 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **700** | **615** | **950** | **950** | **950** | **950** |
| 11. Lønir v.m. | 21 | 26 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 155 | 109 | 200 | 200 | 200 | 200 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 525 | 480 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| **Inntøkur** | **700** | **615** | **950** | **950** | **950** | **950** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *700* | *615* | *950* | *950* | *950* | *950* |

# Umhvørvi

## 18.30.1. Umhvørvi

### 18.30.1.01. Stuðul til umhvørvisverndartiltøk (Stuðulsjáttan)

Játtanin er ætlað til at stuðla umhvørvisverndartiltøkum, sum:

- Menna vitanina um umhvørvið og náttúruna
- Virka dálkingarfyribyrgjandi og -avmarkandi
- Verja landsløg, djóra- og plantusløg
- Kunna almenningin um umhvørvis- og nátturuviðurskifti
- Stuðla undir orkusparandi tiltøk

Stuðulin verður veittur sambært reglugerð frá 26. februar 2021 fyri stuðul til umhvørvisverndartiltøk. Umbønir um stuðul skulu innihalda upplýsingar um endamál og lýsing av verkætlanini, kostnaðarmeting og fíggjarætlan.

Stuðulin verður útgoldin sambært rokning, fyribils verkætlanarroknskapi ella endaligum roknskapi. Roknskapur skal latast Umhvørvismáláráðnum saman við frágreiðing um úrslitið av verkætlanini, tá ið verkætlanin er liðug ella í seinasta lagi 20. februar eftir lokið fíggjarár.

Seinastu árini hevur játtanin í stóran mun verið nýtt til at fíggja virksemi, knýtt at skyldum sambært RAMSAR. Játtanin hækkaði 550 tús. kr. í 2023, soleiðis at umframt RAMSAR skyldurnar kunnu onnur umhvørvisverkndartiltøk fáa stuðul sambært upprunaliga endamálinum við játtanini.

Stuðulin til umhvørvisverndartiltøk var netto 223 tús. kr. í 2022. Higartil er onki goldið út í 2023. Roknað verður við 900 tús. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 286 | 273 | 900 | 900 | 900 | 900 |
| Inntøkur | - | 50 | - | - | - | - |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **286** | **273** | **900** | **900** | **900** | **900** |
| 53. Stuðul til vinnu | 88 | 135 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 25 | - | 900 | 900 | 900 | 900 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 173 | 138 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **-** | **50** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 64. Aðrar flytingarinntøkur | - | *50* | - | - | - | - |

### 18.30.1.07. Náttúrufriðingarnevndir (Rakstrarjáttan)

Náttúrufriðingarnevndirnar, herímillum eisini Yvirfriðingarnevndin, eru settar sambært løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing, við seinni broytingum, og skulu eftir lógini geva loyvi til at byggja uttangarðs, undir ávísum umstøðum innangarðs, at taka mold burtur og til vegagerð o.a. Játtanin er ætlað til lønir, samsýningar, ferða- og dagpening o.a. í sambandi við arbeiðið í nevndunum.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 495 | 422 | 463 | 475 | 475 | 475 |
| Útreiðslur | 495 | 422 | 463 | 475 | 475 | 475 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 495 | 422 | 463 | 475 | 475 | 475 |
| **Útreiðslur** | **495** | **422** | **463** | **475** | **475** | **475** |
| 11. Lønir v.m. | 473 | 387 | 439 | 451 | 451 | 451 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 22 | 36 | 24 | 24 | 24 | 24 |

## 18.30.1.10. Spilloljureinsing (Stuðulsjáttan)

Landsstýrið hevur í 2020 eftir § 3 í løgtingslóg nr. 75 frá 13. mai 1992 um umhvørvisgjald á smyrjiolju, við seinni broytingum, endurnýggja avtaluna við Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin (IRF) um at savna inn, viðgera og selja spillolju. IRF savnar inn og tekur ímóti spillolju úr øllum Føroyum og viðger og reinsar hana á spilloljuverkinum á Hagaleiti, so hon verður endurnýtt og dálkar umhvørvið sum minst.

Tollmyndugleikarnir uppkrevja eftir § 1 í lógini 2,50 kr. fyri hvønn litur av smyrjiolju, sum verður fluttur til Føroya (høvuðskonta 20.52.2.28. Umhvørvisavgjald á smyrjiolju). Gjaldið er ætlað til at fíggja kostnaðin av at savna inn og viðgera spilloljuna soleiðis, at hon ikki dálkar náttúruna. Gjaldið hækkaði í 2016 fyri eisini at kunna fíggja byggingina av nýggjum spilloljuverki.

Játtaða stuðulsupphæddin verður útgoldin einaferð árliga, tá ið Umhvørvismálaráðið hevur fingið avrit av grannskoðaðum roknskap fyri árið fyri.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| **01. Reinsan av spillolju** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **4.000** | **4.000** | **4.000** | **4.000** | **4.000** | **4.000** |
| 53. Stuðul til vinnu | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |

## 18.30.1.13. Stuðul til niðurtøku og burturbeining av oljufýrum (Stuðulsjáttan)

Í verðurlagspolitikkinum, sum Løgtingið samtykti í fjørvár, verður lagt upp til at seta bann fyri oljufýrum í nýggjum húsum og at stuðla niðurtøku av oljufýrum. Tað seinna verður gjørt við hesari játtanini, meðan bannið móti oljufýrum í nýggjum húsum verður ásett við kunngerð. Mett verður, at stuðulin til niðurtøku av oljufýrum, saman við mvg-afturbering til hitapumpur, kann virka við til, at fleiri velja at leggja um til grønar hitaloysnir.

Treytin fyri at fáa stuðul er, at lagt verður um til elrikna hitapumpuskipan ella at bundið verður í fjarhitaskipan. Stuðulsupphæddin er 6.000 kr. fyri hvørja burturbeinda oljufýring.

Játtanin verður umsitin sambært reglugerð fyri stuðul til niðurtøku og burturbeining av oljufýrum frá 30. juni 2023. Umhvørvisstovan umsitur stuðulsskipanina.

Stuðulin til niðurtøku og burturbeining av oljufýrum hevur er higartil 636 tús. kr. í 2023. Roknað verður við 1,5 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | - | - | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| **01. Stuðul til niðurtøku og burturbeining av oljufýrum** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **1.500** | **1.500** | **1.500** | **1.500** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | - | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |

# Ráevnisvinna

## 18.32.1. Fyrisiting

### 18.32.1.06. El-veiting, umsiting (Rakstrarjáttan)

Umhvørvisstovan umsitur løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, við seinni broytingum.

Endamálið við lógini er at tryggja, at el-veiting í Føroyum verður løgd til rættis við fyriliti fyri veitingartrygd, samfelagsbúskapi og umhvørvi, og skal lógin í mest møguligan mun fremja virkisfýsni í sambandi við framleiðslu av ravmagni og stimbra nýtslu av varandi orkukeldum.

Ætlanin hjá landsstýrinum at elektrifisera samfelagið er av álvara farin í gongd, serliga við at økja framleiðsluna av el úr varandi orku, og fevnir munandi partur av virkseminum undir hesari játtan um uppgávur tí viðvíkjandi, eitt nú at fyrireika vindútboð.

Útreiðslurnar av umsitingini av el-veiting vóru brutto 1,3 tús. kr. í 2022. Higartil eru útreiðslurnar brutto 1,4 tús. kr. Játtanin fyri 2024 til ávikavist útreiðslur og inntøkur er 2,5 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | -0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Útreiðslur | 2.343 | 1.341 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| Inntøkur | 2.343 | 1.341 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | -0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **2.343** | **1.341** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** |
| 11. Lønir v.m. | 1.260 | 1.099 | 1.200 | 1.800 | 1.800 | 1.800 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 938 | 224 | 1.000 | 400 | 400 | 400 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 10 | 18 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 55 | - | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 80 | - | 200 | 200 | 200 | 200 |
| **Inntøkur** | **2.343** | **1.341** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *2.343* | *1.339* | *2.500* | *2.500* | *2.500* | *2.500* |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | - | *2* | - | - | - | - |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Fulltíðarstørv | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 1,3 | 1,1 | 1,2 | 1,8 | 1,8 | 1,8 |

# Landbúnaður

## 18.33.2. Landbúnaðarstudningur

### 18.33.2.05. Træplanting (Stuðulsjáttan)

Stuðul til træniðurseting (gróðurseting) verður veittur við heimild í løgtingslóg nr. 53 frá 27. november 1952 um viðarlundir, við seinni broytingum.

Stuðulin verður latin sambært reglugerð fyri stuðul til viðarvøkstur frá 11. apríl 2023.

Nýggj náttúruverndarlóg er sett í gildi 1. januar 2024, løgtingslóg nr. 70 frá 22. mai 2023 um náttúruvernd. Í tí sambandi eru 200 tús. kr. umraðfestar til kortlegging og skráseting av náttúru. Uppgávan er løgd til Umhvørvisstovuna, høvuðskonta 18.37.4.02.

Stuðulin til træplanting var 546 tús. kr. í 2022. Higartil eru goldnar 50 tús. kr. í 2023. Játtanin fyri 2024 er 600 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 315 | 546 | 800 | 600 | 600 | 600 |
| Inntøkur | 30 | - | - | - | - | - |
| **01. Stuðul** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **315** | **546** | **800** | **600** | **600** | **600** |
| 53. Stuðul til vinnu | 315 | 526 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | 20 | 800 | 600 | 600 | 600 |
| **Inntøkur** | **30** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 64. Aðrar flytingarinntøkur | *30* | - | - | - | - | - |

# Handil og vinna annars

## 18.37.1. Ymsar útreiðslur

### 18.37.1.10. El-nevndin (Rakstrarjáttan)

Høg trygdarkrøv o.a. verða sett, tá elmegi verður framleidd og nýtt. Økið er løgskipað við løgtingslóg nr. 75 frá 5. mai 2021 um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin) og løgtingslóg nr. 76 frá 5. mai 2021 um løggilding av elinnleggingarfyritøkum. Lógirnar komu í gildi 1. januar 2022.

Eftir eltrygdarlógini skal El-nevndin m.a. hava eftirlit við virkjum til framleiðslu av elmegi, elinnleggingum, eltilfari og løggildum fyritøkum og skal fremja upplýsingarvirksemi um eltrygd. El-nevndin skal sambært nýggju løggildingarlógini geva elinnleggingarfyritøkum løggilding og hava eftirlit við løggildingunum, góðkenna fakligar ábyrdarar í løggildu fyritøkunum og góðkenna góðskuleiðsluskipan hjá løggildu fyritøkunum og hava eftirlit við góðskuleiðsluskipanini. Hetta eru nýggjar uppgávur, sum eru lagdar á El-nevndina við tað, at løggildingin higartil hevur ligið hjá SEV, og við tað at góðkenningin av fakligu ábyrdarunum og av góðskuleiðsluskipan eru nýskipanir í lóggávuni. El-nevndin skal harumframt veita landsstýrismanninum sakkøna ráðgeving og tryggja neyðugt innlit á økinum.

Fyrisitingarútreiðslurnar verða partvíst fíggjaðar við gjøldum fyri løggildingar av elinnleggingarfyritøkum og gjøldum fyri góðkenning av fakligum ábyrgdarum sambært lógini um løggilding av elinnleggingarfyritøkum. Inntøkurnar frá gjøldum eru á høvuðskontu 20.52.3.10. Aðrar inntøkur.

Avtala verður gjørd við netfelagið (SEV) um at fremja eftirlitsuppgávur eftir nýggju eltrygdarlógini vegna El-nevndina, serliga við innleggingum. Útreiðslurnar av hesum eru mettar til um 3 mió. kr., sum verða kravdar inn frá elbrúkarunum um elrokningina frá SEV.

Í nýggju eltrygdarlógini er ásett, at ein avgreiðsluskrivstova skal skipast, sum eftir nærri avgerð nevndarinnar og góðkenning landsstýrismansins kann verða løgd til netfelag ella stovn undir landsstýrismanninum. Skrivstovan er løgd til Arbeiðs- og brunaeftirlitið.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 149 | 400 | 450 | 450 | 450 | 450 |
| Útreiðslur | 149 | 400 | 450 | 450 | 450 | 450 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 149 | 400 | 450 | 450 | 450 | 450 |
| **Útreiðslur** | **149** | **400** | **450** | **450** | **450** | **450** |
| 11. Lønir v.m. | 126 | 127 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 23 | 23 | 70 | 70 | 70 | 70 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | 30 | 30 | 30 | 30 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 250 | 200 | 200 | 200 | 200 |

## 18.37.4. Ognarskrásetingar

### 18.37.4.02. Umhvørvisstovan (Rakstrarjáttan)

**Ábyrgdarøki**
Umhvørvisstovan fyrisitur matrikul, tinglýsing, fólkayvirlit og landsadressuskrá. Stovnurin fremur umhvørviseftirlit og umhvørvisvernd og somuleiðis gransking á umhvørvisøkinum. Stovnurin umsitur el-veitingarlógina um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, umframt at stovnurin savnar vitan um føroyska orkuøkið, fyrireikar orkupolitisk átøk og veitir óhefta vegleiðing innan grøna orkuumlegging. Stovnurin ger kort og samskipar ymiskar skrásetingar og dátuveitingar. Stovnurin umsitur eisini viðarlundir og onnur náttúruøki. Harafturat er partur av vápnalógini lagdur til stovnin at umsita. Umhvørvisstovan er skrivstova hjá Býarskipanarnevndini og Skógfriðingarnevndini.

Umhvørvisstovan umsitur, frá 1. apríl 2019, eisini landkortmyndugleikan og frá 1. januar 2020 sjókort og sjóuppmáting sambært kongaligu fyriskipanini um "Stedbestemt information". frá 1. januar 2024 fær løgtingslóg nr. 70 frá 22. mai 2023 um náttúruvernd gildi. Fyrisitingingin av náttúruvernd er løgd til Umhvørvisstovuna sum eisini fyrisitur umhvørvisvernd.

**Uppgávur**
Matrikulin er yvirlit yvir allar fastar ognir (eigindómar) í Føroyum. Matrikulin verður umsitin og viðlíkahildin av Umhvørvisstovuni. Farið er undir at menna talgild umsóknarbløð til matrikulerar broytingar, og verða tey knýtt at talgilda samleikanum. Í næstum verður farið undir at menna eina talgilda lendisskrá, soleiðis at allar byggisamtyktir vera atkomiligar á einum stað. Hetta fer at viðvirka til økta effektivisering og gjøgnumskygn innan matrikulera málsviðgerð.

Tinglýsingin umsitur tingbókina, sum er ein skrá yvir, hvør eigur, og hvørji rættindi eru til fasta ogn. Tinglýsingin fevnir eisini um leysafæ (persónbók) og veðhald í akførum (bilbók). Farið varð í 2022 undir at menna fyrsta stig av einari komandi talgildari tinglýsingarskipan. Talgilda menningin heldur fram í 2024.

Landsfólkayvirlitið er føroyska persóndátuskráin. Hon verður umsitin av Umhvørvisstovuni, men aðrir myndugleikar (kommunur, prestar, ljósmøður og skattamyndugleikar) eru við til at halda skránna viðlíka. Persóndátuskráin er talgild, og kunnu stovnar og fyritøkur gera avtalu við Umhvørvisstovuna um atgongd til skráirnar. Lóggávan um persónsdátur liggur hjá landsstýrismanninum í lógarmálum, og vísir Umhvørvisstovan til Løgmálráðið í málum um persónsdátuskrá. í 2022 var KT skipanin FOLK dagførd við nýggjum brúkaramarkamóti. í 2023 og 2024 verður arbeitt við at dagføra skipanina í mun til økt krøv um trygd og dátuskrásetingar.

Umhvørvisstovan umsitur partar av vápnalógini. Stovnurin hevur til uppgávu at skráseta lóglig vápn í Føroyum, eins og Umhvørvisstovan útskrivar og umsitur vápnaprógv.

Kortdeildin umsitur fikspunktnet og geodætiska grundarlagið, eins og deildin dagførir topografiska kortgrundarlagið og ger nýggj myndakort. Deildin fevnir eisini um føroyska sjókortmyndugleikan. Arbeitt verður við at uppbyggja eina bygningsskrá, sum í fyrstu atløgu skal geva eitt yvirlit yvir aldur og nýtslu av øllum bygningum í landinum, men sum frálíður er ynskiligt at menna skránna til fullfíggjaða bygningsskrá.

Fyrisitingin á náttúru- og umhvørvisøkinum skal røkja margfeldið og tær vistfrøðiligu tilgondirnar í náttúruni, bæði fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini. Fyristining skal tryggja verju

av náttúru og umhvørvi, varðveita livikor hjá fólki, rekreativ øki, vistskipanir og eitt fjøltáttað plantu- og djóralív. Hetta verður gjørt við at fyribyrgja og avmarka dálking og skaðiliga ávirkan á náttúruna. Harumframt ger stovnurin ymisk umhvørvishagtøl, sum ásett er í altjóða sáttmálum. Granskingin fær vitan til vega um dálkingarstøðuna í føroysku náttúruni. Arbeiðið fevnir um at granska útbreiðsluna av umhvørvisdálkandi evnum og árin av teimum í grindahvali, fiski og fugli. Umhvørvisstovan arbeiðir eisini við at savna og skráseta vitan um føroyska náttúru og umhvørvi og at fyrireika eina nýggja náttúrufyrisiting. Farið er undir at skráseta náttúru- og umhvørvisdátur í metadátugrunn sum verður týðandi partur í tilrættislegging av skipaðari dátuinnsavnan. Arbeiðið at skráseta náttúru og umhvørvisdátur verður gjørt í samstarvi millum deildirnar Vernd og Land- og sjókort. Innsavnan av nýggjum dátum verður framt í samstarvi við aðrar náttúrustovnar.

Fyrisitingin av elveitingarlógini hevur til endamáls at tryggja, at elveiting í Føroyum verður løgd til rættis við fyriliti fyri veitingartrygd, samfelagsbúskapi og umhvørvi. Henda fyrisiting skal somuleiðis fremja effektivitet í sambandi við framleiðslu av ravmagni og nýtslu av varandi orkukeldum. Norðurlendskt samstarv á orkuøkinum og fyrireiking av orkupolitiskum átøkum stuðlar undir tilgongdini at umleggja føroysku orkuveitingina til varandi orkukeldur.

Innan viðarvøkstur og frílendi umsitur stovnurin almenn skógfriðað náttúrulendi í samstarvi við Skógfriðingarnevndina. Stovnurin rekur Gróðurstøðina í Hoydølum, sum m.a. hevur um hendi plantualing og plantusølu.

Umhvørvisstovan hevur avgerandi leiklut í verkætlanini Talgildu Føroyar. Stovnurin umsitur dátuskráirnar fólkayvirlit, tinglýsing, matrikul, adressur og ymisk kort (topografisk kort og myndakort). Tað eru alt grunddátur, sum aðrir almennir myndugleikar og kommunur, vinnan og einstaki borgarin hava stóran tørv á. Viðlíkahald av grunddátuskráunum og atknýttum talgildum tænastum hevur høga raðfesting.

**Undirkonta 41. Inntøkufíggjað virksemi**
Partur av virkseminum á Skógrøktini er grundaður á inntøkur frá røkt av viðarlundum og frá sølu av føroyskum og føroyskt tillagaðum plantutilfari, sum verður framleitt á Gróðurstøðini í Hoydølum. Vakstrar- og veðurlíkindi gera, at úrtøkan og íløgutørvurin sveiggja frá ári til árs. Arbeiðið eftir lov nr. 147 frá 27. mars 1939 for Færøerne om Udskiftning, við seinni broytingum, verður eisini roknað sum inntøkufíggjað virksemi. Útskiftingararbeiðið er skipað sum sjálvstøðugar verkætlanir, ið kunnu røkka yvir fleiri ár. Landskassin ber helvtina av útreiðslunum, og eigararnir hina helvtina.

**Undirkonta 45. Stuðulsfíggjað virksemi**
Virksemið á granskingarøkinum er í stóran mun skipað í verkætlanir, sum heilt ella lutvíst eru fíggjaðar uttanífrá, eins og einstakar verkætlanir á deildini Orka. Stovnurin røkir uppgávuna sum samskipari í norðurlendska arbeiðsbólkinum fyri lívfrøðiligt margfeldi og náttúrloysnir. Tað verður fíggjað av Norðurlendska ráðharraráðnum.

**Lógargrundarlag**
Lógargrundarlagið undir virksemi stovnsins er:

- Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m., við seinni broytingum
- Løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing, við seinni broytingum
- Lov nr. 147 af 27. mars 1939 for Færøerne om udskiftning, við seinni broytingum
- Løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir, við seinni broytingum
- Løgtingslóg nr. 41 frá 8. mai 2007 um fólkayvirlit, við seinni broytingum
- Løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn, við seinni broytingum

- Løgtingslóg nr. 17 frá 6. mars 2002 um adressur
- Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober í 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum
- Løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum, við seinni broytingum
- Løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, við seinni broytingum
- Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, við seinni broytingum
- Løgtingslóg nr. 53 frá 27. november 1952 um viðarlundir, við seinni broytingum
- Løgtingslóg nr. 76 frá 17. mai 1994 um tinglýsingargjøld v.m., við seinni broytingum
- Løgtingslóg nr. 8 frá 28. februar 2006 um tinglýsingaravgjald, við seinni broytingum
- Løgtingslóg nr. 70 frá 22. mai 2023 um náttúruvernd
- Kunngerð nr. 63 frá 11. desember 1962 um tinglýsing, við seinni broytingum
- Kunngerð nr. 14 frá 11. februar 2009 um gjøld eftir matrikullógini
- Kunngerð nr. 161 frá 19. desember 2011 um royndarskipan um gjøld fyri upplýsingar úr landsfólkayvirlitsskránni
- Kunngerð nr. 102 frá 22. oktober 2012 um gjøld hjá Umhvørvisstovuni fyri umsiting og eftilit sambært lóggávuni á umhvørvisøkinum
- Kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur, við seinni broytingum
- Kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, við seinni broytingum
- Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn
- Kunngerð nr. 84 frá 2. juli 2010 um bunkring, flutning av olju o.a., við seinni broytingum
- Kunngerð nr. 118 frá 16. desember 2010 um ozonoyðandi evni
- Kunngerð nr. 72 frá 29. mai 2012 um taðing, við seinni broytingum
- Kunngerð nr. 74 frá 28. juni 2016 um skráseting av skotvápnum, við seinni broytingum
- Kunngerð nr. 93 frá 7. september 2016 um vápnaprógv
- Anordning nr. 189 af 12. februar 2019 om ikrafttræden for Færøerne af lov om stedbestemt information

**Játtan**
Arbeiðið at menna nýtt nýtslumarkamót til landsfólkayvirltið (FOLK) er framt í 2022. Í 2022 vórðu játtaðar 1,2 mió. kr. til endamálið. Landsfólkayvirlitið er ein eldri skipan og hevur tørv á at verða endurskoðað og at verða nútímasgjørd. Arbeiðið at nútímansgera skipanina heldur fram í 2024. 500 tús. kr eru játtaðar til endamálið í 2024.

Umhvørvisstovan hevur sum grunddátustovnur verið ein virkin og týdningarmikil partur í at talgilda Føroyar. Arbeiðið heldur fram. Í 2022 varð, sum liður í at menna talgilda innlating til tinglýsingina, farið undir at menna eina prototypu til talgilda innlating til akfarsbókina í tinglýsingini. Prototypan er fyrsta stig í tilgongdini til, at øll skjøl til tinglýsingina kunnu latast inn talgilt, og seinni at viðgerðin eisini kann talgildast og í ávísan mun vera sjálvvirkandi. Í 2022 og 2023 vóru 1,1 mió. kr. játtaðar til endamálið. Sum framhald av menningini verða 1,1 mió. kr. játtaðar til endamálið í 2024.

Sum liður í at byggja upp eina vælvirkandi náttúrufyrisiting er neyðugt at uppbyggja og viðlíkahalda dátuskipan til skráseting av dátum, sum finnast, og nýggjar dátur, sum verða innsavnaðar. Talan er um sonevnda metadátubasu, sum vísir hvørjar dátur eru tøkar og relevantar upplýsingar um hesar dátur. Harumframt verður farið undir at skipa eitt nationalt datarepository at goyma og tryggja dátur, sum eru innsavnaðar fyri almenna fígging ella við loyvi frá almennum myndugleika. Í 2023 var játtanin raðfest við 400 tús. kr. til endamálið. Í 2024 er játtanin raðfest við 600 tús. kr. til endamálið, soleiðis at samlaðja játtanin til endamálið verður 1 mió. kr. í 2024 og framyvir.

Farið verður undir at verkseta átak 25 í orku- og veðurlagspolitikkinum. Gjørd verður ein uppgerð yvir vátlendi, ein sokallað Wetland-inventory, sum Føroyar hava bundið seg til í Ramsar-

sáttmálanum. Uppgerðin skal eisini fevna um drenað vátlendi og skal vera grundarlag undir arbeiðnum at verja og endurskapa vátlendi. Játtanin varð í 2023 raðfest við 400 tús. kr. til endamálið. Arbeiðið heldur fram í 2024, og er sama játtan markað til endamálið í 2024.

Skipað verður ein óheft brúkaravegleiðing í orkuspurningum. Saman við øðrum átøkum, eitt nú mvg frítøku til hitapumpur og stuðul til at taka oljufýr niður, skal hetta tryggja orkuskifti frá olju til varandi orkukeldur. Brúkaravegleiðingin er í tráð við átak 15 í veðurlagspolitikkinum, ið varð samtyktur við stórum meiriluta í Løgtinginum. Talan verður um eina óhefta brúkaravegleiðing, ið skal vegleiða og upplýsa einstaklingum og feløgum v.m. um orkugóða bygging, orkusparing og grønar hitaloysnir fyri sethús, størri bygningar og í ídnaðarligum virksemi. Í 2024 er játtanin raðfest við 750 tús. kr. til endamálið, soleiðis at samlaða játtanin til endamálið er 1.750 tús. kr. í 2024.

Nýggj náttúruverndalóg kemur í gildi 1. januar 2024. Fyrisitingin av náttúruverndarlógini er løgd til Umhvørvisstovuna. Játtanin er í tí sambandi raðfest við 1,5 mió. kr. til økið.

Í sambandi við at nýggj náttúruvendarlóg kemur í gildi, skal ein kortlegging og skráseting av náttúru fremjast. Játtanin er í 2024 raðfest við 500 tús. kr. til endamálið.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 34.328 | 35.101 | 38.031 | 42.288 | 42.088 | 41.888 |
| Útreiðslur | 54.340 | 62.845 | 47.041 | 51.298 | 51.098 | 50.898 |
| Inntøkur | 20.011 | 27.744 | 9.010 | 9.010 | 9.010 | 9.010 |
| **21. Umhvørvisstovan** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 34.184 | 35.825 | 37.031 | 40.538 | 40.338 | 40.138 |
| **Útreiðslur** | **42.988** | **46.495** | **42.041** | **45.548** | **45.348** | **45.148** |
| 11. Lønir v.m. | 29.077 | 29.987 | 31.191 | 33.558 | 33.558 | 33.558 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 10.609 | 14.337 | 8.750 | 9.890 | 9.690 | 9.490 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 2.442 | 1.145 | 1.530 | 1.530 | 1.530 | 1.530 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 606 | 794 | 562 | 562 | 562 | 562 |
| 17. Avskrivingar o.a. | 141 | -70 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -0 | -0 | 8 | 8 | 8 | 8 |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | - | 0 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 112 | 302 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **8.804** | **10.670** | **5.010** | **5.010** | **5.010** | **5.010** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *7.844* | *10.456* | *4.500* | *4.500* | *4.500* | *4.500* |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *97* | *140* | *500* | *500* | *500* | *500* |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | *123* | *64* | - | - | - | - |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *228* | - | *10* | *10* | *10* | *10* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *20* | - | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *477* | *11* | - | - | - | - |
| 79. Innanvirkis bókingar | *15* | - | - | - | - | - |
| **23. Óheft orkuráðgeving** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | 1.000 | 1.750 | 1.750 | 1.750 |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **1.000** | **1.750** | **1.750** | **1.750** |
| 11. Lønir v.m. | - | - | 700 | 1.450 | 1.450 | 1.450 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | 250 | 250 | 250 | 250 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | 50 | 50 | 50 | 50 |

**41. Inntøkufíggjað virksemi**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 173 | -734 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **2.757** | **2.344** | **2.200** | **2.200** | **2.200** | **2.200** |
| 11. Lønir v.m. | 1.391 | 1.662 | 1.100 | 1.100 | 1.100 | 1.100 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.187 | 605 | 1.100 | 1.100 | 1.100 | 1.100 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 178 | 78 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 0 | -0 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **2.583** | **3.079** | **2.200** | **2.200** | **2.200** | **2.200** |
| 21. Søla av vøru og tænastum | *2.574* | *3.080* | *2.200* | *2.200* | *2.200* | *2.200* |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *25* | *-1* | - | - | - | - |
| 79. Innanvirkis bókingar | *-15* | - | - | - | - | - |

**45. Stuðulsfíggjað virksemi**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | -29 | 11 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **8.596** | **14.006** | **1.800** | **1.800** | **1.800** | **1.800** |
| 11. Lønir v.m. | 2.002 | 1.728 | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.462 | 3.011 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 6 | 50 | - | - | - | - |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 14 | - | - | - | - | - |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 5.111 | 9.216 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **8.624** | **13.995** | **1.800** | **1.800** | **1.800** | **1.800** |
| 63. Vanligar flytingarinntøkur | *-343* | *2.375* | *800* | *800* | *800* | *800* |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *8.967* | *11.619* | *1.000* | *1.000* | *1.000* | *1.000* |

**Virksemisyvirlit: 21 Umhvørvisstovan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **42.988** | **46.495** | **42.041** | **45.548** | **45.348** | **45.148** |
| Stjórn og felagsumsiting | 6.848 | 10.278 | 7.134 | 7.434 | 7.434 | 7.434 |
| Matrikulumsiting | 6.400 | 6.810 | 6.450 | 6.450 | 6.450 | 6.450 |
| Viðarvøkstur og frílendi | 3.398 | 3.008 | 3.448 | 3.948 | 3.948 | 3.948 |
| Umhvørvisfyrisiting | 6.519 | 7.217 | 7.319 | 9.019 | 8.819 | 8.619 |
| Kort og skráir | 9.941 | 6.689 | 8.185 | 8.185 | 8.185 | 8.185 |
| Tinglýsing og landsfólkayvirlit | 7.260 | 9.687 | 6.883 | 7.137 | 7.137 | 7.137 |
| Orka og orkuráðgeving | 2.622 | 2.806 | 2.622 | 3.375 | 3.375 | 3.375 |

**Starvsfólkayvirlit: 21 Umhvørvisstovan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 54,5 | 55,0 | 54,5 | 59,5 | 59,5 | 59,5 |
| Fulltíðarstørv | 55,5 | 56,0 | 55,5 | 60,5 | 60,5 | 60,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 29,1 | 30,0 | 31,2 | 33,6 | 33,6 | 33,6 |

**Starvsfólkayvirlit: 23 Óheft orkuráðgeving**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | - | - | 1,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Fulltíðarstørv | - | - | 1,0 | 2,0 | 2,0 | 2,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | - | - | 0,7 | 1,5 | 1,5 | 1,5 |

**Starvsfólkayvirlit: 41 Inntøkufíggjað virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 3,5 | 3,5 | 3,5 | 3,5 | 3,5 | 3,5 |
| Fulltíðarstørv | 3,5 | 3,5 | 3,5 | 3,5 | 3,5 | 3,5 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 1,4 | 1,7 | 1,1 | 1,1 | 1,1 | 1,1 |

**Starvsfólkayvirlit: 45 Stuðulsfíggjað virksemi**

| | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |
| Fulltíðarstørv | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 2,0 | 1,7 | 1,5 | 1,5 | 1,5 | 1,5 |

## 18.37.4.07. Orkumál (Stuðulsjáttan)

Játtan til at útvega nýggja vitan og royndir um alternativar grønar orkumøguleikar.

Játtanin kann eitt nú verða nýtt til kanningar, skjalfesting og til praktiskar royndir, sum Jarðfeingi og Umhvørvisstovan kunnu fremja saman við kommunum, felagsskapum og/ella privatum feløgum.

Stuðulsjáttanin verður umsitin sambært reglugerð. Í fyrstu atløgu situr Umhvørvismálaráðið fyri hesum.

Stuðulin til orkumál var 1,8 mió. kr. í 2022. Higartil er ongin stuðul goldin út fyri 2023. Játtanin fyri 2024 er 1,8 mió kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | 1.800 | 1.800 | 1.800 | 1.800 | 1.800 |
| **01. Stuðul til verkætlanir um alternativa orku** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **1.800** | **1.800** | **1.800** | **1.800** | **1.800** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | 1.302 | 1.800 | 1.800 | 1.800 | 1.800 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | 498 | - | - | - | - |

# Arbeiðsmarknaður

## 18.39.1. Ymsar útreiðslur

### 18.39.1.01. Semingsmannaskipanin (Rakstrarjáttan)

Endamálið við játtanini er at fíggja semingsmannaskipanina. Stovnurin er skipaður sambært løgtingslóg nr. 39 frá 13. mai 2013 um semingsstovn. Semingsstovnslógin umfatar allan arbeiðsmarknaðin í mun til lóg nr. 86 frá 31. mars 1928 for Færøerne om Mægling i Arbejdsstridigheder, við seinni broytingum, sum bert umfataði privata arbeiðsmarknaðin. Lógin ásetir í § 12, at landskassin ber útreiðslur av semingsstovninum, meðan partarnir bera sjálvir egnar útreiðslur samsvarandi starvsskipan.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 862 | 912 | 923 | 947 | 947 | 947 |
| Útreiðslur | 862 | 912 | 923 | 947 | 947 | 947 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 862 | 912 | 923 | 947 | 947 | 947 |
| **Útreiðslur** | **862** | **912** | **923** | **947** | **947** | **947** |
| 11. Lønir v.m. | 722 | 803 | 853 | 877 | 877 | 877 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 102 | 70 | 70 | 70 | 70 | 70 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 38 | 39 | - | - | - | - |

### 18.39.1.02. Fastur gerðarrættur (Stuðulsjáttan)

Partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava gjørt sáttmála um fastan gerðarrætt, og varð gerðarrætturin skipaður í 2006. Fasti gerðarrætturin skal loysa trætur, ósemjur og ivamál á arbeiðsmarknaðinum umframt at savna, menna og kunna um føroyskan arbeiðsmarknaðarrætt.

Eftir § 1, stk. 3 í løgtingslóg nr. 21 frá 11. apríl 2006 um mál ið hoyra undir fasta gerðarrættin, við seinni broytingum, ber landskassin útreiðslur, góðkendar sambært fíggjarætlan og roknskap, til skrivstovu, samsýning og aðrar fastar útreiðslur av fasta gerðarrættinum, ið gjøldini til gerðarrættin ikki røkka til.

Játtanin verður flutt fasta gerðarrættinum, tá ið landsstýriskvinnan hevur góðkent fíggjarætlanina fyri játtanarárið og móttikið grannskoðaðan roknskap fyri árið frammanundan.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 700 | 700 | 700 | 700 | 700 | 700 |
| **01. Fastur gerðarrættur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **700** | **700** | **700** | **700** | **700** | **700** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 700 | 700 | 700 | 700 | 700 | 700 |

### 18.39.1.07. Arbeiðs- og brunaeftirlitið (Rakstrarjáttan)

Arbeiðs- og brunaeftirlitið er eftirlitsmyndugleiki og hevur ábyrgdina av føroyska regluverkinum, ið ásetir krøv til arbeiðsumhvørvi, brunatrygd, mát og vekt, vinnuligt kavaravirksemi, handfaring av spreingievnum og handfaring av fýrverki. Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal støðugt saman við Umhvørvismálaráðnum skapa karmar og dagføra lógargrundarlagið innan málsøkið.

Høvuðsuppgávurnar hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eru støðugt at betra um arbeiðsumhvørvið á øllum føroyskum arbeiðsplássum umframt at virka fyri brunatrygd.

Lógargrundarlagið fyri virksemi stovnsins er:

1. Løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi, við seinni broytingum, umframt tilhoyrandi kunngerðir
2. Løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2007 um kavaravinnu og kavaraútgerð, við seinni broytingum, umframt tilhoyrandi kunngerðir
3. Løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 2007 um spreingievni og spreingiarbeiði v.m., við seinni broytingum, umframt tilhoyrandi kunngerðir
4. Løgtingslóg nr. 61 frá 10. juni 2008 um tiltøk at minka um royking, umframt tilhoyrandi kunngerð
5. Løgtingslóg nr. 68 frá 5. mai 2022 um mát og vekt við tilhoyrandi kunngerðum
6. Løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving, við seinni broytingum, umframt tilhoyrandi kunngerðir
7. Løgtingslóg nr. 27 frá 8. mai 1969 um fýrverk, umframt tilhoyrandi kunngerð

Sum liður í myndugleikavirkseminum vegleiðir Arbeiðs- og brunaeftirlitið vinnurekandi, stovnum, pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og almenninginum í spurningum, sum viðvíkja ábyrgdarøkjunum hjá stovninum. Tað verður gjørt fyri, at partarnir sjálvir kunnu loysa sínar trygdarspurningar.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið ger eftirlitsvitjanir fyri at tryggja, at omanfyri nevnda lóggáva og fyrisetingar, sum eru gjørdar við heimild í lóggávuni, verða hildnar.

Stovnurin skrásetir og granskar arbeiðsóhapp fyri at savna vitan um føroyska arbeiðsmarknaðin og fyri at staðfesta, hvørt talan er um lógarbrot, sum eiga at fáa revsirættarligar avleiðingar.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið útskrivar og endurnýggjar eisini fleiri ymisk vinnubrøv, t.d. vinnubrøv sum trukkførari, kranaførari, vinnukavari, kavarahjálpari, spreingimeistari, køliveitari og ketilpassari.

Økta virksemið í samfelagnum, serliga innan byggivinnu og framleiðslu, merkir, at arbeisbyrðan hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum er økt munandi. Arbeitt verður framhaldandi við at betra um sálarliga arbeiðsumhvørvið, fyribyrgja arbeiðsvanlukkum og fremja reglulig brunasýn.

Frá 1. januar 2022 hevur Arbeiðs- og brunaeftirlitið virka sum avgreiðsluskrivstova hjá El-nevndini, høvuðskonta 18.37.1.10. El-nevndin endurrindar Arbeiðs- og brunaeftirlitinum útreiðslurnar, sum standast av virkseminum.

5. juli 2022 bleiv broyting gjørd í málsøkjabýtinum. Dagliga samskipanin av føroysku tilbúgvingini er flutt frá Fiskimálaráðnum til Arbeiðs- og brunaeftirlitið. Í tilbúgvingarmálum vísir Arbeiðs- og brunaeftirlitið til landsstýrismannin í lógarmálum, sum eisini er landsstýrismaður í tilbúgvingarmálum. Broytingin er gjørd fyri at tryggja, at uppgávurnar viðvíkjandi samskipan av

tilbúgvingini framyvir eru staðsettar í einum viðkomandi fakstovni, har góðir møguleikar eru fyri samvirkandi fyrimunum.

Í 2023 varð avtala gjørd um at umsitingin av Vanlukkutryggingarráðnum verður flutt til Arbeiðs- og brunaeftirlitið. Vanlukkutryggingarráðið endurrindar Arbeiðs- og brunaeftirlitinum útreiðslurnar av umsitingini. Rakstarjáttanin hjá Vanlukkutryggingarráðnum er á høvuðskontu 18.21.1.13.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 7.122 | 7.410 | 8.491 | 8.736 | 8.736 | 8.736 |
| Útreiðslur | 10.326 | 9.437 | 9.782 | 10.027 | 10.027 | 10.027 |
| Inntøkur | 3.204 | 2.027 | 1.291 | 1.291 | 1.291 | 1.291 |
| **20. Arbeiðseftirlitið** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 5.298 | 6.287 | 4.956 | 5.110 | 5.110 | 5.110 |
| **Útreiðslur** | **8.502** | **8.314** | **6.247** | **6.401** | **6.401** | **6.401** |
| 11. Lønir v.m. | 5.520 | 5.170 | 5.538 | 5.692 | 5.692 | 5.692 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2.089 | 1.856 | 534 | 534 | 534 | 534 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 416 | 778 | 75 | 75 | 75 | 75 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 403 | 502 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 17. Avskrivingar o.a. | 6 | 8 | - | - | - | - |
| 52. Tilskot til einstaklingar | -0 | - | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 68 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **3.204** | **2.027** | **1.291** | **1.291** | **1.291** | **1.291** |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *1.502* | *1.614* | *1.091* | *1.091* | *1.091* | *1.091* |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *1.702* | *413* | *200* | *200* | *200* | *200* |
| **21. Brunaeftirlitið** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 1.825 | 1.123 | 3.535 | 3.626 | 3.626 | 3.626 |
| **Útreiðslur** | **1.825** | **1.123** | **3.535** | **3.626** | **3.626** | **3.626** |
| 11. Lønir v.m. | 1.781 | 1.118 | 3.265 | 3.356 | 3.356 | 3.356 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 5 | 5 | 210 | 210 | 210 | 210 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | - | - | 60 | 60 | 60 | 60 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 38 | - | - | - | - | - |

**Virksemisyvirlit: 20 Arbeiðseftirlitið**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **8.502** | **8.314** | **6.247** | **6.401** | **6.401** | **6.401** |
| 1. Leiðsla og løgfrøði | 872 | 900 | 931 | 930 | 930 | 930 |
| 2. Felagsútreiðlsur og umsiting | 987 | 950 | 986 | 980 | 980 | 980 |
| 3. Eftirlitsvirksemi | 4.611 | 5.300 | 3.557 | 3.571 | 3.571 | 3.571 |
| 4. Vanlukkugransking | 788 | 620 | 495 | 620 | 620 | 620 |
| 5. Kunning og upplýsing | 1.044 | 344 | 278 | 300 | 300 | 300 |
| 6. El-nevnd | 200 | 200 | - | - | - | - |
| **B: Virksemi (tal)** | **1.430** | **1.710** | **1.680** | **1.680** | **1.690** | **1.700** |
| 1. Eftirlitsvirksemi | 500 | 590 | 550 | 550 | 550 | 550 |
| 2. Vanlukkugransking | 100 | 120 | 110 | 110 | 110 | 110 |
| 3. Vinnubrøv og loyvir | 600 | 750 | 750 | 750 | 750 | 750 |
| 4. Onnur mál | 230 | 250 | 270 | 270 | 280 | 290 |

**Starvsfólkayvirlit: 20 Arbeiðseftirlitið**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| Onnur | 8,0 | 9,0 | 9,0 | 9,0 | 9,0 | 9,0 |
| Fulltíðarstørv | 9,0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 5,5 | 5,2 | 5,5 | 5,7 | 5,7 | 5,7 |

**Virksemisyvirlit: 21 Brunaeftirlitið**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)** | **1.825** | **1.123** | **3.535** | **3.626** | **3.626** | **3.626** |
| 1. Eftirlitsvirksemi | 1.375 | 561 | 2.116 | 2.201 | 2.201 | 2.201 |
| 2. Brunamálsviðgerð | 400 | 412 | 664 | 670 | 670 | 670 |
| 3. Kunning og upplýsing | 50 | 50 | 55 | 55 | 55 | 55 |
| 4. Samskipan og tilbúgving | - | 100 | 700 | 700 | 700 | 700 |
| **B: Virksemi (tal)** | **195** | **240** | **290** | **290** | **290** | **290** |
| 1. Eftirlitsvitjanir | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 2. Brunamálsviðgerð | 50 | 50 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 3. Fyrispurningar/ráðgeving | 45 | 90 | 140 | 140 | 140 | 140 |

**Starvsfólkayvirlit: 21 Brunaeftirlitið**

| | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | - | - | - | - | - | - |
| Onnur | 3,0 | 3,0 | 4,0 | 4,0 | 4,0 | 4,0 |
| Fulltíðarstørv | 3,0 | 3,0 | 4,0 | 4,0 | 4,0 | 4,0 |
| Lønarpartur (mio kr.) | 1,8 | 1,1 | 3,3 | 3,4 | 3,4 | 3,4 |

# 18.39.4. Arbeiðsmarknaðartænastur

## 18.39.4.01. Barsilsskipan (Lógarbundin játtan)

Sambært løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan, við seinni broytingum, fevnir Barsilsskipanin um allan arbeiðsmarknaðin. Barsilspeningur verður veittur í sambandi við viðgongu, barnsburð og ættleiðing. Barsilspeningurin endurrindar løn hjá løntakaranum, annaðhvørt til løntakaran ella til arbeiðsgevaran, tó við einum útgjaldshámarki upp á 25 tús. kr. um mánaðin.

Avtala er gjørd við TAKS um at virka sum umsiting hjá Barsilsskipanini, sí høvuðskontu 18.39.4.04. Umsiting av Barsilsskipan.

Lógin miðar eftir, at:

- Allir løntakarar fáa mest møguligt endurgjald fyri lønarmiss í sambandi við barnsburð
- Skipanin fevnir um bæði løntakarar og sjálvstøðug vinnurekandi
- Fremja javnstøðu og gera grundarlagið betri fyri javnsettum møguleikum hjá kvinnum og monnum til arbeiði
- Tryggja barninum samveru við bæði foreldur

- Umstøðurnar hjá hinum einstaka á arbeiðsmarknaðinum í sambandi við barnsburð og ættleiðing eru so eins sum gjørligt

Mamman hevur rætt til útgjald í 14 vikur eftir barnsburð. Pápin ella sammóðurin hevur rætt til útgjald í 4 vikur. Foreldrini hava harumframt rætt til útgjald í 34 vikur, sum tey kunnu býta sínámillum eftir egnum ynski. Við hesum hava foreldur rætt til barsilspening í 52 vikur eftir barnsburð. Ættleiðingarforeldur hava somuleiðis rætt til barsilspening í 52 vikur, eftir at tey hava fingið barnið.

Stakir uppihaldarar kunnu fáa barsilsfarloyvið hjá hinum foreldrinum lagt afturat sínum barsilsfarloyvi.

Harumframt eru ymiskar serskipanir fyri foreldur, sum fáa:

- Tvey børn ella fleiri
- Børn fødd áðrenn 32. viku í viðgonguni

Síðani 1. mars 2018 hevur tvungin eftirløn verið løgd oman á øll útgjøld úr Barsilsskipanini. Í 2024 er tvungna eftirlønin 10% av útgjaldinum.

Løntakarar og arbeiðsgevarar rinda 0,86% av móttiknu og rindaðu A-inntøkunum. Inntøkujáttanin er á høvuðskontu 20.52.1.28. Gjald til barsilsskipan. Inntøkurnar verða fluttar í Barsilsgrunnin. Barsilsgrunnurin fíggjar barsilsskipanina.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 175.796 | 173.244 | 178.000 | 170.000 | 175.000 | 180.000 |
| Inntøkur | 175.796 | 173.244 | 178.000 | 170.000 | 175.000 | 180.000 |
| **01. Barsilsskipan** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **175.796** | **173.244** | **178.000** | **170.000** | **175.000** | **180.000** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 175.796 | 173.244 | 178.000 | 170.000 | 175.000 | 180.000 |
| **Inntøkur** | **175.796** | **173.244** | **178.000** | **170.000** | **175.000** | **180.000** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *175.796* | *173.244* | *178.000* | *170.000* | *175.000* | *180.000* |

## 18.39.4.04. Umsiting av barsilsskipan (Rakstrarjáttan)

Sambært § 6 í kunngerð nr. 91 frá 31. mai 2001 um umsiting av Barsilsskipan, við seinni broytingum, umsitur TAKS skipanina. Barsilsgrunnurin endurrindar TAKS fyri umsitingina.

### Undirkonta 30. KT-skipan til Barsilsskipanina

Seint á heysti 2020 varð komið fram á ein feil í KT-skipanini hjá barsilsskipanini. Feilurin kom í, tá ið KT-skipanin varð broytt í sambandi við lógarbroytingina í 2018, tá ið barsilsskipanin fór at gjalda eftirlønir hjá persónum og arbeiðsgevarum. Í stuttum hevði feilurin við sær, at útgjøld til eftirlønir ikki vórðu útreiðsluførd yvir raksturin.

KT-skipanin, sum er frá 2001, er stirvin at arbeiða við, tað er sera trupult at trekkja hagtøl úr skipanini, og tað er somuleiðis óneyðuga orkukrevjandi at stemma útgjøld v.m. av. Semja er um, at tørvur er á at nútímansgera KT-skipanina hjá Barsilsskipanini. Eitt verkætlanarfólk varð sett í 2022 at greina tørvin.

Farið verður undir at menna eina nútímans skipan. Nýggja skipanin skal gera umsitingina av útgjøldunum einfaldari og meira sjálvvirkna, og harvið verður skipanin lættari at umsita, og vandin fyri feilum gerst minni. Arbeiðið varð boðið út á heysti 2023. Tá endaligi kostnaðurin er greiður, verður uppskot til verklagslóg latið Løgtinginum. Settar eru 6 mió. kr. av til endamálið. Útreiðslurnar til nýggja KT-skipan verða endurrindaðar av Barsilsgrunninum.

## Átekning

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum høvuðskontuna og høvuðskontu 3.15.1.04. TAKS.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Nettoútreiðslujáttan | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Útreiðslur | 2.022 | 2.802 | 2.850 | 8.800 | 6.800 | 2.800 |
| Inntøkur | 2.022 | 2.802 | 2.850 | 8.800 | 6.800 | 2.800 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Útreiðslur** | **2.022** | **2.802** | **2.850** | **2.800** | **2.800** | **2.800** |
| 11. Lønir v.m. | 52 | 48 | 50 | - | - | - |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | 187 | - | - | - | - |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1.970 | 2.567 | 2.800 | 2.800 | 2.800 | 2.800 |
| **Inntøkur** | **2.022** | **2.802** | **2.850** | **2.800** | **2.800** | **2.800** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *2.022* | *2.802* | *2.850* | *2.800* | *2.800* | *2.800* |
| **30. KT-skipan til Barsilsskipanina** | | | | | | |
| Nettoútreiðsla | - | - | - | 0 | 0 | - |
| **Útreiðslur** | **-** | **-** | **-** | **6.000** | **4.000** | **-** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | - | - | - | 6.000 | 4.000 | - |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **-** | **6.000** | **4.000** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | - | - | - | *6.000* | *4.000* | - |

# § 20 Inntøkur

## Rentur

### 20.50.1. Rentur av skuld

#### 20.50.1.01. Rentur at gjalda (Ógreinað játtan)

Sambært løgtingslóg nr. 116 frá 24. november 2016 um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð, við seinni broytingum, situr Landsbankin fyri gjaldføris- og skuldarviðurskiftunum hjá landinum.

Langfreistaða skuldin hjá landskassanum er lánsbrævaskuld, sum við ársenda 2022 var umleið 3,5 mia. kr.

Roknskaparmeginreglan fyri rentuútreiðslurnar er, at effektiva rentan verður brúkt. Skuldin hjá landskassanum hevur í løtuni fýra lánsbrævarøðir, og er tað tí ikki nógv hóvasták at rokna ta effektivu rentuna fyri hvørt lánið sær. Effektiva rentan kann staðfestast objektivt, og lættir tað munandi um at meta um rentuútreiðsluna. Ein meting skal tó gerast fyri rentuna á komandi lánum, ið verða tikin, men har kunnu forward renturnar á fíggjarmarknaðunum verða brúktar sum eina ábending.

Mettu upphæddirnar fyri rentuútreiðslur eru grundarlag undir bæði játtan og roknskapi. Frávik í mun til játtan verða skrásett sum óvanligar inntøkur og útreiðslur undir RLÚ 2 og ávirka tí ikki RLÚ 1.

Rentuútreiðslurnar vóru 20,2 mió. kr. í 2022 og verða 46,6 mió. kr. í 2023. Roknað verður við rentuútreiðslum á 86 mió. kr. í 2024, svarandi til eina miðal effektiva rentu á 2,3% av samansettu lánsbrævaskuldini.

**Átekning**
Landsstýriskvinnuni verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum høvuðskontuna og høvuðskontu 80.50.1.02. Frávik fyri rentuútreiðslur.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | -9.200 | -280.266 | 46.550 | 86.000 | 140.000 | 168.000 |
| Inntøkur | -35.100 | -300.416 | - | - | - | - |
| **01. Rentur av skuld** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-9.200** | **-280.266** | **46.550** | **86.000** | **140.000** | **168.000** |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | -9.200 | -280.266 | 46.550 | 86.000 | 140.000 | 168.000 |
| **Inntøkur** | **-35.100** | **-300.416** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *-35.100* | *-300.416* | - | - | - | - |

## 20.50.2. Rentuinntøkur o.t.

### 20.50.2.01. Rentuinntøkur av innistandandi (Ógreinað játtan)

**Undirkonta 01. Rentur av innistandandi**
Sambært løgtingslóg nr. 116 frá 24. november 2016 um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð, við seinni broytingum, situr Landsbankin fyri gjaldføris- og skuldarviðurskiftunum hjá landinum.

Gjaldføri landskassans var við ársenda 2022 umleið 3,4 mia. kr. Minstagjaldførið svarar til 15% av BTÚ. Í 2023 er minstagjaldførið 3,4 mia. kr. Nevndin í Landsbankanum hevur ásett minstagjaldførið í 2024 at vera 3,7 mió. kr.

Roknskaparmeginreglan fyri rentuinntøkurnar er, at effektiva rentan verður brúkt. Fyri rentuinntøkurnar er hetta ikki so einfalt at gera upp sum fyri rentur av skuld, tí tað kunnu vera upp móti 200 ymisk virðisbrøv í íløgurøðini, og samansetingin av hesum verður javnan broytt. Samstarvsfelagarnir Nordea, Nykredit, Danske Capital og SEB hava givið teirra meting av væntaðum avkasti. Peningastovnarnir býta aktivini upp í aktivklassar og geva teirra boð uppá eitt langtíðaravkast fyri hvønn aktivklassa. Henda avkastmeting verður nýtt til íløgurøðina hjá landinum, har útgangsstøðið er minstagjaldførið og ein miðalsalda í hvørjum aktivklassa.

Metingarnar av rentuinntøkum eru grundarlag bæði fyri játtan og roknskapi. Frávik í mun til játtan verða skrásett sum óvanligar inntøkur ella útreiðslur undir RLÚ 2 og ávirka tí ikki RLÚ 1.

Arbeitt verður við at broyta samansetingina av virðisbrøvum í umsitingini av gjaldførinum hjá landinum, soleiðis at rentuinntøkurnar vaksa. Broytingin í samansetingini verður framd eftir nøkrum árum.

Rentuinntøkurnar vóru 30,6 mió. kr. í 2022 og verða 84,2 mió. kr. í 2023. Roknað verður við rentuinntøkum á 122 mió. kr. í 2024, svarandi til eitt miðalavkast á 3,6% av gjaldførinum.

**Undirkonta 02. Samsýning til Landsbankan**
Landsbankin hevur í størstan mun verið fíggjaður við gjaldi svarandi til upp til 4 promillu av minstagjaldføri landsins. Fyri 2021 var gjaldið 7,4 mió. kr.

Sambært løgtingslóg nr. 73 frá 5. mai 2021 um broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð fær Landsbankin nú vanliga rakstrarjáttan í fíggjarlógini. Gjaldið til Landsbankan fall tí burtur frá og við 2022.

**Átekning**
Landsstýriskvinnuni verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum høvuðskontuna og høvuðskontu 80.50.2.02. Frávik fyri rentuinntøkur.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 109.835 | -323.352 | - | - | - | - |
| Inntøkur | 141.902 | -292.802 | 84.150 | 122.000 | 130.000 | 132.000 |
| **01. Rentur av innistandandi** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **102.402** | **-323.352** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 102.402 | -323.352 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **141.902** | **-292.802** | **84.150** | **122.000** | **130.000** | **132.000** |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *141.902* | *-292.802* | *84.150* | *122.000* | *130.000* | *132.000* |
| **02. Samsýning til Landsbankan** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **7.434** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 7.434 | - | - | - | - | - |

## 20.50.2.04. Aðrar rentur (Ógreinað játtan)

Hesar rentuinntøkur stava frá pørtum av útlánum landskassans, t.d. stuðulslánum, serlánum og kurslánum. Torført er at meta um hesar inntøkur.

Inntøkurnar frá øðrum rentum vóru 0,2 mió. í 2022. Játtanin fyri 2023 er 1 mió. kr. Roknað verður við 1 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkujáttan | 179 | 194 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| **01.Aðrar rentur** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **179** | **194** | **1.000** | **1.000** | **1.000** | **1.000** |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *179* | *194* | *1.000* | *1.000* | *1.000* | *1.000* |

## 20.50.2.10. Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank (Ógreinað játtan)

Sambært § 19 í fólkatingslóg nr. 116 frá 7. apríl 1936 um Danmarks Nationalbank, við seinni broytingum, fer yvirskotið hjá bankanum, eftir at møguliga avsett er í tiltaksgrunn ella serstakar trygdargrunnar, til ríkið.

Føroyski landskassin fær part av yvirskotsveiting frá Nationalbankanum til ríkið. Partur landskassans verður roknaður sum lutfallið millum tað føroyska seðlaumfarið og alt seðlaumfarið í ríkinum við ársenda. Av tí at rakstrarúrslit bankans verður broytt av, at lánsbrøv, gjaldoyra, gull o.a. verða kursjavnað við ársenda, er ringt at meta um upphæddina, sum goldin verður føroyska landskassanum. Landskassans partur verður inntøkuførdur í fíggjarárinum eftir roknskaparárslok hjá bankanum.

Nationalbankin hevði ávikavist avlop á 194 mió. kr. í 2021 og hall á 8.464 mió. kr. í 2022. Onki er útlutað í 2022 og 2023. Roknað verður við útluting á 5 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | - | - | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| **01.Yvirskot** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **5.000** | **5.000** | **5.000** | **5.000** |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | - | - | *5.000* | *5.000* | *5.000* | *5.000* |

# Skattir og avgjøld

## 20.52.1. Skattainntøkur

### 20.52.1.01. Vanligur landsskattur (Ógreinað játtan)

Samtíðarskattur verður kravdur sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (skattalógin), við seinni broytingum, og løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti (ásetingarlógin), við seinni broytingum.

TAKS krevur landsskatt og kommunuskatt (herundir atvinnuskatt) inn og flytir kommunuskattin til kommunurnar. Inntøkugrundarlagið byggir á tey fólk, sum sambært nevndu lógum skulu gjalda skatt í Føroyum.

Skatturin er settur saman av hesum høvuðsupphæddum:

- Fyribilsskattur er tað, sum er inngoldið í fyribilsskatti í skattaárinum (gjaldsmeginregla)
- Endalig uppgerð, sum er munurin millum tað, ið er goldið í árinum (fyribilsskattur), og endaligu álíkningina fyri árið

Inntøkurnar av vanligum landsskatti vóru netto 1.928,3 mió. kr. í 2022 og eru mettar til netto 2.080 mió. kr. í 2023.

Persónar, sum fáa fólkapensjón, fáa ein frádrátt í skattinum á 6.000 kr. Frádrátturin verður broyttur frá 3.000 kr. í landsskattinum og 3.000 kr. í kommunuskattinum til bara at vera 6.000 kr. í frádrátti í landsskattinum. Broytingin hevur við sær eina metta minni inntøku í landsskattinum á 26 mió. kr. í 2024, 27 mió. kr. í 2025 og 27 mió. kr. í 2026. Uppskot til broyting í ásetingarlógini verður lagt fyri Løgtingið saman við uppskotinum til fíggjarlóg.

Samlaða metingin um inntøkurnar í 2024 byggir á vøkstur í búskapinum, prísum, lønum og fólkatali í árinum. Samanumtikið eru mettu inntøkurnar í 2023 framskrivaðar við um 4,5%. Roknað verður við, at inntøkur landskassans av vanliga landsskattinum verða netto 2.175 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkujáttan | 1.784.788 | 1.928.268 | 2.005.000 | 2.175.000 | 2.230.000 | 2.285.000 |
| **01.Vanligur landsskattur** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **3.907.211** | **4.175.706** | **4.455.000** | **4.858.000** | **4.982.000** | **5.104.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *3.901.279* | *4.179.448* | *4.455.000* | *4.858.000* | *4.982.000* | *5.104.000* |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | - | *180* | - | - | - | - |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *5.932* | *-3.922* | - | - | - | - |
| **07.Húsaleiguskattur** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **1.486** | **1.896** | **2.000** | **2.000** | **2.000** | **2.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *1.466* | *1.876* | *2.000* | *2.000* | *2.000* | *2.000* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *20* | *20* | - | - | - | - |

**09.Flutt til kommunur**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | **-2.123.250** | **-2.248.489** | **-2.451.000** | **-2.684.000** | **-2.753.000** | **-2.820.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *-2.123.250* | *-2.248.489* | *-2.451.000* | *-2.684.000* | *-2.753.000* | *-2.820.000* |

**13.Skattur av húsaleigu flutt til kommunur**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | **-660** | **-844** | **-1.000** | **-1.000** | **-1.000** | **-1.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *-660* | *-844* | *-1.000* | *-1.000* | *-1.000* | *-1.000* |

## 20.52.1.04. FAS-skipanin (Ógreinað játtan)

Lønarinntøka hjá øllum føroyingum og útlendingum í FAS-skipanini verður sambært § 8, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti (ásetingarlógin), við seinni broytingum, skattað við 35%. Skatturin frá FAS verður afturborin reiðaravirkjum sum stuðul sambært § 63 a í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (skattalógin), við seinni broytingum, og tilhoyrandi kunngerð.

Goldin skattur frá FAS-skipanini var brutto 209,6 mió. kr. í 2022 og verður mettur til brutto 230 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 230 mió. kr. í 2024.

Av tí at afturberingin er sama upphædd sum skatturin, er netto eingin beinleiðis skattainntøka frá FAS-skipanini til landskassan, og játtanin verður netto 0 kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 185.222 | 214.176 | 220.000 | 230.000 | 235.000 | 240.000 |
| Inntøkur | 189.019 | 209.640 | 220.000 | 230.000 | 235.000 | 240.000 |
| **01. FAS-endurgjald** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **185.222** | **214.176** | **220.000** | **230.000** | **235.000** | **240.000** |
| 53. Stuðul til vinnu | 185.222 | 214.176 | 220.000 | 230.000 | 235.000 | 240.000 |
| **02. Skattainntøka frá FAS-skipanini** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **189.019** | **209.640** | **220.000** | **230.000** | **235.000** | **240.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *189.019* | *209.640* | *220.000* | *230.000* | *235.000* | *240.000* |

## 20.52.1.05. Kirkjuskattur (Ógreinað játtan)

Grundarlagið undir kirkjuskattinum er løgtingslóg nr. 61 frá 7. juni 2007 um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar. Kirkjuskatturin er býttur í tvey: ein landskirkjuskatt, ið hægst kann vera 0,65% av skattskyldugu inntøkuni, og ein staðbundnan kirkjuskatt, ið hægst kann vera 0,3% av skattskyldugu inntøkuni.

Landskirkjuskatturin er 0,6%, meðan staðbundni kirkjuskatturin er millum 0,0% og 0,3%, alt eftir kirkjusóknum.

Kirkjuskatturin var 71 mió. kr. í 2022 og verður mettur til 74 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 76 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkujáttan | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **01.Kirkjuskattur** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **66.291** | **70.992** | **74.000** | **76.000** | **78.000** | **80.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *66.291* | *70.992* | *74.000* | *76.000* | *78.000* | *80.000* |
| **08.Flutt til kirkjur** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-66.291** | **-70.992** | **-74.000** | **-76.000** | **-78.000** | **-80.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *-66.291* | *-70.992* | *-74.000* | *-76.000* | *-78.000* | *-80.000* |

## 20.52.1.07. Felagsskattur (Ógreinað játtan)

Felagsskattur verður kravdur sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (skattalógin), við seinni broytingum, og løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti (ásetingarlógin), við seinni broytingum.

Inntøkugrundarlagið er tey feløg, sum sambært nevndu lógum skulu gjalda skatt í Føroyum. Felagsskatturin, sum fellur til gjaldingar í 2023, er álíknaður á teir roknskapir, har roknskaparárið fellur saman við ella endar í 2022.

Felagsskatturin er 18% av skattskyldugu inntøkuni, harav fær landið 70% og kommunurnar 30%.

Felagsskatturin var netto 458,5 mió. kr. í 2022 og verður mettur til netto 475 mió. kr. í 2023. Roknað verður við netto 450 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 108 | 540 | - | - | - | - |
| Inntøkur | 337.540 | 459.042 | 470.000 | 450.000 | 460.000 | 470.000 |
| **01. Felagsskattur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **108** | **540** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 108 | 540 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **482.067** | **656.528** | **671.000** | **643.000** | **657.000** | **671.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *481.432* | *655.486* | *671.000* | *643.000* | *657.000* | *671.000* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *634* | *1.043* | - | - | - | - |
| **09. Flutt til kommunur** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-144.526** | **-197.486** | **-201.000** | **-193.000** | **-197.000** | **-201.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *-144.526* | *-197.486* | *-201.000* | *-193.000* | *-197.000* | *-201.000* |

## 20.52.1.11. Kapitalvinningsskattur (Ógreinað játtan)

Kapitalvinningsskattur verður kravdur sambært løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi (kapitalvinningsskattalógin), við seinni broytingum.

Sambært § 14 í lógini verða roknað við í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni:

- Søla og avhendan av partabrøvum v.m. eftir § 4 jvm. við § 1, 1)
- Innfrían, søla og onnur avhendan av fíggjarkrøvum, leysgevan av skuld v.m. eftir § 6 jvm. § 1, 2 og 3)
- Vinningur ella tap við eftirgeving, fyrning v.m. av skuld v.m. eftir § 7, jvm. § 1, 3)
- Vinningur ella tap av keyps- og sølurættindum v.m. eftir § 8 jvm. § 1, 4)
- Vinningsbýti eftir § 9 jvm. § 1, 5)
- Rentuinntøkur eftir § 10 jvm. § 1, 6)
- Rentuútreiðslur eftir § 10, stk. 3

Fyribilsskattur verður goldin av rentuinntøkum og vinningsbýti. Tær inntøkurnar verða um árslok gjørdar upp saman við øðrum kapitalinntøkum. Uppgerðin kann geva avlops- ella írestandi skatt.

**Vinningsbýti**
Feløg, grunnar o.o., sum luta út vinningsbýti til likamligar persónar, skulu halda aftur skatt, sum er 35%. Tá ið útlutað verður til feløg, grunnar o.o., skal verða hildin aftur skattur, sum er 18%. Feløg, grunnar o.o., sum eru fult skattskyldug í Føroyum, skulu ikki gjalda skatt av vinningsbýtinum. Avgerandi fyri, í hvørjum fíggjarári skattur av vinningsbýti verður tikin við, er, nær vinningsbýtið fellur til gjaldingar. Vinningsbýtið, sum fellur til gjaldingar í 2023, verður tikið við í 2023.

**Rentuinntøkur**
Fyri likamligar persónar og deyðsbúgv undir fullari ella avmarkaðari skattskyldu í Føroyum verða rentuinntøkur roknaðar upp í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni. Inntøkan verður skattað við 35%. Fyri tilskrivaða rentu í føroyskum peningastovnum er galdandi, at peningastovnurin, sum tilskrivar rentu á innlánið tvær ferðir um árið, avroknar í rentuskatti 35% beinleiðis í landskassan.

Fyri feløg og grunnar verða rentuinntøkur skattaðar við 18%.

**Vinningur av virðisbrævasølu**
Vinningur av sølu av virðisbrøvum verður fyri likamligar persónar skattaður við 35%. Feløg, grunnar o.o. lata skatt upp á 18%.

Kapitalvinningsskattalógin varð broytt í 2006 soleiðis, at frá 1. januar 2007 var skattafrítøkan tikin av fyri virðisbrøv, ið vórðu útvegað, áðrenn lógin kom í gildi, tó soleiðis at tað bert er staðfesti vinningurin eftir 1. januar 2007, ið verður skattaður.

Kapitalvinningsskatturin var 247,9 mió. kr. í 2022 og verður mettur til 365 mió. kr. í 2023. Metingarnar eru grundaðar á, at serliga alivinnan hevur fingið betri úrslit. Roknað verður við 325 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | - | - | - | - | - | - |
| Inntøkur | 271.169 | 247.919 | 350.000 | 325.000 | 335.000 | 350.000 |
| **01.Kapitalvinningsskattur** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **271.169** | **247.919** | **350.000** | **325.000** | **335.000** | **350.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *266.936* | *257.815* | *350.000* | *325.000* | *335.000* | *350.000* |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | - | *196* | - | - | - | - |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *4.233* | *-10.092* | - | - | - | - |

## 20.52.1.12. Skattur av vinningi frá sølu av veiðirættindum (Ógreinað játtan)

Sambært løgtingslóg nr. 105 frá 29. juni 2020 um skatting av vinningi frá sølu av veiðirættindum, við seinni broytingum, hava likamligir og løgfrøðiligir persónar, sum endaliga avhenda veiðirættindi ella partabrøv í feløgum, sum eru fevnd av løgtingslóg um sjófeingi, skyldu at gjalda skatt.

Tá einans veiðirættindi verða avhendað, er tað søluupphæddin, ið partarnir hava avtalað, ið er grundarlag fyri útrokningini av serskattinum. Frá søluupphæddini verður drigin kostnaðurin av at keypa rættindini, ið verða avhendað.

Verða veiðirættindini seld saman við skipi og møguligum øðrum aktivum, verður støði tikið í samlaða søluvirðinum. Frá søluvirðinum verður drigið eitt mett handilsvirði (óheft fakfólk meta) á øðrum aktivum enn veiðirættindunum, ið verða avhendað. Upphæddin, ið hereftir kemur fram, er søluvirðið á veiðirættindunum, ið verða avhendað. Frá søluupphæddini verður drigin kostnaðurin av at keypa rættindini, ið verða avhendað.

Verða partabrøv ella onnur virðisbrøv avhendað í felag, har veiðirættindi beinleiðis ella óbeinleiðis eru partur av ogn felagsins, verður støði tikið í innara virðinum á avhendaða felagnum og øllum feløgunum, sum avhendaða felagið beinleiðis ella óbeinleiðis eigur lut í. Handilsvirðið á skipi og øðrum aktivum enn veiðirættindum verður funnið. Innara virðið verður síðani javnað við muninum millum metta handilsvirðið og bókaða virðið á einstøku aktivunum. Innara virðið á feløgunum verður hereftir javnað við muninum millum kostnaðin av at keypa rættindini og bókaða virðið á veiðirættindunum. Um rættindini, ið verða avhendað, eru útvegað frá felag, ið var í samtaki, er tað munurin millum kostnaðin, tá ið samtakið útvegaði rættindini, og bókaða virðið á veiðirættindunum, sum tað skal javnast við, um serskattur ikki er álagdur sambært hesari lóg. Virðisjavnaða innara virðið á felagnum, javnað fyri útsettan skatt, verður síðani drigið frá søluvirðinum á samlaða partapeninginum.

Serskattur uppá 50% verður síðan roknaður og álíknaður seljaranum, um seljarin er ein løgfrøðiligur persónur. Er seljarin ein likamligur persónur, verður serskattur uppá 35% álíknaður.

Inntøkurnar frá skatting av vinningi frá sølu av veiðirættindum vóru 9,1 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 10 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 10 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | - | 9.088 | 5.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| **01.Skattur av vinningi frá sølu av veiðirættindum** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-** | **9.088** | **5.000** | **10.000** | **10.000** | **10.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | - | *8.873* | *5.000* | *10.000* | *10.000* | *10.000* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | - | *215* | - | - | - | - |

## 20.52.1.13. Avgjald av kapitaleftirlønum (Ógreinað játtan)

Avgjald av kapitaleftirlønum verður kravt sambært løgtingslóg nr. 51 frá 29. desember 1971 um skatt av rentutryggingum v.m. (rentutryggingarlógin), við seinni broytingum.

Avgjald á 35% verður goldið, tá ið kapitaleftirlønir verða útgoldnar við heimild í § 6, b) og c) eftir reglunum í § 7, stk. 1 í sambandi við:

- Aldur
- Deyða
- Úr starvi av óarbeiðsføri

Sambært § 7, stk. 2 verður 55% avgjald goldið við útgjalding av kapitaleftirlønum. Reglan verður nýtt í sambandi við útgjald í ótíð, t.d. tá ið persónur fer úr føroysku skattaskipanini (flytur av landinum). Áður vórðu sambært § 10 í lógini latin 40% av inngoldna avgjaldinum til kommunurnar. Lógargreinin varð strikað frá 2015 at virka, soleiðis at alt avgjaldið fellur til landskassan. Hetta var partur av fíggingarmyndlinum viðvíkjandi eldraøkinum í sambandi við, at kommunurnar yvirtóku eldraøkið frá 1. januar 2015.

Inntøkugrundarlagið fyri avgjald av kapitaleftirlønum er ógvuliga skiftandi, og tí er ikki gjørligt at gera neyvar metingar av inntøkunum.

Avgjaldið av kapitaleftirlønum var 57,3 mió. kr. í 2022 og verður mett til 65 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 68 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 46.051 | 57.318 | 57.000 | 68.000 | 70.000 | 72.000 |
| **01.Avgjald av kapitaleftirlønum** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **46.051** | **57.318** | **57.000** | **68.000** | **70.000** | **72.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *46.051* | *57.318* | *57.000* | *68.000* | *70.000* | *72.000* |

## 20.52.1.14. Skattur av pensjónsinngjøldum (Ógreinað játtan)

Sambært §§ 11 a-c í løgtingslóg nr. 51 frá 29. desember 1971 um skatt av rentutryggingum v.m. (rentutryggingarlógin), við seinni broytingum, er ásett, at pensjónir frá 1. januar 2012 verða skattaðar við inngjald. Somuleiðis er ásett, at tær pensjónirnar ikki verða skattaðar við útgjald. Netto verður

ikki talan um, at skattainntøkur landsins - sæð yvir pensjónsgjaldstíðarskeiðið - hækka, men heldur er talan um, at tær eru fluttar fram í tíð.

Eftirlønarlógin (løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai 2013 um eftirløn, við seinni broytingum), sum kom í gildi 1. januar 2014, hevði við sær, at pensjónsinngjøldini fóru og fara at vaksa árini frameftir.

Stigvísur skattur av penjónsinngjøldum varð settur í gildi 1. januar 2019, har persónar við skattskyldugari inntøku undir 330 tús. kr. rinda minni enn 40% av pensjónsinngjaldinum í skatti. Eftir broyttu skipanini verða framvegis 40% afturhildin hjá øllum. Árið eftir, tá undanfarna skattaár er gjørt upp, fáa skattgjaldarar við inntøku undir 330 tús. kr. skatt afturgoldnan inn á eftirlønarkontuna.

Skatturin av pensjónsinngjøldum var 474,6 mió. kr. í 2022 og verður mettur til 510 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 520 mió. kr. í skatti av pensjónsinngjøldum í 2024.

Fíggingarmyndilin viðvíkjandi eldraøkinum í sambandi við, at kommunurnar yvirtóku eldraøkið frá 1. januar 2015, hevur við sær, at allur skatturin av pensjónsinngjøldum fellur til kommunurnar frá 2015 og frameftir. Tí eru inntøkurnar netto mettar til 0 kr. frá 2015 og frameftir.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 49 | -737 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **01.Skattur av pensjónsinngjøldum** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **438.056** | **474.599** | **500.000** | **520.000** | **530.000** | **540.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *438.056* | *474.599* | *500.000* | *520.000* | *530.000* | *540.000* |
| **02.Flutt til kommunur (pensjónsskattur)** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-438.006** | **-475.336** | **-500.000** | **-520.000** | **-530.000** | **-540.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *-438.006* | *-475.336* | *-500.000* | *-520.000* | *-530.000* | *-540.000* |

## 20.52.1.25. Arvaavgjald (Ógreinað játtan)

Arvaavgjald verður kravt sambært anordning nr. 468 frá 8. november 1921 om hvorved lov om arveafgift af 27. mai 1908 sættes i kraft på Færøerne, við seinni broytingum.

Áður hevur býtið verið soleiðis, at meginparturin av arvaavgjaldinum varð goldin landskassanum, og ein minni partur goldin ríkiskassanum, men við løgtingslóg nr. 124 frá 7. desember 2012 um broyting í lóg um arvaavgjald er frá 2013 og frameftir alt arvaavgjaldið goldið í landskassan.

Inntøkurnar frá arvaavgjaldi vóru 14,4 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 20 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 21 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkujáttan | 19.362 | 14.424 | 15.000 | 21.000 | 22.000 | 23.000 |
| **01.Arvaavgjald** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **19.362** | **14.424** | **15.000** | **21.000** | **22.000** | **23.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *19.362* | *14.424* | *15.000* | *21.000* | *22.000* | *23.000* |

## 20.52.1.26. Gjald til Vinnusjúkugrunnin (Ógreinað játtan)

Arbeiðsskaðatryggingarlógin (løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, við seinni broytingum) kom í gildi 1. januar 2010.

Lógin var ein dagføring av táverandi vanlukkutryggingarlóg, umframt at nýggja lógin eisini fevndi um vinnusjúkur. Tað er ikki gjørligt at tekna trygging móti vinnusjúkum, og tí varð Vinnusjúkugrunnurin settur á stovn fyri at tryggja, at peningur er tøkur í hesum sambandi.

Til at fíggja Vinnusjúkugrunnin skulu allir arbeiðsgevarar gjalda 0,1% av útgoldnum A-inntøkum, eins og sjálvstøðugt vinnurekandi skulu gjalda 0,1% av skattskyldugu inntøkuni av vinnuvirkinum fyri síðsta inntøkuár.

Gjøldini til Vinnusjúkugrunnin vóru 11,5 mió. kr. í 2022 og verða mett til 12,1 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 12,4 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021<br>R | 2022<br>R | 2023<br>J | **2024**<br>**F** | 2025<br>Æ | 2026<br>Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkujáttan | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **01.Gjald til Vinnusjúkugrunnin** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **10.940** | **11.495** | **12.000** | **12.400** | **12.800** | **13.200** |
| 61. Skattir og avgjøld | *10.940* | *11.495* | *12.000* | *12.400* | *12.800* | *13.200* |
| **02.Flyting til Vinnusjúkugrunnin** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-10.940** | **-11.495** | **-12.000** | **-12.400** | **-12.800** | **-13.200** |
| 61. Skattir og avgjøld | *-10.940* | *-11.495* | *-12.000* | *-12.400* | *-12.800* | *-13.200* |

## 20.52.1.27. Gjald til Heilsutrygd (Ógreinað játtan)

Lógargrundarlagið undir Heilsutrygd er løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd, við seinni broytingum.

Heilsutrygd er almenn heilsutrygdarskipan, sum 1. januar 2010 kom fyri gomlu skipanina við 11 sjúkrakassum kring landið. Endamálið við nýskipanini var at tryggja øllum eina samhaldsfasta almenna heilsutrygd, har allir borgarar verða javnsettir viðvíkjandi inngjaldi og tænastum.

Frá 1. januar 2016 broyttist gjaldssamansetingin soleiðis, at øll, sum eru fylt 18 ár, skulu gjalda 175 kr. um mánaðin umframt 0,6% av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd. Frá 1. januar 2021 hækkaði prosentgjaldið av skattskyldugu inntøkuni upp í 0,7%.

Gjaldið til Heilsutrygd var 178,7 mió. kr. í 2022 og verður mett til 181 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 184 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkujáttan | 172.420 | 178.655 | 184.000 | 184.000 | 186.000 | 190.000 |
| **01.Gjald til Heilsutrygd** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **172.420** | **178.655** | **184.000** | **184.000** | **186.000** | **190.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *172.047* | *178.272* | *184.000* | *184.000* | *186.000* | *190.000* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *373* | *383* | - | - | - | - |

## 20.52.1.28. Gjald til barsilsskipan (Ógreinað játtan)

Gjald til barsilsskipan verður kravt inn við heimild í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan, við seinni broytingum.

Arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar rinda til barsilsskipan í mun til A-inntøkuna. Frá 1. januar 2021 hækkaði gjaldið við 0,15% upp í 0,86%.

Gjøldini til barsilsskipanina vóru 192,3 mió. kr. í 2022 og verða mett til 200 mió. kr. Roknað verður við 205 mió. kr. í 2024.

Goldnu upphæddirnar verða fluttar í Barsilsgrunnin, sum fíggjar virksemið á høvuðskontu 18.39.4.01. Barsilsskipan og á høvuðskontu 18.39.4.04. Umsiting av barsilsskipan.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 182.461 | 192.270 | 200.000 | 205.000 | 210.000 | 215.000 |
| Inntøkur | 182.461 | 192.270 | 200.000 | 205.000 | 210.000 | 215.000 |
| **01. Gjald til barsilsskipan** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **182.461** | **192.270** | **200.000** | **205.000** | **210.000** | **215.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *182.461* | *192.270* | *200.000* | *205.000* | *210.000* | *215.000* |
| **09. Flutt til Barsilsgrunn** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **182.461** | **192.270** | **200.000** | **205.000** | **210.000** | **215.000** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 182.461 | 192.270 | 200.000 | 205.000 | 210.000 | 215.000 |

## 20.52.1.30. Gjald til Búnaðarstovuna (Ógreinað játtan)

Játtanin er til gjald frá Búnaðargrunninum. Gjaldið er fyri jarðarumsiting, sum verður framd við játtanini á høvuðskontu 6.33.2.03. Búnaðarstovan.

Gjaldið frá Búnaðargrunninum var 4,3 mió. kr. i 2022 og mett til 4,3 mió. kr. í 2023. Roknað verður somuleiðis við 4,3 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 4.300 | 4.300 | 4.300 | 4.300 | 4.300 | 4.300 |
| **01.Gjald til Búnaðarstovuna** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **4.300** | **4.300** | **4.300** | **4.300** | **4.300** | **4.300** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *4.300* | *4.300* | *4.300* | *4.300* | *4.300* | *4.300* |

# 20.52.2. Avgjøld og tollur

## 20.52.2.01. Meirvirðisgjald (Ógreinað játtan)

Meirvirðisgjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald, við seinni broytingum. Avgjald verður rindað í landskassan í øllum liðum í vinnuligari vøru- og tænastusølu og av innflutningi úr útlondum.

Høvuðsreglan er, at mvg-inntøkurnar verða tiknar við í tí fíggjarári, tá ið kravið er gjaldkomið. T.e., at eitt krav, sum stavar frá síðsta ársfjórðingi í 2022, fellur til gjaldingar 10. februar í 2023, og verður tí tikið við sum inntøka í fíggjarárinum 2023. Fyri vikuavrokningar er avgerandi, nær uppgávan er innlisin í skipanina. Fyri mvg-endurgjald til kommunur er avgerandi, nær upphæddin verður útgoldin.

Í 2022 komu netto 1.988,7 mió. kr. inn í meirvirðisgjaldi. Í 2023 verða inntøkurnar mettar til 1.995 mió. kr.

Lógin um meirvirðisgjald varð broytt við løgtingslóg nr. 27 frá 27. februar 2023. Broytingin hevði við sær, at afturberingin av meirvirðisgjaldi uppá í mesta lagi 70.000 kr. í sambandi við keyp av el- og vetnisakførum varð longd til árslok 2024 og síðani stigvíst lækkað yvir 4 ár. Fyri plug-in hybridakfør vórðu í mesta lagi 35.000 kr. endurgoldnar fram til 1. september 2023.

Roknað verður við, at inntøkur landskassans frá meirvirðisgjaldi verða netto 2.085 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 265.150 | 333.237 | 210.000 | 230.000 | 230.000 | 230.000 |
| Inntøkur | 2.207.869 | 2.321.938 | 2.295.000 | 2.315.000 | 2.370.000 | 2.425.000 |
| **01. Meirvirðisgjald** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **55.061** | **102.056** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 29.578 | 43.890 | - | - | - | - |
| 53. Stuðul til vinnu | 5.429 | 47.932 | - | - | - | - |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 20.054 | 10.234 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **2.207.869** | **2.321.938** | **2.295.000** | **2.315.000** | **2.370.000** | **2.425.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *2.201.542* | *2.315.242* | *2.289.000* | *2.306.000* | *2.361.000* | *2.416.000* |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | *1.242* | *1.204* | *1.500* | *1.500* | *1.500* | *1.500* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *5.084* | *5.492* | *4.500* | *7.500* | *7.500* | *7.500* |

**09. Endurrindan av keyps-MVG til kommunur**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útreiðslur** | **210.090** | **231.182** | **210.000** | **230.000** | **230.000** | **230.000** |
| 75. Keyps-mvg | 210.090 | 231.182 | 210.000 | 230.000 | 230.000 | 230.000 |

## 20.52.2.04. Tollavgjøld (Ógreinað játtan)

Tollavgjøld verða kravd sambært § 2 í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll, við seinni broytingum.

Tollavgjald er GATT-tollur, ið er ásettur fyri hvørt vørunummar sær í Toll- og Vøruskránni. Eingin GATT-tollur verður roknaður av innflutningi úr ES- og EFTA-londum og teimum londum, Føroyar hava fríhandilsavtalu við.

Tollavgjøldini vóru 89,6 mió. kr. í 2022 og verða mett til 88 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 90 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 70.919 | 89.600 | 90.000 | 90.000 | 91.000 | 92.000 |
| **01.Tollavgjøld** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **70.919** | **89.600** | **90.000** | **90.000** | **91.000** | **92.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *69.443* | *87.667* | *90.000* | *90.000* | *91.000* | *92.000* |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | *463* | *570* | - | - | - | - |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *1.012* | *1.363* | - | - | - | - |

## 20.52.2.07. Punktgjøld (Ógreinað játtan)

Punktgjøld verða kravd sambært § 1 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi, við seinni broytingum.

Punktgjøldini vóru 188,9 mió. kr. í 2022 og verða mett til 185 mió. kr. í 2023. Roknað verður við, at inntøkurnar frá punktgjøldum verða 187 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 204.638 | 188.931 | 190.000 | 187.000 | 190.000 | 193.000 |
| **01.Punktgjøld** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **204.638** | **188.931** | **190.000** | **187.000** | **190.000** | **193.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *204.638* | *188.931* | *190.000* | *187.000* | *190.000* | *193.000* |

## 20.52.2.10. Lønarhæddaravgjald (Ógreinað játtan)

Lønarhæddaravgjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993 um lønarhæddaravgjald, við seinni broytingum. Avgjald gjalda hesi virki, sum fyri samsýning lata tænastur:

- Læknavirksemi, tannlækna- og annað tannavirksemi, kiropraktik, fysioterapi og onnur verulig heilsurøkt hava avgjald á 2,5%
- Tryggingarvirksemi hevur avgjald á 10%
- Banka-, sparikassa- og fíggjarvirksemi hevur avgjald á 12%

Í 2022 komu 41,4 mió. kr. inn í lønarhæddaravgjaldi. Í 2023 verða inntøkurnar mettar til 41 mió. kr. Roknað verður við 41 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 40.856 | 41.431 | 41.000 | 41.000 | 42.000 | 43.000 |
| **01.Lønarhæddaravgjald** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **40.856** | **41.431** | **41.000** | **41.000** | **42.000** | **43.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *40.838* | *41.413* | *41.000* | *41.000* | *42.000* | *43.000* |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | *2* | *3* | - | - | - | - |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *17* | *15* | - | - | - | - |

## 20.52.2.13. Brennioljugjald (Ógreinað játtan)

Brennioljugjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 179 frá 18. desember 1992 um serligt avgjald á brenniolju, við seinni broytingum.

Eitt gjald, sum er 0,80 kr. fyri liturin, verður lagt á gassoljusøluna. Fyri gassolju, latin til skip yvir 20 GT, skal einki gjald verða rindað. Sambært kunngerð nr. 23 frá 19. februar 2003 um endurgjald av serligum oljugjaldi kunnu ávís meirvirðisgjaldskrásett virki fáa góðkenning at fáa endurrindað avgjaldið.

Í 2022 komu netto 68,3 mió. kr. inn í brennioljugjaldi. Í 2023 verða inntøkurnar mettar til netto 65 mió. kr. Roknað verður við netto 66 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 13.073 | 13.774 | 13.000 | 14.000 | 14.000 | 14.000 |
| Inntøkur | 89.516 | 82.090 | 81.000 | 80.000 | 81.000 | 82.000 |
| **01. Brennioljugjald** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **13.073** | **13.774** | **13.000** | **14.000** | **14.000** | **14.000** |
| 53. Stuðul til vinnu | 13.073 | 13.774 | 13.000 | 14.000 | 14.000 | 14.000 |
| **Inntøkur** | **89.516** | **82.090** | **81.000** | **80.000** | **81.000** | **82.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *89.516* | *82.090* | *81.000* | *80.000* | *81.000* | *82.000* |

### 20.52.2.14. Loyvisgjald á alivinnu (Ógreinað játtan)

Alivinnan rindar loyvisgjald eftir løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu, við seinni broytingum.

Frá 1. januar 2019 til 1. august 2023 hevur tøkugjaldið verið:

- Er miðal altjóða marknaðarprísurin 36 kr. fyri kilo ella hægri, er gjaldið 5%
- Er miðal altjóða marknaðarprísurin 32 kr. fyri kilo ella hægri, men lægri enn 36 kr. fyri kilo, er gjaldið 2,5%
- Er miðal altjóða marknaðarprísurin lægri enn 32 kr. fyri kilo, er gjaldið 0,5%

Lógin um loyvisgjald á alivinnu varð broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 1. juni 2023, soleiðis at tøkugjøldini frá 1. august 2023 verða roknað sum ein prosentpartur av avgjaldsgrundarlagnum, sum er mánaðarliga tøkan av alifiski í kruvdari vekt, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum í sama mánaði. Prosentparturin er treytaður av miðal altjóða marknaðarprísin (P) og miðal framleiðslukostnaðin (K):

- Er P minni enn K, er gjaldið 0,5%
- Er P hægri enn ella hin sami sum K, men minni enn K pluss 5 kr., er gjaldið 2,5%
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 5 kr., men minni enn K pluss 15 kr., er gjaldið 5,0%
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 15 kr., men minni enn K pluss 20 kr., er gjaldið 7,5%
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 20 kr., men minni enn K pluss 25 kr., er gjaldið 10,0%
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 25 kr., men minni enn K pluss 30 kr., er gjaldið 12,5%
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 30 kr., men minni enn K pluss 35 kr., er gjaldið 15,0%
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 35 kr., men minni enn K pluss 40 kr., er gjaldið 17,5%
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 40 kr., er gjaldið 20,0%

Framleiðslukostnaðurin verður gjørdur upp út frá roknskapartølum, sum alifyritøkurnar lata inn hálvárliga. Landsstýrisfólkið almannakunnger miðal framleiðslukostnaðin 1. oktober og 1. apríl á hvørjum ári. Framleiðslukostnaðurin 1. august til 30. september 2023 er roknaður við støði í roknskapartølum fyri roknskaparárið 2022 og er 42,22 kr. fyri kilo. Tøkugjaldið fellur til gjaldingar 4 ferðir um árið.

Loyvisgjøld á alivinnuna eru knýtt at ávísari óvissu, sum søguliga serliga hevur havt samband við metingar um prísin fyri komandi árið. Fyri 2024 er óvissan helst nakað størri, tí framleiðsluprísurin, sum seinastu tíðina hevur verið hækkandi, skal setast hálvárliga, og ávís óvissa er eisini um, hvussu stór samlaða tøkan fyri 2024 verður.

Inntøkurnar frá loyvisgjaldi á alivinnu vóru 284,2 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 210 mió. kr. í 2023. Roknað verður við um 320 mió. kr. í 2024. Sambært lógini fella 2% av tøkugjaldinum til kommunurnar.

**Átekning**

Landsstýriskvinnuni verður sambært § 2, stk. 3 í løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu, við seinni broytingum, heimilað at nýta staðfesta mánaðarliga miðalspotprísin í evrum fyri

kruvdan laks sambært Fish Pool Index, sum altjóða marknaðarprís til útrokning av avgjaldsgrundarlagnum fyri tøkugjaldinum. Umroknað verður til danskar krónur við at nýta sentralkursin hjá Danmarks Nationalbank, sum er 746,038 danskar krónur fyri hvørjar 100 evrur.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 196.157 | 284.214 | 270.000 | 313.600 | 392.000 | 411.600 |
| **01.Tøkugjald á alivinnu** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **196.157** | **284.214** | **270.000** | **320.000** | **400.000** | **420.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *196.118* | *283.127* | *270.000* | *320.000* | *400.000* | *420.000* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *40* | *1.087* | - | - | - | - |
| **09.Flutt til kommunur** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **-** | **-6.400** | **-8.000** | **-8.400** |
| 61. Skattir og avgjøld | - | - | - | *-6.400* | *-8.000* | *-8.400* |

## 20.52.2.15. Avgjald á fiskatilfeingi (Ógreinað játtan)

Síðani 2011 hava árligar lógir álagt avgjald á ávísan fiskiskap. Fleiri av árunum hevur eisini uppboðssøla av veiðirættindum verið.

Í 2022 kom nýggj veiðigjaldslóg, løgtingslóg nr. 77 frá 5. mai 2021 um veiðigjøld fyri fiskiskap, í gildi - fyri botnfisk í Barentshavinum frá 1. januar og fyri uppsjóvarfisk frá 1. august. Lógin varð broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 1. juni 2023, har m.a. gjøldini vórðu dagførd. Somuleiðis fevnir lógin nú eisini um lodnu og heystgýtandi sild.

Veiðigjøldini verða ásett út frá miðal avreiðingarvirðinum árið fyri og vaksa stigvíst í mun til virðið. Gjøldini verða ásett í kunngerð fyri eitt ár í senn. Galdandi gjøldini eru:

- 1,45 kr. fyri kilo í rundari vekt av makreli (august 2023 - juli 2024)
- 0,87 kr. fyri kilo í rundari vekt av sild (august 2023 - juli 2024)
- 0,40 kr. fyri kilo í rundari vekt av svartkjafti (august 2023 - juli 2024)
- 1,08 kr. fyri kilo í rundari vekt av botnfiski í Barentshavinum (2023)

Gjøldini fyri lodnu verða ásett 15. juli 2024 fyri tíðarskeiðið august 2023 - juli 2024.

Inntøkurnar frá avgjaldi á fiskatilfeingi vóru 317,7 mió. kr. í 2022. Landið seldi rættindi á uppboðssølu í 2018 og 2019 eftir løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, við seinni broytingum. Lógin varð sett úr gildi við løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi, men landið hevur enn inntøkur frá uppboðssølu av 8 ára rættindum. Inntøkurnar frá uppboðssølu í 2018 og 2019 av 8 ára kvotum vóru 62,5 mió. kr. í 2022. Samanlagt vóru inntøkurnar frá avgjaldi og uppboðssølu 380,2 mió. kr. í 2022.

Óvissa er um bæði prís og nøgd fyri uppsjóvarfisk. Eingin semja er millum strandalondini, og óvist er, um atgongd fæst til bretskan sjógv. Í 2023 hevur makrelveiðan verið hægri enn árliga kvotan, tí at partur av kvotuni í 2022 varð flutt um ár. Somuleiðis er eisini ein óvissa um fiskiveiðisamstarvið við Rusland.

Inntøkurnar frá avgjaldi á fiskatilfeingi verða mettar til 460 mió. kr. í 2023. Inntøkurnar frá uppboðssølu í 2018 og 2019 av 8 ára rættindum verða mettar til 80 mió. kr. Samanlagt verða inntøkurnar mettar til 540 mió. kr. í 2023.

Í 2024 verður roknað við minni inntøku frá avgjaldi av makreli, men at tað kemur nakað afturat frá hægri avgjaldi á svartkjaft og botnfisk í Barentshavinum, umframt avgjaldi av lodnu og heystgýtandi sild.

Roknað verður við 430 mió. kr. í inntøkum frá avgjaldi á fiskatilfeingi og 70 mió. kr. í inntøkum frá uppboðsølu, tilsamans 500 mió. kr. í 2024. Sambært lógini fella 2% av avgjaldinum til kommunurnar.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 314.067 | 380.196 | 400.000 | 491.400 | 491.400 | 490.700 |
| **01.Avgjald á fiskatilfeingi** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **241.679** | **317.693** | **340.000** | **430.000** | **430.000** | **465.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *241.679* | *317.693* | *340.000* | *430.000* | *430.000* | *465.000* |
| **02.Uppboðssøla** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **72.387** | **62.503** | **60.000** | **70.000** | **70.000** | **35.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *72.387* | *62.503* | *60.000* | *70.000* | *70.000* | *35.000* |
| **09.Flutt til kommunur** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **-** | **-8.600** | **-8.600** | **-9.300** |
| 61. Skattir og avgjøld | - | - | - | *-8.600* | *-8.600* | *-9.300* |

## 20.52.2.16. Framleiðsluavgjøld (Ógreinað játtan)

Framleiðsluavgjøld verða kravd sambært § 2 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi, við seinni broytingum.

Størsti parturin av inntøkunum stavar frá framleiðslu av øli og cider.

Inntøkurnar frá framleiðsluavgjøldum vóru 25,6 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 30 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 31 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 26.049 | 25.597 | 26.000 | 31.000 | 32.000 | 33.000 |
| **01.Framleiðsluavgjøld** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **26.049** | **25.597** | **26.000** | **31.000** | **32.000** | **33.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *26.018* | *25.561* | *26.000* | *31.000* | *32.000* | *33.000* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *32* | *36* | - | - | - | - |

### 20.52.2.19. Skrásetingargjald (Ógreinað játtan)

Skrásetingargjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, við seinni broytingum.

Fyri motorakfør v.m., sum eru skrásetingarskyldug eftir løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, við seinni broytingum, verður ásett skrásetingargjald, sum byggir á eitt virðisgjald, og eitt $CO_2$-avgjald. Gjaldið verður rindað í landskassan, samstundis sum akfarið verður skrásett. Játtanin fatar eisini um burturbeiningargjald og umskrásetingargjald.

Persónbilar, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift, eru undantiknir virðisavgjaldi fram til árslok 2024. Eftir tað skal virðisgjald verða rindað av teimum. Virðisgjaldið veksur stigvíst yvir 4 ár, til tað í 2028 er 30% av avgjaldsskylduga virðinum upp til 100.000 kr. og 45% av restini.

Uppskot til broyting í lógini um avgjøld við skráseting av motorakførum er lagt fyri Løgtingið, sum hevur við sær, at persónbilar, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift, frá 1. januar 2024 skulu rinda eitt virðisgjald av tí partinum av CIF-virðinum, sum fer upp um 200.000 kr. Broytingin hevur við sær eina metta meirinntøku í skrásetingargjaldinum á 25 mió. kr. í 2024. Metta meirinntøkan minkar stigvíst fram 2028, tá ið hækkingin av skrásetingargjaldinum verður innheintað av verandi hækking í lógini. Uppskot til broyting í lógini um avgjøld við skráseting av motorakførum verður lagt fyri Løgtingið saman við uppskotinum til fíggjarlóg.

Lækkaða virðisgjaldið fyri persónbilar við hybrid ella plug-in hybrid tøkni, sum hevur verið galdandi frá 1. januar 2021, fór úr gildi 1. september 2023. Eftir tað verður rindað sama virðisgjald sum fyri bensin- og diesel persónbilar.

Inntøkurnar frá skrásetingargjaldi vóru netto 99,8 mió. kr. í 2022 og verða mettar til netto 90 mió. kr. í 2023. Roknað verður við netto 120 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 160.391 | 99.819 | 105.000 | 120.000 | 120.000 | 120.000 |
| **01.Skrásetingargjald** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **155.152** | **97.184** | **101.000** | **116.000** | **116.000** | **116.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *155.152* | *97.286* | *101.000* | *116.000* | *116.000* | *116.000* |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | - | *-102* | - | - | - | - |
| **02.Gjald fyri burturbeining av bili** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-7.620** | **-7.375** | **-8.000** | **-8.000** | **-8.000** | **-8.000** |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | *-7.620* | *-7.375* | *-8.000* | *-8.000* | *-8.000* | *-8.000* |
| **03.Inntøkur, burturbeiningargjøld** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **12.859** | **10.010** | **12.000** | **12.000** | **12.000** | **12.000** |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | *12.859* | *10.010* | *12.000* | *12.000* | *12.000* | *12.000* |

## 20.52.2.22. Vegskattur (Vektgjald) (Ógreinað játtan)

Vegskattur verður kravdur sambært løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 um veg- og umhvørvisgjald av motorakførum v.m., við seinni broytingum.

Vegskatt rinda skrásett akfør, við ávísum undantøkum. Vegskattur verður uppkravdur frammanundan hálvárliga.

Vegskatturin var 146,3 mió. kr. í 2022 og verður mettur til 147 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 148 mió. kr. í inntøkum frá vegskatti í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 143.905 | 146.280 | 148.000 | 148.000 | 150.000 | 152.000 |
| **01.Vegskattur (Vektgjald)** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **143.905** | **146.280** | **148.000** | **148.000** | **150.000** | **152.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *143.905* | *146.280* | *148.000* | *148.000* | *150.000* | *152.000* |

## 20.52.2.25. Ferðaavgjald (Ógreinað játtan)

Ferðaavgjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um ferðagjald, við seinni broytingum.

Fyri ferðafólk, ið verða flutt úr Føroyum, skal rindast ferðagjald til landskassan. Gjaldið hevur síðani 1. oktober 2013 verið 65 kr. fyri hvønn ferðandi.

Inntøkurnar frá ferðaavgjaldi vóru 13,7 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 18 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 19 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 7.957 | 13.673 | 15.000 | 19.000 | 20.000 | 21.000 |
| **01.Ferðaavgjald** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **7.957** | **13.673** | **15.000** | **19.000** | **20.000** | **21.000** |
| 61. Skattir og avgjøld | *7.934* | *13.625* | *15.000* | *19.000* | *20.000* | *21.000* |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *23* | *48* | - | - | - | - |

## 20.52.2.28. Umhvørvisavgjald á smyrjiolju (Ógreinað játtan)

Umhvørvisavgjald á smyrjiolju verður kravt sambært løgtingslóg nr. 75 frá 13. mai 1992 um umhvørvisgjald á smyrjiolju, við seinni broytingum. Inntøkugrundarlagið er innflutt og framleidd smyrjiolja sambært vørunr. 2710.19.81-87 í Toll- og Vøruskránni.

Avgjaldið hevur síðani 1. januar 2016 verið 2,50 kr. fyri liturin og fer til at fíggja kostnaðin av spilloljureinsingini hjá IRF.

Inntøkurnar frá umhvørvisavgjaldi á smyrjiolju vóru 3,9 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 4 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 4 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 4.795 | 3.895 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| **01.Umhvørvisgjald** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **4.795** | **3.895** | **4.000** | **4.000** | **4.000** | **4.000** |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | *4.795* | *3.895* | *4.000* | *4.000* | *4.000* | *4.000* |

### 20.52.2.30. Tinglýsingargjald (Ógreinað játtan)

Tinglýsingargjaldið verður kravt upp við heimild í løgtingslóg nr. 76 frá 17. mai 1994 um tinglýsingargjøld v.m., við seinni broytingum, og løgtingslóg nr. 8 frá 28. februar 2006 um tinglýsingaravgjald, við seinni broytingum.

Umhvørvisstovan krevur inn tinglýsingaravgjaldið. Tann 1. januar 2016 hækkaði avgjaldið til 1,0% av tinglýsta virðinum á ognini ella veðupphæddini.

Inntøkurnar frá tinglýsingargjøldum vóru 61 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 58 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 59 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 0 | - | - | - | - | - |
| Inntøkur | 55.638 | 61.047 | 61.000 | 59.000 | 60.000 | 61.000 |
| **01. Tinglýsingargjald** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **0** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 57. Rentuútreiðslur o.a. | 0 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **55.638** | **61.047** | **61.000** | **59.000** | **60.000** | **61.000** |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | *55.638* | *61.047* | *61.000* | *59.000* | *60.000* | *61.000* |

## 20.52.3. Ymsar inntøkur

### 20.52.3.04. Útluting frá partafeløgum og grunnum (Ógreinað játtan)

**Undirkonta 01. Útluting frá almennum partafeløgum**
Játtanin fevnir um vinningsbýti frá almennum partafeløgum og partafeløgum, sum landið eigur ein part av.

Fíggingargrunnurin frá 1992 varð tikin av í 2021, og eigur landið nú partabrøvini í BankNordik. Vinningsbýti frá bankanum verða frameftir inntøkuførd á hesari játtanini. Landið fekk 156,7 mió. kr. í 2021, 134,4 mió. kr. í 2022 og 47 mió. kr. í 2023 í serstøkum vinningsbýti frá BankNordik.

Væntað vinningsbýti til landið stava í høvuðsheitum frá BankNordik og Føroya Tele. Landið hevur eisini fingið vinningsbýti frá Tjaldur og nøkur ár frá Smyril-Line. Í 2022 og 2023 fekk landið vinningsbýti frá Elektron. Partabrøvini í Tjaldur vórðu seld fyrr í 2023, og eftir ætlan verða partabrøvini í Smyril-Line seld seinni í 2023.

Inntøkurnar frá vinningsbýti frá partafeløgunum vóru 166,2 mió. kr. í 2022 og verða mettar til 120,4 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 123 mió. kr. í 2024.

**Undirkonta 02. Útluting frá almennum grunnum**
Játtanin fevnir um vinningsbýti frá almennum grunnum. Broytingar í lógunum um Føroya Realkreditstovn, Húsalánsgrunnin og Búnaðargrunnin um at heimila almennu grunnunum at rinda út vinningsbýti vórðu samtyktar í desember 2012.

Ongar inntøkur vóru frá vinningsbýti frá almennu grunnunum í 2022, og verða væntandi heldur ongar í 2023. Roknað verður við 7 mió. kr. í vinningsbýti frá Realinum í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 190.113 | 166.186 | 123.500 | 130.000 | 130.000 | 100.000 |
| **01.Útluting frá almennum partafeløgum** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **190.113** | **166.186** | **120.500** | **123.000** | **123.000** | **93.000** |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *190.113* | *166.186* | *120.500* | *123.000* | *123.000* | *93.000* |
| **02.Útluting frá almennum grunnum** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-** | **-** | **3.000** | **7.000** | **7.000** | **7.000** |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | - | - | *3.000* | *7.000* | *7.000* | *7.000* |

## 20.52.3.10. Aðrar inntøkur (Ógreinað játtan)

Tað er torført at meta um inntøkurnar á hesari játtanini, tí her verða skrásettar fleiri óvanligar inntøkur, t.d. bøtur og annað tílíkt.

Aðrar inntøkur vóru netto 13,2 mió. kr. í 2022. Játtanin fyri 2023 er 3,1 mió. kr. Roknað verður við 3,1 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | -1.340 | 586 | - | - | - | - |
| Inntøkur | 2.802 | 13.812 | 3.100 | 3.100 | 3.100 | 3.100 |
| **02. Skeinkiloyvi, avgjøld** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **320** | **290** | **200** | **300** | **300** | **300** |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *320* | *290* | *200* | *300* | *300* | *300* |
| **04. Navnaprógv** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **14** | **7** | **20** | **20** | **20** | **20** |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | *14* | *7* | *20* | *20* | *20* | *20* |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **05. Bøtur** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **559** | **1.295** | **630** | **430** | **430** | **430** |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | *559* | *1.295* | *630* | *430* | *430* | *430* |
| **07. Burturlutingargjøld** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **997** | **1.125** | **1.600** | **1.700** | **1.700** | **1.700** |
| 61. Skattir og avgjøld | *997* | *1.125* | *1.600* | *1.700* | *1.700* | *1.700* |
| **09. Lóggilding av el-innleggjarum, avgjøld** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **163** | **255** | **250** | **250** | **250** | **250** |
| 25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld | *163* | *255* | *250* | *250* | *250* | *250* |
| **11. Víddargjøld oljuvinna** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **15** | **15** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 15 | 15 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **15** | **15** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *15* | *15* | - | - | - | - |
| **12. Nýtslugjald, (royalties, oljufeløg)** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **13** | **22** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 61. Skattir og avgjøld | *13* | *22* | - | - | - | - |
| **14. Bøtur útskrivaðar av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-** | **-252** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 62. Kravd gjøld, bøtur o.a. | - | *-252* | - | - | - | - |
| **60. Óvanligar inntøkur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-1.355** | **571** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 17. Avskrivingar o.a. | - | -0 | - | - | - | - |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | -1.355 | 571 | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **721** | **11.055** | **400** | **400** | **400** | **400** |
| 29. Ymsar rakstrarinntøkur | *524* | *9* | *400* | *400* | *400* | *400* |
| 64. Aðrar flytingarinntøkur | *197* | *11.046* | - | - | - | - |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *0* | - | - | - | - | - |

## Undirkonta 02. Skeinkiloyvi, avgjøld
Gjøld fyri skeinkiloyvi verða kravd sambært kunngerð nr. 3 frá 13. januar 2020 um skeinkiloyvi, hissiniloyvi og virksemi Loyvisnevndarinnar. Gjaldið fyri skeinkiloyvi fyri øll rúsdrekkasløg er 10.000 kr.

## Undirkonta 04. Navnaprógv
Gjøld fyri navnaprógv verða kravd sambært løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn, við seinni broytingum. Fyri navnaprógv verður latið eitt gjald, sum er 1.000 kr. í landskassan.

## Undirkonta 05. Bøtur
Inntøkugrundarlagið er m.a hesar bøtur:

- Parkeringarbøtur
- Sektir - kunngerð nr. 48 frá 21. juni 1985 um ásetan av dagligari sekt samb. samtíðarskattalógini (§ 125 í skattalógini)

- Fiskibøtur

**Undirkonta 07. Burturlutingargjøld**
Gjald av vinningi verður latið sambært løgtingslóg nr. 99 frá 29. desember 1998 um gjald av vinningi við burturluting v.m., við seinni broytingum. Ístaðin fyri inntøkuskatt skal verða latið gjald, sum er 15% av tí parti av vinninginum, sum er oman fyri 3.000 kr., í landskassan.

**Undirkonta 09. Løggilding av el-innleggingarfyritøkum, avgjøld**
Sambært løgtingslóg nr. 76 frá 5. mai 2021 um løggilding av elinnleggingarfyritøkum og kunngerð nr. 19 frá 22. februar 2022 um gjøld fyri løggildingar og gókenning av fakligum ábyrgdarum skal el-innleggingarfyritøka fyri at fáa og varðveita løggilding sum el-innleggjari og góðkenning av fakligum ábyrgdara gjalda eitt árligt gjald. Gjaldið er 1.500 kr., sum skal verða goldið frammanundan í seinasta lagi 15. januar í árinum.

**Undirkonta 11. Víddargjøld**
Sambært fylgiskjali til galdandi løgtingslógir um útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum skal loyvishavari rinda árligt víddargjald. Eftir nøkrum árum hækkar gjaldið árliga.

**Undirkonta 12. Nýtslugjald (royalties, oljufeløg)**
Nýtslugjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 26 frá 21. apríl 1999 um at skatta inntøkur av kolvetnisvirksemi (kolvetnisskattalógin), við seinni broytingum.

**Undirkonta 14. Bøtur útskrivaðar av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni**
Kontan er brúkt til avsetingar uppá bøtur hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

**Undirkonta 60. Aðrar inntøkur**
Játtanin er til óvanligar inntøkur og útreiðslur, sum ikki kunnu verða flokkaðar aðrastaðni.

## 20.52.5. Flytingar

### 20.52.5.01. Endurrindan av keyps-MVG (Ógreinað játtan)

Játtanin er til at miðsavna alt keyps-mvg hjá landinum. Stovnarnir rinda mvg, men verður tað hvønn mánað lyft av nýtsluni og flutt til hesa játtanina.

Endurrindanin av keyps-mvg var 297,4 mió. kr. í 2022 og verður mett til 335 mió. kr. í 2023. Torført er at meta neyvt um játtanina, men roknað verður við 335 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 295.338 | 297.411 | 310.000 | 335.000 | 335.000 | 335.000 |
| **01. Endurrindan av keyps-MVG** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **295.338** | **297.411** | **310.000** | **335.000** | **335.000** | **335.000** |
| 75. Keyps-mvg | 295.338 | 297.411 | 310.000 | 335.000 | 335.000 | 335.000 |

## 20.52.5.04. Endurrindan fyri DIS/FAS inntøkur (Ógreinað játtan)

Í sambandi við at kommunurnar yvirtóku eldraøkið frá 1. januar 2015, er partur av fíggingarleistinum, at landið flytir kommununum eina upphædd árliga. Upphæddin verður býtt millum kommunurnar, alt eftir hvussu skattagrundarlagið viðvíkjandi DIS/FAS inntøkum og ávísum frádráttum er í einstøku kommununum.

Upphæddin var 103,9 mió. kr. í 2022 og verður mett til 104 mió. kr. í 2023. Roknað verður við 103 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 105.871 | 103.865 | 103.000 | 103.000 | 103.000 | 103.000 |
| **01. Endurrindan fyri DIS/FAS inntøkur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **105.871** | **103.865** | **103.000** | **103.000** | **103.000** | **103.000** |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 105.871 | 103.865 | 103.000 | 103.000 | 103.000 | 103.000 |

# Ríkisstuðul

## 20.54.1. Heildarveiting o.t.

### 20.54.1.01. Heildarveiting o.t. (Ógreinað játtan)

Avtala varð gjørd við donsku stjórnina um ríkislóg fyri heildarveitingina fyri 2016-2019, har heildarveitingin í tíðarskeiðnum varð fastfryst á 2015-stigi, t.e. 641,8 mió. kr. Uppskot til ríkislógartilmæli um heildarveitingina fyri 2016-2019 varð soleiðis samtykt av Løgtinginum.

Ríkisstjórnin og landsstýrið avtalaðu 15. november 2019, at heildarveitingin frameftir árliga skuldi verða ásett í donsku og føroysku fíggjarlógini.

Landsstýrið hevur boðað donsku stjórnini frá, at ríkisveitingin skal lækka 25 mió. kr. um árið í 2023-2026.

Ríkisveitingin var 641,8 mió. kr. í 2022 og verður 616,8 mió. kr. í 2023, 591,8 mió. kr. í 2024, 566,8 mió. kr. í 2025 og 541,8 mió. kr. í 2026.

**Átekning**
Landsstýriskvinnuni verður heimilað at gera avtalu við donsku stjórnina um, at heildarveitingin fyri 2024 verður lækkað við 25 mió. kr. í mun til 2023.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 641.800 | 641.800 | 616.800 | 591.800 | 566.800 | 541.800 |
| **01.Heildarveiting** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **641.800** | **641.800** | **616.800** | **591.800** | **566.800** | **541.800** |
| 65. Flytingarinntøkur úr útlandinum | *641.800* | *641.800* | *616.800* | *591.800* | *566.800* | *541.800* |

# § 25 Gjaldføri

## Broytingar í virði og skuld v.m.

## 25.60.1. Ymsar broytingar

### 25.60.1.01. Broytingar í virði og skuld v.m. (Ógreinað játtan)

Gjaldføri landskassans broytist í mun til RLÚ úrslitið, sum er úrslit eftir rakstur-, løgu- og útlánsvirksemi landskassans, og í mun til afturgjalding av skuld og útvegan av gjaldføri.

Í 2024 verður roknað við, at RLÚ I úrslitið verður -63,9 mió. kr. Aftaná serinntøkur á 0,5 mió. kr. og nettoflyting til Búskapargrunnin á 224,3 mió. kr. verður RLÚ II úrslitið -287,7 mió. kr.

Roknað verður við nettolántøku á 450 mió. kr. í 2024, so gjaldførið verður mett at hækka við 162,3 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 1.168.155 | 467.631 | -312.348 | -127.958 | 73.433 | 3.877 |
| **10.Ogn** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **831.970** | **150.037** | **-312.348** | **-127.958** | **73.433** | **3.877** |
| 93. Goymslur og áogn | *-48.451* | *34.484* | - | - | - | - |
| 94. Tøkur peningur | *880.421* | *115.553* | *-312.348* | *-127.958* | *73.433* | *3.877* |
| **20.Útjavningarkonto og skuld** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **336.185** | **317.594** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 95. Útjavningarkonto | *145.421* | - | - | - | - | - |
| 98. Stuttfreistað skuld | *190.764* | *317.594* | - | - | - | - |

**Viðmerking til st.kontu 94**
Er yvirskot í fíggjarlógini eftir rakstrar-, løgu- og útlánsvirksemi, so veksur ágóðin hjá landskassanum við tí talinum. Er harafturímóti hall á gjaldførispostunum, t.d. um skattaeftirstøðurnar vaksa, so minkar tøki peningurin hjá landskassanum. Somuleiðis minkar tøki peningurin hjá landskassanum, um landskassin t.d. tekur 200 mió. kr. í láni, men skal gjalda 300 mió. kr. aftur.

Broytingin í tøkum peningi kann verða roknað sum niðanfyri (í mió. kr.):

| | |
|---|---|
| RLÚ I úrslit (úrslit eftir rakstrar-, løgu- og útlánsvirksemi) | -63,9 |
| +Serinntøkur | +0,5 |
| -Flyting í Búskapargrunnin, netto | -224,3 |
| **RLÚ II úrslit** | **-287,7** |
| + Gjaldførisbroytingar á "virði og skuld" (ikki tøkur og bundin peningur) | 0 |
| + Upptikin lán - afturgjald av lánum | +450,0 |
| = **Broyting í tøkum og bundnum peningi** | **162,3** |

**Viðmerking til st.kontu 95**
Av tí, at útjavningarkontan mestsum bara virkar sum ein tøknilig konta, so er tað mest sum ógjørligt at meta um upphæddina, sum kemur at standa á kontuni.

# Afturgjald av skuld

## 25.62.1. Afturgjald

### 25.62.1.01. Afturgjald av landskassaskuld (Ógreinað játtan)

Langfreistaða skuldin hjá landskassanum er lánsbrævaskuld, sum við ársenda 2022 var umleið 3,7 mia. kr. Marknaðarvirðið var umleið 3,5 mia. kr.

Lánsbrævaskuld áljóðandi 1,1 mia. kr. verður afturgoldin í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslujáttan | 1.380.301 | 1.598.192 | 550.000 | 1.100.000 | 1.645.000 | 900.000 |
| **01. Afturgjald** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.380.301** | **1.598.192** | **550.000** | **1.100.000** | **1.645.000** | **900.000** |
| 83. Afturgjaldan av lánum | 1.380.301 | 1.598.192 | 550.000 | 1.100.000 | 1.645.000 | 900.000 |

# Útvegan av gjaldføri

## 25.64.1. Útvegan

### 25.64.1.01. Útvegan av gjaldføri (Ógreinað játtan)

Langfreistaða skuldin hjá landskassanum er lánsbrævaskuld, sum við ársenda 2022 var umleið 3,7 mia. kr. Marknaðarvirðið var umleið 3,5 mia. kr.

Eftir ætlan verður lánsbrævaskuld á 1,55 mia. kr. upptikin í 2024. Tørvurin at taka upp lán komandi árini er tengdur at støddini á minstagjaldførinum og úrslitinum í fíggjarlógini.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | - | 1.100.000 | 900.000 | 1.550.000 | 1.645.000 | 900.000 |
| **01.Útvegan** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **-** | **1.100.000** | **900.000** | **1.550.000** | **1.645.000** | **900.000** |
| 87. Upptøka av lánum | - | *1.100.000* | *900.000* | *1.550.000* | *1.645.000* | *900.000* |

# § 53 Serinntøkur, fíggjarmál

## Fíggjarmál o.a.

### 53.15.1. Fíggjarfyrisiting v.m.

#### 53.15.1.25. Fíggingargrunnurin frá 1992, avtøka (Stuðulsjáttan)

Fíggingargrunnurin varð tikin av í 2021. Landið eigur frameftir partabrøvini beinleiðis í BankNordik. Landsins ognarlutur er umleið ein triðingur.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 523.067 | - | - | - | - | - |
| Inntøkur | 579.439 | - | - | - | - | - |
| **01. Fíggingargrunnurin frá 1992, avtøka** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **523.067** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 81. Keyp av virðisbrøvum | 523.067 | - | - | - | - | - |
| **Inntøkur** | **579.439** | **-** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 67. Rentuinntøkur og vinningsbýti | *56.373* | - | - | - | - | - |
| 86. Afturgjaldan av útlánum v.m. | *523.067* | - | - | - | - | - |

# § 56 Serinntøkur, vinnumál

## Landbúnaður

### 56.33.2. Landbúnaðarstudningur

#### 56.33.2.12. Niðurlaðing av Búnaðargrunninum (Stuðulsjáttan)

Í løgtingslóg nr. 34 frá 7. mai 2013 um Búnaðargrunn, við seinni broytingum, eru serstudningar ásettir í §§ 6 a, 6 b og 6 c.

Markaðar eru 5 mió. kr. til antikvariska serskipan í Koltri at nýta fram til 2025. Koltursætlanin hevur játtan á høvuðskontu 12.24.3.03. Søvn landsins.

Markaðar eru 5.148 tús. kr. til ábøtur á bygningar hjá Búnaðarstovuni í Kollafirði, sum hevur játtan á høvuðskontu 6.33.2.08. Búnaðarstovan *(Løgujáttan)*. Harumframt vórðu 2.500 tús. kr. játtaðar í 2022 til umvælingararbeiði av festikontu hjá Búnaðarstovuni. Hesar ábøtur verða liðugt framdar í 2023.

Búnaðargrunnurin flytur landskassanum árligu upphæddinar, í síni heild ella lutvíst, eftir umbøn frá Búnaðarstovuni.

Flytingin í 2023 væntast at vera umleið 7 mió. kr. í 2023. Roknað verður við, at flytingin verður 500 tús. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 943 | 379 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| **01.Niðurlaðing av Búnaðargrunninum** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **943** | **379** | **500** | **500** | **500** | **500** |
| 64. Aðrar flytingarinntøkur | *943* | *379* | *500* | *500* | *500* | *500* |

# § 80 Rentur

## Rentur

### 80.50.1. Rentur av skuld

#### 80.50.1.02. Frávik fyri rentuútreiðslur (Ógreinað játtan)

Eftir roknskaparmeginregluni fyri rentuútreiðslurnar verða møgulig frávik í mun til játtan skrásett sum óvanligar inntøkur ella útreiðslur undir RLÚ 2 og ávirka sostatt ikki RLÚ 1.

Í 2022 var frávik á 300,4 mió. kr. í minni rentuútreiðslum. Einki frávik fyri rentuútreiðslur er játtað í 2023. Roknað verður við ongum fráviki í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | -35.100 | -300.416 | 0 | 0 | - | - |
| **01. Frávik fyri rentuútreiðslur** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **-35.100** | **-300.416** | **0** | **0** | **-** | **-** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | -35.100 | -300.416 | 0 | 0 | - | - |

### 80.50.2. Rentuinntøkur o.t.

#### 80.50.2.02. Frávik fyri rentuinntøkur (Ógreinað játtan)

Eftir roknskaparmeginregluni fyri rentuinntøkurnar verða møgulig frávik í mun til játtan skrásett sum óvanligar inntøkur ella útreiðslur undir RLÚ 2 og ávirka sostatt ikki RLÚ 1.

Í 2022 var frávik á 246 mió. kr. í minni rentuinntøkum. Einki frávik fyri rentuinntøkur er játtað í 2023. Roknað verður við ongum fráviki í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2021 R | 2022 R | 2023 J | **2024 F** | 2025 Æ | 2026 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkujáttan | 73.241 | -246.024 | 0 | 0 | - | - |
| **01.Frávik fyri rentuinntøkur** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **73.241** | **-246.024** | **0** | **0** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *73.241* | *-246.024* | *0* | *0* | - | - |

# § 89 Búskapargrunnur

## Flytingar millum fíggjarlóg og Búskapargrunn

## 89.61.1. Búskapargrunnur

### 89.61.1.01. Flytingar í Búskapargrunn (Stuðulsjáttan)

Búskapargrunnurin er skipaður sambært løgtingslóg nr. 82 frá 7. juni 2011 um Búskapargrunn Føroya, við seinni broytingum.

Málið við Búskapargrunninum er at náa einum meira tryggum, framkomnum og sjálvbjargnum búskapi, ið tekur hædd fyri bæði núlivandi og komandi ættarliðum. Grunnurin skal eisini virka sum eitt filtur á inntøkusíðu landsins, har inntøkur, ið sveiggja nógv einstøk ár, verða javnaðar. Tilfeingisinntøkur frá fiskivinnu og alivinnu verða beindar ígjøgnum grunnin og javnaðar yvir ár, áðrenn tær verða goldnar inn í árligu løgtingsfíggjarlógina.

Búskapargrunnurin er partur av landsroknskapinum og fylgir reglunum um almenna roknskaparhaldið, tí grunnurin er ogn landsins.

**Í búskapargrunnin verður flutt:**

- 20% av fyrstu 200 mió. kr. av avlopinum í fíggjarlógini og 50% av restini.
- Tilfeingisgjøld frá fiskivinnuni
- Tilfeingisgjøld frá alivinnuni
- Tilfeingisgjøld frá kolvetnisvirksemi
- Inntøkur frá einskiljingum
- Inntøkur frá íløgurøkt grunsins

RLÚ I avlopið í 2024 verður mett til -63,9 mió. kr. Flytingin í búskapargrunnin verður mett til 805 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Útreiðslur | 566.122 | 626.923 | 699.000 | 805.000 | 957.400 | 980.600 |
| Inntøkur | 28.383 | -76.431 | - | - | - | - |
| **01. Flytingar í Búskapargrunn** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **566.122** | **626.923** | **699.000** | **805.000** | **957.400** | **980.600** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 566.122 | 626.923 | 699.000 | 805.000 | 957.400 | 980.600 |
| **Inntøkur** | **28.383** | **-76.431** | **-** | **-** | **-** | **-** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *28.383* | *-76.431* | - | - | - | - |

### 89.61.1.02. Flytingar úr Búskapargrunninum (Stuðulsjáttan)

Búskapargrunnurin er skipaður sambært løgtingslóg nr. 82 frá 7. juni 2011 um Búskapargrunn Føroya, við seinni broytingum.

Málið við Búskapargrunninum er at náa einum meira tryggum, framkomnum og sjálvbjargnum búskapi, ið tekur hædd fyri bæði núlivandi og komandi ættarliðum. Grunnurin skal eisini virka sum eitt filtur á inntøkusíðu landsins, har inntøkur, ið sveiggja nógv einstøk ár, verða javnaðar. Tilfeingisinntøkur frá fiskivinnu og alivinnu verða beindar ígjøgnum grunnin og javnaðar yvir ár, áðrenn tær verða goldnar inn í árligu løgtingsfíggjarlógina.

Búskapargrunnurin er partur av landsroknskapinum og fylgir reglunum um almenna roknskaparhaldið, tí grunnurin er ogn landsins.

**Úr búskapargrunninum verður flutt:**

- Tilfeingisgjøld upp til 250 mió. kr. frá fiskivinnuni
- Tilfeingisgjøld upp til 150 mió. kr. frá alivinnuni
- Javnað tilfeingisgjøld frá fiskivinnuni (1/7) omanfyri 250 mió. kr.
- Javnað tilfeingisgjøld frá alivinnuni (1/7) omanfyri 150 mió. kr.
- Miðal realvinningur av íløgurøkt, treytað av inntøkuvøkstri landskassans
- Afturrindan av lánsbrøvum, treytað av ogn grunsins er omanfyri 10% av BTÚ

Tilsamans verður flytingin úr búskapargrunninum mett til 580,7 mió. kr. í 2024.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| Inntøkujáttan | 446.653 | 484.426 | 517.000 | 580.700 | 647.000 | 669.400 |
| **01.Flytingar úr Búskapargrunninum** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **446.653** | **484.426** | **517.000** | **580.700** | **647.000** | **669.400** |
| 76. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | *446.653* | *484.426* | *517.000* | *580.700* | *647.000* | *669.400* |

# Fíggjarlógaruppseting

## 1. Inngangur

Dagførda fíggjarlógin er í tveimum pørtum. Sjálv lógin, ið verður nevnd *tekstur*, er skipað í greinar. Lógin hevur harafturat *viðmerkingar til tær einstøku greinarnar*.

Øll málsøki, ið ein landsstýrismaður hevur ábyrgd av, verða savnað í eina grein. Eisini eru greinar um Løgtingið, inntøkur, gjaldføri, serinntøkur, rentur og Búskapargrunn.

Í tekstpartinum eru upplýsingar um játtanarupphæddir, umframt møguligar átekningar (lógarásetingar um ræði yvir játtanum).

Í viðmerkingunum er greitt nærri frá endamáli, grundarlagi, og fyritreytum fyri teimum einstøku játtanunum. Eisini er sundurgreinað ætlan, starvsfólkayvirlit og virksemisyvirlit.

## 2. Tekstparturin á fíggjarlógaruppskotinum

Inngangurin til tekstpartin er eitt høvuðsyvirlit yvir landsins fíggjarætlan. Yvirlitið vísir samlaðar útreiðslur og inntøkur.

Fyri hvørja grein og málsøki eru í høvuðsyvirlitinum vístar rakstrarútreiðslur, inntøkur og/ella nettoútreiðslur. Rakstrarútreiðslurnar eru landsins rakstarætlan fyri rakstrarútreiðslur, og inntøkurnar er landsins rakstrarætlan fyri inntøkur. Munurin millum samlaðar útreiðslur og samlaðar inntøkur vísir yvir- ella undirskot á landsins rakstrarætlan (rakstrarsaldan).

Landsins løguútreiðslur og -inntøkur verða settar á serstaka løguætlan í høvuðsyvirlitinum.

Úrslit fyri landsins rakstrar-, løgu- og útlánsætlan (RLÚ-úrslit), er ein samanlegging av rakstrar- og løguúrslitinum.

Niðanfyri er stutt greitt frá, hvussu skilt verður ímillum rakstrarútreiðsluætlan, skattur o.t. (ætlan), og løguætlan.

*Rakstrarútreiðsluætlan* fevnir um rakstrarútreiðslur, tilskot, útlán (tó ikki útlán til alment løguvirksemi) o.a. Harumframt eru vanligar rakstrarinntøkur so sum inntøkur av tænastusølu, nýtslugjøldum og aðrar inntøkur, ið eru beinleiðis knýttar at rakstrinum. Rakstrarútreiðsluætlanin er grundarlag undir tí útreiðslupolitisku stýringini, og nettoútreiðslur á rakstrarútreiðsluætlanini svara til rakstrarkarmin fyri greinina.

*Skattur o.t.(ætlan)* fevnir um skatt, avgjøld, tvungin gjøld og ávísir (vanliga stórir) inntøkupostar, ið eru av tílíkum slag, at hesir verða skildir frá útreiðslustýringini.
Í høvuðsheitum verða inntøkur, sum sambært altjóða allýsingum verða roknaðar við í skattatrýstið, tiknar við í inntøkurakstrarætlanina.

*Løguætlanin* fevnir um landsins útreiðslur til bygging og keyp av føstum ognum o.t., umframt løgustuðul og útlán til alment løguvirksemi. Eisini fevnir løguætlanin um inntøkur, sum stava frá sølu av landsins ognum.

Aftan á høvuðsyvirlitið kemur *teksturin* til tær einstøku greinarnar. Teksturin er í trimum brotum:

*A. Yvirlit,* er yvirlit yvir játtanaruppskot fyri málsøkir og virksemi umframt búskaparliga flokking eftir slag.

*B. Játtanir*, vísa til játtanirnar, sum Løgtingið hevur samtykt.

*C. Áteknningar*, innihalda serstakar ásetingar um ræði ella heimildir til ávísa játtan.

Niðanfyri er eitt dømi um brot A. Yvirlit:

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| *tús.kr.* | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 85.113 | 85.113 | - |
| **Løgtingið** | | **85.113** | - |
| 1.10.1. Løgtingið | | 70.325 | - |
| 1.10.2. Stovnar knýttir at Løgtinginum | | 14.788 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 85.113 | - |
| Nettostýrt virksemi | 412 | 412 |
| Virksemi tilsamans | 85.525 | 412 |
| Rakstrarútreiðslur | 73.790 | - |
| Rakstrarinntøkur | - | 412 |
| Flytingarútreiðslur | 11.575 | - |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 160 | - |

Fyrst í brotinum er eitt játtanaryvirlit. Hetta vísir samlaðu játtanirnar til ymisk endamál.

Fyri hvørt virksemisøki, t.d. 1.10.1. Løgtingið, verða vístar samlaðu játtanirnar til hetta økið.

Ovast í játtanaryvirlitinum eru nettotøl fyri rakstrarútreiðslu-, inntøku- og løguætlan. Hesi tøl eru eisini við á landsins rakstrarætlan.

At enda er í brotinum eitt yvirlit yvir *útreiðslusløg.* Hetta yvirlit vísir allar útreiðslur og inntøkur, bókaðar eftir búskaparligari samanseting, tvs. rakstrar- og løguútreiðslur, inntøkur, ymisk sløg av flytingum (tilskot, stuðul v.m.) og fíggjarligir postar (t.d. útlán).

Reglan Nettostýrt virksemi er ein tekniskur millumrokningarpostur millum játtanartal og bruttovirksemi (Virksemi tilsamans). Hetta kemst av, at tað í summum førum verða veittar nettojáttanir, meðan Virksemi tilsamans inniheldur bruttotøl.

Næsta brot er B. Játtanir:

# B. Játtanir

## Løgtingið

| | Útr. | Innt. |
|---|---|---|
| | -tús. kr.- | |
| **1.10.1. Løgtingið** | | |
| 02. Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn (Lógb.j) | 11.000 | - |
| 03. Løgtingsarbeiði (Rakstrarj.) | 59.325 | - |
| **1.10.2. Stovnar knýttir at løgtinginum** | | |
| 01. Landsgrannskoðanin (Rakstrarj.) | 9.338 | - |
| 07. Løgtingsins umboðsmaður (Rasktrarj) | 5.450 | - |

Hvør einstøk upphædd er ein *játtan.* Hvørt útreiðsluøki (t.d. 1.10.1. Løgtingið) er skift sundur í *høvuðskontur*, t.d. 1.10.1.03. Løgtingsarbeiði *(Rakstrarjáttan).*

Hvør regla er um eina ávísa høvuðskontu og inniheldur 4 sløg av upplýsingum.

**Dømi:**

**1.10.1. Løgtingið**

| 03. | Løgtingsarbeiði | *(Rakstrarjáttan)* | 59.325 - |
|---|---|---|---|
| 7-sifrað høvuðskontu-nummar | Høvuðskontuheiti | Játtanarslag | Játtan (upphædd) |

*Høvuðskontunummar,* verður nýtt í viðmerking, har raðfylgjan fylgir høvuðskontunummari.

*Høvuðskontuheiti,* vísir *játtanarendamál.*

*Játtanarslag,* vísir til tær ræðisreglur, sum eru galdandi fyri høvuðskontuna.

*Játtan,* vísir ta upphædd (í túsund kr.), sum er samtykt av Løgtinginum. Fyri hvørja høvuðskontu kunnu vera játtanir fyri bæði útreiðslur og inntøkur. Játtanarslag "Rakstrarjáttan" hevur tó bara eina játtan. Hetta kemst av, at hetta játtanarslag er nettostýrt.

# 3. Viðmerkingar til fíggjarlógaruppskotið

*Viðmerkingar,* lýsa nágreinliga endamálið, og hvørjar fortreytir liggja aftan fyri hvørja játtan. Viðmerkingarnar eru savnaðar undir hvørja grein sær.

Í viðmerkingunum til hvørja grein er í innganginum eitt yvirlit. Yvirlitið vísir bæði *rakstrarætlan*, *løguætlan* og *útreiðslusløg*.

Í viðmerkingunum til tær einstøku høvuðskonturnar eru:
- Inngangur
- Sundurgreinað ætlan

og í summum førum
- Starvsfólkayvirlit og
- Virksemisyvirlit

a) Í *innganginum verður* greitt frá endamáli og grundarlagi v.m.

b) *Sundurgreinaða ætlanin* er greinað í undirkontur og standardkontur. Í bruttojáttanum (tvs. løgujáttan, lógarbundin játtan og stuðulsjáttan) verða útreiðslur og inntøkur játtaðar hvør sær. Ovast í talvuni stendur tí
- Útreiðslujáttan
- Inntøkujáttan

Greiningin vísir, hvussu ætlanin er at nýta játtanina, bæði til undirendamál og útreiðslusløg.

Fyri nettostýrd øki (tvs. rakstrarjáttanir, herundir landsfyritøkur) verður bara sett ein nettoútreiðslu-játtan.

Fyri at tað samlaða virksemið skal síggjast á tí sundurgreinaðu ætlanini, eru tølini fyri samlaðar útreiðslur og inntøkur, aftan á nettoútreiðslujáttan, við í báðum reglum.

Um játtanin verður nýtt til at rinda starvsfólki hjá landinum løn, er eisini eitt *starvsfólkayvirlit.* Í starvsfólkayvirlitinum er víst lønarupphædd og tal á fulltíðarstørvum, býtt sundur millum tey, sum ávikavist eru sett eftir lønarkarmi 37 ella hægri, og onnur. Eitt fulltíðarstarv svarar til vanliga árliga arbeiðstíð. Yvirtíð og størv, ið ikki eru fulltíðarstørv, verða umroknað til vanliga árliga arbeiðstíð.

# Kontuskipan á fíggjarlóg

Fíggjarlógin er býtt í greinar. Løgtingið, løgmaður og landsstýrimenn hava sínar serstaku greinar. Afturat hesum eru felagsgreinar fyri inntøkur, gjaldføri landskassans, serinntøkur, rentur og Búskapargrunn.

Á hvørjari grein eru játtanirnar, ið verða nevndar høvuðskontur, ásettar við einum 7 siffraðum tali. Í viðmerkingunum er hvør høvuðskonta býtt sundur í eina sundurgreinaða ætlan við 4 siffrum.

Sostatt verður ein 11 siffrað kontuskipan nýtt í fíggjarlógini, og skal bygnaðurin í kontuskipanini lýsast nærri niðanfyri.

| Siffur: | Heiti: |
|---|---|
| 1.-2. | Grein (Løgtings-, løgmans-, landsstýrismanna- ella felagsøki) |
| 3.-4. | Málsøki |
| 5. | Virksemisøki |
| 6.-7. | Høvuðskontur |
| 8.-9. | Undirkontur |
| 10.-11. | Standardkontur |

*Grein (Løgtings-, løgmans-, landsstýrismanna- ella felagsøki).* Greinabýtið virkar í høvuðsheitum soleiðis, at allar útreiðslur og inntøkur í einum Løgtings-, løgmans-, landsstýrismannaøki eru undir eini grein. Undantøk eru i inntøku- og gjaldførisgreinunum.

*Málsøki* er tað, sum ein grein verður býtt sundur í. Býtið hevur sum endamál at savna játtanir til somu endamál innan fyri landsstýrismannaøkini og at vísa týdningarmikil endamál og útreiðsluskipanir.

Siffrini undir málsøkinum eru eisini skipaði eftir altjóða stigi. Tað ber sostatt til at samanbera ta føroysku fíggjarlógina við fíggjarlógir í øðrum londum.

*Høvuðskontur* eru sjálvar játtanirnar, sum Løgtingið atkvøður um. Tá ið broytingar verða gjørdar, t.e. at upprætta, broyta ella niðurleggja høvuðskontur, verður støða tikin til hetta við fyriliti fyri endamálinum við broytingini, hvussu hóskandi hetta er fyrisitingarligt, og um broytingin hevur munandi sjálvstøðugan játtanarligan áhuga. Av tí at hesi viðurskifti koma undir § 3, 2. stk. í kunngerð um roknskaparverk landsins o.a., har tað stendur, at uppskot m.a. um lógir skulu leggjast Fíggjarmálaráðnum og Føroya gjaldstovu til góðkenningar, skal Fíggjarmálaráðið hava umbønir um broytingar til viðgerðar, áðrenn broytingin verður løgd fyri Løgtingið.

*Undirkontur*: Hesin táttur kann verða nýttur, um so er, at tað í viðmerkingunum til fíggjarlógina er neyðugt at býta eina játtan sundur í fleiri verkevni, sum t.d. at skilja innihaldið í játtanini út til tess at kunna gera funktionel hagtalslig býti ella at skilja partar av virkseminum út í inntøkufíggjað virksemi. Undirkontur eiga ikki at verða nýttar til innanvirkis stýringarendamál! Siffur á undikontu eru lutvíst ásett. Rakstrarjáttanir skulu hava undirkontur frá 20-39. Inntøkufíggjað virksemi og stuðulsfíggjað virksemi hjá stovnum skulu hava undirkontur frá 40-50. Lógarbundnar játtanir og stuðulsjáttanir skulu hava undirkontur frá 01-09. Løgujáttanir skulu hava undirkontur frá 10-19. Onnur siffur kunnu nýtast frítt. Broytingar í undirkontum krevja somu formligu mannagongd, sum tá ið høvuðskontur verða broyttar.

Tað er Fíggjarmálaráðið, sum ásetir kontuætlanina í fíggjarlógini.

*Standardkontur* eru tvørgangandi og eru lagaðar eftir teimum hugtøkum, sum m.a verða nýtt í tjóðarbúskapinum.

Fyrsta siffur vísir høvuðsslag:

| | |
|---|---|
| 1. | Rakstrarútreiðslur (11 til 19) |
| 2. | Rakstrarinntøkur (21 til 29) |
| 3. | Løguútreiðslur (31 til 32) |
| 4. | Løguinntøkur (41 til 47) |
| 5. | Flytingarútreiðslur (51 til 58) |
| 6. | Skattur og flytingarinntøkur (61 til 68) |
| 7. | Flytingar millum almennar myndugleikar (71 til 77) |
| 8. | Fíggingarpostar (81 til 89) |
| 9. | Broytingar í "Ogn" og "Skuld v.m." (91 til 99) |

Fíggjarætlanirnar í Løgtings-, løgmans-, landsstýrismanna- ella felagsøkinum verða taldar saman við at nýta omanfyristandandi høvuðssløg.

Annað siffur á standardkontuni er ein neyvari sundurgreining. T.d. verður høvuðsøki 1. Rakstrarútreiðslur greinað í hesar standardkontur:

| | |
|---|---|
| 11. | Lønir v.m. |
| 14. | Keyp av vørum og tænastum |
| 15. | Keyp av útbúnaði, netto |
| 16. | Leiga, viðlíkahald og skattur |
| 17. | Avskrivingar o.a. |
| 19. | Ymsar rakstrarútreiðslur |

Føroya gjaldstova hevur um hendi Kontuskipan landsins.

**FØROYAPRENT** | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705